

RED: 10 X



Nasjonalbibliotek

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2

LØGTINGS-TIDINDI

1944

LØGTINGSTÍÐINDI
1944

Tórshavn

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókahandils

1945

INNIHALD

Bls.

Løgtingsmenninir o. a. 1
Nevndir 2

I. Fíggjarlig viðurskifti.

1. Fíggjarstandur løgtingsins 5
2. Fíggjarætlan fyri amtsgrunnin 1945 5
3. Fíggjarætlan fyri amtsfátækragrunnin 16
4. Amtsfondsálíkningin 17
5. Løgtingsskattur 1945 17
6. Almennu fíggjarviðurskifti Føroya 33
7. Minkan av útreiðslum til tingstovnar og tingnevndir 34
8. Refusión av dýrtíðarviðbót til lærarar við eftirløn 38
9. Eykainntøkur til amtsgrunnin 40
10. Broytan av lógini um innfluttningsgjøld 47

II. Skúlamál.

1. Studningur til skúlabygningar 49
2. Virðið av frium húsum og útroknan av eftirløn lærara 52
3. Skúlaskipanin í Føroyum 54
4. Prógvtakan við læraranámskeið 65
5. Endurgjald av vikarútreiðslum 68
6. Ítróttur sum føst lærugrein 70
7. Lønin hjá læraranum í Øravík 77
8. Handverkararoynd 79
9. Sveinaprógv 82
10. Grønlandsprógv 84
11. Eykadýrtíðarviðbót til lærarar (barnatillegg) 86
12. Nýtt læraraembætí í Fuglafirði 87
13. Setan av lærarum við fólkaskúlan í Havn 88
14. Fluttningsútreiðslur 92
15. Broytan av samtykt fyri læraraskúlan 93

III. Kirkjumál.

1. Prestafluttningur 96
2. Kirkjutornið í Fuglafirði 97
3. Kirkjugarðar 98
4. Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 99

IV. Telefonmál.

1. Frágreiðing frá telefonnevndini 100
2. Hækkan av telefongjøldum 102
3. Nýtt telefonstøðarhús í Havn 103

V. Sjúkrahúsmál o. a.

1. Bróstsjúkrahúsið 105
2. Ellisheimini 108
3. Læknaviðurskifti í Havn 110
4. Bretska sjúkrahúsið í Sandavági 111

VI. Fiskivinnumál o. t.

1. Endurnýggjan av skipaflotanum 115
2. Friðan av fiskigrunni 122
3. Øðuveiða norðan fyri Streym 123
4. Broytan av grindareglugerðin 125
5. Vitatendring 129
6. Leynar sum hvalvág 130
7. Broytan av fiskivinnulógini 131
8. Vrakan av ferska og ísfiski 132
9. Ymisk sjóvinnumál 135

VII. Landbúnaðurin o. t.

1. Frágreiðing frá millumtinganevndini 136
2. Útskiftingarformenn 137
3. Høsnahald 139
4. Leigan av kongsjørðini 140
5. Frammihjá keypirættur jarðargrunnsins 140
6. Víðkan av matrikulering fyri Tórshavn 141
7. Umsókn frá Føroya smábrúkarafelag 143
8. Innflytan av íslendskum seyðakjøti o. ø. 147

VIII. Vegir, brýr og lendingar.

1. Eftirlit við vegum og lendingum 148
2. Studningur til vegir 154
3. Studningur til lendingar 157
4. Studningur til høvuðsumvølan av samferðsluvegum 161
5. Vinstrakoyrsla í Vágum 161
6. Studningur til nýmótans lið á samferðsluvegum 162
7. Vegurin Hvalvík–Saksun sum høvuðsvegur 163
8. Eykastudningur til lendingar 163

IX. Havnir o. a.

1. Ymisk havnamál 166
2. Leingjan av bryggjuni í Vestmanna 173
3. Umbøtan av bryggjuni í Miðvági 175
4. Eftirlit við havnum 178
5. Havnareglugerðin 179
6. Kavaraskeið 181

X. Ymisk lógmál.

1. Lóg um rúsdrekka 183
2. Inntøkumark fyri sjúkrakassalimir 186

3. Ellisrentulógin 188
4. Fólkatrygging 193
5. Hækkan av endurgjøldum frá Føroya vanlukkutrygging ... 193
6. Lóg um prísir og lønir 199
7. Gerðadóm viðv. arbeiðsósemju 210
8. Fólkaregistar 213
9. Banka- og sparikassaeftirlit 213
10. Mótmæli móti kunngerð av 24. juli 1944 viðv. gjald við ferskfiskasølu 220
11. Broytan av reglum um stýrið fyri Tryggingarsambandið Føroyar 222
12. Gjøld til pantafútan 224
13. Reglur um bjarging av reka 226
14. Føroyskt sum lógarmál 227
15. Valrættaraldurin 228
16. Ólavsøkuting 231
17. Økjan av seðlamongdini 232
18. Prísásetan á vørur frá øðrum londum enn Brettlandi 234
19. Frítíð við løn 236
20. Lóg um hundar 238
21. Umsókn frá Føroya motorpassacafelag 240

XI. Strandferðaskipið.

Smiril 242

XII. Kommunal mál.

1. Decisión av kommunalroknskapum 249
2. Nýggj valstøð 251
3. Kvívíkar kommuna og havnareglugerðin fyri Vestmanna ... 252
4. Tøka av lendi til Trongisvágs havn 256
5. Kommunalur jarðaskattur 261
6. Húsaleigunevnd fyri Húsavíkar kommunu 262
7. Kommunala nevndin 264
8. Kommunulán 265
9. Loyvi til kommunurnar at keypa ella selja fasta ogn 268

XIII. Ymist.

1. Decisión av løgtingsroknskapum 269
2. Landshandilin 269
3. Hini av amtmanninum og landsnevndini greiddu mál 271
4. Kolaframleiðsla 272
5. Fossamálið 282
6. Uppskrivan av orðaskifti á tingi 285
7. Byggjan av verksmiðju 286
8. Umsetan og prentan av Odysseusarkvæði og Ilionskvæði .. 287
9. Politistur í Klakksvík 288
10. Verkfrøðingurin 290
11. 28 tingmál frá javnaðarflokkinum 291
12. Myrkalegging 302
13. Alment føroyskt listarsavn 303
14. «Tjaldur» 304
15. Vørur úr Amerika 306
16. Skylda hjá peningastovnum at uppgeva rentuinntøku til skattaálíkning 313

17. Sømdarpening fyri álitisstarv 316
18. Fyrispurningur frá studentafelagnum 316
19. Umsókn frá O. J. Strømsten 318
20. Skjalasavnið 319
21. Studningur til eykapolitistar í Havn 320
22. Vitskapligt arbeiði viðvíkjandi fuglum 321
23. Uppskrivan av staðarnøvnum 322

XIV. Val av álitismonnum og nevndum 324

Tingið endaði 1. december og fundirnir vóru 94.

ÁR 1944, týsdagin 5. september kl. 13, varð Føroya løgting sett. Formaðurin, ið valdur varð í seinastu tingsetu Thorstein Petersen, tók við fundarstýrinum og lýsti, at tingið var sett. Hann bað tingmenn rópa eitt 9-falt hurra fyri konga okkara og eitt 3-falt hurra fyri Føroyum.

Tingmenn vóru hesir:

J. F. Kjølbro, Klakksvík, ffl.
Robert Joensen, Klakksvík, ffl.
O. F. Joensen, Klakksvík, sb.
A. Samuelsen, Fuglafirði, sb.
Joh. M. Fr. Poulsen, Strondum, sb.
Jens Chr. Olsen, Toftir, sb.
Poul Petersen, Tórshavn, ffl.
Rasmus Rasmussen, Fuglafirði, sj.
Jacob Fr. Øregaard, Gøtu, jm.
J. Patursson, Kirkjubø, ffl.
Th. Petersen, Tórshavn, ffl.
Ricard Long, Tórshavn, sj.
Trygve Samuelsen, Tórshavn, sb.
J. P. Henriksen, Tórshavn, jm.
Hans Iversen, Kvívík, sb.
O. J. Jensen, Tórshavn, ffl.
Johs. Slettenæs, Sandavági, ffl.
Samuel Ellefsen, Miðvági, ffl.
Anthonius Sørensen, Húsavík, ffl.
J. P. Davidsen, Sand, jm.
P. M. Dam, Tvøroyri, jm.
J. H. Danbjørg, Porkeri, jm.
Kr. Djurhuus, Tvøroyri, sb.
Andreas Djurhuus, Vági, sb.
Pauli Dahl, Tórshavn, ffl.

Til formann varð valdur Th. Petersen og til næstformann Kr. Djurhuus.

Til tingskrivarar vórðu valdir Johan Poulsen og Poul Petersen.

Fastar nevndir.

Kirkjunevndin: S. Ellefsen, Pauli Dahl, Johan Poulsen, O. F. Joensen, J. Fr. Øregaard.

Kommunala nevndin: A. Sørensen, Robert Joensen, Andr. Djurhuus, J. H. Danbjørg, R. Long.

Figgjarnevndin: Thorstein Petersen, J. F. Kjølbro, Pauli Dahl, R. Long, Johan Poulsen, Kr. Djurhuus, P. M. Dam.

Ymsamálanevndin: Thorstein Petersen, R. Rasmussen, O. F. Joensen.

Nevndin viðv. teim av landsnevndini og amtmanninum greiddu málum: P. Petersen, R. Long, Jens Chr. Olsen.

Aðrar nevndir.

Skúlanevndin: R. Long, P. Dahl, Johan Poulsen, J. H. Danbjørg, O. F. Joensen.

Fiskivinnunevndin: O. J. Jensen, J. F. Kjølbro, Kr. Djurhuus, P. M. Dam, Jens Chr. Olsen.

Smirilsnevndin: P. Dahl, A. Sørensen, Kr. Djurhuus, J. P. Davidsen, S. Ellefsen.

Havnanevndin: P. Petersen, S. Ellefsen, J. F. Kjølbro, R. Rasmussen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen.

Sociala nevndin: A. Sørensen, Johs. Slettenæs, Johan Poulsen, J. H. Danbjørg, O. F. Joensen.

Telefonnevndin: A. Sørensen, Johs. Slettenæs, O. F. Joensen, J. Fr. Øregaard, H. Iversen.

Bróstsjúkrahúsnevndin: R. Long, S. Ellefsen, Tr. Samuelsen, J. P. Henriksen, R. Rasmussen.

Nevnd viðv. Leynar sum hvalvág: A. Sørensen, R. Rasmussen, J. P. Henrsen, O. F. Joensen, Kr. Djurhuus.

Búnaðarnevndin: Poul Petersen, A. Sørensen, Kr. Djurhuus, J. P. Davidsen, J. Slettenæs.

Rúsdrekkalógin: J. Slettenæs, P. Petersen, A. Samuelsen, J. Fr. Øregaard, Johan Poulsen.

Vørunevndin: J. F. Kjølbro, S. Ellefsen, O. J. Jensen, Johs. Slettenæs, A. Samuelsen, H. Iversen, J. P. Davidsen.

Nevnd viðv. banka- og sparikassaeftirliti: J. F. Kjølbro, Pauli Dahl, Tr. Samuelsen, P. M. Dam, O. F. Joensen.

Nevnd viðv. setan av lærarum við fólkaskúlan í Havn: R. Joensen, S. Ellefsen, A. Samuelsen, J. P. Davidsen, R. Rasmussen.

Prístalsnevndin: Th. Petersen, R. Long, Kr. Djurhuus, J. P. Henriksen, P. Petersen.

Nevnd viðv. socialhjálp: P. M. Dam, A. Samuelsen, P. Petersen.

Frávikjan av tiðarfreistum.

30. november samtykti tingið við 17–0 at frávíkja teim í tingskipanini ásettu tiðarfreistum.

Øll mál, har eitki er nevnt um framløgu, vórðu framløgd 5. sept.

I. Fíggjarlig viðurskifti.

1. Roknskapir og fíggjarstandur.

Roknskapir og fíggjarstandur tingsins sí **skj. nr. 1 og 3.**

2. Fíggjarætlan fyri amtsgrunnin 1945.

Sí **skj. 2:** Uppskot frá løgtingsskrivstovuni.
1. viðgerð 19. september, 26. oktober framlagt.

Álit
(J. Poulsen og Dam við fyrivarni).

Løgtingsskrivstovan hevur fyri tingið lagt uppskot til fíggjarsamtykt fyri amtsgrunnin. Málið hevur verið viðgjørt í fíggjarnevndini, og skal nevndin til tær ymisku greinirnar gera hesar viðmerkingar og seta fram uppskot samsvarandi:

Gr. 1. Inntøkur.

ad b: *Løgtingsskattur:* Sambart viðmerkingar frá skrivstovuni hevur gjaldstovan í skrivi av 11. juli 1944 mett skattin næsta ár til at geva 2 milliónir kr., meðan skrivstovan metir hann til 2½ millión.

Nevndin hevur fingið fleiri upplýsingar hesum viðvíkjandi, serliga hvat ið støðan er broytt síðani í summar, tá hesi tøl vórðu ásett. Meðan árið 1943 gav £ 1.965.000 í bruttosølu av fiski í Bretlandi, so hevur 1944 til 1. oktober givið um leið £ 1.900.000, tað vil siga, at sølan fyri í ár kann væntast at fara at geva 1 millión kr. meira enn í fjør í minsta lagi.

Tað er viðmerkt av gjaldstovuni í juli 1944, at tað hava verið ikki so fáir undirskotstúrar, og er hetta sjálvsagt beint; gjaldstovan sigur nú frá, at einans 10 av hesum túrum nerta við teir størri skattgjaldararnar, og sum tað fyriliggur mugu fleiri av teim feløgum, ið hetta nertir við, kortini væntast at geva meira skatt næsta ár.

Sum ávist í fjør (sí tingtíðindi 1943, síðu 32) hevur tað ligið soleiðis, at um 45 pct. av skattunum komu frá teimum, ið høvdu meira enn 100.000 kr. í inntøku. Hetta er broytt í 1944, tí tølini vísa, at 15 borgarar (móti 24 í 1943) høvdu so stóra inntøku, og at 31 pct. av skattinum (móti 45 pct. í 1943) komu frá hesum borgarum. Tá so verður hugt eftir teimum borgarum, ið høvdu hesa inntøku, má nevndin vera av tí áskoðan, at tað liggur øðrvísi fyri í ár, og at mest trúligt er, at støðan næsta ár aftur verður tann, at teir ið vinna mest, koma at lata út móti 45 pct. av skattinum 1945.

Aftrat hesum kemur, at tað hevur verið meira sildaveiða í Íslandi í ár enn í fjør, meira heimafiskiskapur, og at ógvuliga munagott av peningi er vunnin av monnum, ið hava arbeitt í Íslandi.

Tá roknað verður við hesi framgongd, skal tað ikki verða nógv skeivt, at skatturin fyri 1945 kann verða mettur til væl 3 milliónir kr. Tá er ikki roknað við skattskyldu frá tryggingarfeløgum, ið kann væntast at geva í minsta lagi 150.000 kr. í 1945.

Nevndin mælir til, at skatturin í fíggjarætlanini verður settur til

2.800.000,– kr.

ad c: *Tollur:* Gjaldstovan og løgtingsskrivstovan ætla tollin næsta ár at fara at geva 500.000 kr. Tað kemur av, at fyrra hálvár 1944 hevur einans givið 360.000 kr. Gjaldstovan hevur nú upplýst, at tollurin tann 30. september 1944 hevði givið 453.068 kr., tá tað síðani er upplýst, at innfluttningsloyvi nú er givið til væl av tubakki, og at teir tríggir seinastu mánaðirnir av 1943 góvu 306.682 kr., so kann tað væntast, at árið 1944 kemur at geva 700.000 kr. í minsta lagi.

Í ár hevur verið at kalla steðgur í innfluttningi síðani 1. april og hetta kann væntast at koma at batna til næsta ár. Nevndin ætlar tí, at tað má vera beint at seta tollin til tað sama, sum hann kann væntast at geva í ár, ella til

700.000,– kr.

ad h: *Álíknað kommunum:* Løgtingsskrivstovan setur uppskot um óbroytt at seta hetta til 70.000 kr. eins og ífjør. Nevndin er samd um at ganga sama veg sum í fjør, og minka við 10.000 kr., soleiðis at álíknað verður

60.000,– kr.

Hinar greinirnar undir inntøkur verður uppskot sett um at halda óbroyttar eftir uppskoti frá løgtingsskrivstovu. Samantalt var henda grein kr. 3.156.500,00, og verður við hesum broytingum mett til samantalt:

3.646.500,– kr.

ÚTREIÐSLUR

Gr. 2. Løgting og løgtingsstovnar.

ad g: *Prentan o. a.:* Hesin peningur varð í fjørð hækkaður frá 10.000 kr. til 20.000 kr. vegna ætlanina at fáa prentað munnligt orðaskifti. Hetta er miseydnast, og verður tí skotið upp at seta peningin niður aftur til 10.000 kr.

Greinin annars óbroytt eftir uppskotinum.
Grein 2 soleiðis broytt gevur samantalt

197.000,– kr.

Gr. 3. Sjúkrahús, læknar o. t.

ad a: *Sjúkrahúsini:* Løgtingsskrivstovan skjýtur upp, at lækka hesa metan, tí roknað verður við prísfalli, eins og skrivstovan í øðrum støðum, tí roknað verður við einum prístali uppá 200 fyri 1945. Nevndin er samd um, at fíggjarætlanin má gerast eftir einum prístali uppá um leið 250 eins og tað er nú. Uppskotið er 300.000,– kr. og verður henda grein so statt at hækka til

375.000,– kr.

ad b: *Bróstsjúkrahúsið:* Av tí undir a) nevndu orsøk verður talið hækkað frá 100.000,– kr. til

125.000,– kr.

ad c: *Hvíldarheimið «Naina»:* Umsókn liggur fyri um hækkaðan studning. Nevndin heldur umsókuina vera væl grundaða og mælir tinginum til at hækka frá uppskoti 6000.– kr. til umsøktu

10.000,– kr.

ad e: *Ljósmøður:* Gjaldstovan upplýsir, at útreiðslurnar mugu væntast at verða millum 14.000 og 15.000 kr. Mælt verður til at hækka uppskotið frá 10.000 kr. til

15.000,– kr.

ad h: *Lasarettir og eykalæknahjálp:* Lasarettir kosta nógv minni nú, og næsta ár kann ikki væntast vitjan av eygnalækna. Tilmælt verður at lækka uppskotið frá 10.000,– kr. til 5.000 kr.

Greinin annars óbroytt eftir uppskotinum.
Grein 3 soleiðis broytt gevur samantalt

549.000,– kr.

Gr. 4. Skúlamál og mentunarmál.

ad a 2: *Dýrtíðarviðbót:* Tá roknað verður við einum prístali uppá 250 verður tilmælt at hækka frá 200.000 kr. til

250.000,– kr.

ad b: *Løgtingsins studentaskeið:* Lærari Haraldsen hevur søkt um at fáa eykahjálp til at gjalda húsaleigu. Hann hevur verið noyddur at leiga sær hús fyri 200 kr. um mánaðin, tí einki annað var at fáa, og hetta kann hann ikki greiða av sini vanligu løn. Nevndin mælir tinginum til at játta eykahjálp 1000 kr. árliga fyri 1944 og 1945 fyribils og ikki longri enn tey óvanligu húsaviðurskiftini í Tórshavn vara við. Uppskotið 32.000,— kr. verður at hækkað til

33.000,— kr.

ad c 3: *Studningur til læraraskúlanæmingar:* Nevndin mælir til at hækka henda studning frá 1000 kr. til

2.000,— kr.

Nevndarlimur P. M. Dam tekur fyrivarni um at hækka hesa játtan enn meira.

ad f: *Føroya Fólkaháskúli:* Mælt verður til, at studningurin verður hækkaður frá 5.000 til tað sama sum ífjør

6.000,— kr.

ad g: *Fimleikargrunnur Føroya:* Mælt verður til at halda sama studning sum ífjør og hækka uppskotið til

50.000,— kr.

ad h: *Nýggir skúlar:* Mælt verður til at hækka vegna nýggjar umsóknir til

90.000,— kr.

ad 1: *Ymiskir studningar:* Nevndin mælir til at hækka studningin til Par. 4, 1, 10: Føroya ferðamannafelag frá 300 kr. til 500 kr.

ad j: *Barnaheimið:* Mælt verður til, at studningurin verður hækkaður frá 3.000 til 5.000 kr.

Greinin annars óbroytt eftir uppskotinum.
Grein 4 soleiðis broytt gevur samantalt

675.135,— kr.

Gr. 5. Landbúnaðurin.

ad nýggj gr. h: Í tingsetuni 1943 samtykti tingið at seta 20.000 kr. av til at byggja búnaðarskúla fyri (sí tingtíðindi 1943, s. 114). Javnaðarflokkurin hevur biðið tingið viðgjørt hetta mál í ár, og er nevndin samd um at seta somu peninganøgd av í ár.

Greinin annars óbroytt eftir uppskotinum.
Grein 5 soleiðis broytt gevur samantalt

167.175,— kr.

Gr. 6. Samferðslumál.

ad a 1: *Størri havnir:* Uppskotið verður broytt til tað sama sum ífjør. Mælt verður til at seta 400.000 kr. í staðin fyri 346.375 kr.

ad b: *Vegir:* Mælt verður til, at studningurin til vegir verður settur óbroyttur frá fíggjarætlanini fyri 1944. Uppskotið 35.000,— kr. verður broytt til 450.000 kr.

ad a og b: Nevndarlimur P. M. Dam tekur fyrivarni um at seta uppskot um meira játtan til hesi virki.

ad d: *Snúril:* Tað er sagt frá, at góð framgongd er í inntøkum av ferðafólki. Mælt verður til at seta studningin til 100.000 kr.

Greinin annars óbroytt eftir uppskotinum.
Grein 6 soleiðis broytt gevur samantalt

1.210.000,– kr.

Gr. 7: Socialmál.

ad c: *Dýrtíðarviðbót v. m.:* Tað er í viðmerkingunum frá løgtingsskrivstovuni sagt frá, at hesin peningur fyri 1943 var 531.900.77 kr. Gjaldstovan upplýsir, at tað kemur av, at alt varð tikið við tá, fyri tíðarskeiðið 1. apríl 1942 til 31. desember 1943, ella fyri 7 fjórðingsár. Útreiðslurnar fyri 1944 verða um leið 365.000 kr., so 375.000 kr. eru eftir núverandi skipan ivaleyst. Mælt verður tí til at broyta uppskotið til 375.000 kr.

Nevndarlimur P. M. Dam tekur fyrivarni um uppskot, ið kann væntast at krevja nógv meira pening.

ad d: *Til grunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn:* Nevndin heldur ikki, tað er beint at seta henda studning niður. Mælt verður til, at uppskotið verður hækkað frá 5.000 til 10.000 kr.

Greinin annars óbroytt eftir uppskotinum.
Grein 7 soleiðis broytt gevur samantalt

500.000,– kr.

Gr. 8: Lógreglumál.

ad a: *Dóms- og lógreglumál:* Um so útreiðslurnar hava verið stórar í 1943, er eingin grund til at rokna við, at hetta verður at standa við. Tá bardagin er av, má ið hvussu so er roknast við stórari lækkan. Mælt verður til at lækka uppskotið frá 25.000 kr. til tær vanligu 15.000 kr.

Greinin annars óbroytt eftir uppskotinum.
Grein 8 soleiðis broytt gevur samantalt

20.000,– kr.

Gr. 9: Ymist.

Greinin óbroytt eftir uppskotinum gevur samantalt

105.000,– kr.

Gr. 10: Eftirlønir.

Greinin óbroytt eftir uppskotinum gevur samantalt

31.990,– kr.

Gr. 11: Kirkjugrunnurin.

Eins og í 1943 hevur tingið undir viðgerðini av figgjarætlan fyri kirkjugrunnin játtað ein eykastudning uppá 15.000 kr. Uppskotið frá skrivstovuni verður tí broytt soleiðis:

a. Vanligur studningur	20.000 kr.
b. Eykastudningur f. 1945	15.000 »
	35.000 kr.

Sambart hesar viðmerkingar verður uppskot sett fram til tingsamtykt um figgjarætlan fyri amtsgrunnin.

— — —

Økjan av útvarpsgrunninum er ein spurningur, ið javnaðarmenn í ár hava biðið tingið tikið til viðgerðar. Í tingsetuni 1943 (sí løgtingstíðindi 1943, s. 84) samtykti tingið at játta 30.000 kr. úr løgtingsins tiltaksgrunni til «Hin føroyska útvarpsgrunnin». Nevndin mælir til, at tað aftur í ár verða lagdar 30.000 kr. til henda grunn úr tiltaksgrunninum.

Nevndarlimur P. M. Dam er á einum máli við meirilutan um at leggja 30.000 kr. burturav, men mælir til, at tað verður tikið av figgjarætlanini og setur uppskot samsvarandi.

Framhald av peningajáttan til rentufrítt bátalán er ein annar spurningur, javnaðarmenn hava lagt inn á ting. Nevndin (undantikið Dam) vísir til, at tann peningur, ið tingið fyrr hevur útlænt til bátalán, er gingin inn í vinnulánsgrunnin, tað má tí vera beinast at tað er vinnulánsgrunnurin, ið heldur fram við hesum lánum, um tørvur er til tess. Av tí at reglugerðin fyri vinnulánsgrunnin einans gevur heimild til at læna pening út móti rentu, verður mælt til, at vinnulánsgrunnurin fær loyvi til at læna út tann pening, ið innaftur er komin fyri bátalán undir somu treytum, sum tey fyrr av tinginum játtaðu rentufríu bátalán.

Nevndarlimur P. M. Dam mælir til, at tað eins og í tingsamtykt 1941 og 1942 verður játtað 50.000 kr. av figgjarætlanini til rentufrí bátalán.

Økeypis vistarhald fyri fátækar avbygdanæmingar hava javnaðarmenn biðið tingið um at taka til viðgerðar. Nevndin (undantikið P. M. Dam) skal vísa til viðmerkingar til gr. 4 c. 8. í tingtíðindi 1943, síðu 22, har henda peningahædd er hækkað frá 3.000 kr. til 10.000 kr. við tí viðmerking, at «landsnevndin kann veita peningajáttan . . . til lærlingar, sum eru í læru burtur frá sínì heimbygd.» Hetta kann sjálvsagt ikki røkka til heilt økeypis vistarhald, men tað má kunna verða fátækum avbygdanæmingum til stóran stuðul. Meirilutin setur einki uppskot fram í hesum máli.

Nevndarlimur P. M. Dam heldur tað vera beint at miða móti at geva økeypis vistarhald til fátækar avbygdanæmingar; og mælir tí til, at játtanin undir gr. 4 c. 8. verður hækkað frá 10.000 kr. til 50.000 kr.

Rindan av tí av tinginum játtaða byggipeninginum til kommunur so hvørt sum arbeiðið fer fram, er eitt mál javnaðarmenn hava biðið tingið umhugsað. Tað er nevndini kunnugt, at landsnevndin í mongum førum hevur játtað útgjaldan av peningi, tá arbeiðið er gjørt samsvarandi tí, ið søkt verður um, um so heila arbeiðið ikki er fullgjørt og sýnað. Eisini hevur landsnevndin játtað útgjaldan av byggipeningi til 10-ára játtanir fyri meira enn tað leypandi árið, tá peningastøða tingsins hevur verið til tess. Nevndin heldur tað illa bera til at gera fastar reglur fyri hesum, men heldur tað vera beint, at landsnevndin í hvørjum einstakum tilfelli avger, um tað er beint at útgjalda pening á henda hátt. Nevndin setur uppskot um, at landsnevndin fær tílíka heimild frá tinginum.

Minnilutin (Kr. Djurhuus) tekur fyrivarni fyri, at nakað verður útgoldið, áðrenn arbeiðið er komið ávegis og styðjar so statt ikki uppskot 4 b.

Uppskot:

1. Løgtingið samtykkir uppskot til figgjarætlan fyri amtsgrunnin, samsvarandi tí í álitinum framførda, soleiðis:

gr. 1.	*Inntøkur*	3.646,500 kr.	
gr. 2.	*Útreiðslur.* Løgting og løgtingsstovnar		197.000 kr.
gr. 3.	Sjúkrahús, læknar o. t.		549.000 »
gr. 4.	Skúla- og mentunarmál		675.135 »
gr. 5.	Landbúnaðurin		167.175 »
gr. 6.	Samferðslumál		1.210.000 »
gr. 7.	Socialmál		500.000 »
gr. 8.	Lógreglumál		20.000 »
gr. 9.	Ymist		105.000 »
gr. 10.	Eftirlonir		31.990 »
gr. 11.	Kirkjugrunnurin		35.000 »
			3.490.300 kr.
	Munur		156.200 »
		3.646.500 kr.	3.646.500 kr.

Frá nevndini (undantikið Dam):

2. a. Løgtingið játtar úr løgtingsins tiltaksgrunni 30.000 kr., ið verða at leggja av í «Hin føroyska útvarpsgrunnin».

Frá minnilutanum (Dam):

b. Løgtingið játtar 30.000 kr. til «Hin føroyska útvarpsgrunnin». Peningurin verður bókaður sum nýggj grein 4. n.

Frá nevndini (undantikið Dam):

3. a. Tann peningur, ið er afturgoldin til vinnulánsgrunn Føroya løgtings av tí peningi, landsnevndin tingsins vegna lænti út til bátalán, fær stýrið fyri vinnulánsgrunninum heimild til at læna út til rentufrí bátalán eftir somu reglum sum landsnevndarlánini, ið vóru givin tingsins vegna.

Frá minnilutanum (Dam):

b. Løgtingið játtar 50.000 kr. til at nýta til rentufrí bátalán eins og í 1942. Peningurin verður bókaður sum nýggj grein 7. c.

Frá nevndini:

4. a. Tá ein kommuna sigur frá, at arbeiði, ið tingið hevur játtað byggipening til, er gjørt ella komið væl ávegis, og tá løgtingsins verkfrøðingur hevur ásannað, at so er, fær landsnevndin heimild til at ávísa hóskandi part av tingsins peningastudningi, um so er, at arbeiðið ikki er liðugt til at verða sýnað og góðtikið sum liðugt ella tó at tingsins peningajáttan er givin fyri eitt longri tíðarskeið. Landsnevndin skal í sínum avgerðum ansa eftir, at tað er samsvarandi tingsins peningastøðu í sini heild.

Frá nevndini (undantikið Kr. Djurhuus):

b. Tá tørvur er til, at ein kommuna má fáa ein minni part av eini játtan útgoldnan fyri at seta eitt arbeiði, ið tingið hevur givið peningajáttan til, í verk, kann landsnevndin í serstøkum tilfellum játta hesum, tó bert fyri ein minni part av tingsins samlaðu peningajáttan til sama arbeiði, og soleiðis at í minsta lagi helvtin av tí útgoldna peninginum verður drigin frá tí fyrstu regluligu útgjalding og hin helvtin tí næstu útgjalding uppá sama arbeiði.

Frá minnilutanum (P. M. Dam):

5. Tann undir gr. 4, c, 8, játtaði peningur verður hækkaður frá 10.000 kr. til 50.000 kr. til landsnevndina at játta til ókeypis vistarhald fyri fátækar avbygdanæmingar.

Broytingaruppskot frá J. Poulsen:

Nevndarinnar uppskot
gr. 6. Samferðslumál ..... 1.210.000 kr.
verður broytt til
gr. 6. Samferðslumál ..... 1.260.000 kr.
við tað, at Brýr og lendingar verða sett frá 250.000 kr. upp til 300.000 kr.

Munur á útreiðslusíðuni verður samstundis broyttur frá kr. 156.200 til 106.200 kr.

Minnilutaálit.

Undirskrivaði minniluti kann ganga við til meirlutans uppskot við fylgjandi viðmerkingum:

Inntøkur:

Til b: Minnilutin setur fram uppskot um deils at økja ymsar útreiðslupostar og deils um nýggjar útreiðslupostar. Til rindan av hesum útreiðslum verður sett fram uppskot um eykainntøkur við einum serligum umsetingarskatti og við at taka uppaftur javnaðarmannauppskotið um ein serligan stórmannaskatt í samband við dýrtíðarviðgeran av øllum skattainntøkum undir 6.000 kr.

Útreiðslur:

Skúla- og mentunarmál.

Dýrtíðin er nervandi fyri øll. Men hjá fátækum fólki tyngir hon so hart, at tað er ómøguligt hjá teimum at halda gávað børn sínt gangandi í avbygdaskúla. Hetta má av sonnum sigast at verða stórt spell. Evnini sita sum sagt ikki altíð hjá teimum, ið ráðini hava.

Skal fátækur næmingur kunna fara í framhaldsskúla av bygd kann hann bert gera tað við, at hitt almenna veitir honum munandi studning at rinda bøkur og vistarhald við.

Samsvarandi við henda verunleika mælir minnilutin til at hækka studningin til læraraskúlanæmingar upp í 4.000 kr. Vónandi verður so staturin eisini at førka sín studning samsvarandi upp. Aftrat hesum og teimum í meginálitinum nevndu studningum til lesandi, samanber § 4 c 4 og 8, verður mælt til at seta 50.000 kr. av til vistarhaldsstudning til treingjandi næmingar.

Høvundarnir, teir skrivandi menninir, eru høvuðsmýkjarar og

mennarar av móðurmálinum. Teir seta fólksins mentan á blað og bera hana til komandi ættarlið. Har sum hitt skrivandi liðið er fátt og litið skapandi, har stendur mál og mentun fyri vantrivnaði. I stórum londum hava skrivandi menn góð líkindi at arbeiða í, um teir eiga stórar skapandi gávur.

Tí har eru nógvir keyparar av bókum og bløðum. Men í smáum londum, har gongst verri. Og jú minni tjóðin, landið, er, tess verri.

Føroya tjóð er ein heimsins minsta. Vit eiga fáar høvundar, og korini hjá hesum eru so trong, at teir mega flestir leggja høvundastarv sítt frá sær, halda uppat, tí teir hava ikki ráð, megu nýta tíð sína til at berjast fyri dagligum breyði. Okkara mál og mentan er tí vátt undir fótum. Bera viðurskiftini okkum í sterka samvinnu við onnur lond, hvat ið vit av vinnuligum grundum vóna, kunna vit, um vit ikki ansa okkum, málsliga og mentunarliga skjótt verða útskolaðir.

Vit, ið unna føroyskum máli, føroyskari mentan, væl, vit megu gera okkum greitt, at her krevst eitt ódnartak. Og tað hastar at taka hetta takið. Eitt hitt fyrsta, ið er at gera, er at geva høvundum okkara skrivilíkindi, livilig kor. Hitt almenna skyldar, um tað unnir máli og mentan okkara væl, at ábera okkara vælaskrivarum við beinavegin at veita teim løn fyri høvundastarv teirra. Vit kunna ikki yvirlata okkara máls og mentunnar lív og lagnu yvir til «filantropi». Tí verður «filantropi» og avlopsmegi einasti súlur, ið skulu bera okkara mentunnar borg, verður hon at fúna burtur í tíðarstreymunum.

Minnilutin mælir til, at Føroya løgting veitur árliga 30.000 kr. til frama fyri høvundastarvið her á landi. Minnilutin hevur hugsað sær, at hesin peningur verður nýttur til at veita bestu høvundum okkara upp til 3.000 kr. árliga. Minsta kravið fyri at fáa lut í hesum heiðurspeningi eigur at verða, at høvundin avrikar eina bók um árið ella hevur sýnt, at hann hevur greitt av hondum virðismikið høvundastarv í árinum frammanundan, at peningurin verður givin.

Ein serlig mentunarnevnd eigur at fáa í hendi at umsita peningin.

Búnaðarmál.

Eftirlitið við mjólkaframleiðslu er við at fara burtur.

Hetta er spell.

Eitt tílíkt eftirlit hevur haft alstóran týdning í Norðanlondum har hitt almenna hevur styðjað tað. Vit eiga at gera tað sama.

Skotið verður uppá at veita 5.000 kr. sum studning til fremjan av mjólkaeftirlitsmálinum.

Hjá okkum er lambatalið í mun til ærnar nógv minni enn í øðrum londum. Hetta er óskil. Ein av høvuðsársøkunum til hetta mislyndi er óskilið við brundingini. Brundarnir eru oftast ov ringir, síga kønir menn. Mælt verður tí til at fara til eina skipan, ið tryggjar okkum, at menn einans hava góðar brundar, veðrar av góðum slag. Til fremjan av hesum eins og til gjøgnumførslu av tvungnum seyðatvátti verður mælt til at játta 6.000 kr. Búnaðarráðið eigur at fáa í hendi at gera reglur til eina tílíka skipan eins og til eina mjólkaeftirlitsskipan, men skotið verður uppá, at búnaðarfelagið fær í hendi at umsita mjólkaeftirlitið og skipanina viðvíkjandi tvungnum seyðatvátti eins og skipanina viðvíkjandi bert at nýta góðkendar brundar.

Uppdyrkingin av hagajørð er so tung og torfør, at mangur maður orkar ikki at lúka hesa uppgávu og má tí gevast í hondum á hálvari leið.

Kunnugur við, at eitt nýstovnað felag fyri smáar jarðabrúkarar hevur í umbúna at fáa í lag eina skipan, hvareftir tað skal kunna veitast monnum hjálp til at fáa meginpartin av trød sínt uppdyrkaðan í eini handavending, mælir minnilutin til at settar verða 100.000 kr. til hetta endamál.

Social mál.

Undir orðadráttinum um ellis- og avlamisspurningin varð ásannað, at ellisrentan og tann sociala forsorgin var nógv ov lítil.

Samsvarandi við hesa støðu setur minnilutin fram uppskot um at hækka peningin til ellis- og avlamisfólk samsvarandi við dýrtíðina. Ein dýrtíðarviðgerð av frádráttarpeninginum og grundpeninginum vil ætlandi koma at hækka ellis- og avlamisrentuna við um 325.000 kr., frá 375.000 kr. til 700.000 kr.

Hækkan av vega- og havnararbeiðspeninginum.

Sum mannum kunnugt fáa arbeiðsmenn fyri almenn arbeiði nógv lægri løn enn teir fáa frá privatum. Almenn arbeiði eru so statt mett eftir eini tímansløn uppá 185 oyru, meðan meðaltímansløn liggur um 250 oyru hjá privatum.

Hetta er órættvist. Munurin á hesum tímanslønum er eitt beinleiðis tilskot til hitt almenna.

Minnilutin setur uppskot um, at hækka arbeiðspeningin til vegir og havnir og onnur almenn arbeiði við um kr. 281.000. Við hesi hækking vil arbeiðarin kunna koma at halda eina meðaltímansløn uppá 250 oyru.

Havna- og vegamál.

Ein hópur av umsóknum eru um studning til ymisk havnamál. Minnilutin heldur, at tað verður neyðugt at fáa framt hesi mál og setur tí uppskot um studningsveitan.

Mælt verður til at veita eyka um 250.000 kr. árliga í 5 ár, og verður skotið uppá at leggja studningin soleiðis:

Gøtu havn	45.000 × 3/4 : 5 =	6.750,00	kr. árliga.
Vestmanna havn	150.000 × 3/5 : 5 =	18.000,00	» —
Skopunar havn	70.000 × 3/4 : 5 =	10.500,00	» —
Fuglafjarðar havn	265.000 × 3/5 : 5 =	31.800,00	» —
Klakksvikar havn	900.000 × 3/5 : 5 =	108.000,00	» —
Vágs havn	350.000 × 3/5 : 5 =	42.000,00	» —
Tvøroyra havn.....	250.000 × 3/5 : 5 =	30.000,00	» —

Tá ið trafikkhavnirnar megu sigast at hava betri inntøkulikindi enn fiskiskapshavnirnar er tilskotið til teirra sett til 3/5, meðan fiskiskapshavnunum er ætlað 3/4 í tilskot.

Í 1942 varð fyri 1943/44 og 1944/45 játtað í vegstudningi atvikavíst 3/4 av 388.763 kr. og 3/4 av 383.325 kr. ella 291.572 kr. og 287.492,25 kr.

Aftrat hesum varð játtað eyka 20.000 kr. til Eysturoy, 15.000 kr. til Sandoy, 35.000 kr. til Suðuroy, ialt eykajáttan 70.000 kr. = 35.000 kr. um árið.

Hesin peningur er gamalur prísur.

Dýrtíðarviðgjørdur er hann:

Fyri 1943/44 = (291.572,25 — 35.000,00) × 2,57 = 839.290,68 kr.
Fyri 1944/45 = (287.492,25 — 35.000,00) × 2,57 = 828.805,08 kr.

Í 1943 varð nýtt til vegagerð 1.095.037,01 kr.

Minnilutin skjýtur uppá, at til vegagerð verður settur sami peningur, sum brúktur varð í 1943, nevnliga 1.100.000 kr. Hetta er avgjørt neyðugt, tí jú longri kríggið varar, tess tyngri verður tað hjá teimum at liva, ið fáa lítið og einki av sjónum og at kalla einki lønandi arbeiði frá privatum. Tað eru hesi fólkini, ið leita sær hjálp í almennum arbeiðum sum havna- og vegagerð.

Ravmagnsspurningurin.

Millumtinganevndin, ið viðgjørdi fossamálið, hevur eitt uppskot um at leggja 300.000 kr. árliga av til hetta mál. Minnilutin kann taka undir við millumtinganevndini og mælir til at leggja nevnda pening av.

Hin samlaði meirkostnaðurin:

Læraraskúlanæmingar (4.000—2.000 kr.)	2.000 kr.
Vistarhald hjá næmingum	50.000 »
Neytamjólkaeftirlit	5.000 »
Seyðatvátt og brundseyðaskipan	6.000 »
Ellis- og avlamisrenta	325.000 »
Uppdyrkan av hagajørð	100.000 »
Uppiskoyti til arbeiðsløn	281.000 »
Nýggj havnararbeiði	250.000 »
Økjan av vegapeninginum	650.000 »
Fossamálið	300.000 »
Heiðursløn til høvundar	30.000 »
Tilsamans	1.999.000 kr.

Uppskot:

1. Í staðin fyri 1.000 kr. undir prgf. 4 c 3, Læraraskúlanæmingar, í løgtingsskrivstovuuppskotinum verður sett: 4.000 kr.
2. 30.000 kr. verða latnar eini 5-mannanevnd í hendi at nýta sum heiðursløn til okkara bestu høvundar.
3. Latið verður landsnevndini í hendi 50.000 kr. at veita avbygdanæmingum til vistarhaldsstudning.
4. Aftaná g í § 5 í løgtingsskrivstovuuppskotinum verður sett:

   h. Neytamjólkaeftirlit ..... kr. 5.000,—

   Peningurin verður latin Búnaðarfelagnum í hendi at umsita. Landbrúksráðið fær í hendi at gera ella góðkenna uppskot (frá Búnaðarfelagnum) til reglur til neytamjólkaeftirlit.

   i. Seyðatváttabrunnar og brundseyðaskipan ..... kr. 6.000,—

   Peningurin verður latin Landbrúksráðnum í hendi at umsita gjøgnum felagið fyri smáar jarðabrúkarar.
5. Í staðin fyri «*400.000*» undir c í § 7, Social mál, verður sett: «*725.000*».
6. Undir § 6 verður sett sum punkt e:

   Uppiskoyti til arbeiðsløninа við havna- og vegarbeiði 281.000,— kr.

   Sum punkt f verður sett:

   Árliga eyka í 5 ár til havnaarbeiði ..... 250.000,— kr.

   Av hesum peningi árliga at lata til:

Norðagøtu havn	6.750,— kr.
Viðkan av havnini í Vestmanna	18.000,— »
— » — » Skopun	10.500,— »
Motorbátahavn í Klakksvík	108.000,— »
Havnaverkið í Fuglafirði	31.800,— »
Viðkan av havnini í Vági	42.000,— »
— » — á Tvøroyri	30.000,— »

Í staðin fyri 350.000 kr. undir § 6 b í løgtingsskrivstovuuppskotinum verður sett: 1.100.000 kr.

7. Sum nýggj grein í løgtingsskrivstovuuppskotinum verður sett:

§ 7: Í ein ravmagnsgrunn verða at leggja 300.000,— kr. Skuldu inntøkurnar svikið, so at tær ikki koma at verða førar at rinda útreiðslurnar, verður biðað við at leggja pening í grunnin.

2. viðgerð 10. og 15. november. 3. viðgerð 1. december. Uppskotini í minnilutaálitinum (Dam) fullu 5—0. Broytingaruppskot J. Poulsens samtykt 18—0. Uppskot í nevndarálitinum 1 samtykt 23—0, pkt. 2 b fall 5—0, 2 a samtykt 14—2, pkt. 3 b fall 5—0, 3 a samtykt 20—0, 4 a samtykt 24—0, 4 b við 19—0. 5 burturdottið.

---

3. Fíggjarætlan fyri amtsfátækragrunnin.

---

1. viðgerð 19. september. Framlagt 10. oktober.

Álit.

Løgtingsskrivstovan hevur lagt fyri tingið uppskot til fíggjarætlan fyri fátækragrunn løgtingsins fyri 1945.

Inntøkurnar eru ætlaðar til 18.000,— kr. og fastar útreiðslur til 3.000,— kr. Eftir skuldi so verið 15.000,— kr. at býta millum kommunur, ið hava størri útreiðslur til fátækrahjálp o. t.

Eftir teim upplýsingum, ið eru komnar frá kommununum um teirra útreiðslur, og sum viðurskiftini annars liggja fyri, skal nevndin mæla tinginum til eins og ífjør at samtykkja at einki verður býtt út fyri árið 1945, so grunnurin kann vaksa til ringari tíðir. Serliga má nevndin viðmerkja at útreiðslurnar til fátækrahjálp o. a. eru smáar sammett við tær skattainntøkur, tær ymisku kommunurnar hava í dag.

Nevndin setur so statt fram hetta

Uppskot:

Fíggjarætlan fyri fátækragrunn løgtingsins 1945:

Inntøkur:

1.	Stórhvalagjald	0,— kr.
2.	Arvagjald	15.000,— »
3.	Gjøld fyri handilsloyvi	1.000,— »
4.	Sektir	1.000,— »
5.	Rentur	1.000,— »
		18.000,— kr.

Útreiðslur:

A.	Alimentatiónspeningur o. t.	3.000,– kr.
B.	Flutt til ognarkonto	15.000,– »
		18.000,– kr.

2. viðgerð 13. oktober. 3. viðgerð 18. oktober. Samtykt 21—0.

4. Amtsfondsálíkningin.

18. oktober framlagt.

Álit.

Amtsfondsálíkningin var í fjør 70.000,– kr. Ætlanin er at minka hesa líkning so við og við.

Fíggjarnevndin skal mæla til, at líknað verður fyri árið 1945 60.000,– kr. á kommunurnar eftir hjálagda uppskoti.

Uppskot:

Fyri 1945 verður líknað á kommunurnar 60.000.– kr. eftir hjálagda uppskoti.

Sí **skj. nr. 9.** 2. viðgerð 10. november. 3. viðgerð 16. november. Samtykt 19—0.

5. Løgtingsskattur 1945.

1. viðgerð 19. september. Framlagt 15. november.

Álit.

Reglurnar um beinleiðis skatt til løgtingið eru ásettar í lóg nr. 202 frá 15. mai 1939, og eru tað við árligum kunngerðum síðani 1941 gjørdar broytingar soleiðis, at skatturin er munandi lækkaður. Fyri skattaárið 1944 eru reglurnar ásettar í kunngerð nr. 12 frá 5. janur 1944, og spurningurin liggur nú fyri tinginum, hvussu løgtingsskatturin fyri 1945 verður at útskriva.

Løgtingsskrivstovan hevur eisini í skrivi 8. juni 1944 víst á, at kunngerðirnar nr. 11 og nr. 13 frá 5. januar 1944 um serligar avdráttarreglur fyri kommunuskatt og eykaløgtingsskatt einans galda fyri skattaárið 1944, soleiðis at tingið má umhugsa, um hesar reglur skulu endurnýggjast fyri næsta ár.

Føroya javnaðarflokkur hevur skrivað til tingið um at taka hesi mál um skattaspurningar til viðgerðar:

1. Broytan av galdandi avskrivingarreglum til skattainntøkuuppgávu.
2. Dýrtíðarviðgerð av øllum skattainntøkum, samanber uppskotið frá javnaðarmonnum á tingi ífjør.
3. Broytan av teirri kommunalu skattalógini og skipa bana á sama hátt sum løgtingsskattalógina við vaksandi stigum.
4. Millumkommunalan skatt soleiðis, at menn við stórum skattainntøkum skulu rinda eins í skatt allastaðni í Føroyum.
5. Grundvirðisøkingarskatt á sama hátt sum í okkara granna- og frændalondum.

Fíggjarnevndin, ið hevur haft hetta mál til viðgerðar, hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Minnilutin (P.M.Dam) vil mæla tinginum til at gera víttfevnandi broytingar í skattareglunum, og vil seta sína hugsan og uppskot fram í serligum minnilutaáliti.

Meirilutin (nevndin undantikið P. M. Dam) skal mæla tinginum til at endurnýggja tær reglur, ið eru ásettar í kunngerð nr. 12 frá 5. januar 1944 grein 3 fyri skattaárið 1945. Soleiðis sum tað er ávíst í nevndarálitinum í tingmáli um fíggjarætlan fyri amtsgrunnin, heldur meirilutin at inntøkurnar fyri næsta ár eftir hesum stigi kunnu metast til at geva um leið 3 milliónir kr., og vil hetta geva tinginum tær inntøkur, ið nýtast skulu sambært fíggjarætlanina.

Meirilutin (P. Dahl, J. F. Kjølbro, R. Long og Th. Petersen) skulu um grein 4 í nevndu kunngerð vísa til tað, ið meirilutin í 1943 hevur framhildið, at henda regla má sigast at vera so órættvís, at meirilutin ikki kann taka undir við at fáa hana endurnýggjaða. Líkningarráðið vísti á, hvussu órættvíst hetta kundi vera, sí álitið í 1943, og aftur í síni frágreiðing í ár mælir líkningarráðið til at taka hesa reglu av. Meirilutin setur tí uppskot fram, um, at henda reglan ikki fær gildi fyri næsta skattaár. Somuleiðis kann hesin sami meiriluti ikki vera við til at mæla tinginum til at endurnýggja kunngerð nr. 11 frá 5. januar 1944 um samsvarandi frádráttarreglur fyri kommunuskatt.

Ein minniluti (J. F. Kjølbro og Th. Petersen) kann heldur ikki mæla til at kunngerð nr. 13 frá 5. januar 1944 um eykaskatt til løgtingið verður endurnýggjað. Tílík kunngerð hevur nú verið í gildi í tvey ár, og enn hevur tað ikki av landsnevndini verið hildið neyðugt at uppkrevja skatt eftir henni. At hava tílíka kunngerð standandi í fleiri ár uttan at hon verður nýtt, má minnilutin halda vera skeivt, tí tað skapar eina ótrygd hjá skattaborgarum, ið hava rætt til, tá árið byrjar, og teir leggja sítt virki til rættis, at vita, hvat teir skulu rokna við at fáa í skatt. Eisini má tað verða framhildið, at tað so væl í november mánað kann dømast um, hvat ið skatturin vil geva árið eftir, at tílík lóg skuldi verið óneyðug, hvat eisini hevur víst seg tey tvey seinastu árini.

Ein minniluti (Kr. Djurhuus og Joh. M. Fr. Poulsen) úttala, at frádráttarreglurnar í grein 4 í kunngerð nr. 12 frá 5. januar 1944 hava nú verið í gildi í tvey ár, og tað verður ikki hildið beint at broyta tær. Minnilutin setur tí uppskot um, at kunngerðin verður endurnýggjað óbroytt

fyri árið 1945. Tá hetta verður endurnýggjað, eiga somu reglur at verða í gildi fyri kommunuskatt, og mælir minnilutin til tí eisini at endurnýggja kunngerð nr. 11 frá 5. januar 1944 fyri árið 1945.

Sami minnilutin skal til tað av javnaðarmonnum framborna spurnmál um broytan av galdandi avskrivingarreglum úttala, at tað ikki verður hildið beint at nerta við tær galdandi reglur. Í 1943 setti minnilutin uppskot um, at gera lógarreglu um, at tað kundi verða loyvt fyri skattaárið 1944 at frádraga upp til 10 pct. av tí, ein skattaborgari hevur nýtt til ymisk endamál, ið miða móti at skapa betri vinnukor her í Føroyum, men hetta uppskot varð ikki samtykt. Minnilutin heldur ikki, tað er beint at gera nakra broytan í tí, ið nú er galdandi og setur heldur ikki sama uppskot fram, sum í 1943 um ta nevndu serligu frádráttarreglu, tí tílíkt uppskot ikki kann væntast at fáa meiriluta á tingi.

Meirilutin (P. Dahl, Kr. Djurhuus, R. Long og Joh. M. Fr. Poulsen) má halda, at tað er rættast, at kunngerðin nr. 13 frá 5. januar 1944 um eykaskatt til løgtingið, um landsnevndin heldur tað er tørvur til tess, verður endurnýggjað fyri 1945. Tað er rætt at tað ikki í tvey ár hevur verið brúk fyri hesi kunngerð, men minnilutin má halda tað vera beinast at endurnýggja regluna, tó at tað í dag ikki kann ávísast, at inntøkur tingsins eru í vanda, tí skjótt kann broytan koma í øllum í so óvanligum tíðum, sum vit í dag liva í. Meirilutin setur uppskot samsvarandi.

Meirilutin (P. Dahl, J. F. Kjølbro, R. Long og Th. Petersen) má halda, at tað væl kann verða, at tað hevði stimbrað fólk til at farið undir nýggjar fyritøkur, serliga at lata byggja skip, um tað almenna gav loyvi til meiri avskriving. Avskrivingarreglurnar eru ikki beinleiðis ásettar í lógini, men teir yvirvaldsmenn, ið hava hetta um hendur, skulu meta avskrivingina eftir, hvussu nógv ár tann lutur, talan er um, kann ætlast at halda. Eftir hesum hevur tingsins skattanevnd í desember 1939 í skrivi til kommunustýrini sagt frá, at avskriving uppá skip eigur et vera sett til 2 til 7 pct. uppá skrokkin og 8 pct. uppá motorin. Tað er nevndini kunnugt, at líkningarráðið í tí seinasti tíðini hevur góðtikið eina avskriving uppá 10 pct. av øllum skipavirðinum.

Sami meirilutin heldur, at tað vil verða til stórt gagns fyri Føroyar, um tey skip, ið verða keypt í hesum dýru tíðum, verða skjótt og munagott avskrivað. Í hesum spurningi má tað sjálvandi ansast eftir, at reglurnar ikki verða seltar soleiðis, at tær ov nógv nerva tær almennu inntøkurnar eitt ár. Serliga skal nevnast, at tað kann merkjast heilt nógv, um fleiri keypa trolarar fyri um 1 millión og tað so verður loyvt teimum at avskriva t. d. 20 pct. av virðinum. Á hin hátt má tað kunna finnast ein vegur til at áseta avskrivingina soleiðis, at nýbygd skip verða avskrivað t. d. við 50 pct. innan eini 4 ella 5 ár, uttan at skaða landsins inntøkur. Væl kann tað eisini hugsast, at tað er beint at seta ymiskar avskrivingarreglur fyri skip, ið kosta um 200.000 kr. og skip, ið eru nógv dýrari. Meirilutin mælir til, at tingið biður løgtingsins skattanevnd eftir samráð við líkningarráðið taka henda spurningin til viðgerðar og áseta nýggjar avskrivingarreglur fyri skip, ið nú fáast til landið, og at tær verða gjørdar so víðar sum gjørligt uttan at nerva skattainntøkurnar.

Meirilutin (nevndin undantikið P. M. Dam) ynskir ikki at seta nakað uppskot í teimum málum, javnaðarflokkurin hevur lagt inn á ting um at dýrtíðarviðgera skattainntøku, at broyta ta kommunalu skattalógina og at seta í gildi millumkommunalan skatt og grundvirðisøkingarskatt. Meirilutin má halda, at tað ikki eru tíðir nú, til at fara undir so vittfevnandi broytingar, men at hetta má steðga, til bardagatíðin er av, og tað aftaná samráðingar er fastlagt, hvussu løgtingsins figgjarviðurskifti eiga at leggjast.

Uppskot.

A. MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM INDKOMSTSKAT TIL AMTSKOMMUNEN FOR 1945.

Frá nevndini (undantikið Dam):

§ 1.

For Skatteaaret 1945 udskrives Indkomstskatten til Amtskommunen efter de Regler og efter de Satser, som indeholdes i Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939, saaldes som denne er ændret ved Kundgørelse Nr. 12 af 5. Januar 1944.

§ 1.

Fyri skattaárið 1945 verður inntøkuskatturin útskrivaður til amtskommununa eftir teimum reglum og eftir teimum stigum, ið standa í lóg nr. 202 frá 15. mai 1939, soleiðis sum henda lóg er broytt við kunngerð nr. 12 frá 5. januar 1944.

Frá meirilutanum (P. Dahl, Kjølbro, Long og Th. Petersen):

De i § 4 i nævnte Kundgørelse Nr. 12 af 5. Januar 1944 foreskrevne særlige Fradragsregler finder dog ikke Anvendelse ved Skatteudskrivningen 1945.

Tær í § 4 í nevndu kunngerð nr. 12 frá 5. januar 1944 ásettu serligu frádráttarreglur verða tó ikki at nýta við útskrivan av skatti í 1945.

Frá nevndini (undantikið Dam):

§ 2.

Disse Bestæmmelser træder i Kraft straks.

§ 2.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

B. Frá meirilutanum (P. Dahl, Kr. Djurhuus, R. Long og Johan M. Fr. Poulsen):

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM OVERORDENTLIG INDKOMSTSKAT TIL AMTSKOMMUNEN FOR 1945.

De i Kundgørelse Nr. 13 af 5. Januar 1944 foreskrevne Regler for en overordentlig Indkomstskat til Amtskommunen for Aaret 1944, fornyes for Skatteaaret 1945, saaledes at Landsnævnet efter Tilendebringelse af Ligningen for Aaret 1945 kan beslutte, om det anses nødvendigt, at Reglerne skal sættes i Kraft med Gyldighed fra 1. Januar 1945.

Tær í kunngerð nr. 13 frá 5. januar 1944 ásettu reglur um ein eyka-inntøkuskatt fyri árið 1944 verða endurnýggjaðar fyri skattaárið 1945, soleiðis at landsnevndin, tá likningin fyri árið 1945 er liðug, kann gera av um tað verður hildið neyðugt, at reglurnar skulu setast í gildi virkandi frá 1. januar 1945.

C. Frá minnilutanum (Kr. Djurhuus og Joh. M. Fr. Poulsen):

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM FORLÆNGELSE AF GYLDIGHEDEN AF KUNDGØRELSE NR. 11 AF 5. JANUAR 1944 OM DEN KOMMUNALE BESKATNING.

§ 1.

De i Kundgørelse Nr. 11 af 5. Januar 1944 foreskrevne særlige Fradragsregler ved Paaligning af Kommuneskat for Skatteaaret 1944 fornyes for Skatteaaret 1945 (normalt Indtægten i Aaret 1944).

§ 2.

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

§ 1.

Tær í kunngerð nr. 11 frá 5. januar 1944 ásettu serligu frádráttarreglur við áliknan av kommunuskatti fyri skattaárið 1944 verða endurnýggjaðar fyri skattaárið 1945 (vanliga inntøkan í árinum 1944).

§ 2.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

D. Frá meirilutanum (Dahl, Kjølbro, Long og Th. Petersen):

Løgtingið samtykkir at biðja løgtingsins skattanevnd, eftir samráð við líkningarráðið, taka til viðgerðar spurningin um ásetan av nýggjum avskrivingarreglum fyri skip, ið nú fáast til landið, og heitir á hesar stovnar at gera reglurnar so víðar, sum tað er gjørligt uttan av nerva skattainntøkurnar.

Minnilutaálit.

Minnilutin (P. M. Dam) heldur tað vera átroðkandi neyðugt, tá ið skattað verður, at dýrtíðarviðgera tær fyrstu 6.000 kr., ið svara til tað, ið menn ætla, ein meðalfamilja brúkar. Samanber minnilutans álit í fjør í hesum spurningi, løgtingstíðindi 1943, síðu 34.

Uppskot verður sett um hesa dýrtíðarviðgeran. Hon vil gera, at allar skattainntøkur undir 2.600 kr. verða skattafriar.

Minnilutin hevur í sínum fíggjarætlanaruppskoti skotið til ymsar eykajáttanir.

1. 10 pct. hækkan av inntøkum yvir 6.000 kr.

10 pct. hækkan av øllum skatti á skattainntøkur oman fyri 6.000 kr.

2. 25 pct. hækking av skattinum av skattainntøkum yvir 50.000 kr.

Ein eyka stórmannaskatt: 25 pct. hækking av skattinum av skattainntøkunum oman fyri kr. 50.000.

Tey 10 pct. vilja geva um	kr.	200.000
og 25 pct. um	»	275.000
Tilsamans...	kr.	475.000
Herfrá verður so at taka dýrtíðarviðgerðin av teim fyrstu 6.000 —	kr.	225.000
Rein skattaøking	kr.	250.000

3. Útfluttningsavgift.

Soleiðis sum prísurin á okkara útflytingarvørum (fiski) liggur, tolir útflytingin væl at bera eina eykaavgift uppá 60 oyru uppá hvørt pundið, serliga, um skipað verður soleiðis, at henda avgift ikki kemur at nerva inntøkuna hjá tí meiniga fiskimanninum.

4. Innfluttningsavgift.

Eisini innflytingin tolir eina avgift uppá t. d. 30 oyru uppá hvørt pundið, um skipað verður so, at hon ikki ber við sær, at prísirnir á vørunum verða at vaksa.

Útflytingin liggur um £ 2.000.000, og innflytingin um £ 1.200.000.

60 oyru uppá hvørt útfluttningspundið geva	kr.	1.200.000
30 oyru uppá hvørt innfluttningspundið geva	»	360.000
Tilsamans...	kr.	1.560.000

5. Søluavgift.

Á tingi liggur mál um grundvirðisøkingarskatt.

Fyri at hesin skattur kann verða tikin á einum heilt hollum og álítandi grundarlagi, má ein virðismetan fara fram viðvíkjandi øllum føroum, verkjum, húsum, jørð o. s. fr.

Men ein tílík virðismetan er enn ikki fyrireikað, hóast mælt hevur verið mikið um hana. Her verður skotið til, at nevnd verður sett til næstu tingsetu at fyrireika og leggja til tættis tað, ið eigur at verða gjørt frá tingsins síðu fyri at hetta mál kann verða framt. At málið kann verða framt eins væl her á landi sum í øðrum, er eyðsæð.

Sum ein inntøkutáttur og eitt stig á leiðini til ein grundvirðisvaksttarskatt skjýtur minnilutin til at taka upp aftur málið um eina avgift á søluna av húsum, jørð og øðrum føstum lutum, tá ið prísurin fer upp um fríðartíðarprísin í 1939.

Hetta mál var fyri í 1942, sí løgtingstíðindi fyri hetta ár, blaðsíðu 2 í skjal 12.

Minnilutin skjýtur til at seta avgiftina væl lægri og at áseta, at hon skal verða nýtt til frama av snardyrkan av jørð við nútímans bestu maskintólum undir leiðbeining av serkønum búnaðarmonnum.

Eina tílíka avgift er ilt at meta um, hvat ið hon vil geva í peningi. Tað veldst um hugin hjá monnum til at keypa og selja. Og hesin hugur verður aftur treytaður av, hvussu tíðirnar verða at snúgva sær.

At henda avgift lættliga kann koma til at geva hundraðtúsundtals krónur ivast eingin í, um jarða- og húsasølan fer lívliga fram. Men tað er ikki vert at rokna við ov stórum tølum. Minnilutin hevur tessvegna ikki roknað við meir enn 100.000 kr.

6. Millumkommunalur skattur.

Í 1941 var málið um útjavnan millum løgtingsskatt og kommunuskatt fyri, sí løgtingstíðindi fyri hetta ár, blaðsíðu 193.

At ein tílík útjavnan er bein og vil geva tinginum fitt av peningi er eingin ívi í.

Skotið verður uppá at samtykkja uppskotið, ið tá var nevnt í álitinum.

Inntøkan av einum tílíkum skatti kann ívaleyst verða sett til 50.000 kr. Óivað vil hon verða væl meiri.

Tað er rætt og rímiligt, at hesin peningur verður brúktur at hjálpa fátækum avbygdanæmingum at læra.

Hin samlaði peningur, sum frammanfyri nevndu inntøkuleiðir vilja geva tinginum er so statt:

1.	10 pct. hækkingin	kr.	200.000
2.	25 pct. hækkingin	»	275.000
3.	Útfluttningsavgift	»	1.200.000
4.	Innfluttningsavgift	»	360.000
5.	Virðisvakstraavgift	»	100.000
6.	Millumkommunalur skattur	»	50.000
	Tilsamans	kr.	2.185.000
	Frá hesum er at taka dýrtíðarviðgerðin av fyrstu 6.000 kr. av øllum inntøkum	»	225.000
	Hin samlaða eykainntøkan	kr.	1.960.000

Hesin skattur kemur yvirhøvur ikki at nerva hin minna mannin. Tvørturímótil Um øll inntøkuuppskotini verða samtykt, vilja tey ikki bara verða tí minnimenta til stuðul og styrk í tí dagliga lívinum. Tey vilja beinan vegin bera honum ein harðliga neyðugan skattalætta.

Uppskot:

I. MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM INDKOMSTSKAT TIL AMTSKOMMUNEN FOR SKATTEAARET 1945.

§ 1.

For Skatteaaret 1945 udskrives Indkomstskat til Amtskommunen efter de i Lov for Færøerne Nr. 202 af 15. Maj 1939 indeholdte Regler med nedennævnte Ændringer.

§ 2.

Ingen Skatteyder maa ved Opgørelsen af den Skattepligtige Indkomst for Skatteaaret 1945 (normalt Indtægten i Aaret 1944) for betalte personlige Skatter til Sognekommunen (og Thorshavn Kommune) saint Amtskommunen fradrage et større Beløb end, hvad saadanne Skatter efter de for Skatteaaret 1945 gældende Regler og Ligningsprocenter (for den kommunale Skats Vedkommende Ligningsprocenterne for 1944) vilde udgøre af den skattepligtige Indkomst uden Fradrag af personlige Skatter.

§ 3.

I § 1, Stk. 4, i Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939 indskydes efter «Fradrag» følgende: «og Barnefradrag efter nedennævnte Regler» og til § 1, Stk. 4, føjes: «For hvert Barn (det er Ægtebarn, Barn udenfor Ægteskab for Moderens Vedkommende, Stifbarn, Adoptivbarn og Plejebarn, for hvis Pleje der ikke ydes vedvarende Vederlag), som ved Begyndelsen af Kalenderaaret er under 15 Aar, og som ikke har Midler til at bekoste sit eget Underhold, gives et skattefrit Fradrag, forsaavidt Indkomsten er under 2.000 Kr. paa 300 Kr.

2.000 Kr.,	men	under	3.000 Kr.	paa	250	Kr.
3.000 »	»	»	4.000 »	»	200	»
4.000 »	—	—	5.000 »	—	150	»
5.000 »	—	—	6.000 »	—	100	» »

§ 4.

Bestemmelserne i Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939 § 2, Stk. 1, affattes saaledes:

Den i § 1 omhandlede Skat erlægges efter følgende Skala:

Udgør Skatteindtægten 2.600 Kr. svares 18 Kr. 10 Øre.

Er Indtægten over:

				Kr.		Kr.		Kr.			
2.600 Kr.	m.	ikke	o.	4.000	sv.	18,10	af	2.600	og	18½ ‰	af Rest
4.000 »	»	—	»	5.000	»	44,00	»	4.000	»	21 »	» —
5.000 »	»	—	»	6.000	»	65,00	»	5.000	»	27½ »	» —
6.000 »	»	—	»	7.000	»	93,50	»	6.000	»	6½ %	» —
7.000 »	»	—	»	8.000	»	158,50	»	7.000	»	8 »	» —
8.000 »	»	—	»	10.000	»	238,50	»	8.000	»	9 »	» —
10.000 »	»	—	»	15.000	»	418,50	»	10.000	»	10 »	» —
15.000 »	»	—	»	20.000	»	918,50	»	15.000	»	13½ »	» —
20.000 »	»	—	»	30.000	»	1.593,50	»	20.000	»	16½ »	» —
30.000 »	»	—	»	40.000	»	3.243,50	»	30.000	»	22 »	» —
40.000 »	»	—	»	50.000	»	5.443,50	»	40.000	»	28 »	» —
50.000 »	»	—	»	75.000	»	8.243,50	»	50.000	»	34 »	» —
75.000 »	»	—	»	100.000	»	16.743,50	»	75.000	»	38 »	» —
100.000 »	»	—	»	200.000	»	26.243,50	»	100.000	»	40 »	» —
200.000 »	»	—	»	400.000	»	66.243,50	»	200.000	»	41 »	» —
400.000 »	og derover					148.243,50	»	400.000	»	45 »	» —

§ 5.

Det hver enkelt Skatteyder efter Reglerne i § 4 paalignede Skattebeløb forhøjes med 10 pCt., dog at saadan Forhøjelse ikke finder Sted med Hensyn til Skatteindtægter paa 6.000 Kr. og derunder.

§ 6.

Udover den i §§ 4 og 5 nævnte Indkomstskat erlægges for Skatteaaret 1945 en overordentlig Indkomstskat til Amtskommunen af enhver Skatteyder, hvis skattepligtige Indkomst, jfr. Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939 § 1, Stk. 4, som ændret ved nærværende Bestemmelsers § 3, udgør 50.000 Kr. eller derover.

Den overordentlige Indkomstskat udgør 25 pCt. af den almindelige Indkomstskats Grundbeløb (uden de 10 pCt. Tillæg, naar heri først er fradraget Grundbeløbet for en skattepligtig Indkomst paa 50.000 Kr., d. v. s. 8.243 Kr. 50 Øre).

§ 7.

Overordentlig Indkomstskat udredet i Henhold til § 6 kan ikke bringes til Fradrag ved Beregning af den skattepligtige Indkomst ved senere Skatteansættelser.

Skatten paalignes, udredes og inddrives efter samme Regler som anden personlig Skat til Amtskommunen.

§ 8.

Provenuet af den i § 6 omhandlede overordentlige Indkomstskat indgaar i Færø Amts Repartitionsfond. Hvis Overskudet for denne Fond for 1945, bortset fra den heromhandlede Skat, andrager over en Million Kr., træffer Landsnevndin nærmere Bestemmelser om Anvendelsen af Provenuet af den overordentlige Indkomstskat til Fremme af Erhvervslivet ved Henlæggelse til Vinnulánsgrunn Løgtingsins eller paa anden Maade.

§ 9.

I Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939, § 3 ændres «500» til «2.600».

§ 10.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

FYRIBILS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR UM INNTØKUSKATT TIL AMTSKOMMUNUNA FYRI SKATTAÁRIÐ 1945.

§ 1.

Fyri skattaárið 1945 verður inntøkuskattur til amtskommununa at útskriva samsvarandi teim reglum, sum eru ásettar í lóg fyri Føroyar nr. 202, 15. mai 1939, við niðanfyri nevndu broytingum.

§ 2.

Tað er ikki loyvt manni, sum greiðir skatt, tá hann ger upp skattaskyldugu inntøku sína fyri skattaárið 1945 (vanligt inntøkan fyri 1944) fyri goldnan persónligan skatt til sóknarkommununa (og Tórshavnar kommunu) og amtskommununa at frádraga meiri enn hesir skattir eftir teim fyri skattaárið 1945 galdandi reglum og likningarprocentum (viðvikjandi kommunala skattinum likningarprocentunum 1944) vildu verið av skattaskyldugi inntøkuni uttan frádrátti av persónligum skattum.

§ 3.

Í § 1, stk. 4, í lóg nr. 202, 15. mai 1939, verður sett aftaná «frádrátt» hetta: «og barnafrádrátt eftir niðanfyri nevndu reglum», og til § 1, stk. 4, verður sett: «Fyri hvørt barnið (tað er hjúnarbandsbarn, leysingabarn móðurini viðvíkjandi, sjúkbarn, adoptivbarn og fosturbarn, sum ikki verður goldið viðvarandi viðurgjald fyri at fostra), sum við byrjan av álmanakkaárinum er undir 15 ár, og sum ikki hevur ognir til harav at bera útreiðslurnar við egið undirhald, verður givin skattafríur frádráttur, um inntøkan er undir 2.000 kr., uppá 300 kr.

2.000 kr.	men	undir	3.000 kr.	uppá	250 kr.
3.000 »	—	—	4.000 »	—	200 »
4.000 »	—	—	5.000 »	—	150 »
5.000 »	—	—	6.000 »	—	100 »

§ 4.

Reglurnar í lóg nr. 202, 15. mai 1939, § 2, stk. 1, verða orðaðar so:

Skatturin, sum er umrøddur í § 1 verður greiddur eftir hesum stigum:

Er skattainntøkan 2.600 kr., verður goldið 18 kr. 10 oyru.

Er inntøkan yvir:

2.600 kr.	m.	ikki	yvir	4.000	gj.	18,10	av	2.600	og	18½ ‰	av	rest
4.000 »	»	—	—	5.000	»	44,00	»	4.000	»	21 »	»	—
5.000 »	»	—	—	6.000	»	65,00	»	5.000	»	27½ »	»	—
6.000 »	»	—	—	7.000	»	93,50	»	6.000	»	6½ %	»	—
7.000 »	»	—	—	8.000	»	158,50	»	7.000	»	8 »	»	—
8.000 »	»	—	—	10.000	»	238,50	»	8.000	»	9 »	»	—
10.000 »	»	—	—	15.000	»	418,50	»	10.000	»	10 »	»	—
15.000 »	»	—	—	20.000	»	918,50	»	15.000	»	13½ »	»	—
20.000 »	»	—	—	30.000	»	1.593,50	»	20.000	»	16½ »	»	—
30.000 »	»	—	—	40.000	»	3.243,50	»	30.000	»	22 »	»	—
40.000 »	»	—	—	50.000	»	5.443,50	»	40.000	»	28 »	»	—
50.000 »	»	—	—	75.000	»	8.243,50	»	50.000	»	34 »	»	—
75.000 »	»	—	—	100.000	»	16.743,50	»	75.000	»	38 »	»	—
100.000 »	»	—	—	200.000	»	26.243,50	»	100.000	»	40 »	»	—
200.000 »	»	—	—	400.000	»	66.243,50	»	200.000	»	41 »	»	—
400.000 » og hatyvir						148.243,50	»	400.000	»	45 »	»	—

§ 5.

Skattgjaldið, ið er álíknað hvørjum einstakum skattgreiðandi eftir reglunum í gr. 4 verður hækkað við 10 pct., tó at tílík hækkan ikki verður viðvikjandi skattainntøkum uppá 6.000 kr. og harundir.

§ 6.

Umframt inntøkuskattin, sum verður at greiða eftir §§ 4 og 5, verður at gjalda fyri skattaárið 1945 eykainntøkuskattur til amtskommununa av hvørjum skattgreiðandi, hvørs skattaskylduga inntøka sbr. lóg nr. 202, 15. mai 1939, § 1, stk. 4, sum, broytt við hesum fyriskipanum § 3, er 50.000 kr. ella meir.

Eykainntøkuskatturin er 25 pct. av grundpeningahæddini av tí vanliga inntøkuskattinum (uttan tey 10 pct. tillegg), tá herfrá fyrst er frádrigin grundpeningahæddin fyri skataskylduga inntøku uppá 50.000 kr., t. v. s. 8.243 kr. 50 oyru.

§ 7.

Eykainntøkuskattur, goldin samsvarandi § 6, kann ikki verða frádrigin við útroknan av skattskyldugari inntøku við seinri skattaásetan.

Skatturin verður álíknaður, greiddur og innheintaður eftir somu reglum sum annar persónligur skattur til amtskommununa.

§ 8.

Ágóðin av eykainntøkuskattinum eftir § 6 fer í Føroya amts repartitiónsgrunn. Um avlopið frá hesum grunni fyri 1945, burtursað frá herumtalaða skatti, er meira enn 1 mill. kr., ásetir landsnevndin nærri

reglur um nýtsluna av ágóðanum av eykaskattinum til frama fyri vinnulívið við at leggja pening til vinnulánsgrunn løgtingsins ella á annan hátt.

§ 9.

Í lóg nr. 202, 15. mai 1939, § 3, verður «500» broytt til «2.600».

§ 10.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

II. MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM ERLÆGGELSE AF EN EKSPORT- OG IMPORTAFGIFT.

§ 1.

Ved Bankernes Køb af fremmed Valuta eller Modtagelse af fremmed Valuta paa Valutakonto erlægges fra og med 1. Januar 1945 udover den i § 8 i Kundgørelse af 18. December 1940 omhandlede Afgift paa 10 Øre (Valutaafgift) en yderligere Afgift paa 60 Øre pr. Pund Sterling og for anden fremmed Valuta en tilsvarende Afgift.

Ved Bankernes Salg af fremmed Valuta eller Afgivelse af fremmed Valuta paa Valutakonto erlægges fra og med 1. Januar 1945 udover den i § 8 i Kundgørelse af 18. December 1940 omhandlede Afgift paa 10 Øre (Valutaafgift) en yderligere Afgift paa 30 Øre pr. Pund Sterling og for anden fremmed Valuta en tilsvarende Afgift.

Tilsvarende Afgifter erlægges ved Forbrug af ikke-hjemført Valuta.

§ 2.

De i § 1 omhandlede Afgifter opkræves af Bankerne og overføres maanedlig til Færøernes Oppebørselskontor. Nærmere Regler om Afgiftens Beregning og Indbetaling til Færøernes Oppebørselskontor kan fastsættes af Amtet efter indhentet Erklæring fra Lagtingets Landsnævn.

Afgifterne tilfalder Amtsfonden.

§ 3.

Ved Kalkulation af Priser for importerede Varer maa Kursen for britisk Valuta kun beregnes til 22 Kr. 60 Øre pr. Pund Sterling som hidtil og Kursen for anden fremmed Valuta i Forhold hertil.

Den i § 1 nævnte Afgift 60 Øre pr. Pund Sterling skal ingen Indflydelse have paa Afregning af Skibsbesætninger, Kaptajn og Styrmand undtagne.

§ 4.

Bestemmelserne i § 2 i Kundgørelse Nr. 39 af 23. December 1943 ophæves med Udgangen af Aaret 1944.

§ 5.

Overtrædelse og Forsøg paa Overtrædelse af de i nærværende Bestemmelser indeholdte Forskrifter eller af de i Medfør af Bestemmelserne udfærdigede Forskrifter straffes — medmindre højere Straf maatte være forskyldt efter den almindelige Lovgivning — efter Reglerne i § 16 i Kundgørelse Nr. 48 af 18. December 1940.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR
UM
INN- OG ÚTFLUTTNINGSGJALD.

§ 1.

Tá bankarnir keypa útlendskan pening ella móttaka útlendskan pening á valutakonto, skal frá og við 1. januar 1945 umframt tað í § 8 í kunngerð, 18. december 1940, ummælta gjald uppá 10 oyru (valutagjald) verða goldið eitt gjald uppá 60 oyru fyri hvørt pund sterling og eitt líknandi gjald fyri annan útlendskan pening.

Tá bankarnir selja útlendskan pening ella lata útlendskan pening á valutakonto, skal frá og við 1. januar 1945 umframt tað í § 8 í kunngerð, 18. december 1940, ummælta gjald uppá 10 oyru (valutagjald) verða goldið eitt gjald uppá 30 oyru fyri hvørt pund sterling og eitt líknandi gjald fyri annan útlendskan pening.

Tilsvarandi gjøld verða goldin, tá peningur, sum ikki er heimfluttur, verður nýttur.

§ 2.

Tey í § 1 ummæltu gjøld verða at innkrevja av bankunum og flyta eina ferð um mánaðan til gjaldstovu Føroya. Nærri reglur um útroknan av gjaldinum og rindan til gjaldstovuna kunnu verða ásettar av amtinum eftir ummæli frá landsnevnd løgtingsins.

Gjøldini fara í amtsgrunnin.

§ 3.

Við útroknan av prísi fyri innfluttar vørur má kursurin fyri bretskan pening bert verða roknaður til 22 kr. 60 oyru fyri hvørt pund sterling sum higartil og kursurin fyri annan útlendskan pening í mun hertil.

Tað í § 1 nevnda gjald 60 oyru fyri hvørt pund sterling skal onga ávirkan hava á avrokning av skipamanningum, skiparar og stýrimenn tó undantiknir.

§ 4.

Reglurnar í § 2 í kunngerð nr. 39, 23. december 1943, fara úr gildi 31. december 1944.

§ 5.

Hann, sum brýtur ella roynir at bróta ásetaninar í hesum fyriskipanum ella tar við heimild í hesum fyriskipanum gjørdu ásetanir verður at revsa — um hann ikki er strangari revsing skyldugur eftir ti vanligu lógini — eftir reglunum í § 16 í kunngerð nr. 48, 18. december 1940.

III. MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER OM VÆRDISTIGSNINGAFGIFT VED SALG AF FASTE EJENDOMME PAA FÆRØERNE.

§ 1.

Af alle faste Ejendomme paa Færøerne skal fremtidig erlægges en Amtsfonden tilfaldende Værdistigningsafgift, hver Gang de skifter Ejer ved Køb og Salg, men ikke ved Gave, Arv og Mageskifte.

Afgiften skal benyttes til Fremme af hurtig Opdyrkning af Jord med moderne Redskaber.

§ 2.

Afgiften erlægges af Værdistigningen.

Ved Værdistigningen forstaas Forskellen mellem den paagældende Ejendoms Værdi bergnet efter Prisforholdene i 1939 før Krigens Udbrud og Ejendommens Salgssum eller for Ejendomme erhvervet efter 1. September 1939 Forskellen mellem Anskaffelsessummen og Salgssummen.

Beregningen af Ejendommens Værdi i Henhold til foranstaaende foretages af Vurderingsmænd efter nærmere Regler, der fastsættes af Amtet efter Indstilling fra Landsnævnet.

§ 3.

Værdistigningsafgiften, som paahviler Køberen af en fast Ejendom, udgør:

a. 50 pCt. af Værdistigningen for udenbysboende Købere af Udmark med eventuelt tilhørende Indmark i alle Bygder med Undtagelse af Havnebygderne Vaag, Trangisvaag med Frodebø, Sørvaag, Vestmanhavn, Bygderne ved Skaalefjord, Fuglefjord og Klaksvig.
b. 15 pCt. af Værdistigningen for indenbygds boende Købere af Udmark med eventuelt tilhørende Indmark i de under a. nævnte Bygder.
c. 25 pCt. af Værdistigningen for Købere af Udmark med tilhørende Indmark i de under a. nævnte Havnebygder.
d. 25 pCt. af Værdistigningen for Købere af Trøer, Grundstykker og Husejendomme paa alle Pladser paa Færøerne.

§ 4.

Afgiften fastsættes i hvert enkelt Tilfælde af Landsnævnet og opkræves af Oppebørselskontoret efter nærmere Regler, som fastsættes af Amtet efter Indstilling fra Landsnævnet.

Afgiften forfalder til Betaling, saasnart endelig Aftale om Afhændelse er truffet, hvad enten endeligt Overdragelsesdokument er oprettet eller ej. Afgiften kan inddrives ved Udpantning.

Det paahviler saavel Køber som Sælger af en fast Ejendom at indgive til Oppebørselskontoret Anmeldelse paa Tro og Love om ethvert Køb og Salg af en fast Ejendom. Anmeldelsen angives paa Blanketter tilvejebragt af Landsnævnet og skal indeholde alle for Værdistigningsafgiften fornødne Oplysninger.

Undlader Sælgeren af en fast Ejendom at indgive den foreskrevne Anmeldelse inden 14 Dage efter Salget, hæfter han for Værdistigningsafgiftens Betaling.

§ 5.

Intet Overdragelsesdokument maa fremtidig tinglæses, medmindre det er ledsaget af den i § 4 nævnte Anmeldelse eller forsynet med Oppebørselskontorets Paategning om, at Værdistigningsafgift er erlagt, eller Landsnævnets Paategning om, at Værdistigningsafgift ikke skal erlægges.

§ 6.

Staten, Amtskommunen, Thorshavn Kommune og Sognekommunerne er fritaget for Betaling af Værdistigningsafgift ved Erhvervelse af fast Ejendom.

§ 7.

Overtrædelse af nærværende Bestemmelser straffes med Bøder, der tilfalder Amtsfonden.

§ 8.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks og saaledes, at Værdistigningsafgift betales af alle Købere, som endeligt erhverver en fast Ejendom efter Ikrafttrædelsesdagen.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR UM VIRÐISVAKSTRARGJALD VIÐ SØLU AV FØSTUM OGNUM Í FØROYUM.

§ 1.

Av øllum føstum ognum í Føroyum verður í framtíðini at rinda amtsgrunninum virðisvakstrargjald hvørja ferð tær skifta ánara við keypi og sølu, tó ikki við gávu, arvi ella makaskifti.

Gjaldið verður at nýta til snardyrkan av jørð við nútímans amboðum.

§ 2.

Gjaldið verður goldið av virðishækkanini.

Við virðishækkanina verður at skilja munurin millum virðið av viðkomandi ogn, roknað eftir prísviðurskiftunum í 1939 undan byrjanini av heimsbardaganum, og sølupeningin fyri ognina, ella fyri ognir, keyptar aftaná 1. september 1939, munurin millum keypupeningin og sølupeningin.

Útrokningin av virði ognanna eftir tí, sum frammanundan er nevnt, verður gjørd av metingarmonnum eftir nærri reglum, sum verða ásettar av amtmanninum eftir ummæli frá landsnevndini.

§ 3.

Virðisvakstrargjaldið, ið áliggur keyparanum av føstum ognum, er:

a. 50 pct. av viðisvøkstrinum fyri uttanbíggja keypara av uttangarðsjørð við møguligari viðfylgjandi innangarðsjørð í øllum bygdum uttan havnabygdunum í Vági, Trongisvági við Froðbø, Sørvági, Vestmannahavn, bygdunum á Skálafirði, Fuglafirði og Klakksvík.
b. 15 pct. av virðisvøkstrinum fyri uttanbíggja keyparar av uttangarðsjørð við møguligari viðfylgjandi innangarðsjørð í teimum undir a. nevndu bygdum.
c. 25 pct. av virðisvøkstrinum fyri keyparar av uttangarðsjørð við viðfylgjandi innangarðsjørð í teim undir a. nevndu havnabygdum.
d. 25 pct. av virðisvøkstrinum fyri keyparar av traðum, grundstykkjum og húsaognum í øllum plássum í Føroyum.

§ 4.

Gjaldið verður í hvørjum einstakum tilfelli ásett av landsnevndini og verður innheintað av gjaldstovuni eftir reglum, sum verða ásettar av amtmanninum eftir ummæli frá landsnevndini.

Gjaldið fellur til greiðslu, so skjótt endalig avtala um søluna er gjørd, um so endaligt søluskjal er uppsett ella ikki. Gjaldið kann verða innheintað við útpantan.

Tað er skylda hjá bæði keypara og seljara av fastari ogn at senda til gjaldstovuna skrivlig boð uppá æru og trúgv um hvørt keyp og hvørja sølu av fastari ogn. Boðanin verður skrivað uppá eyðubløð, sum landsnevndin fær til vega, og skal innihalda allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri virðisvakstrargjaldið.

Sendir seljari av fastari ogn ikki ta ásettu boðan innan 14 dagar aftaná søluna, hevur hann ábyrgd fyri greiðsluni av virðisvakstrargjaldinum.

§ 5.

Einki sølubræv má í framtíðini verða tinglisið, uttan at hjáløgd verður tann í § 4 nevnda boðan, ella at gjaldstovan hevur skrivað á tað, at virðisvakstrargjaldið er goldið, ella landsnevndin hevur áteknað, at virðisvakstrargjald ikki verður at greiða.

§ 6.

Ríkið, amtskommunan, Tórshavnar kommuna og sóknarkommunurnar eru fritiknar fyri rindan av virðisvakstrargjaldi við keyp av fastari ogn.

§ 7.

Brot móti hesum fyriskipanum verða revsað við sektum, sum falla til amtsgrunnin.

§ 8.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin og so, at virðisvakstrargjald verður at greiða av øllum keyparum, sum endaliga keypa fasta ogn aftaná dagin, tá fyriskipaninar koma í gildi.

IV. MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM REGULERING AF FORHOLDET MELLEM LAGTINGSSKAT OG KOMMUNESKAT.

§ 1.

I de Kommuner, hvor den kommunale Skatteprocent ligger 1 pCt. eller mere under den gennemsnitlige Skatteprocent paa Færøerne, skal de skattepligtige, hvis Skatteindtægt er over 10.000 Kr. svare til Amtskommunen som Tillægsskat et Beløb, som svarer til Forskellem mellem, hvad de skulde have betalt som Kommuneskat, hvis Skatteprocenten var den gennemsnitlige, og det Beløb, de betaler som Kommuneskat.

Af Skatteprovenuet kan ydes udenbys Elever, som gaar i Skole paa Færøerne, samt Færinger, som studerer i Udlandet, Tilskud til Bestridelse af Udgifterne vedrørende Undervisningen, Kost og Logi.

§ 2.

Lagtingets Skattudvalg udregner Færøernes gennemsnitlige Skatteprocent paa følgende Maade:

Oplysninger indhentes om Skatteprocenten i hver Kommune, Folketallet i hver Kommune afrundes til Hundreder, saaledes at overskydende Tal under 50 bortkastes og 50 og derover forhøjes. For hver Kommune multipliceres dette afrundede Folketal med Skatteprocenten, og alle disse Tal sammenlægges. Det derved fremkomne Tal devideres med det samlede afrundede Folketal paa Færøerne, og derved udfindes den gennemsnitlige Skatteprocent.

§ 3.

Oppebørselskontoret foretager derefter Udregningen af den i § 1 omhandlede Tillægsskat og opkræver samme.

Om Skattens Forfaldstid, Forrentning og Udpantning gælder de samme Regler som for personlig Skat til Amtskommunen.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR
UM
JAVNAN AV MUNINUM MILLUM LØGTINGSSKATTIN OG KOMMUNUSKATTIN.

§ 1.

Í teim kommunum, har kommunala skattaprocentið er 1 pct. ella meira lægri enn miðalskattaprocentið í Føroyum, skulu tey skattaskyldugi, hvørs skattainntøka er meir enn 10.000 kr., gjalda til amtskommununa sum tilleggsskatt eina peningahædd svarandi til munin millum, hvat tey skuldu havt goldið sum kommunuskatt, um skattaprocentið hevði verið samsvarandi miðaltalið, og tann pening, tey gjalda sum kommunuskatt.

Av skattapeninginum verður at veita avbygdanæmingum, ið lesa í Føroyum, og Føroyingum, ið lesa í útheiminum, studning til læru og vistarhald.

§ 2.

Løgtingsins skattanevnd útroknar Føroya miðalskattaprocent á henda hátt:

Upplýsingar verða at fáa til vega um skattaprocentið í hvørjari kommunu, fólkatalið í hvørjari kommunu verður avrundað til hundraðir, so at tøl, sum eru yvir eitt hundrað, men minni enn 50, verða burturkastað, og 50 og meira verða hækkað. Fyri hvørja kommunu verður hetta avrundaða fólkatalið faldað við skattaprocentinum, og øll hesi tøl verða samanløgd. Tað tal, sum harvið kemur fram, verður deilt við tí samlaða avrundaða fólkatalinum í Føroyum, og harvið verður funnið miðalskattaprocentið.

§ 3.

Gjaldstovan skipar so fyri útroknan av tí í § 1 nevnda eykaskatti og innheintar hann.

Viðvíkjandi tíðini, tá skatturin fellur til gjaldingar, rentan og útpantan galda sonnu reglur sum fyri persónligan skatt til amtskommununa.

2. viðgerð 20. november. 3. viðgerð 24. november. Minnilutauppskot (Dam) I–IV fullu 5–0. Nevndin (undantikið Dam): A. samtykt 18–0. Meirilutin (Dahl o. fl.) fall 12–0. B. (Dahl o. fl.) fall 8–0. C. (Djurhuus og Poulsen) samtykt 13–0. D (meirilutin) samtykt 13–0.

---

6. Almennu fíggjarviðurskifti Føroya.

Sí **skj. 8:** Frágreiðing frá skrivstovustjóra Edw. Mitens (framlagt 11. september).

1. viðgerð 23. oktober. Framlagt 8. november.

Álit.

Tann 11. september 1944 skrívar løgtingsskrivstovustjóri E. Mitens bræv til tingið og viðleggur eina frágreiðing um fíggjarviðurskifti Føroya, sum stjórin heldur ætlandi kann verða til nyttu við tær tíngingar og umhugsanir, sum allir flokkar í Føroyum hava úttalað, mugu og skulu fara fram aftaná heimsbardagan, og sum nú eiga at verða fyrireikaðar.

Í frágreiðingini verður framhildið, at stjórin mælir tinginum til at samtykkja, at ein millumtinganevnd fær ta uppgávu at fáa fram nærri yvirlit og upplýsingar frá øðrum londum, og at nevndin verður heimilað at taka eykahjálp til hetta arbeiði, at samráðast við tænastumenn o. s. fr.

Til nevndina, ið hevur fingið málið til viðgerðar, er komið bræv tann 24. oktober 1944 frá amtinum, hvar verður víst á, at tað ikki er beint, tá tað síðu 23 í frágreiðingini stendur: «til amtmann, sorenskrivara, fúta, skrivstovur teirra o. a. ... 300.000 kr.», tí útreiðslurnar undan krignum til hesar nevndu embætismenn og skrivstovur teirra einans var um 100.000 kr. — Skrivstovustjórin hevur tann 26. oktober 1944 sagt nevndini frá, at hetta kemur av, at hann hevur íroknað sýslumenninar, skrivstovur teirra, gjaldstovuna, løgtingsins administratión (t. d. løgtingsverkfrøðingin) og vissar útreiðslur til eftirlønir, viðlíkahald av embætishúsum o. t., og heldur stjórin fram: «tað hevði kanska verið beinari at sett aftrat nøvnini á nøkrum av hesum stovnum í staðin fyri bert at sett o. a.»

Nevndin má úttala, at tað sjálvsagt átti at verið sagt so nógv í viðmerkingunum til tølini, at tílík misfatan ikki kundi framkomið.

Nevndin skal vísa á, at A. Samuelsen og Kr. Djurhuus í tingsetuni 1943 (sí løgtingstíðindi, síðu 199) settu uppskot fram um at seta eina nevnd uppá 7 limir til at savna saman og leggja til rættis øll tey mál, tingið hevur í huga at halda fram undir samráðingum aftaná bardagatíðina. Hetta uppskot var tá ikki samtykt.

Fíggjarnevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar uttan tó at hava handfarið alt tað í frágreiðingini framførda, skal úttala, at tað má ásann-

ast, sum í stjórans skrivi framført, at allir flokkar eru greiðir yvir, at víttfevnandi samráðingar mugu fara fram við ta komandi stjórn í Danmark so skjótt, viðurskiftini gera tað møguligt. Fyri at tílíkar samráðingar ikki skulu taka ov langa tíð, og fyri at tær kunnu føra til tað úrslit sum teir ymisku flokkar nú vilja ynskja, er tað neyðugt, at so nógv tilfar er framskaffað og handfarið sum gjørligt áðrenn samráðingarnar byrja. Nevndin er tí samd um, at ein nevndarviðgerð kann verða til stórt gagn, og at nevndin skal hava atgongd til at fáa tað tilfar, henni tørvar, frá embætismonnum her.

Nevndin ynskir tó at viðmerkja, at tað ikki á henda hátt er samtykt ein nevnd til at taka upp samráðingar úteftir, líkasolítið sum tann setta nevndin á nakran hátt kann binda flokkarnar til at avmarka tað tilfar, ið kann koma uppá mál undir teim samráðingum, sum koma at fara fram. Arbeiðið hjá nevndini verður einans at skaffa til vegar mest gjørligt tilfar og handfara hetta tilfar, so tað verður lætt nýtuligt.

Uppskot:

Løgtingið samtykkir at seta eina 5 manna nevnd til at savna saman og leggja til rættis alt tað tilfar, nevndin heldur, kann verða brúk fyri til tær samráðingar, ið aftaná bardagan mugu fara fram.

Nevndin skal hava heimild til frá skrivstovunum her, at skaffa til vegar neyðturviligar upplýsingar fyri at gera tilfarsyvirlitið so fullfíggjað sum gjørligt.

2. viðgerð 11. november. Samtykt 24—0.

---

7. Minkan av útreiðslum til tingstovnar og tingnevndir.

Framlagt 11. september. 1. viðgerð 16. november. Framlagt 30. november.

Alit.

Løgtingsformaður Thorstein Petersen hevur tann 11. september 1944 lagt soljóðandi skriv á tingborð:

«Undirritaði løgtingsformaður biður hitt háttvirda ting taka til viðgerðar spurningin um at fyrireika soleiðis, at minkað verður um útreiðslurnar til tingstovnar og tingnevndir.»

Málið er beint í fíggjarnevndina, og hevur formaðurin sagt frá, at hansara hugsan við hesum máli serliga er hendan:

Landsnevndararbeiðið er vaksið ógvuliga nógv í seinastu tíðini, tó at mong mál ikki eru av so stórum týdningi, at tað verður hildið beint, at ein fimm-mannanevnd, hvar limirnir koma úr ymiskum plássum í Føroyum, má til fyri at avgera hesi mongu smámál. Formaðurin setur tí fram uppskot til umhugsunar, um at hava eina trimanna nevnd av tinglimum sitandi í Havn, til at taka upp avgreiðsluarbeiðið, ella kanska beinari til at vera ein samráðingarnevnd saman við skrivstovustjóranum, um hvørji mál ið nýtast at fara til landsnevndarviðgerð, og hvørji beinan vegin eiga at vera avgreidd av skrivstovuni.

Arbeiðið í landsnevndini vildi á henda hátt minkað og útreiðslurnar farið væl niður, eins og gerðabókin fyri landsnevndina kundi verið so mikið stytt, at gjørligt varð at prenta hana, so hvør tingmaður á henda hátt kundi fingið eitt yvirlit yvir, hvat ið hevur farið fram millum tingseturnar.

Formaðurin hevur eisini vist á, at tey mál, ið koma til viðgerðar á tingi áttu at verið betri fyrireikað, soleiðis at tað munandi kundi stytt um ta tíð, tingið má sita. Hetta vildi væl kunna verið skipað soleiðis, at ein tinglimur fyri hvønn flokk møtti í Havn einar triggjar vikur undan tingsetuni og vóru saman eina viku ella so, og løgdu til rættis, hvørjar upplýsingar, ið teir hildu kravdust aftrat, og eisini settu í gongd eitt fyrireikingararbeiði fyri sjálva tingviðgerðina við at seta upp tankar um teir møguleikar, ið serliga eiga at umhugsast í teimum ymisku málunum. Ein tílík nevnd vildi óivað gjørt, at tingið fekk nógv lættari nevndarviðgerð, og málini høvdu verið gjøllari umhugsað, enn tað ofta eru stundir til undir sjálvari tingsetuni, har fundir taka so stóran part av tíðini.

Tann triðji spurningurin er at umhugsa at gera arbeiðið biligari fyri tað almenna. Tann tíð kann skjótt koma, tá tað ikki verður so lætt hjá tingsins køssum at rinda stóran pening fyri tingnevndararbeiði, og tað eigur tí at verða umhugsað, hvussu hetta kann fáast í lag.

Nevndin hevur býtt seg í meiriluta og minniluta. Minnilutin (P. M. Dam) hevur givið serligt álit.

Meirilutin (nevndin uttan Dam) úttalar, at sjálvandi eigur at ansast væl eftir, at tað ikki verður nýttur meiri peningur til tað almenna húsarhaldið, enn neyðugt er. Tað ber tó ikki til undir tingsetuni at fáa greiði á, hvat allar tær ymisku nevndir hava kostað, ella fáa eitt yvirlit, soleiðis at tað kann setast uppskot fram um at bøta uppá ta skipan, ið higartil hevur verið, um tað er gjørligt at spara nakað. Meirilutin er tí samdur um, at av landsnevndini verður fyrireikað, at tað fæst eitt yvirlit yvir allar tær útreiðslur, tingið hevur til ymiskar stovnar og nevndir. Eisini eigur tað at skaffast til vegar eitt yvirlit yvir, hvat tær ymisku skrivstovur kosta, og hvussu teirra arbeiði er lagt til rættis, fyri at tað kann verða kannað, um tað ikki eisini kann sparast nakað.

Meirilutin úttalar, at tað av landsnevndini eigur at verða umhugsað: at skipað verður soleiðis, at ein 3-manna nevnd í Havn fær í hendi at arbeiða saman við løgtingsskrivstovuni um avgreiðslumál, meðan størri mál verða vist til landsnevndina, og avgreiðslunevndin einans útvegar, at tílík mál verða væl upplýst, áðrenn tey koma til landsnevndarviðgerð. Landsnevndin verður annars skipað sum ein 5-manna nevnd, soleiðis sum vanligt hevur verið tey seinastu árini.

Meirilutin kann eisini mæla til, at landsnevndin umhugsar at seta eina trímannanevnd til at fyrireika tey mál, ið koma inn til næstu vanligu tingsetu.

Eftir uppskoti frá einum landsnevndarlimi verður við hesum áliti lagt eitt yvirlit yvir ferðaútreiðslur og dagpening hjá teimum føstu landsnevndarlimunum í tíðarskeiðinum 1940—44. Annars verður seinri at skaffa yvirlit yvir aðrar nevndir.

Uppskot:

1. Løgtingið velur eina 5-manna landsnevnd til at virka til næstu vanligu tingsetu.
2. Landsnevndin fær upp í hendi at skaffa eitt yvirlit yvir tingsins útreiðslur til allar tingnevndir og skrivstovur, ið tingið letur kostnaðin til, soleiðis at næsta tingseta kann taka støðu til, hvat kann gerast fyri at minka um hesar útreiðslur tingsins.

*

YVIRLIT

Ferðaútreiðslur og dagpeningar í tíðarskeiðinum 1940—44.

	Fundardagar:	Krónur:	Ferðadagar:	Krónur:	Ferðaútreiðsl.:	Ialt:
1940:						
A. Samuelsen	55	660,00	17	102,00	116,00	878,00
Kr. Djurhuus	13	156,00	16	96,00	0,00	252,00
Th. Petersen	40	240,00	0	0,00	0,00	240,00
Poul Petersen	10	60,00	0	0,00	0,00	60,00
P. M. Dam	58	696,00	18	108,00	231,00	1.035,00
					Ialt	2.465,00
1941:						
A. Samuelsen	55	660,00	21	126,00	193,50	979,50
Kr. Djurhuus	31	360,00	0	0,00	39,00	399,00
Th. Petersen	12	72,00	0	0,00	0,00	72,00
Poul Petersen	46	276,00	0	0,00	0,00	276,00
P. M. Dam	56	672,00	24	144,00	329,00	1.145,00
					Ialt	2.871,50
1942:						
A. Samuelsen	47	564,00	40	240,00	128,00	932,00
Kr. Djurhuus	11	132,00	6	36,00	25,00	193,00
Th. Petersen	27	162,00	0	0,00	0,00	162,00
Poul Petersen	21	126,00	0	0,00	0,00	126,00
P. M. Dam	28	336,00	10	60,00	239,00	635,00
					Ialt	2.048,00
1943:						
A. Samuelsen	35	975,08	32	454,82	115,00	1.544,90
Kr. Djurhuus	14	399,48	15	215,42	36,00	650,90
Th. Petersen	12	172,12	0	0,00	0,00	172,12
Poul Petersen	23	324,67	0	0,00	0,00	324,67
P. M. Dam	30	849,32	17	243,23	280,00	1.372,55
					Ialt	4.065,14
1944:						
A. Samuelsen	41	1.184,20	23	331,55	125,00	1.640,75
Kr. Djurhuus	32	927,68	14	203,07	0,00	1.130,75
Th. Petersen	40	597,85	0	0,00	0,00	597,85
Poul Petersen	42	611,80	0	0,00	0,00	611,80
P. M. Dam	37	1.066,28	21	301,47	346,00	1.713,75
					Ialt	5.694,90

Samandráttur:	Fundar-dagar:	Krónur:	Ferða-dagar:	Krónur:	Ferða-útreiðsl.:	Ialt:
A. Samuelsen.....	233	4.043,28	133	1.254,37	677,50	5.975,15
Kr. Djurhuus.....	101	1.975,16	51	550,49	100,00	2.625,65
Th. Petersen.....	131	1.243,97	0	0,00	0,00	1.243,97
Poul Petersen	142	1.398,47	0	0,00	0,00	1.398,47
P. M. Dam	209	3.619,60	90	856,70	1.425,00	5.901,30
					Ialt...	17.144,54

Minnilutaálit.

Minnilutin (P. M. Dam) heldur fram:

Tað er sjálvandi av stórum týdningi, at hin almenna umsitingin er so bílig sum yvirhøvur møguligt uttan at skerja ídni og ábyrgdarkensluna hjá teim, ið hava fingið umsitingarstarvið lítið í hendi.

Men tað má ikki vera soleiðis skipað, at flestir menn megu bera seg undan at átaka sær almont umsitingarstarv, tí teir ikki hava ráð og figgjarligar umstøður til tess.

Allir menn og allar kvinnur, ið hava hug og gávur at átaka sær almont starv, og ikki bara ríkmenn, skulu kunna gera tað.

Tað má vera soleiðis skipað her á landi, at ein arbeiðari, skúlalærari, kantórmaður og ein og hvør lágløntur maður ikki skal fáa beinleiðis tap av almennum umsitingarstarvi. Ein arbeiðari, fiskimaður, skúlalærari og tilíkir lágløntir menn hava ikki umstøður at missa nakað av sínum smáu inntøkum, ið illa røkka til minsta kravið hjá manni viðvikjandi føði, klæðum, húsi o. ø.

17.144,54 kr. sum hin viðkaða landsnevndin hevur kostað í hesi 5 kríggsárini, tá ið hon beinleiðis hevur haft ábyrgd og størv sum ein ríkisstjórn, ministerium, má sigast at vera ótrúliga bílig umsiting.

Valla munnu nakrir 5 ríkisstjórnarlimir í heiminum í hesi 5 kríggsárini hava kostað landi sínum tilsamans so lítið sum kr. 3.428,91 — trý túsund fýra hundrað átta og tjúgu krónur 91 oyru — um árið, ikki meiri enn ein lítil brotspartur av, hvat einstøk privat virki geva einum av sínum tænara í tanticmu í eitt ár.

Og í hesum kr. 3.428,91 er eisini ein partur av kostnaðinum av øðrum millumtinganevndarstørvum. Bæði landsnevndarformaðurin A. Samuelsen og undirskrivaði minniluti hava av tí, at teir hava sitið sum landsnevndarlimir, kunnað røktað starv í fleiri øðrum føstum nevndum uttan eitt einasta oyra í samsýning ella í útreiðslu fyri hitt almenna. Av tílíkum fullkomuliga óløntum nevndarstørvum, ið undirskrivaði minniluti í øllum ella stórum parti av hesum kríggsárum hevur røktað uttan fyri landsnevndararbeiðið, kunnu verða nevnd umsitingarstørvini sum vinnulánsgrunnsformaður, sjúkrahússtjórnarlimur, vørunevndarlimur (eri nú farin út), limur í stýrinum fyri vanlukkutryggingina (eri nú farin út), formaður í millumtinganevndini viðvikjandi ymsum sjóvinnumálum, skúlastjórnarlimur.

Hvussu nógvar fundardagar hesi ólønaði millumtinganevndarstørv hava kravt, hevur minnilutin ikki fingið stundir at kanna viðvíkjandi øllum nevndunum. Men nevnt kann verða, at í Vinnulánsgrunninum hava fundardagarnir verið 22, í sjúkrahússtýrinum 23, í vørunevndini 48.

At einfaltgera og «centralisera» umsitingina er beint, og er minnilutin avgjørt fyri tí.

Men tað tykist minnilutanum at vera ein beinleiðis «decentraliseran» av umsitingini at seta tvinnar 3-mannanevndir aftrat landsnevndini.

Heldur enn hesa øking av nevndartalinum skjýtur minnilutin til at fara aftur til at seta landsnevndina við 3 limum.

Minnilutin er samdur við menn, at landsnevndin fær í hendi at veita til vega yvirlit yvir tingsins útreiðslur til allar tingnevndir, eins og yvirlit yvir útreiðslurnar til øll stýri og allar nevndir, sum verða vald av tinginum, ella sum verða vald sambart tingsins samtyktir og fyriskipanir.

Uppskot:

Minnilutin (P. M. Dam):

1. Løgtingið velur eina 3-mannalandsnevnd.
2. Álagt verður landsnevndini at handfara tey mál, ið eru komin inn til tingviðgerðar, og at fyrireika og leggja tey so væl til rættis sum gjørligt undan tingsetuni.
3. Landsnevndin fær í hendi at veita til vega eitt yvirlit yvir tingsins útreiðslur til allar tingnevndir eins og yvirlit yvir útreiðslurnar til øll stýri og allar nevndir, sum verða vald av tinginum, ella sum verða vald sambart tingsins samtyktir og fyriskipanir.

2. viðgerð 30. november. Minnilutauppskot fall 7—0. Meiriluta-uppskot samtykt 20—0.

---

8. Refusión av dýrtíðarviðbót til lærarar við eftirløn.

Framlagt 3. november. 1. viðgerð 6. november. Framlagt 22. november.

Álit.

Tann 28. oktober 1944 skrivar kassameistarin fyri eftirlønargrunn læraranna til amtið, at kunngerð nr. 18 frá 25. apríl 1942 í § 5 ásetir, at teir fyrstu 7 partarnir av dýrtíðarviðbótini til lærarar við fólkaskúlan verða at gjalda úr statskassanum, meðan restin verður latin úr amtsgrunninum. Har er einki mælt um, hvussu farið skal verða fram við dýrtíðarviðbótini til eftirløntar lærarar, men kassameistarin heldur fram, at hesir mugu haldast at standa nógv nærri lærarum enn teir standa statsins tænastumonnum yvirhøvur. So statt spyr kassameistarin, um tað kann ella eigur at verða

umskipað soleiðis, at tað ið higartil er útlagt úr statskassanum út yvir teir fyrstu 7 partarnar, kann verða flutt yvir á amtsgrunnin.

Kassameistarin uppger tað, ið goldið er, soleiðis:

Fyri figgjarárið	1942/43	18.708 kr.	75 oyr.
» —	1943/44	37.969 »	18 »
» —	1944/45 (1/4 1944—30/9 1944)	20.004 »	80 »
	Tilsamans	76.682 kr.	73 oyr.

Amtið sendur hetta bræv viðari til tingið við hesi átekning:

«Tilstilles Formanden for Færøernes Lagting, idet man udbeder sig en Udtalelse om, hvorvidt Lagtinget er indforstaaet med, at fornævnte Beløb af 76.682 Kr. 73 Øre anvises af Amtsfonden, og at Amtsfonden fremtidig bærer Udgifterne til Lærerpensionisternes Reguleringstillæg udover de første 7 Portioner paa samme Maade som for Lærerne.»

Málið er beint til viðgerðar í figgjarnevndini, og hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (P. Dahl, J. F. Kjølbro, R. Long og Th. Petersen) skal viðmerkja, at vit ongantíð hava hildið tað verða beint at tað í tíðini síðani 1940 hevur verið arbeitt við einum serligum statskassa, tí viðurskiftini hava gjørt, at tað beinasta var, um einasta umboð fyri fólkið — løgtingið — viðgjørdi landsins inntøkur og útreiðslur í sini heild. Tað vildi óivað av meirilutanum í tinginum 1942 hava verið samtykt, at eftirlønardýrtíðarviðbótin til lærarar skuldi gjaldast á sama hátt sum dýrtíðarviðbótin til sjálva læraralønina, um tað tá var framført ynski um hetta. At koma 3 ár aftaná heldur meirilutin ikki vera beint, tí tá eru, langt síðani, tey fíggjarárini hjá amtsgrunninum, ið skuldu borið útreiðsluna, uppgjørd. Meirilutin vil tó ikki taka støðu móti, at hesin peningur verður goldin úr amtsgrunninum, tí okkara principala støða er, at allar lønir til landsins umboðsmenn eiga at vera goldnar úr løgtingsins køssum, og ikki úr statskassanum.

Minnilutin (P. M. Dam, Kr. Djurhuus og Joh. M. Fr. Poulsen) halda tað er beint at hesin peningur verður goldin úr amtsgrunninum, og at henda útreiðsla í framtíðini fer úr amtsgrunninum fyri tann part, ið liggur yvir teir 7 partarnar, ið eisini fyri læraralønir verða goldnar úr statskassanum.

Uppskot:

Frá minnilutanum (Dam, Kr. Djurhuus og Poulsen):

Løgtingið samtykkir, at tann parturin av dýrtíðarviðbótini til lærarar við eftirløn, ið liggur aftaná teir 7 fyrstu partarnar, verður goldin úr amtsgrunninum fyri tíðina síðani 1. apríl 1942.

2. viðgerð 25. november. 3. viðgerð 30. november. Samtykt 13—0.

9. Eykainntøkur til amtsgrunnin.

Framlagt 30. november.

Álit

(frá meirilutanum: Th. Petersen, P. Dahl, R. Long, J. F. Kjølbro við fyrivarni og P. M. Dam við fyrivarni):

Fíggjarnevndin hevur kannað, hvussu fíggjarstøðan hjá tinginum verður fyri árið 1944. Grundað uppá, at tollurin hevur givið væl minni enn væntað, og at summar útreiðslur hava verið størri, enn tað var ætlað í seinastu tingsetu, verður tað neyðugt at umhugsa spurningin um at skaffa til vegar tær inntøkur, ið vilja gera, at roknskapurin fyri 1944 ikki kemur til at vísa undirskot. Eitt yvirlit yvir støðuna, soleiðis sum hon í dag kann ætlast at vera, tá árið er liðugt, sær soleiðis út:

Inntøkur:

grein b:	Løgtingsskatturin sigur gjaldstovan nú vil geva 2.361.000,00 kr. móti ætlað 2½ millión, so minniinntøkan verður	139.000,00 kr.
	Her skal viðmerkjast, at um 80.000 kr. av skatti frá farnum arum er avskrivaður.	
grein c:	Tollurin metist til at geva væl 700.000,00 kr. móti ætlað 1 millión — munur	300.000,00 »
	Minniinntøka	439.000,00 kr.

Hesar greinir vilja geva meira:

grein g:	Stuttleikaskattur	um 14.000,00 kr.	
— i:	Grind	» 18.000,00 »	
— j:	Rentur av løgtingsskatti	» 12.000,00 »	
— k:	Rentur	» 10.000,00 »	
— l:	Ymist	» 10.000,00 »	
			64.000,00 »
	Inntøka ialt minni enn ætlað		375.000,00 kr.

Útreiðslur:

grein 2:	Prísansingarráðið meira	10.000,00 kr.	
	Prenting o. a. minni	4.000,00 »	
			6.000,00 kr.
grein 3: a.	Sjúkrahúsini meira	140.000,00 kr.	
	Fyri 1. fjórðingsár er nýtt 234.000 kr., ið fyri stóran part er frá árinum 1943.		
b.	Bróstsjúkrahúsið meira	18.000,00 kr.	
e.	Ljósmøður meira	7.000,00 »	
		166.000,00 kr.	
f.	Sjúkrahjálp o. a. minni	5.000,00 »	
			161.000,00 »
grein 4: a.	2. dýrtíðarv. lærarara og minni:	20.000,00 kr.	
e.	Realskúlin 5.000,00 kr.		
m.	Ymist 8.000,00 »		
		13.000,00 kr.	
			7.000,00 »
grein 5:	Útskiftingararbeiði		÷ 50.000,00 »
grein 6: a, b.	Havnir, vegir o. a. meira	60.000,00 »	
d.	Smiril minni	30.000,00 »	
			30.000,00 »
grein 7: a.	Socialhjálp meira	27.000,00 kr.	
b.	Einkjubørn minni 4.000,00 kr.		
c.	Dýrtíðarviðb. minni 10.000,00 »		
		14.000,00 »	13.000,00 »
grein 8:	Dóms- og lógreglumál meira		17.000,00 »
grein 9: a.	Ymisk yrkismál minni	÷ 18.000,00 kr.	
b.	Skaðabøtur, kolagrefstur o. a.	+ 90.000,00 »	
			72.000,00 »
	Meira útreiðsla ialt		256.000,00 kr.

Støðan er soleiðis henda:

Inntøkurnar geva minni enn ætlað	375.000,00 kr.
Útreiðslurnar meira enn ætlað	256,000,00 »
Munurin tilsamans	631.000,00 kr.
Ætlað í yvirskot	113.000,00 »
Rest	518.000,00 »
Hartil kemur eyka útreiðsla nýggjan motor til Medicus	20.000,00 »
Tað íresta inntøkur	538.000,00 kr.

Fíggjarnevndin skal mæla til, at hetta verður skaffað til vegar við tveimum lógaruppskotum um 10 pct. eykaskatt og hækkan av nøkrum tollstigum uppá spiritus og cigaretter, ið samanlagt við tann eykaskatt, ið væntast at koma frá tryggingarsambandinum og sjóvátryggingini, fyri árið 1944 kann ætlast at geva:

Eykaskatt uppá allar inntøkur yvir 20.000 kr. við 10 pct. av skattinum	157.000,00 kr.
Skattur á tryggingarfeløg mett til	400.000,00 »
Tollhækkan fyri december mett til	40.000,00 »
	597.000,00 kr.

Fyri amtsgrunnin 1945 er tað løgd ein figgjarætlan, ið er framløgd á tingi; men tað eru í ymiskum málum uppskot frammi, ið gera broytingar í tí løgdu figgjarætlan. Broytingarnar, ið figgjarnevndin nú má tokna við fyri 1945 eru hesar:

1.	tingmál 1/8:	Dýrtíðarviðbót, eftirløn lærara í tiðini til 31/12 1944	kr.	86.000,00
		fyri 1945	»	40.000,00
2.	— II/11:	Eykadýrtíðarviðbót lærara	»	20.000,00
3.	— VII/7:	Búnaðaramboð	»	25.000,00
4.	— VIII/2:	Vegastudningur eyka	»	25.000,00
5.	— X/3:	Ellisrentulógin	»	150.000,00
6.	— X/5:	Vanlukkutrygging	»	60.000,00
7.	— XIII/8:	Skaldagáva	»	3.000,00
8.	— XIII/9:	Politist	»	1.800,00
9.	— XIII/17:	Sømdarpeningur	»	600,00
10.	— XIII/20:	Skjalasavnið	»	3.000,00
			kr.	414.400,00

Á sama hátt sum fyri roknskapin 1944 verður hetta at skaffa til vegar, og verður tað sett uppskot um at seta eykaskatt 10 pct. og tollhækkan, ið kann metast til at geva í inntøku ialt *kr. 420.000,00* til 1945. Lógaruppskotið um tollhækkan er lagt fyri tingið í serstakum máli.

Figgjarnevndin setur soleiðis fram hetta

Uppskot

til

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM OVERORDENTLIG INDKOMSTSKAT TIL AMTSKOMMUNEN

§ 1.

Udover det efter de almindelige Regler om Indkomstskat til Amtskommunen paalignede Skattebeløb erlægges for Skatteaarene 1944 og 1945 en overordentlig Indkomstskat til Amtskommunen af enhver Skatteyder, hvis skattepligtige Indkomst, jfr. Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939, § 1, Stk. 4, som ændret ved Kundgørelse Nr. 12 af 5. Januar 1944, overstiger 20.000,00 kr.

Den overordentlige Indkomstskat udgør 10 pCt. af den almindelige Indkomstskat.

§ 2.

Den i § 1 omhandlede overordentlige Indkomstskat for 1944 forfalder til Betaling den 15. December 1944, men kan betales uden Tillæg af Rente indtil Udgangen af Januar 1945. For 1945 forfalder Skatten til Betaling sammen med 1. Halvaars Skat. Skatten paalignes, udredes og indrives iøvrigt efter Regler svarende til Reglerne vedrørende anden personlig Skat til Amtskommunen.

§ 3.

Den i § 1 omhandlede overordentlige Indkomstskat kan fuldtud fradrages i Skatteyderens skattepligtige Indkomst i det Aar, hvor Skatten er betalt.

§ 4.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR

UM

EYKAINNTØKUSKATT TIL AMTSGRUNNIN.

§ 1.

Umfram tann skatt, ið er ella verður áliknaður eftir teim vanligu reglum um inntøkuskatt til amtskommununa, skal hvør skattgreiðandi, hvørs skattskylduga inntøka, sbr. lóg nr. 202, 15. mei 1939, § 1, stk. 4, sum broytt við kunngerð nr. 12, 5. januar 1944, er meiri enn 20.000 kr., gjalda eykainntøkuskatt til amtskommununa fyri skattaárini 1944 og 1945. Eykainntøkuskatturin verður 10 pct. av tí vanliga inntøkuskattinum.

§ 2.

Eykainntøkuskatturin, ið umrøddur er í § 1, fellur fyri 1944 til gjaldingar 15. december 1944, men kann verða goldin uttan rentuøkjan, inntil januar mánaði 1945 er lokin.

Fyri 1945 fellur skatturin til gjaldingar saman við skattinum fyri fyrsta hálvár. Skatturin verður annars áliknaður, greiddur og innheimtaður eftir reglum, svarandi til reglurnar viðvíkjandi øðrum persónligum skatti til amtskommununa.

§ 3.

Eykainntøkuskatturin, umrøddur í § 1, kann fullt verða frádrigin í skattskyldugu inntøkuni hjá hinum skattgreiðandi tað árið, tá skatturin er goldin.

§ 4.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

Broytingaruppskot

frá sambandsflokkinum:

Sambandsflokkur løgtingsins loyvir sær vegna tað fyri 1944 ávista figgjarhallið at heita á heiðraða Føroya løgting um at áleggja tí í tingmáli nr. I—6/1944: Almennu figgjarviðurskifti Føroya sitandi millumtinganevnd at taka upp til viðgerðar og gjølla kanna møguleikan fyri:

1) at lækka um tingsins útreiðslur,
2) at skaffa tinginum nýggjar inntøkur.

Uppskot til tingsamtykt

frá Th. Petersen, P. M. Dam og A. Samuelsen:

Landsnevndini verður givið upp í hendi at kanna amtsgrunnsins tøku peningastøðu og fær heimild til at gera tað ið neyðugt er, harundir at taka upp lán.

2. viðgerð 1. desember, 3. viðgerð 1. desember. Uppskot meirilutans um cykainntøkuskatt til amtsgrunnin fall 11—0 (Ja atkvóðu: P. M. Dam, Rasmus Rasmussen, Richard Long, J. H. Danbjørg, Johs. Slettenæs, A. Sørensen, Pauli Dahl, Samuel Ellefsen, J. Fr. Øregaard, J. P. Davidsen, Thorstein Petersen. Kjølbro burturstaddur og hinir atkvóðu ikki).

Broytingaruppskotið frá sambandsflokkinum samtykt 16—0 og uppskotið til tingsamtykt samtykt við 18—0.

Minnilutaálit

frá Kr. Djurhuus og Johan Poulsen:

Eftir álitinum, dagsett 28. november, er hallið fyri amtsgrunnin 1944 ætlað til 538.000,00 kr., og mælir nevndin har til at uppvega ein part av hesum við cykaskatti á allar inntøkur yvir 20.000,00 kr. við

10 pct. av skattinum, ætlað til	157.000,00 kr.
tollhækkan december	40.000,00 »

Meirilutin mælir harumframt til, at Tryggingarsambandið «Føroyar» skal svara skatt 400.000,00 kr.

Minnilutin (Kr. Djurhuus og Johan M. Fr. Poulsen) er av ti áskoðan, at tað ikki var ætlanin, at Tryggingarsambandið «Føroyar» skuldi svara skatt av sínum vanligu inntøkum, men vil ganga við til, at ásett verður ein peningahædd av 300.000,00 kr. til amtsgrunnin, sum gjald frá felagnum fyri at uppvega ein part av figgjarhallinum 1944, sum er ein fylgja av óvæntað minkandi inntøkum, men frá 1. januar 1945 verður ásett eitt gjald til Vinnulánsgrunnin samsvarandi tí, sum felagið annars vildi lata í skatt.

Uppskot:

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER
VEDRØRENDE
TRYGGINGARSAMBANDIÐ «FØROYAR».

§ 1.

Indenfor Tryggingarsambandið «Føroyar» oprettes fra 1. Januar 1945 at regne en særlig Afdeling til Overtagelse af al Reassurance, som Selskabet maatte ønske at overtage.

Fra nævnte Dato at regne maa Tryggingarsambandið's øvrige Afdelinger ikke tegne Reassurance.

§ 2.

For de af Tryggingarsambandið «Føroyar»s Reassurance-Afdeling overtagne Risici hæfter alene Afdelingens Midler. Saalænge disse ikke andrager ½ Mill. Kr., hæfter dog tillige Tryggingarsambandið «Føroyar»s Hovedafdelings Midler.

§ 3.

Medens Tryggingarsambandið «Føroyar»s Reassurance-Afdeling, der ikke virker paa Grundlag af Gensidighed mellem de enkelte Forsikringstagere, undergives kommunal og amtskommunal Skattepligt efter den almindelige Lovgivning, er saavel Tryggingarsambandið »Føroyar»s Hovedafdeling som dets nuværende Underafdelinger fra deres Oprettelser at regne samt dets fremtidige Underafdelinger, der virker paa Grundlag af Gensidighed mellem de enkelte Forsikringstagere, fritaget for enhver direkte kommunal og amtskommunal Skat.

§ 4.

For Tidsrummet indtil 1. Januar 1945 paalægges der, jfr. § 7 i Kundgørelse Nr. 14 af 17. Juni 1940, Tryggingarsambandið «Føroyar»s Hovedafdeling en Afgift til Amtsfonden paa 300.000,00 Kr.

Fra 1. Januar 1945 at regne paalægges der Hovedafdelingen en aarlig Afgift til Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings svarende til, hvad Hovedafdelingens samlede direkte Skat til Amtskommunen og Thorshavn Kommune (vedkommende Sognekommune) vilde have udgjort for det paagældende Aar efter den til enhver Tid gældende Skattelovgivning. I Tvivlstilfælde afgør Amtmanden med bindende Virkning, hvilken Afgift der skal betales.

§ 5.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks. Bestemmelserne i § 3, 2det Stykke, i Kundgørelse Nr. 39 af 23. December 1943 ophæves fra 1. Januar 1945 at regne.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR
VIÐVÍKJANDI
TRYGGINGARSAMBANDINUM «FØROYAR».

§ 1.

Innanfyri tryggingarsambandið «Føroyar» verður sett á stovn frá 1. januar 1945 at rokna ein serstøk deild at taka við allari endurtrygging, ið felagið ynskir at taka við.

Frá nevnda degi at rokna er tað ikki loyvt øðrum deildum tryggingarsambandsins at tekna endurtrygging.

§ 2.

Fyri tey risici, ið endurtryggingardeildin í tryggingarsambandinum «Føroyar» tekur við, standa bert ognir deildarinnar til svars. Soleingi hesar ikki eru komnar upp til ½ mill kr., standa tó eisini ognirnar hjá høvuðsdeildini í tryggingarsambandinum «Føroyar» til svars.

§ 3.

Meðan tryggingarsambandið «Føroyar»s endurtryggingardeild, ið ikki virkar so, at teir einstaki tryggjandi standa til svars sínámillum, verður undirgivin kommunala og amtskommunala skattaskyldu eftir almennari lóggávu, verða bæði Tryggingarsambandsins høvuðsdeild og tess núverandi undirdeildir frá tí, tær vórðu stovnaðar at rokna, og tess komandi undirdeildir, ið virka so, at teir einstaku tryggjandi standa til svars sínámillum, fritiknar fyri einhvønn beinleiðis kommunu- og amtskommunuskat.

§ 4.

Fyri tíðarskeiðið inntil 1. januar 1945 verður álagt, sbr. § 7 í kunngerð nr. 14, 17. juni 1940, høvuðsdeildini í tryggingarsambandinum «Føroyar» eitt gjald til amtsgrunnin, stórt 300.000,00 kr.

Frá 1. januar 1945 at rokna verður álagt høvuðsdeildini eitt serstakt gjald til Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings, svarandi til tað, sum høvuðsdeildarinnar samlaði beinleiðis skattur til amtskommununa og Tórshavnar kommunu (viðkomandi søknarkommunu) vildi verðið fyri avvarandi ár eftir tí til hvørja tíð galdandi skattalóggávu. Í ivamálum ger amtmaðurin av, hvussu stórt gjald verður at rinda.

§ 5.

Hesar fyriskipanir koma í gildi heinan vegin. Reglurnar í § 3, 2. stk., í kunngerð nr. 39, 23. december 1943 fara úr gildi frá 1. januar 1945 at rokna.

Broytingaruppskot

frá Kr. Djurhuus og J. Poulsen:

Í Bráðfengis fyriskipanir viðvíkjandi tryggingarsambandinum «Føroyar» gongur § 4, fyrsta stykki út.

Broytingaruppskotið samtykt 13—0, og uppskotið viðvíkjandi Tryggingarsambandinum «Føroyar» so broytt samtykt 13—0.
Viðvíkjandi sama spurningi sí tingmál VI—1 D.

---

10. Broytan av lógini um innfluttningsgjøld.

Framlagt 28. november.

Álit

(Th. Petersen, Kjølbro, Dahl, Long og Dam):

Aftaná at hava kannað fíggjarviðurskifti tingsins hevur fíggjarnevndin samtykt at seta fram viðlagda uppskot um hækkan av ymsum innfluttningsgjøldum.

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE
OM
INDFØRSELSAFGIFTER

§ 1.

I Lov Nr. 53 af 15. Marts 1939 om Indførselsafgifter m. v., jfr. Kundgørelse Nr. 39 af 4. December 1942, foretages følgende Ændringer:

1. Indførselsafgift af Varer under Løbenumrene 2, 13 og 14 erlægges med Grundsatsen plus 300 pCt. (i Stedet for de hidtige 30 pCt.)
2. Indførselsafgift af Varer under Løbenumrene 3, 4, 5, 6, 7, 8, 15, 16, 17 og 18 erlægges med Grundsatsen plus 100 pCt. (i Stedet for de hidtidige 30 pCt.)

§ 2.

De ved § 1 forhøjede Afgifter opkræves fra og med 28. November 1944 af alle Varer, der ikke af de afgiftsopkrævende Myndigheder er tilladt udleveret Indførerne til fri Raadighed (Afgiftskvittering eller Udleveringstilladelse ikke udstedt), uanset om Indførsel maatte have fundet Sted inden 28. November 1944.

§ 3.

Ved Salg af afgiftspligtige Varer, for hvilke Afgiften er betalt før 28. November 1944, maa Prisen ikke forhøjes paa Grund af de forhøjede Indførselsafgifter.

Ved Salg af afgiftspligtige Varer, for hvilke Indførselsafgift betales den 28. November eller senere, maa Afgiftsforhøjelsen ikke tillægges Prisen uden Priskontrolraadets Tilladelse og i hvert Fald ikke virke prisfordyrende udover de til den virkelige Afgiftsforhøjelse svarende Beløb.

Overtrædelse af disse Bestemmelser straffes med Bøder, der tilfalder Amtsfattigkassen, hvorhos de Varer, som er søgt afhændet i Strid med de givne Bestemmelser kan konfiskeres til Fordel for Amtsfonden.

§ 4.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR UM INNFLUTTNINGSGJØLD.

§ 1.

Í lóg nr. 53, 15. mars 1939, um innfluttningsgjøld o. a., sbr. kunngerð nr. 39, 4. december 1942, verða gjørdar fylgjandi broytingar:

1. Innfluttningsgjald av vørum undir nr. 2, 13 og 14 verður at gjalda við grundstiginum + 300 pCt. (í staðin fyri sum higartil 30 pCt.)
2. Innfluttningsgjald av vørum undir nr. 3, 4, 5, 6, 7, 8, 15, 16, 17 og 18 verður at gjalda við grundstiginum + 100 pCt. (í staðin fyri sum higartil 30 pCt.).

§ 2.

Tey gjøld, ið verða hækkað eftir § 1, verða uppkravd frá og við 28. november 1944 av øllum vørum, sum valdið, ið uppkrevur gjøldini, ikki hevur givið loyvi at flýggja til innflytararnar at ráða frítt yvir (gjaldskvittan ella útflýggingarloyvi ikki skrivað), um so innflytanin hevur verið áðrenn 28. november 1944.

§ 3.

Við sølu av gjaldskyldugum vørum, har gjaldið er greitt áðrenn 28. november 1944, má prísurin ikki verða hækkaður ársakað av teim hækkaðu innfluttningsgjøldunum.

Við sølu av gjaldskyldugum vørum, sum innfluttningsgjald verður goldið fyri 28. november 1944 ella seinri, má gjaldhækkanin ikki áleggjast prísinum uttan loyvi frá prísansingarráðnum og ið hvussu er ikki virka príshækkandi út yvir ta peningahædd, ið svarar til ta verunligu gjaldhækkan.

Brot móti hesum fyriskipanum verða at revsa við sektum, ið falla til amtsfátækragrunnin, og harumframt verða tær vørur, sum royndar eru at selja móti teimum ásettu reglum, konfiskeraðar til góðar fyri amtsgrunnin.

§ 4.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

2. og 3. viðgerð 28. november. Loyvi givið at frávikja tíðarfreistirnar. Uppskotið samtykt 13—0 (Ja atkvóðu: Poul Petersen, P. M. Dam, J. F. Kjølbro, Robert Joensen, Rasmus Rasmussen, Richard Long, J. H. Danbjørg, O. J. Jensen, Johs. Slettenæs, A. Sørensen, Pauli Dahl, Samuel Ellefsen, Thorstein Petersen, burturstaddir J. Paturson, Kr. Djurhuus, Øregaard og Davidsen, hinir atkvóðu ikki).

II. Skúlamál.

1. Studningur til skúlabygningar.

1. viðgerð 8. september. 30. oktober framlagt.

Álit.

Ífjør veitti tingið til skúlahús ein studning uppá tilsamans 203.000 kr., studningurin var til summar skúlar at gjalda í eitt ár, til summar at býta uppá 2—4 ár. Studningur varð veittur til nýggjar skúlar í Vági, Vestmanna, Funningsfirði, millum Loprar og Akrar, á Toftum, Glyvrum og Trøllanesi og til umvøling og tilbygging av skúlunum í Klakksvík, Funningi og Skopun. Í 1944 skuldu verða goldnar 88.950 kr., í 1945 60.650 kr., í 1946 36.300 kr., og í 1947 18.000 kr. Viðvíkjandi skúlunum millum Lopra og Akrar og í Funningsfirði og til umvølan av skúlanum í Funningi hava avvarðandi søknarstýri ikki hættað sær undir verkið í ár, og nevndin skjýtur upp, at studningarnir til hesi pláss, tilsamans 18.200 kr., sum allir vóru ætlaðir at gjalda í 1944, verða endurnýggjaðir fyri árið 1945.

Av nýggjum umsóknum eru komnar hesar:

1. Studning til keyp av lærarahúsum í Kaldbak.
2. Studning til nýggjan skúla í Sørvági.
3. Studning til eykaútreiðslur av skúlanum á Trøllanesi.
4. Eykastudning til umvølan av skúlanum í Funningi.
5. Studning til nýggjar skúlastovur í Klakksvík.

1. Studningur til keyp av lærarahúsum í Kaldbak.

Søknarstýrið skrivar, at eingi lærarahús eru í bygdini, men at teir hava í ætlan at keypa eini hús, 3 ára gomul, sum eru til sølu, av tí at eigarin er fluttur ella ætlar at flyta úr bygdini. Í húsunum, sum eru í ein-

ari hædd við høgum kjallara, er ein stór stova (3,77 . 3,80 m), borðstóva, 2 sovikømur, baðstova og í kjallaranum køkur við miðstøðuhita til 5 radiatorar uppiá. Húsini kunna fáast fyri 15.000 kr., men kunna, sum Edv. Smidt, byggimeistari, sum bygt hevur húsini, greiðir frá, í hesum tíðum ikki byggjast fyri minni enn 25–30.000 kr. Nevndin heldur, at húsini kunna væl brúkast til lærarahús, og at tey eru bílig fyri 15.000 kr. Studningi viðvíkjandi er at siga, at tingið eigur ikki í hesum óvanligu tíðum at binda seg til at lata ávísan part av kostnaðinum í studningi til lærarahús í framtíðini, serliga við tað fyri fáum árum síðan fekkst eingin studningur til lærarahús, men bert til skúlahús, men tingið gekk ífjør, vísandi til dýrtíðina og til tey ringu ráð, kommunurnar høvdu í samanburði við tann stóra byggikostnaðin nú, undir at veita 20 pct. í studningi til skúlahús við uppibygdum lærarahúsum. Nevndin mælir til undir hesum óvanligu viðurskiftum at veita Kaldbaks sóknar kommunu í studningi til keyp av áðurnevndu húsum 20 pct. av keypskostnaðinum, tó ikki upp um 3000 kr. og geva kommununi viðmæli til at fáa lagaligt lán til tann ívantandi part av peninginum.

2. *Studningur til nyggjan skúla í Sørvági.*

Sørvágs sóknar kommuna skrivaði ífjør tinginum, at teir í 1943 høvdu líknað 30.000 kr. til nýggjan skúla og vildu líkna tað sama í 1944, og at teir í ár vildu senda tinginum tekning og kostnaðarætlan til nýggjan skúla og umsókn um studning til hansara. Henda tekningin við kostnaðarætlan eftir Ole Biskupstø í Klakksvík er nú komin nevndini í hendur. Skúlin er ætlaður at stoypa úr jarnbetong, gólv og skilarúm stoypt úr sama tilfari, og er teknaður nakað líknandi skúlanum í Klakksvík, men í trimum hæddum. Teir hava ætlað at gera 6 skúlastovur, men fyri fyrst bert gera 3–4 lidnar innan og síðan búgva hinar til brúks, tá ið tørvur verður til tess. Í niðastu hædd, sum er høgur kjallari, er ætlað sloydstova (7,8 . 5,3 m), skjalasavn, lærarastova (5,0 . 5,3 m) og eitt fjórða rúm so stórt sum sloydstovan, ætlað til kol og reiðskap. Byggimeistarin skrivar, at 4 w. c. kunna verða sett upp burtur av hesum rúmi, og at hann hevur roknað tey uppí kostnaðarætlanina. Í aðru og triðju hædd eru í hvørjari 3 skúlastovur sum tær í Klakksvík, (7,8 . 5,3 m). Millum loft og gólv er í skúlastovunum 3,40 m, í niðastu hædd 3,00 m.

Tekningin hevur ikki verið løgd fyri embætislækna til góðkenningar, og tingið má krevja, at hon verður send amtslæknanum við teim neyðugu broytingum og við «situatiónsplani». Nevndin kann ikki mæla til, at w. c. bæði til dreingir og gentur verða løgd saman burtur av kola og reiðskaparrúminum og heldur ikki við inngongd frá skúlagongdini, men at tey vera burtur frá hvørjum øðrum og inngongd til teirra frá skúlagarðínum. Annars heldur nevndin tekningina og ætlanina vera skilagóða, tó eigur vask at verða uppsett á gongini. Nevndin heldur, at tá ið farið verður undir at byggja nýggjan skúla í so stórari bygd, eigur samtíðis at verða bygd fimleikarhøll, antin uppií skúlanum ella nærindis honum. Sørvágs sóknar kommuna hevur til hesa skúlaætlan tikið so stórt til og lagt so stóran pening niður til byggingina, at tað týðir uppá, at fólkið har vesturi hevur hug í hesari peningariku tíð at lata munagott til at fremja skúlaskap og ungdómsvenjing, og at tað tí kanska millum manna kann fáast nakar studningur til eisini nú at gera fimleikarhøll, sum jú ikki bert fær týdning fyri skúlabørnini, men fyri fólkið sum heild, eisini tey, sum farin eru úr skúlanum. Annars má kommunan søkja studning til fimleikarhøllina úr Fimleikagrunninum. Eftir kostnaðarætlanini krevjast 165.000 kr.

til tilfar og arbeiðisløn og 20.000 kr. til miðstøðuhitaverk, til samans 185.000 kr. Nevndin mælir til at veita í studningi í 1945 10.000 kr. og annars til samans 20 pct. av byggikostnaðinum eftir broyttari og góðtiknari tekning, tá ið arbeiðið er liðugt og roknskapur innsendur til og góðtikin av skúlastjórnini.

3. *Studningur til eykaútreiðslur av skúlanum á Trøllanesi.*

Skúlin var í 1942 ætlaður at skula kosta 10.000 kr. Í fjør greiddi sóknarstýrið frá, at arbeiðið var liðugt, og at kostnaðurin var o. u. 15.000 kr. Tingið samtykti, at veita 20 pct. í studningi, tó ikki upp um 3000 kr. Í ár skrivar sóknarstýrið aftur, at skúlin hevur ikki kunnað verið gjørdur fyri áðurnevnda pening, men at hann fer at kosta u. 21.000 kr. og at teir hava longu goldið millum 19.000 og 20.000 kr., og biðja teir um at studningurin má verða øktur til at vera 20 pct. av øllum kostnaðinum. Nevndin heldur, at skúlin er ógvuliga dýrur fyri eitt so lítið pláss, men vil tó út frá tí, at kommunan hevur tikið so stórt til, og at hesin skúlin kann vera kommunum, sum eru størri og hava betri ráð, til fyridømi, tó so, at so fullfiggjaðir skúlar eiga at verða bygdir í biligum tíðum, mæla til at veita ein eykastudning uppá 20 pct. av 5000 kr. t. v. s. 1000 kr.

4. *Eykastudningur til umvølan av skúlanum í Funningi.*

Sóknarstýrið í Funnings sóknar kommunu hevur í februar í ár skrivað Landsnevndini, at teir halda seg ikki vera førar fyri at umvæla skúlan har, soleiðis sum ætlað var, við tí studningi uppá 4000 kr., sum teimum var veittur ífjør. Teir biðja um at fáa tað dupulta ella meir, helst 50 pct. av kostnaðinum, sum er ætlaður til 20.000 kr., og siga teir, at teir hava havt ella fáa eina útreiðslu uppá 5000 kr. av at umvæla skúlan og lærarahúsini við Gjógv. Sum hildið varð fram í álitinum ífjør, var tað nevndini greitt, at 20.000 kr. vóru nógvur peningur hjá kommununi at lata til umvølingar av skúlanum, men nevndin torir ikki mæla til at hækka studningin fyri eina bygd upp um hægsta markið, men mælir til, at studningurin 4000 kr. verður endurnýggjaður fyri árið 1945, og at kommunan roynir at fáa sær ein part av peninginum við lagaligum láni.

5. *Studningur til nýggjar skúlastovur í Klakksvík.*

Sóknarstýrið í Klakksvík søkir um studning til í kjallaranum undir fimleikarhøllini at útbúgva 3 skúlastovur og 2 forstovur. Kjallarin er stórur og ljósur (24 m langur, 9½ m breiður og m høgur), og har er lætt at gera væl hóskandi sloydstovu, teknistovu og stovu til motorpassaraskúla. Teir hava sent kostnaðarætlan, sum vísir 31.344 kr., av teimum eru 2440 kr. ella knøpp 10 pct. óvæntaðar útreiðslur. Nevndin mælir til at veita hesari kommunu, sum til allar tíðir hevur latið nógvan pening til at útvega sær nútíðarhóskandi skúlaskap, studning, men av tí at ein munandi partur av útreiðslunum fer til stovuna til motorpassaraskúla, og hesir skúlar t. d. ikki fáa byggingarstudning, men studning til raksturin, mælir nevndin til, at ein triðingur av kostnaðarætlanini verður frádrigin og at í studning verður veitt 20 pct. av ⅔ av tí kostnaði, sum tá ið arbeiðið er liðugt verður prógvað Løgtingsskrivstovuni at hava verið, tó ikki upp um 4400 kr. at gjalda við 2400 kr. í 1945 og restini í 1946.

6. *Ikki nýttir studningar í 1944.*

Nevndin mælir til, at umframt studningin til Funnings søknar kommunu verða studningarnir til skúlan í Funningsfirði og til skúlan millum Lopra og Akrar endurnýggjaðir eitt ár og setur fram hetta

uppskot:

1. Veitt verður Kaldbaks søknar kommunu í studningi til keyp av lærarahúsum 20 pct. av keypipeninginum, tó ikki upp um 3000 kr.
2. Veittar verða Sørvágs søknar kommunu í studningi til byggingar av nýggjum skúla 10.000 kr. í 1945 og annars tilsamans 20 pct. av byggikostnaðinum, tá ið tekningin er broytt og góðtikin av amtslæknanum og skúlastjórnini. Avgerð verður tikin á næsta tingi, um tann endaligi studningurin skal verða veittur uppá eitt ella fleiri ár. Søknarstýrið verður biðið siga frá, tá ið arbeiðið byrjar og hvussu langa tíð tað er ætlað at fara fram.
3. Til skúlan á Trøllanesi verða veittar í eykastudningi 1000 kr.
4. Til nýggjar skúlastovur í Klakksvík verða veitt í studningi 20 pct. av ⅔ av kostnaðinum av tí arbeiði, sum studningur er søktur til, tó ikki upp um 4400 kr. at gjalda við 2400 kr. í 1945 og restini í 1946.
5. Teir ífjør veittu studningar til skúla í Funningsfirði, skúla millum Lopra og Akrar og til umvøling av Skúlanum í Funningi verða endurnýggjaðir at galda árið 1945 út.

2. viðgerð 4. november, 3. viðgerð 8. november. Samtykt 20—0.

---

2. Virðið av fríum húsum og útroknan av eftirløn lærara.

1. viðgerð 8. september. 30. oktober framlagt.

Álit.

Løgtingið samtykti í fjør at biðja skúlastjórnina fáa í lag «at húsaviðurgjaldið, sum er ein eftirlønargevandi partur av læraralønini, hereftir verður rokuað fyri 450 kr. fyri giftar lærarar og 300 kr. fyri ógiftar.»

Eftir lønarlógini av 28. april 1931 eru frí hús ein partur av læraralønini. Í § 5 stendur: «Der tillægges de i § 2 nævnte faste Lærere (Læne-

lærere og Førstelærere samt Andenlærere) passende fri Bolig. Hvor Tilvejebringelsen af Bolig er forbundet med særlige Vanskeligheder kan Undervisningsministeren tillade Undtagelse fra ovenstaaende Regel mod at der tillægges vedkommende en passende Boliggodtgørelse, der udredes af Kommunen.»

Hetta húsaviðurgjaldið hevur av skúlastjórnini verið sett at vera 250 kr. fyri giftar og 150 kr. fyri ógiftar lærarar. Tey seinnu árini hava so langt frá hús kunna fingist fyri henda pening og skúlastjórnin hevur veitt teimum lærarum, sum hava prógvað at hava havt stórar persónligar útreiðslur av húsaleigu rætt til upp í 480 kr. í húsaviðurgjaldi til giftar og 300 kr. til ógiftar. Summar kommunur, t. d. Froðbiar sóknar kommuna hava av egnum ávum latið 480 kr. og 300 kr. í húsaviðurgjald, men eftirløngjaldið hevur verið roknað av 250 kr. og 150 kr. fyri allar kommunur. Løgtingssamtyktin í fjør setti eitt virði av 450 kr. fyri giftar lærarar og 300 kr. fyri ógiftar á húsaviðurgjaldið.

Skattmeistarin fyri eftirlønargrunn fólkaskúlalæraranna hevur, dgf. 19. januar í ár, skrivað skúlastjórnini, at henda samtykt fyri fyrst átti ikki at verið sett í gildi viðv. eftirlønini, til øll eftirlønarskipanin var kannað gjølla av nýggjum. Hann vísir á, at útrokningin av eftirløn til fólkaskúlalærararnar í Føroyum er út frá «Lov om Tjenestemænd Nr. 126 af 27. Juni 1927», men at henda lóg er sett úr gildi, og nýggj lóg er ásett av 31. mars 1931.

Munurin á eftirlønarútrokningini eftir hesum báðum lógum er hesin:

	1927-lógin	**1931-lógin**
Eftirlønargjald.....	3 pct. av grundløn, aldursviðbót, persónlig viðbót og *virði av fríum húsi.*	5 pct. av grundløn, aldursviðbót, persónligari viðbót, men *ikki av virði av fríum húsi.*
Eftirlønar virði:		
Í vaksandi mun byrjandi við eftirlønaraldur	upp í 2 ár ..... 1/10 av eftirlønarinntøkuni	undir 1 ár ..... 1/10 av eftirlønarinntøkuni
Endandi við eftirlønaraldur	upp um 30 ár .. 40/60 av eftirlønarinntøkuni	28 ár og har upp um 42/60 av eftirlønarinntøkuni.
Eftirlønarinntøkan	grundløn, aldursviðbót, persónlig viðbót og *virði av fríum húsi.*	grundløn, aldursviðbót og persónlig viðbót, men *ikki* virði av fríum húsi.
Eftirlønin kann ikki koma upp um	8000 kr.	9000 kr.

Virðið av fríum húsi fær á henda hátt ávirkan á 1) eftirlønargjaldið, bæði fyri læraran (3 pct.) og kommununa, 2) eftirlønina og 3) húsaviðurgjaldið, sum kommunan skal gjalda. Skattmeistarin fyri eftirlønargrunn fólkaskúlalæraranna heldur fram, at tað verður ikki beint, um einstakir lærarar skulu fáa eftirløn sína ásetta fyri alla framtíð, uppá eina

hækkan sum hesa, sum kanska bert verður fyri eina tíð, og mælir til, at til útroknan av eftirlønum, eftirlønargjaldi fyri lærara og kommunu til eftirlønargrunnin, verður sum higartil roknað við 150 kr. fyri ógiftar og 250 kr. fyri giftar lærarar.

Skúlastjórnin hevur sent landsnevndini málið, og hevur hon vist tað til tingið. Av tí at øll skúlaskipanin, sum hon er, harundir eisini læraralønirnar, er givin eini millumtinganevnd til eftirkanningar og kanska til framsetan av uppskoti til broytingar, heldur skúlanevndin tað vera beinast bráðfengis at fylgja uppskoti skattmeistarans, men av tí at fleiri kommunur longu frammanundan veittu lærarum sínum, teimum, sum giftir vóru, 480 kr. í húsaviðurgjaldi, man so verða beinast at broyta tær ífjør samtyktu 450 kr. til 480 kr. Nevndin setir fram hetta

uppskot:

Meðan húsaviðurgjaldið til lærarar viðvikjandi útroknan av eftirlønargjaldi lærarans og kommunustudninginum til eftirlønargrunnin sum higartil verður at rokna til 250 kr. til giftar lærarar og 150 kr. til ógiftar, verður skúlastjórnin biðin útvirka, at teimum lærarum, sum eiga hásaviðurgjald á, og sum ikki fáa leigað sær hús fyri áðurnevnda pening, verður veitt dýrtíðarviðbót, so at viðurgjaldið kann koma upp í 480 kr. til giftar og 300 kr. til ógiftar lærarar.

2. viðgerð 4. november og 3. viðgerð 8. november. Samtykt 15—0.

---

3. Skúlaskipanin í Føroyum.

Frágreiðing frá millumtinganevndini
viðvikjandi skúlaviðurskiftum:

Løgtingið samtykti í 1943 at seta millumtinganevnd til við samvirki við skúlastjórnini at kanna skúlaviðurskiftini og gera uppskot til stevnumið bæði fólkaskúlanum og hægri skúlaskipanum viðvikjandi.

Tingið valdi 4 limir: A. Samuelsen, løgtingsmaður, Fuglafirði, Martin Joensen, lærari, Tvøroyri, P. Dahl, løgtingsmaður, Tórshavn og R. Long, løgtingsmaður, Tórshavn. Skúlastjórnin valdi: Blicher-Winther, prestur, Sandi, Z. Sørensen, yvirlærari, Tórshavn og Chr. Lützen, yvirlærari, Tórshavn. Til formann varð valdur R. Long. Nevndin hevur fingið til vegar yvirlit yvir galdandi lógreglur og yvirlit yvir skúlatal, barnatal, læraratal og læraralønir í 1943.

I. Galdandi lógreglur.

1854 1/3 *Lov om Ordningen af Skole- og Undervisningsvæsenet.*
Lov Nr. 117 af 15/3 1939 (Skoledirektionen).
Kgl. Resolution af 1/7 1829 om Salgssummen for Stegaard.
Kgl. Resolution af 14/1 1829 om Thorshavn lærde Skoles Midler.
Kgl. Resulution af 18/4 1832 om 112 Rdl. aarlig til Skolevæsenet.
Undervisningsminiteriets Skrivelse af 1/3 1917 om Autorisation af Skolebøger.
Undervisningsministeriets Skrivelse af 14/5 1917 om aarlig Prøve i Skriftlig Dansk og Regning.
Færø Amts-Skoledirektions Skrivelse af 12/2 1927 om Benyttelse af Folkeskolens Lokaler.
Undervisningsministeriets Skrivelse af 2/3 1931 om dansktalende Børn.

1893 29/3 Lov Nr. 82 om Pensionering ved Almueskolevæsenet.
Lov Nr. 121 af 31/3 1928.
Lov Nr. 152 af 24/4 1935.
Lov Nr. 56 af 5/2 1918.
Bekendtgørelse af 8/3 1928.
Undervisningsministeriets Skrivelser af 22/5 1928, 9/11 1929, 7/4 1930.

1896 25/6 Bekendtgørelse Nr. 95 om Thorshavn Kommuneskole.
Instution af 1/3 1854.
Bekendtgørelse Nr. 278 af 15/11 1924 om Ferieplan.
Bekendtgørelse Nr. 98 af 3/5 1927.

1912 16/1 Anordning Nr. 11 angaaende Folkeskolerne i Bygderne.
Bekendtgørelse Nr. 218 af 27/5 1920.
Anordning Nr. 218 af 22/7 1931.
Bekendtgørelse Nr. 314 af 8/9 1938.
Anordning Nr. 363 af 12/12 1938.
Lov Nr. 214 af 20/5 1933 om Skolekommissioner, jfr. Lov Nr. 88 af 15/3 1939, § 10.
Undervisningsministeriets Skrivelse af 31/5 1934 om Valg til Skolekommissioner.
Færø Amts Cirkulære af 21/6 1939 om Undervisningssproget.

1926 5/1 Kgl. Resolution om Tveraa Skoles Ferieplan.

1929 2/10 Undervisningsministeriets Skrivelse af 3/10 1929 om Statstilskud til Skolebygninger.
Undervisningsministeriets Skrivelse af 10/12 1929,
Cirkulære af 30/6 1933.

1939 13/7 Lovbekendtgørelse Nr. 251 om Lønningsbestemmelser m. m. for Lærere og Lærerinder i Folkeskolen.
Undervisningsministeriets Skrivelse af 13/9 1929 om Vikarudgifter.
Undervisningsministeriets Skrivelse af 9/1 1930 om Lønforskud.

1939 2/5 Vedtægt Nr. 216 for Færøernes Seminarium.
Undervisningsministeriets Skrivelse af 2/8 1915.

1910 22/2 Bekendtgørelse Nr. 54 om Færøernes Mellem- og Realskole, (ændret ved Bekendtgørelse Nr. 256 af 15/10 1924, Bekendtgørelse Nr. 350 af 21/6 1921, Bekendtgørelse Nr. 215 af 23/7 1928, Bekendtgørelse Nr. 536 af 13/12 1922.)
Regulativ af 27/6 1905.
Lov Nr. 269 af 12/6 1922 om Pensionering.
Instruktion af 1/3 1854.
Undervisningsministeriets Skrivelse af 27/1 1921 om Vikarer.
Undervisningsministeriets Skrivelse af 12/5 1930 om Vikarløn.

Undervisningsministeriets Skrivelse af 25/3 1929 om Forældremøder.
1938 21/8 Anordning Nr. 283 om almindelig Forberedelseseksamen.
1935 7/10 Bekendtgørelse Nr. 276 om Aftenskoler.
1930 15/4 Lov Nr. 155 om Folkehøjskoler.
1931 31/3 Lov Nr. 113 om Husholdningsskoler, § 1.
Bekendtgørelse Nr. 178 af 18/6 1931, § 3.
1927 16/7 Lov Nr. 179 om Navigationsskolen i Thorshavn.

II. Skúlatal, barnatal, læraratal og læraraløn.

Skúlin	Læraratal	Barnatal okt. fjórðingsár 1942		
		Dr.	G.	Tilsamans
Hattarvík & Kirkja	1	5 8	3 8	11 13
Svínoy	1	18	12	30
Viðareiði	1	16	20	36
Norðdepli	1	9	5	14
Hvannasund	1	9	2	11
Kunoy	1	10	17	27
Mikladal & Trøllanes	1			
Húsum & Syðradal	1			11 8
Klakksvík	14			354
Árnafjørður	1	5	12	17
Gjógv	1	22	22	44
Funningur	1	10	10	20
Elduvík & Funningsbotnur	1	8	17	25
Oyndarfjørður	1	16	14	30
Fuglafjørður & Hellurnar	4	71 2	66 4	137 6
Lorvík	2	28	42	70
Gøtu	3			
Sóldafjørður	1			
Glivrar	1			69
Lamba & Æðuvík	1			25
Toftir	2			106
Rituvík	1			28
Strendir	2			90
Selatrað & Morskranes	1			8 5
Skála	1			44
Oyri & Norðskála	1			25 15
Eiði	2			72
Haldórsvík & Tjørnuvík	1			25 13

Skúlin	Læraratal	Barnatal okt. fjórðingsár 1942		
		Dr.	G.	Tilsamans
Hvalvík	1			
Hósvík	1			
Kollafjørður		25	25	50
(Sjógv)	1			
(Oyrareingir)		9	5	14
Norðuri í Sund.	1	12	5	17
Kaldbak & Sund	1	9	4	13
Hvítanes & Hoyvík	1	7	13	20
Nólsoy	1	25	26	51
Kirkjubø & Velbastað	1	10	9	19
Hestoy & Koltur	1	10	11	21
Kvívík	1	27	29	56
Leynum &	1	16	10	26
Válurin		5	1	6
Vestmanna				
Miðvág	2	52	41	93
Sørvág				
Sandavág	2	41	26	67
Slættanes	1	8	7	15
Mykines	1	4	3	7
Bøur & Gásadalur	1	7	6	13
Sand	2	45	41	86
Husavík	1	10	12	22
Skálavík	1			
Skopun	1	23	17	40
Skúoy	1	13	8	21
Sandvík	1	17	15	32
Hvalba	2	36	33	69
Nes—Hvalba	1	6	11	17
Tvøroyri	10	112	105	217
Froðbøur	1	7	18	25
Øravík & Øravíkarlíð	1	13	9	22
Fámjin	1	13	13	26
Hovi	1	13	12	25
Porkeri	2	28	29	57
Vág	5			
Lobra & Øgrum	1			
Sunnbøur	2			

FERÐALÆRARAR

Skúlin	Læraratal	Barnatal okt. fjórðingsár 1942		
		Dr.	G.	Tilsamans
Múli & Norðtofti				
Áirnar & Norðoyri	1	2 6	1 5	3 11
Skálabotnur & við Glyvur	1			10 3
Langasand & Ljósá	1			4 7
Nesvík & Saksun	1			5
Norðadalur & Syðradalur				
Dalur & Skarvanes	1	6	6	12
Dímun	1			3
Nes & Víkarbyrgi	1			

BARNATAL FYRI HVØNN LÆRARA

(undantikið Vág, Tvøroyri, Klakksvík)

	1—9 børn	10—19	20—29	30—39	40—49
1. lærari	6	16	13	8	5
2. lærarar					

	50—59	60—69	70—79	80—89	90—99
1. lærari	1	1			
2. lærarar	1	3	3	1	1

	100—109	110—119	120—139	140—159	160—179
2. lærarar	1				
3. lærarar		1		1	
4. lærarar			1		

Bygdir við almennari skúlakenslu fyri minni enn 10 børn:

Syðradalur (Kallsoy) 8, Hellurnar 6, Selatrað 8, Morskranes 5, Válurin 6, Mykines 7, Øgrum 5, Múli og Norðtoftir ókent, Við Glyvur 3, Langasandur 4, Ljósá 7, Nesvík og Saksun 5, Norðadalur 4, Syðradalur 4, Dímun 2, Nes—Vág 7, Sund 3.

Ógiftir

Grundløn og Aldursviðbót	Árlig løn við dyrtíðarviðbót uttan eftirlønarfrádr.	Tal av lærarum
1400 kr.	3280 kr. 67 oyru	6
1700 „	3788 „ 12 „	2
2000 „	4312 „ 16 „	2
2300 „	4612 „ 16 „	1
2600 „	4912 „ 16 „	6
2900 „	5212 „ 16 „	9
1600 kr.	3688 kr. 12 oyru	3
1900 „	4212 „ 16 „	3
2200 „	4512 „ 16 „	
2500 „	4812 „ 16 „	2
2800 „	5112 „ 16 „	1
3100 „	5436 „ 16 „	3

Giftir

Grundløn og Aldursviðbót	Árlig løn við dyrtíðarviðbót uttan eftirlønarfrádr.	Tal av lærarum
1400 kr.	4221 kr. 00 oyru	
1700 „	4832 „ 00 „	5
2000 „	5468 „ 00 „	1
2300 „	5768 „ 00 „	6
2600 „	6068 „ 00 „	5
2900 „	6368 „ 00 „	7
1600 kr.	4732 kr. 00 oyru	2
1900 „	5368 „ 00 „	
2200 „	5668 „ 00 „	1
2500 „	5968 „ 00 „	1
2800 „	6268 „ 00 „	5
3100 „	6604 „ 00 „	27

III. Tey viðurskifti, sum henda nevnd serliga skuldi kanna og kanska gera uppskot til broytan og bøtan av, eru:

1. Skúlaskipan, lærugreinir og kenslulag (undirvísingarlag).
2. Skúlahús, fimleikarvøllir, svimjihylar o. a.
3. Kenslutíð og skúlafrítíð.
4. Barnatal í klassa og skúla mett eftir læraratali.
5. Lønir og eftirlønir lærara.

Um skúlaviðurskiftir yvirhøvur er at siga, at teimum viðvíkjandi varð ógvuliga nógv broytt í øðrum londum fyri bardagan, kunnigast vóru broytingarnar í Norðanlondum føroyskum lærarum, og eisini her hava í smáum royndir verið gjørdar at leggja kenslulagið í nýggjar ræsur. Hvat ið kann verða broytt í norðurlanda skúlaskapi undir bardaganum, vita vit ikki, men óivað munnu broytingarnar har hava verið, sum vit kunnu hava gagn av at kenna, áðrenn vit leggja fast stevnumið fyri føroyskan skúla í næstu framtíð. Í Ongland vita vit, at skúlaskipanin hevur verið fyri miklari broytan og verður tað kanska uppaftur meir eftir bardagan, so eisini hetta mælir til ikki at seta upp endaligt stevnumið, fyrr enn gjøllur kunnleiki kann verða fingin um broytingarnar í okkara grannalondum. Tað hevur eydnast løgtingsskrivstovuni at fingið eitt eintak av nevndaruppskotinum til broytingar í enskum skúlaskapi, men so seint, at limirnir hava ikki kunnað gjørst kunnigir við tað í so góðari tíð, at nevndin kann hava tikið støðu til tess týðning fyri okkum, og um vit kunna nýta tað ella partar av tí sum grundarlag fyri skúlaskapi okkara. Nevndin heldur tí fram at savna tilfar til kunnleika um skúlaskapsviðurskiftini og teirra broytan og vil so skjótt hon kann, eftir tað at bardagin er komin at enda, geva tinginum uppskot um stevnumið fyri føroyskan skúla, punktinum 1 viðvíkjandi.

Punktini 2—5 viðvíkja øll peningalig viðurskifti, og endaligt uppskot teimum viðvíkjandi kann tí ikki verða gjørt, fyrr enn bardagin er komin at enda og gjøllur kunnleiki fast til, hvat peningur verður tøkur til føroyskan skúla. So leingi hesin kunnleiki ikki er fingin til vegar, má verða hildið fram av løgtingi og skúlastjórn at arbeiða sum best eftir núgaldandi skipan, bøta neyðturvuligt um skúlahús og reinhald teirra, gera fimleikarvøllir og svimjihylar og yvirhøvur veita skúlunum so góð arbeiðskor sum gjørligt eftir teim reglum, sum eru í gildi.

Skúlastjórnin hevur lagt fyri nevndini mál um:

1. Leiðbeining fyri skúlanevndir,
2. lægri mark fyri barnatalið í klassa og skúla og
3. spurningin, um ferðalæraraplássini eiga at verða gjørd til føst læraraplass og kanska summi av teimum avtikin.

Nevndin hevur viðgjørt málini og viðleggur avskrift av svarinum til skúlastjórnina teimum báðum fyrstu málunum viðvíkjandi. Svarið tí triðja málinum viðvíkjandi verður sent skúlastjórnini fyrsta dagin, og nevndin ger tinginum kunnigt, at stjórnin kanska vil leggja hetta mál fyri tingið í hesi tingsetu.

Álit frá millumtinganevndini

viðvikjandi skúlamálum um ferðalæraraplássini.

Skúlastjórnin hevur biðið nevndina viðgjørt, um ferðalæraraplássini eiga at verða verandi, sum tey eru, ella tey eiga at verða gjørd til føst læraraplass og kanska summi av teimum avtikin.

Nevndin hevur viðgjørt málið og sendir her fram sítt álit.

Ferðalæraraplássini eru so ymisk til barnatal og tí viðvíkjandi, hvussu tey eru nærstødd ella fjarstødd øðrum skúlum, at nevndin hevur ikki hildið seg kunnað sett upp almennar reglur til broytingar galdandi øllum. Summi av plássunum eru so nærstødd øðrum størri skúlum, at tað má haldast at vera ein vinningur skúlaliga sæð, um børnini frá hesum plássum ganga í skúla í grannabygdini. Soleiðis er vorið t. d. við Ánunum og Norðoyri, haðani so stutt er til Klakksvíkar og lætt gongt eftir sløttum, vælgjørdum veg, at tað má verða hildið beinast, at børnini haðani fáa skúlagongd í Klakksvík. Tað sama er galdandi á Nesi og í Víkarbyrgi. Hesum báðum plássum viðvíkjandi mælir nevndin til, at børnini á Nesi fáa skúlagongd í Vági, og at børnini í Víkarbyrgi ganga tann stutta vegin til Aktar. Um so onkran stak dag á vetrinum børnini ikki torga í skúla vegna veður, so er vinningurin av at fáa skúlagongd í einum størri skúla so stórur, at hann væl vigar upp ímóti stríðinum av tí longri skúlaleiðini, sum tó á ongan hátt er longri, enn børnini hava so mangarstaðir t. d. í Danmark.

Dímun viðvikjandi heldur nevndin, at hetta ferðalæraraplássið eigur at verða avtikið, um semja kann fáast um at veita munagóða hjálp á annan hátt til at fáa teim børnum, sum hoyra heima her, tørvandi skúlagongd. Hesi 3 børn kosta nú løgtingi og stati 3.280 kr. árliga. Nevndin skjýtur upp, at tá ið tað elsta barnið har, ein genta, fer úr skúlanum, ætlandi næsta ár, verður ferðalæraraplássið avtikið og veittur studningur til, at teir tveir dreingirnir, sum eftir eru, kunnu ganga í skúla í Skúvoy t. d. 6 mánaðir av árinum.

Ferðalæraraplássið í Dali og á Skarvanesi við tilsamans 12 skúlabørnum mælir nevndin til at gera til fast læraraplass við tað, at roknað kann verða við, at hetta barnatalið fer nøkunlunda at halda sær.

Í samanhang við málið um ferðalæraraplássini loyvir nevndin sær at seta fram hesa hugsan:

Í áliti sínum hevur nevndin skotið upp at 3 pláss verða avtikin. Hetta eru øll pláss við ógvuliga lítlum barnatali uppá hvønn lærara. Ein kannan av listanum yvir barnatal mett saman við læraratal fyri teir ymsu skúlar vísir, at hetta talið er ógvuliga ymist. Munurin er stórur á Glyvtar skúla við 69 børnum til ein lærara og Mykines við 7 børnum til 1 lærara ella Nesvík og Saksun við 5 børnum til ein lærara (í 2 bygdum). Sum tíðin líður, broytist barnatalið í teim ymsu bygdunum, í summum nørist, í summum fækkast, og á tann hátt er komin fram tann stóri ójavní, sum nú er. Í Nólsoy eru t. d. 2 lærarar til 51 børn, í Porkeri eru 2 lærarar til 57 børn. Í Kvívík er 1 lærari til 56 børn, á Glyrum er 1 lærari til 69 børn, á Toftum eru 2 lærarar til 106 børn, altso 53 uppá læraran, í Miðvági 2 lærarar til 93 børn, á Sandi 2 lærarar til 86 børn o. s. fr. Í Klakksvík eru 14 lærarar til 354 børn, altso 25 børn uppá læraran.

Tað hevur ikki borið til í ár at gjørt eitt uppskot til eina meiri umfatandi broytan av læraratalinum fyri teir ymsu skúlar í mun til barnatalið, hetta kann heldur ikki verða gjørt, fyrr enn ein hevur tikið endaliga støðu til læraralønirnar í næstu framtíð, og hvussu mikil peningur verður tøkur til skúlaskapin á hvørjum ári, men nevndin skjýtur upp, at

um tey frammanundan nevndu 3 ferðalæraraplass verða avtikin, at so verða gjørd minnst 3 nýggj læraraplass í bygdum, har ov nógv børn eru uppá læraran.

Tað er nevndini kunnugt, at skúlastjórnin hevur fingið umsókn um, at ferðalærari verður settur í Kaldbaksbotni. Tað er upplýst, at í Kaldbak eru 6 børn, á Sundi 2 børn og í Botninum 2. At seta 2 lærarar til hesi fáu børn má nevndin mæla frá, og bæði Sund og Botnurin hava færri børn enn minnstatalí má vera fyri at kunna fáa sín egna lærara. Nevndin mælir til, at børnini á Sundi ganga í skúla í Kaldbak, tá ið veður er til at koma um fjørðin, og at børnini úr Botninum eisini fáa skúlagongd í Kaldbak á tann hátt, at veittur verður teimum studningur til innivist har á sama hátt, sum skotið er upp viðv. Dímun.

Nevndin setur fram hetta

uppskot:

1. Ferðalæraraplássið Dalur--Skarvanes verður gjørt til fast læraraplass.
2. Ferðalæraraplássini Ánirnar—Norðoyri og Nes (Vági)—Víkarbyrgi verða avtikin. Børnini í Ánunum og á Norðoyri fáa skúlagongd í Klakksvík, børnini á Nesi í Vági og børnini í Víkarbyrgi á Økrum.

   Ferðalæraraplássið á Dímun verður avtikið, tá ið har bert eru 2 har heimahoyrandi skúlaskyldug børn, og veittur verður studningur til, at hesi børn kunnu fáa skúlagongd í Skúvoy 6 mánaðir av árinum.
3. Hesi ferðalæraraplássini: Múli--Norðtoftir, Skálabotnur—Glyvur, Langasand—Ljósá, Nesvík—Saksun og Norðadalur—Syðradalur verða óbroytt ferðalæraraplass, til læraraplássini yvirhøvur verða skipað av nýggjum.
4. Studningur verður veittur til, at børnini í Kaldbaksbotni kunnu ganga í skúla í Kaldbak í 6 mánaðar.

1. viðgerð 16. september og 10. oktober framlagt.

Álit.

Millumtinganevndin, sum tingið ífjør setti til at kanna skúlaviðurskiftini og gera uppskot til framtíðar stevnumið fólkaskúlanum og hægri skúlaskapi viðvíkjandi, hevur sent tinginum hjáløgdu frágreiðing og avskrift av svari, ið nevndin hevur givið skúlastjórnini í málum, sum stjórnin hevur lagt fyri nevndina umfram álit viðvíkjandi skúlaskipanini í smábygdum (ferðalæraraplass o. a.). Millumtinganevndin skjýtur upp

1) at gera ferðalæraraplássið Dalur—Skarvanes til fast læraraplass,
2) at avtaka ferðalæraraplássini: Ánirnar--Norðoyri, og Nes- Víkarbyrgi. Børnini í Ánunum kunnu fáa skúlagongd í Klakksvík, tað sama børnini á Oyri, børnini á Nesi í Vági og børnini í Víkarbyrgi á Økrum, somuleiðis at avtaka ferðalæraraplássið á Dímun, tá ið har bert verða 2 har heimahoyrandi skúlaskyldug børn, og at veittur verður studningur til, at hesi børn kunna fáa skúlagongd í Skúvoy 6 mánaðir av árinum.

3) at hesi ferðalærarapláss: Múli—Norðtoftir, Skálabotnur—Glyvur, Langasand—Ljósá, Nesvík—Saksun og Norðadalur—Syðradalur verða óbroytt ferðalærarapláss, til læraraplássini yvirhøvur verða skipað av nýggjum,
4) at studningur verður veittur til, at børnini í Kaldbaksbotni kunna ganga í skúla í Kaldbak 6 mánaðir av árinum.

Skúlastjórnin hevur viðgjørt uppskotini og vil nú kanna eftir, hvørja støðu avvarðandi sóknarstýri vilja taka til uppskotini 1 og 2. Skúlanevndin mælir til at samtykkja hesi uppskot, um sóknarstýrini viðmæla. Uppskotinum 3 viðvíkjandi er skúlanevndin eisini samsint við millumtinganevndina. Tað sama er viðvíkjandi uppskoti 4. Skúlanevndin gevur millumtinganevndini rætt, tá ið hon sigur, at tað er ov mikil kostnaður at seta 2 lærarar til 6 børn í Kaldbak, 2 á Sundi og 2 í Botninum, og at lata 1 lærara ferðast millum 3 pláss fer at vera óhóskandi í nútíðini. Skúlanevndin heldur tað tí vera vert at royna ta leið, sum millumtinganevndin hevur skotið upp viðvíkjandi Kaldbaksbotni og Dímun og veita studning til, at tey fáu børnini fáa skúlagongd í grannabygdini, tað fer altíð at vera heilt fá pláss, sum talan kann vera um, kunna fáa studning á henda hátt. Studningurin eigur at verða ásettur fyri eitt ár ísenn, og nevndin skjýtur upp, í hesi dýru tíð at seta hann til 350 kr. til hvørt barnið fyri skúlaárið. Skúlastjórnin kann fáa heimild til, um neyðugt, at stytta eitt sindur um skúlatíðina.

Viðvíkjandi samansetingini av millumtinganevndini hevur Føroya lærarafelag funnist at, at teir ongan mann hava fingið í nevndina. Hildið varð fram undir orðadráttinum á tingið í fjør millumtinganevndini viðvíkjandi, at nevndin skuldi samráðast við formann Lærarafelagsins, fyristøðumenn studentaskúlans og læraraskúlans eins og við ítróttarumsjónarmannin, tá ið tørvur er til tess, og millumtinganevndin hevur greitt frá, at formaður Lærarafelagsins hevur verið tilkallaður til samráðingar við nevndina, og at hinir áðurnevndu menn verða tilkallaðir, tá ið mál koma fyri, sum teir varða av.

Føroya ítróttarlærarafelag hevur klagað um, at eingin limur í millumtinganevndini hevur serligan kunnleika í ítróttarkenslu, og bjóða teir sær til at vísa ein slíkan mann. Skúlanevndin skjýtur upp at svara hesum báðum feløgum, at millumtinganevndin vil samráðast við formann Lærarafelagsins, fyristøðumann studentaskúlans og ítróttarumsjónarmannin, tá ið tørvur er til tess.

Nevndin setur fram hetta

uppskot:

1. Skúlastjórnin verður biðin um at broyta ferðalæraraplássið Dalur—Skarvanes til fast lærarapláss á lægra lønarstigi, um sóknarstýrið ynskir hesa broytan.
2. Skúlastjórnin verður biðin avtaka ferðalæraraplássini: Ánirnar—Norðoyri og Nes—Vikarbyrgi, um børnini kunnu fáa skúlagongd ávikavíst í Klakksvík, í Vági og á Økrum, og at avtaka ferðalæraraplássið á Dímun, tá ið har ikki vera meiri enn 2 skúlaskyldug børn.
3. Veittur verða til hvørt skúlaskyldugt barn í Kaldbaksbotni fyri árið 1945 ein studningur uppá 350 kr. til skúlagongd í Kaldbak.
4. Um ferðalæraraplássið í Dímun verður avtikið næsta ár, verður veittur teimum skúlaskyldugu børnunum har tilsvarandi partvísur studningur fyri mánaðarnar september—december til skúlagongd t. d. í Skúvoy. Studningur fyri 1946 verður at fastseta á tingi 1945.

5. Svarað verður Føroya lærarafelag og Føroya ítróttarlærarafelag, at millumtinganevndin í skúlamálum vil samráðast við formann Lærarafelagsins, fyristøðumann studentaskúlans og ítróttarumsjónarmannin, tá ið tørvur er til tess.
6. Millumtinganevndin, ið vald varð í fjør, heldur fram við arbeiðinum í 1945.

Broytingaruppskot

frá J. H. Danbjørg.

Minnilutin (J. H. Danbjørg) heldur fram, at minnilutin væl kann vera samdur við meirilutan um at mæla til at broyta ferðalæraraplássið Dalur—Skarvanes til fast læraraplass við tað, at í hesum báðum bygdum eru líka nógvir íbúgvarar sum í einstøkum av teimum bygdum, ið hava fastásettan lærara.

Viðvíkjandi ferðalæraraplássunum Ánirnar—Norðoyri og Nes—Víkarbyrgi kann minnilutin ikki mæla til at niðurleggja hesi læraraplass, fyrr enn tað frá íbúgvarunum á hesum plássum ella frá viðkomandi sóknarstýrum fyriliggur úttalilsi um, at teir (tey) samtykkja í hesum.

Skulu børnini í Víkarbyrgi ganga í skúla nakra aðrastaðni, so megu tey búgva á tí plássi, sum skúlin er, tí at ganga úr Víkarbyrgi upp um fjøll eftir ongum veg letur seg ikki gera fyri smá skúlabørn.

Við tað, at bert 2 børn eru í Kaldbaksbotni, heldur minnilutin, at tað er biligari at veita foreldrunum peningastuðul, so tey kunnu lata børnini í skúla í Kaldbak.

Beint nú eru 5 skúlabørn á Dímun, og kann tað tí ikki verða talað um at niðurleggja læraraplássið har. Men roknast kann við, at barnatalið verður at minnka so mikið, at tað verður rættari at ganga somu leið sum nú er ætlanin at ganga viðvíkjandi Kaldbaksbotni.

Tá ið tingið í fjør niðursetti ta millumtinganevnd, sum skal kanna skúlaviðurskiftini bæði her á landi og aðrastaðni og gera uppskot til framtíðar stevnumið fyri føroyskan skúlaskap, var tað brek við samanseting av nevndini, at hvørki Føroya lærarafelag ella ítróttarráðgevarin vóru umboðað í hesi nevnd.

Minnilutin er tí samdur við Føroya lærarafelag, tá ið tað í skrivi, tíðarmerkt 7/8 1944, heldur fram, at hetta er ivaleyst eitt tørvandi og gott tiltak; men Føroya lærarafelag hevði væntað, at eitt sovorðið stórfingið tiltak varð ikki gjørt, uttan hetta felag, sum umboðar so at siga allar lærarar í Føroyum, fekk at vita av.

Tað mátti verið sjálvsagt, at eitt felag sum Føroya lærarafelag t. v. s. allur tann føroyski læraratættur, átti at vita eina frægast, hvussu skipast skal fyri í hesum føri, hvar ið tað treingir til umvølingar, hvar ið byggjast skal av nýggjum ella hvar gamalt skal takast niður.

Væl er tað sagt, at formaður Føroya lærarafelags skal takast við í ráðum; men hetta er ikki nokk, tí tað er jú ikki givið, at tað er hann, ið er best skikkaður til hetta.

Nei, Føroya lærarafelag átti at fingið høvi til at velja minnst ein mann í hesa nevndina, og vit vilja hervið loyva okkum at mótmæla, at hetta var ikki gjørt.

Minnilutin er eisini samdur við Føroya ítróttalærarafelag, sum í skrivi av 3. august førur fram: Føroya Ítróttalærarafelag hevur frætt, at

hitt heiðraða Føroya løgting hevur sett niður skúlanevnd, sum viðger og kannar skúlaviðurskifti og ger uppskot til stevnumið fyri føroyskan skúla.

Vit loyva okkum at siga, at vit halda tað ikki vera beint, at ikki ein limur er í hesi nevnd, sum hevur serligan kunnugleika í ítróttarkenslu.

So statt loyva vit okkum tí at heita á hitt heiðraða Løgting við ynski um at seta ein slíkan mann í nevndina og at siga okkum frá hesum.

Felagið vil gjarna sleppa at vísa á slíkan mann.

Uppskot:

a) Í staðin fyri pt. 2 verður sett:

Skúlastjórnin verður biðin at kanna nærri spurningin ferðalæraraplássini: Ánirnar—Norðoyri og Nes—Víkarbyrgi og samráðast við íbúgvararnar á teim nevndu plássum og so statt taka avgerð.

b) Í staðin fyri pt. 5 verður sett:

Føroya lærarafelag og Føroya Ítróttalærarafelag velja hvørt ein lim í millumtinganevndina í skúlamálum.

2. viðgerð 31. oktober og 3. viðgerð 15. november. Pt. 1 samtykt 16—0. Pt. 2: Uppskot Danbjørgs fall 7—0. Nevndaruppskotið samtykt 13—0. Pt. 3 samtykt 21—0, pt. 4 samtykt 14—0. Pt. 5: Danbjørgs uppskot fall 5—0. Nevndaruppskotið samtykt 14—0.

---

4. Prógvtakan við læraranámskeið.

1. viðgerð 7. september, 14. oktober framlagt.

Álit

(Danbjørg og O. F. Joensen óheftir).

Í ár varð eftir løgtingssamtykt sett á stovn námskeið fyri lærarar, ið hava tikið prógv á læraraskúlanum her, áðrenn læruttíðin varð 4 ár. Á námskeiðinum hevur verið kent í hesum lærugreinum: Fornmálinum, enskum, matematikk og cólisfrøði (fysikk). Í námskeiðinum hava luttikið 15 lærarar, og tað verður liðugt 1. februar 1945. Skeiðið hevur farið fram eftir reglum, skotnar upp av fyristøðumanni læraraskúlans, Chr. Lützen, í skrivi av 21. apríl í ár og góðtiknar síðan av landsnevnd og skúlastjórn.

Uppskot til kunngerð um prógvtakan í áðurnevndu lærugreinum, tá ið námskeiðið endar, hevur verið lagt fyri skúlastjórnina, sum hevur góðtikið tað. Nevndin mælir til at samtykkja uppskotið soljóðandi:

BEKENDTGØRELSE FRA FÆRØ AMTS SKOLEDIREKTION
ANGAAENDE
AFHOLDELSE AF PRØVE VED LÆRERKURSUS.

I.

Paa Lagtingets Foranstaltning afholdes i 1944/45 Kursus for Lærere, som har taget Afgangsprøve ved Færøernes Seminarium i Henhold til Reglerne i Vedtægt for Færøernes Seminarium af 31. Maj 1907 (3 eet-aarige Klasser) efter Regler godkendte af Skoledirektionen.

2.

Undervisningen omfatter følgende Fag: Oldnordisk, Engelsk, Matematik og Naturlære.

3.

Ved Afslutningen af Kursuset afholdes en Prøve under Samvirken af Forstanderen for Seminariet eller andre af Skoledirektionen udpegede Lærere og Censorer. Vedkommende Lærer er Eksaminator, men Emnerne for Eksaminationen bestemmes af Censor Dagen forud efter Samraad med Eksaminator. Skoledirektionen bestemmer efter Indstilling af den paagældende Censor de skriftlige Opgaver og drager Omsorg for, at den skriftlige Prøve afholdes under betryggende Tilsyn.

4.

Fordringerne ved Prøven er følgende:

a. *Matematik og Naturlære.*

Prøven i Matematik er skriftlig og mundtlig.

1. Til den skriftlige Prøve gives der 2 Opgaver: en geometrisk og en algebraisk (3 Timer til hver). Til den skriftlige Prøve kan en Formelsamling medbringes.
2. Ved den mundtlige Prøve opgives begrænset Pensum (fra en Tredie-del til Halvdelen af Stoffet).
3. Karakteren for den mundtlige Prøve gælder lige med Karakteren for den skriftlige Prøve.
4. I Naturlære afholdes der ikke Prøve, men der gives i Vidnesbyrdet Paategning om, at Eksaminanden har fulgt den supplerende Undervisning i Fysik og Kemi og fremlagt de skriftlige Kursusarbejder.

b. *Oldnordisk.*

Prøven er mundtlig. Der opgives 50 Normalsider og kræves desuden Kendskab til Formlæren.

c. *Engelsk.*

Prøven er mundtlig. Den bestaar i Oplæsning og Oversættelse af en ulæst Tekst af lettere skønlitterær eller faglig Art. Dertil knyttes nogle Spørgsmaal, der kan prøve Eksaminandens Forstaaelse af Sprogets grammatiske Bygning og det læste Stykkes Indhold.

5.

Ved Prøven, som kan aflægges i alle Fag eller enkelte Fag gives Karakterer efter de i Vedtægt for Færøernes Seminarium af 2. Maj 1939 § 21, Stk. 1, 2, og 3 indeholdte Regler.

For at have bestaaet Prøven maa Eksaminanden have opnaaet mindst g (4⅓) i hvert af Fagene.

Den af Skoledirektionen dertil beskikkede Censor og Seminariets Forstander udsteder i Forening et Vidnesbyrd, hvori anføres Karaktererne i samtlige enkelte Fag.

KUNNGERÐ FRÁ FØROYA AMTS SKÚLASTJÓRN VIÐVÍKJANDI PRÓVTAKAN Á NÁMSKEIÐI.

1.

Fyrireikað av løgtinginum verður í 1944/45 námskeið fyri lærarar, sum hava tikið fráfaringarprógv á Føroya læraraskúla samsvarandi reglunum í samtykt fyri Føroya læraraskúla av 31. mai 1907 (3 eittára klassar) eftir reglum, góðtiknar av skúlastjórnini.

2.

Kent verður í hesum lærugreinum: Fornmálinum, enskum, matematikk og eðlisfrøði (fysikk).

3.

Í endanum av námskeiðinum verður roynd fyriskipað av fyristøðumanni læraraskúlans í samvirkan við øðrum av skúlastjórnini tilskilaðum lærarum og prógvdómarum. Avvarðandi lærari yvirhoyrir, men yvirhoyringarevnini verða avgjørd av prógvdómaranum dagin fyri í samráð við yvirhoyraran. Skúlastjórnin ger av tær skrivligu uppgávurnar eftir uppskoti frá avvarðandi lærara og skipar fyri, at nóg tryggjandi eftirlit verður havt við tí skrivligu royndini.

4.

Krøvini við prógvtakanina eru hesi:

a. *Matematikk og eðlisfrøði.*

Royndin í matematikk er skrivlig og munnlig.

1. Til ta skrivligu royndina verða givnar 2 uppgávur: ein geometrisk og ein algebraisk (3 tímar til hvørja). Til ta skrivligu royndina kann prógvtakarin hava formelsavn við.
2. Við ta munnligu royndina verður yvirhoyrt í avmarkaðum námsevni (frá triðing til helvt av námsevninum).
3. Karakterurin í munnligari roynd telur eins nógv og karakterurin í skrivligari roynd.
4. Í eðlisfrøði verður ikki roynt, men í vitnisburðinum verður viðmerkt, at prógvtakarin hevur luttikið í tí viðbotandi kensluni í eðlisfrøði og kemi og hevur givið frá sær tey skrivligu námskeiðararbeiðir.

b. *Fornmálið.*

Royndin er munnlig. Yvirhoyrt skal verða í 50 normalsíðum og umframt verður kravdur kunnleiki í mállæruni.

c. *Enskt.*

Royndin er munnlig. Royndin fer fram við upplestri og umsetan av einum frammanundan ólisnum teksti av nakað lættari fagurbókmentaligum ella fakligum slag í samband við spurningum, ið kunna lýsa prótvtakarans skil uppá málsins uppbygging og innihaldinum í tí lisna stykki.

5.

Við prótvtakanina, sum kann verða tikin í øllum lærugreinum ella einstøkum lærugreinum, verða givnir karakterar eftir teimum í reglugerð fyri Føroya læraraskúla av 2. mai 1939, § 21, stk. 1, 2 og 3 ásettu reglum.

Til at standa prógvið má prótvtakarin hava fingið í minnsta lagi g ($4^1/_3$) í hvørjari lærugrein.

Tann av skúlastjórnini tilskilaði prótvdómarin og fyristøðumaður læraraskúlans geva í felag skrivligan vitnisburð og verða á honum uppførdir karakterarnir fyri hvørja lærugrein sær.

2. viðgerð 17. oktober. 3. viðgerð 25. oktober. Samtykt 15--0.

---

5. Endurgjald av vikarútreiðslum.

---

1. viðgerð 7. september. 7. november framlagt.

Álit.

Føroya Læraratelag søkir í skrivi dagf. 5. august 1944 um studning til vikarútreiðslur til teir læraran, sum luttaka í námskeiðinum til eykaprógv í Enskum og øðrum lærugreinum. Teir greiða frá, at fyrsti partur av skeiðinum hevur farið fram, fyrst suðuri í Vági við hesum lærugreinum og tímatali: Enskt, 8 tímar um vikuna, fornmálið, 4 tímar, matematik, 8 tímar og eðlisfrøði (fysikk) 4 tímar um vikuna, síðan í Havn 4 tímar um dagin eðlisfrøðisroyndir. Námskeiðartiðin var í Vági 6 vikur og í Havn 1 vika. Í skeiðinum luttóku 15 lærarar, 14 við føroyskum og 1 við donskum læraraprógvi. Annar partur av skeiðinum fer nú fram á tann hátt, at læraraluttakararnir heima arbeiða tær uppgávur, sum settar eru teimum fyri, og fáa tær rættaðar av námskeiðarlærarunum, triði og seinasti partur skal so fara fram í Havn í januar og februar mánaðum 1945. Læararnir, sum luttóku máttu hava vikár fyri seg tær 6 vikurnar, teir

vóru suðuri í Vági, og noyðast aftur at hava vikar fyri seg teir 2 mánaðirnar, teir fara til Havnar til seinasta part av námskeiðinum. Vikarløn er o. u. 350 kr. um mánaðin, t. v. s. at luttakararnir fáa eina útreiðslu uppá o. um 700 kr. av seinasta parti av námskeiðinum.

Løgtingsskrivstovan hevur biðið teir ymsu luttakararnar upplýst teirra vikarútreiðslur av fyrsta parti av námskeiðinum, og eru tær ógvuliga ójavnar, frá 100 kr. til 370 kr., ein luttakari, lærari í Vági, hevur bert goldið 50 kr., av tí hann hevur kunnað hildið skúla sjálvur mestu tiðina. Orsøkin til tann stóra ójavna í vikarútreiðslunum er, at 3 av lærarunum, sum halda skúla 6 dagar um vikuna tær 6 vikurnar, hava goldið fulla vikarløn 350—370 kr., meðan aðrir, sum bert halda skúla 2 dagar um vikuna tær 6 vikurnar, hava goldið ella átti at hava goldið 100—120 kr.

Nevndin skjýtur upp at veita luttakarunum studning í nakað sama mun sum í Danmark verður veittur luttakarunum í ársnámskeiði á læraraháskúlanum í Keypmannahavn og mælir til at veita teimum, sum luttaka í øllum námskeiðinum 400 kr. í studningi og 75 kr. í eykastudningi til tey 3 lærarafólk, sum hava noyðst at hava fullan vikar ta fyrstu námskeiðartíðina. Prógv fyri at hava havt vikar má verða framsent. Um nakar luttakari ikki luttekur í øllum skeiðinum ella bert tekur lutvíst prógv, ger skúlastjórnin saman við fyristøðumanninum fyri námskeiðinum av, um studningur eigur at verða latin og hvussu nógvur.

Uppskot:

Úr amtsgrunninum verður veittur teimum, sum luttaka í øllum námskeiðinum til eykaprógv í Enskum, matematikk, eðlisfrøði og fornmáli til læraraprógv í studning 400 kr. og í eykastudning til tey 3 lærarafólk, sum hava noyðst at hava fullan vikar ta fyrstu námskeiðartíðina 75 kr. Prógv fyri at hava havt vikar má verða framsent. Um nakar luttakari ikki fullførir námskeiðið ella bert tekur lutvist prógv, ger skúlastjórnin saman við fyristøðumanninum fyri námskeiðinum av, um studningur eigur at verða latin og hvussu nógvur.

Broytingaruppskot

frá Kr. Djurhuus o. fl.

Undirritaðu halda, at tað almenna má leggja tað sjónarmið til grund í hesi sak, at ein lærari her frá tí almenna fær frían skúla, og tí sjálvur eigur at kosta tað, ið fer til vikar, ferðir og annað, um hann er førur fyri ti.

Vit loyva okkum ti at seta hetta broytingaruppskot til málið, soleiðis at tað einans verður goldin studningur eftir serligari umsókn frá teim einstøku lærarum, at tað má prógvast at lærarin sjálvur ikki er førur fyri at kosta hetta, og at studningurin í hægsta lagi kann setast til 350 kr. fyri hvønn lærara.

Uppskot:

Løgtingið samtykkir, at skúlastjórnin eftir samráð við fyristøðumannin fyri námskeiðinum úr amtsgrunninum kann játta teimum luttakandi lærarum, ið ikki sjálvir eru mentir at bera útreiðslurnar, studning upp til 350 kr. til hvønn lærara, tó ongantíð meira enn tær prógvaðu veruligu útreiðslur.

Uppskot til avgerðar

frá R. Long o. fl.

Út frá ti sjónarmiði, at tingið eigur at koma umsóknini frá Føroya Lærarafelagi um studning til vikarútreiðslur orsakaðar av luttakan í námskeiði 1944/1945 nakað á møti, seta undirskrivaðu tingmenn fram hetta

uppskot:

Løgtingið samtykkir, at skúlastjórnin eftir samráð við fyristøðumannin fyri námskeiðinum 1944/1945 úr amtsgrunninum kann játta teimum luttakandi lærarum, ið ikki sjálvir eru mentir at bera útreiðslurnar, studning upp í 350 kr. til hvønn lærara, tó ikki upp um tær prógvaðu veruligu útreiðslur.

Framlagt 30. november. Loyvið givið 20—0. 2. og 3. viðgerð 1. desember. Samtykt 18—0.

---

6. Ítróttur sum føst lærugrein.

1. viðgerð 8. september. 22. november framlagt.

Álit.

Føroya Ítróttalærarafelag hevur dagf. 4. august í ár søkt tingið um at gera ítrótt til fasta lærugrein í skúlunum.

Um tingið vil halda, at tað ber ikki til at gera ítrótt til fasta lærugrein í øllum skúlum, søkir felagið um, at ítróttalærarar verða settir við teir størstu skúlarnar beinan vegin so nógvir, sum fáast kunna við fullfíggjaðum ítróttalæraraprógvi.

Umframt biðja teir tingið gera eina lóg, sum sigur, at ítróttalærari skal verða settur við allar skúlar í Føroyum, sum hava ítrótt sum fasta lærugrein, og at eingin lærari uttan fullfíggjað ítróttalæraraprógv fær pláss í slíkum skúlum, um ein slíkur er søkjari av plássinum. Teir vísa á, at í okkara grannalondum, ongastaðni meir eftir førimuni enn í Íslandi, verður nógv gjørt fyri at fáa skúlarnar at taka sær av ítróttini.

Skúlastjórnin, sum hevur fingið málið til viðgerðar, áðrenn tað varð lagt fyri tingið, hevur sent ítróttareftirlitsmanninum og bygdaskúlaeftirlitsmonnunum tað til viðmælis.

Poul E. Petersen, ítróttareftirlitsmaður, hevur 2. september svarað soljóðandi:

«Ovenstaaende fra Føroya Íróttalærarafelag til Færøernes Lagting indsendte Ønsker og Forslag giver jeg min bedste Anbefaling og foreslaar den ærede Direktion at anbefale Forslaget fra Foreningen.

Ansøgningen indeholder egentlig 3 Punkter:

I. *Idræt* (Fællesbetegnelse for Legemsøvelser af enhver Form saasom Gymnastik, Svømning, fri Idræt, Boldspil, ordnede Lege etc.) gøres til obligatorisk Undervisningsfag i alle færøske Skoler.

II. Ansættelse af *fuldt* kvalificerede Gymnastiklærere ved alle Skoler paa Færøerne, ev. kun ved de større Skoler.

III. Forslag til Lagtinget om at vedtage en Lov, der giver Lærere med udvidet Uddanpelse i Idræt fortrinsvis Ret til Ansættelse ved ledige Embeder ved Skoler, der allerede har Idræt paa Skoleplanen.

ad I. Forslaget er i Traad med Lov af 1937(?) om Folkeskolen i Danmark, hvorfor jeg synes, det er unødvendigt for mig at kommentere Forslaget fra Føroya Íróttalærarafelag; mit Standpunkt har altid været og er, at Idrætten bør indføres som obligatorisk Fag ved Skolerne paa Færøerne.

ad II. Dette Forslag er derimod et specielt færøsk Ønske, men efter min Opfattelse et meget forstandigt Forslag, selv om det kun blev de større Skoler der fik fuldt kvalificerede Idrætslærere. Det siger sig selv, at man ved Indførelse af obligatorisk Idræt ved alle Skoler paa Færøerne vil komme at støde paa den Ulempe, at ikke alle Skoler paa nuværende Stadie er i Stand til at give en fuldt forsvarlig Undervisning i dette Fag, dels fordi det mangler Idrætspladser, Gymnastiksale og Svømmebassiner, og dels fordi der mangler nok af fuldt kvalificerede Idrætslærere.

Disse Ulemper er dog ikke specielt færøske, disse forekommer i alle Lande, og kan jeg specielt udtale mig om disse Forhold i Danmark og Island, hvilke jeg er godt kendt med. Her har man regnet med disse Forhold og derfor indført Bestemmelser med Undtagelser fra Regelen. Og ang. disse Ulemper vil det Foreningen foreslaaede virke gavnligt, idet man ved at ansætte de fuldt kvalificerede Idrætslærere ved de større Skoler har et udmærket Udgangspunkt for en fornuftig Gennemførelse af den obligatoriske Undervisning i Idræt.

De fuldt uddannede Idrætslærere vil ogsaa bedre end de mindre uddannede kunne undervise under mindre udviklede Undervisningsforhold, hvorved de kunne blive en direkte Aarsag til bedre Undervisningsforhold paa Stedet og de omgivende smaa Skoler.

Saa vidt jeg husker findes der ca. 10 fuldt kvalificerede Idrætslærere paa Færøerne; med fuldt uddannede Idrætslærere mener jeg og Foreningen med saadanne Lærere, der har taget Lærereksamen med Gymnastik, taget Svømmelærereksamen og Eksamen i fri Idræt enten ved Statens Kursus paa Færøerne eller ved Statens Gymnastiklærerinstitut.

Disse Lærere burde efter min Opfattelse fordeles paa de større Skoler som f. Eks. Tveraa, Klaksvig, Vaag, Thorshavn Kommuneskole, Færøernes Mellem- og Realskole, Sørvaag, Midvaag, Vestmanhavn, Fuglefjord, Gøte. Dels kunde der være Tale om en Centralundervisning ved forskellige Skoler, til Eks. Strænder—Skaale, Tofte—Glibre—Solmunde, Sand—Skaalevig—Husevig—Skopen og lignende Skoler, hvor det nemt lader sig gøre for en Lærer at komme frem og tilbage.

En saadan Ordning vilde snart medføre et godt Grundlag for Gennemførelsen af en obligatorisk Undervisning i Idræt ved Skolerne paa Færøerne, dernæst vilde man om ganske kort Tid faa en Stab af godt kvalificerede Idrætslærere, som ikke blot var i Stand til at undervise i Skolerne, men som tilligemed kunde forestaa Foreningernes Idræt og blive Rygraden i den idrætslige Bevægelse paa Færøerne, hvilket vi trænger *haardt* til særlig i denne Tid, hvor Idrætsbevægelsen bréder sig over hele Landet og truer med at knuse dem, der styrer denne, idet der er meget stor Mangel paa kvalificerede Arbejdskræfter.

ad III. Som allerede bemærket har vi paa Færøerne allerede i flere Aar haft fuldt kvalificerede Idrætslærere; men disse har for største Delen haft Ansættelse ved Vandrelærerskoler og andre smaa Skoler. Saadanne Skoler bør jo ogsaa have godt kvalificerede Lærerkræfter, men man bør hellere sætte saadanne Lærerkræfter paa de større Pladser, hvor de bedre kan blive til større Nytte, naar Forholdene er som her hos os, at disse Lærerkræfter kun er et Mindretal af de samlede Lærerkræfter.

I Danmark vilde man regne med som givet, at alle disse Lærere med Specialuddannelse og Interesse vilde faa Ansættelse ved Købstadskolerne, og paa Island gælder de samme Forhold.

Da jeg i sin Tid fik Undervisningsministeriet til at gaa med til at oprette et Kursus, hvor Lærere kunde faa Specialuddannelse som Idrætslærere paa Færøerne, var det netop ud fra den Betragtning, at disse Lærere skulde faa Ansættelse ved de større Skoler og senere gennemgaa den udvidede Gymnastiklærereksamen ved Statens Gymnastikinstitut, og Færøerne paa denne Maade lidt efter lidt faa en dygtig Stab af Idrætslærere og Idrætslærerinder, som kunde staa Maal med de dygtigste i Udlandet og gavne baade Skole og Foreninger.

De første Kursus havde ogsaa Tilslutning af flere unge, energiske Lærere, som havde Lyst til at arbejde som Idrætslærere. Men snart viste det sig, at disse *ikke* have flere Muligheder for Ansættelse ved de større Skoler end andre, som ikke havde nogen Specialuddannelse. Derved slappedes Interessen lidt efter lidt.

Forslaget fra Føroya Íttróttalæraratafelag indeholder netop disse mine Synspunkter. Specialuddannede Lærere bør absolut have fortrinsvis Ret til Ansættelse ved de større Skoler.»

Bygdaeftirlitsmenninir Z. Sørensen og S. P. úr Konoy hava 10. oktober 1944 svarað soljóðandi:

«Spørgsmaalet om at indføre Idræt som obligatorisk Fag i den færøske Folkeskole har i de senere Aar adskillige Gange været til Behandling og Inspektionen for Bygdeskolerne har haft Lejlighed til at udtale sig. Den er stadig af den Opfattelse, at nagtet Kropspleje og rigtig Ernæring er af meget stor Betydning for de Børn, som søger Folkeskolen, saa bør man ikke indføre Faget som obligatorisk, før Befolkningen ved Forstanderskaber, Skolekommissioner og eventuelle Forældreforeninger har udtalt sig om Sagen. Tvang kan medføre Tilbageslag. Under de nuværende Forhold i Folkeskolen kan man ikke se bort fra Fagtrængslen, — mange Steder vil man have tre Sprog som obligatoriske Fag — og de mindre gode Omstændigheder, hvorunder mange Skoler arbejder. At den færøske Folkeskole har ladet sig nøje med en Læreruddannelse som angives ikke at staa Maal med Uddannelsen i Danmark, og at færøske Folkeskolelærere

ikke erholder den samme Løn, som Realskolelærere paa Færøerne og Folkeskolelærere i Danmark synes at vise henimod at man ikke med Billighed kan forlange det samme Udbytte af den færøske Folkeskole som den danske. En Forbedring af Folkeskolen, derunder forbedret Undervisning i Idræt, maa ske ved grundigere og bedre Læreruddannelse og bedre Levevilkaar for Lærerne. Men dette lader sig ikke gøre, hvis ikke Befolkningen vil tage sig af Sagen.

Da praktisk talt saa godt som alle Lærere og Lærerinder har søgt forskellige Kursus i forskellige Fag efter deres Udgang af Seminarierne, maa det fraraades at give nogen Forret i et enkelt Fag ved Embedsansættelse. Det bør staa de lokale Myndigheder frit at indstille enhver, som er kvalificeret til at blive Lærer, og Skoledirektionen at ansætte efter sit Skøn.»

Skúlastjórnin hevur sent Løgtinginum málið uttan viðmerking.

Fyriskipan av 16. jan. 1912 viðvíkjandi bygdaskúlum (broytt 12. dec. 1938) skipar í § 7 soleiðis fyri í fyrsta og øðrum stykki:

I enhver Skole skal der undervises i følgende Fag: Religion, Dansk, Færøsk, Skrivning, Regning, Historie, Geografi og Sang. Desuden skal der efter nærmere Bestemmelse i Undervisningsplanen kunne gives Undervisning i Gymnastik, Svømning, Haandgerning, Tegning, Naturkundskab, Sundhedslære og Samfundslære.

Fimleiki og svimjing eru á tann hátt ikki tvungnar lærugreinir í bygdaskúlunum, men eftir frágreiðing frá skúlastjórnini var í 1942 kent í fimleika í 17 skúlum uppi í teimum skyldugu 36 kenslutímum um vikuna og í 5 skúlum útyvir teir 36 tímarnar, tilsamans í 22 skúlum (av 61) og í svimjing í 18 skúlum uppií teim 36 tímunum og í 1 útyvir teir, tilsamans í 19 skúlum av 61.

Málið: Svimjing sum tvungin lærugrein var seinast fyri á tingi í 1942, og varð tá samtykt hetta uppskot:

«1) Lagtinget kan ikke for Tiden imødekomme den fremsatte Henstilling om at indføre Svømning som tvungent Fag i den færøske Folkeskole.
2) Der bevilges af Færø Amts Repartitionsfond et Beløb af 1000 Kr., som stilles til Disposition for Færø Amts Skoledirektion til Anvendelse til Anskaffelse af Diplomer og Svømmemærker, der anvendes i Overensstemmelse med et Reglement, godkendt af Direktionen.
3) Skoledirektionen anmodes om at gøre samtlige Skolemyndigheder og Lærere i Folkeskolen bekendt med, at Direktionen med Sympati omfatter Bestræbelserne for at dygtiggøre den færøske Ungdom i Svømning.»

Orsøkin til at tingið í 1942 ikki játtaði umsóknina um at fáa svimjing gjørda til tvungna lærugrein, var fyri ein part, at tá var ikki tinginum greitt, hvussu var statt við kenslu í svimjing í skúlunum; frammanundan nevnda yvirlit var ikki fingið til vegar fyrr enn í 1943. Viðvíkjandi lærarum við ítróttalæraraprógvi hevur nevndin fingið til vegar hetta yvirlit:

Á ítróttaskeiðinum vóru					
í 1936	5	næmingar	3	tóku	prógv
» 1937	5	—	0	—	—
» 1938	8	—	1	—	—
» 1939	6	—	2	—	—
» 1940	12	—	1	—	—
» 1941			0	—	—
» 1942			0	—	—
» 1943			1	—	—
» 1944			0	—	—

Í 9 ár hava altso ikki meir enn 8 lærarar tikið ítróttalæraraprógvið í Føroyum, og má hetta haldast at vera lítið, við tað at summir av teimum hava tikið prógv, aftaná at hava luttikið bert í einum skeiði. Skúlanevndin má halda, at ikki kann verða biðað við at gera svimjing til tvungna lærugrein, til vit hava fingið ítróttalærarar til flestar-skúlar her á landi. Svimjing í sær sjálvari er so heilsustyrkjandi ítrótt, samtíðis sum hon er lætt atkomilig flestastaðni í Føroyum, eins og dugnaskapur í svimjing hjá fólki yvirhøvur kanska í ongum øðrum landi er so átroðkandi neyðugur sum her hjá okkum, at her hevur verið biðað nógv av leingi við at geta svimjing til tvungna lærugrein í skúlunum á sama hátt sum í øðrum Norðanlondum. Vit vita nú, at o. u. triðingurin av skúlunum hava svimjing sum lærugrein, og nevndin heldur ongan iva vera um, at fleiri lærarar enn so vilja halda seg førar fyri at læra børnini at svimja, eins og um lærarin skuldi hildið seg undan, man ofta vera annað fólk í bygdini, sum hevði viljað tikið sær uppá at kent børnunum svimjing, um heitt varð á tey. Nevndin hevur samrátt við ítróttaeftirlitsmannin, og hevur hann sagt seg samsintan við nevndina viðvikjandi teim uppskotum um svimjing og ítrótt sum lærugreinir í skúlunum, sum nevndin vil seta fram. Nevndin heldur, at fyri fyrst má verða gjørdur munur millum svimjing og aðra ítrótt sum skúlalærugreinir, við tað at nógv færri lærarar munna hætta sær at taka sær uppá at kenna børnunum ítrótt enn at taka sær uppá at kenna teimum svimjing. Nevndin mælir til, at svimjing verður gjørd tvungin lærugrein í barnaskúlanum frá 15. september 1945, tá ið næsta skúlaár tekur við. Ítróttaeftirlitsmaðurin verður biðin so skjótt sum gjørligt at kanna eftir, í hvørjum skúlum lærararnir halda seg til at kenna børnunum svimjing, og um í teimum bygdum, har lærarin heldur seg undan, er annað álítandi fólk, sum vil taka sær hesa kenslu uppá fyri fyrst, síðan leggja hesar upplýsingar fyri skúlastjórnina, sum má fáa heimild til at gera undantak frá lógargreinini fyri skúlar, sum sóknarstýrini geva góðar grundir fyri, at har eru ikki, sum nú er, líkindi til at gera svimjing til tvungna lærugrein, og sum søkja um at verða undantiknir. Um smáar útreiðslur skuldu verið í fyrstuni av at hava framíhjálærara í svimjing á nøkrum plássum, mælir nevndin til, at landsnevndin eftir áheitan frá skúlastjórnini fær heimild til at veita tað neyðturviliga viðurgjald úr fimleikagrunninum, so leingi henda bráðfengis skipan stendur við. Tað kann ikki vera leingi, ið hvussu er í øllum skúlum við yngri lærarum, til hesir kunna taka sær uppá at kenna børnunum svimjing.

Øðrvísi er við ítrótt sum skúlalærugrein, tá ið við hesum orði verður hugsað um bæði fimleika, fría ítrótt, bóltleikir og aðrar leikir. Tá verða færri lærarar, sum tora taka sær uppá at kenna børnum alt hetta. Men nevndin heldur, at um steðgað skal verða, til allir lærarar verða fullfíggjaðir ítróttalærarar, so verður tað ein seinur dagur, at ítrótt verður skúlalærugrein í Føroyum, og mælir hon tí til at ganga ein millumveg. Allir lærarar í bygdaskúlanum hava kunnleika til fimleika frá læraraskúlatíð teirra og hava tikið prógv í hesi lærugrein. Tað er tí spell, at fimleiki ikki fyri langt síðan er gjørdur føst lærugrein í skúlunum í tann mun, sum hann kann verða iðkaður uttan fimleikahús, og tað er tó ikki lítið. Nevndin hevur heitt á ítróttaeftirlitsmannin at gera eina stutta lærubók í skúlastovufimleika, bóltleikum og kanska øðrum leikum, og hevur hann lovað at greiða hana skjótt av hondum. Tá ið henda bók er prentað, og lærarar hava fingið høvi at gera seg kunnigar við hana, mælir nevndin til at gera fimleika (og ítrótt) tvungna lærugrein í skúlunum, tó at frammanundan eiga helst lærararnir at hava fingið høvi til á einum stuttum námskeiði (eina til tvær vikur) at luttaka í skúlastovufimleikakenslu og bóltleikakenslu; so við og við kann so ítróttakenslan í skúlunum gerast meira fullfíggjað.

Nevndin má geva skúlaeftirlitsmonnunum viðhald í, at ikki verða altíð lærugreinir, sum verða tvingaðar inn á skúlar, væl fagnaðar, og eisini eru longu nógvar lærugreinir í bygdaskúlanum, men bæði eru børn altíð flest øll fegin við svimjing og ítrótt í teim skúlum, har hesar lærugreinir verða kendar, og eisini er hugurin fyri ítrótt so skjótt vaksandi í Føroyum, at ikki eigur at verða drálað nógv longur við eins og í øðrum Norðanlondum at føra hesar lærugreinir inn í skúlarnar, so friskleikafremjandi tær eisini eru.

Hini bæði punktini í umsóknini frá ítróttalærarafelagnum kann nevndin ikki mæla til at samtykkja, men má geva skúlaeftirlitsmonnunum viðhald, tá ið teir halda fram, at stór lærarafjøld í Føroyum hevur fingið sær hollan framíhjá kunnleika í ymsum lærugreinum uttan harvið at hava fingið framíhjá rættindir og at illa ber til at taka ítróttalærararnar so nógv fram um aðrar, ið summir hava nógv longri framíhjá lærutíð enn teir. Men rímiligt er, at ítróttalærararnir hava ein fyrimun, tá ið tala er um at seta nýggjan lærara við størri skúla, har meiri dentur kann verða lagdur á ítróttakenslu enn í smáum, um teir annars eru væl kunnigir við aðrar lærugreinir.

Nevndin setur fram hetta

uppskot:

1. Svimjing verður gjørd tvungin lærugrein í barnaskúlanum frá næsta skúlaári.
2. Skúlastjórnin verður biðin kanna eftir, hvussu mangir lærarar kunna taka sær uppá at kenna børnum svimjing, og um álítandi fólk, ið kann taka sær hetta uppá, er at finna í teimum bygdum, har lærararnir fyri fyrst mugu siga seg undan.
3. Skúlastjórnin fær heimild til at taka svimjing undan sum tvungna lærugrein í skúlum, sum søknarstýrini geva góðar grundir fyri, at har eru ikki, sum nú er, líkindir til tess, og sum søkja um tað.
4. Ítróttaeftirlitsmaðurin verður biðin gera stutta lærubók í skúlastovufimleika, bóltleikum og kanska øðrum leikum til brúks í barnaskúlanum. Tá ið henda bók er komin til brúks, ger Løgtingið av, nær ið ítrótt kann verða gjørd til tvungna lærugrein, og um frammanundan skal fara fram stutt námskeið fyri lærarar.
5. Um skúlastjórnin heldur orsøk vera til at veita eitt lítið viðurgjald til einhvønn, sum ikki er lærari, og sum vil taka sær uppá bráðfengis at kenna børnum svimjing, fær Landsnevndin heimild at lata tørvandi pening úr Fimleikagrunninum.

FORSLAG

til

midlertidige Bestemmelse om Ændring i Anordning Nr. 363 af 12. December 1938, angaaende forskellige Forhold vedrørende Folkeskolen paa Færøerne.

§ 7 affattes saaledes:

Stk. 1. I enhver Skole skal der undervises i følgende Fag: Kristendomskundskab, Færøsk, Dansk, Skrivning, Regning, Historie, Geografi, Svømning og Sang. Ved Undervisningen i Færøsk og Dansk lægges der Vægt paa, at Børnene opnaar Færdighed i Brugen af de to Sprog, saavel i Læsning som i Tale og Skrift.

Stk. 2. Der kan desuden efter nærmere Bestemmelse i Undervis-

ningsplanen gives Undervisning i Gymnastik, Haandgerning, Tegning, Naturkundskab, Sundhedslære og Samfundslære. Skoledirektionen kan dispensere fra Bestemmelsen om Svømning.

Stk. 3. Forældre, der staar uden for Folkekirken, kan forlange deres Børn fritagne for at deltage i Undervisningen i Kristendomskundskab.

Stk. 4. De Læremidler, der kun bruges i Skolen, anskaffes til samtlige Børn for Kommunens Regning.

Foranstaaende Bestemmelse træder i Kraft fra Begyndelsen af Skoleaaret 1945/46.

UPPSKOT

til

bráðfengis fyrisetan um broyting í fyriskipan nr. 363, 12. december 1938, um ymisk viðurskiftir fólkaskúlanum í Føroyum viðvíkjandi.

§ 7 verður orðfest soleiðis:

Stk. 1. Í øllum skúlum skal verða kent í hesum lærugreinum: Religión, føroyskum, donskum, skriving, rokning, søgu, landalæru, svimjing og sangi. Undir kensluni í føroyskum og donskum skal verða lagdur dentur á, at børnini vera før at nýta hesi mál bæði í lestri og í talu og skriving.

Stk. 2. Umfram kann eftir nærri fyrisetan í kensluætlanini verða veitt kensla í fimleika, handavinnu, tekning, náttúrufrøði, friskleikafrøði og samfelagslæru. Skúlastjórnin kann gera undantak frá ásetanini um svimjing.

Stk. 3. Foreldur, sum ikki eru í fólkakirkjuni, kunna krevja børn sini fri frá at luttaka í kensluni í religión.

Stk. 4. Læruamboð, sum bert verða nýtt í skúlanum, verða útvegað øllum børnum uppá kommununar rokning.

Frammanfyristandandi fyrisetan fær lógargildi frá ti skúlaárið 1945/46 tekur við.

2. viðgerð 23. november. 3. viðgerð 30. november. Pt. 4 fall 10—0 og hini uppskotini fullu 12—0 (Ja atkvóðu: Johan Poulsen, P. M. Dam, Richard Long, A. Djurhuus, Kr. Djurhuus, O. F. Joensen, J. H. Danbjørg, J. P. Henriksen, Pauli Dahl, S. Ellefsen, J. Fr. Øregaard, J. P. Davidsen, J. Patursson burturstaddir og hinir atkvóðu ikki).

---

7. Lønin hjá læraranum í Øravík.

1. viðgerð 8. september. 16. november framlagt.

Álit.

Jakob Jakobsen Berg, lærari í Øravík og Líðini hevur í brævi dagf. 1. juli í ár søkt sóknarstýrið í Froðbøar sókn um at útvega honum einalæraraløn sbr. lóg nr. 153 av 28. april 1931, § 2, har ímillum annað verður sagt: «Undervisningsministeren kan efter Indstilling af Kommunalbestyrelsen bestemme, at Andenlærere eller nogle af disse lønnes som Første- og Enelærere.» Sóknarstýrið hevur sent Løgtinginum umsóknina við viðmæli at skipa fyri, at hann fær umsóktu løn.

Í áðurnevndu lógargrein koma aftaná frammanundan nevndu fyrisetan hesi orð: «I et Skoledistrikt, hvor Undervisningen besørges af samme Lærer, og hvor Elevtallet normalt er under 40, kan et Enelærerembede normeres med Anderlærerløn.»

J. J. Berg hevur fyri fáum árum síðan sókt skúlastjórnina um at verða løntur eftir hægra lønarstigi, men stjórnin játtaði ikki umsóknina. Nevndin hevur biðið skúlastjórnina upplýsa barnatalið í áðurnevndu skúlum tey seinastu árini, og hevur hon greitt frá, at frá 1940—44 hevur barnatalið í báðum skúlunum tilsamans eftir fráverulistunum verið millum 16 og 21. Skúlastjórnin greiðir samtíðis frá, at hon hevur haft hesa seinastu umsókn til viðgerðar og skrivað umsøkjaranum, at hon kann ikki játta umsóknina, fyrr enn læraralønarskipanin er viðgjørd frá grundini.

Ein meiriluti í nevndini (Dahl, Joensen, Long og Poulsen) heldur, at hetta barnatalið er ikki nóg stórt til at lærarin kann koma uppá hægra lønarstigið, sum viðurskiftini eru nú, og nógvir lærarar á lægra lønarstigi sita við væl fleiri børnum. Lønarviðurskiftini yvirhøvur eru víst til millumtinganevndina í skúlamálum, soleiðis at kon skal gera uppskot um fleiri lønarstig skulu vera í framtíðini, og um so skal vera, hvar markið skal verða sett. Sostatt heldur meirilutin, at avgerð kann ikki verða tikin í hesum máli, fyrr enn tingið hevur fingið fyrilagt, og tikið støðu til uppskotið frá millumtinganevndini, tá ið tað fer at liggja fyri.

Ein minniluti (Danbjørg) mælir til, at umsóknin verður játtað.

Uppskot

frá meirilutanum (Dahl, O. F. Joensen, Long og Poulsen):

Tingið kann ikki taka støðu til umsóknina, fyrr enn tað hevur tikið støðu til uppskot frá millumtinganevndini í skúlamálum um læraralønarskipan í framtíðini.

Frá minnilutanum (Danbjørg): Siggj minnilutaálitið.

Minnilutaálit.

Minnilutin (J. H. Danbjørg) heldur fram:

Læraraløninar her á landi eru ógvuliga ójavnar og flest allar nógv ov lágar.

Fyrstilærarin á Tvøroyri hevur, sovitt minnilutanum kunnugt, eina grundløn av 4.800 kr., fyrstilærarin í Vági 3.000 kr. og fyrstilærarin í Klakksvík 3.000 kr. Hesin munur tykist at vera stórur, tá ið hugsað verður um, at í øllum hesum trimum bygdum eru realskúlar. Hetta er einans framført fyri at ávísa, hvussu ójavnar lønir, ið goldnar vera fyri somu arbeiðir.

Aðrir lærarar við hesar skúlar, eru eisini ógvuliga ójavnt løna›ir, og tað tykist aldeilis skilaleyst, at lærarar við sama skúla liggja so ójavnt í løn sum t. d. á Tvøroyri, har summir annarlærarar hava eina grundløn, ið er meira enn 600 kr. lægri, enn tann, ið aðrir við sama skúla fáa. Sjálvandi skuldu allir lærarar við sama skúla verið eins løntir við undantak av leiðaratilleggi, sum fyrstilærarin hevur uppiborið.

Men verri enn við hesar skúlar eru lønviðurskiftini úti á smá›bygdum. Har fær sjálvt fyrstilærarin heilar 600 kr. minni í grundløn enn teir lægstløntu við hinar skúlarnar.

Umframt allar hesar ójavnar er aftur ein munur millum fyrsta› og einalærarar øðrumegin og annarlærarar hinumegin, og enntá eru summir einalærarar løntir sum annarlærarar, meðan aðrir eru løntir sum fyrstilærarar.

Sagt verður, at markið millum fyrsta› og annanlæraraløningarháttin fyri einalærarar er sett við skúlabarnatalið 40, men eisini hesum viðvíkj›andi eru avvik gjørd. Minnilutin heldur tí, at tað eisini í hesum føri má bera til at gera avvik, soleiðis at umsøkjarin, sum er einalærari og hevur tvær bygdir at halda skúla í og harvið nógv stríð, klædnaslit etc. fyri at kunna røkja sítt starv; og er so lágt løntur, at tað er ófatuligt, hvussu ein familja í hesi dýrtíð, vit nú eru í, kann liva, verður fluttur so frætt upp í løn, at grundløn hansara verður tann sama sum fyri teir annarlærarar úti á smábygdum, ið eru løntir eftir tí hægra løningarstiginum, nevniliga við eini grundløn av 1.600 kr. um árið.

Minnilutin er greiður yvir, hvussu tungt tað er við teim smáu læraraløunum úti á bygd at fáa endarnar at røkka saman, serliga tá ið ein lærari vil halda seg á eini mentunarhædd, sum tíðarinnar krøv seta til teirra, sum vilja hevja okkara unga ættarlið upp í slíkar mentunar› og hugsjónarhæddir, at hin føroyska tjóðin skal kunna gerast kappingarfør við aðrar tjóðir.

Við teim korum, sum okkara lærarar hava — serliga teir so út av lagi lágt løntu bygdaskúlalærarar, er vandi fyri, at teir ikki hava ráð at luttaka í skeiðum og heldur ikki at halda bløð og fáa sær bøkur fyri ikki at tala um radio, sum øll nútíðarhugsandi menniskju meta fyri eitt neyðturvuligt mentunarberandi tól.

Minnilutin er tí av teirri áskoðan, at korini hjá lærarunum megu bøtast so skjótt sum gjørligt, og at serliga teir lærarar, ið hava lægstu løn, megu fáa lønhækkan beinan vegin.

Minnilutin mælir tí tinginum til at ganga umsøkjaranum á møti og heita á amtmannin at fáa hann vegna skúlamálaráðharran at áseta, at lærarin í Øravík og Øravíkarlíð verður løntur sum fyrsti› og einalærari, sbr. kunngerð 13. juli 1939 av lóg um lønreglur fyri lærarar í fólkaskúlanum í Føroyum.

Inntil samvinna kann fara fram millum eitt frítt ríkisstýri og Føroya løgting, verða meirútreiðslurnar at rinda úr amtsgrunninum.

Uppskot:

1) Tingið viðmælir, at amtmaðurin kenslumálaráðharrans vegna fyribils ásetir, at annarlærarin í Øravík verður løntur sum fyrstilærari frá 1. januar 1945 at rokna.
2) Amtsgrunnurin rindar meiriútreiðslurnar fyribils, inntil ráðharrin kann taka endiliga støðu.

2. viðgerð 15. november, 3. viðgerð 22. november. Minnilutauppskotið fall 5—0. Meirilutauppskotið samtykt 15—0.

---

8. Handverkararoynd.

---

1. viðgerð 8. september, 30. oktober framlagt.

Álit.

6/12 1943 vendi Føroya maskinistfelag sær til løgtingið um at fáa skipað so, at handverkararoyndin kann verða tikin í Føroyum. Slík roynd er neyðug fyri teir, sum hava tikið maskinistprógv og skulu sigla, fyri at fáa vinnurættindi sum maskinmeistarar. Innan heimsbardagan vóru menn við maskinistprógvi noyddir at fara til Keypmannahavnar at taka handverkaraprógvið.

2/2 1944 úttalar stjórin fyri Tórshavnar navigatiónsskúla, at tað nú er langt síðan nøkur handverkararoynd er tikin; og tí eru nógvir menn, ið hava eksamensprógv, men ikki kunna fáa sjóvinnuprógv, tí teir ikki hava tikið handverkararoyndina. Hesir menn fáa loyvi (dispensatión) at sigla sum maskinmeistarar. Hetta kann ætlast at viðføra, at menn missa virðingina fyri handverkararoyndini, tá teir siggja, at teir væl kunnu sigla uttan hana. Teir vilja ikki kunna fata, at teir skulu fara av landinum at taka hetta prógvið, sum stjórin heldur væl kann skipast fyri at verða tikið her; hann mælir til, at umsóknin verður framd.

28/3 1944 heldur harra Vilhelm Nielsen, at skipað kann verða soleiðis, at royndin kann verða tikin í Føroyum. Verksmiðjurnar hava ikki øll tey amboð, sum eru á teknologisk Institut; men tað er endamálið við royndini at fáa upplýst, at viðkomandi hevur tann kunnleika, sum verður kravdur og ikki at læra viðkomandi tilíkan kunnleika.

17/4 1944 heldur fútin, at tað ikki er nøkur góð skipan, vit hava, hareftir nógvar og langar dispensatiónir verða givnar, og at tað vil vera ringt at taka loyvir aftur og krevja handverkararoynd í Keypmannahavn. Grundalagið fyri handverkararoynd í Føroyum tykist at vera tilsteðar, og viðmælir fútin umsóknina.

27/6 1944 úttalar amtmaðurin, at hann má vera í iva viðvíkjandi

broytan av hesum viðurskiftum, tí hann kann ikki fáa samband við hin hægsta sakkunnleikan: Stjórnin fyri maskinistundirvisan; og broytanin kann viðføra minnkan av kvalifikatiónunum. Amtmaðurin kann tí ikki átaka sær nakra ábyrgd við at viðmæla eina broyting, sum neyvan nú kann sigast at vera heilt neyðug. Um landsnevnd ella løgting tó ynskja tílíka broyting, vil amtmaðurin tó ikki vera ínóti hesum. Landsnevndin samtykti 19/7 at leggja málið fyri løgtingið.

Lóg nr. 78, 19/3 1930, § 6 ásetur: Ved Haandværksprøven udkræves den Færdighed i Værktøjsføring og Behandling af Materialerne, som er nødvendig for Udførelsen af de i et Skibsmaskineri almindeligt forefaldende Istandsættelsesarbejder.

Den, der vil indstille sig til denne Prøve, skal have bestaaet den almindelige Maskinisteksamen, Maskin- eller Motorpasserprøven samt fra Indehaveren af det Værksted, hvor han har faaet sin Uddannelse, medbringe Attest om denne Uddannelses Varighed.

Kgl. fyriskipan nr. 102, 29/3 1930, § 5 ásetur, hvat ið kravt verður til handverkararoyndina.

Nærri reglur um handverkararoynd eru ásettar í kunngerð nr. 262, 6/9 1930, angaaende Bestemmelser om Afholdelsen af Haandværkerprøven.

Fútin, stjórin fyri navigatiónsskúlanum og Vilhelm Nielsen mæla til at játta umsóknina. Vísandi á tað, ið fram er flutt í umsóknini og ymiskum ummælum í málinum, skal nevndin mæla til, at sett verður í gildi kunngerð, hareftir handverkararoyndin kann verða tikin í Føroyum.

Nevndin mælir til, at kunngerð verður sett í gildi, hareftir handverkararoynd verður eina ferð árliga í Føroyum, soleiðis at stjórin fyri navigatiónsskúlanum ansar, at tað, sum er neyðugt, verður fyrireikað. Reglugerð við nærri reglum fyri royndina verður at fáa við at venda sær til stjóran fyri navigatiónsskúlanum. Reglurnar verða ásettar soleiðis:

REGLUGERÐ
FYRI
HANDVERKARAROYND Í FØROYUM.

1. Stjórin fyri Tórshavnar navigatiónsskúla lýsir hvørt ár í almenna lýsingarblaðnum kunngerð um, hvar royndin vil verða hildin komandi ár, og hvønn dag hon byrjar.
2. Hann, sum ætlar at geva seg fram til handverkararoyndina, sum umtalað er í pt. 1, skal í minnsta lagi 14 dagar, áðrenn royndin byrjar, senda til Tórshavnar navigatiónsskúla eginhandaða umsókn saman við váttan frá honum, sum eigur tað verkstað ella tey verkstøð, har hann hevur fingið handverkaralæru, um, hvussu long henda læra hevur verið.

   Hevur læran øll ella fyri ein part verið á útlendskum verkstaði, má váttanin vera neyðturvuliga ásannað av embætismanni har á plássinum.

   Um viðkomandi fyrr hevur givið seg fram til royndina, skal tað verða upplýst í umsóknini, og saman við henni skal tá verða send váttan fyri, hvussu leingi hann, síðan hann fyrru ferð gav seg fram til prógvið, hevur arbeitt á góðkendum verkstaði.
3. Á ásettum degi og til ásetta tíð skal hann, sum skal taka prógvið, møta í prógvarrúminum og hava við sær arbeiðsklæðir og rættan málustokk í metrum og notubók við blýanti.

   Hvør, sum skal taka prógvið, fær eitt nummar, sum hann heldur undir royndini.

Harumframt fær hann flýggjað ein verktoyskassa inmihaldandi stemplað verktoy, sum er neyðturviligt til skrúustikarbeiði.

4. Annars galda reglurnar í kunngerð nr. 262, 6. september 1930 við neyðturviligum broytingum.
5. Fyri tikna roynd fær hann, sum hevur tikið prógvið eina váttan, sum verður skrivað samsvarandi hetta skema:

Nummar

Eksamensprógv.

N. N. (Fulla navn)
Føddur í (Føðistað, føðingardag og -ár)

Hevur tikið handverkararoyndina við hesum karakterum:

Smiðjuarbeiði	1	kar.
Maskinarbeiði	1	—
Onnur arbeiði	1	—
Skjótleiki í at gera arbeiði	1	—
Samantalt...	4	kar.

Fyri at taka prógvið verður kravt: í smiðjuarbeiði og maskinarbeiði tilsamans minnst 3, samantalt minnst 12.

Hægsta samanteljan er 28.

Tórshavn, tann.....

Prógvið verður at undirskriva av stjóranum fyri Tórshavnar navigatiónsskúla og einum limi av prógvarnevndini, eins og stemplið hjá navigatiónsskúlanum verður at seta á prógvið.

Nevndin skal so statt mæla tinginum til at samtykkja hetta

uppskot:

1. Løgtingið samtykkir, at handverkararoyndin fyri maskinistar kann verða tikin í Føroyum, eftir ti í álitinum ásettu reglugerð, ið verður góðkend.

2. BEKENDTGØRELSE FOR FÆRØERNE
OM
HAANDVÆRKSPRØVEN.

I Medfør af Lov Nr. 78 af 19. Marts 1930 om Eksaminer for Skibsmaskinister m. m. fastsættes herved:

Haandværksprøven afholdes fremtidig hvert Aar paa Færøerne. Prøven afholdes i Forbindelse med Thorshavns Navigationsskole efter Reglement, der udleveres ved Henvendelse til Skolens Bestyrer.

Reglerne i Bekendtgørelse Nr. 262 af 6. September 1930 finder Anvendelse med de fornødne Lempelser.

KUNNGERÐ FYRI FØROYAR
UM
HANDVERKARAROYND.

Við heimild í lóg nr. 78, 19. mars 1930, um prógv fyri skipsmaskinistar o. a. verður hervið ásett:

Handverkararoynd verður hildin árliga í Føroyum. Royndin verður í samband við Tórshavnar navigatiónsskúla eftir reglugerð, sum verður útflýggjað við áheitan til skúlastjóran.

Reglurnar í kunngerð nr. 262, 6. september 1930, verða at nýta við neyðturviligum broytingum.

Broytingaruppskot

frá A. Samuelsen o. fl.

Da Formaalet med Betænkningens Forslag alene er, at Haandværksprøven skal kunne tages paa Færøerne, saaledes at de i Lovgivningen (Lov Nr. 78 af 19. Marts 1930, kgl. Anordning Nr. 102 af 29. Marts 1930 og Bekendtgørelse Nr. 262 af 6. September 1930) indeholdte Regler vedrørende Haandværksprøven iøvrigt skal følges med de Lempelser, som Forholdene gør nødvendige, og da dette Formaal kan opnaas ved en af Amtet i Medfør af Loven af 19. Marts 1930 truffet Beslutning, stilles herved følgende

Ændringsforslag:

I Stedet for Udvalgets Forslag sættes: «Amtmanden anmodes om i Medfør af § 12 i Lov af 19. Marts 1930 at bestemme, at Haandværksprøve fremtidig kan afholdes een Gang aarlig i Thorshavn.»

2. viðgerð 7. november, 3. viðgerð 16. november. Broytingaruppskotið samtykt 13—0.

---

9. Sveinaprógv.

1. viðgerð 8. september. 28. oktober framlagt.

Álit.

Lóg nr. 120, 7. mai 1937 um lærlingar er galdandi fyri Føroyar. § 11 ásetir: Ved Læretidens Udløb skal Lærlingen aflægge Svendeprøve i Faget. § 14 ásetir: Svendeprøverne afholdes af Svendeprøvekommissioner, der nedsættes inden for hvert Fag.

Svendeprøvekommissionerne bestaar af et lige Antal faguddannede Medlemmer, hvoraf Halvdelen skal være Arbejdsgivere og Halvdelen Arbejdere. Medlemmerne vælges af de paagældende faglige Hovedorganisationer.

De inden for hvert Fag nedsatte faglige Udvalg udpeger et lige Antal Arbejdsgivere og Svende til som Skuemestre at bedømme de aflagte Svendeprøver.

Skuemestrenes Bedømmelse kan overværes af 2 Repræsentanter for vedkommende Svendeprøvekommission.

De med Svendeprøvernes Afholdelse forbundne Udgifter afholdes af de respektive Arbejdsgiver- og Arbejderorganisationer.

Í 1938 vendi Havnar handverksmeistarafelag sær til «Fællesrepræsentationen for dansk Haandværk og Industri» og fekk svar, at teir skuldu frætta meiri seinri. Tíðin gekk, og ikki fyrr enn um várið 1940 varð kunngjørt, at viðurskiftini í Danmark tá vóru skipaði so, at sveinaroyndir eftir lógum 1937 í fleiri fakum kundu verða tiknar um heystið 1940. Postsambandið millum Føroyar og Danmark var tá kvett av veraldarbardaganum.

10. mars 1941 sendi Havnar handverksmeistarafelag bræv til amtmannin um, at reglurnar um sveinaroynd eiga at verða skipaðar. 17. mai 1941 upplýsir fútin, at einki felags handverksmeistarafelag er fyri allar Føroyar og einki felag innan fyri hvørt fak.

24. oktober 1942 biður Havnar handverksmeistarafelag amtið aftur um at fremja málið. 23. december 1942 mælir landsnevndin til at biðja handverksmeistarafelagið gera uppskot til reglugerð fyri sveinaroyndina.

24. mai 1943 sendi Havnar handverksmeistarafelag uppskot til tingingargrundarlag til reglugerð. Teir mæla har millum annað til, at sett verður ein sveinaroyndarnevnd af 3 limum; 1 valdur av «Administrationen» og 2 valdir av meistarafeløgunum. Harnæst mæla teir til, at sett verður dómaranevnd fyri hvørt fak, 3 limir, 1 valdur av meistarafelagnum á viðkomandi plássi, ein av sveinafelagnum og hartil 1 av meistarunum í sveinaroyndarnevndini.

30. juni 1943 sendi fútin Regulativ for Aflæggelse af Svendeprøve under Fællesrepræsentationen for dansk Haandværk og Industri. Hann heldur, at tað er neyðugt at broyta lærlingalógina soleiðis, at sett verður ein sveinaroyndarnevnd av 7 limum; 3 meistarar og 3 sveinar, valdir av feløgunum og ein formaður, valdur av «Administrationen», ella 4 valdir av feløgunum og 3 av «Administrationen» umframt menn frá viðkomandi faki. Harnæst mælir hann til, at «Skuemestrene» verða valdir av sveinaroyndarnevndini.

Málið var so til ummælis hjá Føroya arbeiðismannafelag og Havnar arbeiðismannafelag.

20. mars 1944 úttalar fútin: Det synes, som om Tanken om en fast faglig Haandværksinstitution eller Svendeprøvekommission, der kan forestaa Svendeprøverne, har fundet Tilslutning.

Jeg vil fortsat tro, at Svendeprøverne i hvert Fald i den første Tid bør være frivillige for derigennem at styrke Interessen og indvinde de fornødne Erfaringer.

3. juli 1944 sendi fútin frágreiðing frá Havnar handverksmeistarafelag viðvíkjandi frívilligari royndi, sum hevur verið í ár. Av frágreiðingini verður citerað:

.... Fagene var allerede tidligere anmodet om at udarbejde Kravene, og Svar forelaa fra de fleste Fag. Aspiranter blev anmeldt i følgende Fag: Bilmekaniker, Blikkenslager, Bygningstømrer, Skibstømrer og Byg-

ningsmalere. Der blev udmeldt 2 Skuemestre i hvert Fag, og Havnar Arbeiðismannafelag blev anmodet om ligeledes at anmelde 2 Skuemestre i hvert Fag. Bedømmelsen blev saaledes foretaget af 4 faglærde Mænd i hvert Fag.

Bedømmelsen af de udførte Svendestykker fandt Sted Lørdag den 1. April og Søndag den 2. April. Alle Prøverne blev antaget, deraf 2 med Ros.

De fire Skuemestre i hvert Fag valgte en Formand, hvis Stemme i Tilfælde af Stemmelighed gav Udslaget. Skuemestrene afgav en skriftlig og af alle fire Skuemestre underskrevet Erklæring om, hvori Prøverne bestod og Resultatet af Bedømmelsen.

Foreningen agter, saafremt Lovens Bestemmelser ikke er sat i Kraft til den Tid, at afholde Svendeprøve igen til næste Aar, og det er da Meningen at indbyde Haandværkere fra andre Bygder til at deltage. Vi haaber dog, at de offentlige Prøver til den Tid kan aflægges.

Amtmaðurin úttalar 7. juli 1944: ... Efter Amtets Formening bør man fortsætte med de af Thorshavn Haandværksmesterforening etablerede frivillige Prøver i nogle Aar, indtil man paa Grundlag af de derved indvundne Erfaringer og Samraad med Sagkundskaben i det øvrige Kongerige kan etablere en endelig Ordning med tvungne Svendeprøver.

Málið um sveinaprógv hevur verið til viðgerðar í ymsamálanevndini. Sum málið liggur fyri, má nevndin halda, at tað beinasta verður, at tær frívilligu royndir, ið byrjaðu í 1944, halda fram enn eitt ella tvey ár. At gjøgnumføra tvungna royND krevur, at tað verða gjørdar broytingar í lærlingalógini, eins og tað enn er eitt sindur ivasamt, hvussu tey ymisku fak á besta hátt kunnu fáa umboðað arbeiðsgevarar og sveinar í teimum nevndum, sum skulu leggja royndirnar til rættis og døma úrslitið.

So statt setur nevndin fram hetta

uppskot:

Løgtingið biður landsnevndina eftir samráð við amtið, fútan og fakfeløgini til næstu tingsetu at seta fram uppskot til neyðturviligar broytingar í lærlingalógini og reglugerð fyri tvungna sveinaroynd.

2. viðgerð 31. oktober, 3. viðgerð 8. november. Samtykt 19—0.

---

10. Grønlandsprógv.

1. viðgerð 8. september. 16. september framlagt.

Álit.

Nógvir næmingar, ið hava tikið setiskiparaprógv í vár, søkja í brævi 2. mars 1944 um, at tað verður skipað fyri, at menn fáa loyvi at taka grønlandsprógv (udvidet Fiskerskipperprøve), uttan at tað verður

treytað av, at teir hava siglt sum skiparar ella bestimenn í minst 6 mánaðar. Teir føra fram, at tað er trupult hjá mongum av teimum at fáa pláss sum bestimenn, at tað er lættari at læra, meðan ein er ungur; og tað er ikki gott at siga, hvussu viðurskiftini hjá hvørjum einstakum koma at falla seinri. Stjórin fyri Tórshavnar navigatiónsskúla og fútin mæla til at játta umsóknina, meðan amtmaðurin er í iva um tað er beint at broyta galdandi reglur í sjóvinnulógini nú, tað ikki er gjørligt at koma í samband við navigatiónskúlastjórnina í Keypmannahavn.

Reglurnar um grønlandsprógvið ella hitt viðkaða fiskiskiparaprógvið eru settar í gildi við lóg nr. 179 av 16. juli 1927 sum tillegg til lóg um navigatiónsundirvísan nr. 48 av 28. februar 1916 við seinri broytingum smbr. lógkunngerð nr. 331 av 1. apríl 1922. § 1 í lóg av 16. juli 1927 setir sum treyt fyri, at ein maður kann fara at taka prógvið, at hann hevur váttan sum fiskiskipari av fyrstu deild, og at hann harumframt hevur siglt minst 6 mánaðar sum skipari ella bestimaður við fiskiskipum. Um grønlandsprógv eru annars reglur ásettar í kunngerð nr. 197 av 21. juni 1932 § 10 og í kgl. fyriskipan 198, 23. juni 1932, deild 3.

Fiskivinnunevndin skal av teim í umsóknini nevndu ársøkum eins og stjórin fyri navigatiónsskúlanum og fútin mæla til at játta umsóknina.

Uppskot

til

BRÁÐFENGIS LÓG FYRI FØROYAR

UM

VÍÐKAÐI FISKISKIPARAROYNDINA.

Í § 1 í lóg nr. 179, 16. juli 1927, um økjan til lóg um siglingarkenslu, 28. februar 1916, við seinri broytingum ganga út orðini: «og derhos have faret i mindst seks Maaneder som Fører eller Bedstemand (Styrmand) i Fiskefartøj af over 20 tons.»

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE

OM

DEN UDVIDEDE FISKESKIPPERPRØVE.

I § 1 i Lov Nr. 179 af 16. Juli 1927 om Tillæg til Lov om Navigationsundervisningen af 28. Februar 1916 med senere Ændringer udgaar Ordene: «og derhos have faret i mindst seks Maaneder som Fører eller Bedstemand (Styrmand) i Fiskefartøjer af over 20 Tons.»

Broytingaruppskot.

Kr. Djurhuus og J. Chr. Olsen:

Eftir lóg nr. 179, 16. juli 1927, § 3 kann ráðharrin fyri sjóvinnu gera undantak viðvíkjandi reglunum í § 1 og 2 um sigling, og amtið mælir til at nýta hesa paragraf í staðin fyri at broyta sjálva lógina. So statt verður sett fram hetta

broytingaruppskot:

Í staðin fyri uppskot nevndarinnar verður sett:

Tingið mælir til, at tað ikki verður kravt av honum, sum vil taka hina viðkaðu fiskiskipararoyndina við skiparaskúlan í Tórshavn, at hann umfram at hava váttan sum fiskiskipari av fyrstu deild eisini skal hava siglt í minnst 6 mánaðar sum skipari ella bestimaður við fiskiskipi yvir 20 tons.

2. viðgerð 20. september. 3. viðgerð 25. september. Broytingaruppskotið fall 11—0. Nevndaruppskotið samtykt 21—0.

---

11. Eykadýrtíðarviðbót til lærarar (barnatillegg).

Framlagt 20. september. 1. viðgerð 25. september. 14. oktober framlagt.

Álit.

Føroya Lærarafelag skrivar dagfest 15. september í ár til tingið og minnir á, at felagið í 1942 sendi tinginum eitt uppskot til nýggja lønarlóg fyri lærarar, men fekk tað svar, sum varð uppafturtikið 1943, at tingið kundi eiki gera hesum viðvíkjandi, so leingi kríggið vardi. Tó varð samtykt at veita eitt serligt barnatillegg og tingið hevur nú í 2 ár veitt lærarum eina viðbót uppá 100 kr. fyri hvørt barn undir 14 ár. Felagið heitir aftur í ár á tingið, til at fáa «henda ella onkun annan munabetri studning veittan fyri 1945.»

Nevndin má viðmerkja, at henda viðbótin ikki bert er til lærarar, men til allar, sum løntir eru eftir tænastumannslógini av 31. mars 1931, og at hon varð ætlað sum bráðfengis hjálp í dýrtíðini, við tað tað var ógjørligt at broyta grundlønarreglurnar, so leingi kríggið vardi. Við tað at prístalið enn er at kalla tað sama, sum tað var, tá ið henda fyriskipan varð samtykt í fjør, mælir nevndin til at endurnýggja hana fyri eitt ár aftrat og setir fram hetta

uppskot:

BRÁÐFENGIS FYRISKIPAN FYRI FØROYAR UM BARNAVIÐBÓT TIL TÆNASTUMENN OG AÐRAR.

§ 1.

Fyri tíðarskeiðið 1. oktober 1944 til 30. september 1945 verður veitt teimum tænastumonnum og øðrum, sum 1. januar 1945 hava rætt til fulla útjavningarviðbót (lóg nr. 98 av 31. mars 1931 § 91, stk. 1) eina framíhjá dýrtíðarviðbót uppá 100 kr. fyri hvørt barnið, sum teir tann 1.

januar 1945 hava forsyrgjara skyldu av, og sum ikki hevur fylt 15 ár tann 1. januar 1945.

Viðbótin verður goldin í einum til 1. februar 1945 eftir kravi frá avvarandi, skrivað á oyðublað, ið verður fyriskrivað av amtinum.

§ 2.

Henda fyriskipan fær lóggildi beinan vegin.

Forslag

til

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM BØRNETILLÆG TIL TJENESTEMÆND M. FL.

§ 1.

For Tiden 1. Oktober 1944 til 30. September 1945 tillægges der de Tjenestemænd m. fl., som pr. 1. Januar 1945 har Ret til fuldt Reguleringstillæg (Lov Nr. 98 af 31. Marts 1931, § 91, Stk. 1) et ekstraordinært Dyrtidstillæg paa 100 Kr. for hvert Barn, som de den 1. Januar 1945 har Forsørgelsespligt overfor, og som ikke er fyldt 15 Aar den 1. Januar 1945.

Tillægges udbetales samlet pr. 1. Februar 1945 efter paagældendes Begæring paa Blanketter, der foreskrives af Amtet.

§ 2.

Nærværende Bestemmelse træder i Kraft straks.

2. viðgerð 17. oktober, 3. viðgerð 25. oktober. Samtykt 19–0.

---

12. Nýtt læraraembæti í Fuglafirði.

Framlagt 25. september. 1. viðgerð 29. september. 14. oktober framlagt.

Álit.

Í skrivi dagfest 21. september í ár søkir Fuglafjarðar sóknar kommuna um at fáa eitt nýtt læraraplass við skúlan har. Teir siga frá, at har eru 3 læratar og ein lærarinna, sum hálva tíðina er á Hellunum, og barnatalið er 152. So statt eru meir enn 43 børn uppá hvønn lærara. Í tí gamla skúlanum er eitt høli, sum varð nýtt til skúlastovu, áðrenn tann nýggi skúlin varð bygdur; henda stovan er væl nýtandi, til tilfar fæst til at seta

í stand við í tí nýggja skúlanum, har 2 stovur eru, sum ikki eru gjørdar lidnar.

Av tí at tingið áður hevur givið skúlastjórnini upp í hendur at gera av, um nýggj læraraplass eru neyðug ella ikki, mælir nevndin til at senda skúlastjórnini umsóknina, við viðmæli til at koma henni ámøti, um áneyðir eru til tess, og setir fram hetta

uppskot:

Skúlastjórnin verður biðin um við vælvild at taka við umsóknini frá Fuglafjarðar søknar kommunu um eitt fast læraraplass aftrat við skúlan har, um hetta svarar til ta ætlan, ið stjórnin hevur fyri næstu framtíð nýggjum læraraplássum viðvíkjandi.

2. viðgerð 17. oktober. 3. viðgerð 21. oktober. Samtykt 14—0.

---

13. Setan av lærarum við fólkaskúlan í Havn.

Framlagt 27. september. 1. viðgerð 29. september. 23. oktober framlagt.

Álit.

Tórshavnar býráð hevur sent løgtinginum soljóðandi bræv, dagsett 26. september í ár:

«Tórshavnar býráð loyvir sær hervið at bera fram fylgjandi mál til tað háttvirda løgting.

Sum løgtinginum kunnugt varð lýst ósett læraraembæti við kommunuskúlan í Havn aftaná lærara Hans Kamban við sang og gymnastikk og høvuðslærugreinum.

Tað innkomu hesar 10 umsóknir:

		Høvuðskarakter.	Sang og musikk.	Gymnastikk.
1.	Jakob Jakobsen Berg	g+	mg	g+
2.	Hans Huusgaard	mg	mg÷	ug÷
3.	H. J. Højgaard	g+	mg	g
4.	Hans D. Jacobsen	g+	mg+	mg÷
5.	Hjalmar Joensen	mg	ug+	ug÷
6.	Marius Johannesen	mg	mg+	mg+
7.	Johan Olsen	mg	g+	mg÷
8.	Nap. N. Petersen	mg÷	mg+	mg
9.	Peter Petersen	mg÷	mg	mg÷
10.	Jacob av Skarði	mg÷	mg	mg+

Aftaná at skúlakommissión, skúlanevnd og býráð høvdu viðgjørt á vanligan hátt kvalifikasiónirnar hjá teimum ymisku umsøkjarunum vórðu hesir innstillaðir av skúlakommissión:

«Verður sent Tórshavnar býráð við tilskilan, at kommissiónin hevur samtykt at skila hesar 3 til

1. Hans Huusgaard,
2. Hjalmar Joensen og
3. Marius Johannesen.

Samstundis verður mælt til, at Hjalmar Joensen má fáa embætið.»

Av skúlanevnd:
«Sak viðvíkjandi setan av lærara við Havnar kommunuskúla aftaná Hans Kamban.
Málið hevur verið hjá skúlakommissiónini til ummælis, sum hevur sett upp hesa innstilling:

1. Hans Huusgaard,
2. Hjalmar Joensen og
3. Marius Johannesen.

Samstundis ræður skúlakommissiónin til, at Hjalmar Joensen má fáa embætið.
Nevndin býtti seg sundur í ein minnilut Óla Chr. Skála, sum ræður til at samtykkja innstillingin frá skúlakommissiónini í alfabetiskan ordan.
Meirilutin H. P. Hansen og J. P. Henriksen, ræður býráðnum til at samtykkja, at hesir tríggir verða innstillaðir í alfabetiskan ordan:

1. Hjalmar Joensen,
2. Marius Johannesen og
3. Jákup av Skarði

til embæti sum lærara við Havnar kommunuskúla.»

Av býráðnum:
«Sak viðvíkjandi setan av lærara við Havnar kommunuskúla.
Við atkvøðugreiðslu vóru hesir 3 innstillaðir:

1. Hjalmar Joensen,
2. Johan Olsen og
3. Jákup av Skarði.

Málið fór so til skúlastjórnina, men so hendir tað løgna, at skúlastjórnin sendir málið aftur til býráðið við hesari viðmerking:

«Tilbagesendes *Thorshavn Byraad* med Bemærkning, at Skoledirektionen paa sit Møde den 17. August d. A. har vedtaget at forelægge Sagen for Byraadet paany, da Skoledirektionen anser Lærer Højgaard for bedst kvalificeret af samtlige Ansøgere, og derfor er stemt for at ansætte ham i den ledige Stilling. Det bemærkes, at Skoledirektionen ikke anser sig forbundet til at vælge mellem de af Byraadet indstillede, Jfr. § 9 i Bekendtgørelse Nr. 95 af 25. Juni 1896, hvorefter Læreren (Lærerinden)

ved Thorshavn Kommuneskole beskikkes af Skoledirektionen uden at der for Beskikkelsen gælder den samme Betingelse som for Lærerbeskikkelse ved Folkeskolerne paa Bygderne, jfr. § 10 i Anordning af 16. Januar 1912, der bestemmer, at Skoledirektionen skal vælge imellem de af Forstanderskabet indstillede.

Forinden Sagens endelige Afgørelse ønsker Skoledirektionen imidlertid Byraadets Udtalelse efter Sagens Anledning.»

Býráðið helt so fund um málið saman við skúlakommissión og skúlanevnd og varð á hesum fundi einmælt samtykt ikki at broyta støðuna.

Fylgjandi skriv varð so sent skúlastjórnini:

«Verður aftursent *skúladirektiónini* við tilskilan, at skúlakommissiónin, skúlanevndin og Tórshavnar býráð á fundi tann 29. í h. m. einmælt hava samtykt at fasthalda sínar innstillingar.

Samstundis verður gjørt kunnugt, at býráðið fastheldur, at skúladirektiónin er bundin at taka ein av teimum trimum lærarum, sum býráðið hevur innstillað, og at skúladirektiónin líka síðan «Bekendtgørelse Nr. 95 af 25. Juni 1896» kom í gildi hevur tikið ein av teimum lærarum, sum býráðið hevur innstillað, so tað vildi verið løgið, um skúladirektiónin nú tók eina aðra støðu í hesum máli.

Tað er óivað av misgávum at ikki somu reglur eru fyri setan av lærarum í Havn sum á bygd, so mikið meir sum Havnar kommuna letur ein part av lønini hjá sínum lærarum.

Hjálagt verður sent útskrift av gerðabókini hjá skúlanevndini og býráðnum og tilráðingin frá skúlakommissiónini, sum av misgávum ikki varð send seinast.

Býráðið biður um at fáa málið framt sum skjótast, í seinasta lagi innan 18. septembir í ár.»

Tann 19. september móttók Tórshavnar býráð hesa avgerð frá skúlastjórnini:

«Skoledirektionen har Dags Dato tilskrevet Lærer Hans Jacob Højgaard saaledes:

«Det meddeles Dem herved, at Skoledirektionen har ansat Dem som Lærer ved Thorshavn Kommuneskole fra den 1. Oktober 1944 at regne.

Stillingens Grundløn udgør 2.300 Kr. aarlig stigende med 300 Kr. aarlig indtil 3.800 Kr.

Deres Anciennitet regnes fra den 1. Juni 1931.»

Hvilket herved meddeles.»

Býráðið heldur, at skúlastjórnin í hesum máli ikki hevur handlað samsvarandi tann rætt, sum býráðnum er givin. Tað hevur higartil uttan undantak verið fastur praksis, at skúlastjórnin hevur kent seg bundnan at seta ein av teimum 3 av býráðnum innstillaðu.

Hetta hevur í hvørt fall givið býráðnum tað uppfatan, at hesin praksis er samsvarandi við lóggávuna um setan av lærarum við Havnar kommunuskúla, og scinri lóggávu t. d. Anordning (nr. 11) av 16. januar 1912 viðvíkjandi fólkaskúlalærara-ásetanina, hevur í greiðum orðum sagt, at skúlastjórnin er bundin til at taka ein av teimum 3, sum sóknarstýrið innstillar.

Býráðið, ið kennir seg órættað, loyvir sær at biðja tað heiðraða løgting at taka sær av hesum máli, og um neyðugt broyta tað galdandi

lóg soleiðis, at Havnar kommuna eins og tilfelli er við øllum sóknar-kommunum í Føroyum fær til lærara ein av teimum, ið innstillaðir eru til skúlastjórnina at velja ímillum.»

Nevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, heldur, at tingið kann ikki broyta tað avgerð, skúlastjórnin hevur tikið, har hon hevur sett Hans Jacob Højgaard sum lærara, tó at hann ikki var millum teir, sum skúla-kommissiónin ella býráðið viðmælti at seta. Men nevndin vil mæla til at broyta lóggávuna á tann hátt, at Havnar býráð fær sama rætt, sum sóknar-stýrini, so at skúlastjórnin er bundin at taka ein av teimum, sum býráðið viðmælir at seta sum lærara í slíkum tilfellum.

Uppskot:

1. Tingið kann ikki broyta tað avgerð, sum skúlastjórnin hevur tikið.
2. Tingið samtykkir hetta uppskot til

KUNNGERÐ UM BROYTAN

av kunngerð nr. 95, 25. juni 1896 viðvíkjandi nøkrum broytingum í lóg 1. mars 1854 um skipanina av skúla- og kenslumálum í Føroy-um, Tórshavnar kommunuskúla viðvíkjandi.

Aftrat § 9 verður sett:

Áðrenn nakar verður skipaður lærari, verða umsóknir av skúlastjórnini at senda býráðnum. Tað viðmælir so á fundi, aftaná at skúlakommmissiónin hevur haft málið til ummælis, triggir av um-søkjarunum til skúlastjórnina, sum millum teir viðmældu skipar hann, ið stjórnin heldur best hóskar til embætið og gevur honum bræv um at hann er settur.

BEKENDTGØRELSE OM ÆNDRING

i Bekendtgørelse Nr. 95 af 25. Juni 1896 angaaende nogle Foran-dringer i Lov af 1. Marts 1854 om Ændringer af Skole- og Under-visningsvæsenet paa Færøerne, for saa vidt angaar Thørshavns Kom-muneskole.

Til § 9 føjes:

Forinden Beskikkelsen sendes de indkomne Ansøgninger af Skoledirektionen til Byraadet. Dette indstiller derefter i et Møde, efter at Skolekommissionen er hørt, tre af Ansøgerne til Skoledirek-tionen, der blandt de indstillede kalder den, som den finder mest skikket til Embedet, samt meddeler ham Kaldsbrev.

2. viðgerð 28. oktober. 3. viðgerð 2. november. Pt. 1 samtykt 16—0. Pt. 2 samtykt 19—0.

---

14. Fluttningsútreiðslur.

28. oktober framlagt.

Álit.

I fjør sókti Meinhard Johansen, lærara í Svínoy, tingið um studning til útreiðslur, hann hevði havi av at flyta við familju úr Hovi til Svínoyar. Flytingin hevði kostað honum 420 kr. Í Danmark eru tað kommunurnar, ið lata studning gjøgnum skúlagrunnin. Tingið samtykti at senda Svínoyar kommunu umsóknina og gera hana kunnuga við, hvussu hesum viðvíkjandi er skipað í donskum skúla, men tingið sá seg ikki fört fyri at seta donsku grundlógina í gildi her. Givið varð Landsnevndini heimild til undir hesum serligu viðurskiftum at veita hóskandi part av útreiðslunum. Svínoyar kommuna skrivaði 2. jan. í ár Landsnevndini, at Meinhard Johansen ongan studning ynskti frá teimum, og teir tí einki vildu lata. Landsnevndin samtykti at lata triðing av útreiðslunum, og vórðu veittar umsøkjaranum 140 kr.

Í ár søkir Peter Andreasen, lærari í Skúvoy, um endurgjald fyri fluttningsútreiðslur. Hann er fluttur við familju úr Lamba til Skúvoyar, og eins og umsøkjarin ífjør, mátti hann hava stóran motorbát til fluttningsfar. Kostnaðurin var 225 kr. Hann framheldur, at læraraløn hansara er 397 kr. um mánaðin, so sammett við henda pening er fluttningsgjaldið ógvuliga stórt. Uttan at vilja binda tingið til í framtíðini at veita studning til fluttningsútreiðslur, mælir nevndin tinginum til, út frá tí, at prístalið er tað sama í ár sum í fjør, og fluttningsútreiðslurnar hava verið stórar í mun til árslønina, fyri eitt ár enn at taka somu støðu til umsóknina sum ífjør. Nevndin setur fram hetta

uppskot:

Peter Andreasen, lærari í Skúvoy, verður gjørdur kunnugur við tingsamtyktina ífjør viðvíkjandi studning til fluttningsútreiðslur, og Landsnevndin verður heimilað at veita honum í studning upp í triðing av teim fluttningsútreiðslum, sum hann yvirfyri nevndini prógvar at hava haft úr Lamba til Skúvoyar.

2. viðgerð 31. oktober. 3. viðgerð 8. november. Samtykt 16–0.

15. Broytan av samtykt fyri læraraskúlan.

Framlagt 2. november. 1. viðgerð 6. november. 18. november framlagt.

Álit.

Lærararáð læraraskúlans hevur biðið skúlastjórnina útvega, at § 19,10 og § 19,11 í skipanini verður broytt á tann hátt, at tann skrivliga royndin í Føroyskum og Donskum til fyrra part av læraraprógvinum verður aftursøgn (3 timar) í staðin fyri fyrisøgn, og at í § 21 verða sum stk. 7 uppískoyttar reglur fyri at fáa karakterar frá studentaprógvi yvirførdar til annan part av læraraprógvinum.

Skúlastjórnin hevur samtykt at góðtaka broytingina í skipanini § 19 nr. 10 og 11, sum lærararáðið hevur skotið upp, men viðvíkjandi broytingini av § 21 samtykt at hon verður orðfest svarandi til tær í Danmark galdandi reglur í kunngerð nr. 197 av 8. mai 1938, § 52 við teim rættingum og uppískoytum sum gerast neyðug viðvíkjandi Føroyskum. Áðrenn amtið kenslumálaráðharrans vegna setur broytingarnar í gildi, er málið lagt fyri tingið.

Skúlanevndin mælir til, at broytingarnar verða settar í gildi, sum skúlastjórnin hevur skotið upp, og setur fram hetta

uppskot:

UDKAST
TIL
ÆNDRINGER I VEDTÆGT FOR FÆRØERNES SEMINARIUM
AF 2. MAJ 1939.

1. § 19, Nr. 10, sidste Stykke, affattes saaledes: «Den skriftlige Prøve bestaar af en Genfortælling (3 Timer).»
2. § 19, Nr. 11, sidste Stykke, affattes saaledes: «Den skriftlige Prøve bestaar af en Genfortælling (3 Timer).»
3. Til § 21 føjes som Stykke 7:
   a. Studenter, der demitteres fra det af Færøernes Lagting oprettede Studenterkursus, en Gymnasieskole i det øvrige Kongerige eller har bestaaet Studentereksamen som Privatister i Henhold til kgl. Anordning af 25. Marts 1938 kan, naar de indstiller sig til den afsluttende Lærerprøve overføre Karakterer til Lærereksamen i Overensstemmelse med de nedenfor angivne Regler, idet forsaavidt angaar Elever, der har bestaaet Eksamen ved Lagtingets Studenterkursus og for Privatisters Vedkommende alene Eksamenskarakterne lægges til Grund.
   b. Studenter, der i nedennævnte Fag mindst har opnaaet Karakteren mg, kan overføre den paagældende Karakter.

      1) Mundtlig Færøsk og Dansk.

      Karakteren kan overføres fra Studentereksamen paa alle 3 Linier som Karakter i mundtlig Færøsk og Dansk ved Lærerprøvens 2den Del. Karakteren udregnes paa Grundlag af Aarskarakteren og Eksamenskarakteren.

2) Historie:

Karakteren kan overføres fra Studentereksamen paa alle 3 Linier som Fagkarakter ved Lærerprøven, udregnet paa Grundlag af Aarskarakteren og Eksamenskarakteren.

3) Matematik:

Karakteren kan overføres fra Studentereksamen paa alle 3 Linier som Fagkarakter ved Lærerprøven. Karakteren udregnes paa Grundlag af Aarskarakteren og Eksamenskarakteren, for den matematisk-naturvidenskabelige Linies Vedkommende paa Grundlag af Aarskarakteren og Eksamenskarakteren ved den mundtlige Prøve.

4) Naturlære:

Karakteren kan overføres fra matematisk-naturvidenskabelig Studentereksamen som Fagkarakter ved Lærerprøven, udregnet paa Grundlag af Aarskarakteren og Eksamenskarakteren.

5) Engelsk:

Karakteren kan overføres fra Studentereksamen paa alle 3 Linier som Fagkarakter ved Lærerprøven eller som Karakter ved Tillægsprøver. Karakteren udregnes paa Grundlag af Aarskarakteren og Eksamenskarakteren ved den mundtlige Prøve.

c. Hvis der ved Sammenligning af Aarskarakteren og Eksamenskarakteren fremkommer et Resultat, som ligger imellem to Karakterer, forhøjes eller formindskes det til den nærmest liggende Karakter, og for saa vidt Fagkarakteren herefter er mg eller derover, overføres den til Lærerprøven med den saaledes udfundne Karakter.

d. Overførelse af Karakteren finder kun Sted, naar 1ste Del af Lærerprøven bestaas senest 4 og 2den Del senest 6 Aar efter Studentereksamen, dog at den Tid, der ligger forud for det Kalenderaar, i hvilket vedkommende er fyldt 20 Aar, ikke medregnes. I særlige Tilfælde kan Dispensation fra denne Bestemmelse meddeles af af Ministeriet.

ÚTKAST
TIL
BROYTINGAR Í SKIPAN FYRI FØROYA LÆRARASKÚLA AV 2. MAI 1939.

1. § 19, nr. 10, síðsta stykki verður orðfest soleiðis: «Tann skrivliga royndin er afturfrásøgn (3 tímar).»
2. § 19, nr. 11, síðsta stykki verður orðfest soleiðis: «Tann skrivliga royndin er afturfrásøgn (3 tímar).»
3. Skoytt verður uppí § 1 sum stykki 7:
   a. Studentar, ið verða útskrivaðir av studentaskeið Føroya Løgtings, úr studentaskúla í Danmark ella hava lokið studentsprógv sum uttanskúla næmingar samkvamt kgl. kunngerð av 25. mars 1938, kunnu, tá ið teir geva seg til annan part av lærararoyndini, yvirføra karakterar til læraraprógvið samsvarandi eftirfylgjandi reglum, á tann hátt at viðvíkjandi næmingum, sum hava lokið prógvið á studentaskeiði Løgtingsins, og uttanskúla næmingum viðvíkjandi, einans verður roknað við prógvkarakterunum.
   b. Studentar, sum í teim aftanánevndu lærugreinum hava fingið minnst mg í karakteri, kunna yvirføra viðvíkjandi karakter.

1) Munnligt Føroyskt og Danskt:

Karakterurin kann verða yvirførdur frá studentsprógvinum á øllum trimum deildum sum karakterur í munnligum Føroyskum og Donskum til annan part av lærararoyndini. Karakterurin verður útroknaður út frá árskarakteri og prógvkarakteri.

2) Søga:

Karakterurin kann verða yvirførdur frá studentsprógvinum á øllum trimum deildum sum lærugreinarkarakterur í læraroyndini, útroknaður út frá árskarakteri og prógvkarakteri.

3) Matematik:

Karakterurin kann verða yvirførdur frá studentsprógvi á øllum trimum deildum sum lærugreinarkarakterur í lærararoyndini. Karakterurin verður útroknaður út frá árskarakteri og prógvkarakteri, tí matematisk-natúrvitskapligu deildini viðvikjandi út frá árskarakteri og prógvkarakteri frá tí munnligu royndini.

4) Eðlisfrøði:

Karakterurin kann verða yvirførdur frá matematiskum-natúrvitskapligum studentsprógvi sum lærugreinarkarakterur til lærararoyndina, útroknað út frá árskarakteri og prógvkarakteri.

5) Enskt:

Karakterurin kann verða yvirførdur frá studentsprógvi á øllum trimum deildum sum lærugreinarkarakterur til lærararoyndina ella sum karakterur til eykaroyndir. Karakterurin verður útroknaður út frá árskarakteri og prógvkarakteri frá tí munnligu royndini.

c. Um, tá ið árskarakterur og prógvkarakterur verða sammettir, kemur fram ein úrtøka, sum er millum tveir karakterar, verður hækkað ella lækkað til tann karakter, sum næstur er, og um lærugreinarkarakterurin tá verður mg ella meiri, verður hann yvirførdur til lærararoyndina við tí á henda hátt útfunna karakteri.

d. Eingin karakterur kann verða yvirførdur, uttan so er, at fyrsti partur av lærararoyndini verður lokin í seinasta lagi 4 ár, og annar partur í seinasta lagi 6 ár eftir studentsprógv, tó at tann tíð, sum er frammanundan tí álmanakkaári, tá ið avvarandi hevur fylt 20 ár, ikki verður uppíroknað. Undir serligum viðurskiftum kann ráðhartin loyva avvik frá hesari fyrisetan.

2. viðgerð 20. november. 3. viðgerð 24. november. Samtykt 21—0.

III. Kirkjumál.

1. Prestafluttningur.

16. november framlagt

álit.

Eftir § 3 í «Anordning angaaende Ophævelse af Præsteskyds paa Færøerne og Udredelse af Befordringsgodtgørelse til Præsterne sammesteds», staðar- og tíðsfestur: Amalienborg 6/2 1936, verður støddin av tí árliga gjaldinum fyri ferðaútreiðslur prestanna ásett serstakt fyri hvørt prestagjald fyri eitt tíðarskeið uppá fimm ár ísenn. Tey fyrstu 5 árini vóru úti 31/3 1939. Sambart ta galdandi reglugerð skuldi kirkjumálaráðið ásetta støddina av hesum gjaldi fyri tey komandi 5 árini, altso fyri tíðina frá 1/4 1939 til 31/3 1944. Vegna heimsbardagan hevur sum kunnugt sambandið við Danmark og harvið eisini við kirkjumálaráðið verið slitið síðan april 1940, og hevur soleiðis eingin nýggj ásetan av hesum gjøldum kunna farið fram frá teirri síðuni.

Eftir áheitan av prást Dahl steðgaði tingið í setuni 1940 eisini við at taka avgerð um støddina av gjaldinum fyri tey komandi 5 árini, sbr. tingtíðindi 1940, síðu 44, og hevur tingið ikki tikið nakra tílíka avgerð síðan.

Tann árligi peningurin til rindan av prestafluttningi var frammanundan heimsbardagan 3.600 kr., 1.200 kr. frá ríkiskassanum og 2.400 kr. frá kirkjufondini. Peningurin varð býttur av kirkjumálaráðnum.

Fyri fíggjarárið 1942/43 játtaði løgtingið 900 kr. sum dýrtíðarviðbót aftrat úr amtsgrunnioum, so peningurin ialt varð 4.500 kr.

Fyri 1943/44 samtykti tingið at veita 1.300 kr. afturat teim 3.600 kr., so peningurin tilsamans varð 4.900 kr.

Sum áður nevnt er tað kirkjumálaráðið, ið skal býta peningin, aftaná at málið hevur verið til ummælis hjá próstinum. Síðan 1942 — í tingsetunum 1942 og 1943 — hevur løgtingsins kirkjunevnd, ið hevur viðgjørt málið viðvíkjandi prestafluttninginum í farnu árum, sett fram uppskot um býti av fluttningspeninginum millum tey ymisku prestagjøldini. At so hevur verið, skyldast ætlandi einum sterkum huga hjá nevndini til

at veita prestunum hendan beina. «Sjálvboðin tænasta verður ofta forsmáa», sigur orðatakið, og tykist sannleikin av hesum orði aftur eina ferð enn hava staðið sína roynd, tí klagurnar frá summum av prestunum hava verið bæði harðar og strangar og ikki altið íklæddar tey sáttligu orð og givið ljóð fyri tí góðsinnis anda, sum er samsvarandi tí mynd av einum rættum Harrans tænara, hvør av okkum hevur í huganum í einihvørjari sak, sum hevur samband við tílíkar menn.

So statt ynskir nevndin at verða feitikin fyri hettar starv og skal mæla til, at amtið sum kirkjumálaráð sambart galdandi reglugerð eftir ummæli frá próstinum býtir fluttningspening prestanna fyri figgjarárið 1944/45.

Uppskot:

1. Til rindan av fluttningsútreiðslum prestanna fyri figgjarárið 1944/45 verður veitt kr. 5.600,00.
2. Grunnpeningurin 3.600 kr. verður veittur á vanligan hátt við 2.400 kr. frá kirkjufondini, 1.200 kr. frá ríkiskassanum, eins og dýrtíðarviðbótin uppá 2.000 kr. verður goldin úr kirkjugrunninum.
3. Sambart reglugerð av 6/2 1936 verður amtið vegna kirkjumálaráðið biðið um at býta tann undir 1) og 2) nevnda pening, tó so at ummæli frá próstinum verður at skaffa til vegis, áðrenn býtið fer fram.

2. viðgerð 18. november. 3. viðgerð 22. november. Samtykt 18—0.

---

2. Kirkjutornið í Fuglafirði.

1. viðgerð 9. september. 13. november framlagt.

Álit.

Meinigheitsráðið í Fuglafirði hevur í skrivi til kirkjustjórnina, dagsett 19. juni 1944, sent umsókn um studning til nýtt torn til kirkjuna í Fuglafirði. Tað verður framført í umsóknini, at tornið er rotið og má endurnýggjast, og verður tað mett til at kosta 5—6.000 kr.

Meinigheitsráðið flytur fram í sínum skrivi, at kirkjan hevur leingi verið ov lítil, og teir halda tað ikki vera rætt at ofra so nógvan pening til umvøling av torninum, men fyrisláa, at tað í staðin verður bygt nýtt torn frá grundini av, sum um sama tíð vil gera tað, at kirkjan blívur rúmligari, hvat leingi hevur verið hildið átroðkandi. Hetta arbeiðið verður mett til at kosta 20.000 kr.

Tað verður flutt fram, at tað kunnu sparast 5—6.000 kr. við at gera hetta arbeiði nú, nemliga tann peningur, sum umvølingin av tí gamla torninum vildi kostað.

Kirkjunevndin hevur havt eina samrøðu við formannin í meinigheitsráðnum, sum hevur greitt nevndini frá, hvussu arbeiðið hevur farið fram, og hvørjar útreiðslur verða, tí arbeiðið er nú komið somikið áleiðis, at tað sæst, hvat alt kostar.

Tað er frá íbúgvarum í Fuglafirði givið 5.500 kr. til hetta arbeiði, eisini er givið frívilligt arbeiði og tilfar.

Málið hevur verið hjá landsnevndini, ið hevur samtykt at mæla tinginum at játta neyðturviligan pening.

Tær verunligu útreiðslurnar hava verið hesar:

Rokningar fyri arb. og tilfar	kr.	19.141,51
Frívilligt arbeiði	»	1.638,59
Stólar	»	1.200,00
Ymist	»	600,00
Glas, trygging o. a.	»	201,35
	kr.	22.781,45
÷ Frívilligt arbeiði	»	1.638,59
	kr.	21.142,86
÷ gáva	»	5.500,00
	kr.	15.642,86

Uppskot:

Tingið veitir sum studning úr kirkjugrunni løgtingsins kr. 15.642,86 til tað nýggja tornið til kirkjuna í Fuglafirði.

2. viðgerð 17. november. 3. viðgerð 22. november. Samtykt 21–0.

---

3. Kirkjugarðar.

a. **Eiði.** Samtykt:

Úr kirkjugrunninum veitir tingið Eiðis kommunu 1.863 kr. sum studning til viðkan og umbøtan av kirkjugarðinum á Eiði.

b. **Rituvík.** Samtykt:

Hin í tingsetuni 1940 játtaði studningur 1.260 kr. til Nes kommunu til nýggjan kirkjugarð í Rituvík verður endurnýggjaður fyri 2 ár.

c. **Hovi.** Samtykt:

Tá tryggjandi svar er komið uppá teir í álitinum frá 1942 nevndu spurningar, og tann til viðkanina neyðturvuligi garður er lagaður, sýnaður og góðkendur, heimilast landsnevndin tingsins vegna at veita Hovs kommunu studning úr kirkjugrunninum eftir galdandi reglum.

---

4. Figgjarætlan fyri kirkjugrunnin.

19. oktober framlagt.

Álit.

Løgtingsskrivstovan hevur lagt fyri tingið uppskot til figgjarsamtykt fyri kirkjugrunn løgtingsins fyri ár 1945.

Nevndin skal mæla til at góðkenna uppskotið við hesum broytingum: 1. Samsvarandi løgtingssamtykt í 1943 (sí løgtingstíðindi, bls. 75) fær grunnurin sum eykastudning úr amtsgrunninum 15.000 kr.

At viðmerkja er, at grunnurin, um veraldarbardagin ikki endar áðrenn 1944 er úti, skal útlána til trúboðarar um 10.000 kr. fyri árið 1945 av peningi, sum grunnurin eigur.

Uppskot
til
Figgjarsamtykt fyri kirkjugrunn løgtingsins fyri árið 1945.

Inntøkur:

1.	Endurgjald fyri tiggjunda	kr.	7.800,00
2.	Av innfluttningsgjaldi	»	20.000,00
3.	Eykastudningur úr amtsgrunninum	»	15.000,00
4.	Stórhvalagjald	»	— —
		kr.	42.800,00

Útreiðslur:

A.	Vanligar umvølingar	kr.	10.000,00
B.	Kirkjugarðar	»	5.000,00
C.	Prestafluttningur	»	3.700,00
D.	Ymist	»	1.000,00
E.	Forskotsrindan til trúboðarar (Lán til Indremission i Danmark)	»	10.800,00
F.	Munur	»	12.300,00
		kr.	42.800,00

2. viðgerð 16. oktober. 3. viðgerð 21. oktober. Samtykt 16—0.

IV. Telefonmál.

1. Frágreiðing frá telefonnevndini.

1. viðgerð 14. september. 23. november.

Álit.

Nevndin hevur eftirkannað avskrift av gerðabók fyri millumtingasnevndina, og er henda avskrift viðløgd hesum máli. Nevndin mælir tinginum til at góðkenna tær tiknu avgerðir.

Í málinum liggur bræv av 16/3—44 frá verkstjóra L. Zachariasen til landsnevndina, hvar hann kærar seg um, at A. Sørensen formaður fyri telefonnevndina undir seinastu tingsetu hevur í løgtingssetuni vent sær til stjóra Z. Niclasen fyri skipafelagnum fyri at kanna eftir, um L. Zachariasen hevði flutt pappír inn gjøgnum telefonverkið til brúks fyri blaðið «Tingakrossur».

Landsnevndin sendi so A. Sørensen brævið frá L. Zachariasen til ummælis.

Í sínum svarskrivi av 29/3—44 greiðir A. Sørensen millum annað frá, at hann undir seinastu tingsetu hevur kannað eftir, hvussu nógv pappír var komið til telefonverkið. Hettar hevði hann gjørt av tí, at tað var komið honum fyri oyra, at telefonverkið og blaðið «Tingakrossur» skuldi hava innflutt pappír í felag. Um hettar var, so helt hann tað var skeivt.

Teir upplýsingar, sigur A. Sørensen, hann fekk, góvu honum ikki orsøk til at reisa máli á opnum tingi.

Eftir at hava kannað tey frá L. Zachariasen og A. Sørensen fyriliggjandi skriv, sum liggja í málinum, er nevndin ikki sinnað til at gera meira við hetta, men vil tó, at verkstjórin í framtíðini skipar soleiðis fyri, at ikki annað pappír verður innflutt undir verksins merki enn tað, sum verkið sjálvt eigur.

Í málinum liggur eisini skriv frá Klakksvíkar telefonabonnentfelag, dagfest 30. august 1944, har teir biðja um at fáa betur skil á telefonviðurskiftunum í Klakksvík, sum teir halda vera sera vánalig, og mæla teir til, at

1. telefonstøðin í framtíðini verður stjórnað av Telefonverki Føroya Løgtings,
2. hóskandi lønir verða goldnar til tey, sum skulu røkja støðina, og at tænastafólkið verður sett á støðina av T. F. L.
3. at minst 2 beinleiðis linjur verða gjørdar millum Klakksvík og Tórshavn.

Nevndin hevur tingast við sóknarstýrið fyri Klakksvikar kommunu um hetta mál, og var telefonverkstjórin á hesum fundi. Eisini hevur nevndarformaðurin tingast við stjórnini fyri nevnda telefonabonnentfelag.

Undirritaða nevnd er samd um og vil ásanna eftir teim upplýsingum, sum fyriliggja, at telefonviðurskiftini í Klakksvík er ring, og at tað er tørvur á at skipa so fyri, at bøtast kann um hetta.

Ein meiriluti (Øregaard, Joensen og Sørensen) heldur tað vera beint at T. F. L. tekur sær av støðini í Klakksvík, so at betri skil kemur á, og at T. F. L. yvirtekur raksturin av nevndu støð, meðan ein minniluti (Iversen og Slættanes) heldur fram, at skipað verður fyri á tann hátt, at telefonstjórin sendur eina køna telefonkvinnu frá støðini úr Havn til Klakksvíkar at arbeiða á støðini har, og skal hon vera har einar 3 mánaðar, meðan ein genta úr Klakksvík kemur suður á støðina í Havn at læra telefonrøkt. Tá henda er útlærd, kemur tann næsta, til støðin í Klakksvík hevur fingið nóg nógvar kønar telefonkvinnur.

Hesar gentur, sum verða lærdar í Havn, skulu plikta seg at arbeiða við støðina í Klakksvík í minst eitt ár, frá tí tær eru lidnar at læra. Telefonverkið ber útreiðslurnar av hesi skipan.

Í brævi 4/9—44 hevur Føroya Mentunargrunnur søkt um, at telefonverkið hevur eitt serligt skreytblað, sum selt verður fyri 50 oyru dýrari enn hitt vanliga, og at peningurin fer til Mentunargrunnin. Nevndin heldur seg ikki kunna seta fram uppskot um hetta.

Sambært tað í álitinum framførda verða sett hesi

uppskot:

A.

1. Frá *meiriluta*num:

Telefonverk Føroya Løgtings yvirtekur leiðsluna av støðini í Klakksvík og hevur raksturin av henni.

2. Frá *minniluta*num:

a) Fyri rokning telefonverksins fer ein køn telefonkvinna av støðini í Havn til at arbeiða á støðini í Klakksvík, og verður hon har í 3 mánaðar.
b. Fyri telefonverksins rokning verða konufólk úr Klakksvík á støðini í Havn lørd at røkja eina telefonstøð. Tá lærutíðin byrjar, skulu hesir næmingar um gjørligt plikta seg at arbeiða á støðini í Klakksvík eitt ár frá tí, at tær eru nóg mikið lærdar á støðini í Havn.

B.

Frá *allari nevndini:*

1. Tingið góðkennir tær avgerðir, sum tiknar eru av millumtinganevndini.
2. Tingið kjósar eina 3-mannanevnd til millum tingseturnar í felag við verkstjóranum at taka avgerðir í øllum málum telefonverkinum viðvíkjandi.

2. viðgerð 25. november. 3. viðgerð 30. november. Uppskot A 1 samtykt 15—0. (Ja atkvóðu: Poul Petersen, P. M. Dam, J. F. Kjølbro, Robert Joensen, R. Rasmussen, Richard Long, O. F. Joensen, J. H. Danbjørg, J. P. Henriksen, O. J. Jensen, Anth. Sørensen, Samuel Ellefsen, Jacob Fr. Øregaard, J. P. Davidsen, Thorstein Petersen. J. Patursson burturstaddur, hinir atkvóðu ikki), B samtykt 18—0 og A 2 datt burtur.

---

2. Hækkan av telefongjøldum.

---

1. viðgerð 14. september. Framlagt 23. november.

Álit.

Hetta mál hevur verið til viðgerðar í løgtings telefonmillumtingananevnd og í landsnevndini. Í brævi frá telefonstjóranum, 25/4—44, til landsnevndina framførir stjórin fylgjandi:

Orsakað av, at telefonverksins útreiðslur undir bardaganum eru vaksnar við prístalinum, meðan inntøkurnar ikki eru hækkaðar í sama mun, hevur verkið síðan 1942 javnliga verið noytt til at brúka av sínum sparipeningi.

Sum raksturin av verkinum gongur í løtuni, gevur telefonverkið 5—7.000 kr. í undirskoti um mánaðin burtursæð frá telefonfelagagjaldinum, sum gevur verkinum 80—90.000 kr. um árið. Harav fylgir, at keyp av tilfari og amboðum næst gevur undirskot á rakstrarroknskapinum.

Frá 1. jan. 1942 vóru samtalutakstirnir hækkaðir við 10 oyru pr. samtalu, og frá 1. apríl 1943 varð telefonfelagagjaldið hækkað nakað (sjá Nýggir takstir, Telefonfelagabók 1943). Av hækkingini í samtalutakstunum fingu støðirnar 2 oyru av 10, og av telefonfelagsgjaldinum fingu tær eftir 1. apríl 1943 10 kr. av hvørjum telefonfelaga um árið.

Telefonfelagsins rakstur gongur soleiðis í løtuni, at verkið brúkar av sínum sparipeningi.

Aftaná bardagan vita vit, at nógv verður hjá verkinum at leggja um, endurnýggja og byggja av nýggjum; eg skal nevna:

1) Jarðkaðalniðurleggingar bygda millum og innanbýggja í stórbygdum.
2) Húsabygging. Telefonstøðin í Havn má verða bygd storri; telefonstøðirnar í størri bygdum áttu alt at verði fastlagdar (Húsabygging).
3) Útskiftan av gomlum telefontilfari við nýtt.

Slik tiltøk vil telefonverkið ongan pening eiga til, sum raksturin nú gongur. Alt skal verða gjørt við láni ella við tilskoti frá tinginum.

Betri var, um telefonverkið sjálvt hevði nakað til at taka, og tí áttu telefontakstirnir at verða lagdir so undir krígnum, at raksturin gav ein fittan ágóða.

Nevndin, sum hevur haft málið til umhugsan, má halda, at tørvur er á, at skipað verður so fyri, at raksturin av telefonverkinum ber seg, og at verkið kann gerast fört fyri, at umskipan og nýbygging av telefonum kann fara fram, sum so harður tørvur er á.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at hækka takstirnar, um so er, at prísstopplógin ikki virkar forðandi fyri eini taksthækkan og loyvir sær at framseta fylgjandi

uppskot:

1. Stjóranum verður álagt, aftaná at vissa er fingin fyri, at prísstopplógin ikki er til hindurs, at seta fylgjandi takstbroytingar í gildi:
2. Frá 1. januar 1945 verða samtalutakstirnir hækkaðir við 20 oyru pr. samtalu, og telefonfelagatakstir við 10 kr. fyri støðir við 21—150 telefonfelagum og 20 kr. fyri støðir við 151 felagum og fleiri.
   Umstilling verður hækkað við 10 kr., Eykakontakt við 5 kr. og Eykaklokka við 4 kr.
   Yvirtakstir á linjum verða hækkaðar við 2 kr. pr. 100 m og telefontelegramtakstir við 2 oyru pr. orð. Boðsending upp til 1 km verður sett til 30 oyru. Frá 1 km upp til 1,5 km verður sett til 35 oyru og boðsending longur enn 1,5 km verður sett til 75 oyru.
3. Boðskyldu hevur tann støð, sum ringt verður til.
4. Millumtinganevndin saman við verkstjóranum verður heimilað til at geva bygdastøðunum eitt passandi tillegg av taksthækkanini.

2. viðgerð 25. november. 3. viðgerð 30. november. Uppskot 1—3 samtykt 18—0, pt. 4 við 16—0.

---

3. Nýtt telefonstøðarhús í Havn.

---

1. viðgerð 14. september. Framlagt 2. november.

Álit.

Verkstjóri telefonverk Føroya løgtings hevur í brævi 7/8 1944 reist spurningin um nýtt telefonstøðarhús í Havn. Hann vísir á í brævinum, at tann telefonstøðarbyggningurin, sum nú er, varð bygdur í 1912, tá bert vóru um 60 telefonfelagar. Seinri er bygd ein stovulongd aftrat til 2/3 av breiddini, og húsini eru nú so gjølla innrættaði, at har gerst ikki meir.

Støðin í Havn hevur nú 500 telefonfelagar, og bygdalinjurnar eru eisini fleiri nú enn í 1912. Um 30 fólk hava dagligt arbeiði í hesum húsi.

Soleiðis sum telefonfelagarnir eru vaksnir og framvegis tykjast at

vaksa heldur stjórin, at ikki sleppst uttanum skjótt at byggja nýggja telefonstøð, og hevur hann hugsað sær, at hin nýggi byggningurin verður gjørdur í vinkul, ein longd oman mót ánni fram við Sverrisgøtu, og ein oman við Tinghúsvegnum. Byggikostnaðurin eftir 1939-prísum, metir stjórin, verður 65.000 kr., tó skal einki verða gjørt við loftshæddina innan.

Nevndin, sum hevur havt málið til viðgerðar má ásanna, at soleiðis sum telefonverkið er vaksið, er arbeiðið á støðini eisini vaksið og væntandi verður at vaksa. Vildi tað tí gjørst neyðugt at farið undir at byggt nýtt hús, so at arbeiðsrúm varð, og at arbeiðið á støðini kundi gjørst skjótt og gott, og tað hevði borið til. Men, sum umstøðurnar eru í løtuni, hvar at kalla einki byggitilfar fæst, kann nevndin ikki ráða tinginum til at fara undir at byggja nýtt telefonhús í Havn, men at málið verður uppafturtikið til viðgerðar so skjótt, sum umstøður verða til at fremja tað.

Uppskot:

1. Nevndin kann ikki ráða til at byggja nýtt telefonstøðarhús í Havn, sambært tað, sum framført er í álitinum.
2. Málið verður at taka aftur til viðgerðar, tá umstøðurnar verða til at fremja málið.

2. viðgerð 7. november. Samtykt 18-0.

V. Sjúkrahúsmál o. a.

1. Bróstsjúkrahúsið.

1. viðgerð 15. september. Framlagt 8. november.

Álit.

Málinum er viðlagt:

1. Frágreiðing frá V. Magnussen, yvirlækna, um sjúkraviðurskiftini í 1943 á bróstsjúkrahúsinum í Hoydølum og tuberkladeildini á «Dronning Alexandrines Hospital».
2. Fíggjarligt yvirlit við roknskapi fyri 1943 fyri áðurnevndu sjúkrahús og viðmerkingum frá løgtingsskrivstovuni.
3. Útskrift av gerðabókini hjá millumtinganevndini.
4. Umsókn frá Nikal Thomsen, portøri, um lønhækkan.
5. Fíggjarætlan fyri 1944.

Roknskapurin fyri 1943 vísir í útreiðslum kr. 215.538,53 móti kr. 174.500,00 eftir ætlanini, t. v. s. eitt hall uppá kr. 133.911,02, sum er goldið úr amtsgrunninum, sb. løgtingssamtykt av 30. september 1941. Hallið er kr. 24.305,22 størri enn árið fyri.

Útreiðslurnar til kostarhald hava verið:

	1942	1943	1944
Uppá sjúkradagin	3,19 kr.	4,97 kr.	4,34 kr.
— kostdagin	2,50 »	4,03 »	3,03 »

Í árinum 1943 vóru sjúkradagarnir tilsamans 20.512 og sjúklingamiðaltalið 56,2.

Millumtinganevndin hevur á fundi 19. december 1943 samtykt:

1. at lata 300 kr. til ferjuavloysing til starvsfólkið í køkinum.
2. at hækka gjald fyri grannskoðan av rokningum frá 60 kr. til 200 kr. árliga.
3. at lýsa eftir nýggjari sjúkrasystur, tí sjúkrasysturin á nýggja húsi hevði sagt upp.

Á fundi 19. januar 1944 varð samtykt:

1. at leiga Anton Kragesteen, Tórshavn, eitt hóskandi øki av Rossatrønni til høsnagarð, tá ið tilfar fæst til innhegning og bygging av neyðturvulígum húsum, og fyri 1944 at leiga Suðurstreymoyar Rossafelagi alla Rossatrønna fyri 50 kr. við teirri treyt, at felagið umvælar stikið og heldur tað í góðum standi.
2. at seta Ingibjørg Kruse av Eiði sum deildarsjúkrasystur frá 1. mars 1944 við løn 194,13 kr. um mánaðin, tó soleiðis at lønin verður 100 kr. um mánaðin til 10. juni 1944.
3. at lata borðstovuna á gamlahúsi mála.
4. at svara Th. J. Jacobsen á Hvítanesi, sum søkti um, at bróstsjúkrahúsið sjálvt letur ta mjólk, sum tað fær á Hvítanesi, heinta, at hetta hetta kann ikki vera gjørt undir núverandi viðurskiftum.

Á fundi 29. mars 1944 varð viðgjørd rokning frá Martin Mortensen, blikksmiðimeistara fyri tilfar og arbeiðið uppá hitaverkið. Samtykt varð ikki at góðtaka rokningina, fyrr enn upprunalig faktura var framløgd.

Samtykt varð at biðja prísansingarráðið um loyvi at hækka gentulønina við 20 kr. um mánaðin, tí tað tóktist ómøguligt at fáa gentur til bróstsjúkrahúsið.

Á fundi 26. april 1944 var til viðgerðar:

1. Krav frá neytaeigarum á Hvítanesi og í Hoyvík um at fáa mjólkaprísin hækkaðan frá 65 oyru til 71 oyru fyri liturin. Samtykt varð at bjóða 68 oyru fyri og so taka alla mjólkina, teir kunnu lata, ella 71 oyru fyri liturin og so í mesta lagi taka 100 litrar um dagin. Neytaeigararnir tóku seinri við fyrra tilboðnum.
2. Yvirlit yvir raksturin 1943 varð framlagt.
3. Samtykt varð at biðja Tr. Samuelsen, landsrættarsakførara samráðast við harra Martin Mortensen um krav hansara og fáa málið greidliga upplýst.

Á fundi 14. juni 1944 varð framløgd umsókn frá Nikal Thomsen, portøri um lønhækkan. Samtykt varð at svara, at hon fæst ikki í lag uttan samráðing við løgtingsskrivstovuna um lønina hjá hinum tænastumonnum løgtingsins. Løgtingsskrivstovan legði umsóknina fyri landsnevndina, sum samtykti at leggja málið fyri tingið.

Av tí, at Martin Djurhuus o. a., sum árið fyri høvdu leigað Rossatrønna til beiti, høvdu goldið leigu fyri 1944 í teirri trúgv, at leigumál teirra varð viðvarandi og ikki fyri eitt ár í senn, varð samtykt, at teir fyri hetta árið kunna hava beitirættin, um teir kunna semjast við Rossafelagið. Henda semja er fingin í lag.

Á fundi 22. juni 1944 varð framlagt bræv frá Husted-Andersen, landsrættarsakførari við kravi beinan vegin at gjalda rokningina frá Martin Mortensen, annars vildi hann stevna tinginum. Samtykt at halda fast um, at faktururnar verða at leggja fyri nevndina.

Fíggjarætlan fyri 1945 varð góðkend soleiðis sum framløgd av inspektørinum.

Í tingsetuni hevur nevndin 20. september í ár, av tí at tað er ómøguligt at fáa gentur til bróstsjúkrahúsið, samtykt at geva øllum gentunum lønhækkan uppá 20 kr. um mánaðin og biður prísansingarráðið góðtaka hetta. Nevndin mátti halda tað vera nyttuleyst at bert fáa loyvi at hækka lønina hjá gentum, sum hava verið minnst 2 ár í tænastuni, soleiðis sum ráðið hevði givið loyvi til.

Á fundi 26. september varð samtykt at veita sjúkrasystrunum 100 kr. hvørjari í viðurgjald fyri eykaarbeiði. Samtykt varð til várs at lata mála rúmini í ovaru síðu á gomlu deild.

Á fundi 3. november varð framløgd uppsøgn frá bústjóranum frk. Z. Jensen til 1. februar 1945, og biður hon um at fáa afturgoldnan tann pening, sum hon hevur goldið í eftirlønargjaldi. Samtykt varð at taka við uppsøgnini og lýsa eftir nýggjum bústjóra við somu løn sum deildarsjúkrasystir og at afturrinda frk. Z. Jensen hennara inngoldna pening, tilsamans 1.072,50 kr.

Tað misljóði, sum var í fjør, serliga kostinum viðvíkjandi, hevur javnað seg, og ongar kærur hava verið førdar fram fyri nevndini, tvørtur ímóti hava teir sjúklingar, sum spurdir hava verið, sagt, at viðurskiftini eru góð.

Nevndin setur fram hetta

uppskot:

1. Roknskapurin fyri 1943 verður góðtikin, og hallið greitt úr amtsgrunninum.
2. Tær samtyktir, millumtinganevndin hevur gjørt, verða góðtiknar.
3. Bústjórin frk. Z. Jensen fær, táið hon fer úr starvi 1. februar 1945, afturrindað tann pening, — 1.072,50 kr. —, sum hon hevur goldið í eftirlønargjaldi.
4. Millumtinganevndin verður heimilað at lata gera neyðturvuligar umvølingar.
5. Tingið góðtekur fíggjarætlanina fyri 1945:

Inntøkur:

A.	Sjúklingagjald	kr.	20.000,00
B.	Ríkisstudningur	»	56.940,00
C.	Urtagarður og húsdjór	»	3.000,00
D.	Ymist	»	0,00
E.	Løgtingsstudningur	»	124.760,00
		kr.	204.700,00

Útreiðslur:

1.	Løn	kr.	36.000,00
2.	Kostarhald	»	90.000,00
3.	Hiti og ljós	»	36.000,00
4.	Urtagarður og húsdjór	»	3.000,00
5.	Medicin o. t.	»	6.000,00
6.	Viðlíkahald av húsum	»	8.000,00
	At flyta...	kr.	179.000,00

	Flutt...	kr.	179.000,00
7.	Inventar og maskinur	"	9.000,00
8.	Røntgenfilmur	"	3.000,00
9.	Vask og reingering	"	7.000,00
10.	Trygging	"	1.500,00
11.	Skrivstovuhald	"	1.700,00
12.	Koyrsla	"	2.000,00
13.	Ymist	"	1.500,00
14.	Avskrivað	"	0,00
		kr.	204.700,00

2. viðgerð 15. november. 3. viðgerð 17. november. Samtykt 16–0.

---

2. Ellisheimini.

1. viðgerð 14. september. Framlagt 25. oktober.

Álit.

Í tingsetuni 1941 (sjá tingtíðindi 1941, blðs. 155) var til viðgerðar á tingi approbatión av gjøldunum á ellisheiminum í Havn og á Tvøroyri, og samtykti tingið at góðkenna, at gjøldini pr. kostdag hjá hvørjum av teim gomlu, sum vóru, vórðu sett til 2,50 kr. á ellisheiminum í Havn fyri eitt tíðarskeið uppá 2 ár roknað frá 1. januar 1941, og á ellisheiminum á Tvøroyri frá tí degi, heimið varð tikið í brúk og til árslok í 1942.

Samstundis varð viðtikið, at løgtingið skuldi gjalda dýrtíðarviðbót, sum svaraði til $^{9}/_{10}$ av tí peningabædd, sum gjøldini vóru størri enn 2,50 kr. pr. kostdag, inntil 4 kr. pr. kostdag.

Málið var aftur til viðgerðar á tingi í 1942 (sjá løgtingstíðindi 1942, blðs. 75), har tingið samtykti tað sama sum í tingsetuni 1941 ellisheiminum í Havn og á Tvøroyri viðvikjandi fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 1943 til 31. december 1944.

Tá henda viðtøka ikki røkkur longur enn til árslok 1944, hevur løgtingsskrivstovan lagt málið fyri tingið aftur í ár.

Løgtingsskrivstovan hevur sent amtinum málið til umsøgn, og sigur amtið frá, at tað kann góðkenna, at statskassin skal gjalda tað sama sum fyrr, nevniliga $^{9}/_{10}$ av 2,50 pr. kostdag.

Í málinum eru skriv frá Tórshavnar býráð við yvirliti yvir útreiðslurnar viðvikjandi ellisheiminum í Havn 1942 og 1943. Við eftirkannan av tingtíðindum 1941 og 1942 og yvirlitunum frá býráðnum við útreiðslunum í 1942 og 1943 sæst, at útreiðslurnar pr. kostdag fyri hvønn av teimum gómlu á heiminum, hava verið:

1939.... ca. 2,90 kr.
1940.... ca. 3,21 kr.
1941.... ca. 6,64 kr. (samlaðar útreiðslur kr. 24.291,56, kostdagar 3659)
1942.... ca. 7,60 kr. (samlaðar útreiðslur kr. 27.524,93, kostdagar 3621)

Útreiðslurnar á ellisheiminum í Havn fyri árið 1943 vóru 37.610,83 kr. Á heiminum hava verið 14 gomul fólk í tilsamans 3.739 kostdagar. Útreiðslurnar pr. kostdag í 1943 hava soleiðis verið:

$$\frac{37.610{,}83 \text{ kr.}}{3.739 \text{ kostdagar}} = \text{ca. } 10{,}06 \text{ kr.}$$

Roknskapurin fyri ellisheimið á Tvøroyri vísir, at útreiðslurnar hava verið tilsamans 16.076,29 kr. Á heiminum hava verið 8 gomul fólk fyri árið í tilsamans 2.641 kostdagar. Útreiðslurnar pr. kostdag verða:

$$\frac{16.076{,}29 \text{ kr.}}{2.641 \text{ kostdagar}} = \text{ca. } 6{,}08 \text{ kr.}$$

Í tvey tey seinastu árini, 1942 og 1943, eru útreiðslurnar á ellisheiminum í Havn nógv hækkaðar pr. kostdag. Fyri árið 1941 vóru útreiðslurnar sum ávist pr. kostdag ca. 6,64 og í 1943 vóru tær ca. 10,06 kr. Hetta er ein hækkan uppá 3,42 kr. síðan í 1941.

Útreiðslurnar, sum tingið hevði til ellisheim í 1943 (fyri roknskaparárið 1942) vóru 6.971 kr. 40 oyru.

Nevndin, undantikin Danbjørg, mælir til, at sama skipan verður galdandi fyri 1945, sum er galdandi í ár.

Minnilutin (J. H. Danbjørg) heldur fram, at tað hevur verið og er bæði á Tvøroyri og í Tórshavn stór trongd til at hava ellisheim, og at bæði Froðbøar sóknarstýri og Tórshavnar býarstýri hava roknað við at $^{9}/_{10}$ av øllum útreiðslunum skulu verða refunderað av stati og løgtingi.

Vegna tess at 2 kr. 50 oyru um dagin fyri hvørt fólk á ellisheimunum er sett sum tað gjald, ið staturin skal rinda $^{9}/_{10}$ av, meðan útreiðslurnar í hesum óvanligu dýru tíðum eru nógv hægri, koma kommunurnar at bera ógvuliga tungar byrður uttan so er, at løgtingið luttekur mest møguligt í teim útreiðslum, ið liggja omanfyri tær umtalaðu 2 kr. 50 oyru, ið staturin rindar $^{9}/_{10}$ av.

Í 1941 og eisini í 1942 hevur tingið samtykt at gjalda eina dýrtíðarviðbót svarandi til $^{9}/_{10}$ av tí peningahædd, sum gjøldini vóru størri enn 2 kr. 50 oyru pr. kostdag, inntil 4 kr. pr. kostdag fyri tíðarskeiðið inntil 31. december 1944.

Bæði tey nevndu ár hevur undirritaði minniluti hildið fram, at tingið eigur at rinda $^{9}/_{10}$ av muninum millum 2 kr. 50 oyru og 5 kr. pr. kostdag, og minnilutin má fasthalda, at tingið eigur at ganga hægri nú vegna tess, at útreiðslurnar eru vaksnar síðan 1941 og aftur meira vaksnar síðan 1942.

Samsvarandi prístalinum mælir minnilutin at rokna við 6 kr. pr. kostdag.

Uppskot:

Frá *allari nevndini:*

1. Løgtingið samtykkir, at takstirnar fyri Tórshavnar ellisheim og Tvøroyrar ellisheim fyri 1945 verða ásettar til 2 kr. 50 oyru pr. kostdag pr. alumnu.

Frá *meirilutanum:*

2. Verður útreiðslan pr. kostdag meiri enn takstin (2,50 kr.), veitir tingið fyri 1945 dýrtíðarviðbót, svarandi til $^{9}/_{10}$ av tí, útreiðslan er meiri enn taksturin inntil 4 kr. pr. kostdag.
3. Dýrtíðarviðbótin undir pt. 2 verður goldin av tí peningajáttan, landsnevndin hevur at ráða yvir til socialhjálp.

Frá *minnilutanum* (Danbjørg):

4. Verður útreiðslan pr. kostdag fyri hvørja alumnu meiri enn 2 kr. 50 oyru, veitir tingið fyri 1945 úr amtsgrunninum $^{9}/_{10}$ av tí, útreiðslan er hægri enn taksturin (2 kr. 50 oyru) upp til 6 kr. pr. kostdag.

Broytingaruppskot

frá Th. Petersen o. fl.

Í staðin fyri meirilutauppskot grein 3 verður sett:

3. Dýrtíðarviðbótin undir pt. 2 verður goldin úr amtsgrunninum undir gr. 7 C.

2. viðgerð 27. oktober. 3. viðgerð 2. november. Nevndaruppskot 1 samtykt 20—0, meirilutauppskotið 2 samtykt 22—0, broytingaruppskotið við 22—0 og harvið pt. 3 burturdottið, minnilutauppskotið 4 fall 6—0.

---

3. Læknaviðurskifti í Havn.

---

14. september framlagt.

Álit.

Læknaviðurskifti í Tórshavn hava verið óvanlig síðan 1939 av tí, at eingin fastur amtslækni hevur verið, og tí eingin løntur lækni til at taka ta helvtina av læknavirki fyri Tórshavn og Suðurstreymoy, ið kommunulæknin ikki kann koma yvir.

Hesin spurningur lá fyri landsnevndini í 1942, og var tá soleiðis statt, at læknin frgv. Meta Nielsen hevði tikið upp starvið í Tórshavn, men bað um at fáa fasta løn eins og ein kommunulækni. Hesa bøn grundaði læknin við tí, at vitjunargjøld, ið hon fekk, vórðu sett so lágt undir samráðingum við sjúkrakassarnir av tí, at læknarnir høvdu fasta løn, men um hon onga fasta løn fekk, vildi hennara samsýning verða heilt óhóskandi.

Landsnevndin heitti á amtið um at gjalda hendan pening av tí partinum av amtslæknalønini, ið ikki var nýttur, men helt hann ikki hettar bera til.

Tá varð tann sèmjan fingin í lag, at Tórshavnar býráð skuldi gjalda 2.000,00 kr., kommunur í Suðurstreymoy 1.000,00 kr. og Føroya løgting 2.000,00 kr. — fyri tíðarskeiðið 1. juli 1942 til 30. juni 1943 — Líknandi skipan varð seinri játtað av landsnevndini fyri tíðarskeiðið 30. juni 1943 til 30. juni 1944.

Nú søkir lækni frgv. Meta Nielsen um endurnýggjan fyri eitt ár frameftir.

Málið hevur verið til viðgerðar í figgjarnevndini, ið er samd um, at tað eigur at verið hildið fram við hesi skipan til vanlig læknakor kunnu fáast í lag fyri Havnina. Nevndin setur tí uppskot um, at tann gamla skipanin verður endurnýggjað fyri tíðina 30. juni 1944 til 31. december 1944, og at landsnevndin verður heimilað til at samtykkja somu skipan fyri árið 1945 um viðurskiftini gera tað neyðugt.

Uppskot:

1. Lønskipanin fyri lækna Meta Nielsen í Havn verður endurnýggjað fyri tíðina til 31. december 1944.
2. Landsnevndin verður heimilað at samtykkja líknandi skipan fyri árið 1945 um viðurskiftini gera tað neyðugt.

2. viðgerð 16. september. 3. viðgerð 20. september. Samtykt 17—0.

---

4. Bretska sjúkrahúsið í Sandavági.

1. viðgerð 25. september. Framlagt 25. oktober.

Álit.

Til figgjarnevndina er vístur ein spurningur um, hvussu tað almenna kann gera bestu nýtslu av tí bretska sjúkrahúsinum í Sandavági, ið stendur Føroyingum í boði. Málið hevur verið til viðgerðar í landsnevndini frammanundan, og skal her verða givið eitt yvirlit yvir, hvat ið fyri hevur farist.

Í februar 1944 greiddi tann bretska herdeildin løgtingsskrivstovuni frá, at teir ikki longri fingu brúk fyri teirra sjúkrahúsi vesturi í Sandavági, og at teir vóru sinnaðir til at geva tað til eitt gott alment endamál hjá Føroyingum, um vit vildu greiða ta skyldu, teir høvdu yvirfyri losjuni í Sandavági og J. J. Simonsen, sum vóru eigarar av teimum húsunum, teir høvdu umbygt til sjúkrahús.

Landsnevndin svaraði tann 15. februar 1944 aftur, at teir takkaðu fyri tilboðið, men at tað ikki var nøkur heimild til tøku av byggningi, so semja mátti fáast í lag við eigararnar, áðrenn meira kundi verða gjørt.

Tað kom fyrst í lag eitt brævaskifti við stýrið fyri barnaheimið í Vestmanna, um hesin stovnur hevði brúk fyri húsinum. Stýrið ásannar hetta og fær váttan frá J. J. Simonsen um, at hann vil lata hús sítt til barnaheim, um tað verður flutt til Sandavágs. Tá so verður samráðst við losjuna, vil hon ikki ganga við til, at hús hennara verður latið til barnaheim. Tað fara samráðingar fram fleiri ferðir, men uttan úrslit, og tann 24. april 1944 skrivar stýrið fyri losjuna «Vakhús» bræv til Sandavágs kommunu, at teir vilja lata húsið til alment føroyskt endamál — undantikið barnaheim — móti at fáa byggt nýggja losju í seinasta lagi tvey ár aftaná at kríggið er liðugt.

Aftaná at samráðingar høvdu farið fram í Havn og vesturi í Sandavági um at fáa húsið gjørt til barnaheim, hevði landsnevndin í juli fund við stýrinum fyri barnaheimið; á hesum fundi varð samtykt, at Rasmusen, prestur, formaður fyri barnaheimsstýrið, og løgtingsmaður Joh. M. Fr. Poulsen skuldu fara til Sandavágs og gera eina eina royna. Samráðing fór nú fram av nýggjum tann 26. juli 1944, og liggur í málinum váttan frá sendimonnunum og stýrinum fyri losjuna, at eingin semja kann fáast í lag, heldur ikki fyri einum uppskoti um at flyta barnaheimið fyribils til Sandavágs.

Tann 11. mars 1944 var samráðing í Tórshavn millum umboðsmenn fyri sóknarstýrinum í Vágum, landsnevndarlimir og amtslæknan, og varð har serliga talað um at fáa húsið til sjúkrahús fyri Vágoynna. Tað varð framhildið, at høvuðsmiðið má vera at útbyggja eitt sentralsjúkrahús í Havn, og at raksturin av einum lítlum sjúkrahúsi fer at verða dýrur. Amtslæknin framhelt, at tað vildi verða ov fáir sjúklingar til eitt sjúkrahús fyri Vágoynna áleina, men helt tað var at tilmæla, at tað í Vágoynni var ein operatiónsstova í samband við læknavirki í Miðvági, soleiðis at smærri hastandi operatiónir kundi gerast. Vágamenn bóðu um, at landsnevndin vildi koma vestur og hyggja at sjúkrahúsinum og samráðast við sóknarstýrini á plássinum.

Tann 28. april 1944 vóru landsnevndarlimir í Sandavági. Sóknarstýrislimir fyri Sandavág, Miðvág og Sørvág søgdu seg tilreiðar at átaka sær hervaldsins ábyrgd yvirfyri losjueigarunum og harra J. J. Simonsen, og vildu geva váttan um hetta. Henda váttan dagsettt 5. mai 1944 liggur í málinum. Annars var nógv havt á máli, og tankin um at nýta húsið til løgtingsins studentaskeið var eisini borin uppá mál.

Eftir áheitan frá sóknarstýrunum í Vágoynni hava Th. Nygaard fyristøðumaður fyri studentaskeiðinum og lærari við sama skeið verið í Sandavági og sagt frá teirra hugsan í skrivi av 5. juli 1944. Teir halda tað vera beinast, at skúlin í framtíðini verður í Tórshavn, men kunnu hugsa sær at hann bráðfengis, til hóskandi húsarúmd fæst í Havn, verður fluttur til Sandavágs.

Sóknarstýrini fyri Sandavág, Miðvág, Sørvág og Bíggjar sókn hava í skrivi tann 12. august 1944 sagt løgtinginum frá, at teir taka væl undir við uppskotinum um at fáa hægri skúla í Vágum, og vísa á, at teir frammanundan hava havt samráðing um at fáa sær framhaldsskúla fyri oynna,

og hetta kann væl falla saman við hesa ætlan. Teir siga eisini frá, at teir nú beinleiðis søkja um at fáa húsi til skúla og fasthalda ikki fyrra ynski sítt um at nýta húsið til sjúkrahús.

Í skrivinum biðja teir eisini um, at tað má fáast fastur sáttmáli við Bretar um húsini. Her liggur tað soleiðis fyri, at Bretar beinan vegin í vár fingu boð um, at vit vóru til reiðar at taka móti gávuni. Teir máttu tó fáa skrivligt loyvi frá London til at gera slíkan sáttmála, og tað er upplýst fyri nevndini, at hetta loyvi framvegis ikki er komið úr London, men kann væntast fyrsta dagin.

Tann 19. oktober 1944 varð samráðing hildin í Tórshavn millum fíggjarnevndina og Poul Joensen, lærara, og Hjalmar Nielsen, keypmann, úr Sandavági og Daniel Niclasen, keypmann úr Sørvági, sum umboðandi kommunurnar í Vágum; tingmenninir S. Ellefsen og Johs. Slettenæs vóru eisini hjástaddir undir hesum samráðingum.

Allir vóru samdir um, at tað átti at fáast sáttmála í lag við Bretar so skjótt boð var komið úr London, og varð tað hildið beint, at hesin sáttmálin varð fyrireikaður av løgtingsskrivstovuni eftir samráðing við kommunurnar í Vágum, og síðani lagdur fyri løgtingsins landsnevnd til samtyktar.

Allir vóru á einum máli um hetta, at tað átti at verða skipað so fyri, at henda gávan frá Bretum kom til nyttu so skjótt tað er gjørligt, og roknaðu allir við, at hetta mátti kunna fyrireikast til komandi summar. Tey mál, sum fyrst verða at kanna, eru hesi:

1. Flytan av løgtingsins studentaskeiði og preliminerskeiði til Sandavágs fyri tað tíðarskeið, ið má ganga, til hesin skúlin hevur fingið sær tíðarhóskandi innivist í Tórshavn.
2. Um hetta skuldi vist seg trupult, so átti at verið kannaður møguleikin fyri at flyta preliminerskeiðið til Sandavágs, á tann hátt at hetta løgtingsins skeið, saman við einum framhaldsskúla fyri allar kommunurnar í Vágoynni, framvegis skuldi halda til vesturi í Sandavági.
3. Um heldur ikki hetta kundi fáast í lag átti at verið eftirkannaður møguleikin fyri at gera framhaldsskúla fyri Vágoynna í Sandavági í samband við t. d. ein handilsskúla.

Allir hildu, at tað fór at verða trupult at fyrireika hetta undir sjálvari tingsetuni, og uppskot var um at seta eina trímannanevnd til at føra tær samráðingar, ið vórðu neyðugar, og skjótt fáa greiði á hvønn veg kundi haldast fram. Ein tílík nevnd skuldi veljast á tann hátt, at løgtingið valdi ein mann, kommunurnar fyri Vágoynna ein mann og fyristøðumaðurin fyri løgtingsins studentaskeið skuldi verða triði maðurin og formaður. Henda nevnd skuldi so samráðast við skúlastjórnina og við millumtinga skúlanevnd løgtingsins og leggja úrslitið fyri løgtingsins landsnevnd, ið skuldi taka støðu til málið tingsins vegna.

Fíggjarnevndin setur so statt fram hetta

uppskot:

1. Løgtingið samtykkir, at tikið verður við tøkk móti tí gávu, Bretar hava bjóðað Føroyingum við at handa okkum ókeypis tað bretska sjúkrahúsið í Sandavági. Løgtingsskrivstovan fyrireikar sáttmála við Bretar so skjótt boð eru komin úr London, og sóknarstýrini fyri Vágoynna góðtaka henda sáttmála og viðganga teirra ábyrgd til at

gera upp við teir fyrrverandi eigararnar av teimum tveimum húsum, ið eru uppi í sjúkrahúsinum. Landsnevndin fær síðani fyrilagt sáttmálan til samtyktar tingsins vegna.

2. Kommununrnar í Vágoynni verða umbidnar at velja ein mann, ið saman við einum av tinginum valdum manni og fyristøðumanninum fyri løgtingsins studentaskeið sum formanni skulu koma saman í nevnd til at samráðast um nýtsluna av húsinum, sambært tað í álitinum framførda. Henda nevnd førir tær neyðturvuligu samráðingar við skúlastjórnina og millumtingaskúlanevnd løgtingsins.
3. Tá úrslitið frá nevndini liggur fyri, verður tað at leggja fyri landsnevndina, ið tingsins vegna fær heimild til at samtykkja tað, ið er neyðugt, fyri at seta í verk nýtsluna av hesum húsi.

2. viðgerð 27. oktober, 3. viðgerð 2. november. Pt. 1 samtykt 23–0, pt. 2–3 við 18–0.

VI. Fiskivinnumál o. t.

1. Endurnýggjan av skipaflotanum.

A. Skip frá Bretlandi.

8. november framlagt.

Alit.

Fremsti spurningur millum Føroyingar er í løtuni endurnýggjan av okkara skipaflota. Royndir hava tí verið gjørdar longu undir bardaganum at seta bygging í verk. Ein fyribils ætlan um, hvat okkum tørvar, hevur Føroya Skipara- og Navigatørfelag gjørt.

Fyrst og fremst hava royndir verið gjørdar í Brettlandi, sum er at kalla einasta landið, Føroyar hava verið í samvinnu við undir heimsbardaganum. Vit hava fatað, at Brettland higartil má hava lagt alla sína orku í kríggsframleiðslu, so líkindi ikki hava verið enn hjá okkum at fingið sáttmála í lag um skipabygging har.

Í hesum døgum er Breti her, Mr. A. P. Quarrell, A. M. I. Mech. E. út London. Mr. Quarrell hevur verið til samráð við fiskivinnunevndina t. 31. oktober í ár.

Fundarúrslitið liggur í málinum. Av hesum framgongur, at harra Quarrell ikki hevur nakað almert umboð ella samband við brettska ríkisstýrið ella brettskar skipasmiðjur, men umboðar samlag av bretskum motorsmiðjum.

Samstundis var hann umbiðin at kanna møguligleikarnar fyri bygging til Føroya av fiskiførum í Brettlandi. Hann skilti vel trongdina til at fáa bygt skip til føroyska fiskiflotan og helt seg føran fyri at gera okkurt fyri at tílík skip kundu fingist. Hann skeyt ti uppá, at hann skuldi royna at fáa upplýst, hvat og hvussu mikið tørvur var á av vissum sløgum av førum og vónaði hann, at hann kundi skipa so, at hansara felagar í London kundu venda sær til yvirvald í bretsku stjórnini, sum hava skipabygging um hendi.

Skotið varð uppá at byggja tvinni sløgini av fiskiførum:

1. Dieseldrivnir ståltrolarar.

Hesir verða 126–130 føtur langir, ferma um 175 tons av fiski, ætlaðir til eina ferð uppá 10½ knob og drivnir av einum 8-cylindraðum Dieselmotori, framleiddum av Messrs. Mirrless, Bickerton & Day, Ltd. Trolararnir skulu hava dampspæl, dampurin kemur deils frá einum ketli, hitaðum av útstoytinum frá meginmaskinuni, og deils frá einum hjálparketli, hitaðum við oljufýring. Prísurin á hesum skipi er okkurt um £ 35.000, men Mr. Quarrell segði, at av tí, at hann ikki var skipasmiðjur mátti hesin ætlaði prísur kannast betur og verða ásettur, tá detaillerað tekning var gjørd. Skipini verða gjørd til eina manning uppá 18–20 manns fyri uttan skipara og stýrimann. Møguligleikin fyri at byggja 5 sovorðin skip varð umhugsaður.

2. Trawler-Seine net bátar av træi.

Hesir verða um 80 føtur langir, og líkist hetta slagið mest tí, sum verður byggt á landnyrðingssíðuni av Skotlandi (Moray Firth type). Hesi skip verða drivin av einum 4-cylindraðum Petter-motori uppá 250 B. H. P., og tað var roknað við, at prísurin kemur upp í 12–13.000 £, men er eisini hann óvissur, inutil detaillerað tekning er gjørd, og má tá verða ásettur. Møguligleikin fyri at byggja 10 tílík skip varð umhugsaður.

Samtykt varð undir nevndu samráðingum, at viðkomandi vald innan føroysku landsstjórnini skuldi umhugsa henda spurning gjøllari, og Mr. Quarrell lovaði tí at steðga í Føroyum til 10. november, og hann vónaði, at nevndin til ta tíð kundi taka støðu, so Mr. Quarrell kundi telegrafera til samfelagar sínar í London, so málið kundi viðgerast.

Skilað varð til, at tað var hildið neyðugt at finna okkurt felag í Brettlandi, sum kundi vera millumlið millum keyparar í Føroyum og smiðirnar í Brettlandi.

Eitt tílíkt felag átti at viðgjørt handils- og fíggjarsíðuna av tí keypi, sum møguligt verður útinnt, meðan tað hevði verið neyðugt at vissa sær hjálp frá dugnaligum bretskum marinuverkfrøðingi, sum umboða skuldi keyparans interessur.

Fyri at fáa tekningar gjørdar, sum keyparar kunnu góðkenna, er tað neyðugt, at umboðsmenn fyri ta føroysku sjóvinnuna fara til Brettlands so skjótt, sum til ber.

Fiskivinnunevndin, ið hevur havt málið til viðgerðar, er samd um at frambera sína og tingsins tøkk til Mr. Quarrell, A. M. I. Mech. E. fyri tann áhuga, hann hevur sýnt, og fyri, at hann uttan dvøl vil heita á sínar samfelagar í Brettlandi um at fáa útinnt henda fyri okkara land so týðandi spurning.

Málið at fáa skip og motorar frá Brettlandi hevur nevndarinnar og tingsins størsta áhuga. Fartrotið er so stórt nú, at meiri enn helmingurin av okkara sjófólki sleppur als ikki til skips, og hin helmingurin fær lítið meir enn tveir túrar um árið. Tað vil siga, at eisini hann má liggja størsta partin av árinum á landi.

Í Føroyum eru 5.000 sjómenn. Av hesum kunnu tey gomlu skipini, um 100 í tali, einans geva 1200 monnum arbeiði alt árið. Roknað verður við, at tey gomlu skipini nýtímansgjørd ikki kunnu nýta meir enn 12 menn hvørt. Seta vit 800 menn til hvalaveiðu, farmasigling og aðra sjóvinnu enn fiskiskap, verða eftiri um 3000 fiskimenn uttan før.

Fyri at geva hesum monnum før heldur nevndin at okkum tørvar at fáa:

12 150 fóta langar trolarar á 20 menn.
12 126—30 fóta langar trolarar á 20 menn.
50 90 tons før á 12 menn.
50 70 tons før á 10 menn.
75 50 tons før á 7 menn.
75 30—40 tons før á 6 menn.
75 20—25 tons før á 6 menn.

Nevndin mælir til at biðja Mr. Quarrell leggja sína orku á, fyri at fáa bretska ríkisstýrið at geva loyvi til og bretsk felag og virki at ganga við til skjótast møguligt at byggja:

6 150 fóta trolarar.
6 126—30 fóta trolarar.
10 90 tons skip.
10 70 tons skip.
10 50 tons skip.
10 30—40 tons skip.
10 20—25 tons skip.

ella um tað verður at falla tvørligt at byggja so nógvar ymsar støddir so at byggja

6 150 fóta og 6 126—30 fóta trolarar,
15 90 tons før, 15 70 tons før og 20 20—25 tons før.

Nevndin ynskir at siga og undirstrika yvir fyri Mr. Quarrell og bretska valdinum, at um tað av krígsligum og øðrum grundum er Bretum ómøguligt at fara undir eina so stórfingna bygging til Føroyar, so tó at lata Føroyingar fáa tað tal av skipum, ið er møguligt at fáa byggt, sjálvt um vit í fyrsta umfari ikki kunna fáa fleiri skip enn teir 5 trolararnar og tey 10 80 fótar lougu skipini, ið talan var um á frammanfyri frásagda fundi.

Viðvíkjandi drívkraftini heldur nevndin at gjølla má verða umhugsað, hvat ið er best rentabult motor ella dampkraft.

Sum ávíst tørvar Føroyum stóra endurnýgging, og tað verður ongantíð ov skjótt farið undir endurnýggjanina, og tí er aðalspurningurin skipabygging viðvikjandi, hvar vit kunnu fáa mest møgulig til nýmótans veiðu egnaði skip skjótast gjørligt.

Prísirnir, sum uppgivnir eru í fundarúrslitinum, eru sjálvandi leysir. Men nevndin ynskir at flyta fram, at tað hevur sterstan týdning fyri okkum at fáa prísir, sum liggja innan fyri rímuligt mark.

Enn størri týdning enn prisspurningurin hevur tíðin fyri at fáa skip líðug ikki bert fyri møguleikan fyri avrentan av teim keyptu skipum men eisini tí, at tað er mikið umráðandi, at menn í mest møguligum tali sum skjótast kunnu fáa arbeiði aftur í teirra vinnu.

Vísandi til tað í álitinum framflutta loyvir nevndin sær at seta fram hetta

Uppskot:

Løgtingið biður Mr. Quarrell, A. M. I. Mech. E., London, skjótast til ber útvega tilboð uppá tey í álitinum nevndu fiskifør.

Løgtingið leggur miklan dent á stutta handingartíð, haldgóðsku og sámuligan pris.

2. viðgerð 8. november og 3. viðgerð 9. november. Loyvi givið at frávíkja tíðarfreistir. Uppskotið samtykt 17—0.

B. Byggjan av motorførum 20/25 tons í Danmark.

20. november framlagt.

Álit.

Amtið hevur sent nevndini fylgjandi telegram frá danska gesantinum í Bretlandi, harri Reventlow, til ummælis:

«Your letter 26 august regarding small fishing boats 20—40 tons please cable soonest number such vessels required on usual conditions stop will cable you particulars regarding prices as soon as received here.»

Nevndin, ið hevur havt málið til viðgerðar, vísir á ummæli frá landsnevndini og frá vinnulívsfeløgunum, hvareftir menn meina, at tað er stórur tørvur á hjá okkum Føroyingum at fáa før uppá 15—30 tons til heimafiskiskap.

Nevndin heldur 20—25 tons støddina vera best hóskandi til henda fiskiskap.

Sjálvandi er prísmálið og dygdin av skipunum av størsta týdningi. Nevndin heldur tað tí verða neyðugt at tryggjað verður, at álitandi umsjón verður við byggingina.

Hvussu nógv skip vit eiga at fara undir at byggja av hesi her umrøddu stødd liggur á, hvønn marknað vit verða at fáa í framtíðini, umframt á, hvat skipini verða at kosta, og nær tey kunnu fáast. Men um hetta liggur einki fyri nevndini.

Meirilutin (P. M. Dam, Kr. Djurhuus og Jens Chr. Olsen) flyta fram:

Um, hvar vit helst eiga at byggja hesi før, er at siga, at byggjan av tílíkum førum væl kann fara fram í Føroyum í góðan mun, um tilfar kundi fingist til vega, men tað er greitt, at tað tó ikki í bræði her á landi kann verða bygt nær ella námindis tað tal av skipum, ið okkum tørvur er á.

Tá ið nú talan er um eisini at byggja skip í Danmark, verður tað her á landi tikið sum eini stór og gleðilig boð fyri fiskimenn. Farloysi er. Og útlitið at fáa før, meðan kriggið stendur á, er ringt. Tað vildi tí verið óført, um flest møgulig skip kundu staðið liðug og greið at taka til hjá fiskimonnum og nýta við tað sama, ið kríggið hasar av. Meirilutin kann tí mæla tinginum til at takka fyri tað skipabyggingartiltak, Danir eru við at gera fyri at veita føroyskum fiskimonnum nýggj nýtilig skip í ymiskum støddum.

Meirilutin ræður til, at tingið mælir til, at roynt verður at byggja um eini 50 20—25 tousa skip.

Minnilutin (O. J. Jensen og J. F. Kjølbro) skal viðmerkja:

Um, hvar vit helst eiga at byggja hesi før, er at siga, at byggjan av tílíkum førum væl kann fara fram í Føroyum í góðan mun, um tilfar kundi fingist til vega, og at líkindi eru til, at tílík bygging kann fara fram í Onglandi. Tá nú talan er um eisini at byggja slík før í Danmark, er tað ikki gott hjá nevndini at ætla um nakra avgjørda mongd at byggja har. Tó skip megu vit fáa og at veiða megu vit sleppa, um vit skulu liva her á landi. Hóast vit so statt ikki kunnu avgera málið viðvikjandi tali, má nevndin halda, at um bygd verða 20 fiskifør 20—25 tons stór í Danmark, vilja tey kunna koma Føroyingum væl við.

Uppskot.

Frá *meirilutanum* (P. M. Dam, Kr. Djurhuus og Jens C. Olsen):

1. Mælt verður til at byggja 50 20—25 tons fiskifør í Danmark, og at hesi før verða bygd til Bureau Veritas hægsta klassa og maskinkraft minnst 3 hk. pr. brutto tons.
2. Tað er umráðandi, at byggingarkønir menn føra umsjón við byggingini, at prísurin verður kappingarførur, og at bátarnir skjótt verða lidnir.

Frá *minnilutanum* (Ole J. Jensen, J. F. Kjølbro):

1. Mælt verður til at byggja 20 20—25 tons fiskifør í Danmark, og at hesi før verða bygd til Bureau Veritas hægsta klassa og maskinkraft minnst 3 hk. pr. brutto tons.
2. Tað er umráðandi, at byggingarkønir menn føra umsjón við byggingini, at prísurin verður kappingarførur, og at bátarnir skjótt verða lidnir.

2. viðgerð 22. november. 3. viðgerð 1. december. Meirilutauppskotið samtykt 13—0.

C. Motorar úr Svøriki.

20. november framlagt.

Álit.

Motorarnir í nógvum føroyskum fiskiskipum eru gamlir og átroðkandi er at fáa teir endurnýggjaðar. Nevndin heldur, at her verður talan um í næstu framtíð at fáa keypt einar 100 nýggjar motorar størri og minni til fiskifør, ið eru í Føroyum og verða bygd her.

Keypipeningurin fyri hesar motorar vil ætlandi vera um 3 milj. kr.

Av motorunum kunna nakrir verða keyptir í Bretlandi og nakrir í Danmark, tá ið hetta land er vorðið frítt aftur.

Føroyingar hava undan hardaganum keypt motorar eisini í Svøriki, og nevndin skal mæla til, at loyvið verður givið til at keypa í Svøriki motorar fyri upp til 1 milj. kr.

Uppskot:

Tingið viðmælir, at valutajáttan verður givin upp til 1 milj. sv. kr. til keyp av motorum í Svøriki.

2. viðgerð 22. november og 24. november. Samtykt 24—0.

D. Málið í sini heild.

1. viðgerð 22. september. Framlagt 24. november. **Álit, sí skj. 10.**

2. viðgerð 29. november. 3. viðgerð 1. december. Uppskot nevndarinnar pt. I—II samtykt 24—0, III við 22—0, IV við 25—0 og V við 20—0, meðan uppskot minnilutans VI fall 5—0, VII—VIII við 4—0, IX—X við 6—0.

Broytingaruppskot

frá Th. Petersen, P. Dahl, R. Long og Kjølbro.

Í staðin fyri uppskot VII frá minnilutanum (Dam) verður sett hjálagda uppskot:

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR
VIÐVÍKJANDI
TRYGGINGARSAMBANDIÐ «FØROYAR».

§ 1.

Innanfyri Tryggingarsambandið «Føroyar» verður sett á stovn frá 1. januar 1945 at rokna ein serstøk deild at taka við allari endurtrygging, ið felagið ynskir at taka við.

Frá nevnda degi at rokna er tað ikki loyvt øðrum deildum Tryggingarsambandsins at tekna endurtrygging.

§ 2.

Fyri tey riciki, ið endurtryggingardeildin í tryggingarsambandinum «Føroyar» tekur við, standa bert ognir deildarinnar til svars. Soleingi hesar ikki eru komnar upp til ½ mill. kr., standa tó eisini ognirnar hjá høvuðsdeildini í Tryggingarsambandinum «Føroyar» til svars.

§ 3.

Meðan Tryggingarsambandið «Føroyar»s endurtryggingardeild, ið ikki virkar so, at teir einstaku tryggjandi standa til svars sínamillum, verður undirgivin kommunala og amtskommunala skattaskyldu eftir almennari lóggávu, vera bæði Tryggingarsambandsins høvuðsdeild og og tess núverandi og komandi undirdeildir, ið virka so, at teir einstaku tryggjandi standa til svars sínamillum, frá 1. januar 1945 at rokna frítiknar fyri einhvønn beinleiðis kommunu- og amtskommunuskat.

§ 4.

Frá 1. januar 1945 at rokna verður álagt, sbr. § 7 í kunngerð nr. 14, 17. juni 1940, Tryggingarsambandinum «Føroyar»s høvuðsdeild eitt serstakt gjald, ið fellur til Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings. Gjaldið verður ásett av Landsnevndini hvørt ár, tá roknskapurin er gjørdur liðugur, og má ikki verða hægri enn tann peningahædd, ið verður hildin at svara til, hvat eitt einstakramanna firma samsvarandi ta til einahvørja tíð galdandi skattalóggávu vildi hava goldið sum skatt.

Í ivamálum ger amtmaðurin av, hvussu stórt gjald verður at rinda.

§ 5.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin. Reglurnar í § 3, 2. stk., í kunngerð nr. 39, 23. december 1943 fara úr gildi frá 1. januar 1945 at rokna.

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER VEDRØRENDE TRYGGINGARSAMBANDIÐ «FØROYAR».

§ 1.

Inden for Tryggingarsambandið «Føroyar» oprettes fra 1. Januar 1945 at regne en særlig Afdeling til Overtagelse af al Reassurance, som Forbundet maatte ønske at overtage.

Fra nævnte Dato at regne maa Tryggingarsambandið's øvrige Afdelinger ikke tegne Reassurance.

§ 2.

For de af Tryggingarsambandið «Føroyar's» Reassurance-Afdeling overtagne Risici hæfter alene Afdelingens Midler. Saalænge disse ikke andrager ½ Million Kroner, hæfter dog tillige Tryggingarsambandið «Føroyar»s Hovedafdelings Midler.

§ 3.

Medens Tryggingarsambandið «Føroyar»s Reassurance-Afdeling, der ikke virker paa Grundlag af Gensidighed mellem de enkelte Forsikringstagere, undergives kommunal og amtskommunal Skattepligt efter den almindelige Lovgivning, er saavel Tryggingarsambandið «Føroyar»s Hovedafdeling som dets nuværende og fremtidige Underafdelinger, der virker paa Grundlag af Gensidighed mellem de enkelte Forsikringstagere, fra 1. Januar 1945 at regne fritaget for enhver direkte kommunal og amtskommunal Skat.

§ 4.

Fra 1. Januar 1945 at regne paalægges der, jfr. § 7 i Kundgørelse Nr. 14 af 17. Juni 1940, Tryggingarsambandið «Føroyar»s Hovedafdeling en aarlig Afgift, der tilfalder Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings. Afgiften fastsættes efter Aflæggelsen af hvert Aars Regnskab af Landsnævnet og maa ikke overstige det Beløb, der skønnes at svare til, hvad et Privatfirma under de til enhver Tid gældende Regler om Skattelovgivning vilde have erlagt i Skat.

I Tvivlstilfælde afgør Amtmanden med bindende Virkning, hvilken Afgift der skal erlægges.

§ 5.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks. Bestemmelserne i § 3, 2. Stk., i Kundgørelse Nr. 39 af 23. December 1943 ophæves fra 1. Januar 1945 at regne.

Uppskotið datt burtur við, at uppskot um sama spurning frá Johan Poulsen og Kr. Djurhuus varð viðtikið, samanber tingmál nr. 1, 9 (Eykainntøkur til amtsgrunnin).

---

2. Friðan av fiskigrunni.

1. viðgerð 9. september. Framlagt 15. september.

Álit.

Nólsoyingar heita á tingið um at fáa fiskigrunnin «Suðuri á Rivi» friðaðan móti størri dekksførum við línu.

Eftir lóg nr. 59 23. apríl 1881 og almennum reglum er galdandi lóg, at hvør borgari frítt kann fiska á sjóterritorium, har bann er sett fyri fremmandar at fiska. Lóg nr. 90 1. apríl 1925, broytt við lóg nr. 450 22. december 1939 og kunngerð nr. 61 12. december 1941, setur forboð móti at nýta trol innan fyri sjómarkið. Kunngerð nr. 36 24. november 1942 gevur loyvi til at nýta skovluváð á strekki innan fyri sjómark, men uttan fyri eina nærri ásetta linju; snurruváð er eisini bannað innan fyri hesa linju.

Fiskilóg fyri Føroyar nr. 95, 14. apríl 1893 inniheldur serstakar reglur um nótakast, og í § 11 verður sagt, at í firðum, á vikum og í sundum, har ikki er streymur, kunnu serstakar samtyktir verða viðtiknar viðvikjandi nær, hvussu og við hvørjum reiðskapi fiskað kann verða.

Stjórin á skiparaskúlanum upplýsir, at fiskileiðin, her er talan um, liggur innan fyri hesi mark: Norðurleiki: Skalsá í Helluna, Suðurleiki: Hælsskarð í Kirkjubønes og Eysturleiki: Gøtunes í Mjóvanes. Hesi ýtur hevur hann sett út í korti.

Friðan av tí strekki, Nólsoyingar ynskja friðað móti línubrúki frá størri dekksførum, kann tí ikki verða gjørt við samtykt heimilað í galdandi lógum, men serstøk lóg má verða sett í gildi, um umsóknin skal verða játtað.

Fiskivinnunevndin kann so statt ikki mæla til at játta umsóknina.

Uppskot:

Eintak av álinum verður sent umsøkjarunum.

2. viðgerð 20. september. Samtykt 15—0.

3. Øðuveiða norðanfyri Streym.

1. viðgerð 9. september. Framlagt 22. september.

Álit.

Sóknarstýrið fyri Haldórsvíkar kommunu hevur vent sær til løgtingið um at fáa samtykt fyri øðuveiðu norðan fyri Streym endurnýggjaða frá 1. januar 1945.

Málið var til viðgerðar á tingi í 1939 (sí løgtingstíðindi 1939, síðu 81). Uppskotið til nýggja samtykt varð tá, samsvarandi lógina 14. april 1893, gjørt kunnugt í talvuni í øllum bygdunum, sum liggja innan fyri 2 mil frá plássinum, har øðuveiðan fer fram, men upplýsingar vóru tá ikki undir tingsetuni komnar frá øllum kunngerarunum. Sama er og vil verða hesu ferð. Løgtingið samtykti í 1939 at heimila landsnevndini til, tá upplýsingarnar vóru komnar viðvíkjandi kunngerðunum í talvunum, at senda uppskotið til dómsmálaráðið til góðkennan.

Uppskotið varð góðkent 3. juni 1940 og var tað soljóðandi:

§ 1.

I Henhold til Lov Nr. 107 for Færøerne om Beskyttelse af Muslingen af 14. April 1893 bestemmes herved følgende med Hensyn til Fangst af den store Musling «Øðu» paa den Strækning mellum Strømø og Øster- (Haldersvig og Ejde Sogne), der ligger indenfor følgende Grænser. Den nordlige Grænse: Torvanæs paa Østerø og Grønhødden paa Strømø. Den sydlige Grænse: Gjánoyri paa Strømø og Svinaaholm paa Østerø.

§ 2.

«Øður» maa indenfor de i denne Vedtægts § 1 nævnte Grænser kun fanges med det sædvanlige «Dregg», et Stykke Jern, hvis ene Ende fastgøres til en Line, og hvis anden Ende bestaar af en Samling Kroge,

Intet som helst Fartøj, der driver denne Fangst, maa bruge mere end 2 «Dregg». Det er forbudt at bruge andre Fangsredskaber til Fangst af «Øður» end det foran beskrevne Redskab, saalænge denne Vedtægt staar ved Magt.

§ 3.

Overtrædelse af denne Vedtægt, der sigter til at forhindre Ødelæggelsen af Øðubestande, straffes med Bøder efter Lovens § 5.

§ 4.

Nærværende Vedtægt gælder i et Tidsrum af 5 Aar fra 1. Januuar 1940 at regne.

Fiskivinnunevndin skal mæla til at ganga somu leið eisini hesu ferð, soleiðis at staðfest verður, tá teir neyðturvuligu upplýsingar liggja fyri, soljóðandi:

UPPSKOT TIL SAMTYKT

viðvíkjandi

fongi av øðu í einum parti av Sundalagnum millum Streymoy og Eysturoy.

§ 1.

Heimilað í lóg nr. 107 fyri Føroyar, 14. apríl 1893, um vernd fyri øðu og kræklingi verður hervið ásett fylgjandi viðvíkjandi fongi av øðu á strekkinum millum Streymoy og Eysturoy (Haldórsvíkar, Eiðis og Sunda kommunur), ið er innanfyri fylgjandi mark.

Norðara markið: Torvanes á Eysturoy og Grønhøvdin á Streymoy.

Sunnara markið: Gjánoyri á Streymoy og Svínáarhólmur á Eysturoy.

§ 2.

Øða má innanfyri tey mark, sum eru ásett í § 1 í hesi samtykt, bert verða fangað við vanliga dregginum, eitt petti av jarni, harav annar endin er fastbundin til eina línu, og hin endin er samanbundnir krókar.

Einki far, sum rekur hendan fong, má nýta meira enn 2 dregg. Tað er bannað at brúka annan reiðskap til fong av øðu enn tann reiðskap, sum er umskrivaður frammanundan, so leingi henda samtykt er í gildi.

§ 3.

Brot móti hesi samtykt, hvørs endamál er at forða oyðileggjan av øðuni, verða sektað við bót eftir § 5 í lógini.

§ 4.

Henda samtykt verður galdandi fyri eitt tíðarskeið av 5 árum frá 1. januar 1945 at rokna.

Uppskot:

Landsnevndin verður heimilað, tá kunngerarnir í viðkomandi bygdum hava áteknað kunngerðina, at gera tað, ið neyðugt er, so at omanfyri nevnda uppskot kann verða staðfest sum galdandi samtykt við gildi fyri eitt tíðarskeið av 5 árum frá 1. januar 1945 at rokna.

2. viðgerð 9. oktober. 3. viðgerð 12. oktober. Samtykt 23—0.

4. Broytan av grindareglugerðini.

1. viðgerð 23. september. Framlagt 21. november.

Álit.

Sýslumaðurin í Suðuroy skrivar 24. februar 1943 til amtmannin, at eftir grindareglugerðini, § 2, skal sýslumaðurin ansa eftir, at grindabátar og reiðskøp eru í forsvarligum standi og at gera lista yvir bátatal og fólkatal. Hann førir fram, at nú eru fáir grindabátar (róðrarbátar) eftir, og mest verða brúktir innstalleraðir bátar. Tað er eingin skylda at halda grindabát, og heldur sýslumaðurin, at eftirlitið, sum er álagt sýslumanninum, tí er illusorisk. Viðvíkjandi fólkatalinum er tað siður at tekna tað á grannastevnu. Í Suðuroy verður ein bátur ikki roknaður svarandi til 25 fólk. Serstakliga í Froðbiar kommunu geva fólk ikki fólkatalið upp. Í Suðuroy eru nógvir bátar, 6071 fólk svarandi til 121 bátar. Sýslumaðurin mælir tí til at áleggja fólki skyldu á grannastevnu, í hvørt tilfelli innan 1. mars, at geva upplýsingar um fólkatalið, annars missa tey rættin til partahval. Harnæst mælir hann til at áseta, at sýslumaðurin hevur rætt til at útleggja hval samlað til eitt sókn ella partar av einum sókni.

Sýslumaðurin í Sandoy heldur, at tað er ikki neyðugt at broyta grindareglugerðina. Fólkatalið verður uppskrivað á grannastevnu, og har hava eingir trupulleikar verið. Í stórum bygdum hevur sýslumaðurin býtt bygdirnar sundur í nummar, og smáar bygdir eru hvør fyri seg eitt nummar.

Sýslumaðurin í Vágum heldur ikki, at tað er neyðugt at broyta grindareglugerðina. Verunligir grindabátar eru fáir, og sýslumannsins skylda til eftirlit er faktisk burturdottin. Fólkatalið verður so vítt gjørligt skrivað upp á grannastevnu, og annars verða listar sendir út til formenninar at útfylla.

Sýslumaðurin í Eysturoya sigur, at tað eru ikki nógvir grindabátar til í gomlum týdningi, men bátar og reiðskøp tróta ikki. Viðvíkjandi fólkatali verður árliga gjørdur listi, umroknaður til bátatal (1 bátur = 25 fólk), fólk uppgeva vanliga fólkatalið á grannastevnu. Tá fólk í størri bygdum ynskja tað, verður bygdin býtt í fleiri nummar. Við smáar grindir verður útlagt saman fyri fleiri nummar ella bygdir. Sýslumaðurin mælir til, at § 2 í grindareglugerðini verður broytt, um tað er neyðugt at gera praksis í hansara umdømi lógligan.

Sýslumaðurin í Vestmanna upplýsir, at fólkatalið verður uppskrivað á grannastevnu, og um hann ikki fær tað fult upplýst har, fær hann restandi upplýsingar gjøgnum formenninar fyri hvørn bát.

Í Suðuroy verður útlagt eftir parti til hvørt fólkið, aðrastaðni eftir bátatali = 25 partar. Í Tórshavn verður tó útlagt samlað, og býráðið býtir grindina.

Annars er sýslumaðurin av somu uppfatan, sum sýslumaðurin í Eysturoy.

Sýslumaðurin í Norðoyggjunum skrivar, at har eru fáir reglementeraðir grindabátar, men tó nógvir róðrabátar. Viðvíkjandi fólkatalinum sendur sýslumaðurin árliga listar til formenninar at beina, og so verður gjørdur samlaður listi fyri grindadistriktini. Flestar bygdir verða uppførdar samlaðar. Við smáar grindir er tað neyðugt at útleggja ein hval til fleiri bátaløg. Hann mælir til, at loyvi verður givið til at samanleggja við út-

legg, har tað er neyðugt at seta forboð fyri at býta í ov smáar bátar, og at ein umboðsmaður verður valdur fyri hvørt bátalag við ábyrgd fyri upp-teknan av fólkatalinum.

Fútin er samdur við sýslumonnunum í Eysturoy og Streymoy.

Sýslumaðurin í Suðuroy hevur so aftur havt málið og úttalar 15. oktober 1943, at hann mælir til, at sýslumaðurin innan 1. mars skal gera lista yvir fólkatalið í hvørjari bygd. Fyri bygdir við yvir 200 íbúgvarum kann sýslumaðurin eftir ummæli frá kommunustýrinum býta bygdina í distriktir, og kommunustýrið skal so velja ein formann fyrt hvørt distrikt. Hesin maður skal geva sýslumanninum lista yvir íbúgvararnar og standa fyri býtinum av partahvalinum og fáa afturfyri 1/2 pct. in natura umframt endurgjald fyri útreiðslur við fluttning o. t.

Nevndin skal hereftir viðmerkja:

Sum tað sæst av ummælunum frá sýslumonnunum, er tann prak-tiski týdningurin av tí skyldu til eftirlit við grindabátum o. a., sum í § 2 í grindareglugerðini er álagd sýslumonnunum, verunliga ikki longur til staðar, av tí at grindabátar, sum meint í grindareglugerðini, ikki longur verða uppihildnir. Tað er eisini nevndini kunnugt, at nú er til hvørt grindadráp ivaleyst av grindareiðskapi, tí næstan hvør maður, sum fer í grind, hevur egnan reiðskap. Tað hevði tí verið rímiligt og náttúrligt, um tað nú verður gjørd ein broyting í § 2 í grindareglugerðini, eisini við-víkjandi ásetanunum um uppskrivan av fólka- og bátatalinum. Uppskriv-anin av fólkatalinum eigur í framtíðini at verða gjørd av sýslumanninum við hjálp frá kommunustýrunum, sum hvørt fyri sína kommunu skal senda sýslumanninum ein lista yvir húskini í kommununi og talið á fólkunum í hvørjum húski. Listin yvir bátatalið fellur so burtur, og í staðin fyri verða kommunurnar at býta húsatalið í bátanummar ella deildir, sum fyri størri bygdir so vítt gjørligt ikki skulu telja minni enn 200 fólk. Bygdir við minni enn 200 íbúgvarum fáa sjálvsagt bert eitt bátanummar. Kommunu-stýrið velur samstundis ein formann fyri hvørt bátalag, sum skal hava skyldu at standa fyri býtingini av partahvalinum til tey einstøku húsini móti einum viðurlag, uppá 1/2 pct. in natura av partahvalinum, sum til-kemur bátalagnum. Formaðurin skal standa fyri ella lata seta í verk upp-skeringina og flytingina av partahvalinum móti góðgerð av øllum útreiðslum, sum koma av hesum; útreiðslurnar verða so aftur at býta millum húskini í bátalagnum í mun til fólkatalið. Um nakar av bátalagnum skuldi noktað at rindað, stendur kommunan til svars fyri, at formaðurin fær sín pening afturrindaðan, og kann kommunan so innkrevja peningin við panting eftir teimum reglum, sum eru galdandi herum.

Av tí, at tað eftir upplýsingum, sum liggja fyri nevndini, tykist at vera vorðið siður í einari einstakari grindadeild at býta matahval til sjálvt fjarliggjandi bygdir og at nýta ovstórt tal av mannum og bátum til vaktarhald, soleiðis at tað til matahval og vaktarhald forlods gongur ein munandi partur, heldur nevndin orsøk vera til at skjóta uppá, at tað verður álagt øllum sýslumonnum at ansa eftir, at forlods útlegg verða hildin innan fyri rímiligt mark, og at matahvalurin soleiðis, sum álagt í § 19, c í grinda-reglugerðini altíð verður útlagdur í mun til støddina á grindini og talið á fólkinum, sum komið er til drápið.

Vísandi til frammanfyri standandi setur nevndin fram soljóðandi

uppskot:

1. Grindereglementets § 2 affattes saaledes:
   a. Sysselmanden er at anse som Hvalinspektør, og har som saadan det nærmeste Tilsyn med, at alt ved forefaldende Grindefangster

gaar anordningsmæssigt til. Han bør derfor, saa snart Grindebud bringes ham, straks begive sig til Grinden og har der nøje at vaage over, at enhver efterkommer sin Pligt.

b. Forstanderskaberne affatter hver for sin Kommune for et Aar ad Gangen en Fortegnelse over samtlige Kommunes Husstande med Angivelse af Antallet af Personer for hver Husstand.

Bygder med et mindre Indbyggerantal end 200 regnes som et Baadenummer. For større Bygders Vedkommende opdeler Forstanderskabet Husstandsfortegnelsen i Baadenumre med mindst 150 Personer i hvert Nummer.

For hvert Baadenummer udpeger Forstanderskabet en Formand blandt de til Baadelaget hørende mandlige Personer.

c. Inden hvert Aars 15. Februar meddeler Forstanderskabet Sysselmanden Afskrift af den under Pkt. b nævnte Fortegnelse med Angivelse af, hvorledes denne er inddelt i Baadenumre, samt tillige hvem der er udpeget til Formand.

Paa Grundlag af disse Fortegnelser affatter Sysselmanden derefter straks en samlet Fortegnelse for sit Syssel samt meddeler de andre Sysselmænd Fortegnelse over Syslets Baadenumre med Antallet af de dertil hørende Personer, for saa vidt angaar de til deres Sysler hørende Grindedistrikter.

d. Den for et Baadenummer udpegede Formand forestaar eller foranstalter Opskæring og Transport fra Hvalvaagen til Hjemstedet samt Fordelingen af den til Baadenummeret udlagte Partehval.

Som Godtgørelse herfor erholder Formanden ½ pct. in natura af den til Baadenummeret udlagte Partehval samt fuld Dækning af de med Opskæring og Transport forbundne Udgifter, der reparteres paa Baadelagets Husstande i Forhold til Folketallet.

I Tilfælde af at en Husstand ikke straks betaler sin Andel af Udgifterne, holder vedkommende Kommune Formanden skadesløs ved at refundere denne Beløbet, der derefter straks ved Forstanderskabets Foranstaltning kan inddrives ved Udpantning.

II. Amtmanden anmodes om at tilskrive samtlige Sysselmænd i Overensstemmelse med det i Betækningen om Udlæg af Madhval m. v. anførte.

I. Grindareglugerðin, § 2, verður broytt til:

a. Sýslumaðurin verður hildin grindaumsjónarmaður og hevur sum sovorðin næsta yvirlit við, at alt fer regluligt fram. So skjótt, hann fær grindaboðini, skal hann fara, har grindin er, og har væl ansa, at hvør maður ger sína skyldu.

b. Kommunustýrini geva hvørt fyri sína kommunu fyri eitt ár í senn lista yvir øll húskir í kommununi við uppgávu yvir fólkatalið fyri hvørt húsið. Bygd við færri íbúgvarum enn 200 verður roknað sum eitt bátanummar. Fyri størri bygdir býtir kommunustýrið listan yvir húskini í bátanummar við í minnsta lagi 150 fólkum í hvørjum nummari.

Fyri hvørt bátanummar velur kommunustýrið formann millum teir menn, sum hoyra til bátin.

c. Innan 15. februar hvørt árið skal kommunustýrið senda sýslumanninum avskrift av listanum, sum nevndur er undir b, við upplýsingum um, hvussu hann er býttur í bátanummar og um, hvør er valdur til formann.

Við hesum listum sum grundarlag ger sýslumaðurin so beinan vegin samlaðan lista fyri sýsluna og sendur hinum sýslumonnunum lista yvir bátanumrini í sýsluni við fólkatalinum so vítt viðvíkir tær til teirra sýslur hoyrandi grindadeildir.

d. Hann, ið er valdur til formann fyri einum bátanummari, stendur fyri ella letur seta í verk, at grindin verður uppskorin og førd frá hvalvánni til heimstaðið, og at grindin, ið er skift til bátanummarið, verður býtt.

Sum viðurlag fær formaðurin ½ pct. in natura av partahvalinum, ið skiftur er til bátin, og fult endurgjald fyri tær útreiðslur, sum eru við at skera upp og føra grindina. Hesar útreiðslur verða at býta millum húskini í bátanummarinum í mun til fólkatalið.

Um eitt húski ikki beinan vegin betalir sín part av útreiðslunum heldur viðkomandi kommuna formannin skaðaleysan við at afturrinda honum peningin, ið kommunustýrið so beinan vegin kann lata innheinta við útpantan.

II. Amtmaðurin verður umbiðin at skriva til allar sýslumenninar samsvarandi við tað, ið er flutt fram í álitinum um matahval o. a.

Broytingaruppskot

frá Henriksen:

Í grindareglugerð fyri Føroyar 1. juni 1940 verður § 23 III a broytt til:

Til Tórshavn:
Streymoyar sýslu og vestursiðan av Eysturoy og økið Eystnes—Mjóanes á Eysturoynni.

I Grindereglement for Færøerne af 1. Juni 1940 ændres § 23 III a til:

Til Thorshavn:
Strømø Syssel og Vestsiden af Østerø samt Strækningen Eystnes—Mjóanes paa Østerø.

2. viðgerð 28. november. 3. viðgerð 30. november. Nevndaruppskotið pt. I fall 11—0. (Ja atkvóðu: Johan Poulsen, P. M. Dam, Richard Long, Kr. Djurhuus, Tr. Samuelsen, O. F. Joensen, A. Samuelsen, J. H. Danbjørg, J. P. Henriksen, Anth. Sørensen, Thorstein Petersen; burturstaddur R. Rasmussen, hinir atkvøðu ikki), pt. II fall 2—0, broytingaruppskotið samtykt 17—0.

---

5. Vitatendring.

1. viðgerð 7. september. Framlagt 25. oktober

Álit.

26 fiskimenn úr Vági og Porkeri hava sent áheitan til løgtingið um at arbeiða fyri, at vitarnir í Føroyum aftur verða tendraðir skjótast møguligt og á sama hátt sum í grannalondunum Íslandi og Bretlandi.

Umsøkjararnir føra fram, at við sigling uppá Ísland og Bretland við ferskfiski hevur altið verið tann fulla vitatendring, ið hevur verið neyðug fyri siglingina, men tá ið siglingin til og frá Íslandi fer fram millum oyggjarnar her, vil einhvør fata, at tað er vandamikið, tá ið skipið ber við Føroyar, at ikki sæst ein glæma av nøkrum vita.

Eitt stórt bátafiskari fer fram í Føroyum, serliga í heytst- og vetrarmánaðunum og við brádligum illveðri er mangan mannalív í vága, tá ið vithrnir eru sløktir. Í hesum sambandi verður vist til innsiglingina til Vágs, har innan fyri Porkeri-Nes eru um 45 motorbátar, sum fiska bæði summar og vetur, og við ein brádligan eystan storm kunnu lætt henda vanlukkur, tí at vitin á Porkeris-nesi og innsiglingarvitarnir til Vágs eru myrkir. Eisini verður haft á máli, at einkultir vitar í Føroyum verða tendraðir upp í millum, og vekir hetta undran, tí kann hetta verða gjørligt av og á, má tað kunna finnast vegur til eisini onkuntið at hjálpa okkara útróðramonnum og fiskarum.

Fiskivinnunevndin hevur fingið málið til viðgerðar, og er nevndin greið yvir tann týdning, tað hevur fyri okkara sjófólk, at vitatendringin aftur kemur í rætt lag. Nevndin et á einum máli við umsøkjarunum í teirri áskoðan og hevur vent sær til hægsta bretska flotamann í Føroyum captain Corbett um at fáa eina samráðing í lag til fremjan av málinum, men hevur flotamaðurin í brævi, 20. september, boðað frá, at av tí at eingin heimild er givin frá admiralitetinum um at linka tær núverandi reglur um vitarnir í Føroyum, heldur hann eina samráðing vera til onga nyttu.

So statt sær nevndin seg ikki føran fyri nú at fáa framt hetta fyri Føroyar so týdningarmikla mál, men hevur nevndin út frá tí áhuga, ið málið hevur, aftur vent sær til hægsta bretska flotamann við brævi, 3. oktober, og fört fram, at málið er lagt inn á ting av nógvum monnum frá Vági og Porkeri, at Vágs fjørður er sera vandamikil at sigla og tá ið fiskibátar ikki kunnu náa heim á degi vegna veður og streym, kann tað verða størsti vandi at sigla fjørðin inn, serstakliga tá ið sýnið er ringt, og er tá mangan mannalív í vága.

Tað vildi bøtt væl um hesi viðurskiftir, um ikki annað, so tá ið bátar vóru úti, at innsiglingarvitarnir kundu lýst í skýming og so langt út á kvøldið, til bátarnir vóru innkomnir, ætlandi 2-3 tímar aftaná, at dagsett er, alt í samband við bretsku varnarmenninar í Vági. Tað er sjálvandi mikið átroðkandi aðrastaðni við, at vitarnir kunnu leiðbeina skipum og bátum, t. d. Kallsoynni og Nólsoynni.

Nevndin vónar, at so skjótt tað kann lata seg gera fyri kriggsumstøðunum, vil bretska admiralitetið linka um tær núverandi strangu reglur viðvíkjandi teimum føroysku vitunum, og biður nevndin hægsta bretska flotamann boða frá, so skjótt líkindir eru til tess.

Uppskot:

Løgtingið heitir á bretska hervaldið, at valdið, so skjótt tað á nakran hátt er gjørligt, gevur loyvi til, at vitatendringin í Føroyum aftur kemur í rætt lag og boðar amtinum, løgting ella landsnevnd løgtingsins frá at tílík broyting kann fara fram.

2. viðgerð 30. oktober. 3. viðgerð 2. november. Samtykt 18—0.

---

6. Leynar sum hvalvág.

1. viðgerð 15. september. Framlagt 1. november

Álit.

Málið Leynar sum hvalvág hevur í mong ár verið frammi á tingi; aftur í ár er málið borið inn á ting við brævi av 9. april av Magnus A. Petersen, Kvivik, og førir hann fram, sum so ofta fyrr er framført, at framført, at grindir eru farnar aftur í havið, av tí at Leynar ikki er góðkend hvalvág.

Nevndin, sum hevur havt málið til viðgerðar, má ásanna tað, sum er framført av M. A Petersen, og sum so ofta í hesum máli er havt frammi, at grindir, sum verða funnar úti fyri Leynum og har nærhendis, tá umstøðurnar eru tær, at streymur ella náttmyrkur ger, at vandi er fyri at reka tær inn á Vestmanna ella Miðvág, at tær tá kunna fara aftur í havið.

Nevndin má halda, at Leynarvág, sum er útgrunn og við bleytum sandbotni má vera líka so væl nýtilig til grindavág sum mong onnur, og vil tí mæla til at góðkenna Leynar sum hvalvág og loyvir sær at framseta

uppskot
til
broyting í grindareglugerð fyri Føroyar,
dagsett 1. juni 1940.

Í § 10, fyrsta petti, verður aftaná orðið «Vestmanna» sett «Leynar».

Forslag
til
Ændring i Reglement for Grindefangsten
paa Færøerne af 1. Juni 1940.

I § 10, første Stk., indføjes efter Ordet «Vestmanhavn» følgende: «Leynum».

2. viðgerð 7. november. 3. viðgerð 10. november. Samtykt 16—0.

---

7. Broytan av fiskivinnulógini.

1. viðgerð 15. september. Framlagt 27. oktober

Alit.

D. J. Jacobsen, Tórshavn, og 21 aðrir umsøkjarar hava vent sær til løgtingið við áheitan um at fáa fiskivinnulógina broytta soleiðis, at loyvi verður givið at fiska við neti allastaðni, har dýpi, streymur og botnur hóska, og um loyvi ikki kann verða givið at fiska allastaðni árið runt, so í minnsta lagi í august og september.

Fiskivinnunevndin hevur umhugsað málið og er av tí áskoðan, at her bert er talan um at veiða reyðsprøku og tungu innanfyri tað mark, ið ásett varð í 1942, og tá hesin flatfiskur so lítið verður veiddur við húki, at tað als ikki kann roknast sum nøkur verunlig veiða, heldur nevndin, at tað ikki er beint at sýta fyri, at meiri tíðarhóskandi veiðuháttur, ið kann geva betri veiðuúrslit, verður nýttur. Eisini skal verða mint á, at eftir fiskivinnulógini av 1893 kunnu eftir nærri ásettum reglum gerast serligar viðtøkur fyri veiðu á firðunum, víkum og sundum, har ikki streymasjógvur er, um, hvørji veiðuamboð kunnu nýtast.

Meirilutin (O. J. Jensen, J. F. Kjølbro, P. M. Dam og Jens Chr. Olsen) er á einum máli um at mæla til, at umsóknin verður játtað, soleiðis at loyvi verður givið at fiska við neti innanfyri sjómark í tíðarskeðinum frá 1. juli til 30. september, báðar dagar íroknaðar.

Meirilutin heldur tað vera beint, at loyvi verður givið at nýta bæði snurruváð og skovlváð.

Minnilutin (Kr. Djurhuus) vísur á ta støðu, hann fyrr hevur tikið í hesum spurningi: Kunngerðin nr. 36, 24. november 1942 fer úr gildi 31. december 1944, og minnilutin ynskir, at so verður, og at reglurnar, sum vóru galdandi undan heimsbardaganum aftur koma í gildi, hareftir forboð er móti at nýta trol, íroknað skovlváð á sjóterritoriinum, meðan snurriváð frítt kann verða nýtt undantikið, hvar við samtykt er sett forboð í firðum, víkum ella sundum, har eingin streymur er, eftir fiskilóginni av 1893. Minnilutin setur tí einki uppskot fram.

Uppskot

frá meirilutanum:

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR

UM

FISKIVEIÐU Á SJÓTERRITORIINUM VIÐ FØROYAR.

Asetingarnar í kunngerð nr. 36, 24. november 1942, verða galdandi inntil 31. december 1946.

Í tíðarskeðinum 1. juli til 30. september skal harumframt undir teim í kunngerðini annars ásettu treytum vera loyvt at nýta skovluváð eins og snurruváð allastaðni á sjóterritoriinum við Føroyar, soleiðis eisini innan fyri tað í § 1 í kunngerðini ásetta mark.

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER
VEDRØRENDE
FISKERI PAA SØTERRITORIET VED FÆRØERNE.

Gyldigheden af Bestemmelserne i Kundgøresse Nr. 36 af 24. November 1942 forlænges indtil Udgangen af Aaret 1946.

I Tidsrummet 1. Juli til 30. September skal det paa de i Kundgørelsen iøvrigt fastsatte Betingelser desuden være tilladt at anvende saavel Skovlsvaad som Snurrevaad overalt paa Søterritotoriet ved Færøerne, saaledes ogsaa inden for de i Kundgørelsens § 1 angivne Linier.

2. viðgerð 30. oktober. 3. viðgerð 2. november. 1 punktum samtykt 15—0, 2 punktum fall 6—0 (Ja atkvóðu: Dam, Kjølbro, J. Chr. Olsen, O. J. Jensen, A. Sørensen, S. Ellefsen, burturstaddir: J. Patursson, Henriksen, Slættenes, Øregaard, Davidsen. Hinir atkvóðu ikki).

---

8. Vrakan av fersk- og ísfiski.

---

1. viðgerð 15. september. Framlagt 23. november

Álit.

Føroya fiskimannafelag hevur latið inn á ting umsókn um at fáa sett í verk vrakan av fersk- og ísfiski. Í skrivinum verður víst til reglugerð, sum er galdandi í Íslandi, og sum felagið heldur vera nýtuligar her. Tað leggur aftrat, at hetta mál hevur drýggjað alt ov leingi, og at stórur skaði hevur verið voldaður av hesum.

Nevndin, sum hevur haft hetta mál til umhugsunar, hevur haft samráð við Føroya Fiskimannafelag, formann Reiðarafelagsins og umboðsmann fyri Trolarafelagið.

Í málinum liggur eisini skriv frá Klakksvíkar útróðrafelag og harra Magnus Dahl, reiðari, Vági, og frá øðrum reiðarum í Vági.

Umboðsmenninir fyri Reiðara- og Trolarafelagið mæla frá, at reglur verða settar fyri vrakan av fersk- og ísfiski, men mæla til, at fiskur, sum veiddur verður á øhøgligum plássum verður saltaður t. v. s. á slíkum plássum, har tað er torført at avskipa fiskin til før, sum skulu flyta hann til marknaðin. Eisini verður mælt til at fáa í lag skipan við Bretar um at fáa fiskin seldan til eins góðan pris, sum ísfiskin.

Á samráðingarfundi helt Føroya Fiskimannafelag fast við støðu sína í fyrrnevnda skrivi, og ymiskir reiðarar í Suðuroy hava mælt til at seta ferskfiskavraking í verk.

Íslendska reglugerðin um vraking av fersk- og ísfiski er sett í gildi 1. juli 1944. Hon er gjørd sambært lóg, 23. mei 1935.

Í hesi reglugerð verður fyriskrivað, hvussu lastarrúmini á útflutningarskipum skipum skulu vera, hvussu leingi veiðubátar kunnu hava veiðuna innanborða, áðrenn hon verður latin til fluttningarskip, minstamát fyri fiskin, hvussu hann skal leggjast niður, og hvussu nógvur ísur skal til eitt ton av fiski. Hartil, hvussu reglurnar skulu umsitast. Eisini verða fyrisettar revsingarreglur, so sum sekt og vrakan, um fiskurin ikki er í tí í reglugerðini fyrisetta standi.

Reglugerðin ásetur soleiðis, at vrakaraskipanin í Íslandi skal umsitá hesa skipan, og váttan verður givin uppá farmin.

Hvør váttan skal rindast við einum gjaldi uppá kr. 10.00.

Tað framgongur ikki, hvussu umsitingin skal rindast, men tað man ætlandi vera sambært lógina av 1935.

Okkara skipan fyri vrakan av saltfiski hevur ikki haft ís- ella ferskfisk fyri eygu, men ivaleyst man tað vera gjørligt, um tað tørvar, at gera tørvandi broyting til hennara, so at líknandi reglugerð kundi verði gjørd at galda fersk- og ísfisk.

Tingmál nr. XIII–11/1944 (28 tingmál frá javnaðarflokkinum) nr. 15 læra í viðgerð av ferskum fiski og tvungin ferskfiskavirkan er viðgjørt saman við áður nevnda máli.

Ein meiriluti (O. J. Jensen, Kr. Djurhuus, Jens Chr. Olsen og P. M. Dam) er samdur um, at tørvur er á at fáa sett í verk eina eftirlitsskipan her á landi, og ætlandi vil omanumrødda íslendska reglugerð kunna nýtast við broytingum, men rætt vildi tað verið, um reglugerðin varð gjørd í samráð við vinnufeløgini.

Tí skjýtur nevndin upp, at tingið nú skipar lógarheimild og síðan biður amtmann og landsnevnd til uttan tarn at gera reglugerð eftir samráð vinnufelaganna og seta hana í gildi skjótast gjørligt.

Ein minniluti (J. F. Kjølbro) mælir frá at lógfesta skipan fyri vraking av fersk- og ísfiski og setur ikki fram uppskot í málinum.

Meirilutin setur fram soljóðandi

Forslag

til

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM BEHANDLING, TILVIRKNING OG UDFØRSEL AF FISK OG FISKERIPRODUKTER.

§ 1.

Amtmanden bemyndiges til efter Indstilling fra Lagtingets Landsnævn at fastsætte Bestemmelser om Behandling, Tilvirkning og Udførsel af Fisk og Fiskeriprodukter, forsaavidt Bestemmelser herom ikke allerede er givet i særlig Lov.

Bestemmelserne kan omfatte Fisk og Fiskeriprodukter, der med færøsk Fartøj udføres til Udlandet direkte fra Fangststedet eller fra fremmed Indkøbssted.

§ 2.

De med Bestemmelsernes Gennemførelse forbudne Udgifter kan afholdes forlods af Amtsfonden og kan derefter fordeles paa Eksportørerne efter nærmere af Amtmanden efter Indstilling fra Landnævnet fastsatte Regler.

§ 3.

Overtrædelse eller Forsøg paa Overtrædelse af de i Medfør af nærværende Bestemmelse givne Forskrifter straffes med Bøder, der tilfalder Amtsfonden.

§ 4.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

Uppskot

til

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR

UM

VIÐFERÐ, VIRKAN OG ÚTFLUTTNING AV ÓVIRKAÐUM OG VIRKAÐUM FISKI.

§ 1.

Amtmanninum verður veitt heimild eftir tilmæli frá Landsnevnd Løgtingsins at áseta reglur um viðferð, virkan og útfluttning av óvirkaðum og virkaðum fiski, sum ikki áður eru givnar reglur um í serstakari lóg.

Reglurnar kunna umfata óvirkaðan og virkaðan fisk, sum føroysk skip flyta til úthéimin beinleiðis frá veiðustaðnum ella frá fremmandum innkeypsplássi.

§ 2.

Útreiðslurnar, sum koma av at seta reglurnar í verk, kunna verða goldnar frammanundan úr amtsgrunninum og kunna so verða javnaðar á útfluttningarmenninar eftir nærri reglum, ásettum av amtmanninum eftir tilmæli frá landsnevndini.

§ 3.

Brot og brotsroynd móti reglugerðum, settar við heimild í hesum fyriskipanum, verða revsað við sekt, ið fellur til amtsgrunnin.

§ 4.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

2. viðgerð 27. november. 3. viðgerð 30. november. Samtykt 15–0.

9. Ymisk sjóvinnumál.

1. november framlagt.

Uppskot.

Í 1943 varð samtykt at setá millumtinganevnd viðvíkjandi ymiskum sjóvinnumálum. Nevndin hevur givið frágreiðing til tingið, dagfest 9. oktober 1944, og endar henda frágreiðing við hesum orðum: «Nevndin hevur sum sagt ikki haft umstøður at fáa tær neyðtuvuligu upplýsingar fyri at kunna ganga út í æsir í øllum, og er tí ikki í hesi atløgu før fyri at gera sítt arbeiði fullfíggjað. — Skotið verður tí uppá, at nevndararbeiði verður at halda fram.»

Undirritaðu løgtingsmenn mæla til at arbeiði verður hildið fram, og seta tí fram hetta

uppskot:

Løgtingið samtykkir, at arbeiðið í millumtinganevnd viðvíkjandi ymiskum sjóvinnumálum verður at halda fram, og velur tingið 5-manna-nevnd til at arbeiða til tingsetuna 1945.

2. viðgerð 16. november. Samtykt 24—0.

VII. Landbúnaðurin o. t.

1. Frágreiðing frá millumtinganevndini.

Framlagt 16. november.

Uppskot.

Tann í 1943 setta búnaðarnevnd gevur í fyribils frásogn, tann 6. oktober 1944, eitt yvirlit yvir nógvar spurningar, men sigur síðani frá, at tað er eitt samanspæl millum allar búnaðarspurningar, og biður nevndin tí løgtingið um at lata nevndina sita til tingsetuna 1945 fyri

1) at kunna viðgera spurningin um uttanbygdajørð.
2) at kunna viðgera byggigrundspurningin,
3) vetrarfriðingarspurningin, og
4) fyri at kunna geva eitt greint uppskot í lógarformi.

Undirritaðu mæla tí tinginum til at samtykkja hetta

uppskot:

Tingið samtykkir at arbeiði í 7-manna millumtinganevnd viðvikjandi búnaðarmálum (sí tingtíðindi 1943 síðu 115) eigur at halda fram til tingsetuna 1945, og at tingið velur (ella afturvelur) 4 limir til hesa nevnd.

Samtykt 22—0.

2. Útskiftingarformenn.

1. viðgerð 15. september. Framlagt 22. november.

Álit.

Amtið hevur í skrivi, dagfest 10. august 1944, biðið um landsnevndarinnar ummæli til nakrar spurningar, áðrenn teir av landsnevndini tilskilaðu útskiftingarformenn til útskiftingar av vissum bygdum vera settir sambært § 5 í lóg nr. 147 frá 27. mars 1939.

1. Í § 9 skulu limir útskiftingarnevndarinnar, áðrenn teir byrja starv sítt undirskriva eina váttan. Landbúnaðarráðharrin ásetur orðalagið til tílíka váttan.

Amtið spyr, um landsnevndin (løgtingið) hevur nøkur ynski í so máta.

2. Sambært lógarinnar § 8 skulu formenn útskiftingarnevndarinnar og aðrir limir hennara, hartil sýslumaður sum formannsins hjálpari, hava dagpening og frían fluttning og harumframt teir í § 6 nevndu metarar (smbr. eisini niðanfyri).

Hesar samsýningar verða at fyriskriva av landbúnaðarráðharranum. Teir tilskilaðu útskiftingarformenninir hava fingið ájáttað kr. 10,50 fyri samdøgrið, meðan einki er avgjørt hinum viðvíkjandi.

3. Sambært § 9 skal byrjanin av eini útskifting vera kunngjørd við 3 mánaða freisti eftir reglunum í lóg nr. 59 frá 1. apríl 1912. Amtið flytir fram, at henda langa freist man hava fyri eyga, at eisini interessur í útskiftingini hjá fólki, sum bugvandi eru í Danmørk, skulu hava vernd við lóggávuni.

Amtið er tí í iva um, hvørvitt tann tilætlaða kunngerð undir verandi viðurskiftum kann geva ta vernd, t. d. fyri tey, sum búsitandi eru í Danmørk.

4. Sambært § 14 skal landbúnaðarráðharrin fyriseta reglur fyri bonitering og kortleggjan.

Sambært lóg frá 20. apríl 1926 vórðu hesar reglur ásettar við 3 reglugerðum frá 25. juni 1928.

Amtið spyr, um hesar reglugerðir kunnu nýtast sum tær eru ella broytingar ynskjast gjørdar til teirra.

ad 1. Búnaðarnevndin kann vísa til ta váttan, sum nýtt hevur verið til dømis við útskiftingina í Vestmanna, og hevur hon hetta orðalag:

> «At jeg efter bedste Evne med Upartiskhed vil opfylde de Pligter, som paahviler mig som Udskiftningsformand (Udskiftningskommissær) det forsikrer jeg paa Ære og Samvittighed.»

Á føroyskum:

> «At eg eftir førimuni og uttan at gera mannamun vil røkja tær skyldur, ið á meg eru lagdar sum útskiftingarformaður (útskiftingarnevndarlimur), tað fullvissi eg uppá æru og trú.»

ad 2. Nevndin mælir til, at teir her nevndu menn umfram frían flutning fáa sama dagpening, sum fyrisett er fyri limir yvirbúnaðarstevnunar.

ad 3. Nevndin er á einum máli um, at seta verju ad hoc sambært «Midlertidige Bestemmelser for Færøerne» nr. 46 frá 2. desember 1940 eiga at vera nýtiligar í hesum føri.

ad 4. Nevndin er samd um at mæla til, at reglugerðirnar frá 25. juni 1928 framvegis verða nýttar við teirri viðmerking, at metararnir (samb. § 14) skulu leita sær ráð frá 3 teim elstu og við jarðaviðurskifti kønum monnum. Teir fáa somu samsýning sum hinir í § 6 nevndu menn.

Uppskot:

Tingið vísir til tað, ið er framflutt í álitinum, tó verður tilmælt henda broytan í reglugerð nr. 195, 25. juni 1928:

BROYTAN
í
REGLUGERÐ NR. 195, 25. JUNI 1928 FYRI JARÐABONITERING VIÐ ÚTSKIFTING Í FØROYUM.

Tá boniteringin byrjar sbr. pt. 2 í reglugerðini og annars, tá útskiftingarnevndin heldur tað neyðugt, skal nevndin tilkalla 3 av teimum elstu jarðabrúksmonnunum í bygdini at geva nevndini upplýsingar til vegleiðing við boniteringini.

TILLÆG
TIL
REGLEMENT NR. 195 AF 25. JUNI 1928 FOR JORDBONITERING VED UDSKIFTNING PAA FÆRØERNE.

Ved Boniteringsforretningens Begyndelse jfr. Pkt. 2 i Reglementet og iøvrigt, naar Udskiftningskommissionen anser det for nødvendigt skal Kommissionen tilkalde 3 af de i Bygden hjemmehørende ældste Jordbrugere for at meddele Kommissionen Oplysninger til Vejledning under Boniteringen.

2. viðgerð 27. november. 3. viðgerð 30. november. Samtykt 21--0

---

3. Høsnahald.

1. viðgerð 16. september. Framlagt 21. september

Álit.

J. P. Vang, Tvøroyri, søkir í skrivi, tann 16. februar 1944, løgtingið um ein studning uppá 2.000 kr. vegna rakstraundirskot av høsnahaldi í árinum 1943.

Høsnagarðurin hjá J. P. Vang hevur frammanundan fingið hesa almennu hjálp. Fyrst ein beinleiðis studning í juni 1941 uppá 1.000 kr. og síðani í august 1941 eitt lán, 300 kr., harav er afturgoldið 150 kr., meðan tað irestar at gjalda 150 kr. — Løgtingið samtykti í tingsetuni 1941 (sí løgtingstíðindi 1941, síðu 81) at veita eitt lán uppá 2.000 kr.; men varð hetta hækkað til 3.000 kr. í 1942. Síðani játtaði landsnevndin í mars 1943 at veita honum lán 3.000 kr. —

So sum J. P. Vang sigur frá í bønarbrævinum, er tað gingið honum illa við hesum høsnagarði, og tað er nevndini kunnugt, at hann í summar hevur selt allar hønurnar og hevur støðgað virkið. Hann sigur í brævinum frá, at hann skyldar hesar 6.150 kr. til tingið og heldur fram: «eg veit, at tingið ikki rennur meg av fótum, men fyri tí veit eg eisini, at peningurin skal rindast aftur.»

Málið hevur verið til viðgerðar í fíggjarnevndini og er nevndin á einum máli um, at tað ikki ber til undir hesum viðurskiftum at geva tilskot svarandi til rakstraundirskotið. Nevndin heldur, at tær 6.150 kr. eiga at verða ordnaðar, uttan at tað verður farið ov harðliga fram, og setur uppskot um, at hetta verður givið landsnevndini upp í hendi.

Uppskot:

1. Umsókn J. P. Vangs um studning 2.000 kr. kann ikki verða játtað.
2. Landsnevndin fær upp í hendi at fáa sáttmála við J. P. Vang um afturrindan av hansara skuld til tingið.

2. viðgerð 5. oktober. Samtykt 22—0.

4. Leigan av kongsjørðini.

Framl. 8. september. 1. viðgerð 16. september. Framl. 13. november.

Álit

(Kr. Djurhuus við fyrivarni):

Í skrivi, 4. september 1944, hevur D. Danielsen, lærari, Sørvági, vent sær til tingið viðvíkjandi leiguhæddini á kongsjørðini í Føroyum.

Hann vísir á mismun millum leiguna á teim nú sundurbýttu prestajarðunum og kongsjarðunum.

Hann meinar, at bøndurnir sjálvir mega hava havt nakra ávirkan á leiguhæddina.

Hann setur fram uppskot til broytan av kongsleiguhæddini vaksandi eftir støddini omanfyri eitt vist markatal.

Búnaðarnevndin hevur havt hetta mál til umhugsunar.

Harri Danielsen sigur sjálvur, at hetta mál er reist sum ein almennur fíggjarligur spurningur. Longu tí eru ikki grundir fyri at taka spurningin um rættarstøðu kongsleigunar til viðgerðar her. Men bert skal verða sagt, at hesin spurningur so statt ikki í løtuni er nakar átroðkandi fíggjarspurningur, og kann nevndin tí ikki mæla tinginum til at gera nakra broyting í støðuni í løtuni.

Uppskot:

Svarað verður, at spurningurin er til umhugsunar í tingsins millumtinganevnd viðvíkjandi búnaðarmálum, og tingið tí steðgar við at viðgera spurningin, inntil álit er komið frá millumtinganevndini.

2. viðgerð 16. november. Samtykt 16—0.

5. Frammihjá keypirættur jarðagrunnsins.

Framlagt 12. september. 1. viðgerð 16. september. Framlagt 13. november.

Álit.

Vilhelm Tórsheim, byggimeistari, Tórshavn, hevur í skrivi, d. 9. september 1944, vent sær til tingið í hesum máli.

Við skeyti Búnaðarráðsins, d. 6. juni 1940, hevur Vilhelm Tórsheim fingið til keyps trøð sína í Tórshavn (matr. nr. 893 a og b).

Búnaðarráðið hevur treytað keypið av frammihjákeypirætti Jarðagrunnsins samt § 28 í «Lov om Jordbrugets Fremme» Nr. 174 af 24. Maj 1937.

Harra Tórsheim hevur síðani latið sonin Magnus Tórsheim fingið 3050 m² av hesari trøð — útstykkjað sum matr. nr. 893 c (gávubræv 27. mai 1941).

Búnaðarráðið hevur viðmælt hesa útstykking við somu treyt, at frammihjákeypirættur jarðargrunnsins fylgir við hesi útstykking, ætlandi út frá tí ásetningi, at hetta øki skuldi nýtast sum uppískoyti til eina leigutrøð, sum Magnus Tórsheim hevur (smbr. skriv Búnaðarráðsins, d. 27. april 1944, VI 51/1944).

Í hesum skrivi ger Búnaðarráðið galdandi, at tað ikki vil seta seg ímóti, at eigarin av matr. nr. 893 c avhendir hetta lendi til landbúnaðarligt endamál, men at eina hevur tann ásetning fyri eygu at byrgja fyri at slík lendi ikki verða nýtt til spekulatión í grundvirðisøkjan.

Búnaðarnevndin, sum hevur haft hetta mál til umhugsunar, má halda, at Búnaðarráðið ikki hevur kunna tikið aðra støðu sambært § 28 í omannevndu lóg við tilskilan, at ráðið her hevur nýtt so lagaliga tolkan av nevndu § sum yvirhevur møguligt.

Ein lógarbroyting kundi umhugsast í hesum viðfangi, men tað er ein spurningur, um ein lógarbroyting kann gera nakað avvik í hesum føri. Ein sovorðin spurningur kann eftir nevndarinnar hugsan ikki avgerast av tinginum. So statt heldur nevndin seg ikki kunna mæla til lógarbroytingar í løtuni við tilskilan, at hesin spurningur er til viðgerðar í Løgtingsins millumtinganevnd viðvíkjandi búnaðarmálum.

Uppskot:

Eintak av álitinum verður at senda Vilhelm Tórsheim og Magnus Tórsheim, Tórshavn.

2. viðgerð 16. november. Samtykt 14—0.

---

6. Viðkan av matrikulering fyri Tórshavn.

Framl. 3. november. 1. viðgerð 6. november. Framl. 24. november.

Álit.

Sorenskrivarin hevur í skrivi, dagsett 13. mei 1944, tikið upp aftur spurningin um viðkan av matrikuleringini fyri Tórshavn til at umfata tær í Havnini síðani matrikulin innløgdu jaðrir.

Hetta mál var fyri á tingi í 1939 (sí løgtingstíðindi 1939, bls. 121). Tá varð samtykt at mæla til í fyrstu syftu at seta í verk samsvarandi reglur, sum galda fyri útskiftar bygdir (kunngerð nr. 244 frá 18. sept. 1931).

Í 1940 var málið fraumi aftur, men tá varð mælt til at lata málið steðga fyri fyrst. Málið var hjá ríkisstýrinum (smbr. skriv sorenskrivarans, dagsett 29. mai 1940, og landsnevndarinnar, 24. juli 1940).

At málið verður reist av sorenskrivaranum nú er orsakað av, at Tórshavnar býráð hevur í umbúna at gera býplán fyri Tórshavn.

Málið hevur verið til ummælis hjá Tórshavnar býráð.

J. Dewald Hansen, landsinspektørur heldur fram í ummæli sínum at bert lítil partur av tí umráði, sum býplánurín skal umfata, er ómatrikuleraður, so realregistar longu er gjørt fyri at kalla alt býpláns umráði.

Um býplánsumráði verður víðkað til at umfata allar innlagdar og ómatrikuleraðar jarðir, er tað náttúrligt, at grundarlag útvegast fyri samsvarandi víðkan av realregistaranum. Ein tílík víðkan hevur stóran týdning, men tørvandi kortleggingarbeiðið kann ikki væntast avgreitt frá skrivstovu hansara í løtuni, tí er ovbyrjað frammanundan.

Býráðið hevur givið tilráðing J. Dewald Hansens viðmæli.

Nevndin má eins og í 1939 halda fram týdningin av, at tær síðani matrikulin til Havnina innløgdu jarðir verða tiknar upp í realregistari undir matrikulnumrum.

Nevndin skal tí mæla til, at reglur verða settar í gildi sambart § 16 í lóg nr. 85 frá 31. mars 1928 om Indførsel af en Matrikel og Opretelse af et Realregister for Thorshavn til at umfata tær jarðir, sum innlagdar eru til Tórshavn, síðani matrikulin.

Málið er komið so seint inn á ting at stundir ikki hava verið til at seta fram uppskot til fyriskipanir, tí verður mælt til at landsnevndin verður heimilað til at samtykkja tilmæltu fyriskipanir.

Uppskot:

1. Løgtingið mælir til, at realregistarið fyri Tórshavnar bý sambært § 16 í lóg nr. 85 frá 31. mars 1928 «om Indførelse af en Matrikel og Opretelse af et Realregister for Thorshavn» verður víðkað til at umfata tær jarðir, sum innlagdar eru síðani matrikuleringina.
2. Landsnevndin verður heimilað til tingsins vegna at samtykkja uppskot til fyriskipanir, so sum tilmælt frammanundan.

2. viðgerð 30. november. Samtykt 23—0.

7. Umsókn frá Føroya smábrúkarafelag.

Framl. 3. november. 1. viðgerð 6. november. Framl. 10. november.

Álit.

Til tingið er komið skriv, dagsett 31. oktober 1944, frá Føroya smábrúkarafelag, ið sigur frá, at felagið varð stovnað tann 20. november 1942 við tí serliga endamáli «at fremja uppdyrking og bøbrúk», og vendir felagið sær nú til løgtingið við umsókn um at styðja hetta virki teirra.

Felagið sigur, at síðani traðarlógin frá 1894 kom í gildi, eru nógvar traðir innlagdar, og hetta hevur verið til ómetaligt gagn fyri landið, men ein og hvør veit, at tað í seinastuni hevur verið nívandi mjólkatrot, soleiðis at meira uppdyrking má sigast at hava ógvuliga stóran týdning fyri okkum.

Nógvar traðir eru væl dyrkaðar, men hetta hevur verið eilt tungt og torført verk hjá smámonnum; orsøkin til at tað hevur verið so trupult, heldur felagið er fyrst, at fáur hevur haft ráð til at halda bønarmenn og harnæst, at traðarmaðurin ongantíð hevur haft líkindir til at nýta nýmótans amboð. Teir vísa á, at vit í hesum føri standa aftanfyri okkara grannar í Noregi og Íslandi.

Tað er sjálvsagt gott, at ognarleysir kunna fáa jørð til dyrkingar, men hetta er ikki nóg mikið. Tað almenna eigur eisini at styðja traðarmannin so nógv, at skjótt kann fáa so stóran part uppdyrkaðan, at hann kann fáa kúgv á bási. Tí kemur hetta felag nú fram við einum uppskoti til umhugsunar.

Skotið verður uppá, at seta á stovn eitt ferðandi uppdyrkingarlið (en flyvende Opdyrkningskolonne), soleiðis at ein formaður við 2 ella 3 serkønum monnum, ið mugu duga at nýta nýmótans amboð, og 6 ella 7 lærlingum, skuldu ferðast stað úr stað um alt landið við øllum nýmótans amboðum og dyrka traðir fyri fólk. Sum amboð fyri hetta lið nevnast: «Traktor, Fræser, Kompreesor og Lufthamre», og annars verður tað viðmerkt, at eigarin á trøðni sjálvur skal útvega veltingarmenn til at gera tað fyrireikandi arbeiði, meðan liðið serliga skuldi nýtast til at spreingja grót og maskinfara jørðina. Á henda hátt heldur felagið, at tað skuldi verið gjørligt at uppdyrka 5000 m², ella eitt vetrarfóður av okkurt um 60 traðum í eitt ár.

Felagið heldur fram, at tað ikki einans eru nýggjar traðir, hetta kann nýtast til, men eisini til at gera gamlan bø og gamlar traðir maskinførar. Væl kann tað henda, at tað kann verða brúk fyri meira enn einum tílíkum ferðandi liði, men felagið heldur at tað er beint at byrja við einum. Teir meta útreiðslurnar til eitt tílíkt lið soleiðis fyri eitt ár:

formannsløn	um 9000 kr.
løn til 2 maskinkønar menn	um 15000 „
løn til 7 búnaðarnæmingar	um 21000 „
aðrar útreiðslur	um 15000 „
ialt árliga	um 6000 kr.

Um tað nú verður roknað við 60 traðum á 5000 m² so verður tað 300.000 m² í eitt ár ella svarandi til 20 oyr. fyri hvønn m², og hetta má sigast at vera heilt biligt.

Felagið sigur frá, at tað sjálvandi má gerast nærri reglugerð fyri einum tilíkum tiltaki, men heldur hetta vera lætt at fyriskipa, og heldur at tað eigur at skipast soleiðis, at liðið kemur at hoyra undir royndarstøðina, búnaðarráðinum ella kanska fyribils beinleiðis undir løgtinginum. Seinni vil tað óivað verða beinast, at hetta verður samanbundið við ein búnaðarskúla í Føroyum.

Tað má haldast at verða ivasamt um tey neyðturvuligu amboð kunna fáast í løtuni, men søkja teir tingið um at gera royND at samráðast við Bretar um hetta, og biðja teir tingið samtykkja, at hetta eigur at verða sett í verk, og at játta tann pening, ið tørvur verður til.

Nevndin er á einum máli um, at tað er beint, at tað almenna, um tað á nakran hátt er gjørligt, eigur at hjálpa traðarmonnum at fáa traðir dyrkaðar so nógv ávegis, at teir kunna hava kúgv á bási. Tað hevur so mangan sæst, at tað tyngsta takið hjá ognarleysum manni, ið ikki hevur peningaliga orku at keypa sær hoyggj, er at fáa so nógv dyrkað, at hann kann halda kúgv. Tá ið fyrst er komið so nógv áleiðis, er altið lættari at halda fram. Tað almenna eigur tí at gera nakað fyri at hjálpa her.

Meirilutin (nevndin undantikið P. M. Dam) heldur, at hetta mál eisini eigur at verða umhugsað í samband við okkara búnaðarviðurskiftir í síni heild og hava ikki verið stundir til tess í hesi tingsetu, tí málið er komið so seint fram. Í tingsetuni 1943 setti tingið eina millumtingabúnaðarnevnd og setir meirilutin tí uppskot fram um, at umsóknin frá Føroya smábrúkarafelag verður beind til hesa nevnd til nærri umhugsunar og viðgerðar. Meirilutin heldur tað er beint, at henda millumtinganevnd, saman við búnaðarráðinum tekur upp tingingar um at skaffa til vegar tey tól, ið mugu nýtast til at seta hetta í verk, og skaffar yvirlit yvir, hvat ið hetta vil kosta.

Um tann figgjarliga spurningin hevur nevndin býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin skal viðmerkja, at hetta mál fyrst er komið á ting aftaná at figgjanevndin hevur lagt til rættis figgjarætlanina fyri næsta ár, og er tað tí trupult nú at fara undir at útvega pening til at byrja arbeiðið. Meirilutin má tó viðmerkja, at hetta neyvan kann ætlast at seinku um at seta tiltakið í verk, tí tað er óivað soleiðis, sum umsøkjararnir halda fram, at tað verður trupult at skaffa amboð og eisini vil tað taka nakra tíð, áðrenn reglugerðin fyri einum ferðandi liði er løgd til rættis, og áðrenn samráðingar millum búnaðarmenn eru lidnar og menninir til at standa fyri hesum arbeiði eru funnir og sáttmáli gjørdur við teir. Meirilutin heldur tí, at tað neyvan verður neyðugt at viðgera tann figgjarliga spurningin, áðrenn málið liggur meira upplýst til næstu tingsetu. Um tað skuldi verið gjørligt at byrja arbeiðið fyrr, eigur landsnevndin, aftaná samráð við millumtinga búnaðarnevndina at umhugsa málið og gera tað, ið gerast kann samsvarandi tingsins figgjastøðu í síni heild. Meirilutin setur eiki serstakt uppskot um hetta.

Minnilutin (P. M. Dam) heldur fram:

Hesin táttur í framástrembanini í búnaðarstarvinum er av so stórum týdningi, at tað avgjørt er skeivt at drýggja viðgerðina av honum við at lata hann uppí arbeiðið hjá teirri sitandi millumtinganevndini, ið hevur í hendi at gera eina framtíðarætlan fyri okkara landbúnaðarstovnu, og harvið treyta tingsins endiligu støðu av nevndarinnar heildarætlan. Minnilutanum tykist, at smábrúkaranna uppskot til tiltak til uppdyrkingar av okkara hagajørð og aðrari jørð, ið liggur ódyrkað, er so væl greitt og

skilalagt, at tingmenn longu nú kunna taka endiliga støðu. Minnilutin skjýtur tí til, at játtaðar verða 100.000 kr. til umrøddu uppdyrkan, og at tað verður givið búnaðarráðnum í samráð við stjórnina í smábrúkarafelagnum í hendi at umsita peningin og skipa fyri snardyrkingini.

Ein minniluti (Kr. Djurhuus) er samsintur við meirilutan í tí framførda, men heldur tað tó verða beinast, at nakað av peningi longu nú verður játtað til keyp av amboðum og mælir tinginum til at játta 25.000 kr. úr amtsgrunninum.

Uppskot:

Frá *meirilutanum:*

1. Málið um stovnan av einum ferðandi uppdyrkingarliði verður við tingsins besta viðmæli sent til millumtingabúnaðarnevnd tingsins til umhugsunar og viðgerðar, vísandi til tað í álitinum framførda.

Frá *minnilutanum* (Dam):

2. 100.000 kr. verða játtaðar Búnaðarráð Føroya til snardyrkan sambært hugskot í skrivi av 31. oktober í ár frá Føroya smábrúkarafelag til Føroya løgtings.

   Givið verður Búnaðarráðnum í hendi at sita um og í samráðing við Smábrúkarafelagið at skipa fyri snardyrkingini.

Frá *minnilutanum* (Djurhuus):

3. Løgtingið samtykkir úr amtgrunninum at játta 25.000 kr. til búnaðarráðið til keyp av amboðum til dyrkingararbeiði.

Broytingaruppskot

frá Kr. Djurhuus og Johan Poulsen:

Í staðin fyri uppskotið frá Kr. Djurhuus verður sett:

Løgtingið samtykkir úr amtsgrunninum at játta 25.000 kr. árliga í 4 ár til búnaðarráðið til keyp av amboðum og til dyrkingararbeiði, og verður búnaðarráðið biðið um at byrja uppdyrkingararbeiðið soleiðis sum ávist í umsóknini, so skjótt umstøðurnar eru til tess.

Broytingaruppskot

frá J. Patursson o. fl.

Hagajørð í Føroyum líkist ikki jørðini í Amerika, Danmørk ella Ruslandi, har er yvirhøvur slættlendi, turt, grótfrítt og djúp gróðramold. Ísland hevur nógv slættlendi, turrari jørð enn Føroyum og djúpari gróðramold. Vesturlandið í Noregi og Hjaltland hava jarðalíkindi mest lík teim føroysku. Tó eru grasgróðralíkindini ein stóran mun betri her. Bæði í Danmørk, Íslandi, tá ikki um at tala í Noregi hevur fyrsta takið til jarðabøtur við uppskering, at turka jørðina við veiting, undir heilum «drenering».

Nøgdin av Føroya jørð liggur í brattlendi, flatnalendini eru yvir-

høvur váttlig og eyrvikukynt, brattlendini ofta við, torvbakkar og móseygu eru viða hvar har áður var vallgrógvin samfingin vøllur. Jørðin er grýtutari, grótmiklari enn í fyrrnevndu londum undantikið í summum norskum fylkjum. Gróðramoldin er nógva staðni ikki djúpari enn, at hon fjalir grevið.

Vørildin á føroyskari hagajørð undir gróðramoldini, tað veri seg mógvur, tæðingur, leirur, (eyrur) ella annað, er yvirhøvur «deyð» jørð, tað er at siga jørð, har einki livandi kykt fær lívað í, hvørki reyðmaðkur ella kyknir (bakteriur), hvat tá minni nøkur urt. Verður nógv av slíkari vørild løgd omaná, vil long tíð líða, áðrenn frost, veðurlag og taðfall hevur umgjørt hesa mold til nýtiligan bústað hjá teim kyknum, sum eina eru førar fyri at umskifta hesa fyrr so deyðu vørild í gróðramold.

Besti nýggjari veltimáti á føroyskari hagajørð, har vørildin er vinnandi, við rossakraft, er at lata ein vørildarrótara við 3 ella kleyvum saksa og dýpka foyrina so hvørt, sum hvør plógál er vend. Vørildin verður tá verandi, hvar hon er, men verður moldgrað og harvið vatnseyrandi og við og við so atkomilig fyri evnisumbroyting, at við seinri velting kann ein fitt skón av henni takast uppí gróðramoldina og dýpa hana.

Einki at duga at hava í hondini uttan haka (spaka) til at velta góðan bø ella gott haglendi við, eirur ikki við nútíðina. Á nógvum lendum í Føroyum innan- og uttangarða ber væl til at nýta rossareiðskap, plógv, saksir, hestahakkar o. fl. eina, og enn fleiri støðum rossareiðskap saman við handamakt (spaka, jarnbrot o. a.). Enntá til uppskering, at grava veitir kunna plógv manga staðni koma nógvum áleiðis.

Tað kann einki vera at ivast í, at tá føroysk hagajørð ella bøur er tuylagdur og allar opnar gravir lagdar undir heilum, so vilja nøkur lendi vera til, har tað ber til á størri viddum at nýta nøkur sløg av teim amerikansku jarðatólum, sum í seinasti tíð eru komin so væl til nýtslu í íslendskari jarðavinnu og síðani at nýta tey lúkingatól og innheystingatól, sum summastaðni í Føroyum er komin í brúk.

Men tað ræður um at duga at finna tey tól, sum her kunnu vera nýtilig, og hava fólk, sum dugir at handfara tey. Tað er broytingaruppskotsstillarunum kunnugt, at Íslendingar, umfram at teir í fleiri ár hava nýtt amerikansk amboð bæði til at rudda jørð og til at heysta grøðina við, í ár hava havt ein kønan mann vesturí í Ameríka at kanna eftir nýggjastu tólum, ið har eru í brúki, og at hesin hevur gjørt eitt úrvæl og heimført til Íslands um 20 nýggj tól, sum hann hevur hildið hóskað búnaðinum og skulu verða tikin til royndar.

So statt skulu uppskotsstillararnir tilmæla, at landsnevndin vendir sær til íslendska stjórnarráðið um at fáa ein jarðatólkønan Íslending higar at kanna líkindini, hvørji nútíðar jarðaamboð, hann heldur her kunna nýtast og stillar eftirstandi uppskot.

Uppskot:

1. Løgtinðið biður landsnevndina heita á ríkisstjórn Ísland at útvega tinginum ein íslendskan búfrøðing kønan í nýtsluni av teim mest tíðarhóskandi vinnutólum á íslendskan jarðum, at sami maður kemur til Føroya at kanna búnaðarlíkindini her, og at hann úr hesum sínum táfingna jarðakunnleika og samráðing við reiðskaparkønar Føroyingar gevur landsnevndini frágreiðing og uppskot um, hvørji búnaðartól hann vil tilráða at verða tikin í nýtslu her á landi.
2. Tann undir 1 nevnda frásøgn við uppskoti verður kunngjørd tingsins millumtinga búnaðarnevnd, Føroya búnaðarfelag og búnaðarráðinum, sum verða biðin um at geva landsnevndini álit og uppskot í málinum.

3. Eftir tilmælan frá teim undir grein 2 nevndu stovnum kann landsnevndin lata keypa tól og eftir ásettum reglum lata tey út til roynslu og til nýtslu. Inntil annarleiðis verður avgjørt, verða búnaðaramboðini ogn tingsins.
4. Tingið veitir landsnevndini heimild til at nýta upp til 25.000 kr. til hetta endamáls frama.

2. viðgerð 15. november. 3. november 24. november. Broytingaruppskot J. Paturssons fall 11—0. Meirilutauppskotið samtykt 16—0. Minnilutauppskotið (Dam) fall 7—0. Broytingaruppskot Kr. Djurhuus fall 8—0. Minnilutauppskot Kr. Djurhuus samtykt 21—0.

---

8. Innflytan av íslendskum seyðakjøti o. ø.

---

25. november framlagt.

Uppskot.

Løgtingið samtykti í fjør (sí løgtingstíðindi 1943, síðu 114) at tilráða, at tað ikki verður loyviligt at innflyta íslendskt seyðakjøt, meðan møðiveiki og «John's Disease» gongur í seyðinum, og Búnaðarnevnd tingsins úttalar seinri, at hetta má skiljast so, at samtyktin umfatar bæði fryst og saltað seyðakjøt og onnur seyðaproduktir, harundir tálg, rullupylsa o. s. fr.

Harra Páll Ólafsson biður í ár tingið taka til viðgerðar at seta hetta forboð úr gildi.

Búnaðarnevndin heldur seg ikki kunna mæla til at broyta samtyktina frá í fjør, tí einki er upplýst nærri um viðurskiftini.

Uppskot:

Svarað verður umsøkjaranum, at tingið ikki kann broyta ta støðu, sum tingið og nevndin tóku í fjør.

2. viðgerð 30. november. Samtykt 20—1.

VIII. Vegir, brýr og lendingar.

1. Eftirlit við vegum og lendingum.

31. oktober framlagt.

Álit.

Løgtingsverkfrøðingurin hevur sent tinginum hesa frágreiðslu viðvíkjandi vegum, brúm og lendingum:

«Indberetning om Trafikveje 1944.

Vejstyret har i Tiden fra 15. Juni—24. Juni berejst Vejdistrikterne paa Vaagø, Strømø, Østerø og i Klaksvig. I Tiden 13. Juli—19. Juli blev Vejdistrikterne paa Sandø og Suderø berejst. Samtlige Trafikveje er blevet befaret, og der er overalt blevet konfereret med Forstanderskaber og Vejmænd om Spørgsmaal vedrørende Vejenes Tilstand og Vedligeholdelse nu og i Fremtiden.

En almindelig Oversigt over Vejenes Tilstand paa det Tidspunkt, hvor Rejserne foretoges, vil blive givet i Slutningen af nærværende Indberetning.

Man kan i al Almindelighed udtale, at Vejene paa enkelte Undtagelser nær er i forholdsvis god og brugbar Stand, og at der i de sidste 2—3 Aar, hvor Trafikken er steget ganske betydeligt, mange Steder er foretaget saa omfattende Reparationer, at Vejbanens Styrke i al Almindelighed kan siges at være bedret ganske betydeligt.

Det er næsten overalt bemærket, at Grøfternes Tilstand er meget mangelfuld, idet Oprensning ikke er foretaget fornødent Omfang.

Vejstyret er efter sin Rejse kommet til den Anskuelse, at Vedligeholdelsen af Øernes Trafikveje efterhaanden er blevet saa stort et Spørgsmaal, at en Omordning synes paakrævet. Dette skyldes især, at Vejstrækningerne er ulige fordelt mellem Kommunerne, saaledes at de økonomiske Byrder faldet meget ujævnt. En nærmere Drøftelse af dette Spørgsmaal vil blive foretaget i særlig Skrivelse.

Vejbroer.

Paa mange af de eksisterende Vejbroer er det bemærket, at Rækværkerne er blevet stærkt beskadiget ved Paakørsel eller paa anden Vis. Det er saa at sige umuligt at fremskaffe Rør eller Jern til Udbedring af Rækværkerne, og der er derfor ikke stillet Krav til Kommunerne i saa Henseende. Naar de nævnte Materialer igen kan skaffes, bør der foretages et grundigt Eftersyn af alle Broer med Reparation for Øje, men det bør da undersøges, om man ikke i mangfoldige Tilfælde burde erstattes de defekte Rækværker med den ved nye Broer anvendte høje Betonkant og helt se bort fra Rækværk.

Beskadigelse af Rækværker ved Paakørsel skyldes i de fleste Tilfælde den Omstændighed, at Broerne er smalle og har daarlige Tilkørselsforhold. Der burde tilvejebringes Midler til systematiske Ombygning af smalle Broer og nødvendige Vejpaalægning.

Sikring af Vejkanter.

Paa Steder, hvor Vejene forløber langs smalle Fjeldsider, eller hvor der paa Vejenes Yderside er høje Opbygninger er Vejene normalt forsynet med en Række Stabbestene langs Yderkanten. Disse Stabbestene staar hyppigt alt for yderligt og er ofte daarligt funderede, saaledes at deres Værdi som Værn mod Udskridning er ret ringe.

Vejbygningsmateriel — Overfladebehandling.

Anskaffelse af Vejtromler og Skærveknusere bør finde Sted, saa snart som Forholdene tillader det. En almindelig Skærvebelægning af hele Vejnættet er næppe gennemførlig, men der er ingen Tvivl om, at de stærkest trafikerede Strækninger vilde blive betydeligt billige at holde, saafremt de fik et solidt Slidlag af Skærver. Uden Tromling er Værdien af et Skærvelag dog problematisk.

Hvor Forholdene indbyder til det, bør man tilstræbe en Overfladebehandling med Asfalt efter den paa Vaagø anvendte Metode. Fra engelsk Side foreligger Tilbud om Køb af Maskineri (bl. a. 2 Asfaltblandemaskiner) og et større eller mindre Parti Asfalt. Der henvises til særlig Skrivelse.

Haugeskel og Faarehegn.

Til Erstatning for de tidspildende Porte, hvor Vejene passerer gennem Faarehegn, har man ved Sanatoriet, ved Arge og ved Sydregøte forsøgsvis bygget Rørriste tværs over Vejen, saaledes som det bruges paa Island. Nærmere Oplysninger om disse Rørriste vil fremkomme senere.

Trafikvejenes Tilstand i Sommeren 1944.

STREYMOY.

Tórshavn—Velbastað—Kirkjubø.

Fra Tórshavn og halvvejs med Velbastað er Vejen tilfredsstillende, men knapt saa god som Halvdelen nærmest Velbestad.

Fra Velbestad til Kirkebø er Vejen i meget daarlig Stand.

Der tiltrænges en Hovedistandsættelse. Vejen har sikkert aldrig faaet tilkørt Overflademateriaier efter Bygningen.

Det er oplyst, at der i 1943 er brugt ca. 8–900 Kr. til Vejreparation paa Kommunens Regning, men heraf intet til Kirkebø–Velbastad Vejen. Kommunen har Øernes laveste Skatteprocent, nemlig 2,25 pCt.

Tórshavnar uttanbýar kommuna.

Vejen til Argir er meget slidt og noget forsømt.

Om Hvítanes Vejen gælder det samme, dog i mindre Grad.

Vestmanna–Kvívík.

Denne Vejstrækning er endnu ikke optaget blandt Trafikveje, men bør optages snarest muligt.

Ved Besigtigelsen af Vejen den 16. Juni kunde den ikke betragtes som færdig. Der var særlig i Gassadal mange svage Steder, og der manglede endnu Afretning af lange Strækninger. Ved Syn foretaget af Ingeniøren den 12. August 1944 blev Vejen befundet i tilfredsstillende Stand. Hovedistandsættelsen af denne Vej har kostet Kvívík Kommune ca. 20.000 Kr. – Skatteprocenten i Kvívík for 1944 er 5 og Budgettet paa ca. 24.000 Kr.

Kvívík–Kollafjørð.

Denne Vej er ret tilfredsstillende, bortset fra Strækningen gennem Indmarken i Kollafirði, hvor der findes en Mængde Slidhuller. Vejen gennem Kollafjørð Dalen vil egne sig til Anlæg af en Forsøgsstrækning med Vaagø-Asfalt, da man ved Leynum har let Adgang til fint Sand.

Hvalvík–Saksun.

Denne Vej hører ikke ind under Trafikveje. Forstanderskaberne i Hvalvík og Saksun har imidlertid ønsket at faa ansat Vejmænd, hvorfor Vejstyret anbefaler, at Vejen optages som Trafikvej.

Strækningen Hvalvik til midt i Saksun Dalen er temmelig slidt og noget forsømt. Strækningen mod Saksun er ganske god, bortset fra en enkelt Strækning paa den fjerneste fra Aaen liggende Del.

Paa hele Strækningen gælder, at gode Vejmaterialer er let tilgængelige.

VÁGOY.

Fútaklett–Sandavág.

Denne Vej er meget slidt og kun i god Stand paa enkelte Strækninger. Reparationsarbejde var i Gang, men ikke i særlig stor Stil.

Det oplyses, at der i 1943 er forbrugt godt 5.000 Kr. til Vejreparation og desuden til en større Reparation af Vejsvinget ved Fútaklett ca. 2000 Kr. I 1944 er der foretaget Reparation af Murværket omkring en Bro i Nærheden af Fútaklett.

Skatteprocenten var 6 i 1943. I 1944 var den 7 og Budgettets Størrelse 57.000 Kr.

2 Mænd, valgt af Kommunen, arbejder normalt sammen med Vejmanden. Der fandtes ikke udlagt Depoter, og det hævdes fra Forstanderskabets Side, at Vejmanden ikke har forlangt saadanne.

Fútaklett Vejen bør komme i Betragtning, saafremt man skrider til Asfaltering af færøske Veje i større Stil, særlig i Betragtning af, at de øvrige Veje paa Vaagø nu er asfalteret.

Vejen Sandavág–Miðvág–Sørvág blev befaret af Vejstyret. Strækningen er asfalteret og i god Stand.

Klakksvík.

Vejen i og omkring Klakksvík er i det store og hele ret tilfredsstillende, dog tiltrænges de Overfladebelægning paa Strækningen, der fører ud til Strond.

Der er meget stor Trafik paa Vejene i Klakksvík, og det maa anbefales, at man saa hurtigt som muligt gaar over til Asfaltering.

EYSTUROY.

Oyri–Eiði.

Strækningen Oyri–Oyrabakki er ret god.

Strækningen Oyrabakki–Svínáir bliver daarligere efterhaanden, som man kommer nordefter og er noget slidt.

Strækningen Svínáir–Trogará er ret stærkt slidt.

Strækningen Trogará–Eiði er meget slidt. Vejbanen fremviser store Ujævnheder. En stor Reparation er tiltrængt.

Der er anvendt ca. 14.400 Kr. til Reparation i 1943.

Nes til Gøtueiði med Stikveje.

Strækningen Nes–Toftir er ret god.

Stikvejen til Rituvík er nogenlunde god.

Stikvejen til Æðuvík er betydeligt forbedret i det sidste Aar, men Reparationen bør forsætte.

Strækningen Runavík–Sóldafirði er ret god, men dog noget slidt.

Stikvejen til Lamba er ikke helt god og tilsyneladende noget forsømt.

Strækningen Søldarfirði–Gøtueiði er ganske god paa lange Strækninger, men der mangler endnu en Del, før den er helt god.

Stikvejen til Skipanes er beskadiget af Overfladevand, men er ellers bortset fra dette i ret god Stand.

Nes Kommune har i 1943 anvendt ialt ca. 33.000 Kr. til Reparation af Trafikveje.

Gøtueiði til Lorvík Kommunegrænse.

Strækningen Gøtueiði–Syðrugøtu er ganske god nærmest Ejdet, men bliver ringere, jo nærmere man kommer til Syðrugøtu.

Strækningen Syðrugøta–Norðagøta er delvis god og delvis stærkt slidt.

Strækningen Norðagøta–Varmakeldu er stærkt slidt. Reparationsarbejder er i Gang, men der bruges for grove Vejmaterialer, der ligger løst paa Vejbanen til Gene for Færdselen. Græskanterne er sine Steder skaaret for langt ned, hvilket er paatalt.

Strækningen Varmakelda mod Lorvík er i meget daarlig Stand. Vejen er gennemført paa mange Steder. Det hidtil udførte Reparationsarbejde er utilfredsstillende af Omfang og bør fremskyndes.

Gøtu Kommune har i 1943 anvendt ialt ca. 13.800 Kr. til Reparation af Trafikveje.

Lorvík.

Vejen i Lorvik Kommune er betydeligt forbedret, men der kræves endnu meget Arbejde, før den er i almindelig god Stand.

Varmakelda–Fuglafjørður.

Vejen i Fuglafjørð Kommune er i god Stand, men noget ringere i Gøtu Kommune.

Fuglafjørð Kommune har i 1943 anvendt ca. 10.000 Kr. til Reparation af Trafikveje.

Skála—Strendir.

Denne Strækning er meget slidt og forsømt. Reparationsarbejdet bør fremskyndes. Der er ikke helt let Tilgang til Materialer, men der kan utvivlsomt findes Forekomster af egnede Materialer

SANDOY.

Skopun.

Strækningen nærmest Skopun er ret daarlig, hvilket bl. a. skyldes, at den delvis er under Udvidelse. Naar man nærmer sig Kommunegrænsen, bliver Tilstanden gradvis bedre.

Der er udpræget Mangel paa Arbejdskraft i Kommunen. Det oplyses, at der i 1943 er brugt ca. 3.500 Kr. til Vejreparationer. Skatteprocenten i indeværende Aar er 5 og Budgettet paa 21.000 Kr.

Sand.

Strækningen Skopun—Sand er i det store og hele ganske god nu, dog med enkelte ringere Strækninger. Paa en Strækning i den nordre Ende af Vejen fandtes Grøfteskraaningerne beskadiget ved Borthugning af Græstørv. I Bygden Sand er Vejene nogenlunde, dog forekommer Slidhuller alt for hyppigt.

Strækningen fra Sand mod Øst er paa enkelte Steder ganske god, men der er endnu lange Strækninger, som er mindre god. Der er dog alt i alt sket stor Forbedring i de sidste 2—3 Aar.

Der er i Aarene 1942, 43 og 44 anvendt omkring 60.000 Kr. til Vejreparationer, heri dog muligvis indbefattet mindre Nyanlæg. For 1943 og 1944 er Skatteprocenten 8 og Budgetterne paa henholdsvis 48.000 og 53.000 Kr.

Omkring og i Bygden Sand burde anlægges Forsøgsstrækninger med Vaagø-Asfalt, idet Adgang haves til fint Sand.

Skálavík.

Vejstrækningen i Skálavík Kommune er endnu ret daarlig, omend farbar. Der kræves endnu omfattende Reparationsarbejder, før Strækningen er tilfredsstillende.

Húsvík.

Vejstrækningen i Húsavík Kommune er temmelig slidt, men er iøvrigt forholdsvis god.

Vejmand A. Dalsgaard, Distrikt Nr. 13 (Skálavík og Húsavík) har ikke arbejdet paa de 3 km i Húsavík Kommune, dels fordi Skálavík Vejen har krævet hans fulde Opmærksomhed, og dels fordi man ikke har lagt Depoter ud til ham paa Húsavíks Vejen.

Vejstyret overvejer at imødekomme Forstanderskabets Ønske om en særlig Vejmand for Húsavík.

SUÐUROY.

Froðba—Fámjin.

Strækningen Froðba—Tvøroyri er i ret daarlig Stand, særlig fra Stenpladsen til Froðba. Fra Stenpladsen og indefter er Vejen skærvebelagt og ret god.

Strækningen Tvøroyri–Trongisvåg er skærvebelagt og ganske god, men Vejbanen er noget ujævn. Denne stærkt trafikerede Vej burde snarest asfalteres.

Strækningen Trongisvåg–Øravík er i nogenlunde god Stand, men der mangler bindende Materiale i Dæklaget.

Froðbiar Kommune har i 1943 anvendt ca. 57.000 Kr. til Vejreparationer, heraf dog formentlig en væsentlig Del til andre Veje end Trafikveje.

Strækningen Øravík–Fámjin er nogenlunde, men en Del slidt og mange Steder med udprægede Hjulspor. Der er paa Fámjin Siden nyreparerede Strækninger, som er helt gode. Nærmest Fámjin er en Strækning paa 1500 m svagt bygget Vej blevet hovedrepareret efter svær Beskadigelse. Hertil er givet særligt Tilskud.

Det oplyses, at Vejreparationer regnes at kræve over Halvdelen af Famien Kommunes Indtægter. I indeværende Aar er Skatteprocenten 5,5 og Budgettet paa 14.500 Kr.

Våg–Sunnba.

Den korte Strækning fra Porkeris Kommunegrænse til Våg er i nogenlunde god Stand.

Gennem Våg er Vejen ganske god, men ikke fri for Slidhuller. Asfaltering burde foretages.

Strækningen Våg–Lopra er daarlig, bortset fra enkelte nyreparerede Strækninger. Vejen synes daarligt bygget og vil kræve et stort Reparationsarbejde, før den er tilfredsstillende.

Våg Kommune har i 1943 anvendt godt 19.000 Kr. til Vejreparationer.

Vejstrækningen Lopra–Hesturin er meget daarlig. Nærmest Lopra forefandtes et Vejstykke nærmest ufarbart, og der blev givet Paalæg om øjeblikkelig Reparation. Strækningen er forsømt. Der er sikkert ikke tilført Materialer siden Vejen blev bygget.

Strækningen Hesturin–Sunnbø er daarlig, men dog noget bedre end den foregaaende. Her er der i de sidste 2–3 Aar udført en Del Reparationsarbejde.

Vejen Lopra–Sunnba er utvivlsomt den daarligste Trafikvej paa Færøerne i Øjeblikket. Dette skyldes aarelang Forsømmelse og svigtende økonomisk Evne hos Kommunen. Ved Vejstyrets Besøg havde Forstanderskabet netop fremsendt en Ansøgning om Lagtingsstøtte til en stor Hovedreparation, som var anslaaet til 25.000 Kr. Efter Vejstyrets Anskuelse vil en forsvarlig Reparation af den godt 11 km lange Vej snarest koste 40.000 Kr. Skatteprocenten for 1944 er 9 og Budgettet paa 41.000 Kr.

Almindelige Bemærkninger.

Det har ofte vist sig vanskeligt at faa paalidelige Oplysninger om Kommunernes Udgifter til Vedligeholdelse af Trafikveje, idet der ikke føres særligt Regnskab over disse. Vejudgifterne indbefatter saaledes oftest baade Vejreparationer (Trafikveje og andre) og Bidrag til Nyanlæg. Det vilde være gavnligt, hvis det blev paalagt Kommunerne at aflægge særskilt Regnskab over Vedligeholdelse af Trafikveje.

Vedligeholdelse af Veje og Nyanlæg.

Med Henblik paa forsømte Vejstrækninger ønsker Vejstyret at udtale, at det ikke er i Overensstemmelse med gældende Vedtagelser, at

Kommuner, som forsømmer den dem paahvilende Vedligeholdelsespligt, faar udbetalt Tilskud til Bygning af nye Veje, og henstiller, at Vedtagelserne haandhæves med Skarphed.

Uppskot:

1. Avrit av frágreiðsluni verður at senda kommununum og samstundis verður álagt teim at bøta um tey ávístu brek.
2. Eintak av álitinum og frágreiðsluni verður at senda vegastýrinum.

Broytingaruppskot

frá nevndini:

Í málinum eru eisini framlagdar frágreiðslur frá sýslumonnunum, og hesar frágreiðslur umfata umframt vegir eisini brýr og lendingar.

Mælt verður til, at kommunustýrini verða gjørd kunnug við frágreiðslurnar frá sýslumonnunum.

Uppskot:

Kommunustýrini verða gjørd kunnug við frágreiðslurnar frá sýslumonnunum, og álagt verður teimum at bøta um tey hari ávístu brek.

2. viðgerð 4. november. 3. viðgerð 16. november. Nevndaruppskot samtykt 16—0, broytingaruppskot 14—0.

---

2. Studningur til vegir.

---

1. viðgerð 20. september. Framlagt 31. oktober.

Álit.

Nevndin hevur kannað tað yvirlit og tey uppskot, sum løgtingsskrivstovan í samráð við verkfrøðingin hevur gjørt, og tær umsóknir, sum inn eru sendar til tingið.

Viðvíkjandi nøkrum av tí, sum stóð ógjørt, pr. 1. september, er síðan váltan komin fyri, at tað er gjørt.

Fíggjarnevndin hevur sett á fíggjarætlanina fyri 1945 útreiðslur til vegir 450.000 kr.

Veganevndin mælir til, at landsnevndin verður heimilað at nýta upp til 50.000 kr. til vegarbeiði, har trong mátti verið til tess. Eftir eru 400.000 kr. Tá roknað verður við prístali 250, svarar tað til gamlar prísar 160.000 kr.

Innanfyri hetta mark og eftir tí, sum liggur fyri í málinum, skal nevndin seta fram hetta

Uppskot:

1. Viðvíkjandi vegaætlanini 1935–40 verður endurnýggjaður hesin studningur:

Oyndafjarðar kommuna rest av byggipeningínum (Fjarðavegurin)	kr.	18.045,83
Gøtu kommuna (Fjarðavegurin)	»	5.875,00
Funnings kommuna (Gjáarvegurin)	»	7.663,70
Porkeris kommuna (vegurin Porkeri–Hovi)	»	13.950,00
Oyggjarvegurin	»	216.992,00

2. Allir reststudningar frá vegaætlanunum 1940–43 verða endurnýggjaðir inntil 31. december 1945.

3. Fyri 1945 verða ¾ játtaðir av hesum peninganøgdum til fylgjandi kommunur:

Fugloyar kommuna	kr.	2.000,00
Svínoyar kommuna	»	2.000,00
Klakksvíkar kommuna	»	20.000,00
Kunoyar kommuna	»	2.000,00
Mikladals kommuna	»	1.500,00
Oyndafjarðar kommuna (Elduvík)	»	1.500,00
Fuglafjarðar kommuna	»	6.000,00
Lorvíkar kommuna	»	3.000,00
Gøtu kommuna (Skipanes–Skálabotn)	»	3.000,00
Nes kommuna	»	15.000,00
Sjóar kommuna	»	6.000,00
Sunda kommuna	»	2.000,00
Eiðis kommuna (Harav til Svínáar minnst 400 kr.)	»	10.000,00
Saksunar kommuna	»	500,00
Hvalvíkar kommuna	»	4.000,00
Kollafjarðar kommuna	»	5.000,00
Vestmanna kommuna	»	10.000,00
Kaldbaks kommuna	»	1.000,00
Havnar uttanbýggja kommuna (harav skal verða nýtt tað, sum er neyðugt at gera fidnan Hvítanesvegin)	»	3.000,00
Kirkjubøar kommuna	»	1.500,00
Hest kommuna	»	1.500,00
Til vegin Fútaklett–Oyragjógv	»	6.000,00
Mykinesar kommuna	»	500,00
Skopunar kommuna	»	2.000,00
Sands kommuna	»	4.000,00
Húsavíkar kommuna	»	3.000,00
Skálavíkar kommuna	»	1.000,00
At flyta...	kr.	117.000,00

Flutt...	kr.	117.000,00
Skúvoyar kommuna	»	1.000,00
Froðbiar kommuna	»	20.000,00
Hovs kommuna	»	2.000,00
Porkeris kommuna	»	3.000,00
Vágs kommuna	»	15.000,00
Sunnbiar kommuna	»	4.000,00
Tórshavnar kommuna	»	25.000,00
	kr.	187.000,00

Hesir studningar verða givnir undir vanligum treytum viðvíkjandi dýrtíðarviðbót o. ø.

4. Landsnevndin verður heimilað í 1945 at nýta upp til 50.000 kr. til vegaarbeiði til at seta arbeiði í gongd, har trongd mátti verið til tess.

Broytingaruppskot

frá Hans Iversen og O. J. Jensen:

Til Udvalgets Forslag tilføjes under Punkt 3:

«Kvivig Sogns Kommune: 300 Meter Vej i Fortsættelse af Vejen henimod «Múlaheiðar» i Leynum anslaaet 2000 Kr.»

Broytingaruppskot

frá Dam o. fl.:

Til nevndarinnar uppskot petti 3 verður sett sum uppískoyti:

Fyri 1945 verður játtað Hovs kommu ¾ av 4.000 kr. — ¾ av fýra túsund krónum — eftir 1939 prísinum til framhald av akvegnum Hovi—Øravík.

Broytingaruppskot

frá Dam o. fl.:

Til nevndarinnar uppskot petti 3 verður sett sum uppískoyti:

Fyri 1945 verður játtað Froðbiar sóknar kommunu ¾ av 6000 kr. — ¾ av seks túsund krónum — eftir 1939 prísinum til framhald av akvegnum Øravík—Hovi.

Broytingaruppskot

frá Dam o. fl.:

Til nevndarinnar uppskot petti 3 verður sett sum uppískoyti:

Fyri 1945 verður játtað Sunnbiar kommunu ¾ av 1000 kr. — ¾ av einum túsund krónum — eftir 1939 prísinum til framhald av akvegi frá Víkarbyrgi til akvegin Sunnbø—Lopra.

2. viðgerð 4. november. 3. viðgerð 16. november og 24. november. Nevndaruppskotið samtykt 24—0. Broytingaruppskot frá Hans Iversen samtykt 22—0 og 3 uppskot frá Dam við 14—0.

---

3. Studningur til lendingar.

1. viðgerð 20. september. Framlagt 20. november.

Álit.

Í brævi 12. september í ár skrívar løgtingsskrívstovan:

«Viðvíkjandi viðgerð av málinum ífjør sí løgtingstíðindi 1943, s. 135.

Roknað verður við gomlum prísum (prístal 100). Samsvarandi seinri løgtingssamtykt veitir tingið sum studning ¾ av teim verunligu útreiðslunum til tilfar og ¾ av útreiðslunum til arbeiðsløn 70 oyru um tíman og dýrtíðarviðbót. Eldri studningar enn 1943—45 eru burturdotnir, um ikki serstøk løgtingssamtykt liggur fyri.

Løgtingsskrívstovan hevur gjørt yvirlit pr. 1. september í ár yvir restandi studningar; frá 1940—42 standa enn 20.320 kr. (byggjupeningur gamlir prísir). Studningarnir viðvíkja tó arbeiðum, sum eru í gongd, undantikið 4.000 kr. til akbryggju í Sørvági.

Fyri 1942—43 standa 75.384,30 kr., harav 8.000 kr. til lending í Eystvík, Viðareiði, 8.000 kr. til bátahavn á Toftum, og 16.860 kr. til lending á Eiði; hesin seinasti studningur er íroknaður havnastudninginum til Eiði eftir 10-áraætlanini.

3.000 kr. standa til akbryggju í Sørvági og 5.000 kr. til lendiarbeiði í Skálavík, sum hevur verið steðgað í longri tíð.

Løgtingsskrívstovan skal mæla til, at studningarnir verða endurnýggjaðir, eins og studningurin til Eiði gongur út her. Fyri 1943—44 standa eftir 112.980 kr. og fyri 1944—45 kr. 129.398.

Løgtingsverkfrøðingurin hevur havt til eftirkannan tær umsóknir, sum eru innkomnar, og setti hann 8. september fram fyribils uppskot.

Síðan hevur nevndin kannað málið og havt samráð við umboðsmenn fyri ymisk sóknarstýrir og verkfrøðingin og er komin ásamt um niðanfyristandandi uppskot.

Hareftir verður játtað ¾ av 115.930 kr. — 86.947,50 kr. gamlir prísir. Hetta svarar til núverandi prísir	kr. 243.600,—
Játtað í fjør fyri 1945	„ 48.000,—
	kr. 291.600,—

Uppskot:

1. Restandi studningar 1940/43 verða endurnýggjaðir eitt ár.
2. Fyri 1945 verður veittur studningur ¾ av niðanfyri nevnda peningi (byggjupeningurin):

Fugloyar	kommuna:	Umbøtan niðri á Hellu	kr.	5.200,–
Svínoyar	–	Til lendibrúgv við Víkina	»	5.600,–
Klakksvíkar	–	Byrgi í Stóra, Árnafirði	»	1.100,–
Húsa	–	Framhald lending	»	1.500,–
Funnings	–	Útdýpan	»	4.500,–
Oyndarfjarðar	–	Lending, lendibrúgv 10 m í 2 ár, 1. ár	»	7.500,–
Sunda	–	Havnapláss á Oyri	»	5.600,–
		Lendibrúgv, Norðskála	»	4.000,–
Sjóar	–	Lending, Kolbeinagjógv	»	1.700,–
Haldórsvíkar	–	Lendibrúgv á Langasandi	»	5.500,–
Kollafjarðar	–	Langasand 2 ár á	»	5.000,–
Kaldbaks	–	Kaldbaksbotn	»	1.000,–
Havnar uttanb.	–	Útdýpan og víðkan bátahavn, Argir	»	3.000,–
		Framhald, Hoyvík	»	1.000,–
Kirkjubøar	–	Framhald Velbastað 10.000 kr. í 2 ár, 1945	»	5.000,–
		Leingjan brúgv Kirkjubø o. a.	»	4.000,–
Hestoyar	–	Framhald	»	4.000,–
		Nýggjan bátadrátt í Koltri	»	1.600,–
Nólsoyar	–	Bøtan lending	»	7.000,–
Bíggjar	–	Bøtan av drættinum í Gásadali	»	2.500,–
Mikinesar	–	Framhald	»	4.100,–
Skopunar	–	Leingjan av brimgarðinum	»	3.000,–
Húsavíkar	–	Breiðkan Brimgarði, Dali	»	3.600,–
		Víðkan lending, Húsavík	»	6.000,–
		Skipabakka	»	2.000,–
Skúvoyar	–	Umbøtan lending	»	10.000,–
		Stóru Dímun	»	800,–
Froðbiar	–	Lending Froðbø	»	3.630,–
Fámjins	–	Framhald	»	6.500,–
			kr.	115.930,–

Hesir studningar verða givnir undir vanligum treytum viðvíkjandi dýrtiðarviðbót o. ø.

Broytingaruppskot

frá J. P. Davidsen:

Til uppskot nevndarinnar pt. 2. verður sett aftrat:

Lorvíkar kommuna: Til lending á toftanesi til cement, gamlir prísir, ¾ av ..... 1.000 kr.

Skopunar kommuna:	Til kajanlegg í Skopun ¾ av..... fyri 2 ár við 31.500 kr. um árið, núverandi prísir.	63.000 kr.
Húsavíkar kommuna:	Til brimgarð í Dali ¾ av..... aftrat, gamlir prísir.	2.800 »
	Tann fyri 1943/45 standandi játtan til lending í Húsavík uppá 4.000 kr. verður at nýta til ta nýggju lendingina í Húsavík.	
Froðbøar kommuna:	Til lending í Trongisvági ¾ av..... gamlir prísir.	8.000 »

Broytingaruppskot

frá P. Petersen o. fl.:

Til uppskot nevndarinnar pt. 2 verður sett:

1) Sunnbiar kommuna:
Leingjan av brimgarði á Økrum (¾ av kr. 5.500 í 2 ár) kr. 2.750,—
2) Nes kommuna:
Víðkan av havnaplássi á Toftagjógv (¾ av kr. 5.100 í 2 ár) » 2.550,—
3) Kvalbiar kommuna:
Eykastudningur til lending í Sandvík (kr. 12.000 í 2 ár, nýggir prísir)..... » 6.000,—

Broytingaruppskot

frá Øregaard o. fl.:

Sum nýtt punkt verður sett:

Hans P. Hansen og fleiri í Fuglafirði verður úr amtsgrunninum veitt í studningi 1000 kr., eitt túsund krónur, til lending heimi á Bug.

Broytingaruppskot

frá Øregaard o. fl.

Sum nýtt punkt verður sett:

Gøtu kommunu verður úr amtsgrunninum veitt í studningi ¾ av 40.000 — fýrati túsund — krónur til leingjan av lendibrúnni í Syðrugøtu.

Broytingaruppskot

frá A. Sørensen o. fl.

Til uppskot nevndarinnar pt. 2 verður sett:

Skopunar kommuna: Til veg til projekterað kaianlegg í Skopun ¾ av 1500 kr. gamlir prísir.

Broytingaruppskot

frá Kjølbro o. fl.:

Til petti 2 í uppskotinum verður sett:
Kunoyar kommuna: Til hækkan av brimverju o. a. 3/4 gl. pr. av 3.000 kr.

Til nevndarinnar pt. 2 verður sett afturat:
Viðareiðis kommuna: til lending í Eystvík, Viðareiði 3/4 av 4.000 kr.

2. viðgerð 22. november og 3. viðgerð 1. desember. Nevndaruppskotið samtykt 20—0. Broytingaruppskotini fullu undantikið:

Lorvík (Toftanes) 3/4 av	1000 kr.
Brimgarð Dali 3/4 av	2800 »
Brimgarð Økrum 3/4 av	5500 »
Kunoy, Framhald 3/4 av	3000 »
Viðareiði, Eystvík 3/4 av	4000 »

Broytingaruppskot

frá nevndini:

Hesi mál vóru goymd til næstu tingsetu:

1) Bátadráttur, Hattarvík.
2) Uppgongd, Trøllagjónni.
3) Neystalynningar (H. P. Hansen o. fl., Fuglafirði).
4) Framhald lendibrúgv, Syðrugøtu (út á Stórufles).
5) Lending, Edw. Mikkelsen, Gøtueið.
6) Bátadráttur norðan fyri Rasmussar brúgv, Glyvrum.
7) Lendibrúgv, Saltnesi.
8) Bátadráttur á Áarstøðni, Lorvík.
9) Lending, Toftanesi, s. s.
10) Brimgarður í Tjørnuvík.
11) Leingjan brúgv, Signabø.
12) Leingjan lendibrýr, Hvalvíkar kommunu.
13) Bátadráttur hjá Johs. Fr. Hansen, Kollafirði.
14) Lendibrúgv, G. Reinert, Sundi.
15) Lendibrúgv við Líttla sker, Skopun.
16) Bátahavn, Skálavík.
17) Brúgv niðanfyri skúlan í Trongisvági.
18) Víðkan av bátahavnini, Hovi.
19) Brimverja við bátadráttin við Heyggsneyst í Porkeri.
20) Bryggja, Lopra.
21) Bátadráttur (Meinhard Lindenskov, Nólsoy).
22) Bátadráttur (Johan M. Joensen o. fl. Tvøroyrabakka).

Samtykt 18—0.

4. Studningur til høvuðsumvølan av samferðsluvegum.

1. viðgerð 23. september. Framlagt 25. november **álit sí skj. nr. 12.**

Broytingaruppskot

frá J. P. Davidsen o. fl.:

Til uppskotið verður sett sum pt. IV:

Um kommunurnar ynskja tað og tilmæli frá løgtingsverkfrøðinum og vegastýrinum liggja fyri, verður landsnevndin heimilað at geva loyvi til, at ein partur av standandi vegajáttanum verða nýttar til høvuðsumvølan av samferðsluvegum.

2. viðgerð 30. november og 3. viðgerð 1. desember. Meirilutauppskot pt. I samtykt 18—0. Minnilutauppskot II uppskot 1 fall 11—0, 2 fall 8—0. Meirilutauppskot III samtykt 16—0. Broytingaruppskotið samtykt 13—0.

5. Vinstrukoyrsla í Vágum.

1. viðgerð 8. september. Framlagt 21. september.

Alit.

Kunngerð nr. 56, 21. december 1942, ásetir vinstrukoyrslu í Vágum fyri 1943, og løgtingið samtykti í fjør at leingja hesar reglur fyri 1944.

Nevndin hevur biðið løgtingsskrivstovuna fáa ummæli frá bretsku herdeildini, og í brævi í september 1944 sigur yvirmaðurin yvir bretsku hermonnunum í Føroyum, at tað er ikki neyðugt frá militerum sjónarmiði at leingja reglurnar, og at hann einki hevur móti, at tær í Føroyum annars galdandi reglur um høgrukoyrslu koma aftur í gildi í Vágum frá 1. januar 1945 at rokna.

Nevndin skal so statt mæla til, at so verður, og at heitt verður á fútan at gera hetta kunnugt í góðari tið, serstakliga í Vágum og áleggja sýslumanni, politistum og bilstjórum har at ansa væl, at eingin skaði hendur við skiftu frá vinstru- til høgrukoyrslu.

Uppskot:

Fútin verður gjørdur kunnugur við støðu tingsins og umbiðin at fyriskipa neyðturvuliga kunngerð.

2. viðgerð 30. september og 5. oktober. Samtykt 24–0.

---

6. Studningur til nýmótans lið á samferðsluvegum.

---

1. viðgerð 23. september. Framlagt 17. oktober.

Álit.

Føroya búnaðarfelag heitti á tingið í fjør um at seta í verk lógarreglur, hareftir tey sokallaðu patentlið, gjørd av ristum, skuldu verða einasta lógliga lið á samferðsluvegum, har gæs ikki eru í høgunum.

Løgtingsverkfrøðingurin gav ummæli í málinum.

Tingið samtykti í fjør at biðja løgtingsverkfrøðingin um at útvega nærri upplýsingar frá vegastjórn Íslands og gera kommununar kunnugar við teir (sí løgtingstíðindi bls. 109 f. f.).

Enn fyriliggja ongar slíkar upplýsingar fyri tinginum.

Royndir hava verið gjørdar við hesum liðum t. d. í Gøtu og á Argjum, og tað sigst, at tey roynast væl.

Við skrivi, d. 21. juli 1944, hevur Klakksvíkar søknar kommuna søkt tingið um studning til, sum teir siga, nýmótans portur.

Teir skila til, at tilfarstrot er í løtuni til umsitingar av teim liðum, sum eru í kommununi og sèks av teim tørva endurnýgging.

Havna- og veganevndin má halda, at hentast varð, um lógarskipan varð gjørd galdandi fyri allar samferðsluvegir í Føroyum.

Men í løtuni er nevndin í iva um, hvørvitt tær gjørdu royndir við patentliðum kunnu elva til nú at seta fram lógaruppskot.

Annars má nevndin halda, at soleingi umsiting av samferðsluvegum er ein kommunal skylda, kann nevndin ikki mæla tinginum til at veita studning til lið.

Tað liggur heldur eingin ætlan um, hvussu mikið slík lið kosta.

Uppskot:

Eintak av álitinum verður at senda Klakksvíkar kommunu.

2. viðgerð 20. oktober. Samtykt 16–0.

---

7. Vegurin Hvalvík—Saksun sum høvuðsvegur.

1. viðgerð 23. september. Framlagt 12. oktober.

Álit.

Sóknarstýrini fyri Hvalvíkar og Saksunar kommunu søkja um, at vegurin Hvalvík—Saksun verður tikin upp millum hinar trafikkvegirnar í Føroyum og um at fáa sett vegmenn at bøta um vegin. Veglongdin hjá Saksun er 5 km og hjá Hvalvík 9 km.

Vegstýrið mælir til, at vegurin verður tikin upp millum høvuðsvegirnar, og verður tað gjørt, vil vegstýrið taka til viðgerðar spurningin um at seta vegmenn.

Eftir vegareglugerð fyri Føroyar, 19. december 1940, eru 12 høvuðsvegir. Havna- og vegnevndin skal mæla til at játta umsóknina.

Uppskot:

1. Í vegareglugerð fyri Føroyar § 2 verður aftaná pt. 12 sett:
   13. Hvalvík—Saksun við tvørvegi til Streymnesar.
2. Spurningurin um setan av vegmonnum verður at vísa til vegstýrið.

2. viðgerð 17. oktober. 3. viðgerð 21. oktober. Samtykt 15—0.

8. Eykastudningur til lendingar.

7. november framlagt

Álit.

Nøkur lendingararbeiði, sum eru gjørd liðug hava kostað meiri enn ætlað, og havna- og veganevndin skal mæla til eftir samráð við figgjarnevndina, at hesir eykastudningar verða veittir.

Arbeiðið við lendingina í Kunoy hevur kostað	39.954,37 kr.
harav partur hjá kommuni 1/4	9.988,58 »
	29.965,79 kr.
Harav fingið løgtingsstudning	26.815,78 »
	3.150,01 kr.
Mælt verður til at játta	3.150,00 kr.

Tjørnuvík: eykaarbeiði. Eftir uppskoti frá verkfrøðinum verður mælt til at játta ¾ av 1.050 ..... 772,50 kr.

Bátabrúgv Hósvík.

Arbeitt 4988 timar. Goldið løgtingsstudning		4.401,22 kr.
plus selt tilfar		557,50 »
		4.958,72 kr.

Ábyrgd varð givin, tá arbeiðsmannafelagið byrjaði arbeiðið fyri í minnsta lagi 1 kr. 30 oyr. pr. arbeiðstíma.

Mælt verður til eykastudning ..... 1.500,00 kr.

Brimverja Skúoy.

hevur kostað		5.317,50 kr.
ætlað at kosta		4.000,00 »
		1.317,50 kr.

Uppskot eykastudning ¾ av hesum ..... 988,12 kr.

Argir hevur kostað		34.752,86 »
Harav arbeiðsløn	13.300 kr.	
2.60 pr. tíma, um roknað 1,82	9.300 »	
		4.000,00 »
Útreiðslan tá		30.752,86 kr.
minus partur hjá kommuni ¼		7.688,22 »
		23.064,64 kr.
Veittur studningur frá tinginum		18.845,26 »
		4.219,38 kr.
Mælt verður til eykastudning		4.000,00 kr.

Góðadalur, Fuglafjørður.

Brimskaði hendi, og arbeiðið byrjaði eftir samráð við landsnevndina.

Kostnaður		9.970,74 kr.
arbeiðsløn 2,47, um roknað 1,82 munur		c. 1.200,00 »
		8.770,74 kr.
minus partur hjá kommununi ¼		2.192,68 »
		6.578,06 kr.
Mælt verður til studning		6.500,00 kr.

Gásadal, Bíggjar kommuna.

Kostað	11.000,00 kr.
minus partur hjá kommununi 1/4	2.750,00 »
	8.250,00 kr.
Játtað er 3/4 av 8.400 kr.	6.300,00 »
(3000 kr. gl. prísar)	
Mælt verður til eykastudning	1.950,00 kr.

Uppskot:

1.	Lending í Kunoy	3.150,00 kr.
2.	Lending í Tjørnuvík	772,50 »
3.	Bátabrúgv í Hósvík	1.500,00 »
4.	Brimverja í Skúoy	988,12 »
5.	Lending á Argjum	4.000,00 »
6.	Lending í Góðadali, Fuglafirði	6.500,00 »
7.	Lending í Gásadali	1.950,00 »
		18.860,62 kr.

Broytingaruppskot

frá nevndini:

Løgtingsverkfrøðingurin upplýsir, at arbeiðið uppá lendingina í Hattarvík er liðugt. Játtaður studningur er 3/4 av 24.000 kr. í 1942. Prístalið var tá 187. Arbeiðið er gjørt í ár, og um studningurin verður umroknaður eftir núverandi prístali, skuldi hann verðið 3/4 av 30.200 kr. Arbeiðið hevur kostað 32.248 kr. Kommunustýrið hevur ikki søkt um eykastudning, men verkfrøðingurin peikar á, hvussu málið liggur fyri, og at umsókn væntandi kemur.

Havna- og veganevndin skal tí seta fram hetta

uppskot:

Landsnevndin verður heimilað at veita Fugloyar kommunu sum eykastudning til lendiarbeiðið í Hattarvík upp til 3/4 av 6.200 kr. = 4.950 kr.

2. viðgerð 9. november. 3. viðgerð 22. november. Nevndaruppskotið samtykt 24—0, broytingaruppskotið 23—0.

IX. Havnir o. a.

1. Ymisk havnamál.

1. viðgerð 12. september. Framlagt 23. oktober.

Álit.

Viðvíkjandi teimum havnum, sum tingið veitti studning til í 1942 (10-áraætlanini, sí løgtingstíðindi 1942, s. 134) hevur løgtingsverkfrøðingurin 11. september givið hesa frágreiðing:

INDBERETNING VEDR. YMISK HAVNAMÁL.

1. **Hvannasund.** Kajanlæg. Bevilling 116.000 Kr.
Arbejdet ikke paabegyndt.

2. **Fuglefjord Kommune.** Kajanlæg. Bevilling 475.000 Kr.
I Efteraaret og Vinteren 1943 udførtes en Del af Indfatningsmuren for en Havneplads i Tilslutning til den paatænkte Kaj. Omkring 1. Februar 1944 var der udført den nordlige Side samt godt 20 m af Forsiden af Havnepladsen, hvis Længde er 47 m. Bag de opførte Mure var der oplagt betydelige Mængder Sten.

Den 5. Februar skete der under Nordenstorm Skade paa Indfatningsmuren, idet det nordvestre Hjørne blev undermineret og brækket fra. Aarsagen til Skaden maa søges i den Omstændighed, at der trods givne Paalæg ikke var funderet dybt nok.

Arbejdet er forsat i Sommeren 1944. Der er udgravet for og delvis støbt Mur fra Land til Havnepladsens sydvestre Hjørne og herfra mod Nord til den tidligere støbte Mur. Der er funderet paa en Dybde af 170 til 200 cm under den oprindelige Bund. Bunden bestaar i denne Dybde af tæt sammenpakkede Sten, som det skønnes forsvarligt at fundere paa, uanset at man ikke er naaet ned paa fast Klippe. Det forventes, at Indfatningsmuren om Havnepladsen vil blive færdig i indeværende Efteraar.

Opfyldningen har i det store og hele holdt trit med Muren, saaledes, at selve Pladsen ogsaa kan forventes færdiggjort i Aar.

Ultimo August er der efter Opgivelse forbrugt ca. 120.000 Kr. Timelønnen i 1944 er 250 Øre.

Af Lagtingets Tilskud er til Dato udbetalt Kr. 50.625,—.

3. **Lørvig Kommune.** Dækmole og Baadehavn. Bevilling 390.000 Kr.

Den i Fjor paabegyndte Adgangsvej er bygget.

Af Dækmolen er der ultimo August udført 70 m i fuld Højde dog med Undtagelse af Bølgeskærm, og yderligere 7 m er opført i halv Højde. Arbejdet fortsættes.

Efter Opgivelse fra Forstanderskabet er der i 1943 forbrugt ca. 43.500 Kr. og i 1944 indtil nu ca. 42.600 Kr., altsaa ialt ca. 96.100 Kr.

Af Lagtingets Tilskud er der til Dato udbetalt Kr. 49.000,—.

4. **Gøte Kommune.** Kajanlæg i Nordre Gøte. Bevilling 390.000 Kr.

Den i forrige Indberetning beskrevne Del af Anlægget, nemlig Havneplads og 15 m Mole blev fuldført i Efteraaret 1943.

Med Landsnævnets Sanktion er Projektet ændret saaledes, at Molen bliver ialt 40 m lang (i Stedet for 34 m). Arbejdet er i indeværende Sommer fortsat med Bygning af de 25 m Mole, der ender paa en Vanddybde af knapt 7 m. Ved Bygningen af denne Del af Molen, der ligger paa Vanddybder af 5—7 m, er det nedre Parti bygget kompakt ved Anvendelse af en særlig Kombination af Sækkebeton og Undervandsstøbning. — Molen ventes færdigbygget i denne Maaned.

I 1943 blev forbrugt ca. 100.000 Kr. Arbejdet i Aar er kalkuleret til 135.000 Kr., og efter alt at dømme vil dette Beløb ikke blive overskredet.

Af Lagtingets Tilskud er til Dato udbetalt Kr. 132.750,—.

5. **Nes Kommune.** Baadeoptræk i Lamhauge. Bevilling 20.000 Kr.

Det ved sidste Indberetning manglende Arbejde, nemlig Paastøbning foran Plateauet nord for Optrækket, er fuldført i Sommeren 1944. Samtidig er selve Platau'et reguleret i ret stor Udstrækning.

I Henhold til et under 30. August 1944 indsendt Regnskab har de samlede Udgifter været Kr. 31.183,88. En nærmere Udtalelse vil fremkomme herfra.

Af Lagtingets Tilskud er til Dato udbetalt $\frac{3}{4} \times 20.000 = 15.000$ Kr.

6. **Nes Kommune.** Anlægskaj ved Tofte Gjov. Bevilling 65.000 Kr.

Arbejdet blev afsluttet i Begyndelsen af 1944. Det har vist sig, at Anlægget er særdeles nyttigt og velegnet.

I Henhold til et under 30. August 1944 indsendt Regnskab har de samlede Udgifter været 78.708,93 Kr., hvortil kommer Leje for en Del Materialer tilhørende Lagtinget. En nærmere Udtalelse vil fremkomme herfra.

Af Lagtingets Tilskud er til Dato udbetalt 42.125 Kr.

7. **Nes Kommune.** Havneanlæg i Runavik. Bevilling 250.000 Kr.

Der er i Løbet af sidste Efteraar og Sommeren 1944 bygget ca. 55 m Adgangsmole med Retning mod de smaa Skær syd for Saltangará. Overslaget for denne Del af Anlægget var 50.000 Kr., hvortil kommer ca. 4.000 Kr. for en Vej til Stenbrudet.

Molen er opført af Brudsten. Paa Sydsiden er den infattet af en lodret Mur og paa Nordsiden af en Skraaning med Stenkastning.

Strækningen er meldt færdig, og vil snart blive synet.

Der er endnu ikke udbetalt Lagtingstilskud.

8. **Sjov Kommune.** Kajanlæg. Bevilling 275.000 Kr.

Forstanderskabet har valgt at bygge Kajanlægget ved Strænder (Heyggsstøð), og dette er godkendt af Landsnævnet.

Der er udarbejdet Projekt til et Anlæg bestaaende af ca. 60 m Adgangsvej sydfra, en 32 m lang Mole af Bredde 5 m og en Vinkelfløj af foreløbig Længde 15 m og Bredde 8 m. Dette Anlæg vil antagelig kunne bygges indenfor den givne Bevilling. Der er desuden skitseret en Forlængelse af Vinkelfløjen med 25 m.

Arbejdet paabegyndtes i Juli Maaned i Aar. Adgangsvejen er i det store og hele fuldført og Arbejdet paa Molen paabegyndt.

Der er endnu ikke udbetalt Lagtingstilskud.

9. **Ejde Kommune.** Dækmole. Bevilling 570.000 Kr.

Den i forrige Indberetning nævnte Del af Dækmuren blev færdigbygget i Efteraaret 1943.

Paa Grund af Vanskelighederne ved at skaffe nødvendige Arbejdsredskaber og Dykker blev det herfra fraraadet at bygge videre ud i Søen foreløbig.

Der er bygget Indfatninger for det lille Bassin, der ligger i Læ af Dækmuren, og Baadeoptræk i Bassinets Nordside. Disse Arbejder ventes færdige i nær Fremtid.

Desuden er der foretaget Udbygning af det østre Landingssted.

Der er af Lagtingets Tilskud udbetalt i 1943 34.000 Kr. og i 1944 14.000 Kr., hvoraf til østre Landingssted 12.000 Kr., ialt 48.000 Kr.

10. **Thorshavn Kommune.** Fundament for Dækmole. Overslag 2.300.000 Kr. Bevilling fra Lagtinget: 1.000.000.

Arbejdet paabegyndtes i Sommeren 1943, er fortsat med ret smaa Arbejdsstyrker. I Foraaret blev der anskaffet en Kompressor og Luftværktøj, hvilket har fremmet Arbejdet betydeligt.

Medio August var der udkastet ca. 3000 m³ Sten i Fundamentet. De samlede Udgifter var da ca. 155.000 Kr., hvoraf dog en betydelig Del er medgaaet til uundgaaelige Startomkostninger og Anskaffelser.

Det præsterede Arbejde inclusive visse Anskaffelser ansattes medio August til en Værdi af 115.000 Kr., hvortil svarer et Lagtingstilskud paa 50.000 Kr.

Det er god Udsigt til, at Prisen pr. Kubikmeter Stenfyld efter Anskaffelse af endnu en Kompressor, svære Kraner og 1—2 Pramme vil kunne holdes paa de kalkulerede 25 Kr.

Af Lagtingets Tilskud er til Dato udbetalt 50.000 Kr.

11. **Sandevaag Kommune.** Anlægskaj. Bevilling 43.000 Kr.

Indfatningen for Havnepladsen blev fuldført sidste Aar, hvorefter der er foretaget Opfyldning. Betondækket over Fylden ventes færdiggjort i nær Fremtid.

Af Lagtingets Tilskud er til Dato kun udbetalt 9.675 Kr.

12. **Sands Kommune.** Udvidelse af Baadehavn. Bevilling 92.000 Kr., forhøjet til 101.120 Kr. Suppleret med en ren Lagtingsbevilling paa 14.000 Kr. til Baadepladser.

Det nye Baadebassin er i det store og hele udsprængt, saaledes at der kun staar en tynd Væg tilbage mellem det nye og det gamle Bassin. Indfatningsmure og Baadeoptræk i det nye Bassin er støbt. Fjernelse af Mellemvæggen vil antagelig blive paabegyndt om faa Dage. Det er Hensigten at lade en Del af Mellemvæggen blive staaende som Dækning for

det inderste Bassin, hvilket Forslag Forstanderskabet er anmodet om at lægge for Vej- og Havneudvalget.

Havnevejen er færdig, bortset fra Afjævning med fine Skærver. Denne Vej er bygget 5,5 m bred og har aftaget betydelige Mængder af Stenfylden fra Baadebassinet.

Af Lagtingets Tilskud er udbetalt 54.000 Kr. af den oprindelige Bevilling og 4.667 Kr. af den i 1943 givne Bevilling til Baadepladser.

Anlægget ventes færdiggjort i Aar.

13. **Kvalbø Kommune.** Kajanlæg: Býargarð, Nes og Sandvig.

Anlægget i Sandvig blev fuldført sidste Efteraar. Det var kalkuleret til ca. 65.000 Kr., hvoraf dog kun 11.000 Kr. var bevilget under «Ymisk havnamál».

Paa Grund af en Del Ekstraarbejder samt usparsommelig Brug af Arbejdskraft naaede Byggesummen op paa ca. 128.000 Kr. Nærmere Udredning af dette Forhold er givet i Skrivelse af 20. Januar 1944 til Landsnævnet.

Af Lagtingets Tilskud er til Anlægget i Sandvig udbetalt $^3/_4 \times 11.000 = 8.250$ Kr., samt som særligt Tilskud 10.000 Kr.

Anlæggene ved Býargarð og Nes er ikke paabegyndt, hovedsagelig i den Hensigt ikke at gribe forstyrrende ind i Kulproduktionen og Kulafskibningen.

14. **Porkeri Kommune.** Kajanlæg. Bevilling 112.000 Kr.

Anlægget er ikke paabegyndt, og der er ikke truffet endelig Bestemmelse om Placering og Byggemaade.

15. **Sumbø Kommune.** Dækmole i Víkarbyrgi. Bevilling 32.000 Kr.

Anlægget er ikke paabegyndt.

16. **Sumbø Kommune.** Havneværket i Sumbø. Bevilling 300.000 Kr.

Anlægget er ikke paabegyndt, og der er ikke udarbejdet egentligt Projekt.

Den i forrige Indberetning nævnte Dækmur er opført og gør god Fyldest som Beskyttelse af Baadepladsen. Paa den anden Side er det bemærket, at hele Landingsstedet nu sander til, og der er Grund til at befrygte, at dette vil fortsætte, hvis man skrider til at bygge en Havn. En omhyggelig Undersøgelse af dette Forhold er paakrævet.

Almindelige Bemærkninger.

Som det fremgaar af ovenstaaende Oversigt er der en Del Steder, hvor Anlægsarbejdet ikke er paabegyndt, og andre, hvor der kun er udført forberedende Bygningsarbejde. Saafremt der ikke i den kommende Sommer sker en betydelig Forbedring med Hensyn til Indførsel af Materialer (Træ og Jern), og Materiel af forskellig Slags, herunder Dykkergrejer, kan man heller ikke i 1945 vente, at Havnebygningsarbejderne kan fremmes i det Omfang, som maatte ønskes.

Skulde nævnte Forbedring indtræffe, vil Spørgsmaalet om foroget Tilsyn paany melde sig, jfr. Ingeniørkontorets Skrivelse af 25. Februar 1944.»

Arbeiðið er ikke byrjað í Hvannasundi, Porkeri, Víkarbyrgi og Sumbø. Eftir tingsamtyktini í fjør eru játtaninar galdandi eitt ár enn.

Fuglafjarðar kommuna søkir aftur í ár um at fáa studningin hækk-

aðan til 3/4 av 741.000 kr. í staðin fyri, sum játtað, av 475.000 kr. Nevndin er samd um, at eykastudningur má verða veittur, men arbeiðið er enn ikki komið so langt á leið, at nevndin heldur, tað er gjørligt at taka støðu til spurningin um støddina av eykastudningi, soleiðis sum viðurskiftini eru. Annars vísir nevndin á samtyktina í fjør.

Tórshavnar býráð søkir um, at peningurin, sum játtaður er til brimgarð, eisini kann verða nýttur til byggjan av bryggju í Vestari vág frá Shellbryggjuni til konsulargoymsluhúsið. Løgtingið játtaði 1 mill. kr. til brimgarðsarbeiðið, ætlað at kosta 2,3 mill. kr. Bryggjan, sum umtalað er, er ætlað at kosta 1/2 mill. kr. Nevndin skal mæla til at játta umsóknina, tó so, at hægst 200.000 kr. av studninginum kunna verða nýttar til bryggjuna og soleiðis, at studningurin ikki fer upp um 2/3 av útreiðslunum. Tað er sjálvsagt ein ásetningur, at planur verður góðkendur av løgtingsverkfrøðinginum og landsnevndini.

Sandavágs kommuna søkir um eykastudning. Nevndin er samd um, at eykastudningur má verða veittur, men av tí at arbeiðið enn ikki er liðugt og endaligur roknskapur innsendur, heldur nevndin, at endalig støða til støddina ikki kann takast longu nú (smbr. ummæli verkfrøðingsins, 14. oktober).

Sands kommuna søkir um studning til goymsluhús til havnina, ætlað at kosta 20.000 kr. Nevndin kann ikki mæla til at játta studning frá tinginum.

Í fjør úttalaði nevndin, at tað ikki var gjørligt at ætla um, og hvussu nógv í hvørjum einstakum føri vil tørva í eykastudningi. Samtykt varð tí at játta 30.000 kr. árliga sum uppískoyti til 10-áraætlanina. Av teim fyri 1944 samtyktu 30.000 kr. eru játtaðar 14.000 kr. til Sands havn og 10.000 kr. til Sandvík. Eftir eru tí bert 6.000 kr. og 30.000 kr. at ráða yvir fyri 1945.

Viðvíkjandi bryggjuni í Sandvík skrivar verkfrøðingurin 20/1 1944:

«Vedr. Kajen i Sandvig.

I Tilknytning til Skrivelse af 5. Oktober og 10. December 1943 skal jeg yderligere oplyse følgende.

Den samlede Udgift til Anlægget udgør ca. 126.000 Kr., jfr. vedlagte Regnskabsoversigt. Der er saaledes en Overskridelse paa ca. 60.000 Kr. idet det i 1942 udarbejdede Overslag lød paa 66.000 Kr., hvoraf de 11.000 Kr. faldt under Ymisk Havnamál og de 55.000 Kr. under 5-Aarsplanen 1940/45.

Som tidligere nævnt skyldes Overskridelsen dels, at der er lavet en Del Arbejder, som — omend uautoriserede — dog ikke kan siges at være upaakrævede og dels, at der i Forhold til Arbejdets Omfang er forbrugt for mange Arbejdstimer. Endvidere kan en Del af Overskridelsen — ca. 8.000 Kr. — henføres til Pristalsforhøjelse af det Beløb, som falder under 5-Aarsplanen.

Nedenfor er angivet en Beregning af Værdien af de ikke autoriserede Arbejder, som efter Omstændighederne kan godkendes. De anførte Beløb er efter gamle Priser.

1. Forhøjelse af Kajens Overside med 55 cm	Kr.	5.400,–
2. Forlængelse og Forhøjelse af Bølgeskærm samt Fundament ved Land for samme	»	600,–
3. Indfatning og foreløbig Regulering af Havneplads samt Afjævning af Baadeplads	»	1.880,–
4. Tillæg for ekstra Transport af Sand og Skærver	»	1.000,–
	Kr.	8.880,–

Omregnet til Øjeblikkets Priser svarer dette Beløb til Kr. 24.000,–.

Entreprisens Værdi kan herefter ansættes saaledes, idet Bevillingen paa 55.000 Kr. omregnes fra Prisniveauet i Efteraaret 1942 til Prisniveauet 1943.

Bevilling Ymisk havnamál	Kr.	11.000,–
— 1940/45: 55.000 × 2,75/2,40	»	63.000,–
Ekstraarbejder i Henhold til foranstaaende	»	24.000,–
	Kr.	98.000,–

Jeg tillader mig at indstille, at Beløbet 98.000 Kr. lægges til Grund for Beregningen af Tilskuddet, saaledes at dette fastsættes til $^3/_4 \times 98.000$ = Kr. 73.500,–.

Tilskud svarende til den første Post paa 11.000,– Kr. er allerede udbetalt. Af Tilskudet svarende til den anden Post paa 63.000,– Kr. er der udbetalt 30.230,63 Kr., medens Resten kan afvikles paa normal Maade af de foreliggende Bevillinger.

Tilskud svarende til Ekstraarbejderne, nemlig $^3/_4 \times 24.000$ = 18.000 Kr. maa bevilges særligt.»

Verkfrøðingurin mælir soleiðis til eykastudning 18.000 Kr. Harav hevur Landsnevndin játtað 10.000 kr., og havnanevndin skal mæla til at játta 8.000 kr. aftrat. Kommunan fær tá umframt sín fjórðing av tí upprunaligu kostnaðarætlanini eitt undirskot uppá 28.000 kr.

Útreiðslurnar við lendingina við Lamba hava verið 31.183,88 kr., ætlað til 20.000 kr., og útreiðslurnar til brúgv við Toftagjógv, ætlaðar til 65.000 kr., hava verið 78.708 kr. og 93 oyr. umframt lán av kavaragreiðum. Arbeiðslønin hevur verið 1,50 kr. pr. tíma. Nevndin skal mæla til at játta 18.000 kr.

Uppskot:

1. Loyvi verður givið til, at ein partur av peninginum játtaðum til Tórshavnar havn verður nýttur til bryggju í Vestari vág, tó ikki yvir $^2/_5$ av útreiðslunum og ískt ikki yvir 200.000 kr. og treytað av, at arbeiðið viðvíkjandi brimgarðinum verður gjørt so, sum roknað við, tá studningurin varð veittur í 1942.
2. Sum eykastudningur verður veitt at útbetala í 1945:

Til lendingina í Sandvík (Hvalbiar kommuna)	kr.	8.000,–
Til Nes kommunu til lendingina í Lamba og brúnna við Toftagjógv	»	18.000,–

Broytingaruppskot

frá Dam o. fl.:

Ístaðin fyri petti 2 í nevndarálitinum verður sett:
Sum eykastudningur verður veitt at útbetala í 1945:

Til lendingina í Sandvík (Hvalbiar kommuna)	Kr.	30.500,—
Til Nes kommunu til lendingina í Lamba og brúnna við Toftagjógv	»	18.000,—

Uppiskoytisálit.

Sóknarstýrið í Gøtu hevur í skrivi, d. 24. oktober 1944, vent sær til tingið við umsókn um eykastudning til havnaverkið í Norðagøtu. Løgtingsverkfrøðingurin hevur givið soljóðandi ummæli «. . . .»

Tingmenn hava eftir innbjóðing sóknarstýrisins verið í Gøtu fyri at síggja bryggjuna.

Nú hevur sóknarstýrið ta ætlan at fara undir framhaldið undir einum. Sum tað sæst av ummæli løgtingsverkfrøðingsins, so hevur kostnaðarætlanin hildið fyri tann partin, sum gjørdur er av bryggjuni, og at arbeiðið er trivaligt og sera væl úr hondum greitt. Løgtingsverkfrøðingurin hevur í sama skrivi gjørt kostnaðarætlan yvir tað ívæntandi arbeiði. Hetta verður mett til kr. 200.000. Eftir av 10-árajáttanini standa kr. 155.000, so í kemur at vænta kr. 45.000.

Sóknarstýrið søkir nú um at fáa ¾ av kr. 45.000 sum eykajáttan.

Nevndin hevur havt ta støðu, at hon ikki mælir tinginum til at taka endaliga støðu til eykastudning á 10 árajáttanini fyrr enn arbeiði er liðugt og sýnað, men hevur mælt tinginum til at úttala, at eykastudningur má játtast, meðan stødd hansara kann ikki avgerast fyrr enn arbeiðið er liðugt.

Samstundis verður mælt tinginum til, at geva loyvi til tørvandi lán og um neyðugt tingsins ábyrgd fyri tilikum láni.

Í hesum føri er nevndin samd um at úttala, at tað er hugaligt at fara undir eitt framhald.

Uppskot:

Tingið úttalar, at eykastudningur má verða veittur Gøtu kommunu til framhalds av havnagerð, men støða til støddina verður ikki at taka fyrr enn, at arbeiðið er liðugt og sýnað.

Løgtingið gevur kommununi loyvi til lántøku og um neyðugt ábyrgd fyri láni til hetta endamál.

Broytingaruppskot

frá Øregaard o. fl.:

Í staðin fyri nevndarinnar uppskot verður sett:

Úr amtsgrunninum verður veittur Gøtu kommunu eykastudningur ¾ av kr. 45.000,— til framhalds av havnagerðini í Norðagetu.

2. viðgerð 28. oktober, 3. viðgerð 22. og 24. november. Nevndaruppskotið pt. 1 samtykt 19—0, pt. 2 við 24—0. Broytingaruppskotið fall 6—0. Uppskotið í uppískoytisálitinum samtykt 24—0, meðan broytingaruppskotið fall 6—0.

---

2. Leingjan av bryggjuni í Vestmanna.

---

1. viðgerð 12. september. Framlagt 30. november.

Álit

(J. Poulsen við fyrivarni):

Í seinastu tingsetu hevði havnarstýrið í Vestmanna umsókn inni á tingi um studning til leingjan av bryggjuni. Kostnaðurin varð tá mettur til kr. 530.000,— (sí løgtingstíðindi 1943, bls. 142 f. f.).

Aftur í ár er umsókn inni um studning til sama endamál.

Havna- og veganevndin hevur eins og í fjør haft samráðing við umboðsmenn fyri havnar- og sóknarstýrið í Vestmanna.

Av samráðingunum framgekk, at tann tilætlaða víðkanin av bryggjuni hevði tvinnar fyrimunir, ikki minst tann at byrgja fyri súgvi, sum til vissar tíðir er stórur vansi fyri bryggjuna, sum hon er nú. Bryggjan er ein steyrabrúgv, so tað kann sigast, at mismunur er millum hesa og hinar bryggjurnar, sum gjørdar eru við ríkisstudningi.

Tá ásetningurin er tann, at bryggjur, sum gjørdar eru við ríkisstudningi, sjálvar skulu bera kostnaðin av eini víðkan, so hevur tingið ikki kunnað veitt studning til slikar eftir teim fyri studningsveitan til aðrar galdandi reglum.

Sóknarstýrið í Vestmanna hevur so statt minkað um sína ætlan og í staðin sett fram ynski um at fáa eina ábót fyrst og fremst á bryggjuna sum hon. Sum tað sæst niðan fyri, so vil ein ábút sum henda geva bryggjuni kyrt vatn og samstundis eina lítla økjan.

Løgtingsverkfrøðingurin hevur í skrivi ávikavist, dagsett 22. september 1944 og 30. oktober 1944, givið soljóðandi ummæli:

«Vedr. Udvidelse af Kaj i Vestmanhavn.

I Anledning af, at Havnebestyrelsen i Vestmanhavn atter i Aar har fremsendt Ansøgning om Tilskud til en Udvidelse af Kajen skal Ingeniørkontoret bemærke følgende under Henvisning til Skrivelse af 2. Oktober 1943.

Det i 1943 skitserede Anlæg bestaaende af en Kajforlængelse paa 10 + 40 m med en opfyldt Havneplads bagved, bør formentlig fastholdes i Hovedtrækkene. Dette Anlæg kan imidlertid meget vel opdeles i 2 Byggeparceller, saaledes at man først udførte Parcel I nærmest den nuvæ-

rende Kaj og siden fortsatte mod Nordvest, se vedlagte Skitse. Denne Plan medfører en ekstra Udgift paa ca. 10.000 Kr. til den midlertidige Indfatningsmur i Linien a—a, hvilket man imidlertid har god Grund til at tro kan indvindes, saafremt man udsætter Forlængelsen af Kajen nogle Aar eller saa længe, at det bliver muligt at bygge Jernbetonkister til Indfatning i Stedet for de dyrere Mure af Blokke eller Undervandsbeton.

Paa Skitsen er Byggeparcel I vist med en 10 + 15 m lang Facade. Udgiften til dette Anlæg kan efter Nutidens Priser (Timeløn 180 Øre) anslaas til ca. 150.000 Kr. Saafremt man indskrænker sig til at bygge 10 m + 10 m, vil Udgiften blive ca. 120.000 Kr.

Det skal paa Forhaand indrømmes, at Parcel I ikke giver Havnen nogen særlig stor Forøgelse af Kajplads, men den bringer dog den endelige Udvidelse et stort Skridt fremad, og den muliggør, naar Materialsituationen har bedret sig, en meget hurtig Udførelse af Resten af Anlægget. Hvis Parcel II bygges med Indfatning af Kister, kan Arbejdet let udføres paa en Sommer. Bygning af Parcel I bringer endvidere den øjeblikkelige Fordel, at den sydvestre Ende af den nuværende Kaj bliver beskyttet af en tæt Blok, som vil virke dæmpende paa den ofte generende Rendesø, der nu frit passerer gennem den aabne Kajkonstruktion.

Ingeniørkontoret skal anbefale, at der ydes Havnen et passende Tilskud til den foreslaaede Kajforlængelse paa 10 m + 15 m —, eller til en Forlængelse paa 10 m + 10 m — eventuelt saaledes, at Tilskudene fordeles over en passende Aarrække.

Hans Ejrnæs.»

«Vedr. Udvidelse af Kajen i Vestmanhavn.

I Fortsættelse af Skrivelse af 22. September 1944 skal jeg fremhæve, at Bygningen af Parcel 1 — altsaa et massivt Bygværk med Kajfacade 10 + 15 m vest for den nuværende Kaj — vil faa sin største Værdi som Beskyttelse mod Rendesø. Denne Vandforstyrrelse kommer nemlig ind langs Bugtens nordlige Side og smyger sig tæt om den Pynt, ud fra hvilken den nuværende Kaj er bygget. Rendesøen passerer, som Forholdene nu er, frit under Kajen og Havnepladsen, fordi hele Konstruktionen hviler paa Søjler og Bjælker af Profiljern.

Bygning af Parcel I er saaledes nærmest at betragte som en Forbedring af det bestaaende Anlæg, idet man dog naturligvis ved Projekteringen har for Øje, at der senere kan bygges videre saaledes at man opnaar mere Kajplads. Denne Videreførelse kan som tidligere nævnt udføres med Jernbetonkister, hvilken Byggemaade maaske inden længe vil vise sig at være ret billig, saaledes at Havnen selv kan paatage sig Udvidelsen.

Hans Ejrnæs.»

Skiparar í Sandavági hava 8. nov. sent nevndini soljóðandi skriv:

«Vit undirritaðu skiparar úr Sandavági, sum so mangan við skipi hava ligið við kajuna í Vestmannahavn, kunnu siga frá, at drátturin framvið hesa kaj, tíðint er so harður, at tað ikki er liggjandi, og at tað eftir okkara hugsan ikki er at ivast í, at hetta kann endrast um so er, at gjørt verður heilt fyri vestan á kajuni so rennusjógvurin stoytir inn um og ikki sum nú dregur millum jarnstólparnar, sum kajin er bygd á.»

Havna- og veganevndin má skila til, at tann givni ásetningur fyri víðkan av bryggjuni við ríkisstudningi má haldast, men tað skal sigast, at

tær inntøkur, sum tær ymisku havnirnar hava, ikki í hesi dýrtíð kunnu muna til rindan av tørvandi víðkanum, sum gerast skulu í hesi tíð.

Tað kundi tí verið hugsandi, at tingið vildi veitt slíkum havnum eina hjálp t. d. at tikið ein minni part av útreiðslunum, serliga har, sum ein leingjan eisini er ein ábót á teirri gomlu bryggjuni. Út frá hesum ásetningi mælir nevndin tinginum til at játta 60 pct. av kr. 150.000 í 3 ár.

So statt setur nevndin fram soljóðandi

uppskot:

Løgtingið játtar til umbøtan av bryggjuni í Vestmanna kr. 30.000 um árið í 3 ár.

Landsnevndin fær heimild til at geva loyvi til lántøku og um neyðugt at taka ábyrgd tingsins vegna fyri láni til hetta endamál.

2. viðgerð 30. november. 3. viðgerð 1. december. Samtykt 18—0.

Uppskot til avgerðar

frá Dam o. fl.:

Tingið samtykkir, at studningurin, ið tað veitir til almenn arbeiði sum havna- og vegaarbeiði, skal verða roknaður út frá eini grundløn á hædd við meðalgrundlønina hjá teimum organiseraðu arbeiðsmonnunum í tí privata lívinum her á landi plus eina dýrtíðarviðbót uppá 1 oyra fyri hvørt prístalsstigið.

Fall 7—0.

---

3. Umbøtan av bryggjuni í Miðvági.

---

1. viðgerð 12. september. Framlagt 12. oktober.

Áalit.

Í tingsetuni 1943 samtykti tingið at veita kr. 30.000 fyri árið 1944 til umbøtan av bryggjuni í Miðvági og hartil at heimila landsnevndina at geva loyvi til og taka ábyrgd fyri lán til nevnda endamál (sí løgtingstíðindi 1943, bls. 141 f. f.)

Løgtingsverkfrøðingurin hevur í skrivi d. 27. september 1944 latið inn soljóðandi tilmæli:

«Vedr. Midvaag Havn.

Den 8. Juni 1944 paabegyndtes Ombygningen af den til Dækmolen i Midvaag hørende Trækaj. Da en Del af Trædækningen var fjernet, viste det sig tydeligt, at en Udsættelse af Arbejdet ikke længere vilde have været forsvarlig; idet Tømmerkonstruktionen var begyndt at skilles ad. De svære Hjertepæle paa Kajens Yderside, som oprindelig har haft Hældning indefter, er nu kommet til at staa lodret.

Ombygningen udføres paa den Maade, at Trækonstruktionen erstattes med Bygværk af Beton. Langs Hjertepælene opføres en svær Mur af Undervandsbeton. Hjertepælene omgives af Beton paa 3 Sider, medens den yderste fjerde Side er fri. Den Del af Hjertepælene, som ligger over Sandbunden vil Tid efter anden fortæres, men dette er uden Betydning for Konstruktionens Styrke.

Betonmurens Tykkelse er fastsat til 150—160 cm fra Bunden og op til Lavvandsmærket, hvor den indsnævres til 90 cm. Denne Mur er ikke i sig selv stabil overfor Trykket af Fylden paa Bagsiden, hvorfor den bliver forankret med 1" Rundjernsankre til de i Molekronen indstøbte U-Jernsankre. Bag Betonmuren opfyldes med Sten, som overdækkes med et Betonlag.

Den omtalte Indfatningsmur fortsættes ud til Enden af Trækajen, hvor den føres vinkelret ind mod Molehovedet, hvorved man samtidig opnaar at faa dette understøbt og sikret mod fremtidig Underskæring.

Til Fremme af det omtalte Arbejde er der foreløbig givet en Bevilling paa 30.000 Kr. i rent Lagtingstilskud. Desuden er der for Aarene 1940/42 bevilget 5.100 Kr.; som Tillægsbevilling yderligere 5000 Kr. Til Raadighed har man saaledes foreløbig, idet de ældre Bevillinger ansættes til Nutidspriser:

1940/42:	10.100 × 2.8 =	ca. 28.000 Kr.
1944:	Lagtingstilskud	30.000 »
	Tilskud fra Kommunen	10.000 »
		ca. 68.000 Kr.

Medio September, da Arbejdet blev besigtiget, var der forbrugt ca. 45.000 Kr. Paa dette Tidspunkt var der støbt 20 m Indfatningsmur fra Bunden til Vandoverfladen og 6 m Mur i halv Højde. Der var placeret ca. 300 m³ Undervandsbeton og 30 m³ Sækkebeton, borttaget Halvdelen af den gamle Træbro samt opsamlet ca. 170 m³ Støbe- og Fyldematerialer. Der var endnu ikke foretaget Indfyldning af Sten.

Prisen for den udstøbte Undervandsbeton ligger omkring 120 Kr. pr. m³, hvilket er et særdeles godt Resultat.

De endnu resterende Arbejder vurderes som følger:

320 m³ Beton à 125,—	Kr. 40.000,—	
860 m³ Stenfyld à 30,—	» 25.800,—	
Forankringer	» 4.000,—	
Fortøjninger m. m.	» 2.000,—	
Forstærkning af Molehovede	» 10.200,—	
		Kr. 82.000,—
	Transporteres...	Kr. 82.000,—

Transporteret...		Kr. 82.000,–
Uforudset etc. ca. 10 pCt.	Kr. 8.000,–	
Af Hensyn til den fremrykkede Aarstid findes det rigtigst at tillægge yderligere	„ 5.000,–	
		„ 13.000,–
Forbruget til medio September		„ 45.000,–
Samlet Byggesum....		Kr. 140.000,–

Ombygning af Midvaag Havn var paatænkt allerede i 1939, og det er oplyst, at Sagen var saa langt fremme, at den var forelagt bevilgende Myndigheder i Danmark. Arbejdet var kalkuleret til 50.000 Kr., hvilket omsat til Nutidens Priser vil udgøre ca. 140.000 Kr.

Som tidligere nævnt er der foreløbig Bevillinger for ialt 68.000 Kr. saaledes at der til Arbejdets Fuldførelse kræves yderligere 140.000 — 68.000 = 72.000 Kr.

I Betragtning af Arbejdets Vigtighed tillader jeg mig høfligst at indstille, at der til Midvaag Havn bevilges

$$3/4 \times 72.000 = \text{Kr. } 54.000,-$$

Der er ved ovenstaaende Overslag ikke taget Hensyn til Værdien af det nedrevne Tømmer. En mindre Del af dette har fundet Anvendelse til Støbeflager o. lign. Løseligt anslaaet vil Værdien af det tiloversblevne Træ være omkring 4.000 Kr., hvilket Beløb naturligvis, hvis Træet afhændes, bør fradrages i Anlægsudgifterne.

Det er iøvrigt Ingeniørkontorets Hensigt at forestaa, at Træet fortrinsvis anvendes ved Bygning af Kajen i Kollefjord, jfr. særlig Indstilling om dette Anlæg.»

Havna- og veganevndin, sum hevur havt hetta mál til viðgerðar, má vera samd við løgtingsverkfrøðingin út frá teim í fjør givnu ásetningum, at játtaðar verða upp til 3/4 av kr. 72.000 ella kr. 54.000 við møguligum frádrátti av tí, ið inn kann fáast fyri tí í skrivi løgtingsverkfrøðingsins umrødda timbri.

Hendá játtan verður givin í tveimum fyri árini 1945 og 1946 við upp til kr. 27.000 fyri hvørt árið.

Hartil mælir nevndin til, at landsnevndin eins og í fjør fær heimild til at geva loyvi til lántøku og um neyðugt tingsins vegna taka ábyrgd fyri slíkum láni.

Uppskot:

1) Til umbøtan av bryggjuni í Miðvági verða játtaðar upp til kr. 27.000 um árið fyri árini 1945 og 1945.
2) Landsnevndin verður heimilað at geva loyvi til lántøku og um neyðugt tingsins vegna at taka ábyrgd fyri tørvandi láni til nevnda endamál.

2. viðgerð 17. oktober. 3. viðgerð 25. oktober. Samtykt 22–0.

4. Eftirlit við havnum.

1. viðgerð 12. september. Framlagt 12. oktober.

Álit.

Løgtingsverkfrøðingurin hevur í skrivi d. 11. september 1944 latið inn til tingið soljóðandi frágreiðslu:

Indberetning om Havne.

Til den under 2. September 1943 fremsendte Indberetning om

1. Klaksvig Havn.
2. Vestmanhavn Havn.
3. Kvivig Dækmole.
4. Midvaag Havn.
5. Sørvaag Havn.
6. Skopen Havn.
7. Hove Havn.
8. Trangisvaag Havn.
9. Vaag Havn.

er der intet særligt at tilføje om Havnenes almindelige Tilstand. Overalt, hvor der findes Træværk, er dette slidt eller beskadiget i større eller mindre Grad og tiltrænger Smøring med konserverende Stoffer. Saasnart det bliver muligt at skaffe Tømmer og Tjære m. v. bør Anlæggene gaas grundigt efter. Ved de mindre Anlæg saasom Skopen og Kvivig kan man uden Skade fjerne daarligt Friholdeværk.

Følgende særlige Oplysninger skal tilføjes:

1. **Klaksvig.** Kajen er repareret for Bombeskade.

Der er indgivet fornyet Ansøgning om Tilskud til en stor Havneudvidelse (Baadehavn og Skibshavn).

2. **Vestmanhavn.** Der er paany indgivet Ansøgning om Tilskud til en Havneudvidelse.

3. **Kvivig.** Uddybning af Baadebassinet er fuldført.

4. **Midvaag.** Arbejdet med Ombygning af Trækajen til en Betonkaj er paabegyndt. Der er i Øjeblikket støbt ca. 28 m af den nye Kajmur, og der er Haab om, at Arbejdet kan fuldføres i Aar, i hvert Fald for Kajmurens Vedkommende.

Anlægget vil blive indspiceret i indeværende Uge, hvorefter der vil blive givet en særlig Indberetning, særlig med Henblik paa Fortsættelsesbevilling.

9. **Vaag.** Der er indgivet Ansøgning om Tilskud til en Havneudvidelse.

Løgtingsverkfrøðingurin vísur annars til frágreiðslu sína til tingið í fjør. Tað framgongur einki, um tey í nevndu frágreiðslu ávístu brek eru endurbøtt.

Vísandi til uppskotið í tingmáli IX—4/1943 setir havna- og vega-nevndin fram soljóðandi

Uppskot:

Havnastýrinum verður álagt at bøta um tey av løgtingsverkfrøðinginum ávístu brek, so skjótt sum tað er gjørligt.

2. viðgerð 16. oktober. Samtykt 21—0.

---

5. Havnareglugerðin.

1. viðgerð 12. september. Framlagt 28. oktober.

Álit.

Í 1940 vórðu samtyktar reglugerðir um havna- og brúgvatakstir galdandi til 31/3 1945. Tí er nú til viðgerðar spurningurin um framhald við møguligum broytingum av hesum takstum fyri tíðarskeiðið 1945/50. Málið hevur verið sent til ummælis til viðkomandi kommunur og havnastýrir.

17. september 1940 varð góðkent havna- og brúgvatakstir fyri Klakksvíkar, Vestmanna, Tvøroyrar og Vágs havnir. Hareftir skulu før, sum koma inn í havnina við fáum undantøkum gjalda havnagjald 10 oyru pr. nettoton. Fyri vetralegu er gjaldið 12 kr. um árið fyri før undir 5 tons og 48 kr. árliga fyri før yvir 5 tons, og hvørt far, sum leggur til bryggju ella brúgv í havnini, skal við fáum undantøkum gjalda brúgvagjald fyri hvørt samdøgur 15 oyr. pr. nettoton. Viðvíkjandi vørum, sum verða fluttar inn ella fluttar út yvir havnina verður við fáum undantøkum goldið vørugjald, og fyri hesar havnir eru eftir takstunum av 1940 vørurnar býttar í 43 flokkar sum rinda ymist vørugjald.

Tvøroyrar havn fekk broytt reglurnar um gjald fyri vetralegu, soleiðis at hvørt skip yvir 10 tons skal betala 1 kr. pr. nettoton, og Klakksvíkar havn ynskti og fekk sett í gildi, at reglurnar, sum vóru galdandi í 1938, viðvíkjandi skipagjøldum (havnagjald, lossugjald, brúgvagjald og gjald fyri vetralegu) aftur komu at galda.

17. september 1940 varð eisini góðkent havna- og brúgvatakstir fyri Skopunar, Miðvágs, Sørvágs, Kvívíkar, Haldórsvíkar og Kollafjarðar havnir. Reglurnar um havnagjald, gjald fyri vetralegu og brúgvagjald vóru tær somu fyri tær stóru havnirnar. Viðvíkjandi vørugjaldinum vóru vørurnar býttar í 24 flokkar, og gjaldið ásett nakað annarleiðis enn fyri tær stóru havnirnar. Harnæst var í hesum takstum sett gjald 25 oyr. fyri hvørt ferðafólk yvir 4 ár, sum kemur til ella fer frá havnini, tá viðkomandi koma í land frá ella fara umborð í eitt far.

Tær havna- og brúgvatakstir, sum vóru galdandi fyri tær stóru havnirnar, vórðu broyttar 11/11 1941 soleiðis, at fyri ísfisk, sum fyrr hevði verið goldið vørugjald 15 oyr. pr. 100 kg. skuldi verið rindað 25 oyr., tað sama, sum goldið verður fyri ráfisk ella klippfisk, og fyri ís varð sett vørugjald 6 oyr. pr. 100 kg. Viðvíkjandi takstunum fyri tær smærru havnirnar varð 11/11 1941 góðkent broyting, hareftir vørugjaldið fyri ísfisk varð hækkað frá 15 til 25 oyr. pr. 100 kg. Fyri ráfisk varð vørugjaldið 25 oyr. pr. 100 kg. umframt 2 pct. av virðinum. Hetta varð broytt so, at gjaldið 25 oyr. pr. 100 kg. ráfisk datt burtur, so bert stóð eftir gjaldið 2 pct. av virðinum. Takstirnar, sum eru galdandi fyri Skopun o. fl. havnir eru viðkaðar til at galda fyri Skipanes bryggju 11/11 1941, fyri Sands havn 12/2 1943 og fyri Gøtu havn 16/7 1943.

Í 1942 samtykti løgtingið (sí løgtingstíðindi 1942, s. 134), at kommunurnar kunnu samtykkja og fáa góðkent, at vørugjaldið verður hækkað 20 pct. bráðfengis. Harnæst hava verið settar í gildi reglur um cyka-havnainntøkur 23/12 1942, broytt 21/12 1943, hareftir rindað verður upp til 10 oyr. pr. £, sum fiskur verður seldur fyri í Bretlandi. Hesar reglur hava einki við sjálvan spurningin um broytan av havnatakstunum at gera.

Vestmanna, Froðbiar og Vágs kommunur mæla til at endurnýggja tær galdandi reglurnar óbroyttar. Klakksvíkar kommuna hevur ikki svarað.

Sørvágs, Haldórsvíkar, Kollafjarðar, Sands og Nes kommunur hava eisini mælt til, at reglurnar fyri tær smærru havnirnar verða endurnýggjaðar óbroyttar. Frá Gøtu og Kvívíkar kommunum er einki svar komið. Skopunar kommuna hevur mælt til, at gjaldið fyri vetralegu fyri bátar undir 5 tons verður hækkað frá 12 til 15 kr. um árið og fyri bátar yvir 5 tons frá 48 til 60 kr. um árið. Nevndin má halda, at henda broyting er óneyðug.

Miðvágs kommuna ynskir, at opnir bátar við motori, sum liggja í vetralegu í havnini, skulu betala 10 kr. um árið. Eftir teimum galdandi reglunum hevur havnastýrið rætt og skyldu til at krevja 12 kr. fyri sovorðnar bátar, tá ið teir liggja í vetralegu, so her er eingin broyting neyðug. Miðvágs kommuna peikar á, at tað stendur, at vørugjaldið er 5 oyr. pr. 100 kg. av kjøti, og heldur, at hetta má vera ein prentvilla, og at tað skal vera 50 oyr., og nevndin skal mæla til, at prentvillan verður beinað, tá taksturin verður prentaður uppaftur. Harnæst mælir Miðvágs kommuna til, at gjaldið 2 pct. av virðinum av ráfiski verður strikað.

Ætlanin má vera, at í staðin fyri verður roknað 25 oyr. pr. 100 kg. Kommunan førir fram, at fremmandir bátar koma at avreiða fisk, tá skip liggja har at taka fisk, og menninir eru illa við at skula rinda tílíkt gjald, og teir vilja so kanska heldur fara til aðrar havnir, har teir ikki skulu betala tílíkt vørugjald. Nevndin kann ikki mæla til at fylgja uppskotinum.

Miðvágs kommuna mælir eisini til, at ferðafólkagjaldið 25 oyr. verður strikað. Teir føra fram, at tað er bert lítil inntøka, og at tað vekir illvilja; men nevndin kann ikki mæla til at fylgja uppskotinum frá Miðvágs kommunu, tí hinar kommunurnar hava einki tílíkt uppskot.

Keypmaður J. F. Kjølbro, Klakksvík, og A/S Thorshavns Mælkeforsyning søkja um, at tað verður ásett í havna- og brúgvatakstunum, at øll før, sum sambært løgtingsloyvi hava rætt til at sigla reglubundnar ferðir, skulu verða frítikin fyri øll havna- og brúgvagjøld. Nevndin kann ikki mæla til at játta umsóknina, men vísir til, at umsøkjarnir kunnu fáa setnju við havnastýrini um hóskandi gjald, sambært havna- og brúgvatakstunum.

Sum málið liggur fyri, skal nevndin mæla til, at takstirnar verða endurnýggjaðar óbroyttar, burtursæð frá teimum smáu omanfyri nevndu broytingum.

Uppskot:

1. Tær havna- og brúgvatakstir, sum eru galdandi fyri Klakksvíkar, Vestmanna, Tvøroyrar og Vágs havnir verða endurnýggjaðar óbroyttar fyri tíðarskeiðið 1/4 1945 til 31/3 1950.

2. Tær havna- og brúgvatakstir, sum eru galdandi fyri Skopunar, Miðvágs, Sørvágs, Kvivíkar, Haldórsvíkar, Kollafjarðar, Sands, Skipanesar og Gøtu havnir, verða endurnýggjaðar óbroyttar fyri tíðarskeiðið 1/4 1945 til 31/3 1950.

2. viðgerð 1. november. 3 viðgerð 22. november. Samtykt 21—0.

---

6. Kavaraskeið.

---

1. viðgerð 5. september. Framlagt 18. oktober.

Álit.

Løgtingsverkfrøðingurin hevur í brævi av 13. juni í ár vent sær til landsnevndina og sagt frá, at hann heldur, at tað eru ov fáir kavarar í Føroyum til tey nógvu havnaverk, sum nú eru í gerð. Hann sigur eisini frá, at tað er ov lítið av kavaragreiðum her. Verkfrøðingurin heldur, at tað átti at verið sett á stovn eitt kavaraskeið í Føroyum, og hann leggur aftrat, at kavari Krabenhøft er førur fyri at taka sær uppá at vera lærari á einum sovornum skeiði.

Í tingsetuni 1942 var mál fyri á tingi um at broyta kavaralógina. Har var av nevndini hildið fram: «Udvalget er ikke sindet til at foreslaa Ændringer i de nuværende Bestemmelser, men mener, at man maa kunne klare sig med den Regel om, at Amtet paa Ministeriets Vegne hvor det skønnes nødvendigt, kan give Dispensation. Man gaar ud fra, som tidligere sket, at Amtmanden indhenter om fornødent Erklæring i de enkelte Sager fra Landsnevndin.»

Landsnevndin hevur hin 21. juni viðgjørt málið og biðið um nærri uppskot og kostnaðarætlan fyri eitt kavaraskeið. Tað fyriliggur einki nærri uppskot frá verkfrøðinginum, men eitt yvirlit yvir kavaralønir. Hetta yvirlit sýnir, at kavarar hava um 1400 krónur um mánaðin við 8 tima arbeiði dagliga. Tað kann eftir hesum haldast, at eitt kavaraskeið uppá 6 vikur vil kosta um 3500 krónur.

Fíggjarnevndin hevur nú viðgjørt málið. Tær lógir og kunngerðir, sum eru galdandi eru hesar: Lov Nr. 97 af 7. April 1936 om Dykkernæring og Betryggelse af Dykkerarbejde, Kunngerð av 12. september 1936 nr. 217 um læknarannsókn av kavarum, kunngerð nr. 2 11/1 1937 viðvikjandi kavararoyndini við «Søværnets» kavaraskúla, og kunngerð nr. 3 av 11. januar um kavaraamboð.

Bæði lógin og kunngerðirnar seta strangar reglur fyri tí álvarsama arbeiði, sum kavavirksemi førir við sær, og nevndin heldur tað ikki vera rætt at broyta hesar reglur, serstakliga tá tað er upplýst, at tað eru minnst 8 kavarar í Føroyum, sum hava prógv. Um tað er brúk fyri fleiri kann tað eftir 1. reglu í lógini av ministaranum fyri handil, ídnað og sjóvinnu gerast undantak frá lógini. Eisini má tað haldast fram, at tað í Føroyum er lítið til av kavaraamboðum, serstakliga finnast ikki amboð fyri kavan á djúpum vatni.

Nevndin má tí halda, at betri er, um neyðugt verður, at tað verður gjørt undantak frá lógini og skal tí seta uppskot fram, í so máta:

Uppskot:

Tað kann eftir umsókn verða givið kavaraloyvi eftir § 1 í Lov Nr. 97 af 7. April 1936 om Dykkernæring og Betryggelse af Dykkerarbejde, tá ið tað er tørvur á, og tá ið umsøkjarin váttar, at hann í 1 mánað hevur arbeitt sum kavari hjá manni við kavaraprógvi, tá ið kavaraamboðini eru sýnað eftir kunngerð nr. 3 av 11. januar 1937, tá ið hann hevur læknaváttan eftir kunngerð nr. 217 av 12. september 1936, og tá ið hansara kavaraloyvi bert gevur honum rættindi til at kava á einum dýpi av 8 m.

2. viðgerð 20. oktober. 3. viðgerð 25. oktober. Samtykt 18–0.

X. Ymisk lógmál.

1. Lóg um rúsdrekka.

1. viðgerð 20. september. Framlagt 25. november.

Alit.

Løgtingið samtykti í fjør fyribilsbroytingar til lógina um rúsdrekka (smbr. løgtingstíðindi 1943, bls. 160 f. f.) við lógarkunngerð nr. 33 frá 20. december 1943 «om Ændringer i Lov for Færøerne Nr. 115 af 4. April 1928 om Forbud mod at drive Erhverv med Berusende Drikke m.m. jfr. Lov Nr. 98 af 24. Marts 1934.»

Samsvarandi § 3 í nevndu lógarkunngerð verður málið lagt fyri tingið aftur í ár.

Løgtingsskrivstovan hevur tess vegna heimtað inn ummæli frá amti, fúta, gjaldstovu og sýslumonnum.

Í hesum ummæli verður skilað til, at tað ikki er lætt at meta, hvussu tann í fjør samtykta rationeringarskipan hevur roynst vegna tess, at rúsdrekkaútfluttningurin til Føroya er nógv skamtaður, og er bert ein viðfáningur av teim nøgdum, ið bileggjast kunnu, sambart rationeringarskipanina.

Í ummæli hevur verið hildið fram, at tær fyrisettu reglur hava verið atfinningarleysar sum eftiransingarskipan.

Serliga Føroya gjaldstova og Suðuroya sýslumaður vísa tó á, at skipanin sum innlendisbýtisskipan ikki kann sigast at roynast fullt eftir ætlan. Hertil verður lagt afturat, at vandi liggur í skipanini fyri, at fólk kunnu koma sær uttanum hana.

Tað er upplýst í málinum, at skipanin eisini hevur onur lýti, sum mæla frá at endurnýggja hana.

Eftir manntalinum frá 1935 hava hesi rætt til eftir galdandi skipan at bileggja sær rúsdrekka:

2.227 ógift konufólk og 2.760 ógift mannfólk.

4.057 gift, 783 einkjur og 501 einkjumenn, tilsamans 10.323, meðan

bert 1.200 kassar av rúsdrekka kunnu flytast inn í einum ári ella tilsamans 10.800 litur.

Fútin hevur mælt til, at rúsdrekkaavgjaldið verður hækkað, tí tað lítið og einki er økt, síðan kríggið kom, og at inntøkan so statt vegna tann minnkaða innfluttningin er nógv fallin.

Hesin spurningur er beindur til fíggjarnevndina til viðgerðar.

Nevndin, sum hevur haft henda spurning til umhugsunar, er samd um, at afstøður ikki eru í løtuni til at fara undir eina eftirkanning av hesi lóggávu. Hartil er nevndin samd um, at tað við kunngerð nr. 33 frá 20. december 1943 fyrisetta aldursmark skal standa við.

Annars hevur nevndin býtt seg sundur í 3 minnilutar.

Ein minnilutur (Johs. Slettenæs og P. Petersen) má vera samsíntur við teim, sum halda fram, at týdningurin av eini tílíkari rationeringarskipan liggur í teirri innlendis býtanini.

Tá so er, at skipanin ikki hevur roynst í so máta eftir ætlan, men tvørturímóti, so sum tað ætlast, hava elvt til, at tær verða uttanumgingnar, má tað vera ein ivaspurningur, um skipanin eigur at uppihaldast. Minnilutin (Johs. Slettenæs og P. Petersen) mæla tí til at seta hesar reglur úr gildi.

Ein minnilutur (J. Fr. Øregaard) er samdur við minnilutan (A. Samuelsen og Johan Poulsen), men skilar til, at tær eftir hesi skipan ásettu nøgdir 9 litrar í fjórðingsárið verða at broyta til 9 litrar fyri hálvárið.

Ein minnilutur (A. Samuelsen og Johan Poulsen) mælir til, at kunngerðin nr. 33 av 20. december 1943 verður endurnýggjað fyri árið 1945.

Uppskot.

Frá minnilutanum (Johs. Slettenæs og P. Petersen):

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE

om Ændringer i Lov for Færøerne Nr. 115 af 4. April 1928 om Forbud mod at drive Erhverv med berusende Drikke m. m. jfr. Lov Nr. 98 af 27. Marts 1934.

I Lov Nr. 115 af 4. April 1928 om Forbud mod at drive Erhverv med berusende Drikke m. m. jfr. Lov Nr. 98 af 27. Marts 1934 foretages følgende Ændring:

§ 1.

I Lovens § 2, 3. og 4. Stykke, ændres «18 Aar» til «20 Aar».

§ 2.

Nærværende Bestemmelse træder i Kraft den 1. Januar 1945 og bliver at forelægge Lagtinget til Gennemsyn i Samlingen 1945.

Samtidig ophæves Kundgørelse Nr. 33 af 20. December 1943.

BRAÐFENGIS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR

um broyting í lóg fyri Føroyar nr. 115 frá 4. apríl 1928 um bann móti at røkja atvinnu við rúsdrekka v. m. sambr. lóg nr. 98 frá 27. mars 1934.

Til lóg nr. 115 frá 4. apríl 1928 um bann móti at røkja atvinnu við rúsdrekka v. m. sambr. lóg nr. 98 frá 27. mars 1934 verður gjørd henda broyting:

§ 1.

Í lógarinnar § 2, 3. og 4. petti, verður broytt «18 ár» til «20 ár».

§ 2.

Hesar fyriskipanir koma í gildi tann 1. januar 1945 og verða at leggja fyri tingið til kanningar í tingsetuni 1945.

Samstundis fer kunngerð nr. 33 frá 20. december 1943 úr gildi.

Frá minnilutanum (J. Fr. Øregaard):

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE

om Ændring i Kundgørelse Nr. 33 af 20. December 1943 om Forbud mod at drive Erhverv med berusende Drikke m. m.

§ 1.

I Kundgørelse Nr. 33 af 20. December 1943, § 2, ændres Ordene «hvert Kvartal» til «hvert Halvaar».

§ 2.

I Kundgørelsens § 3 ændres «1944» til «1945».

§ 1.

Í kunngerð nr. 33, 20. december 1943, § 2, verða broytt orðini «hvert Kvartal» til «hvert Halvaar».

§ 2.

Í kunngerðarinnar § 3 verður «1944» broytt til «1945».

Frá minnilutanum (Johan Poulsen og A. Samuelsen):

Málið um eftirkannan av rúsdrekkalógini verður goymt til næstu vanligu tingsetu.

2. viðgerð 28. november. 3. viðgerð 30. november. Uppskot Øregaars fall 4—0 (Dam, R. Joensen, J. Chr. Olsen og Øregaard). Uppskotið hjá Poul Petersen og J. Slettenæs samtykt 19—0.

2. Inntøkumark fyri sjúkrakassalimir.

1. viðgerð 13. september. Framlagt 17. oktober.

Álit.

Málið var til viðgerðar á tingi í fjør (sí løgtingstíðindi 1943, s. 163) og samsvarandi løgtingssamtyktina kom í gildi kunngerð nr. 9, 4. januar 1944, galdandi fyri tíðarskeiðið 1. april 1944 til 31. mars 1945.

Løgtingsskrivstovan hevur í brævi til amtmannin, 14. juni í ár, mælt til, at markið verður hitt sama: 5.700,— kr. fyri tíðarskeiðið 1. april 1945 til 31. mars 1946, av tí at prístalið enn er yvir 250, og tað er óvist, hvussu prísviðurskiftini verða til 1. april 1945. Eftirlitmenninir fyri sjúkrakassar, centralfelagið av sjúkrakøssum og amtmaðurin geva uppskotinum viðmæli.

Undirskrivaða nevnd, sum hevur havt málið til viðgerðar, hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (A. Sørensen, J. Slettenæs, O. F. Joensen og Johan Fr. Poulsen) skulu mæla til, at nevnda kunngerð verður endurnýggjað fyri omanfyri nevnda tíðarskeið, og setur fram uppskot samsvarandi.

Minnilutin (J. H. Danbjørg) loyvir sær at flyta fram fylgjandi álit og uppskot.

Í tingsetuni 1943 helt Føroya javnaðarflokkur fram, at inntøkumarkið átti at dýrtíðarviðgerast, t. v. s. at tað áðrenn 1. september 1939 galdandi mark skuldi faldast við prístalinum, dividerað við 100.

At undirritaði minniluti gekk við til at frávikja flokksins upprunaligu støðu, kom av tí, at tað frá aðrari síðu varð framført tann áskoðan, at sjúkrakassastýrini og tær nevndir, ið settar eru at ansa eftir, at reglurnar um inntøkumark verða fylgdar, nú í hesum sera óvanligu tíðum kundu gera avvik frá reglunum.

Tá ið nú málið aftur er á tingi, og tað undir tí viðgerð, sum málið í ár hevur fingið, er vorðið framført, at tey umtalaðu avvik hava verið ógvuligaójøvn á teim ymisku plássum, og at tað á einstøkum plássum als eingi avvik hava verið gjørd, má undirritaði minniluti miða seg eftir flokksins støðu í 1943 og mæla til, at inntøkumarkið verður munaliga hækkað.

Samsvarandi frammanfyri ávísta loyvir minnilutin sær at seta uppskot fram.

Uppskot:

frá *meirilutanum:*

BEKENDTGØRELSE FOR FÆRØERNE

til

Vejledning om de Indtægts- og Formueforhold samt øvrige Omstændigheder, der som Regel betinger en Persons Optagelse eller Forbliven i en anerkendt Sygekasse som nydende Medlem med Ret til gennem denne at nyde Tilskud fra Staten.

For Tiden fra 1. April 1945 til 31. Marts 1946 skal være gældende

de i Bekendtgørelse Nr. 10 af 14. Marts 1941 med Ændringer efter Bekendtgørelse Nr. 9 af 4. Januar 1944 fastsatte Regler.

KUNNGERÐ FYRI FØROYAR

til

vegleiðing um tey inntøku- og formúguviðurskiftir eins og aðrar umstøður, sum vanliga eru treytir fyri, at maður kann verða upptikin og vera njótandi limur í góðkendum sjúkrakassa við rætti til gjøgnum hann at fáa studning frá ríkiskassanum.

Fyri tíðarskeiðið frá 1. apríl 1945 til 31. mars 1946 skulu verða galdandi tær í kunngerð nr. 10, 14. mars 1941, við broytingum eftir kunngerð nr. 9, 4. januar 1944, ásettu reglur.

Frá *minnilutanum:*

BEKENDTGØRELSE FOR FÆRØERNE

til

Vejledning om de Indtægts- og Formueforhold samt øvrige Omstændigheder, der som Regel betinger en Persons Optagelse eller Forbliven i en anerkendt Sygekasse som nydende Medlem med Ret til gennem denne at nyde Tilskud fra Staten.

For Tiden fra 1. April 1945 til 31. Marts 1946 skal være gældende de i Bekendtgørelse Nr. 10 af 14. Marts 1941 fastsatte Regler, dog med følgende Ændringer:

1.

Bekendtgørelsens Stk. 2 affattes saaledes:

Som ubemidlede i Anordningens Forstand vil saadanne Personer være at anse, hvis aarlige Indtægt ikke overskrider 8.500,00 Kr.

2.

I Bekendtgørelsens Stk. 4 ændres «250 Kr.» til «400 Kr.».

KUNNGERÐ FYRI FØROYAR

til

vegleiðing um tey inntøku- og formúguviðurskiftir eins og aðrar umstøður, sum vanliga eru treytir fyri, at maður kann verða upptikin og vera njótandi limur í góðkendum sjúkrakassa við rætti til gjøgnum hann at fáa studning frá ríkiskassanum.

Fyri tíðarskeiðið frá 1. apríl 1945 til 31. mars 1946 skulu verða galdandi tær í kunngerð nr. 10, 14. mars 1941, ásettu reglur, tó við hesum broytingum:

1.

Stk. 2 i kunngerðini verður orðað soleiðis:

Ómúgvandi, sum meint í fyriskipanini, verður hann at rokna, hvørs inntøka ikki fer upp um 8.500,00 kr.

2.

Í stk. 4 i kunngerðini verður «250 kr.» broytt til «400 kr.».

2. viðgerð 20. oktober. 3. viðgerð 25. oktober. Minnilutauppskotið fall 6—0. Meirilutauppskotið samtykt 20—0.

---

3. Ellisrentulógin.

1. viðgerð 13. september. Framlagt 22. november.

Álit.

Umsókn var í fjør á tingi um hækkan av teim inntøkumarkum, sum eru sett í lóg um ellisrentu. Løgtingið samtykti (sí løgtingstíðindi 1943, s. 205) at beina málið í landsnevndina, og landsnevndin varð biðin um át kanna málið gjøllari, harundir at fáa upplýst kostnaðin eftir samráð við amtmannin. Eftir at hava givið málið fullfíggjaða viðgerð, var landsnevndin heimilað at taka avgerð.

Málið var til viðgerðar í landsnevndini í januar mánaða, og varð har samtykt at fáa upplýst, hvat ið hækkan av inntøkumarkinum við 150 pct. vil týða av meiriútreiðslum. Í april var framlagt bræv frá amtmanninum, dagsett 11. april 1944, um at hækkan av frádráttinum til 500 kr. fyri hjún og 250 kr. fyri einstøk vil týða um 70,000 kr. meiriútreiðslur í eitt ár.

Markið er eftir galdandi lóg fyri hjún 200 kr. og fyri einstøk 100 kr. Tá ið inntøkurnar hjá viðkomandi koma yvir hetta mark, verða 25 pct. av teim fylgjandi 200 kr. at draga frá ellisrentuni, av teim næstu 300 kr. verða at frádraga 50 pct. og fylgjandi inntøka verður at frádraga fullt.

Málið var til viðgerðar í landsnevndini í april, mai og juni. Á fundi í juni setti ein limur fram uppskot um at dýrtíðarviðgera frádráttin og ellisrentupeningin soleiðis, at frádrátturin og ellisrentan verða faldað við pristalinum og dividerað við hundrað. Hetta skuldi verið gjørt, samstundis sum eyka-inntøkuuppskot, sum landsnevndin hevði heimilað at seta í gildi, verður gjørt galdandi. Ein annar limur setti uppskot um, at málið sum tað nú fyrilá, varð lagt fyri tingið, fyri at tingið eisini kann umhugsa peningaspurningin.

Ein annar limur viðmerkti, at eftir núverandi praksis verða naturaliir, sum ellisrentunjótarar hava sum inntøku, sum oftast roknað í virði

samsvarandi prísinum undan krígnum, men um frádrátturin og ellisrentan verða hækkað eftir prístalinum, má verða roknað við, at spurningurin um virðismetanina av naturalium eftir núgaldandi prísum eisini má koma fram, og hetta má eisini verða umhugsað. Einki uppskot varð samtykt, og soleiðis liggur málið nú fyri tingi.

Síðani 1. apríl 1940 er veitt dýrtíðarviðbót hækkandi gjøgnum árini. Eftir kunngerð nr. 11, 21. apríl 1943, samanber kunngerð nr. 23, 29. apríl 1944, er dýrtíðarviðbótin fyri núverandi fíggjarár ein viðbót uppá 100 pct. av rentuni, tó í minsta lagi 140 kr. fyri einstøk og 240 kr. fyri hjún, tá ið bæði fáa ellisrentu. Útreiðslan til ellisrentu hevur verið gott og væl 300.000 kr. árliga, harav rindar ríkiskassin 9/10 og kommunurnar 1/10.

Útreiðslurnar til dýrtíðarviðbót, sum amtsgrunnurin ber, eru nú um 300.000 kr. árliga undir núverandi prísviðurskiftum.

Nevndin, sum hevur málið til viðgerðar, skal vísa á, at ellisrentunjótarar í fíggjarárinum 1944 hava fingið fyrst vanliga ellisrentu og síðani 100 pct. hækkan, tað vil siga, at hækkanin liggur 50 pct. lægri enn tað prístalið vísir. Síðani hava ellisrentufólkini fingið nakað meira við lógarreglunum um, at minnsta dýrtíðarviðbótin skal vera 140 kr. fyri einstøk og 240 kr. fyri hjún, og við tað, at fleiri av teimum frá landsnevndini hava fingið játtað socialhjálp.

Nevndin heldur tað er beint at javna ta útgjaldan, ið er gjørd í ár soleiðis, at tað saman við ellisrentuni fyri fyrsta fjórðingsár 1945 verður útgoldin ein eykapeninger fyri 1944 svarandi til eitt fjórðingsárs útgjaldan, og setur uppskot fram til tingsamtyktar um hetta. Henda útgjaldan verður so at bóka til skuldar í amtsgrunnsins rakstrarroknskapi fyri 1944 og ætlast at verða 149.000 krónur.

Um spurningin, hvussu tað eigur at verða skipað fyri komandi tíðir, hevur nevndin býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (nevndin undantikið Danbjørg) skal úttala, at spurningurin um umskipan av lóggávuni viðvíkjandi socialari forsorg má verða viðgjørdur saman við spurninginum um setan á stovn av einari fullfíggjaðari fólkatrygging, men hetta kann ikki setast í verk í hesi tingsetuni. At gera eina fyribils broyting fyri árið 1945 heldur nevndin ikki er beint nú, men heldur at tað eins og uppskotið er í ár, til næstu tingsetu verður at umhugsa, hvussu løgtingið kann bøta uppá ellisrentuna við einari eykajáttan. Serliga skal her verða vist til, at løgtingið í 1945 kemur saman á Ólavsøku, so avgerðin næsta ár kann væntast at verða gjørd, so hon virkar fyri seinra part av árinum, tað vil siga fyri ta tíð, tá tað er mest trupult hjá gomlum fólki at klára seg, tá veturin og kuldin kemur.

Meirilutin kann væl ásanna, at tann skipan, ið nú er er í gildi ikki er fullt tíðarhóskandi, tí sjálvt um tað kann ganga hjá nøkrum av ellisrentufólkunum at klára seg við tí studningi, ið nú verður latin, so er tað meira enn trupult hjá teimum, ið ongan góðan hava, og einans hava rentuna at líta á. Meirilutin heldur tí, at tað er beint, at reglurnar verða umskipaðar so skjótt tað er gjørligt.

Meirilutin setur tí uppskot um, at spurningurin um at játta eykadýrtíðarviðbót fyri árið 1945 verður tikin til viðgerðar í tí vanligu tingsetuni 1945.

Minnilutin (J. H. Danbjørg) heldur fram:

Málið viðvíkjandi broytan av reglum um ellisrentu var í fjør til viðgerðar á tingi (sjá løgtingstíðindi 1943 bls. 205) og helt undirritaði minniluti tá fram, at inntøkumark fyri at fáa ellisrentu sambart lóg nr. 104 frá 31. mars 1933, broytt við lóg nr. 92, 31. mars 1938, skuldi verða

hækkað sambart prístalið og at øllum ellisrentunjótarum verður givin ein dýrtíðarviðbót, ið svarar til ellisrentuna faldaða við prístalinum dividerað við 100, tó soleiðis, at dyrtíðarviðbótin ongantíð verður minni enn eftir núgaldandi lóg.

Javnaðarflokkurin hevur, sum monnum kunnugt, havt á tingi mál um fólkatrygging og hevur í ár lagt inn á ting mál um umskipan av allari teirri socialu forsorgini, samstundis sum flokkurin visir á inntøkuleiðir, sum kunna stimbra tingið soleiðis peningaliga, at vit her á landi kunna verða førir fyri at skipa okkara socialu lógir og viðurskifti í eitt lag, sum kann verða samsvarandi viðurskiftunum í øðrum mentaðum samfeløgum.

Javnaðarflokkurin er av tí áskoðan, at ikki er komið og heldur ikki kemst á mál viðvikjandi bøtan av korunum hjá okkara gomlu fólkum, fyrrenn tey øll fáa sama rætt til pensión sum tey í almennari tænastu, ið nú hava slíkan rætt.

Minnilutin roknar við, at javnaðarflokkurin nakað skjótt kann framseta álit og uppskot um broytan av øllum teimum socialu lógunum, ella ið hvussu er teimum, ið mest tørva skundisliga broytan, eins og minnilutin roknar við at kunna vísa á slíkar inntøkuleiðir, ið vilja stimbra tingið so mikið, at tað verður fört fyri at rinda tær meiriútreiðslur, ið tann tørvandi broytanin vil føra við sær. Flokkurin hevur fyrr mælt til at hækka sjálva ellisrentuna soleiðis, at hjún, tá bæði eru 60 ár, fáa 600 kr. árliga og einstøk, ið fyllt hava 60 ár fáa 300 kr. árliga umframt dýrtíðarviðbót og hækkan av inntøkumarkinum, soleiðis sum umtalað fremri í hesum áliti. Hetta er enn okkara principiella støða; men minnilutin er greiður um, at tað ikki er gjørligt íár at fáa støddina av sjálvari rentuni hækkaða, og vil tí mæla til at broyta reglurnar um inntøkumarkið og dýrtíðarviðbótina. Minnilutin tekur fyrivarni um seinri at seta uppskot fram um hækkan av sjálvari ellisrentuni.

Meirútreiðslurnar verða at rinda úr amtsgrunninum.

Samsvarandi frammanfyri ávísta setur minnilutin fram uppskot.

Uppskot.

I. Frá nevndini:
Løgtingið samtykkir at tað úr amtsgrunnsins rakstrarroknskapi 1944 verður játtað ellis- og avlamisrentunjótarum, eins og fólki undir heimaansan, ein eyka-dýrtíðarviðbót svarandi til útgjaldanina fyri eitt fjórðingsár. Peningurin verður útgoldin í januar 1945 saman við ellisrentuni fyri fyrsta fjórðingsár 1945.

II. Frá meirilutanum (nevndin undantikið Danbjørg):
Spurningurin um eina eyka-dýrtíðarviðbót fyri árið 1945 til ellisrentunjótarar o. a. verður tikin til viðgerðar í vanligu tingsetuni 1945.

III. Frá minnilutanum (J. H. Danbjørg):

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Ændring i Lov for Færøerne Nr. 104 af 31. Marts 1933 om Aldersrente, jfr. Lov af 31. Marts 1938.

§ 1.

§ 7, 1. Stk. ændres til: Retten til at oppebære Aldersrente med dennes fulde Beløb efter § 5 er betinget af, at vedkommendes aarlige

Indtægter ikke repræsenterer en Værdi, der overstiger 100 Kr. for enlige og 200 Kr. for Ægtefæller, hvilke Beløb forhøjes ved at multipliceres med Pristallet for paagældende Kvartal afrundet nedad, saa det er deleligt med Ti og divideres med 100.

§ 2.

Der tillægges Aldersrentenydere et Dyrtidstillæg, der udregnes med at multiplicere Rentebeløbet for vedkommende Kvartal med Pristallet afrundet nedad, saa det er deleligt med Ti og dividere det derved udkomne Beløb med 100.

§ 3.

Merudgifterne, som følger af disse Bestemmelser bæres af Amtsfonden.

§ 4.

Disse Bestemmelser træder i Kraft 1. Januar 1945 og gælder for 1945.

Bráðfengis fyriskipanir fyri Føroyar um broytan í lóg fyri Føroyar nr. 104 frá 31. mars 1933 um ellistøntu, sbr. lóg frá 31. mars 1938.

§ 1.

§ 7, fyrsta petti, verður broytt til: Heimildin til at fáa ellisrentu við hennara fullu peningahædd eftir § 5 er treytað av, at tær árligu inntøkurnar hjá viðkomandi ikki hava eitt virði, ið er meira enn 100 kr. fyri einstøk og 200 kr. fyri hjún, og verða hesar peningahæddir at hækka við at falda tær við pristalinum fyri henda ársfjórðing javnað niðureftir, soleiðis at tað er býtandi við tíggju, og dividerað við 100.

§ 2.

Ellisrentunjótarar fáa eina dýrtíðarviðbót, ið verður roknað við at falda rentupeningin fyri viðkomandi ársfjórðing við pristalinum — javnað niðureftir, soleiðis at tað er býtandi við tíggju — og dividera ta peningahædd, ið kemur fram av hesum, við 100.

§ 3.

Meirútreiðslurnar, sum koma av hesum fyriskipanum, verða at bera av amtsgrunninum.

§ 4.

Hesar fyriskipanir koma í gildi 1. januar 1945 og galda fyri 1945.

Broytingaruppskot

frá J. Slettenæs o. fl.:

Í nevndaruppskotinum 1 verða orðini «úr amtsgrunnsins rakstrarroknskapi 1944 verður» broytt til «úr amtsgrunninum verður».

Broytingaruppskot

frá J. H. Danbjørg:

Minnilutin (Danbjørg) hevur sett fram uppskot til broytingar í lógini um ellisrentu.

Avlamisrentan eigur at verða hækkað og dýrtíðarviðgjørd á sama hátt sum ellisrentan.

Uppskot:

Í staðin fyri uppskot minnilutans verður sett:

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE

om

Ændring i Lov for Færøerne Nr. 104 af 31. Marts 1933 om Aldersrente, jfr. Lov af 31. Marts 1938, og i Lov Nr. 120 af 15. Marts 1939 om Invalideforsikring.

§ 1.

§ 7, første Stykke i Lov om Aldersrente og § 6, første Stykke i Lov om Invalideforsikring ændres til:

Retten til at oppebære Aldersrente eller Invaliderente med dennes fulde Beløb er betinget af, at vedkommendes aarlige Indtægter ikke repræsenterer en Værdi, der overstiger 100 Kr. for enlige og 200 Kr. for Ægtefæller, hvilke Beløb forhøjes ved at multipliceres med Pristallet for paagældende Kvartal afrundet nedad, saa det er deleligt med Ti, og divideres med 100.

§ 2.

Der tillægges Aldersrentenydere og Invaliderentenydere et Dyrtidstillæg, der udregnes ved at multiplicere Rentebeløbet for vedkommende Kvartal med Pristallet afrundet nedad, saa det er deleligt med Ti, og dividere det derved udkomne Beløb med 100.

§ 3.

Merudgifterne, som følger af disse Bestemmelser, bæres af Amtsfonden.

§ 4.

Disse Bestemmelser træder i Kraft 1. Jan. 1945 og gælder for 1945.

§ 1.

§ 7, fyrsta stk., í lóg um ellisrentu og § 6, fyrsta stk., í lóg um avlamistryggjan verða broyttar til:

Rætturin til at fáa ellisrentu ella avlamisrentu við fullari peningahædd er treytaður av, at árliga inntøkan, sum avvarandi hevur, ikki svarar til eitt virði, sum er yvir 100 kr. fyri einstøk og 200 kr. fyri hjún, tó so, at hesar peningahæddir verða faldaðar við pristalinum fyri viðkomandi fjórðingsár, avrundað niðureftir, so tað kann verða deilt við tíggju, og so deildar við 100.

§ 2.

Ellisrentunjótarar og avlamisrentunjótarar fáa dýrtíðarviðbót, sum verður útroknað við at falda rentupeningin fyri viðkomandi fjórðingsár

við prístalinum, avrundaðum niðureftir, so tað kann verða deilt við 10, og so deila ta harvið funnu peningahædd við 100.

§ 3.

Meirútreiðslurnar, sum koma av hesum fyriskipanum, verða goldnar úr amtsgrunninum.

§ 4.

Hesar fyriskipanir koma í gildi 1. januar 1945 og eru galdandi fyri 1945.

2. viðgerð 25. november, 3. viðgerð 30. november. Broytingaruppskotið frá J. Slettenæs o. fl. samtykt 17—0. Nevndaruppskotið so broytt samtykt 24—0. Broytingaruppskot Danbjørgs fall 7—0. Meirilutauppskotið samtykt 18—0.

---

4. Fólkatrygging.

1. viðgerð 13. september. Framlagt 25. november. Álit, sí skjal nr. 14.

2. viðgerð 28. november, 3. viðgerð 30. november. Nevndaruppskotið samtykt 22—0, Minnilutauppskot I samtykt 13—0. Pt. II 1—3 fall við 8—0. II— 4 við 11—0, III við 7—0, IV við 9—0, V við 12—0. VI við 9—0.

---

5. Hækkan av endurgjøldum frá Føroya vanlukkutrygging.

1. viðgerð 13. september. Framlagt 27. november.

Alit.

L. Waagstein, landsrættarsakførari, Tórshavn, hevur í skrivi, d. 20. juli 1944, vent sær til løgtingsskrivstovuna um broytan av endurgjøldum fyri mistan uppihaldara av øðrum ávum enn kríggsvanlukku. Hann við-

leggur avgerð Vanlukkutryggingarráðsins, d. 16. juli í ár, í máli U 17/1944: Thomas Hansen úr Leynum, sjólatin í summar.

Spurningurin um hækkan av hesum endurgjøldum eins og hækkan av dagpeninginum hevur verið til viðgerðar á tingi 1942 (sjá tingtíðindi 1942, bls. 138) og í 1943 (tingtíðindi 1943, bls. 204). Í 1942 var tað løgtingsmaður A. Samuelsen, ið reisti málið vegna, at ein bátur var farin sama summarið, og fleiri menn doyðu. Nevndin, ið viðgjørdi málið í 1942 helt, at tað ikki var gjørligt tá at seta uppskot fram um at broyta sjálvt lógargrundarlagið, tá tað ikki vildi verið samsvarandi teirri støðu, tingið hevði tikið til ta socialu lóggávuna. Tað, ið kundi gerast, var at royna at útjavna tað tap, sum hesi fólk (einkjur og avlamisfólk) fingu, orsakað av príshækkanini. Ein króna tá var ikki meira verd, enn 50 oyru vóru undan krígnum. Við bert at broyta tølini í lógini til hitt dupulta kom ein ikki á rættvíst mál. Tey, sum frammanundan høvdu fingið ásett endurgjald, fingu onga viðbót, og tey, sum frá tí ein møgulig broytan varð gjørd, fingu endurgjøld og fáa tað árliga goldið, vildu kanska fingið ov lítið næsta ár, um prístalið tá aftur er hækkað nógv, og fáa ov nógv kanska um 5 ár, tá prístalið er fallið.

Nevndin er samd um sum tað beinasta at lata lóggávuna standa við óbroytta, men var hugað at veita dýrtíðarviðbót. Grundarlagið fyri teirri skipan, hareftir dýrtíðarviðbótin skuldi veitast, var tað, at løgtingsskrivstovan skuldi fáa til vegis eitt yvirlit yvir øll fólk, sum høvdu fingið pening eftir vanlukkutryggingarlógini og áttu tílíkan pening í sparikassa ella hjá Vanlukkutryggingini, og fáa upplýst, hvat hesi fólk høvdu rætt til ella áttu at fáa goldið hvørt ár. Tingið skuldi so veita eina dýrtíðarviðbót av somu stødd, t. v. s. um ein einkja fekk 300 kr. goldnar av tí, hon átti í sparikassa ella hjá Vanlukkutryggingini, skuldi hon fáa 300 kr. aftrat frá løgtinginum sum dýrtíðarviðbót. Tó heldur nevndin, at tað vil verða neyðugt at granska hvørt einstakt tilfelli, tí viðurskiftini kunnu vera ymisk. Tingið samtykti soljóðandi

uppskot:

1) Landsnevndin fær frá Føroya vanlukkutrygging lista yvir øll fólk, sum hava pening stavandi frá endurgjaldi fyri invalidítet, harundir dagpeningur, ella endurgjald fyri mistan forsyrgjara eftir vanligari galdandi lóg um vanlukkutrygging, eins og landsnevndin frá Føroya vanlukkutrygging fær lista yvir tey, sum í framtíðini fáa tílíkt endurgjald.
2) Landsnevndin kannar hvørt einstakt tilfelli og veitir eftir ummæli frá Føroya vanlukkutrygging teim avvarandi av socialhjálpsstudningunum endurgjald, sum, tá øll viðurskifti eru tikin við, útjavnar fyri komandi ár tann misjavna, sum er orsakaður av príshækkanini.

Í 1943 samtykti tingið hetta uppskot: «Vísandi á tað í álitinum framhildna verður álagt landsnevndini at veita teim, ið hava verið fyri vanlukkuóhappi mest møguliga hjálp.» Løgtingsins sociala nevnd hevði undir viðgerðini av málinum í fjør samráðingar við sorenskrivaran sum formann fyri Vanlukkutryggingarráðnum, H. O. Hansen, stjóra Føroya Vanlukkutryggingar og Jens av Reyni, stjóra Tryggingarsambandsins Føroya. Teir vóru samdir við nevndina um, at tann peninganøgd (ársløn 900 kr.), sum er grundarlag fyri útrokningina av endurgjøldunum — skaðaendurgjøldum og dagpeningi — er ov lág eisini í vanligum tíðum. Nevndin setti tí einki uppskot fram um broytan av sjálvari lógini, (sbr. uppskotið).

Sociala nevnd løgtingsins, sum aftur í ár hevur haft málið til viðgerðar, skal loyva sær at seta fram hesar viðmerkingar: Av tí frágreiðing, løgtingsskrivstovan hevur lagt við í málið, sæst, at skipanin av dýrtíðarviðbótini síðan 1942 hevur verið ein onnur, enn tann av tinginum samtykta, og heldur nevndin, at kommununnar íblandan bert hevur gjørt skipanina meiri fløkta. Viðvíkjandi dagpeninginum sæst, at landsnevndin á fundi 2. mai 1943 samtykti at veita eina dýrtíðarviðbót *fyri forsyrgjarar* uppá 3,50 kr. um dagin og fyri onnur uppá 1,50 kr. um dagin, soleiðis at *forsyrgjarar* hereftir fáa 6 kr. í dagpeningi, meðan onnur fáa 4 kr. um dagin. Dýrtíðarviðbótina rindaði landsnevndin av tí peningi, sum nevndin ráddi yvir til sociala hjálp, og var hetta fyri 1943 kr. 13.797,50. Fyri 1944 er líknandi skipan, tó so, at Føroya Vanlukkutrygging sjálv hevur goldið dýrtíðarviðbótina viðvíkjandi dagpeningi, og hetta helt landsnevndin vera natúrligt av tí, at tryggingin hevur haft stórt yvirskot. Landsnevndarsamtyktin um, at Vanlukkutryggingin sjálv skuldi rinda dýrtíðarviðbótina viðv. dagpeningi varð sett í gildi við kunngerð nr. 24 av 3. mai 1944. Í skrivi, d. 11. september 1944, til løgtingsskrivstovuna frá stjóranum fyri Føroya Vanlukkutrygging setur stjórin fram sítt sjónarmið viðv. rindan av dýrtíðarviðbót, og er hansara fatan tann, at dýrtíðarviðbót saknar tryggjunarligt grundarlag (forsikringsmæssigt Basis) og krevur hann principalt, at Vanlukkutryggingin fær afturgoldið alla rindaða dýrtíðarviðbót til dagpening subsidiært tað, ið goldið er av dýrtíðarviðbót til tann dag, kunngerðin kom í gildi (3. mai 1944). Annars sigur stjórin, at hann kann halda seg til landsnevndarsamtykt av 3. februar h. ár, hvar ein meiriluti av nevndini var samdur um, at dýrtíðarviðbótin skuldi rindast við tingsins peningi. Stjórin vísir eisini á, at kunngerðin av 3. mai 1944 er so snævur, at hon bert veitir ta hægri dýrtíðarviðbótina til forsyrgjarar av konu og børnum og ikki til tey, sum verunliga eru uppihaldarar av øðrum næstingum t. d. faðir og móðir o. l. soleiðis, sum Vanlukkutryggingarráðið hevur nýtt galdandi reglur.

Nevndin er við at umhugsa málið komin til tað úrslit, at tveir vegir eru at ganga:

1) at broyta lógina soleiðis, at tey ymisku endurgjøld verða hækkaði munandi.
2) halda fram við at veita dýrtíðarviðbót.

Ein broytan av sjálvari lógini, sum miðjar ímóti eini hækkan av øllum endurgjøldum, verður einans til bata fyri tey, ið fáa endurgjøld aftaná, at broytingin er sett í gildi. Øll tey vanlukkumál, ið eru endiliga avgjørd framman undan, verða sjálvsagt ikki ávirkað av broytingini, og er tað tí neyðugt, at tað almenna roynir at bøta um viðurskiftini hjá hesum við eini dýrtíðarviðbót.

Nevndin er sum áður nevnt samd um, at ein ársløn uppá 900 kr. sum grundarlag fyri útrokning av viðurgjøldum er ov lág sjálvt í vanligum tíðum, ein hækkan av ársløninni má tí ætlast at verða hægst neyðug, soleiðis út frá sum viðurskiftini eru í dag.

Ein hækkan av ársløninni til 1500 kr. vildi, um so varð, at øll endurgjøld fyri invaliditet, fyri deyða og fyri dagpening — vórðu roknað 1500 kr., viðført hesar broytingar:

1) *Viðv. invaliditet:*
Lægstagjald (5 pct. invaliditet) vildi verið 337 kr. 50 oyru móti nú 202 kr. 50 oyru. Árlig renta (við 100 pct. invaliditet) vildi verið 900 kr. móti nú 540 kr.

Hægsta endurgjald vildi verið 16.900 kr. móti nú ca. 10.000 kr.

2) *Endurgjald aftaná deyða.*

Ein einkja vildi fingið	5400 kr.,	nú 3600 kr.
Hennara børn upp til	4050 „	„ 2700 „
Hægsta gjald (einkja plus børn)	9450 „	„ 6300 „

3) *Dagpeningarnir.*
Teir vildu verið 3 kr. um dagin, nú 2 kr. 50 oyr. Nevndin heldur, at ein tílík broyting vildi verið ein munandi bati, og sigur stjórin, at ein tílík broyting kann fara fram uttan at ávirka tryggingargjøldini av tí, at ttyggingargjøldini eru hækkað, síðan heimsbardagin brast á, uttan at tey vanligu endurgjøldini eru hækkað.

Um tann umrødda broyting verður framd, verður neyðugt at broyta reglugerð viðv. vanlukkutrygging av 29. mars 1939, § 44 viðv. árslønini, § 25 viðv. dagpeningi, § 39 viðv. endurgjald aftaná deyða og § 41 viðv. peningahjálp til gravarferð. Ein sovorðin broyting vildi eisini verið ynskjandi av teirri grund, at útrokningargrundarlagið 1500 kr. vildi verðið eins fyri øll endurgjøld, meðan tað, sum nú er, er ymiskt: invaliditet verður roknaður út frá eini ársløn av 900 kr., endurgjøld eftir deyða út frá eini ársløn av 1000 kr., meðan dagpeningurin verður roknaður út frá 1250 kr. Tær galdandi reglur viðv. endurgjøld vegna kríggsvanlukku verður her ikki nomið við, tó verður tað neyðugt at broyta § 1, 1 stk. í kunngerð av 8. november 1939. Tað er orsakað av, at endurgjaldið fyri vanliga vanlukku verður hækkað. Kríggsendurgjaldið er vanligt endurgjald plus kríggstillegg. Tá ið vanliga endurgjaldið hækkar, má kríggstilleggið lækkast í sama mun, fyri at endurgjaldið skal hava somu stødd. Uppskot um tílíkar broytingar vil verða sett fram.

Fyri at kunna bøta um viðurskiftini hjá teimum, sum hava fingið endurgjøld, útroknað á tí verunliga grundarlagi (árslønini) verður neyðugt at halda fram við dýrtíðarviðbót, tó heldur nevndin, at skipanin viðv. býti av viðbótini eigur at verða broytt. Viðvíkjandi rindan av endurgjøldum — undantikið dagpening — er skipanin hendan: Tá Vanlukkutryggingarráðið hevur tikið avgerð um støddina av endurgjaldinum í einum máli, verður peningurin settur á sparikassabók í «Færø Amts Sparekasse»; henda sparikassabók fær eina átekning um, hvussu nógv tann avvarandi kann taka út árliga. Frammanundan krígnum vóru 300 kr. vanliga tann peninganøgd, ið avvarandi hevur loyvi at taka út árliga. Undantøk kunnu verða gjørd, tá skrivlig umsókn er til steðar, og stýrið fyri Vanlukkutryggingini heldur, at umstøðurnar eru til tess. Tey seinri árini eru tey árligu útgjøldini vorðin størri, sjálvandi eisini passað til eftir umstøðunum. Tað er nevndini kunnugt, at, sum er, ca. 170 persónar árliga taka út til brúks av teirra skaðapeningi eftir viðmerking á sparikassabókini frá 300 kr. upp til 1000 kr., rokna vit við eini dýrtíðarviðbót uppá 100 pct. av vanligum útgjaldi 300 kr., verður tann samlaða árliga útreiðsla til dýrtíðarviðbót: 170 × 300 kr. ..... ca. 51.000 kr.
Har afturat kemur dýrtíðarviðbót til dagpening, og kann hon ætlandi árliga metast til ..... ca. 15.000 kr.

Tann samlaða árliga viðbótin er soleiðis ..... ca. 66.000 kr.

Nevndin skal mæla til, at veitt verður áður nevndu persónum ein dýrtíðarviðbót svarandi til 100 pct. av tí skaðapeningi sambart viðmerkingina í sparikassabókini, tey hava rætt til uttan serligt loyvi at fáa útgjøldum, tó hægst 300 kr. Býti av dýrtíðarviðbótini viðvíkjandi endurgjøldum heldur nevndin lættast kann skipast á tann hátt, at landsnevndin frá Føroya Vanlukkutrygging fær eitt yvirlit yvir allar teir persónar, ið

hava skaðapening innistandandi í Færø Amts Sparekasse. Dýrtíðarpeningurin kann setast inn á sparikassabókina hjá teimum avvarandi og soleiðis verða teimum tøkur. Býti eigur at fara fram við ársenda ella t. d. fyri 1945 í byrjanini av 1946.

Henda skipan kemur ikki at nema tey endurgjøld, sum ognast børnum fyri mistan forsyrgjara. Tann lagaligasta skipan viðv. rindan av dýrtíðarviðbót til dagpeningin heldur nevndin vera tann, at Føroya Vanlukkutrygging útleggur allan dagpening móti at fáa dýrtíðarviðbótina afturgoldna t. d. fyri hvørt fjórðingsár. Spurningurin um, hvør skal rinda kostnaðin av dýrtíðarviðbótini til dagpeningin, hevur verið frammi deils á tingi og deils í landsnevndini. Tað hevur verið hildið fram, at tryggingin átti at rinda hesa viðbót. Tryggingin afturímóti hevur meint, at tryggingarligt grundarlag fyri slíkari skipan ikki tykist at vera til staðar. Nevndin má eins og tryggingin halda, at dýrtíðarviðbótin er ein spurningur, sum ikki viðkemur tryggingini, men eigur at rindast av amtsgrunninum, tó kann nevndin eftir umstøðunum mæla til, at tryggingin sambart kunngerð nr. 24 av 3. mai 1945 rindar dýrtíðarviðbótina til dagpeningin fyri 1944. Annars vil nevndin seta fram uppskot um, at nevnda kunngerð verður sett úr gildi frá 1. januar 1945. Nevndin skal mæla til, at umrødda skipan viðv. dýrtíðarviðbót verður sett í gildi fyri árið 1945. Til næsta ár verður spurningurin at taka upp aftur.

Minnilutin (J. H. Danbjørg) heldur fram:

Í teimum av javnaðarmonnum í ár á tingi reistu málum er m. a. eitt, ið mælir tinginum til at seta í gildi skipan um at veita endurgjald til allar einkjur uttan mun til, um maðurin er deyður av vanlukku ella av sjúku ella á annan hátt, og at øll slík endurgjøld skulu vera eins í stødd og ikki vera minni enn tað endurgjald, ið tær einkjur fáa, ið mist hava mannin av kriggsávum.

Javnaðarflokkurin hevur, sum monnum kunnugt, haft á tingi mál um fólkatrygging og hevur í ár lagt inn á ting mál um umskipan av allari teirri socialu forsorgini, samstundis sum flokkurin vísir á inntøkuleiðir, sum kunna stimbra tingið soleiðis peningaliga, at vit her á landi kunna verða førir fyri at skipa okkara socialu viðurskifti í eitt lag, sum kann verða samsvarandi viðurskiftunum í øðrum mentaðum samfeløgum.

Minnilutin hevur skrivað álit og uppskot í ti av javnaðarflokkinum reista máli um broytan av øllum teim socialu lógunum, og miðjar tað m. a. ímóti at bøta um korini hjá øllum einkjum og børnum teirra eins og øllum, ið mist hava ella missa forsyrgjara sín ella missa heilsuna o. s. fr.

Tessvegna vil minnilutin í hesum fyriliggjandi máli vísa til tað omanfyri nevnda álit og uppskot, sum skal verða framsett í hesi tingsetu, og er annars samdir við hinar nevndarlimirnar um at framseta hetta uppskot:

Uppskot:

I. UPPSKOT TIL BROYTINGAR Í REGLUGERÐ FYRI FØROYAR NR. 161 um TRYGGJAN MÓTI VANLUKKU AV 29. MARS 1939.

a. Í § 25 broytast «2 kr. 50 oyru» til «3 kr.»
b. Í § 39, 1. stk. 1) broytast «3600 kr.» til «5400 kr.»
1. — 2) — «1350 kr.» til «2025 kr.»

1. stk. 3) broytast «2700 kr.» til «4050 kr.»
1. — 5) — «6300 kr.» til «9450 kr.»
1. — 6) — «6300 kr.» til «9450 kr.»
4. — — «450 kr.» til «675 kr.»
5. — — «180 kr.» til «270 kr.»
c. I § 41 broytast «100 kr.» til «200 kr.»
d. I § 44 — «900 kr.» til «1500 kr.»

II. UPPSKOT TIL BROYTINGAR Í REGLUGERÐ FYRI FØROYAR NR. 394
um
KRÍGGSVANLUKKUTRYGGING FYRI SJÓFARANDI AV 8. NOVBR. 1939

Í § 1, 1. stk. broytast «800 kr.» til «200 kr.»

I. FORSLAG TIL ÆNDRINGER I ANORDNING FOR FÆRØERNE NR. 161
om
FORSIKRING MOD FØLGER AF ULYKKESTILFÆLDE AF 29. MARTS 1939.

a. I § 25 ændres «2 Kr. 50 Øre» til «3 Kr.»
b. I § 39, 1. Stk. 1) ændres «3600 Kr.» til «5400 Kr.»
1. Stk. 2) — «1350 Kr.» til «2025 Kr.»
1. Stk. 3) — «2700 Kr.» til «4050 Kr.»
1. Stk. 5) — «6300 Kr.» til «9450 Kr.»
1. Stk. 6) — «6300 Kr.» til «9450 Kr.»
4. Stk — «450 Kr.» til «675 Kr.»
5. Stk. — «180 Kr.» til «270 Kr.»
c. I § 41 ændres «100 Kr.» til «200 Kr.»
d. I § 44 — «900 Kr.» til «1500 Kr.»

II. FORSLAG TIL ÆNDRINGER I ANORDNING FOR FÆRØERNE NR. 394
om
KRIGS-ULYKKESFORSIKRING FOR SØFARENDE AF 8. NOVBR. 1939.

I § 1, 1. Stk. ændres «800 Kr.» til «200 Kr.»

III. 1. Løgtingið veitir sum dýrtíðarviðbót til endurgjald fyri mistan uppihaldara av øðrum ávum enn kriggsávum 100 pct. av teim av tryggingini árliga ásettu útgjøldum, tó hægst 300 kr., soleiðis sum nærri frágreitt í álitinum.

2. Dýrtíðarviðbótin til dagpening verður at endurnýggja við 3,00 kr. til tey, ið hava forsyrgjaraskyldu og 1 kr. til onnur, tó so, at viðbótin skal rindast av amtsgrunninum.
   Frá 1. januar 1945 verður kunngerð nr. 24 av 3. mai 1944 sett úr gildi.
3. Henda skipan verður at galda fyri 1945.

2. viðgerð 30. november, 3. viðgerð 30. november. Pkt. I samtykt við 24—0, II við 22—0, III við 24—0.

---

6. Lóg um prísir og lønir.

1. viðgerð 29. sept. **A.** framlagt 10. november.

Álit.

Tað er til tingið komið umsókn frá Oscar F. Arge, J. Slettenæs og Chr. Dahl-Restorff um, at teimum verður loyvt at hækka prísin av tí bíligasta tubbakkinum, og geva teir sum grund, at prísurin er hækkaður í Bretlandi, soleiðis at tubbakkið nú kemur undir eitt hægri tollstig.

Undir viðgerðini av málinum hevur tað verið nevnt, at tað kanska var beint at lækka tollin við at seta markið fyri tollstigið upp, men hetta nevna umsøkjararnir ikki í sínari umsókn.

Í lóg nr. 53 av 15. mars 1939 um innfluttningsgjald o. a. er tubbakkstollurin ásettur soleiðis:

«Roykitubbak til innkeypspris av

19.	3 kr. fyri kilo ella undir	1 kilo	70	oyr.
20.	yvir 3 kr., men ikki yvir 6 kr. kilo	1 —	200	—
21.	yvir 6 kr. fyri kilo	1 —	400	—»

Henda lógarregla varð broytt við bráðfengis ásetanum nr. 22 av 16. august 1940, soleiðis at nr. 20 og 21 varð hækkað við 20 pct., og seinri við nr. 39 av 4. desember 1942, soleiðis at henda hækkanin varð broytt til 30 pct.

Tað er nevndini kunnugt, at tað lægsta stigið 70 oyr., fyri kilo ikki hevur verið nýtt síðani einaferð í 1940, tí so bíligt tubbak alls ikki hevur verið at fingið. Higartil hevur tað úr Bretlandi fingist tubbak, ið kostar nøkur oyru undir 6 kr. kilo í innkeyp, og soleiðis gekk fyri tollin 260 oyru fyri kilo, men nú er tað umsøkjararnir gera tinginum kunnugt, at eisini hesi tubbakssløg eru hækkaði í prísi, soleiðis at tey falla undir hægsta stig, og tollurin tí verður 520 oyru fyri kilo.

Við kunngerð nr. 6 av 23. mars 1943 grein 1 er ásett, at eingin vøra má kosta meira enn hon kostaði tann 15. mars 1943. Í sama kunngerð § 2 verður príseftiransingarráðið heimilað til at gera undantak, tá útfluttningsprísurin er munandi hækkaður og tá vøran er av týdningi fyri landsins trongd. Tað er ikki í lógarregluni nevnt nakað um, at prísurin kann hækkast, tá útreiðslurnar til toll fara munandi upp.

Nevndin skal vísa til, at tað ikki fyri tinginum lá nøkur klaga, tá tubbak ikki longur í 1940 fekkst fyri tann lága prísin, ið skuldi gjalda 70 oyru kilo í toll, so veruliga hevur tað síðani ikki fingist tað heilt bíliga tubbakkið, ið grundaði tingsins støðu fyri til at hava í gildi eitt so heilt lágt stig fyri tubbakkstoll. Tá tubbakkið hevur kunnað verið selt við 260 oyr. kilo í tolli, má tað ikki vera so óbeint, at tað nú vegna prishækkan kemur upp til 520 oyr. í toll. At broyta hesa lógarreglu er vandafullt, tí tað vil lætt gerá ein mismun millum innfluttningsmenn, bæði tá markið fer upp, og tá markið fer niður aftur. Tílíkar reglur eigur tað at verða nortið minnst gjørligt við og haldast má tí, at tað ikki er beint at gera nakra broyting í tolllógini.

Nevndin má viðganga, at tað er ógjørligt hjá innfluttningsmonnum at selja tubbak fyri sama pris sum undan 15. mars 1943, tá prísurin fer upp og tollurin hækkar við 260 oyr. fyri kilo. Sum ávist er tað ikki beinleiðis í kunngerðini nr. 6 av 23. mars 1943 givið príseftiransingarráðnum heimild til at góðtaka hækkan grundað á tollhækkan, men eingin kann ívast í, at tingið, tá henda lógarregla varð samtykt, ikki hevur verið av tí hugsan, at innfluttningsmenninir skuldu gjalda hetta sjálvir, ella at innfluttningurin av tí orsøk skuldi steðga. Nevndin mælir tí til, at lógin verður broytt, soleiðis at príshækkan av hesi orsøk kann verða góðtikin av ráðnum.

Príseftiransingarráðið hevur úttalað, at teir ikki kunna viðmæla broytan í lógini, tí tá mátti vøran hækka í pris. Amtið og gjaldstovan mæla til, at lógarreglan verður ásett soleiðis, at tað einans verða tær í tolllógini § 1, nr. 12—25 nevndu vørur, tað vil siga allar tubbaksvørur, ið loyvi verður givið til at hækka, og mæla teir eisini til, at príshækkanin einans kann verða játtað við tí peningahædd, tollurin veruliga hækkar við.

Nevndin skal mæla til, at lógin verður broytt soleiðis, at tann veruliga príshækkan og tollhækkan kann leggjast aftrat tí gamla útsøluprísinum, meðan tað ikki verður loyvt av hesi príshækkan at taka meira ágóða enn vanligt frammanundan. Nevndin mælir tinginum til at samtykkja hetta

Uppskot:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Tilføjelse til Kundgørelse Nr. 6 af 23. Marts 1943.

Til § 2, 1. Stk. føjes som nyt Punktum: «Priskontrol-Raadet kan for de i Lov Nr. 53 af 15. Marts 1939, § 1, Nr. 12—25, nævnte Varer tillade en højere Pris end den pr. 15. Marts 1943 gældende, naar det dokumenteres, at Indførelsafgifterne af disse Varer er steget efter nævnte Dato. Prisforhøjelsen maa ikke finde Sted med et større Beløb end det, der svarer til den effektive Forhøjelse af Importprisen og Afgiftsforhøjelsen.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

Aftrat § 2, 1. stk. verður sett sum nýtt punktum: «Prísansingarráðið kann fyri tær í lóg nr. 53 frá 15. mars 1939, § 1, nr. 12—25, nevndu vørur loyva ein hægri pris enn tann ið var galdandi 15. mars 1943, tá prógvað verður, at innfluttningsgjøldini á hesum vørum eru uppfarin eftir nevnda dag. Prishækkanin má ikki fara fram við einari størri peningahædd enn tí, ið svarar til ta veruligu hækkan av innfluttningsprísinum og av gjaldshækkanini.»

Hesar fyrisetanir koma í gildi beinanvegin.

Broytingaruppskot

frá Davidsen o. fl.:

I. FORSLAG

til

Midlertidige Bestemmelser om Ændring i Lov for Færøerne Nr. 53 af 15. Marts 1939 om Indførselsafgifter m. v.

Amtmanden bemyndiges til at tilstaa Indførsel af Røgtobak af visse Sorter mod at der svares Indførselsafgift efter Satsen i Lov Nr. 53 af 15. Marts 1939 § 1 Nr. 20, selvom Indkøbsprisen er over 3 Kr.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR

um

broytan í lóg fyri Føroyar nr. 53, 15. mars 1939 um innfluttningsgjøld o. a.

Amtmaðurin verður heimilaður at loyva innfluttning av royktubakki av vissum sløgum móti at goldið verður innfluttningsgjald eftir satsinum í lóg nr. 53, 15. mars 1939, § 1, nr. 20, tó at innkeypsprísurin er meiri enn 3 kr.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

II. Tingið viðmælir, at fyri hesi sløg av tubakki verður bert goldið innfluttningsgjald eftir § 1, nr. 20, í lóg nr. 53, 15. mars 1939, tó at innkeypsprísurin er meiri enn 3 kr. pr. kg:

Old Friend, Pilot, Brown Birds Eye, Everest Dark Shag, Th. & Porteous Dark Shag, London Shag.

2. viðgerð 18. nov., 3. viðgerð 22. nov. Nevndaruppskotið samtykt 18—0. Broytingaruppskotið fall 10—0.

B. Framlagt 22. november.

Álit.

Tann 13. april 1944 skrivar prísansingarráðið til landsnevndina um ymiskar spurningar, ið ráðið ynskir svar uppá. Landsnevndin bað løgtingsmenninar J. P. Henriksen, Poul Petersen og Trygve Samuelsen um sum nevnd at viðgera málið og geva landsnevndini frágreiðing. Frágreiðing, dagsett 26. april 1944, frá hesi undirnevnd varð send prísansingarráðnum og sigur ráðið frá, at tað hevur verið til viðgerðar á fundi í prístalsnevndini tann 20. mai 1944, og samtykti henda nevnd, at tað framførda vildi verða lagt til grundarlag fyri prístalsútrokningini, men at spurningurin annars mátti leggjast fyri tingið til viðgerðar, og vísa teir serliga til peningin fyri «Bolig».

Brævið frá prísansingarnevndini frá 13. april 1944 og frágreiðingin frá undirnevndini í landsnevndini frá 26. april 1944 verða viðløgd hesum áliti sum skjal A og B.

Málið er nú lagt fyri tingið saman við skrivi frá 10. september 1944 frá Føroya arbeiðarafelag, hvar felagið biður um samráðing. Felagið sigur í brævinum, at «hitt arbeiðandi fólkið í Føroyum hóast prístalsskipanina — ella kanska sum ein fylgja av, so, sum hon virkar — hevur nógv truplari við at vinna nóg mikið at liva av nú, enn hvat tilfellið var fyri kríggið.» Um «Bolig» siga teir, at tað í útrokningini bindur prístalið til skaða fyri arbeiðaran við tað, at tað ikki verður hækkað í sama mun sum hinir postarnir. Um uppgávu av vørunøgdini heldur F. A., at tað átti at verið soleiðis at keypmenn skuldu uppgivið alla vørunøgdina — við teim verunligu prísum — sum seld er í tí farna ársfjórðingi.

Tann 23. oktober 1944 fór samráðing fram við nevndina í Føroya arbeiðarafelag. Felagið helt her fram, at teir serliga ynsktu peningin fyri «Bolig» broyttan frá 600 kr. til upp ímóti 1200 kr. Um prístalið var útroknað beint vildi tað givið 30 stig hægri, og vildi hetta komið fram, um hækkan fór fram eftir teirra áheitan. Síðani vildu teir seta uppskot um, at vørunøgdin varð roknað sambært sølu í farna ársfjórðingi, eins og sagt var frá í brævi teirra.

Til nevndina er frá amtinum komið skriv tann 21. oktober 1944, har kunngjørt verður skriv frá bretska konslinum av 17. s. m. Konsulin sigur frá, at bretsku yvirvøldini her eru illa við at siggja, at prístalið er farið upp eitt stig vegna ostaprísin. Teir siga eisini frá, at teir ikki kunna góðtaka betta prístalið sum verandi samsvarandi livikostnaðinum her, og fyri løningar eru teir av tí hugsan, at tað vil vera órættvíst at nýta tað sum grundarlag fyri útroknan. Síðani verður framhildið, at teir síðani januar í ár hava væntað at hoyra um broytan í hesum uttan úrslit.

Føroya arbeiðarafelag hevur, aftaná at samráðingar fóru fram, sent tinginum 3 brøv, ið eru til viðgerðar í hesi nevnd:

1. Føroya arbeiðarafelag biður um, at felagið verður betri umboðað í prísansingarráðnum — helst við føstum limi í ráðnum.

2. Felagið biður tingið taka til viðgerðar at fáa lækkað prísirnar munandi á í minsta lagi øllum tí, ið kann koma inn undir at nevnast neyðsynjarvørur. Her nevna teir serliga, at Íslandsvøran er ræðuliga dýr og at vøran úr Bretlandi eigur at keypast fyri tann pris, bretskir heilsølumenn lata hana fyri innlendis. Teir vísa á, at kanska umboðsmenn landsins í Íslandi og Aberdeen (um tað hevði eydnast at fingið hendan avstað) kundu fingið uppí hendi at kanna prísirnar á vøru, ið verður avskipað til Føroya.

3. Felagið heitir eisini á tingið um at fáa reguleræð prísirnar á hoyggi og lívneytum. Teir halda fram, at prísirnir hava verið fyri eina byrðu av hoyggi upp til 25 kr. og lívneyt 1000 til 1200 kr., ja heilt upp til 1800 kr. og siga teir «úrslitið av hesum ónæruliga høgu prísum hevur sjálvandi verið mjólkatrot.»

Meirilutin (R. Long, Poul Petersen og Th. Petersen) skal vísa til minnilutaálitið í tingmálinum «prístalsútrokningin» í tingsetuni 1943 (sí tingtíðindi skjal 9), og tað ið har er framført um, hvussu neyðugt tað verður hildið at verða at fara undir eina eftirhyggjan av nýggjum av heila grundarlagnum fyri prístalinum, og at tað má haldast at verða beinast at fáa skipað eitt prísansingarráð á nýggjum grundarlagi. Eisini skal vera víst til minnilutans hugsan tá, at tað er hildið neyðugt, at allir landsins stættir taka lut í hesum arbeiði.

Til allar teir spurningar, ið í ár liggja fyri tinginum hevur meirilutin somu støðu sum seinasta ár, at hetta ikki verður rættvíst skipað uttan at prísansingarráðið verður broytt og øll prístalsskipanin verður eftirkannað og løgd á eitt meira fast og álitandi grundarlag. Vit seta tí einki uppskot fram um smábroytingar á hesum grundarlagi, ið vit halda vera skeivt, men um tað skuldi víst seg, at tingsins meiriluti, gjøgnum sínar umboðsmenn í nevndini, gera uppskot til broytingar, ið mugu haldast at vera til veruliga batan nú í løtuni, vilja vit umhugsa at styðja tílík uppskot undir viðgerðini í salinum.

Ein minniluti (Kr. Djurhuus) skal vísa til tað, ið framført var av meirilutanum í málinum um prístalsútrokningina í 1943. Minnilutin skal síðani taka undir við tí frágreiðing, ið nevndin millum tingseturnar hevur framført (sí skjal B) og mælir minnilutin tinginum til at góðkenna hesa frágreiðing.

Minnilutin skal síðani mæla tinginum til at samtykkja tey uppskot (B. 1, b og B. 2), ið vóru sett fram í fjør, men ikki fingu nóg nógvar atkvøður. Minnilutin heldur tað vera neyðugt, at hetta verður samtykt fyri at vera vissur í at fáa tað mest álitandi prístal.

Minnilutin skal eisini mæla til, at tingið heitir á prísansingarráðið um at samráðast við Bretar um at fáa millumágóðan niðursettan og fáa farmagjøldini lækkað. Víst skal verða til meirilutaálitið í 1943 uppskot C, ið varð samtykt uttan at nakað enn er frætt frá úrsliti.

Ein minniluti (J. P. Henriksen) er á einum máli við Føroya arbeiðarafelag, tá ið teir halda fram, at prísirnir á teimum vørum, ið eitt vanligt húsarhald noyðist at brúka, matvørur, klædnavørur o. a. liggja í meðalskurði væl hægri enn hitt lýsta prístalið gevur mynd av. Hetta er órættvíst og hetta greiðir, hvussu tað ber til, at ein arbeiðari í dag fær minni fyri sína løn enn undan krígnum. Tað er minnilutans áskoðan og støða, at tingið ikki kann lata standa á sær, at hetta órættvísi ikki verður bøtt. Kannað má vera, hvar grundirnar til hetta ólag liggja.

Við at hyggja at uppsetanini av teimum vørum, ið eru settar á húsarhaldsbudgettið og kanna eftir, hvussu vørurnar eru býttar í deildir og settar í prísvøkstri, vilja vit síggja, at í teirri eini deildini, deild 2, sum tær einstøku vørurnar ikki verða settar í pris eftir teirra veruliga prísi í dag, men fáa ein prísvøkstur, sum svarar til meðalprísvøksturin í deild 1, finnast nógvar vørur hvørs verunligi prísvøkstur liggur langt omanfyri prísvøksturin í deild 1. Hetta ber við sær, at deild 1 dregur prístalið niður um tann verunliga meðalprísin. Prístalið verður av besum umstøðum ein ósonn mynd av verunleikanum. Tá ið lønir hjá arbeiðsmonnum og fastløntum verða ásettar eftir hesum prístali, verða tær ikki at kunna geva tí lønta keypkraft og lívsevnir, sum hann hevði undan krígnum.

Tá ið ætlanin við prístalinum er, at tað skal vísa eitt satt bilæti

av trongdini hjá fólki viðvíkjandi lønhækkan, má prístalsútrokningin verða broytt. Hetta kann henda ymiskar vegir, her skulu nevnast tveir:

Menn kunnu taka hvørja einstaka vøru fyri seg og finna hennara prísvøkstur og so finna meðalprísvøksturin fyri allar tær vørur, ið brúktar verða.

Menn kunnu flyta vørur úr einari deild til aðra í budgettinum soleiðis, at tann eina deildin ikki ávirkar hinar skeivt. Hetta verður skotið uppá av Føroya arbeiðarafelag. Teir halda fram, at hús og skattur upprunaliga vórðu tikin við í deild 2 og tá prísvøksturin á hesum ætlandi liggur nakað niðanfyri prísvøksturin í deild 1 — ið sum sagt avger prísvøksturin í deild 2 -- vil tað at taka hús og skatt undir deild 2 heldur enn at rokna teirra prísvøkstur fyri seg sjálvan, sum gjørt verður nú, bøta uppá tær mongu vørur í deild 2, sum í prísvøkstri liggja nógv hægri enn tann prísvøkstur, tær vera settar í eftir deild 1.

Minnilutin heldur principielt, at tað er rættast at finna prísvøksturin á hvørjari einstakari vøru fyri seg, men tá ið hetta ætlandi er ilt at fáa gjøgnumført, heldur minnilutin í hesi syftu sær einans til at koma fram við uppskoti um prísvøksturin fyri at seta hús og skatt á sama hátt sum hinar vørurnar undir deild 2.

Minnilutin styðjar krav Føroya arbeiðarafelags um at fáa fastan mann í prísansingarráðið.

Minnilutin er samdur við minnilutan Kr. Djurhuus um at áleggja prísansingarráðnum at samráðast við Bretar um lækkan av millumágóðanum og farmagjaldinum, og at allar vørur á húsarhaldsbudgettinum eiga at verða hildnar so langt niðri sum gjørligt við ásetan av hámarksprísi ella hámarkságóða.

Uppskot:

Frá *minnilutanum* (Kr. Djurhuus):

1. Løgtingið góðkennir ta av einari nevnd tann 26. apríl 1944 givnu frágreiðing (sí skjal B).
2. Við útroknan av prístalinum verða einans prísirnir á føroyskum vørum og á vørum innfluttum úr Bretlandi at leggja til grund, soleingi innfluttningurin til landið eina mest kemur úr Bretlandi.
3. Allar vørur, ið eru tiknar við í húsarhaldsætlanini fyri prístalsútrokningina eiga at vera bundnar av hámarksprísi ella hámarkságóða, og hesir prísir eiga at verða ásettir samsvarandi lægsta prís á plássum, ið fáa vørurnar beinleiðis úr útheiminum.

Frá *minnilutanum* (Kr. Djurhuus og J. P. Henriksen):

4. Prísansingarráðnum verður álagt at samráðast við Bretar um lækkan av millumágóðanum og farmagjaldinum (sbr. tingsamtykt í 1943).

Frá *minnilutanum* (J. P. Henriksen):

11. Broytan av reglum um stýrið fyri Tryggingarsambandið Føroyar.

---

1. viðgerð 16. september. Framlagt 1. november.

Álit.

Við skrívi av 10. august 1944 hevur amtið biðið tingið tikið til umhugsunar spurningin um broytan av talinum á stýrislimum í tryggingarsambandinum «Føroyar».

Tann 14. juni 1944 skrivaði amtið til tryggingarsambandið, at tann núverandi skipanin er soleiðis, at stýrið hevur tríggjar limir, valdar av umboðsnevndini, løgtinginum og amtinum, men felagsins virki er nú so stórt, at tað kanska vildi verið natúrligt at stýrið varð broytt til 5 limir, soleiðis at teir tveir, ið koma aftrat verða valdir t. d. av løgtinginum og amtinum.

Stýrið hevur viðgjørt henda fyrispurning á fundi tann 23. juni 1944 og svarar, at stýrið ikki hevur nakað móti, at tað koma tveir limir aftrat, men at tað tá verður hildið meira handigt, um stýrið varð felags fyri allar deildir, ið eru undir tryggingarsambandinum, meðan deildarstýrini verða tikin av.

Eftir fyrispurning frá løgtingsskrivstovuni hevur tryggingarsambandið sagt frá, at tað eru hesar deildir:

1. Tryggingarsambandið «Føroyar» — 3 limir í stýrinum.
2. Føroya Sjóvátrygging — felagsstýri við sambandið.
3. Føroya brunatrygging — 5 limir í stýrinum.
4. Føroya vanlukkutrygging s/f. — 3 limir í stýrinum.
5. Krigsforsikringen for Fiskefartøjer paa Færøerne — 4 limir í stýrinum.

Fíggjarnevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (P. Dahl, J. F. Kjølbro, R. Long og Th. Petersen) skal viðmerkja, at okkara flokkur ikki í 1940, tá tryggingarsambandið varð stovnað var samsintur í, at hetta átti at verða gjørt á tann hátt, at tað varð givið felagnum einarætt til trygging. Vit ásanna, at tað er beint, at mest gjørligt av trygging verður her heima í Føroyum, soleiðis at ikki óneyðugur peningur fer av landinum, men meina, at hetta væl kundi fingist í lag, uttan at ganga øðrum ov nær.

Tað er í reglugerðini fyri kríggstryggingina ásett, at hon skal halda uppat og avrikast tá tann núverandi bardagatíðin er av, og meirilutin má tí vísa á, at tað kann væntast, at tað skjótt kemur at liggja fyri tinginum spurningur um broytan í virki tryggingarsambandsins. So statt heldur meirilutin ikki tað er neyðugt nú at gera eina minni broyting í reglugerðini.

Minnilutin (Kr. Djurhuus) skal vísa til tað, sum er framført av stýrinum fyri tryggingarsambandinum um at kasta øll stýrini saman í eitt. Sum limur av stýrinum hevur minnilutin verið við til hesa samtykt, og heldur hana vera beina. Tá tað ikki sýnist at kunna væntast meiriluti fyri hesi støðu á tingi, setur minnilutin einki uppskot fram í málinum.

Minnilutin (P. M. Dam og Joh. M. Poulsen) heldur fram: Tað má ásannast, at tað er stórur munur á tí virki, ið tryggingarsambandið hevur í dag, og ta roynd, ið varð gjørd í 1940 at seta á stovn eitt almennt føroyskt tryggingarfelag. Framgongdin er so stór, at minnilutin má taka undir við tí tanka, ið er komin frá amtinum um at viðka um stýrið við tveimum limum. Av tí, at tær ymisku deildir hava so ymiskt virki, og at stýrislimirnir í hesum deildum eru valdir á so ymiskan hátt, kunnu vit ikki taka undir við tryggingarsambandinum um at leggja alt virkið fyri tær ymisku deildirnar undir sama stýri, men einans mæla tinginum til at gera broyting, soleiðis at stýrið verður viðkað til 5 limir.

Eftir § 5 í reglugerðini fyri tryggingarsambandið eru teir nú valdu limirnir valdir uppá 9 ár, soleiðis at ein fer av triðja hvørt ár. Tá tað nú verða 5 limir, má hetta broytast, og skjóta vit uppá, at tað verður broytt til, at tað triðja hvørt ár fara av ávikavist 1, 2 og 2, soleiðis at tað verður valdur 1 av umboðsnevndini einsamallur og síðani ein frá løgtinginum og 1 frá amtinum tilsamans við hinum valunum.

Minnilutin (Dam og Poulsen) setur fram hetta

uppskot:

1. MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE

OM

ÆNDRING I KUNDGØRELSE NR. 14 AF 17. JUNI 1940 OM FORSIKRINGSVIRKSOMHED.

§ 6, tredie Stk. forandres til:

Bestyrelsen bestaar af 5 Personer, der vælges henholdsvis 1 af Repræsentantskabet, 2 af Lagtinget og 2 af Amtmanden.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPAN FYRI FØROYAR

UM

BROYTAN Í KUNNGERÐ NR. 14, 17. JUNI 1940 UM TRYGGINGARVIRKI.

§ 6, triðja petti verður broytt til:

Stýrið verður skipað av 5 monnum, ið veljast ávikavist 1 av umboðsmannanevndini, 2 av løgtinginum og 2 av amtinum.

2. Løgtingið samtykkir fylgjandi broytan í reglugerð fyri «Tryggingarsambandið «Føroyar» (Forsikringsforbundet, gensidigt Forsikringsforbund).

§ 5, 2. og 3. petti verður broytt til:

Stýrið verður skipað við 5 monnum, ið veljast ávikavist 1 av umboðsmannanevndini, 2 av løgtinginum og 2 av amtinum.

Triðja hvørt ár fer ávikavist 1, 2 og 2 limir av stýrinum og ein av umboðsmannanevndini av, og fer so nýval (ella afturval) fram. Tað verður við lutakast avgjørt, í hvørjum rað limirnir skulu fara frá, tó skal tað við stýrinum skipast soleiðis, at tann av umboðsmannanevndini valdi limurin fer av einsamallur, og hini árini ein valdur av løgtingi og ein av amtinum.

§ 5, 2. og 3. Stk. forandres til:

Bestyrelsen bestaar af 5 Personer, der vælges henholdsvis 1 af Repræsentantskabet, 2 af Lagtinget og 2 af Amtmanden.

Hvert 3. Aar udgaar henholdsvis 1, 2 og 2 Medlemmer af Bestyrelsen og eet Medlem af Repræsentantskabet, hvorefter Nyvalg (eventuelt Genvalg) finder Sted. Det afgøres ved Lodtrækning, i hvilken Rækkefølge Medlemmerne afgaar, dog skal det angaaende Bestyrelsen ordnes saaledes, at det af Repræsentantskabet valgte Medlem afgaar alene, og de andre Aar en valgt af Lagtinget og en af Amtmanden.

2. viðgerð 7. november. 3. viðgerð 1. december. Samtykt 13—0.

---

12. Gjøld til pantafútar.

1. viðgerð 20. september. Framlagt 9. november.

Álit.

(Dam við fyrivarni).

Løgtingið hevði í 1943 (sí løgtingstíðindi 1943, síðu 255) til viðgerðar málið um hækkan av gjøldum til pantafútar. Tá varð samtykt, at málið skuldi goymast til hesa tingsetu, fyri at umhugsað kundi verða hækkan av gjøldum og samsýningum til menn, ið hava almennt starv ella umboð. Sorinskrivarin hevur verið so beinasamur at gera yirlit yvir tílík gjøld og liggur hetta tilfar fyri tinginum í ár.

Fyri flestu gjøld við sorinskrivaraskrivstovuna eru hesi tey somu sum í Danmark, tó eru rættargjøldini í dómsmálum munandi lægri her í Føroyum. Øll hesi gjøld eru ásett í ymiskum lógum, ið tað er neyðugt at broyta, um hesin spurningur skal takast upp allur, sum hann er. Tá undantikið verður kunngerð nr. 35 av 30. oktober 1940 um broytan av nøkrum av gjøldunum, er tað ikki nortið við hendan spurningin undir krígnum.

Nevndin má sjálvsagt ásanna, at tað ið nú verður goldið í almennum gjøldum illa svarar saman við peningastøðuna í dag, men tað má eisini verða hildið fram, at um ein heilt nýggj reglugerð varð sett í gildi nú, so vildi hon væl kunna hugsast at vera eins illa samsvarandi peningavirði um heilt stutta tíð. Tá bardagatíðin einaferð er av, má hesin spurningur verða umhugsaður í sini heild, og má tað tá eisini kannast, um tað ikki er beinast at savna í eina lóg øll tey ymisku almennu gjøld og allar tær samsýningar, ið gjaldast skulu her í Føroyum, soleiðis at tað ikki eins og nú má finnast fram úr heilt gomlum lógum og reglugerðum.

Nevndin heldur tað einasta, ið eigur at gerast í hesi óvanligu tíð,

er at kanna tey einstøku dømi, har alment umboð gevur borgara í landinum figgjarligt tap av starvinum og so royna at bøta uppá hetta, uttan löggávu men við at tingsins landsnevnd játtar eina bráðfengis dýrtíðarviðbót.

Spurningurin um endurgjald til vitnir í straffamálum var til umhugsunar í 1943 í landsnevndini, og samtykti nevndin at heimila sorinskrivaran at rinda úr amtsgrunninum munin millum 15 kr., ið er hægsta stig, og tær veruligu útreiðslurnar, tá hetta varð hildið neyðugt.

Nú framgongur av yvirlitinum í málinum at t. d. limir í yvirbúnaðarstevnunum einans fáa 8 kr. um dagin, og er hetta væl minni enn teir kunna klára seg við. Tað finnast eisini onnur almenn umboð, ið ikki fáa samsýning, sum sparir teir fyri figgjarlig tap, t. d. uttanbýggja sjórættarlimir, nevningar o. a.

Nevndin vil mæla til, at landsnevndin fær heimild at játta dýrtíðarviðbót í tílíkum førum, á sama hátt sum samtykt var í 1943 um endurgjald til straffamála vitnir.

Um gjaldið fyri panting varð tað, eins og greitt er frá í álitinum í fjør, gjørd ein bráðfengis skipan tann 11. mai 1943, soleiðis at gjaldið varð tvífaldað. Hetta kom av, at 3107 pantingarmál tá lógu ógreidd fyri løgtingsskatt. Henda bráðfengis skipan hevur verið í gildi síðani.

Tað er nevndini kunnugt, at tað ymsa staðni er ógviliga nógv í aftur-hond við panting fyri løgtingsskatt. Her má nevndin úttala, at hetta eigur at fáast í rættlag. Um tað ikki er gjørligt at fáa hetta gjørt á tann hátt, pantafútaskipanin nú er, so vil nevndin mæla til, at landsnevndin fær heimild til at gera ta broyting, ið neyðug er. Serliga kann tað teinkjast, at tað besta vil vera, um gjaldstovan meira beinleiðis tekur lut í hesum arbeiði og fær manning til tess. Til onnur skipan kemur í lag, heldur nevndin, at tann í 1943 ásetta bráðfengis skipanin við tvífaldaðum gjøldum eigur at standa við.

Spurningarnir um at hækka samsýningina til tann motorsakkøna og til skrivstovufólk fyri mynstring eru eisini nevndir í málinum. Nevndin heldur, at tað ikki soleiðis sum tað liggur fyri, er neyðugt at gera serligar reglur um hetta, tí tað má eisini havast í huga, at hesir menn hava teirra fasta arbeiði, har teir hava fingið vanliga dýrtíðarviðbót.

Við hesum viðmerkingum skal nevndin mæla tinginum til at samtykkja hetta

uppskot:

1. Løgtingið samtykkir at heimila landsnevndina et játta úr amtsgrunninum hækkaða samsýning fyri ymisk almenn størv á tann hátt, at tær nú galdandi samsýningar kunnu hækkast í minsta lagi til tær veruligu útreiðslurnar.
2. Bráðfengis skipanin frá 1943 um gjald fyri panting verður í gildi framvegis, tó fær landsnevndin heimild til at góðtaka broyting í nú galdandi skipan, um tað verður hildið neyðugt.

2. viðgerð 14. novbr. 3. viðgerð 17. novbr. Samtykt 21—0.

13. Reglur um bjarging av reka.

1. viðgerð 16. september. Framlagt 18. november.

Álit.

J. H. O. Djurhuus sakførari, hevur í skrivi, dagfest 4. juni 1944, biðið tingið um við lóg at fyriseta fastar og greiðar reglur fyri bjarging av reka.

Hann heldur fram, at slíkar reglur ikki tykjast lógfestar í Føroyum og skilar til, at eisini reglur fyri at ganga ótálmaður í haga og framvið strond eiga at vera fyrisettar í eini føroyskari lóg. Galdandi lóg um «Markfred» tykist ikki hóskandi her á landi.

Atvoldin til hetta, skrivar hann, er rættarmál um rættin til bjarging. Einki uppskot fylgdi við skrivinum og heldur eingin ætlan um, hvussu slík lóggáva skal skipast, men í málinum liggur hópur av rættarreglum og umnælum nýtt undir rættarmálum.

Soleiðis sum málið liggur fyri nevndini, viðkemur tað ikki sjálvari bjargingarlóggávuni, men eina bjargingarrættinum ella tí, sum enn á vissum plássum verður nevnt rekstøðin.

Nevndin heldur ikki at fyriliggjandi rættarmál kann elva nevndini til at koma fram við lógaruppskoti, men tað má ásannast, at ein tílík lógarskipan er tørvandi.

Tí verður mælt til, at hetta mál eins og lógin um «Markfred» verður beint til løgtingsins millumtinganevnd viðv. búnaðarmálum. Í hesum føri verður nevnt, at møguligar broytingar eisini kundu umhugsast har um broyting í sjálvari bjargingarlógini — Strandingslov —.

So staðt setir nevndin fram hetta

uppskot:

Málið verður at beina til løgtingsins millumtinganevnd viðv. búnaðarmálum til framførslu.

Eintak av álitinum verður sent J. H. O. Djurhuus, sakførara.

2. viðgerð 20. november. Samtykt 18—0.

14. Føroyskt sum lógarmál.

Framlagt 11. september. 1. viðgerð 15. september. Framlagt 29. september.

Álit.

Í tingsetuni 1943 (sí tingtíðindi 1943, síðu 217) var til viðgerðar at fáa føroyskt góðkent sum lógarmál, og varð tá samtykt, at øll lógaruppskot á tingi hareftir verða at samtykkja á føroyskum og donskum máli.

Hin føroyski fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) og sjálvstýrisflokkurin hava tann 8. september 1944 skrivað til tingið um at taka til viðgerðar, at ikki einans lógir, men eisini einhvør kunngerð ella reglugerð, sum samtykt er av løgtingi ella landsnevnd, og sum verður kunngjørd av amti ella løgtingsskrivstovuni, verða orðaðar á føroyskum máli. Eisini biðja teir tingið taka til viðgerðar støðuna hjá priseftiransingarráðnum, og áleggja tí verandi stjóra, at nýta føroyskt, um hann framvegis ætlar at halda áfram við at vera stjóri fyri priseftiransingini.

Málið hevur verið til viðgerðar á tingi og er beint í ymsamálanevndina, ið hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Thorstein Peterten og Rasmus Rasmussen) skulu gera hesar viðmerkingar til málið.

Eins og ein meiriluti í tingnevndini 1943 mugu vit halda, at tað beinasta vildi verið, at tað við lóg varð fastlagt, at føroyskt er lógarmálið, men vilja ikki seta uppskot samsvarandi, tí tað í fjør vísti seg, at tað ikki kann væntast meiriluti fyri hesum á tingi.

Uppskotið frá minnilutanum (P. M. Dam) í tingsetuni 1943 um, at øll lógaruppskot skulu samtykkjast á føroyskum og donskum máli varð samtykt, men tað sýnist at vera komin ein misskilningur í málið. Til dømis samtykti løgtingið kunngering um ferðapassareglurnar (sí tingtíðindi 1943, síðu 220) á føroyskum og donskum máli, men varð tað av amtinum einans kunngjørt á donskum máli; hetta er orsakað av tí, at amtið hevur lisið tingsamtyktina soleiðis, at tað einans eru lógarmál og ikki kunngerðingar (Anordningar og Bekendtgørelser) ið tingið hevur sagt, skulu vera á báðum málum. Tað má haldast at vera sjálvsagt, at teir sum í fjør atkvóðu fyri uppskotinum, vóru í tí trúgv, at hetta kom at galda eina hvørja almenna kunngerð, ið varð samtykt av Føroya løgtingi, fyri so at skulla kunngerast av yvirvaldinum.

Meirilutin setur tí uppskot um nýggja samtykt, orðað soleiðis, at henda misfatan ikki longur kann koma.

Tann næsti spurningur, ið liggur fyri nevndini, er málið, ið nýtt verður av tingstovnum. Í fjør samtykti tingið at áleggja øllum tingstovnum at nýta føroyskt mál í øllum førum, har ið umstøðurnar ikki gera tað neyðugt at nýta annað mál. Hetta varð millum annað kunngjørt fyri priseftiransingarráðnum. Tó at tað varð kunngjørt hesum tingstovni, komu brøv til landsnevndina og kunngerðir til bløðini framvegis frá hesum stovni á donskum máli. Ein landsnevndarmeiriluti samtykti so at endurnýggja tað, tingið hevði álagt nevndini, men fekk tað svar, at hetta bar ikki til, tí stjórin ikki vildi átaka sær ábyrgdina fyri at nýta føroyskt mál. Landsnevndarmeirilutin samtykti einaferð enn at áleggja ráðnum at nýta føroyskt mál samsvarandi tingsamtyktini í fjør, men einki batti, tí framvegis lýsir hesin tingstovni einans á donskum máli.

Meirilutin má framhalda, at tað ikki kann framførast nakað, ið talar fyri, at «umstøðurnar gera tað neyðugt at nýta annað mál enn føroyskt», soleiðis sum samtyktin í fjør var orðað, og má haraftrat vísa til tað, uppskotsstillarin í fjør viðmerkti um, at føroyskt mál áttí at verða nýtt allastaðni, har tann fulla peningaliga og siðmenniliga ábyrgdin lá hjá løgtingi, og tað má fultút sigast at vera støðan hjá ráðnum, har tingið betalir allar útreiðslur. Tað kann tí ikki vera ivi um, at tingið má fastbalda, at hesin tingstovni, eins og aðrir tingstovnar, skal nýta føroyskt mál, og at tann maður, ið ikki vil fylgja tingsins samtyktum, ikki framvegis eigur at halda fram sum fyristøðumaður fyri tingstovnin. Meirilutin setur uppskot samsvarandi.

Minnilutin (O. F. Joensen) setur einki uppskot fram í málinum.

Uppskot:

Frá *meirilutanum* (Th. Petersen og R. Rasmussen):

1. Øll lógaruppskot eins og uppskot til reglugerðir, ið tingið ella løgtingsins landsnevnd samtykkir til kunngeringar av tinginum, tingstovnum ella yvirvaldinum, verða at orða á føroyskum og donskum máli.
2. Øllum tingstovnum, harundir prísceftiransingarráðnum, verður álagt einans at nýta føroyskt mál í brævaskifti og í almennum kunngerðum, har ið umstøðurnar ikki gera tað neyðugt at nýta annað mál. Um tað er neyðugt at nýta annað mál, verður avgjørt av Føroya løgtingi ella, um tingið ikki er samlað, av løgtingsins landsnevnd.

2. viðgerð 2. oktober. 3. viðgerð 5. oktober. Pt. 1 samtykt 16—0, pt. 2 við 15—0.

---

15. Valrættaraldurin.

Framlagt 11. september. 1. viðgerð 15. september. Framlagt 12. oktober.

Álit.

Málið um at broyta valrættaraldurin frá 25 til 21 ár var fyri í tingsetuni 1943. Har var samtykt broyting, sum var kunngjørd sum «Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Valgretsalderen» nr. 10, 5. januar 1944.

Hin føroyski fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) og sjálvstýrisflokkurin hava við skrivi, 8. september 1944, biðið tingið um at taka málið til viðgerðar av nýggjum soleiðis, at orðið «ordinære» í § 4 í kunngerðini verður burturtikið.

Málið er beint í ymsamálanevndina, ið hevur býtt seg í ein meirilluta og ein minniluta.

Meirilutin (Thorstein Petersen og R. Rasmussen) heldur fram:

Okkara uppskot í tingsetuni 1943 gekk út uppá, at lógarkunngerðin skuldi koma í gildi beinan vegin. Undir viðgerðini í tinginum kom broytingaruppskot frá P. M. Dam o. fl., hareftir kunngerðin fyrst skuldi koma í gildi til fyrstu vanligu val, soleiðis, at 25 ára valrættaraldurin framvegis varð í gildi, um val skuldi komið vegna upploysan av Føroya løgtingi. Tað varð ikki sagt nakað um, hvat hetta broytingaruppskot grundaði seg á.

Undir viðgerðini av málinum í hesari tingsetuni er tað frá javnaðarmonnum framhildið, at ein mátti fara líðandi fram, og at ungfólkið mátti hava stundir til at búgva seg til at taka við rættindum sum veljarar.

Meirilutin má halda, at tíðin til at umhugsa politiski viðurskiftini hevur verið long nokk, serliga tí vit hava ta áskoðan, at ungfólkið í Føroyum er politiskt vaksið og búgvið. Vit meina tí, tað vildi verið beint at seta aldurin beinan vegin til 21 ár, og seta fram uppskot samsvarandi.

Vit mugu vísa á, at tað kann vera heldur óvist, nær ungfólkið fær valrætt eftir teimum reglum, ið samtyktar vórðu í fjør. Um Føroya løgting skuldi verðið heimsent, og nýval útskrivað í 1946, vil tað siga, at tann nýggi valrættaraldurin ikki fær gildi áðrenn 1950, og tá verða ungfólk, sum í 1943 vóru 21 ár, longu 28 ár. Eitt nýval kann eisini sigast at vera væl møguligt undir teimum óvanligu tíðum, vit liva í.

Ungfólkið í Tórshavn fær valrætt til Havnar býarstýri í heyst, men eftir teimum nú samtyktu og kunngjørdu reglum missa tey valrættin aftur til fyrsta løgtingsval, og tað heldur meirilutin ikki vera beint.

Um okkara uppskot um at seta regluna um 21 ára valrættaraldur í gildi beinan vegin, ikki skuldi fingið meiriluta á tingi, loyva vit okkum at seta annað uppskot fram til avgerðar. Um ein heldur, at royndartíð fyri ungfólk er neyðug — hvat vit ikki halda —, so eigur henda tíð at verða avmarkað. Vit skjóta tí upp, at greinin eigur at verða orðað soleiðis, at valrættaraldurin verður niðursettur líðandi við einum ári hvørt loypandi almanakkaár, so ungfólkið er vist í at fáa fullan rættin til 21 ára valrættaraldur í 1947.

Lóg. nr. 88, 15. mars 1939 »om ændret Opfattelse af forskellige Bestemmelser i borgerlig Straffelov Nr. 126 af 15. April 1930 med flere Love» ger í § 6 broyting í § 2 í løgtingslógini, 28. mars 1923, í § 7 broyting í § 5 í lógini, 27. mai 1908, um Havnar býarstýri og í § 8 broyting í § 2 lógini, 17. juli 1931, um kommunustýrini soleiðis, at tað ikki longur í hesum nevndu §§ er ásett, at valrættaraldurin er 25 ár, men í staðin víst til sama aldur, sum er galdandi fyri val til fólkatingið.

Meirilutin vísir tí á, at tað er neyðugt at broyta orðalagið í §§ 1—3 í kunngerðini nr. 10, 5. januar 1944. Vit seta tí uppskot um, at tað í eioari § verður ásett, at valrættaraldurin og aldurin fyri valføri til løgtingið, býráðið og sóknarstýrini verður lækkaður frá 25 til 21 ár, meðan treytirnar fyri valrætt annars verða óbroyttar eftir galdandi lógum.

Minnilutin O. F. Joensen vísir á støðu sína í 1942 og 1943 og setir einki uppskot fram.

Uppskot:

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM VALGRETSALDEREN.

§ 1.

Valgret og Valgbarhed til Færøernes Lagting, til Thorshavns Byraad og til Forstanderskaberne i Landkommunerne paa Færøerne tilkommer

enhver, der har fyldt sit 21de Aar og iøvrigt opfylder de i Lovgivningen foreskrevne Betingelser.

§ 2.

Pricipalt:

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks, og samtidigt ophæves Kundgørelse Nr. 10 af 5. Januar 1944.

Subsidært:

1. Stk.: Disse Bestemmelser træder i Kraft ved første ordinære Valg henholdsvis til Færøernes Lagting, kommunale Valg til Landkommunerne paa Færøerne og til Byen Thorshavns kommunale Styrelse. Samtidigt ophæves Kundgørelse Nr. 10 af 5. Januar 1944.

2. Stk.: Paa Lagtingsvalglisterne for Aarene 1944, 1945 og 1946 optages Uanset Bestemmelserne i § 1 i denne Kundgørelse kun de Mænd og Kvinder, der har fyldt henholdsvis deres 24de, 23de og 22de Aar saaledes, at den fastsatte Valgretsalder, 21 Aar, fuldtud indtræder fra 1. Januar 1947.

BRÁÐFENGIS ÁSETANIR FYRI FØROYAR UM VALRÆTTARALDURIN.

§ 1.

Valrætt og valføri til Føroya løgting, til Tórshavnar býráð og til kommunustýrini í sóknarkommununum í Føroyum hevur hvør, ið hevur fylt sítt 21da ár og annars uppfyllir tær treytir, lóggávan ásetir.

§ 2.

Principalt:

Hesar ásetanir koma í gildi beinan vegin, og samstundis fellur úr gildi kunngerð nr. 10, 5. januar 1944.

Subsidiert:

1. stk.: Hesar ásetanir koma í gildi til fyrstu vanligu val til Føroya løgting, stýrini fyri sóknarkommununar í Føroyum og Tórshavnar býráð. Samstundis fellur kunngerð nr. 10, 5. januar 1944, úr gildi.

2. stk.: Á løgtingsvallistarnar fyri 1944, 1945 og 1946 verða bertsettir teir menn og tær kvinnur, sum, burtursæð frá reglunum í § 1 í hesu kunngerð, hava fylt atvikavíst teirra 24da, 23da og 22da ár soleiðis, at tann fastsetti valrættaraldurin, 21 ár, kemur at galda fult frá 1. januar 1947.

2. viðgerð 16. oktober. 3. viðgerð 10 november. Uppskot meirilutans § 1 og § 2 subsidiert 1. stk. samtykt 15—0, meðan § 2 principalt og § 2 subsidiert 2. stk. fall 12—0.

---

16. Ólavsøkuting.

Framlagt 11. sept. 1. viðgerð 15. sept. Framlagt 21. september.

Álit.

Hin føroyski fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) og sjálvstýrisflokkurin hava í skrivi, dagfest 8. september 1944, biðið tingið taka uppaftur til viðgerðar málið um Ólavsøkuting, soleiðis at uppskotið, sett fram í tingsetuni 1943 (sí tingtíðindi, síðu 225), sum miðaði ímóti, at tingið verður sett Ólavsøkudag, verður samtykt.

Málið er beint í ymsamálanevndina.

Meirilutin í nevndini (Th. Petersen og R. Rasmussen) halda tað vera heinast, at aftur verður farið til Ólavsøkuting, og vísa á ta støðu, sum meirilutin í tingnevnd, ið hevði málið til viðgerðar í fjør,hevur tikið í málinum, og setur fram uppskot samsvarandi hesa støðu.

Minnilutin (O. F. Joensen) vísir á ta støðu, sum minnilutin í tingnevndini í fjør hevur tikið og setur einki uppskot fram í málinum.

Uppskot.

Frá meirilutanum (Th. Petersen og R. Rasmussen):

BRÁÐFENGIS ÁSETANIR FYRI FØROYAR
um
broyting í lóg fyri Føroyar av 28. mars 1923 um Føroya Løgting, sambært kunngerð nr. 249 av 24. juni 1939.

§ 16, tvey fyrstu punktir verða broytt til:

«Løgtingið kemur saman árliga í Tórshavn Ólavsøkudag, 29. juli, eftir at guðstænastan hevur farið fram. Tá hesin dagur er sunnudagur, verður tingið sett fylgjandi dag. Eftir viðmæli løgtingsins kann kongur fyri 2 ár ísenn áseta, at tingið verður sett annan dag enn Ólavsøkudag.»

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE
om
Ændring i Lov for Færøerne af 28. Marts 1923 om Færøernes Lagting jfr. Bekendtgørelse Nr. 249 af 24. Juni 1939.

§ 16, to første Punktum formuleres saaledes:

«Lagtinget samles efter forud afholdt Gudstjeneste aarlig i Thorshavn paa St. Olavsdag (den 29. Juli), medmindre denne indtræffer paa en Søndag, i hvilket Tilfælde Tingets Aabning finder Sted den følgende Dag. Efter Lagtingets Indstilling kan Kongen for 2 Aar ad Gangen bestemme, at Tingets Aabning skal finde Sted paa et andet Tidspunkt end St. Olavsdag.»

2. viðgerð 30. september. 3. viðgerð 5. oktober. Samtykt 14—0. (Ja atkvóðu: Poul Petersen, Dam, Patursson, Kjølbro, Robert Joensen, Rasmussen, Long, Henriksen, Danbjørg, Slættanes, Sørensen, Dahl, Ellefsen, Thorstein Petersen. Hinir atkvóðu ikki).

---

17. Økjan av seðlamongdini.

Framlagt 10. oktober. 1. viðgerð 10. oktbr. Framlagt 26. oktober.

Álit.

Amtið hevur við skrivi av 9. oktober 1944 gjørt tinginum kunnugt, at tað henda dag eru í umfar 10.990.380 kr. í peningaseðlum, tað vil siga, at markið 11 milliónir, sum er sett í kunngerð nr. 26, 26. august 1943, næstan er náað.

Amtið sigur frá, at tað tí er neyðugt at geva heimild til at senda fleiri seðlar í umfar, og setur fram uppskot til nýggja kunngerð hesum viðvíkjandi, soleiðis at tað verður loyvt at senda út 2 milliónir krónur í seðlum aftrat, ella tilsamans fyri 13 milliónir krónur.

Málið er beint til viðgerðar í fíggjarnevndini, og hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (P. Dahl, J. F. Kjølbro, R. Long og Th. Petersen) skal viðmerkja:

Í 1940, tá seðlagerð fyrstu ferð varð neyðug, setti minnilutin í nevndini (Th. Petersen) fram fullfíggjað uppskot til eina lóg um føroyskan seðilbanka. Hetta uppskot (sí skjal 38 til tingtíðindi 1940) fall á tingi. Serliga skal her verða vist til viðmerking í álitinum 1940, hvar tað m. a. stendur: «Fíggjarligt er einki prógvað, hvat tað vil siga, at «amtið» ger hetta «paa Nationalbankens Vegne» ella hvat tryggjan seðlarnir á henda hátt fáa. Einasta vissa tryggjan er sterling-pundini, og tey koma frá Føroyingum.

Meirilutin skal síðani visa til uppskot til seðilbanka framsett í eykatingsetuni í mars 1943 (sí tingtíðindi síðu 10) og meirilutans álit í tingmáli «landsbanki» í tingsetuni 1943 (sí tingtíðindi 1943 síðu 319), hvar tað verður framhildið, at meirilutin má halda tað tá, eins og alla tíðina síðan 1940, hava verið neyðugt at fáa umskipað okkara peningaviðurskifti soleiðis, at tað verða allir stættir, ið verða við til hetta arbeiði. Eisini skal tað verða nevnt, at tað eftir meirilutans hugsan er einasti vegur til at virka móti inflatión, at tað almenna stílar fyri seðlagerðini á ein hátt, hvar allir stættir eru við, og hvar landsbankin eisini tekur sær av spurninginum at gera tað møguligt hjá landsins borgarum at fáa rentað teirra pening, soleiðis at tey ikki liggja heima við peninginum í staðin.

Meirilutin skal vísa til hesa støðu, ið ikki er broytt fyri okkum, men má sjálvsagt ásanna, at eitt samfelag ikki kann halda fram, um tað ikki

er gjørligt at fáa tað seðlatilfar, ið samfelagið krevur til sítt samvirki. Tað kann vera, at tann peninganøgd, ið nú er í umfar, minnkar av sær sjálvum, men tað kann ein ikki rokna við, og meirilutin skal tí ikki, soleiðis sum viðurskiftini liggja, seta uppskot um eina nýggja skipan, tí tingmenn í fjør við atkvøðu vístu, at tað ikki er meiriluti fyri hesum.

Meirilutin setur so statt ikki fram uppskot um at broyta nakað í uppskotinum hjá amtinum.

Minnilutin (P. M. Dam og Johan Poulsen) setur ikki fram uppskot um nakra broyting í uppskotinum, sum amtmaðurin hevur lagt fyri tingið.

Minnilutin (Kr. Djurhuus) skal úttala, at tað má vera vandamikið fyri peningavirðið, at størri nøgd av seðlum kemur í umfar, og heldur ikki, at hetta er strangt neyðugt. Minnilutin setur einki uppskot fram, men vil í øðrum máli mæla til, at tikið verður alment lán fyri at fáa peningin rentaðan of fyri harav at minnka um nøgdina av peningi, sum er millum manna.

Uppskot

frá nevndini undantikið Kr. Djurhuus:

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM SEDDELOMLØB.

§ 1.

Udover de i Kundgørelserne Nr. 48 af 18. December 1940, Nr. 28 af 3. Juli 1942 og Nr. 26 af 26. August 1943 nævnte Beløb af indtil 11 Millioner Kroner Sedler udstedes yderligere Sedler til Paalydende indtil 2 Millioner Kroner.

§ 2.

Pengesedlerne udstedes af Amtmanden paa Danmarks Nationalbanks Vegne og er sikret paa samme Maade som de i Henhold til Kundgørelse af 18. December 1940 udstedte Pengesedler.

§ 3.

De i § 1 omhandlede Pengesedler er fra Udstedelsen lovligt Betalingsmiddel paa Færøerne sammen med dansk Skillemønt efter Reglerne i Lov Nr. 66 af 23. Maj 1873.

§ 4.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPAN FYRI FØROYAR UM SEÐLAÚTGÁVU.

§ 1.

Útyvir tann í kunngerðunum nr. 48, 18. december 1940, nr. 28, 3. juli 1942, og nr. 26, 26. august 1943, nevnda pening upp í 11 milliónir kr. í seðlum, verða aftrat útgivnir seðlar til ein pening upp í 2 mill. kr.

§ 2.

Pengaseðlarnir verða útgivnir av amtmanninum Danmarkar national-

banka vegna og eru tryggjaðir á sama hátt sum teir pengaseðlar, sum eru útgivnir sambart kunngerð, 18. december 1940.

§ 3.

Teir í § 1 nevndu pengaseðlar eru frá útgávudegnum lógligt gjaldoyra í Føroyum saman við donskum smápengum eftir reglunum í lóg nr. 66, 23. mai 1873.

§ 4.

Henda fyriskipan kemur í gildi beinan vegin.

2. og 3. viðgerð 26. oktober. Samtykt 20–1). (Nei atkvað Ellefsen. Atkvóðu ikki: Patursson, R. Joensen, K. Djurhuus, Slettenæs).

---

18. Prísásetan á vørur frá øðrum londum enn Bretlandi.

Framlagt 21. okt. 1. viðgerð 21. okt. Framlagt 29. nov.

Álit.

Prísansingarráðið skrívar 19. oktober 1944 til amtið um at fáa setstaka lóg um ásetan av prísum á vørur úr Íslandi. Ráðið heldur hetta vera neyðugt, tí tað annars er trupult at ansa eftir vøruprísunum í síni heild, og eisini tí tílík vøra við hvørt er keypt í smásølu í Íslandi og dýrkar tí okkara prísir óhóskindi. Ráðið viðleggur uppskot til lóg, og sendir amtið hetta til tingið við sínum viðmæli.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (K. Long, P. Petersen og Th. Petersen) skal vísa til tað, ið framført er í tingmálinum um prísir og lenir. Okkara stoða er tann, at vit neyvan kunnu vænta nakran bata uttan so, at prísansingarráðið verður broytt. Í hesum spurningi skulu vit haraftrat viðmerkja, at lógaruppskotið at kalla er eitt bann móti innflytan av vøru úr Íslandi, og sjálvt um tað má ásannast, at henda vøra mangan hevur verið dýr, so hevur hon komið væl við, tá trot hevur verið. Meirilutin setur tí einki uppskot fram í málinum.

Minnilutin (Kr. Djurhuus og J. P. Henriksen) kann mæla tinginum til at samtykkja uppskotið, ið sent er tinginum. Minnilutin setur so statt fram lógaruppskotið, tó soleiðis, at minnilutin (Kr. Djurhuus) í fyrstu syftu vil mæla til, at tað ikki í § 1 verður sett «vanliga», men í aðru syftu er samsintur við minnilutan (J. P. Henriksen).

Uppskot:

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE OM FASTSÆTTELSE AF PRISER FOR VARER, DER INDFØRES FRA ANDRE LANDE END STORBRITANNIEN.

I. Frá *minnilutanum* (Kr. Djurhuus) í fyrstu syftu:

Í § 1 í niðanfyri standandi lógaruppskoti verða orðini: «Denne maa normalt ikke» og «Hesin prísur má vanliga ikki» broytt soleiðis, at orðið «normalt» og «vanliga» verður strikað.

II. Frá *minnilutanum* (J. P. Henriksen og Kr. Djurhuus) í aðru syftu:

§ 1.

Varer, der er indført fra andre Lande end Storbritannien, maa ikke videresælges paa Færøerne, forinden Priskontrol-Raadet har modtaget Prisberegning over Varerne og har fastsat den Pris, til hvilken Varerne maa sælges. Denne maa normalt ikke overstige Prisen paa tilsvarende Varer, der kan indføres fra Storbritannien.

§ 2.

For de i § 1 omhandlede Varer skal Importøren snarest muligt og senest inden 7 Dage efter Varernes Ankomst til Færøerne indsende behørig Prisberegning til Priskontrolraadet i Overensstemmelse med Kundgørelse Nr. 51 af 19. December 1942.

Under særlige Omstændigheder kan Priskontrol-Raadet tillade, at Prisberegningen indsendes senere end i Stykke 1 angivet.

§ 3.

Overtrædelse af fornævnte Bestemmelse medfører Straf og Konfiskation efter Regleme i Kundgørelse Nr. 59 af 9. December 1941, jfr. Kundgørelse Nr. 41 af 28. December 1943.

§ 4.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

---

§ 1.

Tað er ikki loyvt í Føroyum at selja vørur, ið eru innfluttar frá øðrum londum enn Brettlandi, áðrenn prísansingarráðið hevur fingið prísútroknan fyri vørurnar og hevur ásett tann pris, sum tað er loyviligt at selja vørurnar fyri. Hesin prísur má vanliga ikki vera hægri enn prísurin á samsvarandi vørum, ið kunna verða innfluttar úr Brettlandi.

§ 2.

Fyri tær í § 1 umrøddu vørur skal innflytarin skjótast gjørligt og í seinasta lagi innan 7 dagar aftaná, at vørurnar eru komnar til Føroya, senda fullfiggjaða prísútroknan til prísansingarráðið samsvarandi kunngerð nr. 51 av 19. december 1942.

Undir serstøkum viðurskiftum kann prísansingarráðið loyva at prísútroknanin verður innsend seinri enn ásett í stykki 1.

§ 3.

Brot móti frammanundan nevndu reglum føra við sær revsing og konfiskatión eftir reglunum í kunngerð nr. 59 av 9. december 1941, sbr. kunngerð nr. 41 av 28. december 1943.

§ 4.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

2. og 3. viðgerð 30. november. Uppskot minnilutans pkt. I samtykt 14—0, men lógaruppskotið so broytt 11 fall við 7—0.

---

19. Frítíð við løn.

Framlagt 28. okt. 1. viðgerð 6. nov. Framlagt 20. nov.

Alit.

Tann 28. oktober 1944 kom til tingið eitt skriv frá Føroya arbeiðarafelag, dagsett 22. s. m., hvar felagið heitir á Føroya Løgting at fáa lidna í hesu tingsetu lóg um frítíð við løn fyri arbeiðarar. Teir halda fram, at ein skipan soleiðis, at feriumerkir verða latin við hvørju lønútgjaldan fyri 4 pct. av lønini vildi verið besti vegur til at fáa spurningin loystan.

Málið var til viðgerðar í tingsetuni 1943 (sí løgtingstíðindi 1943, s. 210) og vóru tá tvey uppskot frammi, uttan at nakað varð samtykt.

Meirilutin (Kr. Djurhuus, Poul Petersen og Th. Petersen) kann ikki viðmæla at tingið í ár samtykkir tað uppskot, sum í fjør var frammi um at seta í verk eina skipan við feriumerkjum. Tann skipan, ið gjørd var í 1940, hevur roynst væl, og sjálvtum tað kanska hendir, at onkur ikki kann fáa sína frítíð við løn eftir hesi skipan, so vil tað at fara yvir til eina nýggja skipan væntandi fara at ráma onkran annan. Tann skipan, ið nú er í gildi við kunngerð nr. 28 av 20. september 1940 loysir teir flestu spurningar, men nevndin hevur fingið ávíst, at tað er eitt glopp í lógini. Um ein arbeiðari verður uppsagdur frá plássinum í tíðarskeiðinum 1. mai til 30. september og ikki hevur fingið feriu, so missur hann hana, tó at hann væl kann hava arbeitt hjá sama arbeiðsgevarar í nógvar mánaðar. Meirilutin vil mæla tinginum til at gera lógbroyting soleiðis, at ein arbeiðari kann krevja sín rætt, eisini innanfyri nevnda tíðarskeið, um so er, at hann verður uppsagdur frá arbeiðinum.

Minnilutin (J. P. Henriksen og R. Long) heldur tað vil vera beint at nýggj lóggáva um feriumerkir verður sett í gildi, so skjótt tilfar kann skaffast til vegar. Minnilutin setur tí fram uppskot um hetta, men kann annars í aðru syftu styðja uppskotið hjá meirilutanum um at gera eina broyting í tí nú galdandi lóggávu.

Uppskot:

1. Frá *meirilutanum* (Kr. Djurhuus, P. Petersen og Th. Petersen):

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE
OM
ÆNDRING I KUNDGØRELSE NR. 28 AF 20. SEPTEMBER 1940
OM FERIE MED LØN.

I Kundgørelse Nr. 28 af 20. September 1940 om Ferie med Løn føjes til § 2 som nyt 3. Stykke:

Saafremt nogen Arbejder opsiges til Fratrædelse i Tidsrummet 1. Maj—30. September, er han berettiget til Ferie med Løn, saafremt han iøvrigt opfylder Betingelserne herfor, naar han fremsætter Krav overfor Arbejdsgiveren inden han fratræder sin Plads.

Í kunngerð nr. 28 av 20. september 1940 um frítíð við løn verður til § 2 sett sum nýtt 3. petti:

Um nakar arbeiðari verður uppsagdur til fráfaran í tíðarskeiðinum 1. mai—30. september, hevur hann rætt til frítíð við løn, um treytirnar annars eru til tess, tá hann setir krav fram fyri arbeiðsgevara sínum áðrenn hann fer úr plássinum.

2. Frá *minnilutanum* (J. P. Henriksen og R. Long):

Landsnevndini verður givið upp í hendi skjótast gjørligt at útvega tørvandi frítíðarmerkir og bøkur, og síðani stíla fyri umsiting av frítíðarlógini.

Tá tilfar er skaffað til vegar fær landsnevndin heimild til at seta í gildi tað av tinginum í 1941 samtykta uppskot til broytan í frítíðarlógini við teimum avvikum og møguligum millumbilsreglum, sum amtið eftir tilmæli landsnevndarinnar heldur vera tørvandi soleiðis, at tey, sum eftir galdandi reglum eiga frítíð við løn í 1945, fáa henda rætt óskerdan.

Í lógini verða orðini «fast beskæftiget» broytt til «beskæftiget».

2. viðgerð 22. november. 3. viðgerð 30. november. Meirilutauppskotið samtykt 21—0. Minnilutauppskotið fall 9—0.

20. Lóg um hundar.

Framl. 2. november. 1. viðgerð 6. november. Framl. 15. november.

Álit.

Landfútin hevur tann 7. september 1944 skrivað til amtið, at tað serliga í Havn ofta eru klagur um hundar, ið ganga leysir, og tekur hann tí uppaftur spurningin um at seta í gildi lógina nr. 164 frá 18. mai 1937 um hundar, ella eina minni umfatandi lógreglu, soleiðis sum tingið hevði til viðgerðar í tingsetuni 1940, uttan at uppskotið tá varð samtykt.

Amtið skrivar tann 16. oktober 1944 aftur til fútan, at tað má haldast ivasamt, um ein tílík lóg kann haldast, og spyr amtið fútan um uppskotið kortini skal leggjast fyri tingið, og úttalar amtið, at tað soleiðis sum umstøðurnar eru, ikki kann fáa amtsins viðmæli.

Fútin skrivar so tann 23. oktober 1944, at hann ikki er í iva um, at ein lógregla vil verða til bata og vil verða aktað, og málið er síðan lagt fyri tingið, har tað er víst til viðgerðar í ymsamálanevndini.

Nevndin skal vísa til viðgerðina av hesum máli í tingsetunum 1938 og 1940 (sí tingtíðindi hesi ár síðu 143 og 121), og skal mæla tinginum til, at sett verður í gildi ein lógregla svarandi til tað, ið lá fyri tingi í 1940, og sum tá varð samtykt í §§, meðan lógarreglan sum heild fall.

Nevndin heldur tað vil verða beint og neyðugt at gera viðmerking til § 2, um at lógarreglan, um hon verður sett í gildi uttanfyri Havnina, ikki nertir við tær nú galdandi reglur fyri góðtiknar seyðahundar.

Nevndin mælir so statt tinginum til at samtykkja hetta

Uppskot:

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE
OM
HUNDE.

§ 1.

I Thorshavns Kommune er det forbudt at lade Hunde færdes paa Gader, Veje, Stier eller Pladser m. v., der er aabne for almindelig Færdsel, uden at de enten føres i Baand eller er i Følge med en Person, som har fuldt Herredømme over dem. En Hund anses ikke for at være under Ledsagelse, fordi den er under Tilsyn fra Besidderens Bolig eller Forretningslokale. Føres Hunde i Baand, skal dette være saa kort, at Hunden holdes tæt ind til Ledsageren. Saafremt Hunde paa de nævnte Steder færdes løse uden at være i Følge med en Person, som har fuldt Herredømme over dem, lader Politiet dem optage og fremlyse; hvis Besidderen ikke inden 3 Døgn indløser dem ved at betale de Udgifter, som Optagelsen og Fremlysningen har foranlediget, lader Politiet dem dræbe. Skønner Politiet, at Omkostningerne ved Fremlysningen vil overstige den optagne Hunds Værdi, kan Hunden uden Fremlysning dræbes.

§ 2.

I Kommuner udenfor Thorshavn kan Forstanderskabet med Lagtingets Samtykke lade Bestemmelserne i § 1 træde i Kraft, dog saaledes at de for godkendte Faarehunde fastsatte Regler ikke berøres af de nye Regler.

§ 3.

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

BRÁDFENGIS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR
UM
HUNDAR.

§ 1.

Í Tórshavnar kommunu er tað forboðið at lata hundar ganga á breytum, vegum, gøtum ella plássum o. ø., sum eru opin fyri almennari ferðslu uttan at teir annaðhvørt verða leiddir í bandi ella fylgjast við manni, sum hevur fult vald á teimum. Hundur verður ikki hildin at verða fyldur, um hann er undir eftirliti frá bústaði eigarans ella sølubúð hansara. Verður hundurin leiddur í bandi, skal tað vera so stutt, at hundurin verður hildin nær inn at honum, ið leiðir hann. Gauga hundar leysir á teim nevndu støðum uttan at vera í fylgi við manni, sum hevur fult vald á teimum, letur løgregluverndin teir taka upp og lýsa; um eigarin ikki innan 3 samdøgur loysir teir inn við at rinda tær útreiðslur, sum upptøkan og lýsingin hava volt, letur løgregluverndin teir drepa. Heldur løgregluverndin, at útreiðslurnar við lýsing fara uppum virðið á tí upptíkna hundinum, kann hundurin uttan lýsing verða dripin.

§ 2.

Í kommunum uttanfyri Tórshavn kann sóknarstýrið eftir samtykt frá løgtinginum lata fyriskipanirnar í 1. § koma í gildi, tó so at tær fyri góðkendar seyðahundar ásettu reglur ikki verða nervaðar av teim nýggju reglunum.

§ 3.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

2. viðgerð 17. november. 3. viðgerð 22. november. Samtykt 14—0.

---

21. Umsókn frá Føroya motorpassarafelag.

Frl. 16. nov. Loyvið givið viðgera 20—0. 1. viðgerð 17. nov. Framlagt 24. november.

Álit.

Føroya motorpassarafelag søkir tingið um at fáa gjørt tað loyvi-ligt, at teir taka upp tingingar við reiðararnar um nýggjan lønsáttmála, óbundnir av lønsteðglógini.

Teir vísa til, at teirra løn einans hevur verið 50 kr. um mánaðin meira enn hjá einum fiskimanni, og at teir fyrst nú kunnu taka upp ser-ligar samráðingar, meðan teir fyrr hava verið undir sáttmálanum hjá Fiski-mannarelagnum.

Nevndin heldur, tað er góð grund til at umsóknin verður játtað, og setur fram hetta

uppskot.

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE
om
ÆNDRINGER I KUNDGØRELSE NR. 6 AF 23. MARTS 1943 OM PRISER, ARBEJDSLØNNINGER M. M.

§ 1.

Bestemmelserne i § 5 i Kundgørelse Nr. 6 af 23. Marts 1943 skal ikke være til Hinder for, at «Føroya Motorpassarafelag» efter Forhand-ling med Rederierne indgaar Overenskomst om højere Lønninger for sine Medlemmer end pr. 15. Marts 1943 gældende, ligesom Bestemmelserne heller ikke skal være til Hinder for, at der ved Voldgiftsafgørelse efter Kund-gørelse Nr. 63 af 15. December 1941 fastsættes højere Lønninger for Med-lemmerne af nævnte Forening end pr. 15. Marts 1943 gældende.

De Lønninger, der fastsættes ved den første endelige Overens-komst eller første Voldgiftsafgørelse efter nærværende Bestemmelsers Ikrafttræden, kan ikke forhøjes ved senere Overenskomst eller Voldgifts-afgørelse.

§ 2.

Disse Bestemmelser træder straks i Kraft.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR
um
BROYTAN AV KUNNGERÐ NR. 6. 23. MARS 1943 UM PRÍSIR, ARBEIÐSLØNIR O. A.

§ 1.

Reglurnar í § 5 í kunngerð nr. 6, 23. mars 1943, skulu ikki hindra, at Føroya motorpassarafelag eftir tingan við útgerðarmenninar gera sátt-mála um hægri løn fyri limir felagsins enn ta, sum var galdandi 15. mars

1943, eins og reglurnar ikki skulu hindra, at ásett verður við gerðadómi, sbr. kunngerð nr. 63, 15. december 1941, hægri løn fyri limirnar í nevnda felagi enn ta, sum var galdandi 15. mars 1943.

Tær lønir, sum ásettar verða við fyrstu endaligu semju ella fyrsta gerðadómi, aftaná at hesar fyriskipanir eru komnar í gildi, kunnu ikki verða hækkaðar við seinri semju ella gerðadómi.

§ 2.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

2. viðgerð 27. nov. 3. viðgerð 30. nov. Samtykt 23—0.

XI. Strandferðaskipið.

«Smiril».

A. 1. viðgerð 7. okt. Framlagt 25. nov.

Álit.

Smirils administrator hevur lagt fyri tingið roknskapin fyri tíðarskeiðið 1. april 1943 til 31. mars 1944 og fylgiskriv av 17. april 1944 við ymiskum viðmerkingum til roknskapin.

Tær samlaðu útreiðslurnar eru kr. 340.037,06 móti kr. 287.236,05 í seinasta roknskaparári, altso ein meirútreiðsla av kr. 52.801,01.

Til inntøkurnar viðmerkir administrator:

I. Farmagjaldið er vaksið við kr. 7.926,77.

II. Ferðapeningur, ið seinasta ár var kr. 56.489,50, er vaksin við kr. kr. 36.086,09 til kr. 92.575,59.

Hetta kemur fyri ein part av, at returferðaseðlar fullu burtur í februar 1943.

Útreiðslurnar:

A. Manningarlønin er 2.274,40 kr. minni enn seinasta ár. Atvoldin til hetta er, at tað hevur verið minni sjúka millum manningina og tessvegna minni útreiðslur til avloysarar.

B. Kostarhaldið er vaksið nakað, nevniliga 2.019,56 kr. Hetta kemur av teim høgu kjøtprísunum.

C. Kolabrúkið hevur verið nakað tað sama sum seinasta ár, bert 5 tons meira, ialt 1.072,5 tons; ein meiraútreiðsla uppá kr. 3.318,00, ið kemur av hægri lossingarløn.

Administrator hevur viðvikjandi kolabrúkinum viðmerkt, at vørubandilin, sum hevur selt kol til «Smiril», hevur sagt frá, at tað má roknast við einari eyka rokning fyri kol, orsakað av hægri innkeypsprísum. Um so verður, kemur undirskotið at verða størri, enn roknskapurin vísir.

D. Olja og tvistur o. a. er vaksið ca. 2.000 kr.

E. Umsitingin er ein mun hægri enn seinasta ár, og kemur av eini eykaútreiðslu, tí tað var neyðugt, at «Smiril» fór á bedding áðrenn vanligt eins og beholdningurin av wire, ristum o. ø. var kr. 2.500. Postfluttningurin er vaksin við 1.000 kr.
Til eykafar eru útreiðslurnar vaksnar ca. kr. 11.775,00, ialt kr. 18.375,00, «Rókur» 10.200,00 kr., «Pride» 4.550,00 kr., «Morgunstjørnan» kr. 3.531,00 og motorbátur Hvalbø—Tvøroyri 1 túr kr. 104,00.

L. Manco er vaksið nógv, nevniliga kr. 1.316,89, ialt kr. 3.051,89. Hesin partur má eftirkannast, her má vera nakað skeivt, tá vørur hvørva og ikki finnast aftur.

M. Til útreiðslurnar í telefon, telegram, prenting verður viðmerkt, at fyri ca. 1.800,00 kr. í prentlutum liggja á goymslu.

N. Avgreiðslan í Havn. Harinnundir kemur løn til V. Debess kr. 2.400, húsaleiga 1¼ ár kr. 750,00.

Smiril skal so skjótt sum umstøður eru til tess hava 12-ára klassa. Hetta vil óivað kosta ógvuliga nógv.

Fyri at tryggja rutuna til Sands og Skúvoyar hevur administrator fingið tilboð frá firma D. P. Højgaards einkju, Toftir, um leigu av m.b «Morgunstjørnan» á líknandi hátt sum seinasta ár.

Sum tað sæst av roknskapinum hevur «Smiril» eitt rakstrarundirskot seinasta ár, stórt kr. 104.795,20. Harumframt kemur sum áður nevnt ein eyka rokning fyri kol.

Nevndin heldur, at raksturin av «Smiril» eigur at verða skipaður á betri hátt, og nevndin hevur haft eina samrøðu við skiparan, stýrimannin og hovmeistarin á «Smiril», har ymiskir møguleikar fyri at økja um inntøkurnar og lætta um útreiðslurnar vórðu viðgjørdir.

1. Tað varð framhildið at nú, tá ið «Smiril» ikki siglir týsdag, eigur at verða bunkað so mikið tíðliga á degi, at ikki arbeiðið kemur undir yvirtíð. Eisini eigur at verða ansað, at kol, sum kemur umborð, verður kontrollerað.
2. Tað var gjørt nevndini kunnugt, at ferðafólk ofta hava meira í viðføri enn hvat rímiligt kann roknast. Sjálvandi eiga ferðaskrín og klædnasekkir at roknast sum ferðagóðs, sum sjómenn kunnu hava í viðføri.
   Tað hevur verið framhildið, at fólk viðhvørt hava grindasekkir, kjøt og fugl o. a. við sær uttan at betala farmagjald, og er hetta ikki beint.
   Administrator og stýrimaður eiga at ansa eftir tílíkum, so at hetta kann haldast innan fyri rímiligt mark.
3. Nevndin heldur eisini, at Smiril fær ov lítið fyri at flyta postin, bert 25.000,00 kr., eisini av tí, at tað verður sent sum postur nógv sum átti at fara sum farmagóðs.
   Um tað er nakað mark fyri hesum, eigur at verða eftiransað, at ikki slík vøra, sum verunliga er farmagóðs, verður flutt sum postur. Nevndin hevur haft samráð við postmeistaran um hetta. Hann heldur seg ikki at kunna ganga við til at hækka peningin fyri postfluttning. Tað hevur verið haft frammi í nevndini, at roknskapurin vildi sæð betri út, at løgtingið gav studning so stóran, sum undirskotið av postfluttninginum er, men heldur nevndin, at tað ikki er til nakra nyttu at seta uppskot um hetta. Annars hevur poststjórnin bindandi semju við løgtingið, sum kann verða uppsøgd, um løgtingið ynskir tað.

Umbyggjan av «Smiril».

Tað er nevndini kunnugt, at 2. kabútt á «Smiril», ið er frammi í skipinum, er til lítla og onga nyttu fyri ferðafólkið, og við tað, at tað má sigast at vera ódemokratiskt at býta ferðafólk í tveir klassar, heldur nevndin, at tað mest hóskandi fyri allar partar vil vera, at 2. kabútt verður umgjørd til manningina, sum nú býr í afturskipinum, og so nýta mannskapsrúmini til ferðafólkið, hvarvið manningin vil fáa betri likindir og ferðafólkið fáa nøkur kømur, sum tað er stórur tørvur á. Nevndin setur so statt uppskot um eina sovorðna umbygging, ið kann fara fram, meðan skipið siglur, við at hava ein ella tveir timburmenn umborð soleingi, og kann tað roknast við, at ein sovorðin umbyggjan kann verða gjørd fyri nakrar fáar túsund krónur.

Tað eigur eisini at verða umhugsað at flyta akkerspælið upp á bakkan, og so undir bakkanum gera 3 messir fyri manningina og møgulig kømur til ferðafólkið. Hendu umvølan kann bert fara fram, tá ið skipið aftur skal fara á bedding fyri at skravast og málast, og vil nevndin seta uppskot um, at landsnevndin fær upp í hendi at greiða hetta best møguligt.

Tað beinasta vildi verið, at brúgvin og afturhúsið varð samanbygt, hvarvið tað vildi verið vunnið ógvuliga nógv pláss fyri ferðafólki.

Afturlastin átti so at verið tikin burtur og eisini umgjørd, men við tað at forlastin er rættiliga rúmlig, og at «Smiril» meiri sjáldan hevur báðar lastir fullar, so vil skipið álíkavæl hava nóg stórt pláss fyri góðsinum.

Við tað at hetta krevur størri umhugsan og plauleggjan, verður tað skotið upp, at landsnevndin fær upp í hendi at fáa til vega plan og yvirlit yvir eina sovorðna byggjan.

Roknskaparførslan.

Við tað at nevndin veit, at rokningar verða útgoldnar uttan at tær frammanundan eru váttaðar av tí ávarðandi manninum umborð, setur nevndin uppskot um, at administrator hereftir ikki má útgjalda nakra rokning, fyrr enn hon er váttað av skipara og stýrimanni, tá ið hon viðvíkir sjálvum skipinum, av maskinmeistaranum, tá ið rokningin viðvíkir maskinuni, og av hovmeistaranum, tá ið rokningin viðvíkir provianti o. t.

Procentir til manningina.

Í 1938 og 1940 varð tað givið manningini procentir aftrat tí føstu lønini (sí løgtingstíðindi 1938, síðu 158, og løgtingstíðindi 1940, skjal 28, síðu 6). Hetta er seinri tikið aftur.

Nevndin heldur, at tað aftur eigur at verða givið procentir sum frammanundan og setur so statt uppskot um hetta, og heldur nevndin hetta vera rímiligt sum dýrtíðarviðbót, síðan hýran seinastu ferð í 1942 varð fastløgd av landsnevndini.

Hækkan av farma- og ferðapeningi og postfluttningi.

Eftir hvat ið nevndin dugir at skilja, eru takstirnir fyri fluttning við «Smiril» ikki samsvarandi prísstigið, og setur nevndin so statt uppskot um, at administrator verður álagt eftir samráðing við prístalsnevndina og postmeistaran at hækka takstirnar hóskandi.

Skjótari sigling.

Fyri at fremja siglingina fyri Smiril í teim einstaku túrunum heldur nevndin, at øll manningin, frá skipara til fýrbøtara og messudrong, eigur at skiftast at hjálpa til við at lasta og lossa, so ferðatíðin verður styttst møgulig millum plássini. Eisini eigur tað at verða heitt á administrator at áleggja avgreiðslunum at fremja lossing og lasting skjótast møguligt.

Í Havn hevur skipið ein hjálparmann, Valdemar Debess. Í staðin fyri, at hann nú bert hjálpir til við spælinum, eigur hann at verða fastur vaktarmaður, hvørja ferð «Smiril» liggur við kai í Tórshavn.

Uppskot um frammanfyri standandi verður sett fram.

Tað er vorðið sagt, at 1. kahyt á «Smiril» er illa viðlíkahildin og tørvar ymiskt sum linoleum, polstring o. a. Nógv av hesum er ikki umvælað síðan «Smiril» kom og treingir harðliga til pábót.

Nevndin er samd um, at umvøling eigur at verða gjørd, so skjótt sum líkindir eru til tess.

Nevndin heldur, at spurningurin um sølu av «Smiril» eigur at verða uppaftur tikin, og at landsnevndin fær upp í hendi at bjóða «Smiril» út til sølu og útvega tilboð uppá hóskandi motorfar í «Smiril's» stað.

Søla má tó ikki fara fram uttan, at innanoyggjasamferðslan er tryggjað. Nevndarformaðurin hevur haft samrøðu við Mr. Quarrell, ið bjóðaði sær til at kanna líkindini til at fáa bygt hóskandi far í «Smiril's» stað, so skjótt sum hann kemur aftur til Onglands, og senda løgtinginum boð, um hetta kann eydnast.

Nevndin hevur frá administrator fingið hesar upplýsingar um «Smiril's» túrar frá Tórshavn vestureftir og norðureftir:

Vestureftir:			Norðureftir:		
10. aug.	232,60 kr.		15. aug. . . .	47,00 kr.	
17. »	882,25 »	(Mykines)	29. »	176,40 »	
25. »	329,30 »		5. sept. . . .	61,00 »	
31. »	200,20 »		12. » . . .	444,05 »	óvanligan eplafarm
7. sept. . . .	344,75 »				
14. » . . .	653,00 »	(Mykines)	19. » . . .	591,75 »	—
22. » . . .	341,20 »		26. » . . .	58,10 »	
29. » . . .	246,30 »		4. okt.	581,55 »	
5. okt.	376,95 »		10. »	443,45 »	
14. »	387,45 »				
20. »	812,50 »	(Mykines)			
	4.806,50 kr.			2.403,30 kr.	

Uppskot

frá *allari nevndini:*

1. Roknskapurin fyri «Smiril» fyri árið 1. apríl 1943 til 31. mars 1944 verður góðkendur.
2. Landsnevndin fær upp í hendi at bjóða «Smiril» út til sølu og útvega tilboð uppá hóskandi motorfar í «Smiril's» stað.
   Tá hóskandi boð liggja fyri, verður málið aftur at leggja fyri landsnevndina. Søla má tó ikki fara fram uttan, at innanoyggjasamferðslan er tryggjað.

3. Givið verður landsnevndini upp í hendi at seta ferðaætlan fyri «Smiril» í gildi fyri tíðarskeiðið 1. apríl til 1. oktober 1945 og útvega í sama tíðarskeiði hóskandi far at sigla til Sands og Skúvoyar.

Frá *meirilutanum* (Kr. Djurhuus og Pauli Dahl):

4. Tingið góðkennir hesa ferðaætlan fyri «Smiril» fyri tíðarskeiðið 1. december 1944 til 1. apríl 1945:

Hvønn mánadag kl. 9:
Tórshavn—Skálavík—Tvøroyri—Vág.

Hvønn týsdag kl. 9:
Vág—Tvøroyri—Skálavík—Tórshavn.

Hvønn miðvikudag:
liggur Tórshavn.

Hvønn hósdag kl. 9:
Tórshavn—evt. Skálavík—Tvøroyri—Vág.

Hvønn friggjadag kl. 9:
Vág—Tvøroyri—evt. Skálavík—Tórshavn.

Hvønn leygardag kl. 9:
Tórshavn—Koltur—Miðvág—Vestmanna—Tórshavn.

Siglt verður til Mykinesar, Bíggjar og Sørvágs, tá ið likindir og orsøk eru til tess, tó um gjørligt, minst eina ferð um mánaðan. Tá so er, verður ferðin Tórshavn—Vágarnar—Vestmanna—Tórshavn sigld leygardag og sunnudag.

Frá *minnilutanum* (S. Ellefsen og A. Sørensen):

5. Tingið góðkennir niðanfyri standandi ferðaætlan fyri «Smiril»:

Tórshavn—Suðuroy		**Suðuroy—Tórshavn**	
Tórshavn—Skálavík—Trongisvág—Vág	*Tórshavn—Skálavík-Vág-Trongisvág*	*Vág-Trongisvág-Skálavík—Tórshavn*	*Trongisvág—Hvalbø—Skálavík—Tórshavn*
Leygardag 2/12		Mánadag 4/12	
	Hósdag 7/12		Friggjadag 8/12
Týsdag 12/12		Mikudag 13/12	
Leygardag 16/12		Mánadag 18/12	
	Hósdag 21/12		Friggjadag 22/12
Sunnudag 24/12		Mikudag 27/12	
Friggjadag 29/12		Leygardag 30/12	
	Hósdag 4/1		Friggjadag 5/1
Týsdag 9/1		Mikudag 10/1	
Leygardag 13/1		Mánadag 15/1	
	Hósdag 18/1		Friggjadag 19/1
Týsdag 23/1		Mikudag 24/1	
Leygardag 27/1		Mánadag 29/1	
	Hósdag 1/2		Friggjadag 2/2
Týsdag 6/2		Mikudag 7/2	
Leygardag 10/2		Mánadag 12/2	
	Hósdag 15/2		Friggjadag 16/2
Týsdag 20/2		Mikudag 21/2	
Leygardag 24/2		Mánadag 26/2	

Tórshavn–Fuglafjørð–Klakksvík

Týsdag 5/12
Týsdag 19/12
Hósdag 28/12
Týsdag 2/1
Týsdag 16/1
Týsdag 30/1
Týsdag 13/2
Hósdag 22/2

Klakksvík–Tórshavn

Mikudag 6/12
Mikudag 20/12
Hósdag 28/12
Mikudag 3/1
Mikudag 17/1
Mikudag 31/1
Mikudag 14/2
Friggjadag 23/2

Tórshavn–Koltur–Miðvág–Vestmanna.

Leygardag 9/12
Hósdag 14/12
Leygardag 23/12
Leygardag 6/1
Hósdag 11/1
Leygardag 20/1
Hósdag 25/1
Leygardag 3/2
Hósdag 8/2
Leygardag 17/2
Týsdag 27/2

Vestmanna–Miðvág–Tórshavn.

Mánadag 11/12
Friggjadag 15/12
Leygardag 23/12
Mánadag 8/1
Friggjadag 12/1
Manadag 22/1
Friggjadag 26/1
Mánadag 5/2
Friggjadag 9/2
Mánadag 19/2
Mikudag 28/2

Landsnevndin verður heimilað til at samtykkja ferðaætlan fyri mars 1945.

6. Givið verður landsnevndini heimild til
   a. at fyrireika tær í álitinum nevndu umbyggingar og umvølingar.
   b. at seta nærri reglur fyri váttan av rokningum áðrenn administrator rindar tað, sum ávíst í alitinum.
   c. at áseta nærri reglur viðvíkjandi procentum til manningina, sbr. álitið.
   d. at hækka ferða- og farmagjøldini sum umtalað í álitinum.
   e. at samtykkja reglur fyri at fremja siglingina og fáa í lag skjótari ferming og uppskipan.

Broytingaruppskot

frá nevndini:

I. Til petti 6, a verður sett:
Tó so, at byggingin av mannskapsrúminum verður givin administrator upp í hendi at seta í verk beinan vegin.

II. Petti 6, c, verður broytt til:
Manningin verður frá 1. december at rokna at fáa goldið fylgjandi procentir sum samsýning fyri yvirarbeiði:

Skiparin	1 pct.	av fraktini,
Stýrimaðurin	1 pct.	„ —
1. matrósur	1 pct.	„ —
2. matrósur	¾ pct.	„ —

3. matrósur	½ pct.	av fraktini,
Hovmeistarin	1 pct.	» billetsøluni,
Kokkurin	10 pct.	» restauratiónssøluni (matsøluni).

2. viðgerð 27. november. 3. viðgerð 1. december. Pt. 1 samtykt 25—0, pt. 2 við 16—0, pt. 3 við 22—0, pt. 4 við 18—0, pt. 5 datt burtur. Broytingaruppskot pt. 6 a samtykt 19—0, broytingaruppskot pt. 6 c við 17—0 og pt. 6 so broytt við 19—0.

B. Framlagt 4. oktober.

Uppskot

frá Ellefsen o. fl.:

Spurningurin um søla av strandferðaskipinum «Smirli» er til viðgerðar í Smirlanevndini.

Tað er upplýst, at góðar vónir eru, at skipið kann seljast fyri góðan pris. Tað er eisini upplýst, at nevndin kann útvega m/s. «Norðfarið» ella «Silverspray» í leigu til røkjan av sigligini uppá Suðuroynna, fyri fyrst.

Nevndin hevur sagt tinginum frá, at avgerð má takast nú, um «Smiril» skal seljast ella ikki, áðrenn fram verður hildið við tingingunum við keyparan.

Tað er sjálvsagt ikki lætt hjá tingmonnum at taka avgerð í hesum máli, so leingi óvissa er um, hvussu langt tíðarskeið kann koma at ganga til nýmótans skip kann fáast í staðin fyri «Smiril».

Um hetta tíðarskeið kann ásetast til í longsta lagi til 11 mánaðir frá søludegnum, vilja vit undirritaðu biðja tingið um at samtykkja søluna.

So statt seta vit fram soljóðandi uppskot til avgerðar:

Uppskot.

Løgtingið samtykkir, at tingsins Smirlanevnd fær heimild til bindandi fyri tingið at selja «Smiril», um nevndin fær vissu fyri, at annað vælhóskandi skip kann útvegast seinast 1. september 1945.

2. viðgerð 6. oktober. Fall 12—0. (Ja atkvóðu: Poul Petersen, Paturson, Kjølbro, Robert Joensen, Rasmussen, Long, Jensen, Slettenæs, Sørensen, Dahl, Ellefsen, Thorstein Petersen. Hinir atkvóðu ikki).

XII. Kommunal mál.

1. Decisión av kommunuroknskapum.

Framlagt 14. nov.

Álit.

Kommunala nevndin hevur havt samráð við løgtingsrevisor og stjóran fyri løgtingsskrivstovuni viðvíkjandi kommunuroknskapum.

Í 1933 (sí løgtingstíðindi 1933, s. 226 og skjal 5) vórðu samtyktar reglur um roknskaparførslu hjá kommununum. Nevndin heldur tað vera beint og neyðugt at minna kommunustýrini á hesar reglur, sum ikki allar verða hildnar. Serstakliga eigur at verða minnt á reglurnar um kassaeftirlit.

Har varð samtykt soljóðandi:

«1. Saavel Forstanderskaberne som Lokalrevisor bør jævnlig foretage Kasseeftersyn.

Om hvert Eftersyn bør der ske Tilførsel i Forhandlingsprotokollen og i Kassebogen.

2. Naar Aarsregnskabet er afsluttet, vil der altid være at foretage Kasseeftersyn i Forbindelse med den lokale Revisor. Ved dette Kasseeftersyn maa det nøje paases, at Beholdningen efter det afsluttede Regnskab stemmer med Beholdningen efter den afsluttede Kassebog, herunder bør det ogsaa paases, at Kassebogens Konti stemmer med Regnskabets Konti. Den foreliggende Kassebeholdning skal da stemme med den afsluttede samt den til næste Regnskab overførte Beholdning.

Om det her ommeldte Kasseeftersyn vil der være at meddele Aarsregnskabet Paategning.

3. Lagtingsrevisor er bemyndiget til at foretage Kasseeftersyn, naar han finder dette ønskeligt.»

Kommunustýrini eiga at greiða frá hondini skrivliga kassauppgerð fyri hvønn mánað ella sum til ber, tó ikki sjáldnari enn annanhvønn mánað. Um kommunurnar gera hetta, vilja teir, sum hava roknskapin í hendi, hava betri yvirlit yvir figgjarstøðuna, og um onkur feilur skuldi

verið komin í roknskapin, so vil roknskaparførarin lættari koma at vera varður við feilin.

Søknarstýrið fyri Sandavágs kommunu verður mipnt á, at tað ikki aftur má lata ein roknskap frá sær í tí skili, sum roknskapurin fyri 1942 var í, tá hann varð latin til løgtingsrevisor, og at slíkt óreglusemi, sum nú er beinað, ikki má henda aftur.

Løgtingsins skrivstovustjóri verður biðin um at fyrireika eftirlit við kommunukøssum kring landið. Um hetta verður gjørt oftani, kann sleppast lættari frá óreglusemi í roknskøpum. Tað er skilligt, at skrivstovustjórin persónliga ikki kann hava stundir til at ferðast so nógv. Tí mæla vit til, at løgtingsins revisor kommunuroknskapum viðvikjandi, eftir áheitan frá skrivstovustjóranum, eisini ger ein part av hesum arbeiði. Tær útreiðslur, sum hetta krevur, verða ásettar av landsnevndini.

Tað eru fleiri kommunur, sum á roknskapinum ikki seta upp figgjarstøðuna ella yvirlit yvir tey lán, kommunan hevur.

Møguligt er hetta ársakað av tí, at menn í smærri kommunum, sum ikki eru kendir við roknskaparførslu, ikki halda seg til at gera hetta. Um so verður, at fólk í løgtingsins tænastu koma at ferðast kring landið til kassaeftirlit hjá kommunum, so kundu tey eisini verið kommununum til leiðbeiningar í nevnda føri.

Saman við roknskapinum eiga kommunurnar á hvørjum ári at innsenda til løgtingið yvirlit yvir tey lán, kommunan hevur, nær peningurin varð læntur, frá hvørjum, stødd av láninum, renta, avdráttarreglur, støddin av tí peninganøgd, ið er eftir at gjalda, hvat peningurin var læntur til, um løgtingið hevur ábyrgd av láninum o. m. a. Løgtingsskrivstovan letur prenta útfyllingarbløð, sum kommunurnar skulu nýta til nevnda brúk.

Nevndin setir fram uppskot um góðkennan av teim av løgtingsrevisor grannskoðaðu kommunuroknskapum.

Uppskot:

1. Løgtingsskrivstovan verður biðin at seta í verk tær í álitinum nevndu fyriskipanir viðvikjandi eftirliti við og vegleiðing fyri kommunurnar.
2. Løgtingið góðkennir uppskot til decisión frá løgtingsrevisor viðvikjandi niðanfyri standandi kommunuroknskapum við teimum av løgtingsrevisor tilskilaðu viðmerkingum:

Roknskapur fyri árið 1941 fyri

Haldórsvíkar kommunu — Saksunar kommunu

Roknskapur fyri árið 1942 fyri

Klakksvíkar	kommunu	Hvalvíkar	kommunu
Fuglafjarðar	—	Sandavágs	—
Lorvíkar	—	Miðvágs	—
Nes	—	Sands	—
Eiðis	—	Froðbiar	—
Haldórsvíkar	—	Hovs	—
Saksunar	—	Vágs	—

Roknskapur fyri árið 1943 fyri

Fugloyar	kommunu	Kunoyar	kommunu
Svínoyar	—	Mikladals	—

Húsa	kommuna	Sørvágs	kommunu
Sjóar	—	Biggjar	—
Funnings	—	Mykines	—
Vestmanna	—	Skopunar	—
Kaldbaks	—	Skálavíkar	—
Havnar uttb.	—	Skúoyar	—
Kirkjubøar	—	Hvalbiar	—
Hests	—	Fámjins	—
Nólsoyar	—	Hovs	—
Sandavágs	—	Porkeris	—

2. viðgerð 17. nov. Pkt. 1 samtykt við 20—0, pkt. 2 við 21—0.

---

2. Nýggj valstøð.

1. viðgerð 11. september. Framlagt 29. september.

Alit.

Sóknarstýrið fyri fyri Viðareiðis sóknar kommunu hevur vent sær til tingið við umbøn um at fáa skipað soleiðis fyri, at tað í staðin fyri at vera 2 valstøð í sóknini kommununvali viðvíkjandi koma at vera 4 valstøð.

Sum nú stendur er valstaður á Viðareiði fyri fólk í Viðareiðisbygd og valstaður í Norðdepli fyri Hvannasund, Toftir, Depli, Norðdepli, Fossá og Múla kommununvali viðvíkjandi.

Í skrivum, sum viðløgd eru hesum máli, ynskir Viðareiðis kommuna at fáa broytt «Vedtægt for Afholdelse af kommunale Valg i Viderø Sogn» av 1922 (sjá løgtingstíðindi 1922, blós. 150) soleiðis, at tað verða hesi valstøð:

1. Valstaður á Viðareiði fyri Viðareiðisbygd.
2. — í Hvannasundi fyri Hvannasunds bygd.
3. — í Norðdepli fyri Norðtoftir, Depli, Norðdepli og Fossá.
4. — í Múla fyri Múla bygd.

Undirritaða nevnd er samd um, at tað er torført hjá fólki í Viðareiðis kommunu í sini heild at kunna møta fram til val, sum valstøðini eru nú, og er nevndin sinnað til at fáa undannevndu broytan setta í gildi, so sum kommunan hevur skotið upp, eisini viðvíkjandi fólkatings- og løgtingsvali.

Uppskot:

1. Tingið viðmælir, at valstað fyri fólkatings- og løgtingsval verður í bygdini Viðareiðifyri í búgvararnar í nevndu bygd, í bygdini Hvanna-

sundi fyri íbúgvararnar í nevndu bygd, í Norðdepli fyri íbúgvararnar í bygdunum Norðdepli, Norðtoftir, Depli og Fossá og í Múla fyri íbúgvararnar í Múla búgd, og at neyðturvuligar broytingar verða gjørdar í listanum yvir valstøð sbr. § 17 í lóg 28. apríl 1916 um fólkatingsval og § 3 í løgtingslógini.

2. Viðlagda uppskot til samtykt fyri kommununvalum í Viðarciðis kommunu verður staðfestað.

2. viðgerð 9. oktober. 3. viðgerð 12. oktober. Samtykt 21—0.

---

3. Kvivíkar kommuna og havnareglugerðin fyri Vestmanna.

1. viðgerð 14. oktober. Framlagt 23. november.

Álit.

Í umsókn, 12. juli 1944, søkir Kvívíkar kommuna um at fáa havnareglugerðina fyri Vestmanna havn broytta. Málið varð sent Vestmanna kommunu til ummælis, og er tilíkt ummæli komið, dagssett 2. oktober.

Frammanundan 1909 hevur einki havnagjald verið, so vitt nevndini kunnugt, fyri Vestmanna havn. Í 1908 (sí løgtingstíðindi 1908, síðu 19) sendi Vestmanna kommuna umsókn til tingið við uppskoti til havnareglugerð. Hetta varð viðmælt av tinginum og sett í gildi av ríkisstýrinum 29. januar 1909. Hareftir er markið ein strika frá Grønanesi til Fiskinakullið. Havnagjaldið varð sett til 5 oyru pr. ton, og havnastýrið uppá 3 limir varð valt av kommunustýrinum.

Kommunustýrið fyri tær sameindu søknirnar í Norðstreymoy varð ikki spurt, og Kvívíkingar sendu í 1909 mótmæli til tings og gjørdu galdandi, at Kvívíkar kommuna eigur helvtina av landinum, sum havnin liggur innan fyri, og at kommunan tí átti at fáa part í stýrinum og ein part av inntøkunum. Málið var til viðgerðar á tingi í 1909, 1910 og 1911 (sí løgtingstíðindi 1909 s. 176, 1910 s. 126 og 1911 s. 249); í 1911 varð samtykt soljóðandi:

«1. Det meddeles Forstanderskabet, at Lagtinget approberer den af det trufne Overenskomst, hvorefter Tvistigheder vedrørende Havnereglementet af 29. Januar 1909 for Vestmanhavn bliver at afgøre af en Voldgift bestaaende af Amtmanden og en af hvert Forstanderskab valgt Mand.

2. Amtet bemyndiges til, naar Voldgiftskendelsen foreligger, forsaavidt Lagtinget ikke er samlet at ansøge Justitsministeriet om Sanktion paa de eventuelt nødvendige Ændringer i bemeldte Reglement.»

Valdgerðardómur varð so avsagdur, og hareftir komu so broytingar í havnareglugerðina, 17. juni 1912. Vanligt havnastýri skal hareftir vera 3 limir, harav Vestmanna kommuna velur 2 og tær sameindu kommunnar í Norðstreymoy 1 lim. Tá ið talan er um útreiðslur, skulu spurningar harum, tá roknað kann vera við, at kommununar hava mótstríðandi interessur, verða at leggja fyri eitt havnastýri uppá 6 limir, 3 valdir av hvørjum kommunustýri. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, skal amtmaðurin gera av. Spurningurin, um eitt mál skal verða lagt fyri tað vanliga havnastýrið ella tað viðkaða havnastýrið, kann, um limirnir ikki eru samdir, verða lagdur fyri amtmannin, sum tekur avgerð. Inntøkurnar hjá havnakassanum kunna bert verða nýttar til havnina. Til bøtan av havnaviðurskiftunum á Kvívíkarlandinum skal verða nýtt minnst $^{2}/_{7}$ og kann verða nýtt upp til $^{1}/_{3}$. Vestmanna kommuna hevur roknskaparførsluna og sendir Kvívíkar kommunu avskrift hvørt ár av roknskapinum. Pengar, sum vóru til avlops vórðu settir inn í sparikassan.

Í 1926 setti umboðsmaðurin fyri Kvívíkar kommunu uppskot fram um, at nevnda kommuna skuldi fáa útgoldið $^{2}/_{7}$ av tí, sum var til góðar pr. 1. januar 1926 og so framvegis árliga $^{2}/_{7}$ av avlopinum. Hetta varð samtykt av havnastýrinum, tó treytað av, at peningurin bert kundi verða nýttur til bøtan av havnaviðurskiftunum á Kvívíkarlandinum innan fyri Vestmanna havn, og viðvíkjandi tí árligu útbetalingini varð samtykt hetta: «Denne Foranstaltning gælder ikke mere, naar et eventuelt Kajanlæg i Vestmanhavn er udført, og Havnereglementet i den Anledning maa forandres.» Vestmanna kommuna peikar á, at handa samtykt ikki varð skotin inn fyri tað viðkaða havnastýrið.

Kvívíkar kommuna fekk so útgoldið $^{2}/_{7}$ av tí, sum havnin átti í sparikassanum pr. 1. januar 1927 við kr. 6.718,95, og síðani fekk Kvívíkar kommuna árligt goldið $^{2}/_{7}$ av avlopinum við ca. 750 kr. árliga inntil ársslok 1936, tá varð nýggj bryggja gjørd líðug í Heyganesi. Kvívíkar kommuna hevði byggt eina minni bryggju á Válinum og goymsluhús. 24. august 1929 gav ríkisstýrið loyvi til byggjan av bryggjuni, treytað av, at bryggjan uttan endurgjald skuldi falla til møguligt alment havnavirki, um tílíkt verður gjørt.

Í 1934 fekk Vestmanna kommuna játtað ríkisstudning til bryggju í Heyganesi. Arbeiðið byrjaði í 1935 og varð sum nevnt líðugt í 1936. Síðan hevur Vestmanna kommuna ikki goldið Kvívík nakran part av inntøkuni hjá hannini.

Í 1936 góðkendi løgtingið takstir fyri bryggjuna við Heyganes. Spurningurin um stýrisskipan fyri Vestmanna havn varð í 1938 av ríkisstýrinum lagdur fyri løgtingið; roynt varð at fáa semju í lag, og fundur var á amtsskrivstovuni 12. oktober 1938 millum umboðsmenn frá kommununum og løgtinginum. Amtmaðurin setti fram uppskot um, at Vestmanna havn skuldi yvirtaka viðlíkahaldið av bryggjuni á Válinum og rentan og avbetalan av restskuld, sum Kvívíkar kommuna hevði hesari bryggju viðvíkjandi til sparikassan, ca. 4.000 kr., og harumframt rinda Kvívíkar kommunu 2.000 kr., og so skuldi Kvívíkar kommuna ikki hava rætt til nakran part av havnainntøkunum og ikki hava nakran mann í havnastýrinum. Vestmanna kommuna góðkendi uppskotið, men tað vildi Kvívíkar kommuna ikki. Verkfrøðingurin hjá V. B. V. mælti til at góðtaka uppskotið frá amtmanninum. Tingsins havna- og veganevnd setti fram álit við uppskoti, hareftir inntøkurnar skuldu falla til Vestmanna kommunu, tó so at Kvívíkar kommuna skuldi fáa 600 kr. árliga, og hetta kundi verða broytt 5. hvørt ár. Ein tingmaður setti fram broytiogaruppskot samsvarandi uppskotið frá amtmanninum. Einki av uppskotunum varð samtykt (sí løgtingstíðindi 1938 s. 126).

Ráðharradeildin fyri almenn arbeiðir gjørdi so av spurningin í brævi, dagssett 15. november 1939, soljóðandi:

«Af den med Hr. Amtmandens Skrivelse af 22. juni d. A. (1936, Nr. 975) tilbagefulgte Sag fremgaar, at den i Ministeriets Skrivelse af 24. Maj f. A. omhandlede Sag om Forvaltningsreglement for Vestmanhavn Havn har været til Behandling i Lagtinget, at Forslaget i Udvalgsbetænkningen er bortfaldet, og at de under Sagens Behandling i Lagtinget fremsatte Ændringsforslag ligeledes er bortfaldet.

Som en af Betingelserne for Bevillingen til Kajanlægget i Vestmanhavn var anført, at Ministeren for offentlige Arbejder efter at have indhentet Lagtingets Betænkning kan fastsætte de nærmere Regler for Havnens Forvaltning, og under Hensyn til det nedenanførte mener Ministeriet nu at burde udfærdige et Forvaltningsreglement for Havnen.

Af det af Forstanderskabet for Kvivig Sogns Kommune under Sagens Behandling fremførte ses der ikke at være noget, som kan gøre Bibeholdelsen af den nugældende Ordning nødvendig eller ønskelig. For Sognets Beboere vil det næppe heller kunne indvirke paa deres frie og uhindrede Adgang til Søen, om Havnen administreres paa den ene eller den anden Maade.

Efter Vedtagelsen den 18. Marts 1926 i Vestmanhavn Havnebestyrelse, der ikke af Kvivig Kommunes Repræsentant i Havnebestyrelsen blev indanket (jfr. Bekendtgørelse Nr. 216 af 17. Juni 1912 i Lovtidende B), skulde Afgivelsen af en Del af Indtægterne til Kvivig Kommune kun vedvare, til et eventuelt Kajanlæg i Vestmanhavn var udført, og Havnereglementet i den Anledning maatte forandres. Endvidere er Kvivig Kommune indgaaet paa de i Ministeriets Skrivelse af 24. August 1929 til Amtmanden over Færøerne opstillede Betingelser for Tilladelse til Bygning af Kajen i Vaalen, herunder, at Anlægget uden Erstatning skal kunne indgaa i et eventuelt Kajanlæg eller lignende, hvis et saadant udføres af det offentlige, hvilket jo nu er sket.

Ministeriet maa efter det saaledes foreliggende anse det for rettest, at Medlemmerne af Havneudvalget for Vestmanhavn Havn alene vælges af Forstanderskabet for Vestmanhavn Sogns Kommune, at Forvaltningsreglementet derfor udfærdiges i Overensstemmelse med det for Trangisvaag m. fl. Havne gældende, at samtlige Afgifter i Overensstemmelse med det af Lagtinget godkendte Forslag til Havne og Brotakster tilfalder Vestmanhavn Havn, og at Anlægget i Vaalen indgaar i Havnen. Hvorvidt Kvivig Sogns Kommune vil indgaa paa den af Dem paa Mødet den 12. Oktober f. A. foreslaaede, af Vestmanhavn Havnebestyrelse tiltraadte Ordning, hvorefter sidstnævnte overtager Vedligeholdelsen af Anlægget ved Vaalen, bestaaende af Kajanlæg, Pakhus og et ca. 650 m² stort Areal, samt Forrentningen og den fuldstændige Afbetaling gennem 15 Aar af den derpaa hvilende Gæld til Sparekassen, ca. 4.000 Kr., og betaler 2000 Kr. kontant gennem 8 Aar med 1/8 aarlig, idet hele Anlægget skal være Vestmanhavn Havns Ejendom, naar Laanet er afbetalt, maa overlades til Sogneforstanderskabets Afgørelse, men man skal dog henlede Opmærksomheden paa, at det paagældende Forvaltningsreglements Gennemførelse ikke vil afhænge deraf, og at Tilbudet under Hensyn til foranførte synes at maatte betragtes som en stor Imødekommenhed over for Kvivig Kommune.

Ministeriet har herefter udfærdiget det i 4 Eksemplarer vedlagte Reglement for Forvaltningen af Vestmanhavn Havn.

Endvidere har man, jfr. en anden Skrivelse herfra af D. D., i Henhold til Lov af 30. Januar 1875 udfærdiget et Ordensreglement for Vestmanhavn Havn, som, bortset fra nogle redaktionelle Rettelser, er enslydende

med det indsendte Udkast, dog at Stk. 2 i Reglerne for Sejlads har faaet den i Skrivelse herfra af 24. Maj f. A. foreslaaede, formentlig klarere Affattelse.

Sluttelig har man, jfr. ligeledes en anden Skrivelse herfra af D. D., i Henhold til Vilkaarene for Tilskud til Kajen i Vestmanhavn approberet en Havne- og Brotakst for Resten af indeværende Femaarsperiode, der udløber den 31. Marts n. A., hvilken Havnetakst ligeledes er i Overensstemmelse med det indsendte Forslag.

Det bemærkes som fremhævet i Ministeriets oftnævnte Skrivelse af 24. Maj f. A., at alle Afgifter tilfalder Vestmanhavn Havn, saaledes at eventelle Ejere af Broer eller andre Anlæg inden for Havncomraadet ikke kan opkræve Afgifter i Henhold til Takstregulativet.»

Kvívíkar kommuna sendi amtmanninum mótmæli í mars 1940 og tók fyrivarni fyri at taka spurningin upp aftur. Í brævinum til løgtingið 12. juli í ár sigur Kvívíkar kommuna, at teir ikki hava viljað tikið málið uppaftur, tí postsambandið varð slitið við ríkisstýrið í apríl 1940, men nú halda teir seg ikki kunna bíða longur og søkja um at fáa sama rætt, sum teir høvdu fyrr, antin við at løgtingið samtykkir hetta ella heitir á amtmannin sum umboðsmann fyri ríkisstýrið. Kommunustýrið flytur fram, at Vestmanna havn hevur 2 armar, harav annar við bygdunum Nesinum og Válinum hoyrir til Kvívíkar kommunu. Nú vegurin til Vestmanna er liðugur, hevur kommunan størri áhuga fyri Vestmanna havn, teir halda seg vera avskornar frá at fáa fulla nyttu av sínum parti av havnini.

Vestmanna kommuna førir fram í brævinum, at íbúgvararnir í Kvívík hava sama rætt til at brúka havnina og pakkhúsini har sum íbúgvararnir í Vestmanna. Havnin er ein stovnur fyri seg og hevur ta uppgávu at bøta um havnaviðurskiftini, og tí má stýrið ráða yvir øllum inntøkunum hjá havnini. Bryggjan í Heyganesi er gjørd av jarni og træi, og tí eru útreiðslurnar til viðlíkahald størri enn um bryggjan var gjørd av jarnbeton. Bryggjan er ov lítil og má víðkast, og tað vil kosta nógv eisini tí er tað neyðugt, at allar inntøkurnar falla til havnakassan, og Vestmanna kommuna ræður frá at broyta reglugerðina, sum ríkisstýrið hevur sett í gildi.

Kvívíkar kommuna søkir um at fáa part í havnastýrinum og part av havnainntøkunum. Viðmerkt skal vera, at havnainntøkurnar eru nógva ferðir størri nú aftaná at bryggjan er komin við Heyganes, enn tær vóru fyrr.

Nevndin skal serliga í hesum máli vísa á, at havnareglugerðin frá 17. juni 1912 er komin í gildi aftaná gerðadómsrætt millum báðar kommunurnar. Við hesi reglugerð fekk Kvívíkar kommuna góðkent sín lutarrætt í havnaviðurskiftunum fyri Vestmanna havn, og nevndin má tí halda, at málið í 1938—39, aftaná at einki uppskot var samtykt undir tingviðgerðini, átti at verið fyribils avgjørt, meðan tann endaliga avgerð átti at støðga, til nýggjur gerðadómsrættur var settur.

Soleiðis sum nevndin sær uppá málið, má tað verða givið Kvívíkar kommunu rætt í, at teirra havnagerð á Válinum væl kundi verið leys frá havnini á Heyganesi, og serliga mátti tað verið heilt sjálvandi, at tað pakkhús og tað landaøki, teir hava fingið sær á Válinum, framvegis kundi verið til nýtslu fyri Kvívíkar kommunu, uttan at heftast til havnagerðina á Heyganesi.

Nevndin má halda, at tað ikki er neyðugt, at heila víkin og tær harverandi bryggjur eru undir einum stýri. Samráðing eigur at fara fram millum allar avvarandi, um tað ikki kann finnast ein skipan, sum allir partar kunnu góðtaka. Til dømis kundi tað hugsast, at Vestmanna kom-

muna hevði eitt havnastýri og serligan roknskap fyri bryggjuna á Heyganesi og alt, ið har hoyrir til, meðan Kvívíkar kommuna hevði sítt havnastýri og serligan roknskap fyri alt, sum nertir við Válin. Eftir vildi so einans verðið inntøkur frá skipum, sum liggja úti á firðinum, og tá kundi væl tann gamla skipanin frá 1912 verið í gildi fyri henda partin. Hvussu nærri kann skipast, eigur at verða væl umhugsað undir samráðingum millum bæði kommunustýrini, og heldur nevndin, at løgtingið eigur at seta eina serliga trýmannanevnd til at taka hesar samráðingar upp og til at royna at vera millummenn fyri at finna fram til hitt besta semingarúrslitið.

So statt heldur nevndin seg ikki at kunna mæla tinginum til í hesi setuni at játta umsóknini frá Kvívíkar kommunu, áðrenn samráðingar hava farið fram millum Kvívíkar og Vestmanna sóknarstýri. Nevndin setur tí sambart tað í álitinum framførda fylgjandi

uppskot:

Løgtingið heldur, at tað er orsøk til hjá Kvívíkar kommunu at fáa reglugerðina fyri Vestmanna havn broytta, og samtykkir løgtingið at seta eina trímannamillumtinganevnd til at taka upp samráðingar við sóknarstýrini fyri Vestmanna og Kvívíkar kommunur um eina framtíðarskipan av havnareglugerðini fyri Vestmanna.

2. viðgerð 30. november. Samtykt 18—0.

---

4. Tøka av lendi til Trongisvágs havn.

1. viðgerð 11. september. Framlagt 20. november.

Álit

(Danbjørg óheftur).

Froðbiar sóknar kommuna ynskir at ogna sær lendi til eina møguliga víðkan av havnalagnum, og hevur hetta fört til, at sóknarstýrið hevur viðtikið at ekspropriera eitt øki nærhendis bryggjuni. Eftir teimum skrivum, sum liggja í hesum máli, kann undirritaða nevnd, sum hevur fingið málið til viðgerðar, geva hesa frágreiðslu málinum viðvíkjandi:

Tann 25. januar 1943 skriva J. Johannesen og Daniel J. Poulsen til Froðbiar sóknar kommunu og biðja stýrið um at ekspropriera lendið í Sæbjarnarvíkini til neystagrundir, av tí at teir ikki kunnu fáa grund til neyst á høgligum staði.

Tann 22. februar 1943 viðgjørdi sóknarstýrið hetta mál og svarað verður umsøkjarunum, at sóknarstýrið hevur samtykt at ekspropriera lendið í Sæbjarnarvíkini *og leggja tað undir kommununa til*

nýtslu sum lendistøð. Í skrivi til T. F. Thomsen A/S verður skilað til, at hetta er viðvíkjandi matr. nr. 489. Sambært lóg nr. 69 av 7. mai 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler paa Færøerne, sbr. Kundgørelse Nr. 45 af 30. Okt. 1941 om midlertidige Bestemmelser om Ændring i Lov Nr. 69 af 7. Maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje o. s. v., biður sóknarstýrið nevndu eigarar koma á fund saman við sóknarstýrinum tann 15. mai 1943 til at samráðast um støddina av tí peningi, ið møguliga skal gjaldast fyri tað øki, ið ætlað er at ekspropriera. Hesin fundur gav tó einki úrslit.

T. F. Thomsen A/S, sum ikki lat mann møta á áðurnevnda fundi, svarar, áðrenn teir kunnu taka støðu til málið, ynskja teir greiniliga at fáa at vita, hvat hesi lendi skulu nýtast til (samber skriv dagfest 26. juni 1943).

Á fundi tann 17. juli viðtekur sóknarstýrið at svara uppá henda spurning, og siga teir, at tað lendi, teir ætla at ekspropriera, gongur frá havnarskrivstovuni vestur móti N. J. Mortensens krambúð (samber skriv dagfest 24. juli 1943). Í skrivi til sókarstýrið tann 31. august svarar T. F. Thomsen A/S uppá áðurnevnda skriv frá sóknarstýrinum og undrast á, at sóknarstýrið ikki greidliga sigur frá, hvat teir skulu nýta hetta lendi til. Eisini vísir T. F. Thomsen A/S á, at teir ætla at senda kæru til løgtingið hesum viðvíkjandi, um tað, sbrt. lóg av 7. mai 1881, § 2, er talan um at ekspropriera av ognum teirra.

Tann 27. sept. 1943 sigur sóknarstýrið frá í skrivi til T. F. Thomsen A/S, at sóknarstýrið hevur sett fram ynski um at fáa umrødda lendi, tí tað er hildið at vera neyðugt fyri havnarinnar framtíðarútvikling, at hitt almenna eigur alt nýtandi lendi, ið liggur nærhendis bryggjuni. Til hetta svarar T. F. Thomsen A/S í skrivi dagfest 19. okt. 1943, at teir ikki halda tað vera heimild í lógini til ekspropriatión av lendi til slíkt endamál, og vísa teir eisini á, at henda tøka kemur at nerva virki teirra, og meintu teir, at havnarlagið varð gjørt teimum við virkjum til stuðul og ikki fyri at nerva virkini. Teir vísa á, at tað øki, ið ætlað er at ekspropriera, er ein stórur partur av tí lendi, teir eiga.

28. oktober 1943 skrivar kommunan til Føroya rætt, har hann verður biðin um sambært § 4 í lóg nr. 69 av 7. mai 1881 at útnevna 2 kønar óvildarmenn at avgera støddina á tí viðurgjaldi, ið kommunan verður at lata fyri hitt inntikna lendi. Stykkini, sum skulu eksproprierast, og sum nevnast í hesum skrivi, eru: Matr. nr. 487 og 489 á Tvøroyri, eigari T. F. Thomsen A/S, Tvøroyri, og matr. nr. 765, Tvøroyri, sum er felagsstrond, tilhoyrandi Froðbiar bygd. Grundirnar til hesa ekspropriatión verða ávístar og eru tær hesar:

1. Alt tað lendi, sum havnarlagið eigur, er so trongt og innigyrt, at tað er fullkomiliga vónleyst at hugsa um at víðka havnina, uttan so er, at havnarlagið fær hesi lendi.
2. Eisini er tað avgjørt neyðugt, at havnarlagið eigur hesi lendi fyri at kunna gera ferðsluna til og frá bryggjuni liðiliga og fult út forsvarliga.
3. Ávíst verður, at tað viðvíkjandi framtíðardriftum av nýggjum monnum, sum einki eiga nærhendis havnini, er neyðugt hjá havnarlagnum at hava lendi at leiga hesum monnum.

Frá Føroya rætti verður málið sent Suðuroyar sýslu til ummælis og við fyrispurningi um, nær eigararnir eru gjørdir kunnugir við sámtykt sóknarstýrisins um ekspropriatión, um nakar av teimum hevur sent kæru

til løgtingið, og síðan verður sýslumaðurin biðin um uppskot viðvíkjandi teimum monnum, rætturin var biðin at útnevna. Tá málið aftur hevur verið hjá Froðbiar kommunu til ummælis, sendur sýslumaðurin tað aftur til Føroya rætt, og sendir rætturin málið løgtingsskrivstovuni til ummælis.

Tann 5. januar 1944 sigur løgtingsskrivstovan í skrivi til Froðbiar kommunu:

«Sorenskrivarin hevur sent løgtingsskrivstovuni til ummælis bræv frá Froðbøar sóknarstýri til Føroya rætt, dagssett 28. oktober 1943, við ymiskum átekningum.

Løgtingsskrivstovan skal úttala, at ein kommuna sambart lóg nr. 69 av 7. mai 1881 er heimilað um neyðugt at ekspropriera jørð til vegir, havnir o. t., tá tað er so neyðugt, at hitt almenna besta má haldast at krevja tað. Kommunan skal siga eigarunum frá, og teir hava so rætt til, áðrenn 3 mánaðar, at kæra spurningin til løgtingið. Um fleiri eiga jarðastykkið felags, er tað nóg mikið, at 4 av teimum størru ánarum fáa boð, og harumframt verður tøkan gjørd kunnug í kunngerðartalvuni og eina ferð í tí almenna lýsingarblaðnum (Dimmalætting).

Viðvíkjandi matr. nr. 765, sum er felagsstrond, framgongur av matrikulinum, at T. F. Thomsen A/S er brúkari, og hann skuldi óivað eisini haft fingið boð um tøkuna.

Tað sæst ikki av málinum, at tøkan hevur verið kunngjørd í talvuni ella í «Dimmalætting», og aðrir eigarar enn teir 4 kunnu tí senda kæru, og beinast vil vera, at tøkan verður kunngjørd sum nevnt.

Viðvíkjandi matr. nr. 487 og 489, sum T. F. Thomsen A/S eigur, tykist at framganga, at Thomsen hevur sent kæru til kommunustýrið, og eftir omanfyri nevndu lóg, § 2, stendur, at viðkomandi kann kæra til løgtingið gjøgnum kommunustýrið. Tað má tí haldast, at T. F. Thomsen A/S hevur í rættari tíð sent inn kæru, men kommunustýrið hevur ikki sent kæruna víðari til tingið.

Løgtingsskrivstovan skal mæla til, at kommunustýrið sendir til skrivstovuna útskrift av gerðabókini viðvíkjandi tøkuni og avskrift av øllum brøvum, sum tit hava sent í málinum, og teimum brøvum, sum tit hava móttikið í málinum.

Harnæst skal løgtingsskrivstovan peika á kommunallógina, 28. februar 1872, § 27 g, hareftir ein kummuna skal hava samtykki frá løgtingnum, har talan er um at ogna sær nýggjar, fastar ognir; reglan umfatar eisini tøku.

Spurningurin verður nú, um málið verður at leggja fyri landsnevndina, og um so skal verða, verður kommunustýrið umbiðið at upplýsa, hvat kommunustýrið heldur virðið av teim nevndu jarðastykkjum vera.»

Kommunan heitir so tann 1. juni 1944 á landsnevndina um at samtykkja ekspropriatión av hesum stykkjum á Tvøroyri:

matr. nr.	765,	sum er	183	m^2	stórt
—	487,	„ „	2136	m^2	—
—	489,	„ „	1281	m^2	—

Sóknarstýrið heldur, at 5 kr. er hóskandi prísur pr. m^2, og ætlast lendið eftir hesum at koma at kosta um 18.000 kr.

Fyrst í juni mánaða 1944 lýsir Froðbiar kommuna í Dimmalætting og øðrum ávísum um ekspropriatión av nevndu stykkjum, har tað eisini verður ávíst, at um eigararnir vilja mótmæla hesi tøku av lendi, so mega teir innan 3 mánaðar senda kæru til løgtingið gjøgnum sóknarstýrið.

Við ávísan til hesa lýsing í Dimmalætting, 7. juni 1944, senda eigarnir kæru til sóknarstýrið. Kæran er undirskrivað av 24 eigarum.

Í hesum máli liggur eisini skriv frá Husted-Andersen, sakførara, vegna T. F. Thomsen A/S, Tvøroyri, sum er skrivaður sum eigari av matr. nr. 487 og matr. nr. 489, og sum brúkari av matr. nr. 765, har hann vegna nevnda partafelag harðliga mótmælir nevndu ekspropriatión. Sum grund fyri hesum mótmæli verður nevnt:

1. Kommunan hevur ikki fingið loyvi til ekspropriatión frá løgtinginum sambart § 27 í kommunallógini.
2. Tá kommunan hevur grundað ekspropriatiónina í tí, at kommunan eigur at ogna sær alt nýtandi lendi við havnarlagið, so er hetta ikki grund nokk til ekspropriatión, og má fyrst fyriliggja greið tilætlan yvir víðkanina av havnarlagnum.
3. Tað verður ávíst, at kommunan eigur lendi matr. nr. 490, sum kommunan ikki enn hevur nýtt í fult mát.
4. Tá talan er um, at havnarlagið skal ogna sær alt nýtandi lendi, ið liggur nærhendis havnini, so má lendið hjá A. T. vera líka so væl egnað til tøku, sum hetta, ið ætlað er at ekspropriera.

Eisini verður ávíst, hvussu dýrt hetta øki kann væntast at koma at vera at ekspropriera í hesi tíð — — —.

— — Frá Froðbiar kommunu kemur so skriv tann 14. september 1944 saman við øllum skrivum, sum hoyra til málið, so at løgtingið kann taka stoðu til, um loyvi skal gevast Trongisvágs havn til ekspropriatión ella ikki.

Undirritaða nevnd, sum hevur havt hetta mál til viðgerðar, hevur biðið verkfrøðing løgtingsins um at sagt sína meining hesum viðvíkjandi, serstakliga viðvíkjandi víðkanini av havnini. Løgtingsverkfrøðingurin sigur hetta í skrivi, dagfest 8. november 1944:

«Vedr. Tveraa Havn.

Idet jeg hoslagt tilbagesender Skrivelse af 14. September 1944 fra Forstanderskabet i Frodebø Sogn til Lagtinget samt en fyldigere Kopi af Matrikulskortet, skal jeg bemærke følgende:

Det er i al Almindelighed gavnligt og rigtigt, at et Havnevæsen er Ejer af Arealer med Facade mod Kajgader og Havneværker. Tveraa Havn er daarligt udstyret i saa Henseende, især hvis man vil holde sig Fremtidsmuligheder for Øje. Havnen ejer af Pakhusplads saavidt vides kun Transitskurene paa Kajen og Bygningen Matr. Nr. 497. Dette er muligvis tilstrækkeligt for selve Havnen, men den burde ogsaa have Pakhusarealer til Udleje.

Havnebestyrelsen har i Aar indgivet Ansøgning om Tilskud til en ikke nærmere angivet Udvidelse af Havnen. Ingeniørkontoret har haft denne Ansøgning til Udtalelse og har rent foreløbigt foreslaaet en Forlængelse af den nuværende Kaj med 36 m mod Vest (Overslag 270.000 Kr. efter Nutidens Priser). Nærmere Undersøgelser og Overvejelser kan meget vel føre til, at man vil foretrække at forlænge Kajen mod Øst; hvilket giver bedre Transportforhold. Det er ogsaa muligt, at Hovedvægten bør lægges paa Fremskaffelse af en Kaj paa ca. 3 m Vand for mindre Fiskeskibe. I saa Fald vilde Strækningen A—B foran de paatænkte Ekspropriationsarealer sikkert først og fremmest komme under Overvejelse. (Beliggenheden A—B er ganske vilkaarlig valgt, da Vanddybderne langs Kyststrækningen ikke kendes).

I Tilfælde af en Udbygning af Strækningen A—B, vilde det være naturligt for Havnen at sikre sig de bagved liggende Grunde i en Dybde af ca. 45 m (15 m Kajgade plus 20 m Pakhusbredde plus 10 m øvre Vej). De anførte Tal nævnes med Forbehold, idet der ikke findes nogen fast Udvidelsesplan. — Hvorvidt der under disse Omstændigheder er Grundlag for at foretage Ekspropriation, er et juridisk Spørgsmaal, som Ingeniørkontoret vanskeligt kan udtale sig om.»

Nevndin skal úttala:

Viðvíkjandi trætumálinum, um kommunan hevur havt rættan atburð viðvíkjandi hesi ætlaðu tøku av teim 3 áðurnevndu stykkjum, má meirilutin siga, at tað kannska er farið ógreitt fram í fyrstani, men so sum málið nú liggur fyri, kann nevndin ikki halda tað vera orsøk til at avvísa tøkuætlanina.

Eftir er so at kanna eftir, um orsøk er til hesa tøku sambart lóg av 7. mai 1881.

Høvuðsgrundin, sum sóknarstýrið førir fram í sínum fyrru skrivum, er tann, at tøkan er neyðug fyri *havnarinnar framtíðarútvikling*, tí hitt almenna má eiga alt nýtandi lendi, ið liggur nærhendis bryggjuni. I skrivinum dagfest 14. september h. á. halda teir fram, at fyri at kunna ganga teirri stóru viðkingartrongd fyri nýggjum virkjum á møti, má brimgarðurin verða longdur munandi vestur eftir og bryggjugarðurin fram við strondini verða longdur heilt vestur móti Sæbjarnarvíkini, og at tað óbygda lendi oman fyri bryggjugarðin má verða lagt undir havnina til har á at seta nýggj virkir, tað sama, sum hendir og hevur hent nærhendis bryggjuni í Tórshavn. (So vítt nevndini kunnugt, er tað so at økið fram við strondini í Havn hevur Tórshavnar kommuna keypt so við og við uttan at hava nýtt tøkulógina).

Eisini førir kommunan fram, at koyrslan niðan frá bryggjuni á meginvegin er illa nýtandi, og at tað verður neyðugt at byggja veg frá bryggjuni og á skák til vegin við handilshús N. J. Mortensens.

Nevndin er samd við løgtingsverkfrøðingin í tí, at ein havn eigur at hava tørvandi lendi til goymsluhús og virkishús.

Høvuðstátturin í tí kæru, sum liggur í málinum frá teimum, sum eiga ella nýta tey stykkir, sum ætlanin er at ekspripriera, er tann, at tað ikki er nakar fastur planur yvir, hvat hesi stykkir skulu nýtast til.

Tað fyriliggur einki fast uppskot um, hvussu viðkanin av havnini skal gerast. Hon kann eftir tí, sum løgtingsverkfrøðingurin greiðir frá, verða viðkað vestur eftir ella eystur eftir.

Nevndin heldur ikki, at tað er nóg greitt tilskilað, hvussu hesi lendi skulu nýtast, sum ætlanin er at ekspropriera, og heldur ikki er nøkur endalig tekning yvir, hvussu viðkanin av havnini veruliga skal gerast. Hetta tykist okkum at vera neyðugt, um tøka skal fara fram eftir nevndu tøkulóg av 1881.

Nevndin heldur tí, at endalig avgerð viðvíkjandi tøku av øllum teim nevndu stykkjum má bíða, til greiður planur er komin til tingið um, hvussu havnin verður viðkað.

Uppskot:

Tingið kann ikki taka endaliga avgerð viðvíkjandi expropriatión av teimum í álitinum nevndu stykkjum, fyrr enn greiður planur er komin til tingið um, hvussu havnin verður viðkað.

2. viðgerð 22. november og 24. november. Samtykt 20—0.

5. Kommunalur jarðaskattur.

1. viðgerð 11. september. Framlagt 25. september.

Álit.

Sambart § 37 í lóg av 12. mars 1923 ásetir tingið fyri eitt tíðarskeið uppá 3 ár ísenn, hvussu stóran part av tí samlaða árliga skattapeningi skal áliknast jarðagóðsinum, og hvussu stórur hin parturin, ið skal liknast eftir ogn og førimuni, eigur at vera. Seinast tingið ásetti hetta mark var í 1942 fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 1943 til 31. december 1945 (Sí løgtingstíðindi 1942, s. 171).

Hetta mál skuldi so statt ikki verið viðgjørt aftur á løgtingi fyrr enn í tingsetuni 1945. Landsnevndin hevur samtykt at leggja hetta mál fyri tingið longu í ár av tí, at fleiri kommunur hava kært seg um, at kríggsviðurskiftini hava borið við sær, at óvanliga tungur skattur er komin at liggja á jarðagóðsinum.

Løgtingsskrivstovan hevur sent spurningin til allar kommunur, ið álíkna jarðaskatt, og biðið tær sagt frá, um tær ynskja broytan í hesum, og um so er, at senda inn uppskot til løgtingsskrivstovuna áðrenn 1. august í ár.

Nakrar kommunur hava svarað og sent uppskot, hareftir jarðaskatturin verður lækkaður:

Fugloyar	kommuna	frá	1/20	til	1/30
Kunoyar	—	»	1/15	»	1/25
Fuglafjarðar	—	»	1/50	»	1/100
Nes	—	»	1/50	»	1/200
Sjóar	—	»	1/40	»	1/80
Eiðis	—	»	1/14	»	1/28
Kvívíkar	—	»	1/16	»	1/20
Havnar uttb.	—	»	1/12	»	1/20
Nólsoyar	—	»	1/25	»	1/40
Sandavágs	—	»	1/50	»	1/75
Miðvágs	—	»	1/25	»	1/50
Hvalbiar	—	»	1/25	»	1/30
Froðbiar	—	»	1/50	»	1/65
Fámjins	—	»	1/10	»	1/12
Hovs	—	»	1/9	»	1/12
Porkeris	—	»	1/20	»	1/31

Undirritaða nevnd skal mæla tinginum til at góðkenna hesi uppskot frá kommunum um broytan av álikningini av kommunalum jarðaskatti.

Porkeris kommuna hevði fyri árið 1944 loyvi til at álíkna 1/20 á jarðagóðsið, men hevur uttan loyvi bert álíknað 1/31 á jarðagóðsið. Kommunan biður løgtingið um at góðkenna hetta. Nevndin skal vísa á, at henda framferð er skeiv, men vil tó ganga við til at góðkenna álikningina á jarðagóðsið í Porkeris kommunu fyri 1944. Porkeris søknarstýri verður minnt á, at tað ikki uttan fyrst at fáa loyvi kann álíkna á annan hátt enn tað, ið løgtingið hevur fyriskipað.

Uppskot:

1. Tingið samtykkir, at skatturin fyri hesar kommunur fyri 1945 verður áliknaður soleiðis:

Kommuna:	Eftir markatali:	Eftir ogn og førimuni:
Fugloyar	1/30	29/30
Kunoyar	1/25	24/25
Fuglafjarðar	1/100	99/100
Nes	1/200	199/200
Sjóar	1/80	79/80
Eiðis	1/28	27/28
Kvívíkar	1/20	19/20
Havnar uttanb.	1/20	19/20
Nólsoyar	1/40	39/40
Sandavágs	1/75	74/75
Miðvágs	1/50	49/50
Hvalbiar	1/30	29/30
Froðbiar	1/65	64/65
Fámjins	1/12	11/12
Hovs	1/12	11/12
Porkeris	1/31	30/31

2. Landsnevndin verður heimilað til at góðkenna uppskot frá teimum kommunum, sum enn ikki hava svarað ella sent inn uppskot, um so er at tær ynskja broytan fyri tað í stykki 1 nevnda tíðarbil.
3. Tingið góðkennir, at Porkeris kommuna fyri árið 1944 hevur áliknað 1/31 á jørðina í staðin fyri 1/20.

2. viðgerð 9. oktober. 3. viðgerð 12. oktober. Samtykt 23—0.

---

6. Húsaleigunevnd fyri Húsavíkar kommunu.

1. viðgerð 4. oktober. Framlagt 4. november.

Álit.

Kommunustýrið fyri Húsavíkar kommunu samtykti 10. september at biðja løgtingið um loyvi til at fáa húsaleigunevnd fyri Húsavíkar kommunu. Landsrættarsakførari Husted-Andersen hevur sent umsókn í málinum til tingið og hevur eftir fyrispurningi frá kommunalu nevndini upplýst, at í Húsavíkar kommunu er ætlandi bert ein maður, sum leigar hús,

og at tað er fyri at verja hann, at kommunustýrið ynskir at fáa húsleigunevnd setta.

Kunngerð nr. 41, 2. december 1940, smbr. kunngerð nr. 54, 19. december 1942, ásetir reglur fyri útleigu av sethúsum og rúmum til krambúð ella onnur virki. Uppsøgn kann innan 14 dagar verða løgd fyri eini leigunevnd, og heldur nevndin, at tað ikki er rímilig orsøk til uppsøgn, er hon ógyldug. Um ein útleigari krevur leigu, sum er órímiliga høg sambært við virðið av tí, sum er útleigað, kann leigarin leggja spurningin fyri leigunevndina, sum kann lakka leiguna til hóskandi peningahædd. Lógin ásetir í § 12, at leigunevndin fyri Tórshavn er: sorinskrivarin sum formaður og 2 limir, sum verða valdir á fylgjandi hátt: Tvey ár ísenn verða av Tórshavnar býráð uppsettir tveir listar við 12 persónum á hvørjum. Á øðrum listanum skulu vera húsaeigarar, meðan á hinum listanum skulu vera leigarar. Fyri hvørja sak útpeikar sorenskrivarin ein persón frá hvørjum lista.

§ 16 sigur, at reglurnar bert eru galdandi fyri Tórshavnar kommunu, men at løgtingið kann áseta, at tær skulu galda fyri aðrar kommunur, tá viðkomandi kommunustýri ynskir tað. Um reglurnar verða settar í gildi fyri aðrar kommunur enn Tórshavn, verður fyri viðkomandi sýslu vald ein leigunevnd eftir reglunum í § 12 við hesum broytingum:

1. Formaðurin fyri leigunevndini verður sýslumaðurin.
2. Hvør kommuna í sýsluni, har reglurnar verða settar í gildi, velur 6 persónar til hvønn listan.

Meirilutin (R. Long, A. Sørensen, R. Joensen og A. Djurhuus) má halda, at ein broyting má gerast í § 16, um reglurnar yvirbøvur kunnu gerast nýtiligar fyri Húsavíkar kommunu, og tað er ivaleyst ein ásetningur í somu § 16, at tær kommunur, sum ynskja reglurnar settar í gildi, sjálvar uppfylla tær í reglunum ásettu treytir. Nevnda kommuna, sum eftir teim fyri nevndini liggjandi upplýsingum bert hevur 2 leigandi, ætlast ikki at uppfylla treytirnar í so máta.

Meirilutin meinar ikki, at tað, sum nú stendur, eru nóg miklar grundir til at broyta lógina og mælir so statt ikki til at gera broytingar í reglunum og setur ikki fram uppskot í málinum.

Heldur ikki kann meirilutin mæla tinginum til, so sum skotið upp av minnilutanum, at seta lógina í gildi fyri allar Føroyar út frá omanfyri nevnda ásetningi.

Minnilutin (J. H. Danbjørg) skal flyta fram, at stór húsaneyð er í mongum kommunum, og at í ymiskum tilfellum er leigan ov høg, og vandi er fyri, at kravd verður hægri leiga. Mælt verður til at broyta reglurnar í § 12 í leigulógini, tí í nøkrum kommunum eru ikki so nógvir leigarar sum roknað við í greinini. Tað er tí trongd til at seta reglur í gildi fyri allar kommunur í Føroyum, og setur minnilutin uppskot um hetta.

Uppskot.

Frá minnilutanum (J. H. Danbjørg):

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Lejeforhold.

§ 1.

Bestemmelserne i Kundgørelse Nr. 41 af 2. December 1940, jfr. Kundgørelse Nr. 54 af 19. December 1942 sættes i Kraft for alle Kom-

muner uden for Thorshavn og Frodebø Sogns Kommune. For hvert Syssel oprettes et Lejenævn efter de i § 12 i nvennævnte Kundgørelse omhandlede Regler med følgende Ændringer:

1. Formanden for Syslets Lejenævn er Sysselmanden.
2. Hver Kommune vælger mindst 3, højst 6 Personer til hver af Medlemslisterne. De paa den ene Liste opførte Personer skal være Husejere, medens de paa den anden opførte saa vidt muligt skal være Lejere.

§ 2.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks, og samtidig ophæves Kundgørelse Nr. 41 af 2. December 1940, § 16.

Bráðfengis fyriskipan fyri Føroyar um leiguviðurskifti.

§ 1.

Reglurnar í kunngerð nr. 41, 2. december 1940, sbr. kunngerð nr. 54, 19. december 1942, verða settar í gildi í øllum kommunum umfram Tórshavn og Froðbiar sóknar kommunu. Fyri hvørja sýslu verður sett á stovn ein leigunevnd eftir reglunum í § 12 í nevndu kunngerð við hesum broytingum:

1. Formaðurin fyri leigunevndini í sýsluni er sýslumaðurin.
2. Hvør kommuna velur í minnsta lagi 3 og í mesta lagi 6 limir til hvønn limalista. Teir, ið standa á øðrum listanum, skulu vera húsaeigarar, meðan teir, ið standa á hinum listanum so vítt gjørligt skulu vera leigarar.

§ 2.

Henda fyriskipan kemur í gildi beinan vegin, og samstundis fer úr gildi § 16 í kunngerð nr. 41, 2. december 1940.

2. viðgerð 13. november. 3. viðgerð 18. og 24. novbr. Minnilutauppskotið fall 6—0.

---

7. Kommunala nevndin.

Framlagt 4. oktober.

Uppskot

frá A. Samuelsen og Dam:

Lagtinget beslutter, at Udvalget for de Sager, som vedkommer Landbokommunerne i Almindelighed (det kommunale Udvalg), fra denne Beslutnings Vedtagelse skal bestaa af 5 Medlemmer.

2. viðgerð 6. oktober. 3. viðgerð 10. oktober. Samtykt 17—0.

---

8. Kommunulán.

A. Klakksvíkar kommuna.

1. viðgerð 25. september. Framlagt 29. september.

Álit.

Klakksvíkar kommuna hevur í skrivi, dagfest 3. juli 1944, søkt um loyvi til at gjalda tann pening aftur, sum kommunan skyldar Kreditforeningen af Kommuner i Danmark. Kommunan ætlar at taka lán í Føroyum fyri at kunna rinda og søkir um tingsins ábyrgd.

Tað, sum Klakksvíkar kommuna skyldar til Kreditforeningen af Kommuner i Danmark, er eitt lán, ið kommunan tók, tá Klakksvíkar elektricitetsverk varð bygt, eitt lán til Klakksvíkar havn og tvey lán, tikin til skúlan, og er skuldin tilsamans tann 3. juli 1944

kr. 289.850,85

Í málinum liggja tvey skriv frá Klakksvíkar kommunu, sum vísa ta samlaðu lániskuld hjá kommununi, og er hon hendan:

	skuld pr. 1/1—1944
Lán frá Kreditforeningen af K. i Danmark	25.518,92 kr.
—	12.210,34 »
—	224.194,11 »
—	33.989,61 »
Lán frá Dansk Folkeforsikring	114.431,77 »
—	52.417,71 »
Lán frá Nye Danske	22.908,30 »
Lán frá Færø Amts Sparekasse	4.000,00 »
—	109.844,42 »
—	2.800,00 »
—	81.532,76 »
Lán frá Den Danske Statskasse	6.063,74 »
Lán frá Norðoya Sparikassa	13.970,00 »
Tann samlaða lániskuldin 1. jan. 1944 verður	703.881,68 kr.

Meginparturin av hesum er skuld, sum kommunan hevur sett seg í tá havnin og elektricitetsverkið vórðu bygd. Bæði Klakksvíkar havn og Klakksvíkar elektricitetsverk tykjast at bera seg so mikið væl, at tað kann væntast, at hesar fyritøkur koma at gjalda lánini aftur í rætta tíð. Tann peningur íroknaður her, sum kommunan skyldar fyri annað enn havnina og elektricitetsverkið, er *57.763,00 kr.*

Av omanfyri nevndu lánum hevur løgtingið tikið ábyrgd fyri:

Lánið frá Kreditforeningen af Kommuner i Danmark	224.194,11 kr.
— » — » — » —	33.989,61 »
— » Færø Amts Sparekasse	109.844,42 »
— » — — —	81.532,76 »
	449.560,90 kr.

Undirritaða nevnd er samd um at mæla til at geva Klakksvíkar kommunu loyvi til at taka lán til at gjalda skuldina til Kreditforeningen við, og vil nevndin mæla tinginum til at taka ábyrgd fyri Klakksvíkar kommunu fyri nevndu lán.

Uppskot:

Tingið gevur Klakksvíkar kommunu loyvi til í Norðoya sparikassa at taka lán upp til 300.000 kr. at avloysa omanfyri nevndu lán til Kreditforeningen af Kommuner i Danmark, og tekur tingið ábyrgd fyri hesi lán.

2. viðgerð 5. oktober. 3. viðgerð 25. oktober. Samtykt 20—0.

B. Sands kommuna.

1. viðgerð 11. september. Framlagt 10. oktober.

Alit.

Kommunurnar í Sandoyar sýslu fóru í fjør undir at byggja nýggj læknahús, og Sands kommuna søkti um loyvi til at taka lán til hetta endamál, stórt 12.000 kr. Loyvi varð givið, og tingið tók ábyrgd fyri láninum.

Í ár upplýsir kommunustýrið, at húsini koma at kosta 40.000 kr. í staðin fyri 28.000 kr. og søkir um loyvi til at lána 8.000 kr. aftrat og biður tingið geva tílíkt loyvi og taka ábyrgd fyri hesum nýggja láni.

Kommunala nevndin hevur spurt kommunustýrið, um tað, áðrenn arbeiðið byrjaði, lá fyri tekning og kostnaðarætlan og hevur biðið um at fáa upplýst, hví útreiðslurnar, sum vóru ætlaðar til 28.000 kr. í fjør, nú verða 40.000 kr. Kommunustýrið upplýsir, at ætlanin var at nýta vindeygu, hurðar og ovnar úr tí gamla húsinum, og ætlað var, at timburið í hesum skuldi vera nóg mikið; men tað vísti seg, at vindeygu og hurðar fyri ein part mátti gerast av nýggjum og nýggir ovnar verða keyptir, eins og tað vísti seg, at timburið rakk ikki til. Tímalønin fyri handverkarar var eisini roknað 1/3 lægri, enn handverkarar kunnu fáast fyri. Ætlanin var at byggja húsið á sama stykki, har hitt gamla húsið stóð; men heldur ikki hetta kundi gerast, og tí má nýggjur garður verða gjørdur um grundstykkið.

Viðvíkjandi figgjarstøðuni hjá kommununi er upplýst, at kommunan heur hesi lán í sparikassanum:

	Upprunaligt	Rest
Saneringslán	25.000 kr.	23.712 kr.
Havnarlán	20.000 —	16.000 —
Havnarlán	15.000 —	14.250 —
Havnarlán	100.000 —	65.873 —
Lán til læknahúsini	12.000 —	12.000 —

Løgtingið hevur ábyrgd fyri øllum hesum lánum, og kommunan skyldar rentur frá 11. december 1943 undantíkið lánið stórt rest 65.873 kr.

Viðvíkjandi hesum láni er at siga, at kommunan hevur eftir av studningi til viðkan av bátahavn 21.800 kr., harav ynskir kommunan tó at fáa goldið kontant 6.000 kr., meðan restin skal ganga til sparikassan, so-

leiðis at hetta lán ætlandi verður 50.000 kr., tá havnin er liðug. Tað vil siga, at kommunan skyldar sparikassanum um 116.000 kr., og tað má verða hildið ivingasamt, um inntøkurnar av havnini kunnu renta og avdraga stórvegis av havnarlánunum.

Nevndin hevur eftirhugt rokinskapin hjá kommununi fyri 1942 og 43, og í 1942 var áliknað kr. 35.157,29 og í 1943 kr. 48.171,40. Eftirstøður vóru 1. jan. 1942 6.000 kr. og 1. januar 1944 kr. 11.000. Figgjarætlanir fyri 1942–44 vísa, at áliknað er so nógv, at kommunan skuldi kunnað goldið sín part 25.000 kr., tó er tað verunliga so, at tað tykist trupult hjá kommununi at fáa havnararbeiðið gjørt liðugt, og úrslitið er, at kommunan hevur fingið nýggja skuld 50.000 kr. í staðin fyri, at eingin tílík skuld átti at verið komin. Bílætið av fíggjarviðurskiftunum er tí ikki ljóst, og nevndin má vera í iva, um tað er beint at geva kommununi loyvi til at taka nýggj lán; men av tí, at her er talan um eitt arbeiði, sum má verða gjørt liðugt, skal kommunala nevndin tó mæla til at geva loyvi til umsókta lán og taka ábyrgd fyri láninum. Nevndin roknar við, at løgtingsskrivstovan og landsnevndin, sum hava eftirlit við kommununum, fáa meiri gjølla kannað viðurskiftini hjá kommununi og fáa samráð við kommunustýrið um, hvussu líkindini eru fyri kommununi at renta og avbetala lánini.

Uppskot:

Loyvi verður givið Sands kommunu at taka lán í Færø Amts Sparekasse 8.000 kr., og tekur tingið ábyrgd fyri hesum láni.

2. viðgerð 16. okt. 3. viðgerð 25. okt. Samtykt 21–0.

C. Kvivíkar kommuna.

8. november samtykt við 20–0 at geva loyvi til lán í Færø Amts Sparekasse 10.000 kr. og at taka ábyrgd fyri láninum.

D. Kollafjarðar kommuna.

17. november samtykt 21–0 kassakreditt í Sjóvinnubankanum upp til 50.000 kr. og ábyrgd tikið (til bryggjuarbeiði).

9. Loyvi til kommunurnar at keypa ella selja fasta ogn.

a. 12. oktober Sands kommunu at keypa fyri 25 kr. Vatnsoyrarhólm á Sandsvatni til friðlýst fuglavarp.

b. 27. oktober Vestmanna kommunu at selja ymiskar byggigrundir fyri 2 kr. pr m^2.

c. 27. oktober Klakksvíkar kommunu at keypa frá jarðargrunninum skúlatrøðna fyri 16.000 kr.

d. 14. november Skopunar kommunu at keypa av festijørð 1717,8 m^2 til byggigrund til skúlahús fyri 687,12 kr.

XIII. Ymist.

1. Decisión av løgtingsroknskapum.

24. november vórðu góðkend roknskapurin fyri Miðvág havn 1942 og allir roknskaparnir fyri 1943 undantikið Klakksvíkar sjúkrahús.

2. Landshandilin.

Frágreiðing og roknskapur 1/4 1943—31/3 1944, sí **skj. nr. 7.** 1. viðgerð 21. september. Framlagt 31. oktober.

Álit

(Iversen, A. Samuelsen og Davidsen við fyrivarni).

Amtmaðurin hevur sent tinginum frágreiðslu viðvíkjandi landshandlinum fyri tíðarskeiðið 1. september 1943 til 31. august 1944 og roknskap fyri fíggjarárið 1/4—1943 til 31/3—1944. Vísst verður til hesa frágreiðslu og roknskapin, ið eru prentað. Vørusølan hevur verið 5 1/4 milj. kr. og

bruttovinningurin er	564.231,39 kr.
Rentuinntøkur	23.758,26 „
Bilkonto	10.676,74 „
	598.666,39 kr.

Útreiðslur til vørugoymslu (harav saltleiga c. 30.800 kr. onnur leiga 26.500 kr., arbeiðsløn ir 81.000 kr.)	161.464,91	kr.
Skrivstovan (harav løn ir 75.020,33 kr.)	101.959,15	»
Rentur	59.021,16	»
Avskrivan skuldarar, innbúgv o. a.	34.913,75	»
Til delkrederekonto	30.000,00	»
Nettovinningur	211.307,42	»
	598.666,39	kr.

Harav sæst, at útreiðslurnar til leigu og løn ir eru stórar. Nettovinningurin er sum nevnt 211.307,42 kr.

Av figgjarstandinum pr. 31/3—1944 sæst at ognirnar vóru 2.375.663,69 kr., harav vørur ca. 1¼ mill. kr., í bankunum ca. 192.000 kr. og skuldarar ca. 924.000 kr.

Skuldin var: obligatiónslán 1½ mill. kr., til amtsgrunnin 150.000 kr. og ognarar um 205.000 kr.

Eginogn ¼—1943	208.158,76	kr.
plus vinningur í árinum	211.307,42	»
	419.466,18	kr.

Framlagt fyri nevndina hava verið brøv frá amtmanninum við fyrispurningi frá bretska konsulinum viðvikjandi trot av skóm, leðri, undirklæðum, segldúki, tógverki o. ø. Víst verður á hesi brøv og avskriftir av viðmælum, sum nevndin hevur givið um innfluttning av hesum vørum, so væntandi fáa vit meiri til landið av vørum, sum stór trongd er til at fáa, millum annað skógvar, undirklæðir, skipaútgerð sum segldúkur, tógverk og annað.

Telegram frá umboðsmanninum í Íslandi 11. oktober við tilboði uppá beinmjøl hevur eisini verið lagt fyri nevndina.

Tað hevur í longri tíð verið ein spurningur um landshandilin hevði skyldu at rinda skatt. Hetta var ivingasamt, og varð tí samtykt at láta dómstólin avgera málið. Dómur er fallin, hareftir landshandilin skal svara skatt, og á fundi 13. oktober varð einmælt samtykt at gjalda tann álagda kommunuskatt til Tórshavnar kommunu 27.157,40 kr. fyri 1940—43 og samtykt at rinda løgtingsskatt fyri 1940 til 1943 íroknað 59.325,50 kr.

Víðari verður framhildið, at útlit er fyri, at kriggið fer at hæsa av nakað skjótt, og beinast má tað vera at taka handilin av, so skjótt sum líkindi verða hartil, tí hildið verður, at tað er óneyðugt at halda almennan handil gangandi í vanligum tíðum. Sjálvstøðug handilshús í oyggjum okkara hava fyrr verið før fyri at røkja okkara innfluttningarhandil væl, og eigur tað tí ikki at verða forða teimum at taka henda handil uppaftur.

Uppskot:

Tingið góðkennir roknskapin fyri landshandilin fyri tíðarskeiðið ¼—1943 til 31/3—1944.

2. viðgerð 2. november og 3. november. Samtykt 21—0.

3. Hini av amtmanninum og landsnevndini greiddu mál.

Frágreiðing frá løgtingsskrivstovuni, sí **skj. nr. 6.**

25. november framlagt.

Álit.

(Jens Chr. Olsen við fyrivarni):

Nevndin hevur eftirkannað tey ymsu útgjøld, sum amtið hevur ávíst til gjaldingar í tíðarskeiðinum 3. nov. 1943—7. nov. 1944 og hevur einki at finnast at.

Eisini hevur nevndin eftirkannað gerðabókina fyri Landsnevndina millum tingseturnar 1943 og 1944 og ger hesar viðmerkingar:

Tann 10. desember 1943 hevur Landsnevndin valt formann, men ongan næstformann, og næstformaður er heldur ikki valdur á seinni fundi. Nevndin heldur, at ein so týdningarmikil nevnd sum Landsnevndin eigur at velja bæði formann og næstformann og mælir til, at so verður gjørt í framtíðini.

Tann 17. august er framlagt bræv frá Búnaðarráðnum dagfest 24. juli við sáttmála millum ráðið og bretska hervaldið um leigu av grund til hervaldsins oljutangar í Søldarfirði. Nevndin heldur, at Búnaðarráðið átti ikki av sínum eintingum at hava gjørt ein sáttmála sum henda, ið kann koma at føra við sær, at annaðhvørt enski staturin bíliga fær ognarrætt til eina dýrmetta sjóvarstrond á Skálafirði ella Løgtingið noyðist at keypa og dríva tangarnar, men at málið átti at verið lagt fyri tingið til avgerðar.

Tann av Løgtingsskrivstovuni útarbeidda frágreiðing um Landsnevndarmál gevur yvirlit yvir tað arbeiði, Landsnevndin hevur greitt frá hondum og tær avgerðir, hon tingsins vegna hevur tikið, men nevndin heldur at í Løgtingstíðindi eiga á hvørjum ári at verða skrásett, ið hvussu er øll fíggjarmál og lógarmál, sum hava verið til avgerðar í Landsnevndini í tíðini síðan seinastu tingsetu, eins og frásøgnin í Landsnevndargerðabókini eigur at vera — um enn stutt — so tó so umfatandi, at altíð skilst hvat ið málið sipar til. Sum dømi um ov stutta frásøgn kann verða nevnd frásøgn 1. december 1943:

> «Viðvíkjandi vørum frá bretskum útsølum, sum eru tollskyldugar.
> Bræv frá amtmanninum 23. juni.
> Samtykt, at nevndin heldur, at meiri kann ikki verða gjørt fyribils.»

Her átti at verið tilskilað leysliga innihaldið í amtmannsbrævinum.

Landsnevndarlimirnir hava ikki verið samdir í nógvum málum, sum tó tey flestu hava verið umrødd í bløðum ella á tingi. Nevndin heldur tað vera ónyttu í hesum áliti at draga hesi mál fram aftur, men ein meiriluti (R. Long og Poul Petersen) vísa til, at ein minniluti í Landsnevndini í mongum málum hevur tikið fyrivarni og ynskja hetta fyrivarni viðmerkt í Landsnevndarmálaskránni, tá ið hon verður prentað í Løgtingstíðindi.

Uppskot:

Tingið góðtekur tey útgjøld, amtið hevur ávíst og tær avgerðir, Landsnevndin hevur tikið millum tingseturnar.

Í Løgtingstíðindi verður á hvørjum ári prentað skrá yvir ið hvussu er øll lógarmál og fíggjarmál, sum Landsnevndin millum tingseturnar hevur viðgjørt, soleiðis sum skilað til í nevndarálitinum.

Broytingaruppskot

frá R. Long og J. Chr. Olsen:

Í uppskotinum verður sum triðja stykki sett aftrat:

Viðvíkjandi tí í álitinum nevnda máli frá 17. august 1944 verður víst til viðgerðar frágreiðingin í Landsnevndargerðabókini fyri 1942.

2. viðgerð 27. november. Broytingaruppskotið samtykt 13–0. Nevndaruppskotið samtykt 13–1.

---

4. Kolaframleiðsla.

A. Framlagt 6. oktober.

Álit.

frá Dahl, Kjølbro, Long og Th. Petersen:

Kolamálið í síni heild er av Løgtingsskrivstovuni lagt fyri tingið. Málið umfatar serliga tveir spurningar: Kolaframleiðslan í Rangabotni og í Hvalbæ. Tann seinni spurningurin, um støðgin, ið komin er í kolaframleiðsluna í Hvalbæ, verður ikki umrøddur í hesum áliti, men vil seinri, tá tingingar hava farið fram, verða lagdur fyri tingið.

Í spurninginum um Rangabotn hevur nevndin býtt seg í ein meirilutu og ein minniluta. Meirilutin (P. Dahl, J. F. Kjølbro, R. Long og Th. Petersen) ger her hesar viðmerkingar og uppskot í málinum:

Fyri at taka støðu til teir spurningar, ið nú fyriliggja, heldur meirilutin tað vera neyðugt, at tingmenn fáa sær eitt greitt yvirlit yvir tað, ið fram er farið síðani kríggsbyrjan.

Í 1940, tá heimsbardagin serliga nerti við okkara oyggjar, var støðan tann við A/S Føroya kol, at hetta felagið skyldaði nógvan pening, og ikki hevði eina støðu, ið gjørdi tað møguligt at halda fram við kolaframleiðsluni landinum til frama.

Tann 16. juli 1940 varð gjørd semja millum Foroya kol og an-

beiðsmannafelagið «Fylking», soleiðis at hetta seinra felagið skuldi taka kolagrefstur upp. Í § 11 var ásett, at sáttmálin kundi uppsigast frá øðrum av pørtunum við 2 mánaða ávaring. Tann 12. februar 1941 varð gjørd ein broyting í sáttmálanum vegna príshækkan av koli.

Hesin sáttmálin hevur so stutta uppsagnarávaring sum 2 mánaðar, tí sáttmálin varð gjørdur bráðfengis fyri bardagatíðini, meðan ein ikki kundi fáa fatur á Føroya kols stjórn og nevnd.

Tann 11. mai 1942 varð nýggjur sáttmáli gjørdur millum arbeiðsmanna kolavirki og Føroya kol, eftir at samráðingar høvdu farið fram við landsnevndina. Tað gekk ikki væl við kolaframleiðsluni, og landsnevndin játtaði ymiskar peningastyrkir, móti at kolavirkið váttaði at vilja royna at seta framleiðsluna upp til 1000 tons um mánaðin, hvat ongantíð varð náðað enn ikki fyri ein einasta mánaða.

Eisini hesin sáttmáli hevur uppsagnarfreist, sum í grein 9 er sett til ein mánaða frá hvørjari síðu.

Tann 19. apríl 1943 varð seinasti sáttmálin gjørdur, og var tað nú landsnevndin, ið Føroya løgtings vekna tók alla ábyrgd fyri rakstrinum. Sáttmálin varð lagdur fyri tingið í eykatingsetuni apríl 1943 og varð har góðtikin við 13 atkvøðum fyri og eingin ímóti. Í § 11 er ásett, at hvør av pørtunum kann uppsiga sáttmálan við ein mánað ávarðing.

Sum tað sæst av hesum, hevur tað verið heilt stutt freist til uppsøgn í øllum sáttmálum. Tað er ikki beinleiðis sagt hvi í sjálvum sáttmálanum, men í einum uppskoli stendur: «Nærværende Overenskomt *vedvarer, indtil Verdenskrigen* for Europas Vedkommende *er ophørt*, og kan derefter opsiges med 1 Maaneds Varsel fra begge Sider til Ophør ved Udgangen af en Maaned.» Tað sæst her, at tað, ið tankin hevur verið, er at sáttmálarnir eru gjørdir fyri tá óvanligu tíðina, meðan ein má rokna við, at nakað má umskipast við felagnum so skjótt felagsins stjórn og nevnd, ið nú er í Danmark, aftur er førar fyri at røkja felagsins virki.

A/S Føroya kols støða var í 1940 tann, at felagið í Føroyum skyldaði kr. 49.479,13, og síðani til kolafeløg í Danmørk kr. 150.000,00 og til danska státin kr. 400.000,00. Skuldin í Føroyum er niðurgoldin, so har einans eru eftir kr. 9.794,61, ið landshandilin hevur til góðar, meðan tað má roknast við, at skuldin í Danmørk er vaksin við rentunum í teimum farnu 4 árum.

Felagið var í 1940 í trupulleikum og var fyrst stýrt av felagsins verkfrøðingi og stjóra Mitens, men seinri var stjóri Mitens av sorinskrivaranum nevndur til verju fyri felagið. Tá ein hyggur at støðuni í dag, má ein rokna við, at tað ikki er gjørligt at fáa tað gamla felagið í lag aftur, tí hartil skal nógvur peningur. Men heilt víst er tað, at ein nýskipan má koma í lag við skuldina til kolafeløgini og státin, um tað so verður við, at felagið verður uppgjørt sum trotibúgv, ella við at eitt umskipað felag verður stovnað.

Tá ein hugsar um hetta, má ein gera sær greitt, at tað grundarlag, Føroya løgting í dag arbeiðir kolaraksturin á, er ógvuliga ótrygt. Ognarrætturin til alt er hjá felagnum, ið, sum ávist, má verða umskipað, og einans rakstrarrætturin er hjá tinginum, og tað við einum so stuttum uppsagnarfreisti sum ein mánað. Tann peningur, ið verður niðurlagdur í at byrja nýggja framleiðslu, má tí av meirilutanum haldast at vera peningur, ið einans kann roknast at koma tí gamla felagnum til góðar.

Kolagrefsturin í Rangabotni hevur givið hetta úrslit:

Tíðarskeið:	Framleitt kol:	Selt kol:	Alm. studn.:
1940, frá 1.–8.:	3.080,8 tons	2.096,20 tons	10.000,00 kr.
1941:	5.550,0 —	3.943,18 —	3.412,78 —
1942:	4.731,7 —	3.459,48 —	38.285,39 —
1943:	5.618,5 —	4.084,25 —	109.881,26 —
1944, til 1.–9.:	2.050,4 —	1.641,65 —	79.722,60 —
Samantalt:	21.031,4 tons	15.224,76 tons	241.302,03 kr.

Tað skal til tølini gerast hesar viðmerkingar: Tølini framleitt kol er tað, ið kemur úr minuni, soleiðis at munurin millum hetta tal og selt kol er tað, ið ikki kemur til sættis (Svind) og visir hetta, at 26¼ pct. av allari framleiðsluni fer fyri einki. Av tí peningi, ið nevndur er, eru tær fyrstu 10.000 kr., ið vóru lán frá státinum, afturgoldnar, meðan tær 231.302,03 kr., løgtingið hevur útlagt, allar eru farnar. Tað skal eisini viðmerkjast, at ein partur av peninginum ikki er farin beinleiðis til at bróta kol; soleiðis eru 10.000 kr. í 1942 til eitt nýtt kolahol, ið miseydnaðist, soleiðis at einki kom burturúr, 42.508,57 kr. í 1942 til at byggja barakkir fyri og 40.000 kr. í 1944 til tey 2 nýggju kolaholini, ið seinri skulu umrøðast.

Meirilutin má framhalda, at tað frá einum alment føroyskum sjónarmiði má leggjast dent á, hvat pening tað almenna hevur latið, og hvat kol er komið til nýtslu. Tá ein so sammetir tey ymisku tíðarskeið, verður bílætið dapurt:

Tíðarskeið:	Selt kol:	Løgtingspeningur:	Kr. uppá tonsið:
1.–8.–40 til 1.–9.–44	15.224 tons	233.302 kr.	15 kr. 34 oyr.
1.–4.–42 til 1.–9.–44	7.818 tons	189.603 kr.	24 kr. 30 oyr.
1.–1.–44 til 1.–9.–44	1.641 tons	79.722 kr.	49 kr. 81 oyr.

Til sammetingar kann vísast á, at kolagrefsturin í Hvalbø, síðani teir byrjaðu at útflyta í november 1942, hevur givið 11.752,4 tons av koli móti 6.580 tons úr Rangabotni í sama tíðarskeiði. Tá er tað, Hvalbingar sjálvir hava nýtt, ikki roknað við, meðan alt tað, ið selt er á Tvøroyri, er íroknað tey 6.580 tons, og gevur hetta ein størri mun. Til Hvalbingar hevur tingið latið 12.000 kr. studning og 39.150 kr. lán, ið kann væntast afturgoldið, og gevur øll peningahjálpin til Hvalbingar einans 4 kr. 37 oyr. uppá tonsið av útfluttum koli.

Um tey tvey nýggju kolholini í Rangabotni skal meirilutin viðmerkja:

Tað varð í december 1943 byrjað í Rangabotni uppá arbeiði at seta á til eitt nýtt kolahol; tað fyrilá tá eingin játtan um hetta frá tinginum ella landsnevndini. Tann 25. januar 1944 samtykti landsnevndin, at hildið verður fram við tí umtalaða kolabrotinum, um útreiðslurnar kunnu haldast innan fyri rimiligt mark.

Tann 13. februar 1944 skrivar driftsráðið og verkfrøðingurin til landsnevndina, at teir tilráða, at tað falt verður byrjað 4 nýggj kolahol, soleiðis at útreiðslurnar ætlast til at verða um kr. 70.000. Tað verður lagt aftrat í brævinum, at «De nye Indslag kan ikke forventes at blive ydedygtige før om ca. 4 Maaneder.» Landsnevndin samtykti nú tann 17. februar 1944, at 2 nýggj kolahol (íroknað tað, sum varð byrjað í december) verða gjørd, og at hartil verður játtað upp til 30.000 kr. Tann 3. marts 1944 var verkfrøðingurin í Rangabotni og setti plássið av til hetta arbeiði, og varð so byrjað.

Frá 7. til 10. april 1944 vitjaði tann bretski professarin Ritson kolaminuna. Hann setur fram uppskot um at byrja nýggj kolahol og føra tey 100 m inn í fjallið, áðrenn framleiðslan veruliga byrjar, meðan tað ikki má arbeiðast í jaðaranum. Síðani leggur hesin professari aftrat, at hann, um hansara uppskot verða fylgd, ikki sær nakað at vera í vegin fyri, at ein framleiðsla uppá 15.000 tons árliga skuldi kunna uppnáast 6 mánaðar aftaná byrjanina.

Tann 18. august 1944 viðgjørdi landsnevndin málið av nýggjum, og nú varð upplýst, at tað var nýtt um 32.000 kr. til tað nýggja brotið, men enn sást einki til kol. Verkfrøðingurin sigur í sínum brævi tann 24. juli 1944, at tað er ógjørligt at siga, hvussu nógvan pening tey tvey nýggju kolaholini vilja taka, men leggur hann aftrat, at arbeiðið má haldast fram og tann neyðturviligi peningur skaffast til vegar. Landsnevndin samtykkir nú at játta neyðturviligan pening til at halda fram ein mánaða aftrat, og løgtingið má gera av um, hvussu so verður at gera. Th. Petersen og Poul Petersen tóku ikki lut í hesari samtykt.

Tað liggur nú fyri nevndini bræv frá kolaleiðsluni um at 40.000 kr. eru nýttar tann 18. september 1944. Hendan dag má hetta arbeiði ætlast at vera steðgað av tí, at landsnevndarsamtyktin frá august ikki er longd av tinginum, tó hevur nevndin onga frágreiðing fingið um hetta, ella um hvat úrslit tann seinasti mánaðin hevur givið. Nevndarformaðurin hevur frá verkfrøðinginum fingið ymiskar upplýsingar um hansara sýn uppá hesa nýggju roynd:

Tað fyrsta arbeiði, at rudda fyri teimum tveimum kolaholunum og koma inn undir fjallið, sigur verkfrøðingurin, at ein má rokna við í besta fall at nýta 3 mánaðir til, tó at trupulleikar á vetrartíð gera, at tað kann ganga longri tíð. Hetta metar verkfrøðingurin at vilja kosta um leið 30.000 kr. í arbeiðslønum.

Tað næsta arbeiði at gera tvær gangir 100 m inn í fjallið, áðrenn tann veruliga framleiðslan byrjar, roknar verkfrøðingurin vil taka um leið 3 ella 4 mánaðar, kosta í arbeiðsløn um 20.000 ella 25.000 kr. og geva í koli frá sjálvum kolaganginum 600 tons og so eitt sindur meira frá smalri tvørgangum.

Tá landsnevndin tann 17. februar 1944 samtykti at fara undir at gera tvey nýggj kolahol, varð sagt henni frá, at hetta kundi væntast at geva kol um 4 mánaðar, ella í juli 1944. Tað var tí heilt natúrligt, at landsnevndin samtykti hetta, ið kundi hjálpa uppá kolastøðuna til henda veturin, ið nú stundar til.

Tá landsnevndin viðgjørdi málið í apríl mánaða, fyrilá frá bretska professaranum frásøgn um at komast kundi uppá 15.000 tons árliga innan fyri 6 mánaðar, tað vil siga til heystar í ár, so tað er væl fatiligt, at landsnevndin tá samtykti, at haldast skuldi fram við virkinum.

Tá landsnevndin tann 18. august 1944 viðgjørdi málið, lá alt heldur ógreitt, og einki vist útlit var fyri at fáa kol í nærmastu framtíð. Tó at útlitið var óvist, samtykti landsnevndar meiriluti at halda fram ein mánað aftrat til tingið sjálvt kundi taka avgerð, og vildi hetta kosta út móti 10.000 kr.

Í dag liggur málið meira greitt, og um hesi tvey kolahol er yvirlitið hetta:

Til 18/9 1944 hevur tað kostað í arbeiðsløn	40.000 kr.,	tikið 6½	mánaða
At koma inn undir vil kosta í arbeiðsløn	30.000 »	taka 3	—
At koma 100 m inn vil kosta í arbeiðsløn	25.000 »	— 4	—
Hartil kemur aðrar rakstrarútreiðslur 7 mánaðar á 3.000 kr.	21.000 »		
Tilfar, propps o. a. óvist	24.000 »		
ialt	140.000 kr.	13½	mánaða

Tað, tingið tí má leggja til grund fyri sína avgerð í hesum máli, er tann verunleikin, at tað vil kosta í minsta lagi 100.000 kr. aftrat, at kolaframleiðslan — fyri uttan tey nevndu 600 tons — ikki kann væntast at byrja áðrenn juni—juli 1945, at ognarrætturin til hetta virki ikki er hjá tinginum, men hjá felagnum A/S Føroya kol, og at tingið má rokna við at verða uppsagt, áðrenn kolaframleiðslan byrjar.

Veraldarbardagin má sigast at hava tikið eina vending, ið ger, at roknast má við, at A/S Føroya kol's nevnd og stjórn kemur at taka við starv teirra áðrenn kolaframleiðslan í teimum nýggju kolaholunum er byrjað, og møguleikin fyri at fáa sáttmálan broyttan eigur tí at verða umhugsaður. Um tað er gjørligt at fáa nýggjan sáttmála við verjan fyri A/S Føroya kol, soleiðis at tað verður vissað Føroya løgtingi ein frammihjárætt fyri tann pening, ið niðurlagdur verður, vil meirilutin vera við til at taka spurningin um at halda fram til umhugsunar. Sum nú liggur fyri, má meirilutin gera uppskot um at arbeiðið fyri nýggjari minuframleiðslu í Rangabotni støðgar.

Fíggjarnevndin hevur fingið bræv frá stjóra Mitens, ið umboðar menn á Tvøroyri og í Trongisvági, ið hava hug at royna kolaframleiðslu í einum nýggjum plássi «vesturí í kráini». Teir siga seg at hava tøkan pening til hetta, men koma at gera ein vegastubba, ið ætlaður er at kosta 20.000 kr. Teir spyrja, um tingið kann hugsast at veita peningastyrk til hetta arbeiði, og ynskja eisini at vita, um tingið ásannar, at sáttmálin millum tingið og Føroya kol ikki er til hindurs fyri hesa framleiðslu.

Meirilutin skal viðmæla, at hesir menn fáa byrjað hesa royn. Um peningastyrk heldur meirilutin, at tað beinasta hevði verið, at tað varð givið eitt lán uppá 15.000 kr. at afturgjalda við í minsta lagi 5 kr. av hvørjum tonsi av koli, ið tað nýggja felagið fær til sættis og at renta við 3 pct. p. a. Meirilutin setur uppskot samsvarandi.

Sum málið liggur fyri, og sum kolastøðan er í løtuni heldur meirilutin, at dentur má verða lagdur á at arbeiða við tí, ið kann geva kol hendan veturin og ikki tí, ið kanska frá einum fremmandum felag kann geva kol einaferð í framtíðini, í besta fall einaferð næsta summar.

Tað ummælta nýggja felagið, ið er umboðað av stjóra Mitens, sigur seg at vænta at fáa kol um 1½ mánaða, so tað er her, tingið eigur at leggja sína megi til. Eisini skal viðmerkjast, at formaður Viberg og rakstrarleiðari Peter Bærentsen báðir eru millum teir menn, ið ætla at royna nýggjan rakstur, soleiðis at ein má ganga út frá, at teir síggja heldur dapurt uppá útlitið fyri kol í sjálvum Rangabotni.

Sum sagt frá í byrjanini av hesum áliti er her ikki ummælt støðan í Ilvalba, tí nevndin fyrst má hava samráðingar við fólk haðani, áðrenn støða kann takast.

Meirilutin setur so statt fram hesi

uppskot:

1. Løgtingið samtykkir, at tað ikki undir núverandi sáttmála millum løgtingið og verjan fyri A/S «Føroya kol» er beint at halda fram við arbeiðinum fyri nýggjari kolaframleiðslu í Rangabotni.
2. Løgtingið samtykkir, at tað ikki, sambart sáttmálan 19. april 1943, vil gera einum nýggjum felag, umboðað av stjóra Mitens, nakað til hindurs fyri at royna nýggja framleiðslu «vesturí í kránni.»
3. Løgtingið játtar úr amtsgrunninum eitt lán uppá 15.000 kr. til tað undir 2) nevnda nýggja felag, at renta við 3 pct. p. a., og at aftur-gjalda við í minsta lagi 5 kr. av hvørjum tonsi av koli, ið kemur til sættis.

Broytingaruppskot

frá Johan Poulsen og Kr. Djurhuus:

Sum broyting av punkt 3 í meirilutans uppskoti verður sett hetta uppiskoyti:

1. Um so verður, at arbeiðið í tí nýggja umrødda kolaholinum má støðga vegna kolatrot, verður lánið at afturrinda seinast 2 ár altaná, at arbeiðið er støðgað.

   Verður kolaframleiðslan hagani harafturímóti munagóð, heimilast landsnevndin tingsins vegna at taka avgerð um, æntin ein partur ella alt lánið kann veitast sum studningur.
2. Sum nýtt punkt 4 í meirilutauppskotinum verður sett:

   Løgtingið áleggur fíggjarnevndini at tingast við verjan fyri A/S «Føroya kol», harra Mitens, um tryggjan av tingsins ognarrætti til bygningar, arbeiðstól o. a., sum av tingsins ávum og fyri tingsins pening er skaffað til vegis; samstundis heimilast fíggjarnevndin eisini at tingast um møgulig onnur tørvandi viðurskiftir kolabrotinum í Rangabotni viðvíkjandi.

Broytingaruppskot

frá P. M. Dam o. fl.:

Staðið, sum harra løgtingsskrivstovustjóri Edw. Mitens og fleiri ynskja at fáa tingsins loyvi at høgga kol í, og sum ætlanin er at leggja veg til við løgtingsstudningi, liggur í sama øki (fjalli), sum tað av løg-tinginum drivna kolanám (Rangabotnsnámið).

Undirskrivaðu tingmenn halda, at tað ber illa til hjá tinginum at lata privatmenn (felag) koma at grava kol út fyri egnu rokning í sama øki sum tingið sjálvt høggur kol í. Serstakliga øvugt halda vit hetta vera, tá ið ímillum teir umsøkjandi eru driftsleiðari og kolanámsformaður við kolanámið hjá løgtinginum, og tað staðið, privatfelagið ætlar at seta á, verður hildið at vera bæði kolarikari og lættari at koma til enn tey tvey nýggju holini, ið tingið hevur ásett og ætlandi vil halda fram við grevstr-inum av eftir ávising av professara Ritzon.

Soleiðis sum kolastøðan er í dag, er tað skylda hjá tí almenna at troyta hvønn møguligleika at fáa kol til nýtslu skjótast møguligt. Undir-skrivaðu seta tí fram fylgjandi

Uppskot.

Í staðin fyri punktini 2 og 3 í meirilutans nevndaruppskotið verður sett:

«Løgtingið setur á við kolagrefstri «Vesturi í Krónni» í Rangabotni. Byrjað verður við tað sama, fyrst við einum holi. Um líkindi eru til tess, og trongd er eftir koli, verður landsnevndin heimilað at skipa fyri, at onnur nýggj kolagrevstrarhol verða gjørd.

Landsnevndin verður heimilað til fyri tingsins rokning at lata gera veg ella aðra neyðuga fyriskipan fyri at fáa koyrt kolið úr kolanáminum «Vesturi í Krónni».

Útreiðslurnar verða goldnar úr amtsgrunninum.

2. og 3. viðgerð 6. oktober. Loyvi givið til frávíkjan av tiðarfreistum. Uppskot meirilutans pkt. 2 samtykt 21—0. Broytingaruppskotið frá Djurhuus og Poulsen til pkt. 3 samtykt 20—0 og pkt. 3 so broytt samtykt 21—0. Broytingaruppskotið frá Djurhuus og Poulsen til nýtt pkt. 4 samtykt 24—0. Broytingaruppskot frá Dam fall 8—0 og pkt. 1 burturdottið.

B. Framlagt 22. november.

Álit.

Tann 25. august 1944 dømdi Føroya rættur ein dóm, hareftir Hvalbingar skuldu geva upp, hvussu nógv teir høvdu flutt út av koli síðani 1940, og síðani gjalda eina avgift til A/S Føroya kol uppá 2 kr. av hvørjum tonsi. Tá Hvalbingar frættu um henda dóm settu teir lýsing í bløðini, at útfluttningur var steðgaður.

Sambandsflokkurin hevur sent skriv til tingið tann 5. september 1944 og biður um, at útfluttningsstøðan frá Hvalba má verá tikin til viðgerðar sum skjótast.

Tann 5. september 1944 skrivar amtið til tingið, at bretski konsulin sigur seg at vera illa við at frætta um trupulleikarnar við kolahøggarunum í Hvalba, og minnir hann á, hvussu álvarsom kolastøðan er í Bretlandi, soleiðis at tað er heilt neyðugt, at kolaframleiðslan í Føroyum verður nýtt mest gjørligt.

Brenninevndin skrivar tann 13. september 1944 til tingið: «I Anledning af den gennemførte Standsning af Afskibning af færøske Kul fra Kvalbø skal Brændselsnævnet i Henhold til Beslutning i Møde den 12. September 1944 tillade sig at meddele, at der omkring den 15. Oktober 1944 vil være komplet Mangel paa færøske Kul, saafremt Afskibningen fra Kvalbø ikke er genoptaget forinden.»

Málið varð tann 7. september 1944 av tinginum sent til fíggjarnevndina til viðgerðar.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og ætlanin var, at løgtingsformaðurin saman við tinglimunum Kr. Djurhuus og P. M. Dam skuldi fora samráðingar við Hvalbingar tann 18. september í Hvalba. Óveður gjørdi, at tingformaðurin ikki kundi koma til hesar samráðingar, ið fóru fram millum Hvalbingar og teir nevndu tinglimirnar. Hvalbingar tóku ta føstu støðu, at teir vildu ikki taka útfluttningina uppaftur, uttan so at tað varð tryggjað teimum, at teir fyri farnu tíð og alla framtíð fingu rætt til at framleiða kol og útflyta tað uttan at gjalda nakra avgift til A/S Føroya kol.

Undir fyrireikingini av málinum kom formaðurin fram á eitt skriv

frá statsministara Th. Stauning dagsett 21. mars 1938 til Føroya løgtings, har millum annað verður sagt: «at Selskabet Føroya kol formentlig ikke vilde kunne undgaa Konkurrence fra tilsvarende Virksomheder paa Færøerne.» og hvar «Ret til Brydning af Kul» verður sett í mótstøðu til «Eneretten til Udnyttelse af Undergrunden.» Av tí at hetta skjal ikki hevði ligið fyri rættinum, tá málið var avgjørt tann 25. januar 1944, varð skrivað til rættin fyri Hvalbingar um at taka sakina til nýggja viðgerð. Rætturin avger tann 30. september 1944, at sakin ikki kann verða tikin uppaftur, og gevur sum grund, at skrivið frá 1938 ummælti eina viðkan av rættinum í Suðuroy til eisini at galda aðrastaðni í Føroyum og ikki vísur hvat ein eigur at leggja í koncessiónina frá 1932 um felagsins rætt í Suðuroy.

Tá hesin vegur til eina semju vísti seg ikki at vera farandi, sendi fíggjarnevndin boð til Hvalbiar, og bað teir senda umboðsmenn til Havnar til at samráðast við nevndina. Tann 5. oktober 1944 komu Niclas Jensen og Peter Emil Jensen sum umboðsmenn fyri felagið «Royndø» til samráðingar við fíggjarnevndina, og var úrslitið av hesum samráðingum, at fíggjarnevndin, samstundis sum hon takkaði Hvalbingum fyri tann stuðul, kolahøggingin gjøgnum tey seinastu tvey ártini hevði verið fyri Føroya fólk, setti fram tvey uppskot til semjingar, soleiðis at kolaútfluttningurin kundi byrja aftur úr Hvalba. Umboðsmenninir fingu tilboðið skrivliga við sær suður, og lovaðu at leggja tað fyri felagnum skjótast gjørligt, og síðani senda telegram um, hvat úrslit felagsins samráðingar komu til.

Tilboðið, ið varð sett fram av fíggjarnevndini 5. oktober 1944 til umboðsmenn fyri arbeiðsmannafelagnum «Royndø», harrarnir Niclas Jensen og Peter Emil Jensen, Hvalba, var soljóðandi:

«Løgtingsins fíggjarnevnd hevur í dag haft samráðingar við tykkum sum umboðsmenn fyri arbeiðsmannafelagið «Royndø», Hvalba, og hava tit sagt frá, at úrslitið av samráðingunum mugu leggjast fyri felag tykkara áðrenn nakar sáttmáli kann gerast. Samráðst hevur verið um, undir hvørjum treytum, kolaframleiðslan í Hvalba kann verða uppafturtikin, og skal fíggjarnevndin í stuttum taka upp, tað ið hevur verið framborið undir samráðingunum.

Á einum fundi um heystið 1942 millum fíggjarnevnd tingsins og umboðsmenn fyri Hvalbingar varð umtalað, at avgift til A/S «Føroya Kol» 2 kr. av hvørjum tonsi skuldi steðga til bardagin varð av, men setast av og málið kundi so verða avgjørt av teimum vanligu rættarstigum. Á hesum grundarlag hava Hvalbingar høgt kol til útfluttning síðani.

Í vetur kom tað til sakarmál millum A/S «Føroya Kol» og felagið «Royndø» um hesa avgift, og varð felagið fyrst frífunnið, men síðan, tann 25. august 1944, dømt til at gjalda ta nevndu avgift 2 kr. av tousinum til A/S «Føroya Kol». Steðgur kom nú í kolaframleiðsluna, og hava samráðingar farið fram um, á hvønn hátt hetta kann verða uppafturtikið.

Fíggjarnevndin var á einum máli um at halda fram tann munagóða stuðul, sum útfluttningurin frá Hvalba hevur verið undir bardagatíðini, og allir tinglimir eru Hvalbingum takksamir fyri hesa hjálp. Um arbeiðið ikki verður uppafturtikið, kann tað henda, at mangur Føroyingur kemur at sita við kaldar steinar komandi vetur, og fíggjarnevndin heitur tí á Hvalbingar um at hjálpa fólki viðahvar um landið, við eins og higartil at verða tað álit, ið fær til vegar kol, so eingin situr kaldur. Løgtingið hevur frá Bretlandi fingið boð um, at loyvi vil verða givið til tilfluttning av tørvandi nøgd av koli, um her heima verður gjørt hvat gerast kann fyri at fáa til vega tað brenni, torv og kol, ið her kann skaffast; ógvuliga ivasamt má fíggjarnevndin halda tað verða at fáa øktan tilfluttning, um so er, at innanoyggja ósemja ger, at kolaframleiðslan her minkar við fleiri túsund tons.

Eftir samráðingum við stóra Mitens, verja fyri A/S «Føroya Kol», skal fíggjarnevndin koma fram við hesum ymisku uppskotum um semju í málinum:

A. Verjan fyri A/S «Føroya Kol» gevur avkall uppá tær 1 kr. 50 oyru uppá tonsið av kolið, ið felagið sambart tann avsagda dóm skal hava í avgift, galdandi frá útfluttningurin byrjaði í 1942 og til A/S «Føroya Kol»s nevnd tekur við starvinum, tá bardagin er endaður.

Tingið heldur verjan persónliga skaðaleysan, um krav verður gjørt.

Tey 50 oyru uppá tonsið, ið skulu tilfalla tí franska felagnum, verða at inngjalda á eina konto, og kunnu so tingingar takast upp um hetta, tá bardagin er av.

Føroya løgting samtykkir at biðja statin, ið eigur 400.000 kr. til góðar hjá felagnum «Føroya kol», um tá bardagin er av, og samráðingar skulu fara fram um felagsins framtíð, at seta tað sum treyt fyri eina hvørja semju við felagið, at tað verður ásannað, at felagið als ikki hevur nakran rætt til avgift av koli, ið verður framleitt í Hvalba.

B. Verjin fyri A/S «Føroya Kol» váttar, at hann felagsins vegna gevur avkall uppá ein hvønn rætt samsvarandi tí avsagda dómi, soleiðis at støðan verður eins og áðrenn sakarmál var lagt, tað vil siga tann sama, sum Hvalbingar í tíðini áðrenn 25. august 1944 hava arbeitt undir. Um tað so aftaná bardagan skal leggjast nýtt sakarmál um avgiftina fyri alla tíðina frá útfluttningurin byrjaði, má avgerast av felagsins nevnd og stjórn, ella við samráðingar við felagsins ognarar, harundir danska státin.

Fíggjarnevndin vil biðja Hvalbingar umhugsa hesar báðar møguleikar, og váttar, at Føroya løgting bindur seg til at standa við endan, tí semjingarvegi viðvíkjandi, sum Hvalbingar velja, soleiðis at telegram frá Hvalbingum um at teir hava samtykt at ganga við til annan hetta vegin, er at fata sum tað var inngingin bindandi sáttmáli fyri allar partar um viðgerð av málinum í framtíðini.

Fíggjarnevndin heitir á Hvalbingar um at viðgera málið skjótast tilber og senda telegram um úrslitið, tí støðan við kolaframleiðslu er soleiðis at neyð kann væntast í mongum føroyskum heimum, um tað ikki skjótt kemur úrslit av hesum samráðingum.»

Uppskot A varð samtykt av «Roynd». Fíggjarnevndin má eins og «Roynd» ganga út frá, at tað, tá veraldarbardagin er at enda, og samband við stýrið fyri A/S Føroya Kol aftur kann fáast, verður gjørligt at fáa eina skipan í lag, soleiðis at kolagrefsturin í Hvalba verður frítur fyri skyldu til at rinda koncessiónsgjald.

Fíggjarnevndin skal halda fram, at hon skilir verjans, harra Mitens, frítøku fyri ábyrd yvir fyri A/S «Føroya Kol» viðvíkjandi gjald fyri tíðina frá 1942 til samband við felagið aftur fæst í lag, á tann hátt, at Løgtingið um neyðugt má hava ábyrgdina fyri at rinda nevnda gjald. Um ein partur av gjaldinum skuldi ognast státinum sum kreditor hjá A/S «Føroya Kol», gongur nevndin út frá tí ásetningi, at státurin til ta tíð vil geva eftir tann partin av gjaldinum.

Uppskot:

Við at vísa á tað í álitinum framførda, góðtekur Løgtingið tann millum fíggjarnevndina og felagið «Roynd» gjørda sáttmála, eins og tingið

samtykkir at halda verjan fyri A/S «Føroya Kol», harra Mitens persónliga skaðaleysan, um tað orsakað av hansara játtan av at fráfalla avgift sambart dómin frá 25. august 1944 skuldi verið gjørt nakað persónligt krav galdandi móti honum.

2. viðgerð 25. november, 3. viðgerð 30. november. Samtykt 18—0.

C. Framlagt 22. november.

Álit
frá Kr. Djurhuus

sí skjal nr. 15.

2. viðgerð 25. novbr. 3. viðgerð 30. novbr. Samtykt 13—0.

D. Framlagt 4. oktober.

Uppskot
frá Kr. Djurhuus, J. Poulsen og Dam.

Landsnevndin samtykti 18. august, at arbeiðið viðvíkjandi 2 nýggj kolahol í Rangabotni skuldi halda fram inntil 18. september, og so skuldi løgtingið gera av, um arbeiðið skuldi steðga ella verða hildið fram. Landsnevndin hevði í sínari tíð eftir tilmælan frá verkfrøðinginum játtað upp til 30.000 kr., men hesin peningur var brúktur 18. august.

Eitt minnital í fíggjarnevndini (P. M. Dam, Kr. Djurhuus og Johan Poulsen) heldur tað vera beint, at arbeiðið ikki steðgar, og vil nærri greiða frá støðu sínu í tingsalinum.

Uppskot.

1. Arbeiðið við tey tvey kolaholini í Rangabotni verðu hildið fram fyri tingsins rokning, inntil løgtingið ella landsnevndin tingsins vegna tekur aðra støðu.
2. Álagt verður løgtingsverkfrøðinginum at fara til Tvøroyri leygardagin tann 7. í hesum fyri at kanna kolagrefstralikindini og síðani geva tinginum frágreiðing.

2. viðgerð 4. oktober. 3. viðgerð 6. oktober. (Loyvi 13—6—6). Pkt. 1 samtykt 13—0 (Ja atkvóðu: Poulsen, Dam, Andr. Djurhuus, Kr. Djurhuus, Trygve Samuelsen, Joensen, A. Samuelsen, Olsen, Iversen, Henriksen, J. H. Danbjørg, Øregaard, Davidsen. Hinir atkvóðu ikki). Pkt. 2 samtykt 24—0.

5. Fossamálið.

1. viðgerð 7. oktober. Framlagt 6. november.

Álit.

Fyri 40 árum síðani var spurningurin frammi um útbyggjan av Fossá í Vestmanna til framleiðslu av ravmagnsmegi, men einki úrslit kom. Í 1919 samtykti løgtingið at seta nevnd, sum fekk heimild at taka verkfrøðing til at rannsaka megina í okkara vøtnum og fossum, og til at gera onnur fyrireikandi arbeiðit fyri at fáa ravmagnsmegina til nýtslu. Verkfrøðingur Blauw, Bergen, og seinri verkfrøðingur Sætersmoen, Oslo, fóru undir hetta arbeiði, og í 1922 kom úrslitið av hesum rannsóknum.

Málið hevur mangan verið til viðgerðar á tingi, og skal vísast til viðgerðina í løgtingstíðindi: 1919 síðu 14, 18, 126 og 132; 1920 síðu 149; 1921 síðu 216 og skjal 24; 1922 síðu 195 og 197 og skjal 35; 1923 síðu 73 og skjal 1 og 31; 1930 síðu 224; 1931 síðu 160; 1932 síðu 238 og 1933 síðu 277.

Í 1939 var málið frammi um ravmagnsvirki í Vestmanna og Leynum (sí løgtingstíðindi 1939 síðu 269) og var tá mælt til, at Vestmanna kommuna fekk koncessión, men vegna kriggsviðurskiftini kom ongantið avgerð frá ríkisstýrinum uppá henda spurning.

Í 1943 (sí løgtingstíðindi 1943 síðu 337) samtykti tingið at seta eina millumtingafossanevnd, og hevur nevndin sent tinginum soljóðandi frágreiðing dagsett 16. september 1944:

«Løgtingið samtykti í fjør at seta nevnd at fyrireika fossamálið. Tingið valdi til limir løgtingsmenninar: Rasmus Rasmussen, J. Poulsen, J. Fr. Øregaard og O. J. Jensen, og Tórshavnar býráð hevur valt: býráðsformannin, Føroya arbeiðsgevarafelag: Steingrim Winther, byggjumeistara og Føroya arbeiðarafelag: Carl Samuelsen, maskinmeistara. Nevndin hevur viðgjørt málið í síni heild.

Av ti, at løgtingsverkfrøðingur Harry Fonsdal, sum er ravmagnsverkfrøðingur og nógv hugaður fyri at fáa fossamálið framt, ætlandi skjótt sleppur úr Noreg, kann verða roknað við hjálp frá honum.

Skuldi hetta ikki verið, má roknast at fáa aðra tekniska hjálp.

Nevndin skal mæla til, at tingið umhugsar í ár, at seta upp til 300.000 kr. í grunn til fremjan av fossamálinum.

So statt skal nevndin mæla til, at løgtingið heimilar nevndina at halda fram við arbeiðinum.»

Málið er nú beint í figgjarnevndina til viðgerðar, og skal nevndin serliga vísa á, tað sum framført var í málinum í 1930, hvar tað í álitinum stendur: «Man maa mene, at Tinget i hvert Fald ikke paa nærværende Tidspunkt kan foretage noget med Hensyn til Spørgsmaalet om Fremskaffelse af nødvendig Kapital, forinden Kommunerne har sluttet sig sammen og dannet eet eller flere Selskaber. Man tilraader, at Arbejdet fortsætter, og at der udsendes en Redegørelse til hver Husstand.»

Tað er sjálvsagt beint sum millumtinganevndin sigur frá, at illt er at gera við í hesi tíð, hvar tað er trupult ella ógjørligt at fáa fatur á tekniskari hjálp, men tað at fyrireika at seta ravmagnsverk á stovn, við at fáa sáttmála millum tær ymisku kommunur, ið avvara, tað er eitt arbeiði, ið eigur væl at kunna gerast soleiðis ávegis, at ikki sjálv byggjanin av rav-

magnsverki, tá verkfrøðingar fáast, skal støðga av tí, at tað tá skal samráðast við kommunur, løgting og aðrar, ið kunnu ætlast at taka lut í eini útbyggjan.

Tað má standa øllum greitt, at tað við útbyggjan av fossamegini krevst so stór peninganøgd, at tað má takast stór lán, og líkaso greitt má tað vera øllum, at Føroya løgting má verða til hjálpar fyri at skaffa til vegar tann neyðturvuliga pening, við at skaffa pening og taka ábyrgd fyri teimum lánum, sum eru neyðug. Tað er tó ikki harvið avgjørt, at løgtingið má verða ella eigur at verða beinleiðis luttakari í teimum feløgum, ið útbyggja fossarnar og gera ravmagnsmegina tøka fyri fólkið. Harafturímóti má ein verða greiður yvir, at tað eiga at verða tær ymisku kommununar, ið avvara, ið taka størsta lutin í hesum samvirki.

Í *Suðuroy* er eitt ravmagnsverk, og er tað Vágs kommuna, ið hevur sett hetta verk. Seinni er tað gjørdur sáttmáli millum Vágs og Froðbiar kommunur um at lata streym til Tvøroyri. Tað er øllum kunnugt, at tað hava verið trupulleikar longu nú, av tí at verkið við Ryskivatn ikki hevur nokk streym, men enn verri kann tað væntast at verða, tá tann umbøtan av verkinum, ið liggur fyri skal setast í verk. Undir rannsóknum er tað ávist, at Hovsá og Stóra í Famien kunnu væntast at geva 840 kw. móti teimum 440 kw. sum Ryskivatn gevur, og eiga tað tí at fara samráðingar fram millum kommununar í Suðuroy, um útbyggjan av meira ravmagnsmegi. Suðuroyggin liggur soleiðis fyri, at har ikki kann vera talan um at fáa streym frá øðrum oyggjum, og eigur fossanevndin tí at taka serligar samráðingar við kommununar í hesi oyggj fyri at fáa fastlagt, *hvussu* tað nýggja felagið skal skipast, *á hvønn hátt* Vágs ravmagnsverk skal ganga inn í tað nýggja felagið, *við hvørjum pørtum* tær ymisku kommununar skulu luttaka, *um nakar annar* enn kommunur skulu luttaka, *hvat pláss* fyrst eigur at verða arbeitt uppá at útbyggja, og *hvussu peningurin* skal skaffast til vegar, og hvat part løgtingið má taka í hesum.

Á *Sandoynni* ger tað seg eisini galdandi, at tað ikki kann væntast samband við kraftvirkir á øðrum oyggjum. Rannsóknirnar hava vist á 4 pláss, ið egna seg væl til útbyggjan: Dalsá, Traðará, Stóravatn og Lítlavatn. Her eiga samráðingar at byrja millum allar kommunur í Sandoynni, fyri at leggja tað grundarlag fast, sum kann føra til útbyggjan av kraftmegi. Serliga eigur tað at leggjast fast við hvørjum parti tær ymisku kommunur skulu luttaka, og hvar virkið fyrst eigur at útbyggjast.

Vágoyggin, *Streymoyggin* og *Eysturoyggin* kunnu væl knýtast saman til bestu nýtslu av ravmagnsmegi. Á hesum oyggjum er einans ravmagnsstøðin í Tórshavn, so her ræður tað um at fáa lagt til rættis, hvussu tað á besta hátt kann skipast at arbeiða móti einum samlaðum plani fyri útbyggjan. Tað kann væl hugsast, at tað her eigur at verða skipað soleiðis, at tað verða fleiri feløg, ið hvørt sær útbyggjur virkir, og síðani knýtast saman og selja streym hvørt til annað. Tað fyriliggja nógvar rannsóknir um Fossá Vestmanna og Leynarvatn, og haldast má tað, at tað vildi verið beinast at byrja útbyggjan á einum av hesum plássum, ið liggja mittskeiðis millum allar tær kommunur ið tað má verða miðið at fáa samanknýttar við ravmagnsmegi. Tað kundi væl tonkst, at tað var beint, at eitt felag av kommunum varð sett á stovn á Streymoynni til útbyggjan av hesum plássum, meðan so onnur feløg fóru undir Eiðisvatn og onkur onnur pláss, ið hóskandi vóru í Eysturoynni og eitt felag fyri Vágoynna. Hetta er eitt arbeiði, ið einaferð má gerast, og tað liggja so nógvar rannsóknir fyri longu nú, at tað væl mugu kunna takast upp samráðingar um høvuðsgrundarlagið, uttan at serkønur maður er til hjálpar, og vist er tað, at tað vil seinka útbyggjan, um einki er gjørt, áðrenn tann neyðturviliga tekniska hjálpin kann skaffast til vega til sjálva útbyggjanina. Fossanevndin eigur at taka hetta til umhugsunar.

Norðuroyggjar liggja soleiðis fyri, at har er tað væl einans ein vegur at ganga, og tað er meira útbyggjan í samband við verkið hjá Klakksvík kommunu við Stórá. Nevndin heldur, at tað var beinast, um henda kommuna var biðin um at bjóða øðrum kommunum á Borðoynni, á Viðoynni og á Kunoynni til samráðingar um útbyggjan av meira fossamegi, og síðani samráðast við fossanevndina um, á hvønn hátt tær ymisku kommunurnar skulu taka lut í útbyggjan og takstur av einum tilíkum verki fyri Norðuroyggjar.

Á *Hestoynni* hevur eisini undir rannsóknum verið talan um at leggja eina ravmagnsstøð. Her kann tað einans verða talan um eina kommunu, ið luttekur, so henda spurning kann tað óivað ikki gerast meira við, áðrenn sakkønur maður kann koma til hjálpar.

Fíggjarnevndin heldur tað vera beint, at tann í 1943 setta fossanevnd heldur fram við arbeiðinum, vísandi til tað, ið frammanundan er framført um, hvat ið kann ætlast at fáast í lag longu nú undir bardagatiðini. Nevndin setur fram uppskot samsvarandi.

Tá fossanevndin í síni frágreiðing mælir tingið til at seta upp til 300.000 kr. í grunn til fremjan av fossamálinum, skal fíggjarnevndin (undantikið P. M. Dam) hartil viðmerkja. Í 1943 samtykti løgtingið at seta á stovn «Løgtingsins tiltaksgrunn», og er tað um henda grunn viðmerkt í álitinum (sí løgtingstíðindi 1943 síðu 17): Løgtingsins tiltaksgrunn mælir nevndin til sum fyrsta endamál at hava at stimbra tingið fíggjarliga úteftir, soleiðis at fíggjarsamtyktir tingsins altið vilja verða tiknar sum fullt álítandi .... Stórmál sum útbyggjan av fossamegini o. t. kann ikki verða viðgjørt við tí peningi, eitt samfelag kann fáa sær tøkan, har mugu lán nýtast, og betri okkara samfelag er stimbrað, lættari verður tað hjá tinginum at gera sína skyldu, tá málini verða verunleiki.»

Soleiðis sum ávíst verður tað her talan um so stóran pening, at hann má skaffast til vegar við láni. Tær útreiðslur, ið falla til samráðingar við kommunurnar og stovnan av tí felagsskapi, ið skal fara undir arbeiðið, mugu verða avhildnar av teim ymisku kommununum og av løgtinginum fyri fossanevndina, og verður tað her einans talan um smærri peningahæddir. Tær útreiðslur, ið koma við at fáa arbeiðstekningar skaffaðar til vegar og útrokningar av arbeiðinum, verða meira munandi, men tað eigur at verða tikið saman við sjálvari útbyggjanini sum stovnarútreiðslur, ið mugu skaffast til vegar saman við byggipeninginum. Tað, sum tað almenna vil fáa til uppgávu, verður soleiðis at skaffa lán, ella tað sama sum ummælt varð undir viðgerðini av løgtingsins tiltaksgrunni í 1943.

Um tingið kann fáa sær eina góða fíggjarstøðu og ein munagóðan tiltaksgrunn, heldur meirilutin, at tað væl má vera gjørligt at fáa sett á stovn útbyggjan av okkara fossamegi, og heldur ikki tað er neyðugt, soleiðis sum málið liggur fyri í dag, at seta serligan grunn til hetta endamál, men vísir til ta stimbran, ið liggur í stovnaðinum av tiltaksgrunnunum.

Minnilutin (P. M. Dam) tekur undir við millumtingafossanevndini og mælir til, at 300.000 kr. verða settar í ein grunn til fremjan av fossamálinum.

Uppskot.

Frá nevndini:

1. Løgtingið samtykkir at heimila ta av tinginum í 1943 settu fossanevnd til at halda fram við arbeiðinum, vísandi til tað í hesum áliti framførda.

Frá minnilutanum (P. M. Dam):

2. Løgtingið samtykkir at játta 300.000 kr. til ein grunn til fremjan av fossamálinum.

2. viðgerð 9. november. 3. viðgerð 16. november og 24. november. Nevndaruppskotið samtykt 20—0. Minnilutauppskotið fall 6—0.

---

6. Uppskrivan av orðaskifti á tingi.

1. viðgerð 7. september. Framlagt 21. september.

Álit.

Í tingsetuni 1943 varð samtykt at lata tað munnliga orðaskiftið uppskriva í øllum lógmálum. Hetta varð eisini gjørt, men av tí, at einans tvær stenografkvinnur fingist til at arbeiða, varð tað fyrst reinskrivað aftaná, at tingsetan endaði. Tað varð eisini samtykt at latið hetta prenta, men sigur løgtingsskrivstovan í august 1944 landsnevndini frá, at hetta hevur verið ógjørligt higartil, tí prentsmiðjurnar hava haft ov nógv arbeiði.

Í tingsetuni 1943 varð eisini samtykt, at landsnevndin fekk upp í hendi at leggja til rættis soleiðis, at alt orðaskiftið kundi verða uppskrivað frá tí tingið kom saman hesa tingsetuna 1944. Hetta hevur eisini víst seg ógjørligt, tí ikki hava fingist fólk til hetta arbeiði.

Málið hevur nú verið til viðgerðar á tingi í ár og er víst til figgjarnevndina. Sjálvt um flestir nevndarlimir vildu ynskt, at tað kundi verið hildið fram við uppskrivan av tí munnliga orðaskiftinum, er heila nevndin vorðin samd um, at tað er ógjørligt í løtuni. Fyri at eitt munnligt orðaskifti skal vera nóg álitandi, heldur nevndin tað verða neyðugt, at tað, ið er uppskrivað, kann leggjast fyri røðaranum helst sama dag og ið hvussu er, dagin eftir, fyri at hann kann gera sínar viðmerkingar. Fyri at hetta kann fáast í lag, má í minnsta lagi 4 og helst 6 fólk luttaka í uppskrivanini, og tað fæst ikki í lag í hesi tingsetuni.

Nevndin setur so statt fram hetta

uppskot:

Málið um uppskrivan av munnliga orðaskiftinum á tingi verður goymt fyri fyrst.

2. viðgerð 30. september. Samtykt 19—1.

---

7. Byggjan av verksmiðju.

1. viðgerð 15. september. Framlagt 21. september.

Álit.

Í tingsetuni 1943 var til viðgerðar málið um at fáa smiðju, ið er før at arbeiða við øllum nútímans greiðum. (Sí løgtingstíðindi 1943, síðu 336). Málið varð víst til landsnevndina, ið varð heimilað at kanna møguleikarnar fyri at fáa neyðturvilig tól, og um tað var gjørligt at fáa hetta til vegar, at taka lán úr vinnulánsgrunninum til at keypa tól fyri.

Landsnevndin hevur biðið løgtingsskrivstovuna fyrircika málið, og hevur skrivstovan skrivað bræv til handilsfelagið Charles Mauritzen & Co um, hvørvítt teir kunnu fáa tilboð uppá tílík tól, og svarar felagið, at teir einki kunnu gera við málið, áðrenn teir fáa nærri frágreiðing um, hvørjar maskinur og onnur tól ynskjast, og um tað kann væntast at fáa innflutningsloyvi úr Bretlandi fyri hetta.

So statt hevur skrivstovan vent sær til harra Vilhelm Nielsen, Tórshavn og spurt hann um, hvat krevst fyri at seta á stovn verkstað, ið kann bøta um gomul og byggja nýggj jarnskip. Nielsen svarar í skrivi av 21. juli 1944, og framheldur hann í høvuðsreglum hetta:

Ein verkstaður má verða samanknýttur við eina sleipustøð, og einki er nevnt um, hvørvítt tað skal vera saman við eini sleipustøð, ið er í virki, ella tað er ætlanin at byggja nýggja støð; so statt letur hann spurningin byggjan av sleipustøð ósvaraðan. Síðani sigur hann, at einki er nevnt um, hvat stødd av skipum ætlanin er at umvæla; har kann vera talan um tríggjar møguleikar, 1) skip av øllum støddum, sum koma framvið hesar oyggjar, 2) skip av stødd, sum kunnu leggja til bryggju her á landi ella 3) skip av stødd sum trolarar, Smiril o. l. Hann talar síðani einans um tað minnstu, undir petti 3) nevndu stødd.

Fyri at byggja og umvæla tílík skip krevst, at verkstaðurin kann handfara tríggjar tjúkdir av jarnplátum 3/8", 1/2" og 3/4". Hann sigur so frá ymiskum tólum og maskinum, sum krevjast til hetta arbeiði. Nielsen sigur, at tað er trupult at siga nakað um, hvat alt hetta vil kosta, men skal hann nevna nakað tal, má hann ætla, at tað vil kosta um 200.000 krónur, og leggur hann afturat, at tað má haldast, at tað er ógvuliga ivasamt, um útfluttningsloyvi kann útvegast frá Bretlandi fyri hetta, so sum tíðirnar nú eru.

Síðani verður framhildið í nevnda skrivi, at tað má fáast menn til landið, ið kunnu handfara hesi tól, inntil vit sjálvir kunnu útbúgva menn herheima til at taka verkið upp. Eisini ger hann landsnevndina kunnuga við, at tað eftir hansara hugsan vildi verið landinum til gagn, um Føroyingar fóru at nýta jarnskip til fiskiskap, tí umvælingin vil tey fyrstu árini verða ógvuliga nógv biligari.

Málið er nú lagt fyri tingið av nýggjum og er beint í tíggjarnevndina. Nevndin má halda, at tað neyvan er meira at gera við málið, sum tað liggur fyri. Tað má sigast at vera beint, at tað skal ein munagóð sleipistøð til, fyri at ein verksmiðja kann verða til gagns, og tingið ræður ikki yvir tílíkari sleipustøð. Eisini má nevndin halda tað vera beint, at tað verður trupult at fáa útfluttningsloyvi fyri so stórari nøgd av tólum úr Bretlandi, áðrenn bardagin væl er av. Spurningurin um at fáa nýmótans

verksmiðju her á landi má sigast at verða týdningarmikil, og verður tað tí gjørt uppskot um, at tingsins skrivstova skal halda seg kunnugan við, nær viðurskiftini eru soleiðis, at hetta kann setast í verk, og so leggja málið fyri tingið av nýggjum, við øllum upplýsingum, ið kunnu útvegast.

Uppskot:

Løgtingsskrivstovan verður umbiðin at ansa eftir, nær viðurskiftini eru til at fáa til vegar neyðturvilig nýmótans tól til eina verksmiðju, og tá at fáa fullfíggjaðar upplýsingar um, hvat hetta vil kosta, og leggja málið fyri Føroya løgtingi ella landsnevndini, um løgtingið ikki er saman.

2. viðgerð 30. september. Samtykt 24—0.

---

8. Umsetan og prentan av Odysseusarkvæði og Ilionskvæði.

1. viðgerð 15. september. Framlagt 9. november.

Álit.

Til fíggjarnevndina er beind henda umsókn frá skaldinum J. H. O. Djurhuus:

«Fyri o. u. 6 árum síðani varð Ilionskvæði umsett á føroyskt mál. Annarleiðis er statt við Odysseusarkvæði, av hvørjum bert 8 sangir (táttir) eru umsettir. Teir 16 táttir, ið resta í, haldi eg meg til at vera lidnan við um 1 ella 2 ár, um annað arbeiði verður beint burtur.

Í øðrum londum verður tað hildið vera neyðugt, at hesi bæði heimsgitnu skaldaverkini, Ilionskvæðið og Odysseusarkvæðið finnast millum bókmentir hjá hvørjum landi, ið mentunarliga virðast millum landa.

Loyvi eg mær tí hervið at venda mær til Føroya Løgtings við spurningi, um tingið vil játta pening til prentingar av hesum skaldarverkum og samsýna mær hóskandi fyri mítt starv.»

Fíggjarnevndin má taka undir við skaldinum, at tað vil verða eitt stórt framstig fyri bókmentir landsins, um tað kann eydnast at fáa hesi ummældu skaldarverk umsett til føroyskt mál og prentað. Soleiðis sum umstøðurnar eru í løtuni, má tað tó haldast at vera ógjørligt at fáa í lag prenting av besum verkum, tí átroðkandi er tað, at hetta verður prentað í vøkrum búnað, og pappírstilfar er undir teimum óvanligu tíðum torført

at fáa og vánaligt er tað, sum fæst. Nevndin heldur tí ikki tað ber til at fara undir hesa prenting, áðrenn bardagatiðin er av og hóskandi tilfar er at fáa.

Nevndin er á einum máli um, at tað almenna eigur at styðja útgávu av hesum verkum og er sinnað til, tá hetta kann fáast í lag, at mæla tinginum til at játta tann pening, ið tørvur er á, fyri at fáa hesi kvæði prentað í vøkrum haldgóðum búnað.

Meirilutin (P. Dahl, P. M. Dam, Kr. Djurhuus, R. Long, Johan Poulsen) kennir takklæti, tí J. H. O. Djurhuus sum stórskald og kønur í grikkskum máli veitir Føroyingum Ilionskvæðini á okkara máli, so hesir dýrgripir vera settir millum føroyskar bókmentir.

Meirilutin skjýtur upp á, at tingið veitir honum eina serliga skaldagávu upp 3000 kr.

Minnilutin (J. F. Kjølbro, Th. Petersen) framheldur: At geva hóskandi samsýning fyri eitt tílíkt skaldarverk, sum her er talan um, fer at verða ein torfør sak; allar tær løtur, ið skaldið hevur nýtt til at finna tað mest rámandi orðatilfar fyri at vísa lesarum sínum eitt satt bilæti av hesum heimsgitna skaldaverki, kunnu væl neyvan teljast og enn minni metast í peningi. Rættast má minnilutin tí halda tað vera, at tað almenna, samstundis sum prentan fer fram, játtar skaldinum ein pening sum samfelagsins tøkk fyri starvið, og ikki sum løn.

So statt setur minnilutin einki uppskot fram.

Uppskot
frá meirilutanum:

Løgtingið samtykkir, at játtað verður skaldinum J. H. O. Djurhuus úr amtsgrunninum eina serliga skaldagávu uppá 3000 kr.

2. viðgerð 14. november. 3. viðgerð 17. novbr. Samtykt 15–0.

---

9. Politistur í Klakksvík.

1. viðgerð 20. september. Framlagt 10. oktober.

Álit.

Klakksvíkar sókna kommuna skrívar tann 3. februar 1944 til løgtingið um loyvi til at fáa ein politimann afturat í Klakksvík, og søkir kommunan við einum áteknaðum skrivi av 1. mars 1944 um, at løgtingið átekur sær helvtina av útreiðslunum til henda politistin.

Norðoya sýsla, Føroya landfútadømi og amtið hava viðmælt, at tað verður settur ein politistur afturat í Klakksvík.

Landfútin hevur upplýst nevndina um, at skipanin í Klakksvík hevur verið tann, at tað er ein fastur politistur, ið varð settur undan hesum óvanliga tiðum, og hevur hann í løn 2400 kr. og dýrtíðarviðbót, ið ikki er upplýst. Tað má gangast út frá, at hesin fasti politisturin nú hevur meira í løn enn teir undir bardaganum settu politistar í Vágum. Henda løn er sett til 300 kr. um mánaðan, dýrtíðarviðbót íroknað; nevndin skal her vísa á tingsamtyktina í løgtingsmáli: Lønan av politistum, 1942, (sí løgtingstíðindi 1942, síðu 236) og má nevndin halda, at tað framvegis eigur at verða gingið fram eftir teimum í hesum áliti framsettu sjónarmiðum, soleiðis at eingin studningur verður latin úr amtsgrunninum, um politisturin fær eins nógv ella meira enn tann løn, ið er ásett fyri politistarnar í Vágum.

Síðani sigur landfútin frá, at Klakksvíkar kommuna fyri gott og væl einum ári síðani setti sær ein hjálparpolitist aftrat, og at øll hansara løn er goldin úr kommunukassanum. Tað er hendan politistin, ið kommunan nú vil hava umbýttan við einum føstum manni, og ætla teir at seta lønina til 2000 kr. í grundløn og so dýrtíðarviðbót, ið tað ikki er upplýst, hvussu teir útrokna.

Fíggjarnevndin má eftir tí framførda og viðmælinum frá embætismonnum halda, at tað er beint, at tað bráðfengis verður settur ein maður aftrat í Klakksvík. Eins og tað í fjør varð viðmerkt til eina umsókn úr Fuglafirði (løgtingstíðindi 1943, s. 349) má nevndin fasthalda, at henda setan er ein bráðfengis skipan, soleiðis at hon má viðgerast av nýggjum, um Klakksvíkar kommuna, tá bardagin er av, ynskir at hava tveir politistar fast í søknini. Tann nú setti politisturin, vil nevndin mæla til, verður løntur við helminginum av kommununi og helminginum av amtsgrunninum, tó soleiðis at amtsgrunnsins útreiðslur ikki fara upp um tað sama, sum amtsgrunnurin letur til aðrar politistar, ið eru settir undir ófriðartíðini, tað vil siga í mesta lagi 150 kr. um mánaðan.

Spurningurin um reglugerð fyri politistin er eisini ummældur í málinum, og hevur Klakksvíkar kommuna ynskt innsett í reglugerðina eina broyting av reglugerðini frá 1940, soleiðis at politisturin, um hansara politistvirki ikki er til hindurs, kann verða til størri hjálp fyri kommununa. Sýslumaðurin viðmerkir, at hann heldur ikki, tað er beint, at orðini «bistaa ved Opkrævning af Skat» koma at standa í reglugerðini. Nevndin má halda, at tað ikki eigur at verða nakað til hindurs fyri, at reglugerðin verður broytt samsvarandi ynski frá søknarstýrinum, tó eigur tann nevnda reglan um skattauppkrevjan ikki at fatast annarleiðis, enn at tann nýsetti politisturin, áðrenn eftirstøðulistin fer til pantingar, roynir at krevja nakað av honum upp. Nevndin heldur tað ikki vera beint at skipa soleiðis fyri, at kommunustýrið letur alla uppkrevjan av skatti í hendurnar á politistunum; men tað kann neyvan heldur sigast at hava verið ætlanin við tí reglugerð fyri politistin í Nes sókn, sum Klakksvíkar kommuna vísir til. Tað beinasta er, at landfútin fær samráðingar í lag við kommunustýrið um hesa broyting í reglugerðini, soleiðis at tað verður greitt, at tað er sýslumaðurin sum yvirmaður fyri politistunum, sum avgerð í hvørjum tilfelli, um tað er samsvarandi politistvirkið, at politisturin av og á krevur skatt upp fyri kommunustýrið.

Nevndin skal seta fram hetta

uppskot:

1. Løgtingið viðmælir, at ein kommunalur politistur bráðfengis verður settur aftrat í Klakksvíkar kommunu. Amtsgrunnurin rindar helvtina av útreiðslunum, tó í mesta lagi 1800 kr. árliga.

2. Reglugerðin fyri tann nýsetta politistin í Klakksvík verður tann sama sum reglugerðin fyri hin núverandi fasta politistin, tó við broytingum í § 7. Reglugerðin verður samtykt og kunngjørd av fútanum aftaná samráðingar við sóknarstýrið, samsvarandi tað í álitinum framførda.

2. viðgerð 13. oktober. 3. viðgerð 18. oktober. Samtykt 23—0.

---

10. Løgtingsverkfrøðingurin.

---

1. viðgerð 25. september. Framlagt 27. november.

Álit.

Løgtingsverkfrøðingurin hevur frá 7. juli 1943 til 1. juni 1944 haft bústað í Kvívík, og hevur hann fyri ta tíð, hann hevur verið burtur heimanífrá á skrivstovuni í Tórshavn haft ymiskar útreiðslur. Verkfrøðingurin hevur søkt um at fáa ásett dagpengar fyri hesa tíð, og hevur hann sagt tinginum frá, at hann til kostarhald í Tórshavn hevur haft eina útreiðslu uppá kr. 1272,00. Nevndin heldur tað vera beint, at honum verður játtað tær beinleiðis útreiðslur, hann hevur haft fyri ta tíð, hann búði í Kvívík, og setur uppskot fram um hetta.

Síðani hevur verkfrøðingurin sent tokning inn fyri flytan úr Kvívík til Havnar kr. 450,28, og mælir nevndin til, at hetta verður játtað.

Í tí tíðini, verkfrøðingurin hevur búð í Kvívík, hevur hann sambart samtykt frá landsnevndini fingið eitt húsaleiguendurgjald uppá 100 kr. um mánaðan, av ti hann á Tvøroyri lat 100 kr., men í Kvívík mátti lata 200 kr. um mánaðan. Nú upplýsir verkfrøðingurin, at hann eisini í Tórshavn letur 200 kr. og søkir um at fáa sama endurgjald 100 kr. um mánaðin framvegis. Tað er upplýst fyri nevndini, at hansara løn er sett til grundløn 5040 kr. um árið, soleiðis at hann við dýrtíðarviðbót fær útgoldið 763,50 kr. um mánaðan, fyriuttan eitt eykagjald uppá 200 kr. um mánaðan fyri eftirlit við kolaframleiðsluni í Suðuroy. Tá hann soleiðis er tann hægst lønti av teimum monnum, ið tingið hevur ásett lønina hjá, kann nevndin ikki mæla til, at honum verður játtað eyka húsaleiguendurgjald. Tað, at hann fekk eitt tílíkt í Kvívík, var meira natúrligt, tí tað sjálvandi í Kvívík mátti vera væl dýrari hjá honum við ferðaútreiðslum, og við tað at hann so sjáldan kundi vera heima.

So statt skal nevndin seta fram hetta

Uppskot.

Játtað verður verkfrøðinginum 1272 kr. í dagpeningi fyri tað tíð, hann hevur verið í Havn, meðan hann hevði bústað í Kvívík, og kr. 450,28 í endurgjald fyri hansara flytan úr Kvívík til Havnar.

2. viðgerð 29. novbr. 3. viðgerð 30. novbr. Samtykt 18—0.

---

11. 28 tingmál frá javnaðarflokkinum.

Framlagt 12. septbr. 1. viðg. 3. okt. **A.** framlagt 9. november.

Álit.

Tann 11. september 1944 sendi Føroya javnaðarflokkur skriv til tingið og bað um at taka til viðgerðar tey hará nevndu 28 mál. Málini eru av tinginum beind í fíggjarnevndina til viðgerðar. Nevndin hevur samráðst um hesi mál, og hevur verið á einum máli um at beina eftirfylgjandi mál til viðgerðar undir øðrum tingmálum:

mál nr. VI—8: Fiskivinnunevndin: Læru í viðgerð av ferskum fiski og tvungna ferskfiskavraking.

mál nr. VII—1: Búnaðarnevndin: Økjan av studningi til uppdyrkingar bæði fyri at grønka land okkara skjótast gjørligt og fyri at skaffa arbeiði til flest møguligar hendur serliga í hesi tíð, tá ið arbeiðsloysi ræður manga staðni, og tað tessverri eru tekin til, at arbeiðsloysi verður at taka til — og:
Skipan viðvíkjandi uttanbyggja jørð, soleiðis at hon kemur aftur at verða ogn hjá íbúgvarunum í bygdini.

mál nr. VIII—4: Havna- og veganevndin: Tilskot til viðlíkahald av vegum — og:
Tann til kommununa játtaði peningur kann verða nýttur til nýggjar vegir og grundumvølingar av gomlum vegum eftir samráðingar við landsnevnd og vegastýrið.

mál nr. X—5: Socialu nevndina: Allar einkjur somu trygging, eingin minni enn einkjan eftir manni, ið er deyður við kríggsvanlukku.

mál nr. X—4: Broytan av teim socialu lógunum, so tryggjan verður veitt øllum treingjandi. — Í samband við hesa umskipan eina serliga inntøkuskipan at greiða útreiðslurnar, t. d. umsetingarskatt o. a. — og:
Eitt serligt forsyrgjaragjald til foreldur í mun barnatal og trongd.

mál nr. I—5: Fíggjarnevndina: Broytan av galdandi avskrivingarreglum til skattainntøkuuppgávu — og:
Dýrtíðarviðgerð av øllum skattainntøkum, samauber uppskotið frá javnaðarmonnum á tingi í fjør — og:
Broytan av teirri kommunalu skattalógini og skipa hana á sama hátt sum løgtingskattalógina við vaksandi stigum — og:
Millumkommunalan skatt soleiðis, at menn við stórum skattainntøkum skulu rinda eins í skatt allastaðni í Føroyum — og:
Grundvirðisøkingarskatt á sama hátt sum í okkara granna- og frændalondum.

mál nr. I—2: Fíggjarnevndina: Rindan av tí av tinginum játtaða byggipeningi til kommunur, so hvørt sum arbeiðið fer fram — og:
Tilskot til búnaðarskúla — og:
Økjan av útvarpsgrunninum — og:
Ókeypis vistarhald fyri fátækar avbygdanæmingar — og:
Framhald av peningajáttan til rentufrítt bátalán.

Meðan 8 mál verða goymd til onnur álit, verða hesi mál tikin til viðgerðar í hesum áliti:

A. Tráðleyst telefonsamband
við Suðuroy og allar aðrar oyggjar, har ið kaðal ikki kann nýtast eins og til útheimin.

Nevndin skal í hesum máli vísa til viðgerðina av málinum: Tráðleys telefon í tingsetuni 1943 (sí løgtingstíðindi 1943 síðu 85). Í hesum máli var umrøtt stovnan av telefonsambandi við Suðuroy, meðan spurningurin um telefonsamband við útheimin ikki er viðgjørdur. Nevndin má viðganga, at viðurskiftini framvegis eru soleiðis, at tað ikki enn kann vera hugsandi um at fáa tilfar ella sáttmála um at seta á stovn tráðleyst telefonsamband við Suðuroy og við útheimin, men telefonnevndin eigur so skjótt viðurskiftini verða broytt, at taka spurningin upp og fáa hann settan í verk.

Nevndin setur tí uppskot um, at tað verður givið telefonnevndini uppí hendi framvegis at arbeiða við málinum, og at fáa í lag, tá líkindi eru, fyrst tráðleyst telefonsamband við Suðuroynna, og síðani við aðrar oyggjar her í Føroyum, og eisini at fyrireika stovnan av tráðleysum telefonsambandi við útheimin.

B. Tokulúðrar við vitar, har tørvur er til tess.

Nevndin skal vísa til, at málið um at fáa tokulúðrar við vitan á Mykineshólmi og á Akrabergstanga var til viðgerðar í tingsetuni 1940 (sí løgtingstíðindi 1940 síðu 76) og í tingsetuni 1941 (sí løgtingstíðindi 1941 síðu 60). Málið varð í 1940 beint til landsnevndina fyri at kanna, um tilfar kundi fáast, og hvat tað vildi kosta. Upplýsing lá fyri tinginum 1941, at ein tokulúður vildi ætlast at kosta um leið 4—5.000 kr., men at tað neyvan kundi væntast loyvi til at nýta tokulúður við vitarnar, so leingi bardagin stóð á.

Tað má eisini haldast, at tað vil vera ógjørligt at fáa tilfar soleiðis sum støðan er í dag, og nevndin heldur tí at støðan frá 1941, at hetta má steðga, til kríggið er liðugt, má vera tann sama í dag. Nevndin er samd um, at tað eigur at setast í verk skjótast gjørligt, og mælir til, at løgtingsskrivstovan fær upp í hendi at spyrja seg fyri, hvar ið tilfar kann fáast og hvat tað vil kosta, fyri at málið kann verða viðgjørt, so skjótt líkindi eru til at fáa tað framt. Uppskot samsvarandi verður sett fram til tingið.

C. Vísindaliga kannan
av virðinum, ið undirgrundin og landið møguliga goymir.

Nevndin skal vísa til, at hesin spurningur var komin væl áleiðis undan krígnum, við tað at ætlanin var at ein geologisk kortleggjan skuldi fara fram um alt landið. Í løtuni heldur nevndin ikki tað verður gjørligt at fáa kønar menn til hetta arbeiði, men heldur tað vera beint, at málið ikki fer okkum úr húga, men at tað verður framt so skjótt viðurskiftini eru til tess. Uppskot verður sett fram til tingið um, at tað verður givið løgtingsskrivstovuni upp í hendi at kanna møguleikarnar fyri at fáa køna hjálp, og so tá viðurskiftini eru til at fara undir arbeiðið at leggja spurningin av nýggjum fyri tingið.

Uppskot.

ad A. 1. Telefonnevndini verður givið upp í hendi so skjótt sum gjørligt er at fáa sett á stovn tráðleyst telefonsamband fyrst við Suðuroy og síðani við aðrar oyggjar í Føroyum, ið ikki hava samband. Tað verður eisini givið nevndini upp í hendur at fyrireika stovnan av tráðleysum telefonsambandi við útheimin.

ad B. 2. Løgtingsskrivstovuni verður givið upp í hendur at spyrja seg fyri, hvar ið tilfar kann fáast til tokulúðrar, og hvat tað vil kosta, og síðani so skjótt tað er gjørligt at fáa tilfar, at leggja spurningin av nýggjum fram fyri tingið.

ad C. 3. Løgtingsskrivstovuni verður givið upp í hendur at kanna møguleikarnar fyri at fáa køna hjálp til at fáa eina geologiska kortleggjan av Føroyum, og síðani so skjótt tað er gjørligt, at leggja spurningin av nýggjum fram fyri tingið.

2. viðgerð 16. november. Samtykt 18—0.

B. 10. november framlagt.

Álit.

Føroya javnaðarflokkur hevur millum onnur mál biðið tingið tikið til viðgerðar:

D. Setan á stovn av einum landsbanka við serrættindum, ið so við og við bera bankanum landsins bankayrki í hendi.

Málið um landsbanka var til viðgerðar í tingsetuni 1943 (sí løgtingstíðindi 1943, síðu 319). Nevndin hevur eins og í fjør býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (P. Dahl, J. F. Kjølbro, R. Long og Th. Petersen) skal fullt út vísa til tað, ið framført varð í málinum í 1943. Longu í 1940 vistu okkara tingmenn á, hvussu átroðkandi spurningurin um at seta ein føroyskan landsbanka á stovn var. Tað, ið fram er farið síðani, hevur einki broytt í hesi støðu meirilutans, tvørturímóti kann tað sigast at vera enn meira neyðugt í dag, nú seðlamongdin millum manna er vaksin til meira enn 11 milliónir krónur.

Ífjør setti meirilutin uppskot um at seta á stovn ein føroyskan seðilbanka, men hetta uppskotið fall. Av nevndarviðgerðini sæst, at tað ikki í ár kann væntast nøkur broytan í hesi støðu hjá tingsins meiriluta, og setur meirilutin í nevndini tí einki uppskot fram í málinum.

Minnilutin (Kr. Djurhuus og Johan M. Fr. Poulsen) vísa til okkara støðu til hetta mál í tingsetuni 1943, og seta eins og ífjør einki uppskot fram í málinum, men halda, at málið má steðga til tingingar kunna takast upp um keyp av partabrøvum í A/S Føroya Banka frá danska statinum.

Minnilutin (P. M. Dam) heldur fram: Í tingsetuni 1943 tóku javnaðarmenn uppaftur tað uppskot, ið framsett var í cykatingsetuni í mars 1943 um at seta á stovn ein løgtingsbanka við einkarrætti til alla vekslan av fremmandari valuta. Hetta uppskot til stovnan av bankanum og uppskot

til bráðfengis ásetanir um broytan í kunngerð nr. 48 av 8. december 1940 setir minnilutin fram av nýggjum og mælir tinginum til at samtykkja.

Uppskot:

Frá *minnilutanum* (Dam):

1. Løgtingið samtykkir stovnan av partafelaginum «Oyggjabankin» við hesum samtyktum:

a. VEDTÆGTER FOR PARTAFELAGIÐ «OYGGJABANKIN».

Navn, Hjemsted og Formaal.

§ 1.

Bankens Navn er Partafelagið «Oyggjabankin».
Dens Hjemsted er Thorshavn, Færøerne.

§ 2.

Bankens Formaal er at drive Bankvirksomhed og herunder fortrinsvis at støtte og udvikle det færøske Erhvervsliv gennem Ydelsen af langfristede Laan til Nyanskaffelser og Nyanlæg og Driftslaan til Virksomheder af Betydning for det færøske Samfund.

Kapital og Aktier.

§ 3.

Bankens Aktiekapital er 500.000 Kr., der er fuldt indbetalt, fordelt paa Aktier paa 200 Kr., 1000 Kr. og 5000 Kr.

Ingen af Aktierne har særlige Rettigheder og ingen af Aktionærerne er pligtige at lade deres Aktier indløse helt eller delvis.

§ 4.

Aktierne udstedes paa Navn og kan ikke transporteres til Ihændehaveren. I Tilfælde af Ejerskifte er den nye Ejer pligtig at lade sine Aktier notere hos Selskabet, og Overdragelsen har ingen Gyldighed overfor Banken, før saadan Notering har fundet Sted.

Aktiebrevene forsynes med Udbyttekuponer og Talon. Udbytte, der ikke er hævet 5 Aar efter Forfaldsdagen, tilfalder Bankens Reservefond.

§ 5.

Naar det sandsynliggøres, at et Aktiebrev er bortkommet, kan Bankens Bestyrelse paa Begæring og Bekostning af den noterede Ejer ved en i «Dimmalætting» og Statstidende indrykket Bekendtgørelse med mindst 12 Ugers Varsel indkalde den, der eventuelt maatte have Aktiebrevet i Hænde, til at møde paa Bankens Kontor og bevisliggøre sin Adkomst.

Saafremt ingen melder sig efter en saadan Bekendtgørelse, er Bestyrelsen berettiget til at erklære Aktiebrevet for mortificeret og til at udstede nyt Aktiebrev til den noterede Ejer.

Generalforsamlinger.

§ 6.

Ordinær Generalforsamling afholdes i Thorshavn hvert Aar i April Maaned.

Ekstraordinær Generalforsamling afholdes efter Bestyrelsens Beslutning eller efter skriftlig Anmodning til Bestyrelsen fra Aktionærer, der ifølge Aktiebogen ejer mindst 1/4 af Aktiekapitalen.

Generalforsamlingen indkaldes af Bestyrelsen med mindst 14 Dages

Varsel. Indkaldelsen kan ske skriftligt eller ved offentlig Bekendtgørelse i «Dimmalætting».

Det reviderede Regnskab, Dagsorden og de Forslag, der agtes fremsat, skal senest 14 Dage før Generalforsamlingens Afholdelse tilsendes Aktionærerne eller fremlægges i Banken til Eftersyn for Aktionærerne.

Forslag fra Aktionærerne maa for at komme i Betragtning paa den ordinære Generalforsamling tilsendes Bestyrelsen inden den 1. Marts.

§ 7.

Dagsordenen for den ordinære Generalforsamling skal omfatte:

1. Bestyrelsens Beretning om Bankens Virksomhed i det forløbne Aar.
2. Fremlæggelse af det reviderede Aarsregnskab til Godkendelse.
3. Eventuelle Forslag fra Bestyrelsen til Aktionærerne.

§ 8.

Enhver Aktionær er berettiget til at deltage i Generalforsamlingen, naar han senest 8 Dage før dens Afholdelse har løst Adgangskort hertil i Banken. Adgangskortet skal lyde paa Navn og være forsynet med Paategning om Indehaverens Antal Stemmer.

Hver Aktie paa 200 Kr. giver een Stemme, naar Aktien er noteret paa Navn senest 2 Maaneder før Generalforsamlingen.

Stemmeret kan udøves ved Fuldmægtig, der selv er Aktionær, naar Generalforsamlingen har godkendt Fuldmagten.

§ 9.

Generalforsamlingen ledes af en ved simpel Stemmeflerhed valgt Dirigent, der afgør alle Spørgsmaal angaaende Sagernes Behandling og Stemmegivningen.

De paa Generalforsamlingen behandlede Sager afgøres ved simpel Stemmeflerhed af de mødte eller repræsenterede Aktionærer. Til Vedtagelse af Beslutning om Vedtægtsændring eller om Bankens frivillige Likvidation udkræves, at mindst $^2/_3$ af Aktiekapitalen er repræsenteret, og at Beslutningen vedtages med mindst $^2/_3$ af de repræsenterede Stemmer.

§ 10.

Over Generalforsamlingens Forhandlinger føres en Protokol, der underskrives af Dirigenten og Bestyrelsens tilstedeværende Medlemmer.

Bestyrelsen.

§ 11.

Bestyrelsen bestaar af 5 Medlemmer, der vælges af Generalforsamlingen. Samtidig vælges en Suppleant for hvert Medlem.

Valgene af Bestyrelsesmedlemmer gælder for et Tidsrum af 5 Aar. Af den først valgte Bestyrelse afgaar dog eet Medlem hver Aar, første Gang ved Udgangen af Aaret 1944. Rækkefølgen bestemmes ved en af Bestyrelsen foranstaltet Lodtrækning.

Saafremt et Medlem af Bestyrelsen udtræder inden Udløbet af de 5 Aar, indtræder den for ham valgte Suppleant i Bestyrelsen for den resterende Del af hans Periode. Findes ingen Suppleant, vælger Generalforsamlingen et nyt Bestyrelsesmedlem og en Suppleant for den resterende Del af den indtraadtes Periode.

§ 12.

Bestyrelsen har med Forbehold af Generalforsamlingens Myndighed den øverste Ledelse af Bankens Anliggender.

Bestyrelsen vælger selv sin Formand. Den afholder Møde, saa ofte Formanden eller to andre Bestyrelsesmedlemmer finder det fornødent. For at gyldig Beslutning kan træffes, maa mindst tre Bestyrelsesmedlemmer eller disses Suppleanter være til Stede.

Bestyrelsen fastsætter iøvrigt selv sin Forretningsorden.

Det fastsættes i en af Bankinspektøren godkendt Instruks i hvilket Omfang Bestyrelsens forudgaaende Medvirken udkræves til Ydelse af Laan. Bestyrelsen træffer Bestemmelse om Oprettelse af Filialer.

Bestyrelsen oppebærer et af Generalforsamlingen ved Aflæggelsen af Aarsregnskabet fastsat Honorar.

Direktionen.

§ 13.

Til Ledelse af Bankens daglige Forretninger antager Bestyrelsen en Direktør. Bestyrelsen fastsætter Direktørens Løn og Ansættelsesvilkaar, samt instruerer ham med Hensyn til Udførelsen af de daglige Forretninger.

Banken forpligtes ved Underskrift af Direktøren og Bogholderen i Forening, Direktøren og Kassereren i Forening eller Direktøren og et Bestyrelsesmedlem i Forening.

Ved Afhændelse og Pantsætning af fast Ejendom udkræves Underskrift af Direktøren og Bestyrelsens Formand i Forening.

§ 14.

Filialbestyrere, Bogholder og Kasserer ansættes af Bestyrelsen, medens det øvrige Personale ansættes af Direktøren.

Bestyrelsen fastsætter Personalets Lønninger.

Prokura kan kun meddeles af Bestyrelsen.

§ 15.

Direktøren, Filialbestyrere og det øvrige Personale maa ikke for egen Regning under nogen Form udføre eller deltage i Spekulationsforretninger.

Direktøren og Filialbestyrere maa ikke uden Bestyrelsens for hvert Tilfælde givne Samtykke, der vil være at indføre i Bestyrelsens Forhandlingsprotokol, optage Laan i Banken, opnaa Bankens Garanti for Laan eller indgaa Kaution for Gældsforpligtelser til Banken. For Revisorernes Vedkommende maa saadanne Transaktioner overhovedet ikke finde Sted.

Regnskab, Revision og Udbyttets Fordeling.

§ 16.

Bankens Regnskabsaar er Kalenderaaret.

Regnskabet revideres af 2 af Generalforsamlingen valgte Revisorer, hvoraf den ene skal være statsautoriseret.

Revisorernes Vederlag fastsættes af Bestyrelsen.

Regnskabet skal afleveres til Revisorerne mindst 4 Uger inden Generalforsamlingens Afholdelse.

Bestyrelsen træffer efter Samraad med Revisorerne Bestemmelse om Udførelse af daglig Revision.

§ 17.

Bankens Nettooverskud, efter at samtlige Tab og Udgifter er afholdt og de nødvendige Afskrivninger er foretaget, fordeles paa følgende Maade:

Der henlægges 10 pCt. til den lovmæssige Reservefond, indtil denne udgør mindst $^1/_{10}$ af Aktiekapitalen, hvorefter Henlæggelsen sker

med 5 pCt., indtil denne Reservefond udgør 1/4 af Aktiekapitalen. Dog skal der, medmindre Egenkapitalen udgør mindst 15 pCt. af Bankens samlede Gælds- og Garantiforpligtelser, efter Generalforsamlingens Beslutning henlægges aarlig mindst 20 pCt., saaledes at mindst 15 pCt. henlægges til Reservefonden og 5 pCt. til Dispositionsfonden.

Af det herefter resterende Overskud faar Aktionærerne 4 pCt. af Aktiernes paalydende Beløb i Udbytte. Af yderligere Overskud henlægges 10 pCt. til Reservefonden, hvoreftet der kan ydes indtil 2 pCt. yderligere Aktieudbytte. Resten af Udbyttet henlægges til Reservefonden, Dispositionsfonden eller andre Fond.

Almindelige Bestemmelser.

§ 18.

Alle Bekendtgørelser angaaende Bankens Forhold indrykkes i «Dimmalætting». Bekendtgørelser i Henhold til Banklovens § 17 indrykkes tillige i Statstidende.

Saavel de ved Udløbet af hvert Kvartal optagne Maanedsbalancer, som det reviderede og godkendte Aarsregnskab skal af Bestyrelsen offentliggøres i «Dimmalætting» og efter Bestyrelsens Bestemmelse i andre Blade samt for Aarsregnskabets Vedkommende paa de Steder, hvor Banken maatte have Filialer.

§ 19.

Nærværende Vedtægter og Ændringer i Vedtægterne skal for at have Gyldighed være godkendt af Handelsministeriet.

b. SAMTYKTIR FYRI «PARTAFELAGIÐ OYGGJABANKIN».

Navn, heimstaður og endamál.

§ 1.

Navn bankans er «Partafelagið Oyggjabankin».

Heimstaður hansara er Tórshavn, Føroyum.

§ 2.

Endamálið hjá bankanum er at dríva bankayrki og herundir helst at styðja og byggja upp hitt føroyska vinnulívið við at lata langfreistað lán til nýútveganir og nýggj virkir og rakstrarlán til virkir av týdningi fyri hitt føroyska samfelagið.

Peningur og partar.

§ 3.

Bankans partapeningur er 500.000 kr., ið er fult inngoldin, býttur í partar uppá 200 kr., 1000 kr. og 5000 kr.

Eingin partur hevur serrættindi og eingin av partaeigarunum hevur skyldu at lata partabrøv sini innloysa heilt ella lutvís.

§ 4.

Partarnir verða útgivnir uppá navn og kunna ikki flytast ónevnda ognaranum. Verður ognarskifti er hin nýggi ognarin skyldugur at lata partabrøv sini bókføra hjá felagnum, og avhendingin hevur ikki gildi fyri bankanum, fyrr tílík bókførsla er gjørd.

Partabrøvini skulu hava vinningsbýtisseðlar og «prógv. Vinningsbýti, ið ikki er tikið út 5 ár aftaná gjalddag, fær tiltaksgrunnur bankans.

§ 5.

Tá tað ásannast, at partabræv er burturblivið, kann nevnd bankans eftir umbøn frá tí bókførda eigaranum og fyri hansara rokning við at seta lýsing í «Dimmalætting» og Statstidende við eini freist uppá minnst 12 vikur stevna tí, ið kanska hevur partabrævið í hendi, til fundar á skrivstovu bankans at prógva sína heimild.

Sigur eingin til sín aftaná tilíka lýsing, hevur nevndin heimild til at siga partabrævið at vera deytt og til at geva út nýtt partabræv til hin bókførda eigaran.

Aðalfundar.

§ 6.

Vanligur aðalfundur verður hildin í Tórshavn á hvørjum ári í apríl mánaði.

Eykaaðalfundur verður hildin eftir nevndarinnar avgerð ella tá partaeigarar, ið eftir partabókini eiga minst 1/4 av partapeninginum, skriviliga biðja nevndina um tað.

Aðalfundurin verður lýstur av nevndini við minnst 14 daga ávaring. Lýsingin kann fara fram skrivliga ella við almennari kunngerð í «Dimmalætting».

Grannskoðaður rokuskapur, fundarevni, og uppskot ið ætlast at verða borin fram, skulu seinast 14 dagar áðrenn aðalfundin verða send partaeigarunum ella verða framløgd í bankanum til eftirlit hjá partaeigarunum.

Uppskot frá partaeigarunum mugu fyri at koma uppí part á tí vanliga aðalfundinum verða send nevndini áðrenn 1. mars.

§ 7.

Fundarevnið á tí vanliga aðalfundinum skal umfata:

1. Frágreiðing frá nevndini um bankans virki í farna ári.
2. Framløga av granskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Møgulig uppskot frá nevnd ella partaeigarum.

§ 8.

Hvør partaeigari er heimilaður at taka lut í aðalfundinum, tá hann seinast 8 dagar áðrenn fundin hevur fingið atgongumerki til hansara í bankanum. Atgongumerkið skal ljóða uppá navn og hava áskrift um talið á atkvøðum hjá honum.

Hvør partur uppá 200 kr. gevur eina atkvøðu, tá parturin er bókførdur á navn seinast 2 mánaðir áðrenn aðalfundin.

Atkvøðurættur kann fara fram við fulltrúa, ið sjálvur er partaeigari, tá aðalfundurin hevur góðkent fullmaktina.

§ 9.

Aðalfundurin verður stýrdur av einum fundarstjóra, ið verður valdur við vanligum meiriluta, og ger hesin av allar spurningar viðvikjandi viðgerð av málunum og atkvøðugreiðsluni.

Mál, ið verða viðgjørd á aðalfundinum, verða avgjørd við vanligum meiriluta av partaeigarum á fundi ella umboðaðir. Til at samtykkja avgerð um samtyktarbroyting ella um sjálvbodna likvidatión bankans krevst, at minnst 2/3 av partapeninginum eru umboðaðir, og at avgerðin verður samtykt við minnst 2/3 av teimum umboðaðu atkvøðunum.

§ 10.

Yvir aðalfundarsamráðingarnar verður førd ein bók, ið verður undirskrivað av fundarstjóranum og nevndarlimunum, ið eru hjástaddir.

Nevndin.

§ 11.

Nevndin er uppá 5 limir, ið verða valdir av aðalfundinum. Samstundis verður valdur ein tiltaksmaður fyri hvønn lim.

Valini av nevndarlimum galda fyri eitt tíðarskeið uppá 5 ár. Av ti fyrst valdu nevndini fer tó ein limur frá á hvørjum ári, fyrstu ferð við árslok 1944. Raðið verður avgjørt við lutakast fyrireikað av nevndini.

Fer limur av nevndini frá áðrenn hesi fimm árini eru umliðin, kemur í hansara stað tiltaksmaðurin, ið er valdur fyri hann, í nevndina fyri hin eftirverandi partin av hansara tíð. Finnst ikki tiltaksmaður, velur aðalfundurin nýggjan nevndarlim og ein tiltaksmann fyri hin eftirverandi partin av tíðini hjá hinum fráfarna.

§ 12.

Nevndin hevur við fyrivarni av yvirvaldi aðalfundarinnar hægstu leiðsluna av bankans viðurskiftum.

Nevndin velur sjálv formann sin. Hon hevur fund, so ofta formaðurin ella tveir aðrir nevndarlimir halda vera neyðugt. Fyri at gild avgerð kann verða tikin, mugu minnst triggir nevndarlimir ella tiltaksmenn teirra verða hjástaddir.

Nevndin ásetir annars sjálv starvsskipan sína.

Ásett verður í leiðbeining, góðkend av bankaeftirlitsmanninum, í hvønn mun nevndarinnar samvirkan krevst frammanundan til at veita lán. Nevndin tekur avgerð um stovnan av útbankum.

Nevndin fær eina samsýning, ið verður ásett á aðalfundinum, tá ársroknskapur verður framlagdur.

Stjórnin.

§ 13.

Til at leiða bankans dagliga virki setir nevndin ein stjóra. Nevndin ásetir løn og setutreytir stjórans og vísir honum á, hvussu tey dagligu virki skulu fara fram.

Bankin verður bundin við undirskrift av stjóra og bókahaldara í felag, stjóra og kassameistara í felag ella stjóra og einum nevndarlimi í felag.

Til at avhenda og veðseta fasta ogn krevst undirskrift av stjóra og nevndarformanni í felag.

§ 14.

Útibankastjórar, bókahaldari og kassameistari verða settir av nevndini, meðan hitt starvsfólkið verður sett av stjóranum.

Nevndin ásetir lønirnar hjá starvsfólkinum.

Fulltrúarumboð (Prokura) kann bert verða givið av nevndini.

§ 15.

Stjórin, útibankastjórar og hitt starvsfólkið mugu ikki fyri egnu rokning á nakran hátt útinna ella taka lut í spekulatiónshandlum.

Stjórin og útibankastjórar mugu ikki upptaka lán í bankanum, fáa tryggjan frá bankanum fyri lán ella taka uppá seg borgan fyri skuldir til bankan, uttan at nevndin í hvørjum einstakum tilfelli hevur samtykt hesum, og verður hetta at føra inn í gerðabók nevndarinnar. Hvat viðvíkir grannskoðarunum mugu tílík virki yvirhøvur ikki fara fram.

Roknskapur, grannskoðan og býtan av vinningi.

§ 16.

Roknskaparár bankans er kalendarárið.

Roknskapurin verður grannskoðaður av 2 av aðalfundinum valdum grannskoðarum, og skal annar teirra vera statsautoriseraður.

Grannskoðaranna viðurgjald verður ásett av nevndini.

Roknskapurin skal verða flýggjaður grannskoðarunum minnst 4 vikur áðrenn aðalfundin.

Nevndin tekur aftaná samráðing við grannskoðarunum avgerð um útinnan av dagligari grannskoðan.

§ 17.

Bankans nettoavlop, verður býtt á eftirfylgjandi hátt, tá øll tap og allar útreiðslur eru tiknar frá og neyðturviligar avskrivingar gjørdar.

Lagt verður burtur av til lógásettan tiltaksgrunn, 10 pct., til hann í minnsta lagi er 1/10 av partapeninginum, hereftir verða løgd burtur av 5 pct. til hesin tiltaksgrunnur er í minnsta lagi 1/4 av partapeninginum. Tó skulu, um eginkapitalurin ikki er minnst 15 pct. av samlaðu skuld- og tryggjanarábyrgdum bankans, eftir aðalfundarsamtykt árliga verða løgd burtur av minnst 20 pct., soleiðis at minnst 15 pct. verða løgd í tiltaksgrunnin og 5 pct. í nýtslugrunnin.

Av tí avlopi, ið tá er eftir, fáa partaeigararnir 4 pct. í vinningsbýti av tí, sum partarnir ljóða uppá. Av meira avlopi verða løgd 10 pct. í tiltaksgrunnin, og kunnu so verða latin upp til 2 pct. meira í vinningsbýti. Restin av avlopinum verður lagt í tiltaksgrunnin, nýtslugrunnin ella í aðrar grunnar.

Reglur yvirhøvur.

§ 18.

Allar kunngerðir viðvikjandi bankans viðurskiftum verða settar í «Dimmlætting». Kunngerðir eftir bankalógarinnar § 17 verða eisini at seta í Statstidende.

Mánaðaruppgerðir, ið verða tiknar upp, tá hvør ársfjórðingur er umliðin, eins og grannskoðaður og góðkendur ársroknskapur, skulu av nevndini verða kunngjørd í «Dimmalætting» og eftir nevndarinnar avgerð í øðrum bløðum, og hvat ið ársroknskapinum viðvikur, eisini á teimum støðum, har bankin hevur útbanka.

§ 19.

Hesar samtyktir og samtyktarbroytingar skulu verða góðkendar av handilsráðinum fyri at hava gildi.

2. Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om

Ændring i Kundgørelse Nr. 48. af 18. December 1940 om Seddelomløb, Valutaforhold og Handel med Udlandet m. v.

§ 1.

§ 6 i midlertidige Bestemmelser for Færøerne Nr. 48 af 18. December 1940 om Seddelomløb, Valutaforhold og Handel med Udlandet m. v., jfr. Bekendtgørelse Nr. 14 af 27. Marts 1941 og Bekendtgørelse Nr. 19 af 26. April affattes saaledes:

«Køb og Salg af fremmed Valuta paa Færøerne maa kun finde Sted gennem P.f «Oyggjabankin».

§ 2.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft samtidig med, at P.f «Oyggjabankin» paabegynder sin Virksomhed.

Amtmanden udsteder Bekendtgørelse om Tidspunktet for Bestemmelsernes Ikrafttræden.

§ 1.

§ 6 í bráðfengis kunngerðum fyri Føroyar nr. 48 frá 18. december 1940 um seðlaumfar, gjaldevnisviðurskifti og handil við útheimin o. s. fr., sbr. kunngerð nr. 14 frá 27. mars 1941 og kunngerð nr. 19 frá 26. apríl 1941 verður orðað soleiðis:

«Keyp og søla av útlendskum gjaldevni í Føroyum kann bert fara fram gjøgnum P.f «Oyggjabankan».

§ 2.

Hesar reglur koma í gildi samstundis sum P.f «Oyggjabankin» tekur við starvi sínum.

Við kunngerð ásetir amtmaðurin, nær hesar reglur koma í gildi.

2. viðgerð 16. november. 3. viðgerð 18. november og 24. november. Uppskot minnilutans fall 5—0.

C. Framlagt **álit** sí **skjal nr. 11.**

Broytingaruppskot
frá A. Samuelsen o. fl.:

Í staðin fyri uppskotini í tingmálinum:

E: Búgva okkara fólk til farmasigling.
F: Eina planøkonomiska skipan.
G: Umskipan av okkara handilsviðurskiftum.
H: Setan av einum hýringskantóri.
I: Kooperativar fyritøkur og fiskimenn, fyrsta rættin til skip.
J: Útlendsk reiðarlir fáa loyvi til at arbeiða í Føroyum.
K: Kannan av vinnuvegamøguleikum.

verður sett:

Málið verður beint í ta millum tingseturnar standandi nevnd viðvíkjandi Endurnýggjan av fiskiflotanum til umhugsan og gjøllari viðgerð til næstu tingsetu.

2. viðgerð 21. november og 28. november. Broytingaruppskotið samtykt 16—0.

12. Myrkalegging.

Framlagt 19. september. 1. viðgerð 19. september (loyvi 13—0). Framlagt 5. oktober.

Álit.

Málið um broytan av myrkaleggingarreglum fyri Føroyar er lagt fyri tingið við skrivi frá amtinum av 19. september 1944.

Tað framgongur av málinum, at C. B.-skrivstovan tann 8. september hevur skrivað til hervaldið her, við fyrispurningi um, hvør støða skal takast til broytan av hesum reglum, nú tað í útvarpinum er kunngjørt, at stórar broytingar eru gjørdar ymsa staðni í Bretlandi. Hægsti flotamaðurin, Captain Corbett, sigur í skrivi av 13. september 1944 frá, at hann heldur tað ikki vera at tilráða at broyta her í Føroyum á sama hátt sum í Bretlandi, men sigur hann, at broytingar kunnu gerast í kunngerðini um myrkalegging § 5 og 6, soleiðis at bilar og cyklur kunna nýta ljós, bara tað verður slókt, beinanvegin varslað verður loftálop, og at lummalyktir ikki longur skulu verða dimmaðar; eisini verður framhildið, at gøtuljós kunnu nýtast um so er, at tað ikki kann siggjast beinleiðis frá opnum havi.

Landfútin hevur skrivað til amtið um sama mál tann 12. september 1944, og hevur hann síðani givið sítt ummæli um ta broyting, sum frammanundan er nevnd. Hann mælir til, at roynt verður at fáa størri broyting í myrkaleggingarreglunum.

C. B.-skrivstovan sigur í skrivi av 15. september 1944 frá, at tilmælt verður at gera tær nevndu broytingar, og at skrivstovan vil gera sýslurnar kunnugar við, at gøtuljós kunna nýtast, tá ið ljósmegin ikki verður størri enn 25 watt, tá byrgt verður fyri ljósinum uppeftir, tá ið tað ikki verður sjónligt frá opnum havi, og tá ljósið beinanvegin kann sløkkjast, um flúgvarar boyrast. Amtið tekur undir við C. B.-skrivstovuni og tilmælir, at tær nevndu broytingar verða kunngjørdar sum broytan í amtsins kunngerð nr. 4 av 9. februar 1942.

Fíggjarnevndin er samd um, at størri broytingar eiga at fáast í lag skjótast gjørligt. Nevndin hevur tí skrivað til hervaldið og vist á, at sonnu reglur eru í gildi um allar oyggjarnar, tó at nakrar bygdir nýta ravmagnsljós, meðan flestu einans nýta petroleumsljós, hvat nevndin heldur, stórur munur er á. Eisini hevur nevndin vist á, at fólk sjálv hava broytt um støðuna, so myrkaleggingin í smáum plássum er væl minni, enn reglugerðin strangliga ásetir. Eisini hevur nevndin vist á, at í tí myrku tíðini nú bardagin hevur vart so leingi, er tað trupult og dapurt hjá fólki at hava hesar strangu reglur, ið virka nívandi á sinnini. Hervaldið er tí biðið enn einaferð at umhugsa málið fyri at kanska nakrar fleiri broytingar kunnu fáast í lag.

Hægsti flotamaðurin hevur í skrivi 23. september 1944 til nevndina sagt frá, at honum er ógjørligt at koma okkum ámøti, tí hann hevur fingið beinleiðis boð frá bretsku stjórnini, at ongar broytingar eiga at gerast í Føroyum. Hann visir eisini til, at hann hevur sagt politinum frá, at reglurnar eiga at verða hildnar allastaðni í Føroyum. Fútin hevur gjørt kunngerð samsvarandi hesum boðum, og sigur frá, at myrkalegging er í gildi í Hetlandi og Orknoyggjum.

Nevndin heldur ikki tað er beint at gera broyting í reglugerðini, tá ið hon einans nertur so lítið við trupulleikarnar hjá fólki, sum uppskotið frá amtinum ger. Ein broyting vil kunna ætlast at gera øvuta virkning á fólk, so tað verður enn meira trupult at fáa myrkaleggingarreglurnar hildnar. Serliga verður tað ikki væl fatandi hjá fólki, hví allir húsagluggar skulu vera stongdir, tá tað uttanfyri gáttina verður loyvt at hava sterkari ljós enn tey ofta nýta inni í stovuni. Nevndin heldur tí, at tað er best einki at gera nú.

Nevndin heldur tað er beint, at tað verður gjørt hervaldinum kunnugt, at tingið ynskir hesar reglur broyttar, fyrsta tað er gjørligt, og biður um at fáa ávaring, fyrsta tann stundin er komin, tá ið bretska ríkisstjórn vegna krígsførslu ikki heldur hetta vera neyðugt meira. So eigur landsnevndin, um tingið ikki er saman, beinanvegin at seta broyting í gildi.

Uppskot.

1. Fyribils verður eingin broyting í teimum galdandi reglum fyri myrkalegging í Føroyum.
2. Løgtingið samtykkir, at tað ynskir so stóra broyting sum gjørligt, fyrsta hetta fellur saman við virki hjá tí hervaldinum ið er her á landi. Hervaldið verður biðið um at siga løgtinginum frá, fyrsta teir kunnu ganga við til, at broyting verður gjørd.
3. Tá ið tað er upplýst, at broyting kann gerast, verður landsnevndin heimilað til beinan vegin at fáa tað sett í gildi, um so er, at løgtingið ikki er saman.

2. viðgerð 9. oktober. Samtykt 14—0.

---

13. Alment føroyskt listarsavn.

Framl. 23. september. 1. viðgerð 2. oktober. Framl. 20. november.

Álit

(Dam við fyrivarni):

B. Husted-Andersen, landsrættarsakførari hevur vent sær til tingið um at fáa stovnað eitt alment føroyskt listarsavn. Hann førir fram í skrivi sínum, at meðan skaldskapur og tónalist í Føroyum í ein vissan mun hava verið styðjað av tinginum, hevur eingin stuðul verið veittur málaralist og myndahøggaralist, og hann vísir á, at umfram at staturin í øðrum norðanlondum beinleiðis styðjar listarmonnum, eru mangastaðni almenn listarsøvn, sum á mangan hátt veita stuðul. Hann heldur, at nú eru líkindir til at

stovna eitt alment listarsavn í Føroyum, av tí at peningaviðurskiftini eru rúmmiskari enn vanliga, og eisini at likindini til at útvega savninum nóg mikið av góðum listarverkum eftir núlivandi ella deyðar listarmenn verða betri, tess fyrr savnið verður sett á stovn; savnið hugsar hann sær sett á stovn av Løgtinginum, men at tað annars eins og á flestum øðrum støðum eigur at vera sjálveigandi. Hann viðleggur uppskot til skipan fyri grunnin og sigur frá, at hann eigur tað stóra listarverkið eftir Samuel Joensen-Mykines: Heim frá gravarferð, framsýnt á Charlottenberg í 1937.

Nevndin heldur, at Løgtingið eigur at styðja málara- og myndahøggaralistini og taka lut í at stovna eitt alment listarsavn her á landi. Sum umsøkjarin vísir á, er tað ikki neyðugt, at eitt tílíkt savn tey fyrstu árini hevur egið hús, men myndaverkini kunna verða varðveitt á øðrum almennum plássi fyri fyrst. Tað hevur ikki verið gjørligt í Løgtingssetuni at kanna hetta til lítar og nevndin setur tí fram hetta

uppskot:

Tingið setir eina 3-mannanevnd til at gera uppskot til skipan fyri almennum føroyskum listarsavni og kanna, hvar listarverkini bráðfengis kunna verða varðveitt. Um henda nevnd innan næstu tingsetu heldur tað vera neyðugt til listarsavnið at keypa virðismikil listarverk, sum kunna vera í boði, verður Landsnevndin heimilað at játta keypið og veita upp í 3000 kr. til hetta endamál. Á næsta tingi verður listarsavnið at seta á stovn.

2. viðgerð 22. november. 3. viðgerð 30. november. Samtykt 17–0.

---

14. «Tjaldur».

Framl. 25. september. 1. viðgerð 2. oktober. Framl. 9. oktober.

Álit.

Til fíggjarnevndina er víst soljóðandi skriv av 22. september 1944 frá nevndini fyri P/f. Skipafelagið Føroyar:

«Útlit er nú til, at bardagin nakað skjótt fer at halda uppat, og spurningurin um fluttning av ferðafólki og góðsi millum Føroyar og Danmark kemur tá at fyriliggja.

Onglendingar tóku sum kunnugt «Tjaldrið», ið tá var lagt upp inni á Skálafirði, í juni mánaða 1941. Ætlan teirra var at senda tað fyri pricurættin, men tingingar komu í lag, og sáttmáli varð gjørdur við okkum um leigumál. Av hesum sáttmála leggja vit hjálagt eina avskrift við, og sum tað sæst av honum, kunnu vit ikki krevja at fáa skipið aftur fyrr enn ½ ár aftaná, at bardagin í Europa er lokin.

Nevndin visti ikki av hesum, tá ið sáttmálin varð gjørdur, og um hetta ikki verður broytt, kann «Tjaldrið» ikki verða sett inn í norðurlandasiglingina fyrr enn út ímóti eimum ári, aftaná at siglandi verður.

«Tjaldrið» flutti áður um 3000 ferðafólk landanna millum, og nú sambandið við Danmark hevur verið kvett í 4½ ár er tað aldeilis neyðugt, at skip verður tøkt til hesa sigling, beinan vegin hon kann verða tikin upp. Vit kunna neyvan vænta, at Danir hava skip sum hóskar, og sum teir vilja seta inn, tí teir koma ivaleyst at hava brúk fyri øllum teirra førum.

Vit heita tí hervið á Føroya Løgting og biðja um, at tingingar verða tiknar upp við Onglendingar um broytan av sáttmálanum, so vit kunna fáa «Tjaldrið» aftur sum skjótast.

Fáa vit «Tjaldrið» aftur nú, so vilja vit seta tað inn í siglingina Leith—Føroyar. Í hesi sigling nýta Onglendingar nú 2 skip, og tey kunna tá verða tikin út og nýtt til aðra sigling. Saman við føroyskum fiskiskiptum kunna vit tá væl syrgja fyri øllum fluttningi millum Føroyar og Ongland.

Spurningurin er ógvuliga umráðandi, og vóna vit, at Føroya Løgting fær hann loystan sum skjótast.»

Nevndin hevur haft samráðingar við nevndarformannin og stjóran fyri umsøkjarunum, og varð tað har framhildið, at tað neyvan kundi væntast, at nakrar samráðingar kundu koma í lag ,meðan løgtingið var saman, eintust allir tí í, at tað, ið kundi gerast í fyrstu syftu, var, at tingið tók støðu til, um ein umsókn kundi viðmælast, soleiðis at felagið sjálvt mátti taka upp samráðingar.

Nevndin er á einum máli um, at tað kann fáa stóran týdning fyri Føroyar, at «Tjaldrið» kann verða siglingarklárt so skjótt tilber. Nevndin setur tí fram uppskot um, at tingið gevur sitt besta viðmæli til, at P/f. Skipafelagið «Føroyar» fær sín sáttmála við bretska kríggsfluttnings umvaldið broyttan soleiðis, at skipið verður givið aftur til felagið so skjótt, tað er gjørligt.

Um tað undir samráðingunum um broytan í sáttmálanum skuldi komið soleiðis fyri, at P/f. Skipafelagið Føroyar treingir til stuðul frá tí almenna í Føroyum, mælir nevndin tinginum til at samtykkja, at landsnevdin fær fulla heimild til tingsins vegna at gera tað, ið gerast kann fyri at styðja umsóknina.

Uppskot:

1. Løgtingið gevur sitt viðmæli til eina umsókn frá P/f. Skipafelagnum «Føroyum» til bretska Minister of war transport um broytan í sáttmálanum um leigu av «Tjaldrinum», soleiðis at skipið kann flýggjast felagnum aftur skjótast gjørligt, og úttalar, at hetta kann fáa stóran týdning fyri Føroyar.
2. Løgtingið gevur landsnevndini uppí hendi at geva skipafelagnum allan tann stuðul, tað biður um, undir samráðingunum um at fáa «Tjaldrið» aftur til brúks fyri felagið.

2. viðgerð 13. oktober. Samtykt 16—0.

15. Vørur úr Ameríka.

Framlagt 18. oktober.

Meirilutaálit.

Spurningurin um at skaffa vørur úr Ameriku hevur fleiri ferðir verið til viðgerðar á tingi. Í tingsetuni 1943 kom vørunevndin inn á henda spurning (sí løgtingstíðindi 1943 síðu 279), og kom tað tá fram, at ein meiriluti (J. F. Kjølbro, O. J. Jensen, S. Ellefsen og Johs. Slettenæs) ynskti keypt beinleiðis úr Ameriku:

> 1500 tons av viði, 1000 tons av rug, mais o. ø, 800 tons av jarni o. t. og 700 tons av ymiskum, harímillum leður, gummistyvlar, skótoy og klædnavørur,

meðan ein minniluti (A. Samuelsen, Iversen og Davidsen) helt fram: «Mindretallet skal som de Varer, man om muligt absolut ønsker fremskaffet, nævne Tømmer Jern, Læder og Gummifodtøj». Annars hevði minnilutin ta støðu, at tað skuldi virkast fyri at fáa tær neyðsynjarvørur, ið ikki kundu fáast úr Bretlandi.

Heitt varð á Bretastjórn um at fáa dollars til at keypa vørur fyri, men svar kom aftaná, at tingsetan 1943 var endað, at eingir dollars kundu fáast, og so fall henda roynd niðurfyri. Tað, ið eigur at vera øllum greitt, er, at allir flokkar, ja allir tingmenn ynsktu, at vørur kundu koma til landið úr Ameriku.

Tað er tann 14. oktober 1944 komið eitt bræv frá handilsfelagnum Helgason og Melsted til løgtingsformannin um tilfluttning av vørum úr Ameriku, og hevur formaðurin víst tað til viðgerðar í vørunevndini, og má tað sigast, at hetta mál hastar ógvuliga nógv, um vón skal verða fyri, at tingsins ynski frá 1943 kann verða framt.

Felagið sigur frá, at teir hava teirra umboðsmann í Ameriku og hava roynt at skipa fyri farmi til Føroyar. Teir hava vent sær til handilsráðið (viðskiptaráðið) í Reykjavík um hagani at fáa útvegað tann amerikanska peningin, teimum tørvar til keypið. Vónirnar sýnast ógvuliga góðar, tí teimum varð víst vælvild frá øllum íslendskum embætismonnum undir samráðingum, og nú restaði einans eitt viðmæli frá einari føroyskari myndugheit við ábyrgd um, at vørurnar vóru tørvandi fyri Føroya fólk. Felagið skrivar so bræv tann 15. september 1944 til amtið um at fáa hetta viðmæli telegraferað til Íslands, og verður tað sagt frá í brævinum, at hetta hevur skund, tí ætlanin er at avskipa vørurnar í oktober mánaða. Eisini verður sagt frá, at hetta bræv viðvíkir tað føroyska viðmælið, meðan málið annars í Íslandi vil verða lagt fyri bretskum og amerikanskum myndugheitum til ummælis.

Uppskot til vørunøgd og pris verður viðlagt skrivinum til amtið, tó at hetta einans er uppskot frá felagnum her og kann broytast, um tað verður hildið, at meira tørvur er til aðrar nøgdir av teimum ymisku vørunum. Vørurnar eru hesar, og prísurin er sagdur at vera cif, soleiðis at lætt skuldi verið at dømt um, hvat vøran kemur at kosta her í Føroyum:

300	tons	av	mais	$ 25.000
500	—	»	handilstøðum	» 35.000
250	—	»	kjøtvørum	» 72.000
30	—	»	leður	» 15.000

20	tons	av	kaffi	$ 5.000
100	—	»	sukur	» 10.000
100	—	»	mjøli	» 8.000
3	—	»	skótoy	» 15.000
50	—	»	rís	» 5.000
2	—	»	undirtoy	» 10.000
3	—	»	ullint klæði	» 10.000
2	—	»	klædningum	» 10.000
140	—	»	jarni og stáli	» 10.000

Tað sæst av hesum, at nógv av tí, sum tingið í fjør samtykti at vera neyðugt, her stendur okkum í boði. Vørumøgdirnar eiga tó óivað at verða eftirhugdar og nakað meira tikið av summum og minni av øðrum, men hetta hevur felagið sagt seg at vera til reiðar at samráðast um.

Felagið sigur nú frá, at teir hjá amtinum fáa at vita, at málið er farið til ummælis á valutamiðstøðini, og venda teir sær til skrivstovuna, ið biður teir skaffa prógv fyri, at Føroyingar ikki skulu gjalda dollars aftur, um so er, at tað verður játtað frá Íslandi, og senda teir so tann 19. september 1944 skriv til miðstøðina við váttan um, at peningurin skal verða afturgoldin í bretskum pundum ella við føroyskum peningi í banka her í Føroyum.

Tó at málið hastar, tí tað framgongur av skrivinum, at ætlanin er at avskipa úr Ameriku í oktober, gongur long tíð, og einki frættist aftur. Tann 12. oktober 1944 fær so felagið skriv frá amtinum, hvar víst verður til eitt skriv, dagssett 10. oktober 1944 frá valutamiðstøðini til amtið, og stendur tað í hesum brævi: «Valutacentralen er for sit Vedkommende altid interesseret i den bedst mulige Import til Færøerne af Nødvendighedsvarer, men *Valuta-Centralen kan ikke være med til overfor Myndighederne i Island at anbefale den her omhandlede Import*, medmindre denne Import vilde betyde flere nødvendige Varer til Færøerne og/eller billigere Varer.» Síðani verður lagt aftrat, at tað fyri naktar vørur vil verða minkað um innfluttningin úr Bretlandi, um vørur koma úr Ameriku; aðrar vørur sigur valutamiðstøðin ikki vera uttan týðning fyri Føroyar, meðan teir siga, at summar vørur kunnu teir ikki vátta eru «urgently needed» fyri tað føroyska samfelagið. Tað sæst av hesum brævi frá miðstøðini, at teir als ikki siga eitt orð um, hvørjar vørur teir kunnu vera við til og hvørjar ikki, einans nýta orðalagið: «en Del Varer», «andre Varer» og «enkelte Varegrupper», so ilt er at fáa hylling á, hvat ið henda miðstøðan verunliga meinar við sínum svari.

Tað skal eisini viðmerkjast, at tað í brævinum frá valutamiðstøðini stendur, at miðstøðin «har indhentet medfølgende Udtalelse af 3. oktober 1944 fra Færøernes offentlige Vareforsyning.» Tað fyriliggur ikki eitt orð um hetta fyri vørunevndini. Her skal verða víst til reglugerð fyri vørubandilin, grein 4: «Vareforsyningen bestyres af et af Lagtinget dertil nedsat Udvalg samt Amtmanden over Færøerne.» Tað má tí haldast meira enn løgið, at vørunevndin, meðan tingið situr saman, ikki hevur hoyrt eitt orð um hetta týðningarmikla mál, serliga tá tað hevur fingið besta viðmæli frá tinginum í tingsetuni 1943.

Ein meirluti í vørunevndini (J. F. Kjølbro, O. J. Jensen, S. Ellefsen og Jobs. Slettenæs) má framhalda, at tað eigur at verða samtykt av tinginum beinan vegin, at nógvar av hesum vørum eru neyðsynjarvørur fyri okkara fólk, og at tingsins og Føroya fólks besta viðmæli verður givið til, at hesin fluttningur kann fáast í lag.

Meirilutin má halda, at tað er harmiligt, at felagið, ið hevur fyrireikað hetta, ikki beinan vegin, tann 15. september 1944, fekk svar, tí

stórur ótti má vera fyri, at tann tíðin, ið er farin nú, kann hava gjørt, at eingi kemur burturúr, men nú eigur ikki at verða steðgað við at samtykkja, hvussu stóran týdning hetta hevur fyri Føroyar.

Meirilutin ynskir at úttala, at vit harmast yvir, at eitt tilíkt mál hevur fingið eina slíka viðgerð, tí okkara frændir Íslendingar hava her sýnt eina vælvild, sum hvør tingmaður átti at verið takksamur fyri, og skilja vit ikki, hvat vit sita í vørunevndini til, tá eitt slíkt mál ikki kemur fram. Vit vilja vísa á, at fyrispurningurin frá felagnum til amtið sigur at ynskja eitt viðmæli Føroya fólks vegna, og so verður málið viðgjørt 1) av amtinum, 2) av valutamiðstøðini við amtmanninum sum formanni og ongum limi valdum av teimum 12 tingmonnum, sum umboða okkara flokk, 3) av landshandlinum — uttanum vørunevndina — tað vil siga, at tað má ætlast at vera av stjóra K. Petersen saman við amtmanninum, 4) aftur av amtmanninum sum formanni í valutamiðstøðini og so 5) sýtt av amtinum; alt hetta fer fram, meðan løgtingið situr saman, uttan at eitt orð verður mælt til tingmenn um málið.

Meirilutin setur fram hetta

uppskot:

1. Løgtingið samtykkir at úttala, at tingið er takksamt fyri, at felagið Helgason & Melsted hevur fyrireikað ein farm av neyðsynjarvørum úr Ameriku, og at Íslendingar hava skaffað okkum skip og dollars. Tingið váttar, at tað Føroya fólks vegna gevur sitt besta viðmæli til, at íslendska handilsráðið útvegar tann neyðturviliga útlendska pening til hetta keyp og úttalar, at nógvar av teimum vørunum hava serliga átroðkandi týdning fyri okkara land.
2. Løgtingið samtykkir at heimila vørunevndina til at skipa so fyri, at besta viðmæli tingsins verður telegraferað til Íslands skjótast gjørligt, og at Íslendingar vilja gera so væl at útvega okkum skip og dollars.
3. Løgtingið heimilar vørunevndina til eftir samráð við felagið Helgason & Melsted og innfluttningsmenn her í Føroyum at fáa fastlagt broytingar, ið teir halda tørvur er til í teimum vørunøgdum, sum uppskot er um at flyta inn úr Ameriku.

Framlagt 30. oktober.

Minnilutaálit.

Udvalgets Flertal har allerede den 18. dennes afgivet Betænkning (Álit) i foranstaaende Sag, uden at det har været muligt for Udvalgets Mindretal at deltage i de Forhandlinger, som har ført til Betænkningens Afgivelse. Der blev den 18. dennes fra Kl. 11 Formiddag til Kl. 1½ Eftermiddag afholdt Vareudvalgsmøde om en til Lagtingets Formand stilet Skrivelse fra Direktør Sigurjónsson med Bilag — en Skrivelse, som Tingets Formand maa have haft i flere Dage, (den er dateret 14. Oktober), men som nærværende Udvalgs Mindretal først modtog om Aftenen den 17. dennes. Paa Udvalgsmødet fremsattes et Forslag om at søge Forhandling med Direktør Sigurjónsson, som repræsenterer det Firma, der har rejst Spørgsmaalet om Vareindkøb i Sydamerika og Grossererne Poul Hansen og A. Jørgensen (Balslev & Co.), som Herr Sigurjónsson opgav som med-

interesserede i Varekøbet. Dette Forslag blev af et fremragende Medlem af Udvalgsflertallet betegnet som den eneste rette Vej at gaa; men Udvalgets Formand dikterede, at Sagen skulde behandles i Lagtinget allerede i Eftermiddagsmødet Kl. 4, og at Udvalgets Mindretal enten maatte tiltræde Udvalgsflertalsbetænkningen eller afgive Særbetænkning. Men denne Flertalsbetænkning med eventuelle Forslag blev hverken forelagt, oplæst eller forevist Mindretallet i dette ejendommelige Udvalgsmøde. Mindretallet i Udvalget havde den Gang noget vanskeligt ved at forstaa Udvalgsformandens Standpunkt. Nu forstaar man, at Herr Udvalgsformanden sandsynligvis endnu ikke havde faaet Betænkningen overrakt, men dog havde paa Fornemmelsen, at en Forhandling med de ovennævnte Grosserere vilde virke distraherende paa Flertalsbetænkningens Koncipist og derfor maatte afværges. Betænkningen indeholder da heller ikke noget om det afholdte Udvalgsmøde. Den afleveredes til Mindretallets Medlemmer i renskrevet Tilstand den 18. dennes om Eftermiddagen Kl. 1^{40}, det vil sige en Time efter Udvalgsmødets Afslutning. Den maa saaledes være lavet færdig inden Udvalgsmødet begyndte. Men Mindretallet tager næppe fejl, naar man gaar ud fra, at Betænkningens egentlige Indhold har været ligesaa ukendt for Udvalgets Flertal som Udvalgets Mindretal under Udvalgsmødet. Forsaavidt har Mindretallet ikke noget særligt at beklage sig over i denne Henseende. Alle Udvalgsmedlemmerne synes at have faaet samme ejendommelige Behandling.

Under Forsøget paa at faa Sagen afgjort i Lagtinget paa det af Udvalgsflertallet eller dettes Befuldmægtige tilvejebragte Grundlag, nægtede Lagtingets Flertal i Mødet den 18. dennes sin Medvirkning, og Sagens Behandling i Tinget blev saaledes standset.

Udvalgsmindretallet, som saaledes tik den fornødne Tilslutning hos Lagtingets Flertal — har derefter ført de Forhandlinger med de interesserede Grossister, som maatte anses for at være af Interesse for Sagens gode Gennemførelse. — Det er kun beklageligt, at Udvalgsflertallet selv satte sig uden for disse Forhandlinger, ved ikke engang at gøre Forsøg paa at konstatere, om Enighed kunde tilvejebringes i det samlede Udvalg om Flertallets Forslag, før Flertallets Betænkning afgaves. Dette er saa meget mere beklageligt, som Udvalgsflertallet er bekendt med, at Udvalgets Mindretal havde Flertal i Lagtinget for sine Anskuelser. Det synes derfor at have været Udvalgsflertallets og dettes Meningsfællers (Folkeflokkens) Hensigt at føre Sagen frem til Behandling i Tinget for der at faa den stemt ned. — Under saadanne Omstændigheder maa desværre Arbejdet for at skaffe den færøske Befolkning den bedst mulige Forsyning af de nødvendigste Varer foregaa i denne vanskelige Krigstid. —

Allerede Onsdag Eftermiddag Kl. 1½ forhandlede Mindretallet og Amtmanden med Grossererne Poul Hansen og A. Jørgensen (Balslev & Co.), som skulde deltage i Købet af den Ladning Varer fra Sydamerika som Direktør Sigurjónsson (Helgason & Melsted) arbejdede paa at ordne. Disse Forhandlinger var af orienterende Art. — Flertalsbetænkningen synes i Hastværket at have glemt at nævne, at de to førstnævnte Grossister var interesserede i Varekøbet. Dette store Hastværksarbejde kan nu forklares ved, at det for Udvalgsflertallets Lagtingsparti gjaldt om at faa Flertalsbetænkningen fremlagt i Tinget allerede om Onsdagen, da den ellers ikke saa godt kunde offentliggøres i Partiets Avis om Fredagen — før den var fremlagt i Tinget, og denne Offentliggørelse synes at være det politiske Resultat, man ønskede ud af Sagen.

Til Udvalgsflertallets Undskyldning maa man dog retfærdigvis anføre, at dettes Betænkning synes skrevet af Mænd uden for Udvalget.

Torsdagen den 19. dennes forhandlede Amtmanden og Udvalgets

Mindretal med Direktør Sigurjónsson. Disse Forhandlinger førte bl. a. til, at Amtmanden telegrafisk sendte en Udtalelse i Sagens Interesse til Viðskiptaráðið i Reykjavik og Firmaet Helgason og Melsted sammesteds gennem den danske Legation. Det er Mindretallet bekendt, at Direktør Sigurjónsson nu er i Forhandling direkte med Amerika om at faa Priserne paa Varepartiets vigtigste Poster opgivne. Naar der herom er modtaget tilfredsstillende Oplysninger, er Tidspunktet inde til at træffe Afgørelse om Køb. Herom er der Enighed mellem Færøernes offentlige Vareforsyning og Grossererne Poul Hansen og A. Jørgensen. Det kan tilføjes, at Direktør Sigurjónsson er indforstaaet hermed. Og det samme gælder Færøernes Valutacentral og Amtet.

Om Møderne med Grossererne Poul Hansen, A. Jørgensen og Sigurjónsson skal man her gengive følgende af Parterne godkendte Referat samt nogle i Sagens Interesse afsendte Telegrammer.

18. Oktober 1944:

Kl. 13[30] mødte paa Kontoret Direktør Jørgensen, Grosserer Poul Hansen, Sysselmand Samuelsen, Lagtingsmand Davidsen og Direktør Knud Petersen. Amtmanden meddelte de mødende, at der i Formiddags havde været Møde i Vareudvalget i Anledning af en Henvendelse fra Helgason & Melsted til Lagtinget vedrørende Køb af Varer i Sydamerika. Amtmanden redegjorde nærmere for, hvad der i saa Henseende forelaa for Amtet og Valuta-Centralen.

Samuelsen bemærkede, at Sambandspartiets og Socialdemokratiets Repræsentanter i Vareudvalget havde ønsket, at Vareudvalget skulde forhandle om Spørgsmaalet med Direktør Jørgensen og Grosserer Poul Hansen, da Helgason & Melsted har nævnt dem som Modtagere af de omhandlede Varer. Vareudvalgets Flertal havde ikke ønsket en saadan Forhandling, men de to Partier, som Samuelsen og Davidsen repræsenterer, vilde gerne stille de to Købmænd nogle Spørgsmaal, inden Sagen kommer til Behandling i Lagtinget formentlig i Eftermiddag.

Det Hovedspørgmaal, som ønskes stillet, er, hvad der er oplyst for de Herrer om denne Sag, og, hvor langt Forhandlingerne mellem dem og Helgason & Melsted er kommet.

Direktør Jørgensen oplyser herefter, at han for en eller to Maaneder siden har haft en Henvendelse fra Sigurjónsson, der forelagde et Projekt om Indførsel af Varer fra Sydamerika. Direktør Jørgensen havde for sit Vedkommende været interesseret, men havde selvfølgelig bedt om Priser. Oplysninger om Priser er ikke kommet fra Helgason & Melsted, og derfor er Sagen ikke kommet videre for hans Firmas Vedkommende.

Grosserer Poul Hansen oplyser, at Sigurjónsson første Gang henvendte sig til ham om Sagen midt i August og nævnte, at han havde Planer om at skaffe en Skonnertlast af Varer fra Sydamerika. Grosserer Hansen svarede, at han var ubetinget villig til at være med hertil, hvis Forretningen kunde gøres paa et sundt Grundlag. Aftalen blev, at Sigurjónsson skulde arbejde videre med Sagen og navnlig skaffe at vide, hvilke Varer der kunde skaffes og til hvilke Priser. Sigurjónsson kom igen til Grosserer Hansen for en Maaneds Tid siden, men der var heller ikke nu præcise Oplysninger om Varer eller Priser, og det aftaltes derfor paa ny, at Sigurjónsson skulde arbejde videre med Sagen og komme igen, naar der forelaa Oplysning om Varerne, Priser og Befragtning. Senere har Grosserer Hansen ikke hørt nogen til Sagen.

Begge de Herrer oplyser, at der ikke er forhandlet med dem om de Varearter og Kvanta, som er angivet paa Helgason & Melsted's Liste af 14. September 1944. De tilføjer, at der ikke overfor dem er angivet

en bestemt Frist, indenfor hvilken Forretningen skulde være sluttet. Sagen ligger for deres Vedkommende saaledes, at de venter paa yderligere Oplysninger fra Sigurjónsson.

19. Oktober 1944, Kl. 11; mødte paa Kontoret Grosserer Sigurjónsson samt Lagtingsmændene Samuelsen, Davidsen og Hans Iversen. Sigurjónsson blev gjort bekendt med, hvad der er passeret vedrørende den paatænkte Import af Varer fra Sydamerika.

Sigurjónsson blev herefter forespurgt, om de fra hans Side foreliggende Oplysninger skal forstaas saaledes, at de opgivne Priser er bindende Cif-Priser. Dertil svarede Sigurjónsson, at det ikke er bindende Priser, men det er Priser, anslaaet for at fremskaffe den fra islandsk Side ønskede Kalkulation af det samlede Dollarbehov. Sigurjónsson blev forespurgt, hvorfor der ikke var skaffet Priser før. Hertil svarede Sigurjónsson, at han nu har faaet opgivet nogle Fobpriser. Han er klar over, at der ikke hidtil er gjort nok med Hensyn til Prisopgaver.

Referatet af Forhandlingerne i Gaar med Direktør Jørgensen, Grosserer Poul Hansen og Direktør Petersen blev oplæst og Sigurjónsson bekræftede Rigtigheden af det deri oplyste.

Sigurjónsson blev paany forespurgt, hvorfor Priserne ikke er kommet frem tidligere, uanset saavel Poul Hansens samt Direktør Petersens og Direktør Jørgensens Anmodning om Priser. Sigurjónsson svarede hertil: «Det ved jeg ikke. Det kan kun Melsted svare paa, og han er i Amerika, men jeg tænker mig, at Grunden er den, at man venter paa Anbefaling, inden man tager Sagen op i Detailler. Jeg har stadig forsøgt Henvendelse til mit Hovedkontor, men har ikke faaet endeligt Svar. Anbefalingen har efter min Mening været nødvendig, for at vise Interessen fra færøsk Side.»

Sigurjónsson oplyser videre, at han i Gaar efter at have talt med Direktør Jørgensen om Sagen, har sendt et Telegram til Reykjavik om, at det er nødvendigt at opgive Priser, før en Anbefaling fra færøsk Side kan naas. Han regner med, at der stadig er Mulighed for at bringe Forretningen i Orden, men kan ikke sige noget bestemt herom.

Amtmanden bemærkede, at hans og Valuta-Centralens Stilling maa forstaas saaledes, at det ikke er en Betingelse for Anbefaling at faa opgivet faste, bindende Priser paa alle Varerne, men en tilnærmelsesvis Indikation af Priserne er nødvendig.

Efter yderligere nogen Forhandling om Sagen tilbød Amtmanden under Forudsætning af Valuta-Centralens Tilslutning at sende et Telegram til Den danske Legation i Reykjavik af omtrent følgende Indhold:

«Helgason & Melsted har gennem herværende Filial rejst Spørgsmaalet om Indførsel til Færøerne fra Sydamerika af visse Nødvendighedsvarer stop for at skaffe Dollars fra Island til Købet kræves Anbefaling af Importen fra herværende Myndigheder stop Amtet og Valutacentralen ininteresseret i Import af i hvert Fald visse af de omhandlede Varer men kun paa den Betingelse at Priserne vil muliggøre Salg paa Færøerne uden ugunstig Paavirkning Prisniveaut stop Priser har ikke hidtil kunnet opgives og Myndighederne afventer Prisopgivelser inden endelig Anbefaling kan gives stop bedes straks meddelt Helgason & Melsted Reykjavik og Viðskiptaráðið*)».

Sigurjónsson sagde hertil, at det vel kan forventes, at et saadant

*) Telegrammet afsendt 19. Oktober 1944 Kl. 15,30.

Telegram vilde være en Hjælp i Sagen, men han fremhævede stadig, at det vilde være bedre med en ubetinget Anbefaling.

Amtmanden bemærkede herefter, at den eneste Betænkelighed, han har med Hensyn til nu at sende det omhandlede Telegram, er, at Sagen i Øjeblikket er indbragt for Lagtinget, saaledes at det muligvis vil være rettest at afvente Lagtingets Beslutning i Sagen. Sigurjónsson sagde i denne Anledning, at det ikke har været hans Mening, at Sagen skulde forhandles i selve Lagtinget. Han havde mødt Thorstein Petersen paa Gaden og havde omtalt Sagen for ham. Thorstein Petersen havde sagt, at han kendte ikke Spor til Sagen, og at det derfor var bedst, at Sigurjónsson gav en skriftlig Forklaring. Sigurjónsson fik den Opfattelse, at Sagen derefter vilde komme til Behandling i Varcudvalget, og ikke i selve Lagtinget. Samuelsen rejste derefter overfor Sigurjónsson Spørgsmaalet om, hvorvidt han (Sigurjónsson) kunde og vilde foranledige, at Sagens Behandling i Lagtinget udsattes, saalænge der stadig forhandles mellem ham og Island om Sagen. Sigurjónsson svarede hertil, at han som Sagen nu foreligger, vil anmode Thorstein Petersen om at foranledige Sagens Behandling i Lagtinget udsat, indtil der foreligger Svar fra Island paa de Henvendelser, der nu er rettet dertil.

Telegram. Thorshavn, 20. Oktober 1944.

NLT Pall Melsted c/o. Helgason og Mested A/S. 165, Broadway, Newyork City.

Autoriteterne her kun villig sende Anbefaling til Viðskiptaráðið for Dollars paa Betingelse De opgiver Cif Priser eller Fob plus Fragt og Assurance Stop Følgende Varer fornødent omtrentlig 250 tons Majsmel for Kvægfoder 50 Tons Majs 100 Tons Kali 40 pCt. eller tilsvarende Kvantum stærkere 200 Tons Monierjern 100 Tons Stangjern for Smedier 30 Tons Saalelæder 10.000 Par Børnefodtøj 20.000 Par Voksnes Fodtøj 10.000 Sæt assorteret Undertøj 40 Tons Corned Beef et og to lbs. Daaser 300 Tdr. Saltkød Stop Saafremt nødvendigt for at komplettere Last forventer Anbefaling ogsaa opnaaeligt for Hvedemel Melis Ris Kaffe derfor venligst ogsaa opgiv Priser for disse Artikler.

Helgason Melsted.

«Opgiv Priser» er oversat fra det engelske «quote» hvilket ogsaa betyder «giv Tilbud»

Undertegnede Udvalgs Mindretal haaber, at Forhandlingerne, som nu fortsættes i det rigtige Spor, maa føre til, at der sikres Færøerne Varer, som ikke kan faas i Storbritannien. De Varer, man kan faa fra Storbritannien, kan næppe med Fordel indføres fra Sydamerika i Partier som Færøerne har Brug for. Mindretallet er enigt om, at Islands Viðskiptaráðið ved at stille sig velvilligt overfor Tanken om at udvirke, at Færøerne faar det fornødne Dollarsbeløb til Gennemførelsen af det omhandlede Varekøb har fortjent Tingets Tak, og Mindretallet er taknemmeligt for denne Velvilje, og det er klart, at Mindretallet med alle gode Færinger er enigt i, at denne Velvilje ikke maa misbruges. Kun i de allernødvendigste Tilfælde har Lagtinget efter det foreliggende Lov til at modtage det islandske Tilbud om Dollars til Indkøb af Varer i Amerika. — Udvalgets Mindretal haaber, at der maa tilflyde Tinget saadanne Oplysninger fra Amerika om Varepriser m. m., at Varerne kan købes og indføres hertil uden uheldig Indflydelse paa det færøske Prisniveau. Visse Varer, som ikke kan købes i Storbritannien, men er aldeles nødvendige for færøsk Behov, maa vel ogsaa købes hertil, hvis de kan faas, selv om Prisen er højere end ønskeligt. En Vanskelighed for Indkøb af de amerikanske

Varer til Færøerne er beklageligvis opstaaet under denne Sags Behandling, den Vanskelighed nemlig, at Udvalgets Flertal har indtaget en Stilling under Sagen, som foran er refereret, men denne Vanskelighed maa overvindes. Saafremt imidlertid det af Mindretallet krævede Grundlag for Varekøbet kan tilvejebringes, og der herom er Enighed mellem Grossererne Poul Hansen og A. Jørgensen og Direktøren for Færøernes offentlige Vareforsyning bør Lagtinget bemyndige Direktøren for Vareforsyningen til at deltage i Købet af Varerne sammen med nysnævnte Grossister.

Forslag:

1. Under Henvisning til foranstaaende bemyndiges Direktøren for Færøernes offentlige Vareforsyning til at købe et passende Parti Varer fra Sydamerika sammen Grossererne Poul Hansen og A. Jørgensen (Balslev & Co) saafremt Priserne skønnes acceptable og det fornødne Dollarbeløb kan skaffes. Varerne købes ved Firmaet Helgason & Melsted.
2. Direktøren har sammen med de under 1) nævnte Grossister om fornødent Ret til at ombytte eller supplere de i Sagen ommeldte Varesorter med andre nødvendige Varer.

2. viðgerð 2. og 3. november. Meirilutauppskotið fall 9—0. Minnilutauppskotið samtykt 13—0.

---

16. Skylda hjá peningastovnum at uppgeva rentuinntøku til skattaálíkning.

Framlagt 18. oktober (loyvi 15—0). 1. viðgerð 20. oktober. Framlagt 23. november.

Álit.

Við Kundgørelse Nr. 69 av 23. december 1941 um stovnan av Likningarráð Føroya o. a. verður í § 7 millum annað ásett, at bankar og sparikassar «er forpligtet til uden Betaling i begæret, men kort betegnet Form saavidt muligt at meddele de kommunale Ligningsmyndigheder, Lagtingets Skatteudvalg og Ligningraadet alle de Oplysninger, der kan tjene disse Myndigheder til Vejledning ved Udførelse af deres Hverv, saasom .... Oplysning om Størrelsen af indestaaende Kapitaler og disses Forrentning» og í sama § verður sagt, at «vægrer nogen sig ved at meddele de begærte Oplysninger, afgør Indenrigsministeriet, hvorvidt han er forpligtet hertil».

Líkningarráð Føroya hevur í brævi av 18. oktober 1944 spurt Løgtingið, hvussu nevnda lógarregla reiðiliga er at skilja, helst um tað er álagt teimum nevndu peningastovnum skyldu at geva likningarnevndum «generellar» upplýsningar um støddina av innistandandi peningi og ávøkstri ella um teir bert eru skyldugir at geva slíkar upplýsningar í serstøkum («konkrete») førum, har navn og bústaður skattgjaldarans er viðmerkt.

Amtið hevur haft málið til ummælis og heldur í brævi av 18. april 1944, at peningastovnarnir hava skyldu at geva nevndu upplysingar fyri navngivnar skattgjaldarar, sum likningarvaldið ynskir upplysingar um, meðan teir ikki hava skyldu at geva generellar upplýsingar, sum t. d. fyri «allar í búgvarar í tí og tí bygd», fyri «allar jarðabrúkarar í Føroyum» o.s.fr.

Færø Amts Sparekasse hevur í brævi av 10. september 1943 fört fram, at stjórnirnar fyri bankarnar og sparikassan í Havn eru av tí hugsan, at skattalógin eisini her í Føroyum eigur at brúkast soleiðis, at viðkomandi likningarvald í øllum førum, hvar sjálvuppgávan ætlast at vera ov lág ella tá sjálvuppgávan yvirhøvur ikki er givin inn, biður viðkomandi skattaskyldugu um teir tørvandi upplýsingar og prógv, og síðani — um tær antin koma og ætlast at vera nóg góðar ella ikki — áleggja skattin soleiðis, at tað verður latið til skattgjaldarin sjálvan at fáa skattin niðursettan við klagu yvir, at tann soleiðis ásetti skattur fer upp um hansara sonnu inntøku við meira enn 25 pct. Fyrst tá tað vísir seg antin við sjálvari skattaáleggjanini ella tá klagað verður, at træta kemur millum likningarvaldið og skattgjaldarin um ásetanina, vilja peningastovnarnir geva nevndu upplýsingar, aftaná fyrst at hava biðið skattgjaldarin um sjálvur at geva teir umbidnu upplýsingar.

Málið er beint í eina serliga 5-mannanevnd.

Ein minniluti (O. F. Joensen og Trygve Samuelsen) heldur, at tað eigur at fatast varliga fram við at krevja upplýsingar hjá peningastovnum um innistandandi pening og rentur. Tað kemst ikki heilt uttanum, at ein radikal gjøgnumføran av lógarreglum um skyldu hjá peningastovnum at geva hesar upplýsingar kann føra vissar trupulleikar við sær, sum t. d. mótvirka uppsparing og føra til «Kapitalflugt», sjálvt um hetta síðsta kanska ikki beint nú undir bardaganum er beinleiðis aktuelt. Minniluti mælir tí til, at lógarreglan verður broytt soleiðis, at upplýsingar um innistandandi pening og rentur fyrst eiga at kunna krevjast frá peningastovnunum, tá klagað verður til skattanevnd løgtingsins ella til yvirlíkningarnevndina í Havn um skattaásetanina, og setur fram samsvarandi hesum framførda niðanfyristandandi uppskot til lógarbroyting.

Ein minniluti (P. Dahl og J. F. Kjølbro) er einigur við minniluta O. F. Joensen og Trygve Samuelsen í tí í álitinum framførda, men heldur, at ein lógarbroytan er neyðug av tí, at hettar tingið ikki kann fara undir at leggja út lógir, sum eitt fyrverandi ting hevur gjort, ein útleggjan, sum bert administrationin og dómsmálaráðið kann gera. Minniluti má halda, at peningastovnarnir fyrst hava skyldu at geva upp til likningarvaldið, tá ið ósemja er komin millum likningarvaldið og hin skattskylduga, og tá ið alt er roynt frammanundan at útjevna hesa ósemju. Minniluti setur tí fram niðanfyristandandi uppskot um lógarbroytan.

Ein minniluti (P. M. Dam) heldur, at lógarreglan eigur at standa við, og eigir at fatast soleiðis, at peningastovnarnir hava skyldu at geva upplýsingar um innistandandi pening og rentur fyri skattgjaldarar, har navn og bústaður er viðmerkt, og setur fram uppskot samsvarandi hesum.

Uppskot:

frá *minnilutanum* O. F. Joensen og Trygve Samuelsen.

Midlertidige Bestemmelser om Ændring i Kundgørelse Nr. 69 af 23. December 1941 om Oprettelse af et Ligningsraad m. v.

I § 7 i Kundgørelse Nr. 69 af 23. December 1941 om Oprettelse af et Ligningsraad m. v. forelages følgende Ændring:

Ordene «Oplysning om Størrelsen af indestaaende Kapitaler og disses Forrentning,» udgaar, og til Paragraffen føjes som nyt Stykke 2: «Banker og Sparekasser er derhos forpligtet til at meddele Lagtingets Skatteudvalg og for Thorshavns Vedkommende Overligningskommissionen ved Behandlingen af Skatteklager Oplysning om Størrelsen af indestaaende Kapitaler og disses Forrentning.»

§ 7 i kunngerð nr. 69 av 23. december 1941 um stovnan av einum Likningarráðið o. a. verður soleiðis broytt:

Orðini «Oplysning om Størrelsen af indestaaende Kapitaler og disses Forrentning,» ganga út og sett verður sum nýtt stykki 2: «Bankar og sparikassar eiga skyldu at geva skattanevnd Løgtingsins og Yvirlíkningarnevndini í Havn undir viðgerð av skattaklagum upplýsingar um stødd av innistandandi peningi og rentu.»

Frá *minnilutanum* P. Dahl og J. F. Kjølbro:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Ændring i Kundgørelse Nr. 69 af 23. December 1941 om Oprettelse af et Ligningsraad m. v.

Til § 7 i Kundgørelse Nr. 69 af 23. December 1941 indføjes Ordene «i Konfliktstilfælde» foran Sætningen «Oplysning om Størrelsen af indestaaende Kapitaler og disses Forrentning,»

Í § 7 í kunngerð nr. 69 av 23. december 1941 verða orðini «í ósemju» førd inn frammanundan orðunum «Oplysning om Størrelsen af indestaaende Kapitaler og disses Forrentning,»

Frá *minnilutanum* P. M. Dam:

Svarað verður Likningarráði Føroya, at tingið heldur, at peningastovnarnir eftir lógarregluni hava skyldu til at geva líkningarvaldinum upplýsingar um innistandandi pening og rentur fyri skattgjaldarar, har navn og bústaður er viðmerkt.

2. viðgerð 29. november. 3. viðgerð 30. november. Uppskot Dams fall 6—0. Uppskotið hjá Dahl og Kjølbro fall 5—0. Uppskotið hjá Joensen og Tr. Samuelsen samtykt 13—0.

17. Sømdarpening fyri álitisstarv.

Framlagt 10. november.

Uppskot.

Sum monnum kunnugt var Søren Sørensen, Kunoy, fyrsti álitsmaður tingsins til umsjónar av lendingum o.l., sum tingið veitti studning til.

Hann røkti sítt álitisstarv framúr væl og eigir landsins og tingsins tøkk fyri tað.

Undirskrivaðu tingmenn halda tað vera landsins skylda at veita tilikum monnum sømdir. Tí verður mælt til at veita Søren Sørensen sømdarpening.

Uppskot:

Sum sømdarpening fyri álitisstarv sítt sum umsjónarmaður tingsins veitir tingið Søren Sørensen, Kunoy, kr. 600.

2. viðgerð 14. november. 3. viðgerð 17. november. Samtykt 23–0.

---

18. Fyrispurningur frá studentafelagnum.

Framlagt 13. november. (Loyvi 18–0). 1. viðgerð 15. november. Framlagt 22. november.

Álit

(Dam við fyrivarni).

Studentafelagið hevur í skrívi tann 12. november 1944 vent sær til tingið og sagt frá, at tað í felagnum eru 15 limir, ið, um líkindir høvdu verið, høvdu farið burtur at vinna sær kunnleika í hesum greinum: læknar 5, verkfrøðingar 5, lógfrøðingar 2, málfrøðingar 2 og handilsfrøði 1. – Felagið biður tí tingið um at greiða sær ein fyrispurning um tað t. d. í Onglandi, Íslandi og Ameriku,

1. er møguleiki fyri at sleppa til háskúlar,
2. kostnaður,
3. kann verða roknað við fríplássum ella almennum styrki, og
4. hvørjir háskúlar eru best hóskandi til hesar greinirnar.

Málið er beint í figgjarnevndina til viðgerðar og nevndarformaðurin hevur haft samráðingar við felagsins formann Andreas Højgaard. Hesin segði frá, hvør tað var, ið hevði hug at læra tær ymisku greinirnar, men váttaði samstundis, at tað einans vildi vera talan um heilt fáar, ið kundu hugsast at fara í tíðini til næstu vanligu tingsetu.

Læknar eru tað 5, ið læra til her í Føroyum í løtuni, og av teimum hava tveir verið í Íslandi við styrki frá Løgtinginum og tikið fyrsta part. Teir fara væntandi avstað aftur í mars mánað 1945 at fyrireika annan part, men til hetta er tað peningur í teim 8000 kr., tingið eins og í fjør hevur játtað. Hinir 3 lesa heima í Føroyum og kunnu ikki í 1945 væntast at verða komnir so nógv áleiðis við lestri, at teimum nýtist at fara av landinum.

Verkfrøðingar eru tað 5, ið ætla at læra til, harímillum felagsins formaður. Tað er her at siga, at flest allir verkfrøðingar skulu hava eitt ár smiðjutíð, og hetta er væl gjørligt at fáa heima í Føroyum. Soleiðis sum umstøðurnar fyri at lesa til verkfrøðing í norðanlondum eru sammett við tey lond, teir nú kundi sloppið til, helt formaðurin neyvan tað vildi verða talan um, at nakar av teimum 5 vildu fara burtur at læra í 1945.

Lógfrøðingar eru tað 4, ið læra til, — ikki 2 sum í umsóknini nevnt —, men her er tað neyvan til nakað gagn fyri teir at fara til nevndu lond, tí løgfrøði er so ymiskt í teimum ymisku londum.

Handilsfrøði er tað ein, ið ætlar sær at lesa til, og her kann tað vera til stórt gagn, um hann vitjar fremmand lond t. d. Bretland, tí tað vil fyrireika hann væl til at halda fram í skúla seinni. Tað eigur at verða samrátt við hann, um hann hevur hug at fara nú, og síðani at vera fyrireikað, at hann kann koma av stað.

Málfrøði eru tað tveir, ið hava hug at takast við, men einans annar av teimum kann væntast at fara burtur í 1945.

Nevndarlimur í collegium academicum faeroense, landsrættarsakførari Leif Waagstein, ið hevur fyriskipað útgjaldan av peningi fyri lestur í Føroyum og fyri teir, ið hava verið burtur, hevur sagt frá, at hann hevur talað við flest allar studentarnar og eggjað teimum til at fara undir lestur og sagt teimum frá, at tað almenna hevur hug at styðja teir, um so er, at teir vildu fara burtur at læra. Felagsins vegna sigur Leif Waagstein eisini frá, at tað má væntast, at tær 8000 kr., ið játtaðar eru, vilja røkka til tær útreiðslur, ið talan verður um í 1945, ið hvussu so er vil tað røkka longur enn til Ólavsøku 1945, tá tingið kemur saman aftur.

Fíggjarnevndin skal vísandi til tað, ið her er upplýst mæla til, at landsnevndin í samarbeiði við collegium academicum faeroense fær til vegar allar tørvandi upplýsingar, fyri at okkara ungu studentar kunnu taka støðu til spurningin, um tein skulu halda leiðina burtur av landi at søkja sær kunnleika, og skal nevndin eisini mæla tinginum til at siga studentunum frá, at tingið er sinnað til at hækka játtanina til hetta endamál, tá tað verður tørvur til tess.

Uppskot:

1. Løgtingið biður landsnevndina skaffa upplýsingar til vegar um teir spurningar, studentafelagið hevur sett fram.
2. Løgtingið úttalar, at tað er sinnað til at hækka játtanina til ungar Føroyingar, ið lesa, um tað verður tørvur til tess.

2. viðgerð 23. november. Samtykt 15—0.

19. Umsókn frá O. J. Strømsten.

Framlagt 15. november. (Loyvi 14–0). 1. viðgerð 17. november. Framlagt 18. november.

Álit.

Skipseigari Severin Strømsten og skipsreiðari O. J. Strømsten av Oyri hava við bønarbrævi tann 24. oktober 1944 vent sær til tingið, og siga frá at teir eiga skipini «Streymsteinur» og «Sandslúkur», men at teir av ymiskum umstøðum eru kommnir soleiðis fyri, at hóttað verður við at selja skipini.

Serliga verður víst til, at m/s. «Streymsteinur» lá við bryggjuna í Sørvági í døgunum frá 28. september 1943 til 15. oktober 1943, men varð so frákoyrdur og harav sigst nógv óhapp at vera voldað. Umsøkjararnir meina at hava krav móti Bretum fyri øll óhappini, ið nú koma í meira enn eitt hálvt ár, og gera tað upp til kr. 69.035,—, og síðani halda teir fram at teir mugu krevja 10.000 kr. um mánaðin aftrat líka til Bretar geva teimum søndir. Teir heita nú á tingið um at greiða Bretum frá, at hesir hava alla skuldina og mugu gjalda, og síðani biðja teir um hjálp beinanvegin, soleiðis at teir kunnu halda fram í teirra vanliga erliga arbeiði.

Málið er víst til viðgerðar í ymsamálanevndini og hevur umsøkjarin Strømstein greitt nevndarformanninum frá, at tað, hann ynskir, er, at tingið átekur sær ábyrgd fyri eitt bankalán, til hann fær peningin frá Bretum. Nevndin skal viðmerkja, at tað ikki er upplýst, hví málið ikki langt síðani er avgjørt við bretsku myndigheitir, um so er at hesir vilja viðganga nakra ábyrgd; tað framgongur av skjølum, ið eru send til tingið, at umsøkjarin tann 3. mai, 26. juli og 27. august 1944 hevur skrivað til amtið, men eingki um hvat svar hann hevur fingið. Tað kann hava seinkað málið, at fyrsta brævið er skrivað 3. mai 1944, tó at sjóforkláring er upptikin tann 3. november 1943. Nevndin heldur ikki tað ber til hjá Føroya løgtingi at fara undir at geva ábyrgdarváttan fyri ein reiðara, tí hann er komin soleiðis fyri, at vandi er fyri, at skip hansara má seljast, tí tá vildi sjálvsagt hvør reiðari í Føroyum í komandi tíðum kunnað vent sær til tingið við líknandi umsókn, og tingið mátti hildið somu leið næstu ferð.

Nevndin skal tí mæla tinginum til at samtykkja hetta

uppskot:

Løgtingið samtykkir, at svarað verður skipseigara Severin Strømsten og skipsreiðara O. J. Strømsten, at spurningurin um teirra skip «Streymsteinur» og «Sandslúkur» má viðgerast á vanligan veg, uttan fyri tingið.

2. viðgerð 20. november. 3. viðgerð 24. november. Fall 1–0.

20. Skjalasavnið.

Framlagt 17. november.

Uppskot A.

Skjalavørði A. Degn hevur síðani 1. april 1941 fingið játtað eina dýrtíðarviðbót úr amtsgrunninum uppá 500 kr. árliga. Hetta er ikki samsvarandi tað, hann verunliga skuldi haft, av tí at hetta varð gjørt sum eitt bráðfengis skipan til samrøða kundi fara fram við statin, ið vanliga letur part av lønini.

Tað er nevndini kunnugt, at skjalavørði A. Degn kundi ynskt at fingið hetta broytt longu nú, og heldur nevndin, at tað er beint at koma hesum ynski á møti. Nevndin mælir tí tinginum til at samtykkja hetta

uppskot:

Løgtingið gevur landsnevndini heimild til at broyta dýrtíðarviðbótina til skjalavørða A. Degn, samsvarandi dýrtíðarviðbótini fyri aðrar lønir, aftaná at samráðingar hava farið fram við skjalavørðan.

Uppskot B.

Fíggjarnevndin hevur havt til umhugsunar at seta ein ungan mann sum hjálparmann á skjalasavninum fyri, at hann á tann hátt kann gerast kunnigur við arbeiðið og førur fyri seinri, um heitt verður á hann, at taka við hesum starvi í framtíðini.

Fíggjarnevndin setur so statt fram hetta

uppskot:

Settur verður ein hjálparmaður á skjalasavninum.

Landsnevndin fær heimild til at seta ein slíkan mann og áseta hóskandi løn.

2. viðgerð 20. november. 3. viðgerð 24. november. Samtykt 24—0.

21. Studningur til eykapolitistar í Havn.

Framlagt 20. november. 1. viðgerð 21. november. Framlagt 23. november.

Álit

(Dam og Poulsen við fyrivarni):

Tórshavnar býráð søkir við skrivi tann 18. november 1944 tingið um studning til løn til 6 eyka-politistar í Havn at rokna frá tí degi, tann 15. september 1941, tá teir, vegna heimsbardagan vóru settir.

Sagt verður frá, at býráðið í 1941 eftir uppskoti frá lútanum og amtmanninum samtykti at seta 6 eyka-politistar aftrat teimum trimum, ið tá vóru, og skuldi hetta standa við, til kriggið er uppathildið.

Útreiðslur til hesar politistar hava frá 15. september 1941 til 1. januar 1945 verið:

løningar	kr. 103.050,–
mundering	„ 5.521,–
Tilsamans	kr. 108.571,–

Málið er beint til fíggjarnevndina, og skal nevndin vísa á, at tingið, tá umsókn er innkomin innan politisturin er settur, fyri bygdir í Vágum, Nes, Fuglafjørð og Klakksvík hevur samtykt, at tingið letur helvtina av lønútreiðslunum upp til eina løn uppá 3.600 kr. uppá mannin árliga, meðan sóknarstýrini lata helvtina av lønini og allan peningin til klæðir.

Serliga skal nevndin vísa á, at Klakksvíkar kommuna í sini umsókn í hesi tingsetu, søkir um hetta gjald fyri ein politist, teir ætla at seta í staðin fyri tann eyka-politistin kommunan hevur haft tey seinastu tvey árini. Henda kommuna hevur ikki søkt um at fáa endurgoldið frá tinginum nakað av tí løn teir einsamallir hava latið til eyka-polistin gjøgnum tvey ár, og tingið hevur eisini tikið ta støðu, at tað einans er játtað helvtin av lønini, upp til 1800 kr. árliga fyri framtíðina, og ikki játtað nakað av tí, kommunan frammanundan hevur útgoldið.

Nevndin kann so statt ikki mæla til, at nakað av tí peningi, Havnar kommuna hevur útgoldið aftaná játtanina av býráðnum, verður goldin av tinginum.

Um Havnar kommuna heldur tað verða beint at søkja tingið um studning svarandi til tann, ið er latin til aðrar kommunur, tað vil siga 900 kr. um mánaðan til allar 6 politistarnar, so eigur tað at verða sent tinginum upplýsing um reglugerðina og treytirnar, ið kommunan hevur fyri setan av hesum 6 politistunum. Hetta vil tað ikki verða stundir til at taka støðu til í hesi tingsetu, tí umsóknin er komin inn so seint, men ein tílík umsókn eigur at verða tikin til viðgerðar í næstu tingsetu, tó so at tað sjálvandi frá tinginum eigur at ásannast, at umsókn um hettar er komin til tingið í november 1944, soleiðis at ein nýskipan – um tingið játtar hana – eigur at verða galdandi frá 1. december 1944.

Uppskot:

Tórshavnar býráð verður gjørt kunnugt við tað í álitinum framførda; annars verður málið at goyma til næstu vanligu tingsetu.

2. viðgerð 28. november. Samtykt 15–0.

---

22. Vitskapligt arbeiði viðv. fuglum.

Framl. 20. november. 1. viðgerð 21. november. Framl. 23. november.

Álit.

Niels Petersen, Nólsoy, hevur tann 16. november 1944 sent tinginum umsókn um studning, 3000 kr., til eitt vitskapligt arbeiði um føroyskar fuglar.

Umsøkjarin greiðir frá, at ætlan hansara er at arbeiða uppá eitt vísindaligt savn, ið skal verða knýtt til «Føroya djórasavn», og skal vísa fuglin í teim ymisku búnaðum frá tí ungin kemur úr egginum til hann er fullvaksin. Síðani hevur umsøkjarin í gerð eina bók um bú-, strok- og ferðafuglar í Føroyum og onnur uttanlanda fuglasløg, sum koma vitjandi higar.

Umsøkjarin sigur eisini frá, at hann hevur arbeitt saman við pápa sínum við fuglum, og eftir deyða pápans hevur hann hildið fram við tílíkum arbeiði, og eisini í 16 ár arbeitt við rannsóknum av føroyskum svampum (hundaland), og hevur funnið 50 sløg av hundalandi, ið ikki eru kend fyrr her hjá okkum.

Fíggjarnevndin hevur fingið málið til viðgerðar og skal úttala, at tað er áhugavert at vita, at maður her á landi hevur tikið hetta arbeiði upp, líkasum øll mugu verða samd um, at landið skyldar hesum manni tøkk, og at stuðul verður honum veittur.

Umsóknin er komin so seint til tingið, at tað ikki í hesi tingsetuni kann takast støða til hvat samsýning landið eigur at geva umsøkjaranum fyri starv hansara. Eisini má viðmerkjast at fíggjarnevndin, áðrenn støða verður tikin, helst skuldi fingið nakrar upplýsingar um, á hvønn hátt hann ætlar at fáa útgávu í lag.

Tað verður í umsóknini viðmerkt, at djórasavnið á bókasavninum sjálvandi verður landsins ogn, menn fíggjarnevndin heldur tað er beinast, at tingið fær kunnleika um, hvussu skipan fyri hesum savni er løgd til rættis bæði fíggjarliga og stjórnarliga.

Fíggjarnevndin skal so statt mæla til, at málið steðgar til næstu vanligu tingsetu.

Uppskot:

Málið verður goymt til næsta ár.

2. viðgerð 28. november. Samtykt 13–0.

---

23. Uppskrivan av staðarnøvnum.

24. november framlagt.

Álit

(K. Djurhuus við fyrivarni):

Í skrivi 1. november hevur millumtinganevndin smb. tingmál nr. XIII–7/1943 latið inn frágreiðslu frá starvinum.

Nevndin sigur í nevndu frágreiðslu, at tað arbeiði, ið farið er undir, er so stórt, at mælt verður til, at nevndini verður givið arbeiðslikindi fyri fyrst í 4 ár.

Um áramótið 1943–44 hevði telefonverkið 99 listaførandi støðir við tað, at ein, Saltnes, var komin aftrat og ein, Ánirnar, var fallin burtur. Av ikki listaførandi støðum vóru 4 (Gjógvin, Hattarvík, Skælingur, Syðradalur S), og umframt vóru 3 samtalustøðir (Kaldbaksbotnur, Nesvík, Kolbeinagjógv). Av støðum, sum bert vóru radiostøðir, vóru við árs enda 5 (Fugloy, Nólsoy, Skúvoy, Hestur, Koltur). Umframt er radiostød á Viðareiði, í Tórshavn, í Skopun og á Sandi, harumframt Dímun, sum er at rokna sum telefonfelagi av Sandi. Telefonstøðin í Tórshavn hevur eisini radiosamband við vitarnar á Mikineshólmi og á Borðuni, sum eisini verða roknaðir fyri telefonstøðir (í Mykinesi tó sjálv bygdin gjøgnum linju).

Við árs enda høvdu fylgjandi telefonstøðir telefonfelagar, sum viðmerkt í tølum aftaná:

Argir	2	Kvívík	8	Skálavík	3
Árnafjørður	1	Lambi	1	Skáli	7
Bøur	2	Leynar	1	Skopun	3
Eiði	7	Lorvík	4	Strendur	19
Elduvík	1	Miðvágur	15	Streymnes	2
Fámjin	1	Nes	2	Stykkið	1
Froðbøur	1	Norðdepil	1	Sund	1
Fuglafjørður	24	Norðradalur	3	Sunnbøur	3
Funningsbotnur	1	Norðragøta	3	Svínoy	4
Funningur	1	Norðskáli	2	Syðradalur	1
Gjógv	2	Oyndarfjørður	2	Syðrugøta	13
Haldórsvík	5	Oyrareingir	3	Søldarfjørður	3
Hósvík	2	Oyri	4	Sørvágur	17
Hov	2	Porkeri	3	Todnes	4
Húsavík	1	Rituvík	2	Toftir	13
Hvalbøur	8	Saksun	1	Tórshavn	486
Hvalvík	5	Saltangará	11	Tvøroyri	91
Hvannasund	2	Sandavágur	10	Vágur	66
Kaldbak	2	Sandur	13	Velbastaður	1
Kirkjubøur	4	Selatrað	4	Vestmanna	32
Klakksvík	125	Signabøur	1	Viðareiði	6

Við árs byrjan vóru 987 telefonfelagar við 1185 apparatum og við árs enda 1069 felagar við 1270 apparatum, 94 telefonfelagar vóru komnir aftrat og 12 fráfarnir (militerið).

Longdin av telefonlinjum var:

Linjur millum bygda:	628	km	tvíleiðara landlinjur
	128,5	—	einleiðara —
	33,2	—	tvíleiðara sjókaðal
	12,3	—	einleiðara —
Innanbýggja linjur:	235	—	tvíleiðara luftlinjur
	312	—	— jarðkaðal.

V. Raksturin.

Inntøkan av telefonfelagagjaldi hevur verið kr. 102.865,35 móti kr. 79.124,25. Tað er ein framgongd uppá kr. 23.741,10 móti eini framgongd uppá kr. 2.897,25 frá 1941 til 1942. Hetta er fyri stóran part orsakað av taksthækkan.

Tað eru førdar 348.078 gjaldsamtalur móti 336.678 í 1942. Tað er ein framgongd uppá 11.400.

Inntøkan av samtalum hevur verið kr. 194.112,90 móti kr. 192.605,40 í 1942 ella ein framgongd uppá kr. 1.507,50 móti eini framgongd uppá kr. 40.146,40 frá 1941 til 1942. Meðalinntøkan av hvørji samtalu hevur verið o. u. 55,7 oyru móti 57,2 oyru í 1942.

Í árinum 1943 eru send 30921 telefontelegramm móti 23605 í 1942. Tað er ein framgongd uppá 7316.

Inntøkan av telefontelegrammum var kr. 48.880,35 móti 36.300,18 í 1942. Tað er ein framgongd uppá kr. 12.580,17. Meðalinntøkan av hvørjum telegrammi var 158 oyru móti 153,3 oyru í 1942.

Inntøkan av boðum var kr. 27.526,11 móti kr. 24.803,23 í 1942.

Inntøkan av eykagjaldi var kr. 19.954,60 móti kr. 19.095,52 í 1942.

Frá viðmerkingum til listarnar í 1942 kom inntøkan kr. 30,75.

Inntøkan av telegrammum var kr. 11.020,72 móti kr. 8.952,44 í 1942. Tað er ein framgongd uppá kr. 2,068,28 frá 1942.

Ymsar inntøkur vóru kr. 25.660,05 móti kr. 28.996,35 í 1942. Tað er ein afturgongd uppá kr. 3.336,30.

Øll ársinntøkan í 1943 er *kr. 430.050,83* móti kr. 389.985,12 í 1942.

Útreiðslurnar í 1943 eru:

Rakstrarútreiðslur (stjórnarútreiðslur, rakstur støðanna, umvøling, ymsar útreiðslur og ótøkar eftirstøður)	kr. 388.171,49
Nýbygging	— 17.305,69
	kr. 405.477,18

Ársúrslitið vísir soleiðis eina framgongd í verksins peningaognum av kr. 24,573,65. Saman við nýbyggingarútreiðslunum vísir hetta talið kr. 41.879,34.

Tað er at viðmerkja, at tilfarskeypið í 1943 hevur verið lítið og einki burtursæð frá keypi av einum vekslaraborði til Tórshavnar, fært undir nýbygging. Verkið stendur fyri stórum innkeypum og nýbyggingum, so skjótt sum viðurskiftini loyva tað. Til alt hetta átti verkið at hava lagt pening niður undir krígnum, men tað hevur tað ikki kunna gjørt vegna ov lágar takstir og vaksandi útreiðslur við prístalinum.

Væl vísa útreiðslurnar í 1943 seg at vera kr. 91.015,72 minni enn í 1942, men í 1942 varð keypt fyri 120.000,00 kr. í sjókaðali.

Inntøkurnar í 1943 eru kr. 40.065,71 hægri enn í 1942, og er so at siga øll orsøkin til hetta at finna í hækkan av telefonfelagatakstunum.

Louis Zachariasen.

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókhandils

Landsnevndarmál.

Millum tingsetuna 1943 og tingsetuna 1944 hevur landsnevndin hildið 36 fundar og viðgjørt og tikið avgerð í málum, har nevndin hevur verið heimilað at taka avgerð, samsvarandi almennum ella serstøkum løgtingssamtyktum. Harumframt hevur nevndin tikið avgerð í øðrum málum, sum hon hevur hildið hastandi ella neyðug at taka avgerð í.

Her skal verða givið yvirlit yvir tey týdningarmiklastu mál, sum landsnevndin hevur viðgjørt.

I. *Viðvíkjandi peningi, sum tingið hevur heimilað nevndini at ráða yvir.*

Studningur til bygdanæmingar í millum- og realskúlum 5000 kr., til bygdanæmingar á studenta- og preliminerskeiðinum 5000 kr., til handilsskúlanæmingar 2400 kr., til búnaðarlæru í Íslandi 500 kr. og til lærlingar 2000 kr.

Løgtingið veitti 50.000 kr. til fimleikagrunnin. Harav hevur landsnevndin sett 40.000 kr. til studningar til fimleikahøllir og 10.000 kr. til leikvøllir. Av teim 40.000 kr. til fimleikahøllir hevur Froðbiar kommuna fingið tilsagn um 8000 kr. (20 % av 40.000 kr.)

Kommunulæknin í Miðvági fekk 1500 kr. fyri arbeiði við lasarettini í Vágum.

Lendingin í Sandvík varð ætlað at kosta 66.000 kr., men hevur kostað 126.000 kr. Nevndin samtykti at játta 10.000 kr. eyka av teimum 30.000 kr., sum árliga eru roknaðar sum uppiskoyti til 10-ára havnajáttanina.

Av eykajáttanini fyri 1944 til vegir upp til 50.000 kr. hevur nevndin játtað Kaldbaks kommunu 2500 kr., Húsavíkar kommunu 3000 kr., Fiði 10.000 kr., Haldarsvík 700 kr. og Havnar uttanbýggja kommunu 756 kr. 33 oyr.

Játtað er til lending í Rituvík 4599 kr. 72 oyr., 2000 kr. til báta-spæl í Rituvík og 26.875 kr. til áskot av skervum á kolaveg í Trongisvágsdali fyri at fáa meiri kol fram (50 % av útreiðslunum).

Til socialhjálp eru nýttar tær játtaðu 100.000 kr. og nakað meiri.

Til fremjan av kolaframleiðslu í Trongisvági er goldið propsrokningar £ 748, til 2 nýggj kolhol 30.000 kr, umframt loypandi útreiðslur til hesi hol eru ein mánaða til 18/9, ætlað 10.000 kr., leigugjald til p/f Føroya kol 6897 kr. 60 oyr., licencegjald kr. 538,50, til stoypan av betonpelum 5000 kr., propshøggan (av gomlum skipsvrakum) 5000 kr., til fritið við

løn til arbeiðararnar kr. 12586,50, og rest barakkirnar 3000 kr. Verkfrøðingurin er heimilaður at innkeypa tól o. tl. fyri um £ 3300 umframt 2 luftkompressarar. Til steinspreingjan í kolabrotinum í Kvalbø er goldið 4550 kr., fyrr goldið 5450 kr., ialt 10.000 kr.

Sum skaðabøtur er játtað kr. 7003,16 brimskaða á lending í Fámjin, 2000 kr. til einkju í Hósvík stormskaða á hús og 11394 kr. fyri skaða á vegum í Fámjin av ovtungari bil.

Felagið «Glæman» fekk lán 5000 kr. til saltan av sild (døgurðamatur).

Samtykki varð givið at nýta um 9500 kr. til nýtt tak á Tvøroyrar kirkju.

Eftirstøður av matrikulskatti í Norðoya sýslu er eftirgivið kr. 1382,39. Til grunnar er av avlopinum av amtsgrunninum 1943: Til vinnulánsgrunnin 200.000 kr., sociala grunnin 200.000 kr., ábyrgdagrunnin 55.000 kr. og tiltaksgrunnin 130.000 kr.

II. *Hastandi mál o. t.*

A. Kunngerðir.

Dýrtíðarviðbót til dagpengar frá Føroya vanlukkutrygging (kunngerð 5/5—1944), útflýggjan av sólberpurð (kunngerð 27/3—1944), dýrtíðarviðbót til tænastumenn og onnur (kunngerð 29/4—1944), dupult summartíð (kunngerð 29/4—1944) og friðan av havhestaungum (kunngerð 11/7—1944).

B. Kommunal mál.

Tingsins vegna hevur nevndin givið loyvi til og tikið ábyrgd fyri hesum lánum: Oyndafjarðar kommuna 10.000 kr. til Fjarðarvegin, Sandavágs kommuna 60.000 kr. til havn, Svínoyar 10.000 kr. (lending), Mikines 10.000 kr. (lending), Kunoy 8000 kr. (lending), Froðbiar kommuna 141.000 kr. til avloysan av láni frá Kreditforeningen af Kommuner i Danmark (elektricitetsverkið), Hvalbiar kommuna 28.000 kr. (arbeiðsløn restandi lending í Sandvík), Miðvág 25.000 kr. (havnin), Sjóar kommuna 60.000 kr. (havn) og Hest 10.000 kr. (lending). Størsti parturin av hesum lánum verður afturgoldin við løgtingsstudningum.

Loyvi varð givið Fámjins kommunu til lán 4000 kr. til umvølan av vegum. Góðkent varð at Trongisvág havn av avlopi frá Ísvirkinum setti 34.000 kr. sum partapening í felag, ið keypti eitt fiskiskip.

Nevndin góðkendi fylgjandi skattaálikningar, sum eru hægri enn lógfest uttan tingsins loyvi:

		Skatta-procent:	Álíknað:	Kundu ikki uttan loyvi álíkna meiri enn:
Fugloyar	kommuna	4	10,442,00 kr.	6.750,00 kr.
Viðoyar	—	5,5	32.751,00 »	26.705,00 »
Klakksvíkar	—	8,5	354.151,00 »	230.627,00 »
Mikladals	—	5	7,393,00 »	5.025,00 »
Húsa	—	5	8.912,00 »	8.135,00 »
Sjóar*)	—	7	92,342,00 »	57.382,00 »
Eiðis	—	9	44.808,00 »	30.728,00 »
Funnings	—	5,5	15.911,00 »	15.419,00 »
Oyndafjarðar	—	7	22.000,00 »	20,570,00 »
Fuglafjarðar	—	8,5	135.811,00 »	70.761,00 »
Nes	—	7,5	166.383,00 »	84.866,00 »
Lorvíkar	—	8	48.331,00 »	29.209,00 »
Gøtu	—	9	71,536,00 »	51,475,00 »
Haldórsvíkar	—	4	15,869,20 »	14,609,00 »

*) Seinri hækkað til 8 pct.

	Skatta-procent:	Alíknað:	Kundu ikki uttan loyvi álíkna meiri enn:
Hvalvíkar kommuna.....	6	17.496,00 kr.	16,411,00 kr.
Kaldbak —	3,75	5.493,00 »	2.759,00 »
Havnar uttanb. —	4	23.312,00 »	13,696,00 »
Hest —	3,5	4.000,00 »	3.500,00 »
Nólsoy —	6	13.126,00 »	11.141,00 »
Sandavágs*) —	7	57,416,00 »	32.021,00 »
Sørvágs —	5	60.945,00 »	43.685,00 »
Miðvágs —	6	42.253,00 »	41,541,00 »
Biggjar —	2,5	3.050,00 »	2.975,00 »
Sands —	8	46.000,00 »	41.409,00 »
Skálavíkar —	7,3	19.550,00 »	13.644,00 »
Húsavíkar —	8	14.507,00 »	11.282,00 »
Skopunar —	5	21.372,00 »	18.312,00 »
Hovs —	5	11.578,00 »	10.132,00 »
Sunnbøar —	9	42.300,00 »	23,976,00 »
Fámjins —	5,5	14.332,00 »	8.917,00 »
Porkeris —	8	36.270,00 »	20.443,00 »
Vágs —	8	220.545,00 »	140.802,00 »
Hvalbiar —	8	81.355,00 »	42.929,00 »
Froðbiar —	9,5	284,915,00 »	248.479,00 »

C. Onnur mál.

Amtsgrunnurin hevur yvirtikið 15.000 kr. av láni, sum p/f. Fiskavirki, Gøtu, hevði í Danmarks Fiskeribank.

Føroyskt mál er vorðið prógvfak í navigatiónsskúlanum við karakteri, sum telir við, og hartil verður kravt eins nógv og til danskt mál sum minsta krav.

Spurningurin um endurnýggjan av skipaflotanum hevur verið til viðgerðar á nógvum fundum. Málið verður framlagt sum serstakt løgtingsmál.

Málið um umboðsmenn til Bretlands og Íslands hevði eisini viðgerð á mongum fundum. Serstak frágreiðing verður givin um hetta mál.

Gjøgnum amtmannin kom uppskot frá bretska konsulinum um metingarnevnd viðvíkjandi endurgjaldi frá bretum fyri nýtslu av fastari ogn undir hersetanini (konsulin og 1 breti og 2 føroyingar útpeikaðir av amtmanninum og amtmaðurin uppmaður). Uppskotið varð samtykt.

Semja er eisini gjørd um møguliga yvirtakan av bretskum telefonkaðalum.

Bretska herdeildin hevur bygt sjúkrahús í Sandavági áfast við losjuna og tikið eini onnur hús. Teir hava boðið at lata sín part til hitt almenna í Føroyum, móti at verða fríhildnir fyri ábyrgd yvirfyri losjuni og hinum húseigaranum frá 1. mai. Um hetta mál verður annars vist til serstakt tingmál.

Viðvíkjandi bretska flogvøllinum í Vágum og tøku av lendinum verður vist til serstaka útskrift av gerðabókini um hetta mál.

Ymiskir spurningar viðv. «Smiril» hava verið til viðgerðar.

Landsnevndin samtykti at heimila verkfrøðingin og løgtingsskrivstovuna at ávísa studningar, játtaðar av tinginum til ymisk havnamál, upp til eitt árs studning av 10-áraætlanini fyri hvørt einstakt arbeiði útyvir tað loypandi árið.

Løgtingsskrivstovan, Tórshavn, 4. september 1944.

Edw. Mitens.

*) Seinri hækkað til 8 pct.

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókhandlis.

Beretning

til

Formanden for Færøernes Lagting

om

Færøernes offentlige Vareforsyning.

(Vedrørende Tiden 1. September 1943 til 31. August 1944).

I Henhold til § 9 i Reglement af 25. Oktober 1939 aflægges herved i Fortsættelsen af Beretninger af 4. Marts og 31. August 1940, 8. Juli 1941, 31. August 1942 og 31. August 1943 følgende Beretning om Færøernes offentlige Vareforsyning's Virksomhed i Tiden 1. September 1943 til 31. August 1944.

Vareforsyningen ledes fortsat af Direktør Knud Petersen i Forbindelse med et Personale bestaaende af en Inspektør, en Bogholder samt 7 mandlige og 3 kvindelige Kontorister.

Udvalget og Amtmanden har i den forløbne Tid afholdt en Række Møder til Drøftelse af opstaaende Spørgsmaal og har søgt at fremskaffe de til Færøernes Forbrug nødvendige Varer. En Fortegnelse pr. 15. August 1944 vedlægges over Vareforsyningens Lager af de vigtigste Nødvendighedsartikler. Paa Fortegnelsen er samtidig givet Oplysning om Købmændenes Beholdninger af samme Vare pr. samme Dato.

Afskrift af Vareforsyningens Regnskab for Finansaaret 1943/44 samt Status pr. 31. Marts 1944 vedlægges. Regnskab og Status er godkendt af Vareudvalget.

Midlerne til Vareforsyningens Drift er fortsat stillet til Raadighed af Lagtinget, dels gennem et Laan paa 1,5 Mill. Kroner, dels gennem yderligere Laan. Vareforsyningens samlede Gæld til Lagtinget var pr. 15. August 1944 1.650.000 Kr.

Med Hensyn til Vareforsyningens og Vareudvalgets Virksomhed er der iøvrigt særlig Grund til at fremhæve følgende:

Vareforsyningen har som tidligere importeret de Kvanta Foderstoffer og Kunstgødning, som kunde faas fra Storbritannien.

Udvalget var allerede før Nytaar 1944 opmærksom paa, at der maatte forventes Mangel paa Kartofler og forsøgte tidligt at faa Tilladelse til at købe indtil 1000 Tons Kartofler i Storbritannien. Udvalgets Ønske med Hensyn til Kartoffelkøb kunde ikke imødekommes fra britisk Side, og det saa længe ud, som om der, trods den udprægede Mangel paa Kar-

tofler paa Færøerne, ikke vilde blive tilført nogen fra Storbritannien. Omkring Midten af August 1944 blev dog endelig givet Tilladelse til Køb af 300 Tons, hvoraf 100 Tons allerede er modtaget af Vareforsyningen, medens Resten forventes indenfor de nærmeste faa Uger.

Et i Udvalget fremkommet Forslag om af faa stillet indtil 1 Mill. Dollars til Raadighed til Indkøb af Nødvendighedsvarer i U. S. A. og til Chartring af en Damper til at føre Varerne til Færøerne og at faa Rejsetilladelse for en Delegation til Storbritannien og U.S.A. for at arrangere et saadant Indkøb, har været forelagt de britiske Myndigheder, men er afvist af disse.

Vareforsyningen indførte ved Juletid et Parti Appelsiner, der blev fordelt mellem Børn og Mødre samt syge, og indfører stadig Solbærpurré (C-Vitamin) og kondenseret Mælk til Fordeling paa samme Maade.

Da Beholdningerne af Margarine og Raastoffer hertil har været noget bedre end tidligere, er der forsøgsvis stillet 18 Tons Margarine aarlig til Disposition for Bagerne.

Det i den seneste Beretning omtalte Spørgsmaal om Vareforsyningens Skattepligt har været forhandlet med Thorshavn Byraad, der imidtid fornylig har meddelt, at Byraadet maa fastholde, at Vareforsyningen skal betale Skat til Kommunen.

Vareforsyningens Priser paa Sukker og Mel er bibeholdt uændrede, uanset at Indkøbspriserne i Storbritannien er gaaet en Del op.

Thorshavn, den 31. August 1944.

Paa Vareudvalgets og Amtet Vegne:

Hilbert.

RAKSTRARROKNSKAPUR

Vørukeyp (viðroknað vørur í goymslu 1/4—1943 kr. 1.210.372,04)		kr. 5.924.382,89
Munur		» 564.231,39
		kr. 6.488.614,28

Útreiðslur:

Vørugoymsla:		
Saltleiga	kr. 30.791,37	
Kolleiga	» 912,00	
Ymisk leiga	» 25.593,96	
Arbeiðslønir	» 81.153,06	
Trygging	» 3.960,00	
Flyting	» 13.904,00	
Ymiskt	» 5.150,52	
		kr. 161.464,91
Skrivstova:		
Lønir	» 75.020,33	
Porto	» 6.071,62	
Telefon og telegram	» 4.744,38	
Amboð	» 5.210,60	
Lýsingar	» 569,40	
Leiga	» 2.100,00	
Revisjón	» 2.119,75	
Ljós, hiti og reinhald	» 2.760,47	
Sakføraraútreiðslur	» 1.218,00	
Ymiskt	» 2.144,60	
		» 101.959,15
Rentuútreiðslur		» 59.021,16
Avskrivað skuldarum		» 21.782,73
Avskrivað bilum		» 10.031,02
Avskrivað innbúgvi		» 2.500,00
Avskrivað kolskúri		» 600,00
Flutt til delkrederekonto		» 30.000,00
Nettovinning		» 211.307,42
		kr. 598.666,39

1. aprí 1943 til 31. mars 1944.

Vørusøla	kr. 5.250.079,42
Vørur í goymslu 31/3—44	» 1.238.534,86
	kr. 6.488.614,28

Bruttovinning	kr. 564.231,39
Rentuinntøkur	» 23.758,26
Bilkonto	» 10.676,74
	kr. 598.666,39

FÍGGJARSTANDUR 31. MARS 1944

Ogn:

Kassapeningur	kr.	7.602,03
Tilgóðar í bankum	»	191.813,02
Vekslar	»	3.088,19
Skuldarar innanlands	»	874.159,99
Skuldarar uttanlands	»	49.685,60
Vørur í goymslu	»	1.238.534,86
Innbúgv	»	680,00
Bilar	»	10.000,00
Kolskúr	»	100,00
	kr.	2.375.663,69

Skuld:

Obligasjónslán			kr.	1.500.000,00
Amtsgrunnurin			»	150.000,00
Delkrederekonto			»	100.000,00
Ognarar innanlands			»	116.493,46
Ognarar uttanlands			»	89.704,05
Eginogn 1/4—1943	kr.	208.158,76		
plus yvirskot av árinum	»	211.307,42		
			kr.	419.466,18
			kr.	2.375.663,69

Varebeholdninger pr. 15. August 1944.

	Købmændenes Beholdninger:	Vareforsyningens Beholdninger:	Ialt:
Korn	225 kg	5706 kg	5931 kg
Rugmel	20.194 »	54.054 »	74.248 »
Hvedemel	26.409 »	751.994 »	778,403 »
Andet Mel	67.196 »		67.196 »
Al Slags Gryn	15.203 »		15.203 »
Al Slags Brød	3.660 »		3.660 »
Sukker	18.813 »	156.515 »	175.328 »
Kaffe	8.058 »	6.842 »	14.900 »
The	2.180 »	2.161 »	4.341 »
Cacao	5.804 »	87 »	5.891 »
Kul og Koks	997.413 »	50.000 »	1.047.413 »
Benzin	267.337 l		267.337 l
Petroleum	499.748 »		499.748 »
Solarolie	801.428 »		801.428 »
Blød Sæbe	26.174 kg		26.174 kg
Fast Sæbe	10.785 »		10.785 »

Færø Amt, den 1. September 1944.

Hilbert.

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókahandils.

Til

Føroya Løgting.

Løgtingsskrivstovan ger hvørt ár uppskot til fíggjarætlanir fyri tingsins grunnar, og hevur tí til umhugsunar spurningin um inntøkur og útreiðslur tingsins.

Í kríggsárunum hevur spurningurin um beinleiðis skatt til tingið vegna kríggsviðurskiftini (stórar inntøkur og stórar útreiðslur) verið til viðgerðar, og lóg herum er givin hvørt ár eftir líknandi reglum, sum hava verið galdandi í øðrum norðanlondum.

Tingið samtykti í fjør at biðja landsnevndina gera uppskot til lóg um stempilgjald, og nevndin hevur biðið skrivstovuna fyrireika málið.

Undirskrivaði stjóri fyri løgtingsskrivstovuna hevur tí umhugsað allan spurningin um fíggjarviðurskifti Føroya og skrivað fyribils frágreiðing, sum ætlandi kann verða til nyttu við tær tingingar og umhugsanir, sum allir flokkar í Føroyum hava úttalað mugu og skulu fara fram aftaná heimsbardagan, og sum nú eiga at verða fyrireikaðar.

Undan veraldarbardaganum vóru inntøkurnar hjá tinginum beinleiðis skattur, tollur og álíknan á kommunurnar og einstakar aðrar smærri inntøkur. Undir bardaganum eru galdandi tollsatsir hækkaðir nakað og beinleiðis skattur kravdur eftir meiri stigandi skala og hevur givið eftir okkara viðurskiftum stórar inntøkur.

Hvussu eigur at verða skipað, tá kríggið vónandi um ikki langa tíð er at enda, er ein høvuðsspurningur hjá tinginum at umhugsa. Neyvan nakar vil mæla til at fara aftur til inntøkulógirnar, sum tær vóru undan krígnum, so tí má óivað koma til viðgerðar spurningurin um revisión ella broytan av skattalógum og lógum um almennar inntøkur og útreiðslur yvirhøvur.

Her verður sett upp yvirlit yvir galdandi føroyska lóggávu og lóggávuna í nøkrum øðrum norðanlondum til vegleiðing til viðgerð av spurninginum um, hvat er neyðugt og beint at broyta í okkara lóggávu og okkara skipan, og yvirlit yvir útreiðslurnar við almenna húsarhaldið.

Fíggjarviðurskifti Føroya.

I. Almennar Inntøkur.

A. Beinleiðis skattur og ognarskattur.

Føroysk lóggáva.

Upprunaliga varð skattur til Løgtingið serstakliga álíknaður jørðina.

Lóg 6. februar 1880 ásetir, at tann peningur, ið amtsgrunnurin skal nýta, verður líknaður á ta matrikuleraðu jørðina, tó at upp til 1/3 av tí, ið árliga skal verða álíknað, kann líknast á kommunurnar.

Lóg 27. mars 1903 broytti hetta so, at skatturin verður líknaður á jørðina og kommunurnar, minnst 1/3 og mest 2/3 á kommunurnar.

Lóg 5. mars 1909 ásetir, at forlods verður árliga álíknað á jørðina 1,50 kr. á hvørja skattamørk; restin verður at líkna á kommunurnar, innan til líknað er 4/5 av øllum skattinum. Av tí, sum harumframt er neyðugt at líkna, verður 1/5 lagdur á jørðina og 4/5 á kommunurnar.

Við lóg 5. mars 1920 varð skatturin á jørðina settur til 2 kr. fyri hvørja skattamørk, og restin skuldi verða líknað á kommunurnar við helvtini eftir fólkatalinum og helvtini eftir tingsins ætli.

Lóg 12. mars 1923 ásetir, at skatturin skal vera 2 kr. fyri hvørja skattamørk, og rest verður líknað á kommunurnar, soleiðis at 3/4 verða líknaðir samsvarandi støddina av skattainntøkunum í hvørjari kommunu fyri árið sum fór og helvtina eftir tingsins ætli.

Her skulu verða nevnd nøkur dømir fyri, hvat løgtingið hevur líknað á kommunurnar til amtsgrunnin: 1880: 1878 kr. 98 oyr., 1890: 1878 kr. 98 oyr., 1905: 7200 kr., 1915: 18000 kr., 1920: 76.657 kr. 32 oyr., 1925: 116.000 kr., 1930: 103.102 kr. 94 oyr., 1935: 115.000 kr., 1940: 100.000 kr. og 1944: 70.000 kr.

Inntøkurnar hjá løgtinginum vístu seg at vera ov smáar, samsvarandi tey krøv, sum komu um studning.

Í 1918 varð sett fram uppskot á tingi um beinleiðis løgtingsskatt. Tingingar fóru fram við ríkisstýrið um Føroya almennu fíggjarviðurskifti, og sum lið í semju um ymiskar tílíkar spurningar kom lóg 30. mars 1935 um beinleiðis skatt til løgtingið. Hvør, sum hevur skyldu at rinda kommunuskatt, skuldi eisini rinda skatt til amtsgrunnin, um hansara skattainntøka var 2.000 kr. ella meiri. Við skattainntøku verður skilt áset skattaskyldug inntøka við teim í skattalógini § 11 heimilaðu frádráttum, men uttan hækkan ella lækkan eftir skattalógini § 15.

Skatturin varð at rinda eftir fylgjandi skala:

Um skattainntøkan var 2.000 kr., verður at rinda 15 kr.

yvir	2.000	kr.,	men	ikki	yvir	2.500	—	15	kr.	av	2.000	og	1 %	av rest
—	2.500	»	—	—	—	3.000	—	20	»	»	2.500	»	2 %	» —
—	3.000	»	—	—	—	4.000	—	30	»	»	3.000	»	2 %	» —
—	4.000	»	—	—	—	5.000	—	50	»	»	4.000	»	2½ %	» —
—	5.000	»	—	—	—	6.000	—	75	»	»	5.000	»	2½ %	» —
—	6.000	»	—	—	—	8.000	—	100	»	»	6.000	»	2¾ %	» —
—	8.000	»	—	—	—	10.000	—	155	»	»	8.000	»	3 %	» —
—	10.000	»	og haryvir					215	»	»	10.000	»	3 %	» —

Lógin var galdandi inntil endan av skattaárinum 1939. Hon var ætlað at geva 60.000 kr. árliga.

Í 1935	gav skatturin	60.821 kr.	16 oyr.
Í 1936	— —	51.165 kr.	64 oyr.
Í 1937	— —	41.258 kr.	08 oyr.
Í 1938	— —	48.433 kr.	61 oyr.
Í 1939	— —	48.918 kr.	07 oyr.

15. mai 1939 kom nýggj lóg um beinleiðis skatt til løgtingið.

Har var markið lækkað niðureftir til 500 kr. fyri skattaskyldug og procentini hækkaði uppeftir.

Er skattainntøkan 500 kr., verður rindað 2 kr.

Er inntøkan yvir

500,	men	ikki	yvir	1.000,	rindast	2 kr.	av	500	og	1%	av rest
1.000,	—	—	—	2.000,	—	7 »	»	1.000	»	2%	» —
2.000,	—	—	—	3.000,	—	27 »	»	2.000	»	3%	» —
3.000,	—	—	—	4.000,	—	57 »	»	3.000	»	3½%	» —
4.000,	—	—	—	5.000,	—	92 »	»	4.000	»	4%	» —
5.000,	—	—	—	6,000,	—	132 »	»	5.000	»	4½%	» —
6.000,	—	—	—	7.000,	—	177 »	»	6.000	»	5%	» —
7.000,	—	—	—	8.000,	—	227 »	»	7.000	»	5½%	» —
8.000,	—	—	—	10.000,	—	282 »	»	8.000	»	6½%	» —
10.000,	—	—	—	15.000,	—	412 »	»	10.000	»	7½%	» —
15.000,	—	—	—	20.000,	—	787 »	»	15.000	»	9½%	» —
20.000,	—	—	—	30.000,	—	1.262 »	»	20.000	»	11%	» —
30.000,	—	—	—	40.000,	—	2.362 »	»	30.000	»	12%	» —
40.000,	—	—	—	50.000,	—	3.562 »	»	40.000	»	13½%	» —
50.000,	—	—	—	75.000,	—	4.912 »	»	50.000	»	15½%	» —
75.000,	—	—	—	100.000,	—	8.787 »	»	75.000	»	17½%	» —
100.000	og	haryvir			—	13.162 »	»	100.000	»	20%	» —

Løgtingið kundi hækka ella lækka skattin, sum brúk var fyri peningi, tó ikki yvir 10%. Løgtingið skuldi ansa, at kommunuskatturin verður lækkaður, svarandi til lækkan av útreiðslum hjá kommununum, samsvarandi finanssemju fyri Føroyar av 3. september 1938. Amtsfondsálíkningin skuldi ikki uttan samtykt frá ríkisstýrinum vera yvir 100.000 kr. árliga, og ætlanin var at lækka hesa álíkning mest møguligt. Lógin skuldi leggjast fyri ríkisdagin til revisión í 1942—43.

Skatturin varð ætlaður at geva 150—200.000 kr. árliga. Hann gav í 1940 232.538 kr. 20. oyr.

Kriggsviðurskiftini gjørdu tað neyðugt at fáa til vegar størri inntøkur til tingið, og við kunngerð 19. december 1940 varð serstøk skipan gjørd fyri 1941, og líknandi kunngerðir hava verið samtyktar fyri 1942, 1943 og 1944, hareftir verða rindaðar av skattainntøku 1.000 kr. 5 kr., og skatturin er so vaksandi, soleiðis at tað til dømis verður rindað, har inntøkan er yvir 40.000 kr., men ikki yvir 50.000 kr. 5.510 kr. av 40.000 kr. og 28% av restini, og har inntøkan er 100.000 kr. og ikki yvir 200.000 kr. 26.310 kr. av 100.000 kr. og 40% av restini og 400.000 kr. og meira 148.310 kr. av 400.000 kr. og 45% av restini.

Hesar skattalógir góvu	í 1941	1.181.305,67 kr.
	í 1942	2.993.875,67 kr.
	í 1943	2.631.163,79 kr.
	í 1944	2.424.603,29 kr.

Donsk lóggáva.

Lóg nr. 104, 15/5 1903, ásetir inntøkuskatt til ríkiskassan. Sum dømir skulu verða nevnd:

Av inntøkum undir 2.000 kr.	1,3	pct.
— — 6.000—8.000 kr.	1,7	pct.
— — 10.000—15.000 kr.	1,9	pct.
— — 40.000—50.000 kr.	2,3	pct.
— — 100.000 kr. og meira	2,5	pct.

Sum skattafritt varð frádrigið fyri Keypmannahavn 800 kr., keypstaðir 700 kr. og landkommunur 600 kr. og fyri hvørt barnið ávikavist 100 kr., 85 kr. og 70 kr. Í somu lóg varð settur í gildi formúguskattur 0,6 pro mille.

Lóg nr. 219, 30. sept. 1909 hækkaði skattin nakað. Dømir:

Inntøkur undir 2.000 kr.	1,3	pct.
— uppá 6.000—8.000 kr.	2,2	pct.
— — 10.000—15.000 kr.	2,6	pct.
— — 40.000—50.000 kr.	3,4	pct.
— — 100.000 kr. og haryvir	4	pct.

Formúguskatturin varð ásettur til:

Formúgur undir 15.000 kr.	0,6	‰
— uppá 15.000—30.000 kr.	0,8	‰
— — 30.000 kr. og meira	1	‰

Lóg nr. 144; 8. juni 1912 kom nýggj lóg um inntøkuskatt. Her verða nevnd dømir:

Av inntøkum undir 1.000 kr.	1,4	pct.
— — uppá 5.000—6.000 kr.	2	pct.
— — — 10.000—15.000 kr.	2,4	pct.
— — — 40.000—50.000 kr.	3	pct.
— — — 100.000—200.000 kr.	3,4	pct.
— — — 200.000 kr. og meira	3,5	pct.

Til rindan av verjuútreiðslum eftir lóg 30. sept. 1909, varð lagt aftrat teim nevndu procentum, sum dømir:

Av inntøkum uppá 3.000—4.000 kr.	0,3 pct.	ella ialt	2,1 pct.
— — — 5.000—6.000 kr.	0,4 pct.	ella ialt	2,4 pct.
— — — 10.000—15.000 kr.	0,7 pct.	ella ialt	3,1 pct.
— — — 40.000—50.000 kr.	1,1 pct.	ella ialt	4,1 pct.
— — — 100.000—200.000 kr.	1,5 pct.	ella ialt	4,9 pct.
— — — 200.000 ella meira	1,5 pct.	ella ialt	5 pct.

Formúguskattur varð ásettur við lógini 1912, til dømis av formúgum undir 15.000 kr. 0,65 ‰

Formúgur uppá 15.000—30.000 kr.	0,70	‰
— — 100.000—200.000 kr.	0,80	‰
— — 200.000 kr. og meira	0,85	‰

plus tillegg til verjuútreiðslur:

Av formúgum uppá 15.000—30.000 kr.	0,20 ‰	ella ialt	0,90 ‰
— — — 100.000—200.000 kr.	0,40 ‰	ella ialt	1,20 ‰
— — yvir 200.000 kr.	0,40 ‰	ella ialt	1,25 ‰

Frádrigið verður sum skattafritt í Keypmannahavn 800 kr., keypstøðum 700 kr. og landkommunum 600 kr.

Fyri hvørt barn 100 kr., fyri feløg 4 pct. av inngoldnum partapeningi.

Lóg nr 128 av 10. mai 1915 hækkaði inntøkuskattin nakað. Sum dømir skulu verða nevnd:

Av inntøkum undir 1.000 kr. var skatturin	1,4	pct.
— — uppá 5.000—6000 kr. —	2,4	pct.
— — — 10.000—15.000 kr. —	3,3	pct.
— — — 40.000—50.000 kr. —	5	pct.
— — — 100.000 kr. og meira —	6	pct.

Formúguskattur:

Dømir:

Undir 15.000 kr.	0,65 ‰
Uppá 100.000—200,000 kr.	1,60 «
— 500,000—1.000.000 kr.	2,15 «
— 1.000.000 kr. ella meira	2,50 «

Lóg nr. 149, 10. april 1922, sum broytt við lóg 31. mars 1933 ásetir, at inntøkuskattur verður rindaður til rikiskassan av skattaskyldugum persónum eftir hesi skala:

Har tann skattaskyldugi partur av inntøkuni ikki er yvir 500 kr., verður rindað 0,4 pct.

500 kr.	men	ikki	yvir	1.000,	2 kr.	av	500,	1	pct.	av	rest
1.000 »	—	—	—	2.000,	7 »	»	1.000,	2	»	»	—
2.000 »	—	—	—	3.000,	27 »	»	2.000,	3	»	»	—
3.000 »	—	—	—	4.000,	57 »	»	3.000,	3½	»	»	—
4.000 »	—	—	—	5.000,	92 »	»	5.000,	4½	»	»	—
5.000 »	—	—	—	6.000,	132 »	»	4.000,	4	»	»	—
6.000 »	—	—	—	7.000,	177 »	»	6.000,	5	»	»	—
7.000 »	—	—	—	8.000,	227 »	»	7.000,	5½	»	»	—
8.000 »	—	—	—	10.000,	282 »	»	8.000,	6½	»	»	—
10.000 »	—	—	—	15.000,	412 »	»	10.000,	7½	»	»	—
15.000 »	—	—	—	20.000,	787 »	»	15.000,	9½	»	»	—
20.000 »	—	—	—	30.000,	1.262 »	»	20.000,	11	»	»	—
30.000 »	—	—	—	40.000,	2.362 »	»	30.000,	12	»	»	—
40.000 »	—	—	—	50.000,	3.562 »	»	40.000,	13½	»	»	—
50.000 »	—	—	—	75.000,	4.912 »	»	50.000,	15½	»	»	—
75.000 »	—	—	—	100.000,	8.787 »	»	75.000,	17½	»	»	—
100.000 »	—	—	—	200.000,	13.162 »	»	100.000,	20	»	»	—
200.000 »	—	—	—	500.000,	33.162 »	»	200.000,	22	»	»	—
500.000 »	—	—	—	1.000.000,	99.162 »	»	500.000,	24	»	»	—
1.000.000 og meira					219.162 »	»	1.000.000,	25	»	»	—

Formúguskattur verður rindaður eftir hesi skala:

Av formúgum undir 15.000 kr. verður rindað 0,65 promille.

15.000 kr.	men	ikki	yvir	20.000,	10 kr.	av	15.000,	1	p.m.	av	rest
20.000 »	—	—	—	30.000,	15 »	—	20.000,	2	—	»	—
30.000 »	—	—	—	50.000,	35 »	—	30.000,	3	—	»	—
50.000 »	—	—	—	100.000,	95 »	—	50.000,	5	—	»	—
100.000 »	—	—	—	200.000,	345 »	—	100.000,	7	—	»	—
200.000 »	—	—	—	500.000,	1.045 »	—	200.000,	10	—	»	—
500.000 »	—	—	—	1.000.000,	4.045 »	—	500,000,	13	—	»	—
1.000.000 »	og meira				10.545 »	—	1.000.000,	16	—	»	—

Skattaskyldug feløg rinda inntøkuskatt eftir hesi skala:

Tá inntøkan	er	inntil	6	pct.	p. a. av tí inngoldna partapeningi o. ø.					7	pct.
—	—	» yvir	6	—	men	ikki	yvir	7	pct.	8	—
—	—	» —	7	—	—	—	—	8	—	9	—
—	—	» —	8	—	—	—	—	10	—	10	—
—	—	» —	10	—	—	—	—	12	—	11	—
—	—	» —	12	—	—	—	—	15	—	12	—
—	—	» —	15	—	—	—	—	20	—	13	—
—	—	» —	20	—	—	—	—	30	—	14	—
—	—	» —	30	—	—	—	—	50	—	15	—

Er inntøkan yvir 50 pct., verður skatturin rindaður fyri tann part av inntøkuni, ið ikki fer yvir 50 pct., við 15 pct., og fyri tann partin, sum er meira, við 20 pct.

Skattafriir eru forsyrgjarar, hvørs inntøkur ikki eru yvir í Keypmannahavn 1.600 kr., keypstøðum 1.400 kr. og landkommunum 1.200 kr.

Er inntøkan yvir áðurnevnda pening, men undir 5.000 kr. verður givin forsyrgjarum ein skattafrían frádrátt av somu stødd sum áðurnevndi skattafríi peningur.

Er inntøkan 5.000 kr. ella haryvir, verður frádrátturin settur successivt niður fyri hvørjar avloypandi 1.000 kr. í inntøku soleiðis:

Er inntøkan uppá 5.000 kr. ella meira, men undir 6.000 kr., verður frádráttur givin við ávikavist fyri Keypmannahavn, keypstaðir og landkommunur ..... 1.350 kr., 1.150 kr., 1.000 kr.

6.000 kr. ella meira, men undir 7.000 kr. ...	1.100 »	950 »	800 »
7.000 » — — — — 8.000 » ...	800 »	700 »	600 »
8.000 » — — — — 9.000 » ...	550 »	450 »	400 »
9.000 » — — — — 10.000 » ...	300 »	250 »	200 »

meðan eingin frádráttur verður givin fyri størri inntøkur.

Onnur skattaskyldug, hvørs inntøka ikki fer upp um ávikavist 800 kr., 700 kr. og 600 kr., eru skattafrí, á sama hátt sum tað, tá inntøkan fer upp um áðurnevnda pening, men er undir 5.000 kr., verður givið teimum ein skattafrían frádrátt uppá ávikavist 800 kr., 700 kr. og 600 kr.

Er inntøkan 5.000 kr. ella meira, verður frádrátturin settur successivt niður fyri hvørjar avloypandi 1.000 kr.s inntøku soleiðis:

Fyri inntøkur uppá 5.000 kr. ella meira, men undir 6.000 kr., verður frádráttur givin við ..... 700 kr., 600 kr., 500 kr.

6.000	kr.	ella	meira,	men	undir	7.000	kr.,	..	550	kr.,	450	kr. og	400 kr.
7.000	»	—	—	—	—	8.000	»	...	400	»	350	» »	300 »
8.000	»	—	—	—	—	9.000	»	...	300	»	250	» »	200 »
9.000	»	—	—	—	—	10.000	»	...	200	»	150	» »	100 »

meðan eingin frádráttur verður givin fyri størri inntøkur.

Fyri hvørt barn verður frádrigið í Keypmannahavn 300 kr., keypstaðskommunum 250 kr. og landkommunum 200 kr. og fyri partafeløg og onnur feløg 5 pct. av inngoldnum lutapeningi.

Lóg nr. 108 av 31. mars 1938 inniheldur reglur um stovnan av landsskattarætti og um eftirlit við skattaálíkningini.

Fyri skattaárið 1939—40 varð inntøkuskatturin við kunngerð nr. 141, 23. mars 1939 hækkaður við 15 pct.

Tá veraldarbardagin brast á, komu størri krøv til ríkiskassan, og lóg nr. 378, 30. oktober 1939 ásetti, at statsskatturin fyri 1939—40 skuldi hækkast við 40 pct. umframt tey nevndu 15 pct. og formúguskatturin hækkast við 40 pct. Eisini orsakað av kríggsviðurskiftunum kom lóg nr. 95 av 20. mars 1940. Her var inntøkuskatturin til statin líknaður eftir fylgjandi skala:

Har skattainntøkan er undir 200 kr., verður rindað ..... 0 kr.

200	kr.	men	ikki	yvir	400	rindast	2	kr.	av	200,	2	pct. av	rest
400	»	—	—	—	800	—	6	»	»	400,	3	— »	—
800	»	—	—	—	1.200	—	18	»	»	800,	4	— »	—
1.200	»	—	—	—	2.000	—	34	»	»	1.200,	6	— »	—
2.000	»	—	—	—	3.000	—	82	»	»	2.000,	8	— »	—
3.000	»	—	—	—	4.000	—	162	»	»	3.000,	10	— »	—
4.000	»	—	—	—	6.000	—	262	»	»	4.000,	12	— »	—
6.000	»	—	—	—	8.000	—	502	»	»	6.000,	15	— »	—
8.000	»	—	—	—	10.000	—	802	»	»	8.000,	18	— »	—
10.000	»	—	—	—	15.000	—	1.162	»	»	10.000,	21	— »	—
15.000	»	—	—	—	20.000	—	2.212	»	»	15.000,	24	— »	—
20.000	»	—	—	—	30.000	—	3.412	»	»	20.000,	27	— »	—
30.000	»	—	—	—	40.000	—	6.112	»	»	30.000,	30	— »	—
40.000	»	—	—	—	60.000	—	9.112	»	»	40.000,	33	— »	—
60.000	»	—	—	—	100.000	—	15.712	»	»	60.000,	36	— »	—
100.000	»	—	—	—	200.000	—	30.112	»	»	100.000,	40	— »	—
200.000	»	—	—	—	400.000	—	70.112	»	»	200.000,	45	— »	—
400.000	»	og	haryvir	.....			160.112	»	»	400.000,	50	— »	—

Á partafeløg varð líknaður serstakur skattur, og formúguskatturin varð líknaður eftir hesi skala:

Av formúgum uppá ikki yvir 15.000 kr. verður rindað..... 0,8 pro mille

15.000	kr.	upptil	20.000,	12	kr.	av	15.000,	1,4	p.m.	av	rest
20.000	»	—	30.000,	19	»	»	20.000,	2,5	—	»	—
30.000	»	—	50.000,	44	»	»	30.000,	3,7	—	»	—
50.000	»	—	100.000,	118	»	»	50.000,	6,2	—	»	—
100.000	»	—	200.000,	428	»	»	100.000,	8,8	—	»	—
200.000	»	—	500.000,	1.308	»	»	200.000,	12,5	—	»	—
500.000	»	—	1.000.000,	5.058	»	»	500.000,	16,2	—	»	—
1.000.000	»	og meira	.....	13.158	»	»	1.000.000,	20,0	—	»	—

Hvussu skatturin er líknaður fyri fylgjandi fíggjarár er undirskrivaða ókunnugt, tí danskt lógtíðindi kemur ikki fyri tíðina til Føroyar.

Undir veraldarbardaganum 1914—18 høvdu einstakir stórar krígsinntøkur, eins og útreiðslurnar hjá tí almenna vuksu nógv. Tí varð uppkravdur eykainntøkuskattur.

Lóg nr. 129, 10. mai 1915, ásetir, at hann, sum fyri skattaárið 1915—16 og 1916—17 er settur í skatt av skattainntøku yvir 8.000 kr. fyri hvørt av árunum, skal rinda eykaskatt til ríkiskassan, 10 pct. av tí peninganøgd, sum hansara skattainntøka fyri hvørt av árunum er meira enn meðaltalið av hansara tilsvarandi inntøku fyri 1912—13, 1913—14 og 1914—15, tó at frádráttur verður í peninganøgdini soleiðis:

Um meirinntøkan er:	Verður frádrigið:
Undir 8.000 kr.	7.000 kr.
8.000 men undir 15.000 kr.	6.000 »
15.000 — — 20.000 »	5.000 »
20.000 — — 50.000 »	4.000 »
50.000 — — 75.000 »	3.000 »
75.000 — — 100.000 »	2.000 »
100.000 og meira	1.000 »

Fyri partafeløg varð serstakur eykaskattur álagdur á annan hátt enn fyri einstaklingar.

Lóg 155, 17. mai 1916, broytir lógina av 1915 um eykaskatt, soleiðis at fyri 1916—17 verður eykaskattur at rinda av teimum, sum hava skattainntøku 6.000 kr. ella meira, av teirri peninganøgd, sum skattainntøkan fyri nevnda ár er meira enn meðaltalið av inntøkunum fyri 2 av skattaárunum 1912—15, har inntøkan hevur verið hægst.

Skatturin varð áliknaður eftir nýggjum reglum, og sum dømi skulu nevnast:

Skattainntøka:

Meirinntøka:	6—8.000	8—10.000	10—15.000	15—20.000	20—30.000	30—40.000
2— 4.000 kr.	1 pct.	1 pct.	1 pct.	1 pct.	1 pct.	2 pct.
10—12.000 kr.			3 pct.	4 pct.	4 pct.	5 pct.

Meirinntøka:	40—50.000	50—60	60—70	70—80	80—90	90—100	100.000 og meira
2—4.000 kr.	3 pct.	4 pct.	5 pct.	5 pct.	6 pct.	6 pct.	7 pct.
10—12.000 »	6 »	6 »	7 »	8 »	8 »	8 »	9 »
40—50.000 »	14 »	14 »	14 »	14 »	15 »	15 »	15 »
90—100.000 »						19 »	20 »

og 21 pct. fyri meirinntøkur 100—300.000 kr., hækkandi við 1 pct. fyri hvørjar 200.000 kr. inntil 25 pct. av 900.000 kr. og meira.

Lóg 254 14. mei 1917 um eyka inntøkuskatt og formúguskatt ásetir fyri 1917—18 fyri skattainntøkur uppá 6000 kr. ella meiri líknandi meirinntøkuskatt eins og lóg av 1916, tó inntil 30 pct. fyri meirinntøkur uppá 1 mill. kr. ella meiri. Harnæst ásetir lógin tilleggsskatt av inntøkum uppá 8000 kr. ella meiri t. d.:

8000—10.000 kr.	0,10 pct.
40.000—50.000 »	2,00 »
100.000 og meira	4,5 »

Eyka formúguskattur: av 24.000— 50.000 kr. ..... 0,10 p.m.
» 50.000—100.000 » ..... 0,2 —
» 1 millión kr. ella meiri ... 1,25 —

Fyri fíggjarárið 1918—19 kom lóg um meirinntøkuskatt av líknandi innihaldi sum lógin frá 1917, og fyri fíggjarárið 1919—20 kom lóg um meirinntøkuskatt og tilleggsskatt av líknandi innihaldi sum lógin av 14. mai 1917.

Í nógv ár komu so ikki tílíkar lógir, men ríkisstýrið hevur vanliga ífylgi lóg haft heimild til at hækka skattin viss procentir, og tað hevur verið gjørt av og á, tá tørvur hevur verið til tess til serstakar fyriskipanir, til dømis til studningar til kommunur ella studningar til vinnulívið.

Lóg 125, 21. apríl 1936, um eykainntøkuskatt ásetir til dømis, at av inntøkum ikki yvir

15.000 kr.	verður goldið	0 kr.	av	10.000 kr.	og	1	pct.	av	rest
30.—50.000 »	— —	325 »	»	30.000 »	»	2,5	»	»	»
100.000 »	og haryvir	2.325 »	»	100.000 »	»	4	»	»	»

Lóg 7. mai 1937 ásetir meirinntøkuskatt fyri 1937—38 av inntøkum uppá 8.000 kr. og meiri og gevur eisini reglur um tilleggsskatt, og fyri 1938—39 og 1939—40 vóru ásettar líknandi reglur í lóg nr. 107 av 18. mars 1938.

Meirinntøkuskattur varð eftir hesari lóg álíknaður fólki, hvørs skattainntøka var 10.000 kr. ella meira av tí peningaøgd, sum skattapliktiga inntøkan fyri hvørt av nevndu árum var meira enn meðaltalið av tilsvarandi inntøkum fyri skattaárini 1933—34, 1934—35 og 1935—36.

Meirinntøkuskatturin varð rindaður við fylgjandi procentum:

Skattaskyldug inntøka:

Meirinntøka:	10—15000 kr. pct.	15—20000 kr. pct.	20—30000 kr. pct.	30—40000 kr. pct.	40—50000 kr. pct.	50—60000 kr. pct.	60—70000 kr. pct.	70—80000 kr. pct.	80—90000 kr. pct.	90—100000 kr. pct.	100000 kr. og meira pct.
7— 10.000 kr.	1	—	—	—	—	—	—	—	—	—	—
10— 15.000 »	2	2	2	—	—	—	—	—	—	—	—
15— 20.000 »	—	3	3	4	—	—	—	—	—	—	—
20— 30.000 »	—	—	4	5	5	—	—	—	—	—	—
30— 40.000 »	—	—	—	6	6	6	7	—	—	—	—
40— 50.000 »	—	—	—	—	7	7	8	8	9	10	11
50— 60.000 »	—	—	—	—	—	8	9	9	10	11	12
60— 70.000 »	—	—	—	—	—	—	10	10	11	12	13
70— 80.000 »	—	—	—	—	—	—	—	11	12	13	14
80— 90.000 »	—	—	—	—	—	—	—	—	13	14	15
90—100.000 »	—	—	—	—	—	—	—	—	—	15	16

og 17 pct. fyri meirinntøkur 100—200.000 kr., hækkandi við 1 pct. fyri hvørt 100.000 kr. inntil 26 pct. fyri 1 mill. kr. ella meira.

Harnæst varð lagdur tilleggsskattur fyri skattapligtigar persónar, soleiðis:

Har skattainnt. ikki er yvir 10.000 kr.,	0 kr.	av	8.000 kr.	og	1	pct.	av	rest
10.000 kr., men ikki yvir 15.000, rindast	20 kr.	av	10.000,		2	pct.	av	rest
15.000 » — — — 20.000, —	120 »	»	15.000,		3	»	»	»

20.000 kr.,	men ikki	yvir	30.000,	rindast	270	kr.	av	20.000,	4	pct.	av rest
30.000 »	—	—	— 50.000,	—	670	»	»	30.000,	5	»	» »
50.000 »	—	—	— 100.000,	—	1.670	»	»	50.000,	6	»	» »
100.000 og meira					4.670	»	»	100.000,	7	»	» »

Lóg nr. 99 av 15. mars 1939 ger smærri broytingar í lógini av 1938.

Íslendsk lóg.

Íslendingar hava haft og hava beinleiðis skatt til ríkiskassa teirra eftir líknandi reglum sum í Danmark. 14. december 1877 fingu teir eina lóg, sum í § 1 ásetir, at av allari árligari inntøku av jørð verða rindað 4 pct. til ríkiskassan. § 2 sigur, at av inntøkum av pengum, antin talan er um obligatiónir, partabrøv ella annan rentuberandi kapital ella útlæntan pening, verða rindað á sama hátt 4 pct. til ríkiskassan. Tað sama var viðvíkjandi inntøkum við útleigan av leysoyri. Av inntøkum frá vinnulívinum varð einki rindað av teim fyrstu 1.000 kr. Av tí sum var yvir

1.000 kr.	og	inntil	2.000 kr.	.....	1	pct.
2.000 »	»	—	3.000 »	.....	1½	»
3.000 »	»	—	4.000 »	.....	2	»

o. s. fr. ½ pct. fyri hvørjar 1.000 kr. inntil 4 pct. av tí, sum var yvir 7.000 kr. § 5 ásetir, at til skattaskyldugt vinnulív varð roknað handil, handverk, farmasigling o. a., inntøka av embætinum og einumhvørjum virki. Jarðabrúkarar og fiskimenn skuldu tó ikki svara ríkisskatt av beinleiðis inntøkum av teirra vinnuvegi.

Lóg 3. oktober 1903 ásetti, at hvalaveiða roknast javnt við aðrar vinnuvegir viðvíkjandi ríkisskatti.

Lóg 26. oktober 1917 ásetti, at inntøkuskattur av ognum, sum umtalað varð í § 2 í lógini frá 1877, skuldi greiðast við 4 pct. av inntøkum upp til 1.000 kr., og síðan kundi skatturin økjast við 1 pct. av hvørjum 1.000 kr., inntil hann var vorðin 15 pct. av tí, sum var yvir 11.000 kr. Inntøkuskattur av vinnu, sum umtalað varð í § 4 í lógini av 1877, skuldi økjast á sama hátt, sum har var ásett, inntil hann var vorðin 15 pct. av tí, sum inntøkan var yvir 29.000 kr., og umframt teim vinnuvegum, sum umtalaðir vóru í grein 5 í tí gomlu lógini, skuldi skatturin eisini greiðast av inntøkum av landbúnaði og fiskivinnu.

Lóg 27. juni 1921 (broytt 26. mars 1923 og 4. juni 1924) um inntøkuskatt og ognarskatt ásetti inntøkuskatt eftir hækkandi stigum.

Sum dømir skulu verða nevnd:

Um hin skattaskyldugi luturin var undir 500 kr., greiðast av honum 6 pct.

Av	500—	1.000	kr.	greiðast	3	kr.	av	500	kr.	og	0,8	pct.	av rest
»	2.000—	3.000	»	—	22	»	»	2.000	»	»	2	»	» »
»	5.000—	6.000	»	—	112	»	»	5.000	»	»	5	»	» »
»	10.000—	11.000	»	—	462	»	»	10.000	»	»	10	»	» »
»	15.000—	16.000	»	—	1.062	»	»	15.000	»	»	15	»	» »
»	20.000—	25.000	»	—	1.912	»	»	20.000	»	»	19,5	»	» »
»	40.000—	50.000	»	—	6.037	»	»	40.000	»	»	23	»	» »
»	50.000—	70.000	»	—	8.337	»	»	50.000	»	»	24	»	» »
»	70.000—	100.000	»	—	13.137	»	»	70.000	»	»	25	»	» »
»	100.000 kr. og haryvir				20.637	»	»	100.000	»	»	26	»	» »

Skatturin av feløgum varð roknaður á henda hátt:

Tá skattaskyldugar inntøkur í lutfalli við inngoldnum partapeningi eru undir 2 pct., greiðast 5 pct. av teimum.

2— 5	pct.,	greiðast	5	pct.	av	teim	fyrstu	2	pct.	og	10	pct.	av	rest.
5—10	»	—	8	»	»	»	—	5	»	»	15	»	»	»
10—20	»	—	11½	»	»	»	—	10	»	»	20	»	»	»
20—50	»	—	15¾	»	»	»	—	20	»	»	25	»	»	»
50 pct. og haryvir			21³/₁₀	»	»	»	—	50	»	»	30	»	»	»

Frá inntøkum skal dragast sum skattafrítt 500 kr. og 1.000 kr., um talan er um hjún; harumframt fyri børn 500 kr. fyri hvørt.

Ognarskatturin var hesin:

Av teim fyrstu 5.000 kr. greiðist eingin skattur.													
»	5.000—	15.000	kr.	—	1	p.m.	av	tí,	sum	er	yvir	5.000	kr.
»	15.000—	20.000	»	—	10	kr.	av	15.000	og	1,2	p.m.	av	rest.
»	20.000—	30.000	»	—	16	»	»	20.000	»	1,5	—	»	—
»	30.000—	50.000	»	—	31	»	»	30.000	»	2	—	»	—
»	50.000—	100.000	»	—	71	»	»	50.000	»	3	—	»	—
»	100.000—	200.000	»	—	221	»	»	100.000	»	4	—	»	—
»	200.000—	500.000	»	—	621	»	»	200.000	»	5	—	»	—
»	500.000—	1.000.000	»	—	2.121	»	»	500.000	»	6	—	»	—
»	1.000.000	og haryvir		—	5.121	»	»	1.000.000	»	7	—	»	—

Ein lóg ásetti í 1934 broytingar.

Sum dømir skulu verða nevnd:

Um hin skattaskyldugi parturin av inntøkuni er undir 1.000 kr. greiðist av honum 1 pct.

Av	1.000—	2.000	kr.	greiðast	10	kr.	av	1.000	og	2	pct.	av	restini.
»	4.000—	5.000	»	—	140	»	»	4.000	»	9	»	»	—
»	7.000—	8.000	»	—	460	»	»	7.000	»	13	»	»	—
»	10.000—	11.000	»	—	880	»	»	10.000	»	16	»	»	—
»	15.000—	16.000	»	—	1.780	»	»	15.000	»	21	»	»	—
»	20.000—	22.000	»	—	2.930	»	»	20.000	»	27	»	»	—
»	28.000—	33.000	»	—	5.270	»	»	28.000	»	33	»	»	—
»	50.000 kr. og haryvir			—	13.200	»	»	50.000	»	40	»	»	—

Sum skattafrítt kunnu frádragast fyri einstaklingar 600 kr. og fyri hjún 1.200 kr. og fyri børn 500 kr. fyri hvørt.

Ognarskatturin var hesin:

Um ognin er yvir 5.000 kr., men undir 10.000 kr. greiðist av henni 1 pct.

Sum onnur dømir:

Av	10.000—	20.000	kr.	greiðast	10	kr.	av	10.000	og	1,5	p.m.	av	rest
»	50.000—	75.000	»	—	115	»	»	50.000	»	5	»	»	»
»	100.000—	250.000	»	—	390	»	»	100.000	»	7	»	»	»
»	500.000—	1.000.000	»	—	3.440	»	»	500.000	»	9	»	»	»
»	1.000.000 kr. og haryvir			—	7.940	»	»	1.000.000	»	10	»	»	»

Undir veraldarbardaganum hevur skatturin verið hækkaður nakað.

Sum dømir skulu nevnast lóg av 5. mai 1941. Av reglum her skulu verða nevndar:

Um hin skattaskyldugi parturin av inntøkuni er undir 1.000 kr. greiðist 1 pct.

Av	1.000— 2.000	kr.	greiðast	10	kr.	av	1.000	og	2	pct.	av restini
»	5.000— 6.000	»	—	230	»	»	5.000	»	11	»	» —
»	10.000—11.000	»	—	940	»	»	10.000	»	28	»	» —
»	20.000—25.000	»	—	4.030	»	»	20.000	»	34	»	» —
»	50.000 kr. og haryvir		—	14.980	»	»	50.000	»	40	»	» —

Skattafríur frádráttur fyri einstaklingar 900 kr., hjún 1.800 kr. og fyri hvørt barnið 600 kr.

Partafeløg hava rætt at draga frá inntøkuni 5 pct. av inngoldnum partapeningi.

Serstakar reglur vórðu givnar um loyvi til at leggja skattafritt vissan part av yvirskotinum í reservafond og nýbyggingargrunnar.

Líknandi reglur sum í Danmark hava eisini verið undir krígnum í Íslandi um meirinntøkuskatt.

B. Tollur.

Til at avloysa fiskitiggjunda og lestagjald, sum fór í ríkiskassan, varð við lóg 30. mars 1892 ásett innfluttningsgjald:

1) Vín í føtum pr. pott 15 oyru,
   — » fløskum pr. ¾ pott 15 oyru.
2) Spirituosa í føtum eftir styrkini frá 15 til 35 oyru. pr. pott.
   Spirituosa í fløskum pr. ¾ pott frá 15 til 35 oyru.
3) Øl, skattafritt, pr. pott 5 oyru.
   Annað øl pr. pott 5 oyru.

Tollurin varð ætlaður at geva 17.000 kr. árliga til ríkiskassan og gav árliga 20—30.000 kr. Tá lóg kom í 1907 um bann móti at handla í Føroyum við spiritus, minnkaði innfluttningurin, og fyri at bøta um hetta, varð neyðugt at hækka tollin, og samstundis varð samtykt at avloysa restandi tiggjundar o. a. Tað, sum ríkisstýrið nú skuldi hava fyri umtalaðu avloysan, varð 29.000 kr árliga.

Við lóg av 1908 varð innfluttningsgjaldið tí hækkað til um tað dupulta. Tað vísti seg, at ov lítið kom inn, og tá lógin kom til revisión í 1912, varð tollurin aftur hækkaður til um 3 ferðir av tí, hann var í 1892.

Lóg 28. mars 1925 ásetti hesi innfluttningsgjøld:

1) a.	Vín í føtum pr. l	40	oyru
	— » fløskum pr. ¾ l	45	—
b.	Spirituosa eftir styrkjuni frá 70 til 200 oyru pr. l		
	— í fløskum frá 75 til 200 oyru pr. ¾ l		
c.	Øl, skattafritt, pr. l	8	—
	Annað øl, pr. l	18	—
2)	Mineralvatn o. l. pr. l	8	—
3) a.	Roykitubbak, sum kostaði í innkeyp 5 kr. ella minni pr. kg	20	—
b.	Annað roykitubbak	100	—
c.	Spunnið skrátubbak	40	—
d.	Annað skrátubbak og snús	200	—

e. Cigarettir pr. 100 stk. ..... 100 oyru
f. Cigarir pr. 100 stk. ..... 200 –
g. Cigarillos pr. 100 stk. ..... 100 –
4) Chokolata, bon-bons og tílíkar sukurvørur pr. kg. ..... 25 –

Ríkiskassin fekk av innfluttningsgjøldum 30.000 kr., og restin fór til løgtingsendamál.

Við lóg av 15. februar 1928 vóru innfluttningsgjøldini fyri spirituosa, øl, mineralvatn, cigarettir, cigarir og cigarillos og fyri sukurvørur hækkað.

Aftur við lóg av 8. mars 1930 vórðu nógv av gjøldunum hækkað nakað, serstakliga annað spiritus enn brennivín og aquavit, og lóg av 8. mars 1935 hækkaði aftur innfluttningsgjaldið fyri ymsar av teim nevndu vørunum, serstakliga fyri dýrar cigarettir og cigarir.

Lógin av 1935 legði harnæst innfluttningsgjald á 10 nýggjar vørur: Fotografirekvisittir, bilar, cyklir, musikinstrumentir, fajancu og glasvørur, leikutoy, gólvteppir, linoleum, tapet og ur, frá 5 upp til 20 pct. av innkeypsprísinum, og harnæst kom innfluttningsgjald á spælikort, 1 kr. pr. spæl. – Sjúkrahúsini skuldu hava 48.000 kr. av tollinum og restin fór til løgtingsgrunnarnar.

Núgaldandi lóg um innfluttningsgjøld o. a., 15. mars 1939, ásetir innfluttingsgjald á ymiskar vørur, og hevur 62 nummar. Sum dømir kunnu nevnast:

Vín pr. l	70	oyru
Brennivín pr. l	frá 240 til 600	–
eftir rúmprocentunum og		
Annað spirituosa pr l	» 400 » 1000	–
Øl, skattaklassa 2, pr. l	15	–
Annað øl pr. l	30	–
Cigarir pr. stk.	frá 4 til 6	–
eftir innkeysprísinum		
Cigarillos pr. stk.	3	–
Cigarettir pr. stk.	frá 2 til 8	–
Tubbak pr. kg	70	–

tá innkeypsprísurin er 3 kr. ella lægri og 2 kr. pr. kg, tá prísurin er yvir 3 kr., men ikki yvir 6 kr. og 4 kr. pr. kg., tá prísurin er yvir 6 kr. pr. kg.

Chokolata, bon-bons o. t. pr. kg	100	oyru
Sukur pr. kg	3	–
Kaffi, pr. kg	20	–
Te, pr. kg	20	–
Spælikort, pr. spæl	100	–
Skógvar, undantikið gummiskógvar	10 pct. av	virðinum
Cyklir	10 » »	–

o. s. fr.

Lógin ásetir, at finansministeriið hevur hægsta ræði í hesum viðurskiftum.

Lógin ásetir eisini framleiðslugjald fyri øl, tubbak og tubbaksvørur, sum verða gjørdar í Føroyum.

Lógin ásetir, at 20.000 kr. fara í kirkjugrunnin, meðan restin fer í amtsgrunnin.

§ 22 sigur, at sektir kunnu verða dømdar av amtmanninum, um viðkomandi samtykkir tílíka avgerð.

§ 24 ásetir, at lógin verður at leggja til revisión fyri løgtingið í 1944. Undir kríggsárunum er ásett við kunngerð nr. 22 av 16. august 1940, at innfluttningsgjøldini við fáum undantøkum eru hækkaði 20 pct.

Eftir roknskapinum hevur tollurin givið í árunum 1929 til 1936 um 120.000 kr. árliga og í árunum 1936, 1937 og 1938 gott og væl 200.000 kr. árliga, í 1939 og 1940 ca. 450.000 kr. árliga, í 1941 kr. 924.000, 1942 kr. 1.221.000 og í 1943 kr. 1.180.000.

Í Danmark, Íslandi og øðrum londum hava teir toll á nógv fleiri vørum enn hjá okkum; til dømis skal verða nevnt, at tann danska tolllógin hevur 364 nr. Tað má tí haldast at vera neyðugt at fáa eina tilsvarandi lóg um toll fyri Føroyar, har tollur verður lagdur á fleiri vørur, serstakliga luksusvørur, men eisini aðrar vørur, á líknandi hátt sum í øðrum londum.

Hetta má verða fyrireikað av tí nevnd, sum fær ta uppgávu nærri at eftirkanna okkara figgjarviðurskifti.

Samanlíknað við Danmark og Ísland skuldi ein tílík tolllóg í vanligum tíðum, um vinnulíkindini eru skipað á líknandi hátt sum í nevndu londum, eftir fólkatalinum givið um 2 milj. kr. um árið. Hetta verður kanska væl høgt sett.

Í Danmark hava teir benzinskatt, ætlað til viðlíkahald av vegum, og innfluttningsgjøld til studning fyri vinnulívið.

Ísland hevur serstaka lóg um rúsdrekkatoll, tubbakstoll, kaffi- og sukurtoll og annan toll.

C. *Stempilgjald.*

Hini Norðanlondini hava stempilgjald.

Danska figgjarlógin fyri 1939/40 ætlar stempilgjaldið tað árið at geva 16½ milj. krónur.

Í Íslandi var inntøkan av stempilgjaldi í 1938 kr. 700.000.

Føroysk lóg av líknandi innihaldi sum danska ella íslendska lógin kann ætlast at geva gott og væl 100.000 kr. árliga.

Donsk lóggáva.

Donsk lóggáva er kunngerð nr. 99, 23. april 1929 av lóg um stempilgjald, sbr. kunngerð nr. 86 av 23. mars 1933, lóg nr. 75, 31. mars 1931 og lóg nr. 82, 23. mars 1932. *Deild I* inniheldur almennar reglur viðvíkjandi stempilskyldu. Øll skjøl, sum ljóða uppá pening ella peningavirði og hatí inngingin verður ella yvirtikin verður ein skylda, ella harvið ognað verður ella selt verður ein rættur, eitt krav ella rættindi, eru, um tey ikki eru undantikin í lógini, undir stempilgjaldi, eftir teirra innihaldi og virði.

Deild 2 ásetir reglur um útroknan av stempilgjaldi.

Stempilgjald fyri skjøl verður ásett antin við at rokna tey undir eina av 3 deildum, har gjaldið verður ásett samanborið við virðið ella við serstaka takst, galdandi fyri serstøk skjøl. Gjaldið fyri tey undir teim 3 almennu deildunum hoyrandi skjøl verður roknað soleiðis:

Fyri	1.	deild	við	½ %	av	virðinum.
„	2.	—	„	⅕ %	„	—
„	3.	—	„	⅕ %	„	—

Deild 3 hevur reglur um rindan av stempilgjaldi o. a.

Fíggjarráðharrin ásetir, til hvørjar takstir stempilmerkir verða prentað o. s. fr.

Deild 4 ásetir reglur fyri eftirlitið og sektir, sum falla til ríkiskassan.

Dómarar og aðrir embætismenn skulu ansa eftir, at reglurnar um stempilgjald verða hildnar og ansa eftir, at øll skjøl, sum koma teimum í hendi, og sum skulu vera stemplað, eru tað.

Deild 5 inniheldur reglur um tey einstøku stempilskyldugu skjøl. Her verður nevnt ein hópur av ymiskum skjølum.

Sum dømir skulu nevnast:

Við sølu av fastari ogn	1. deildar takst.
„ — „ skipum og førum	2. — —
„ — „ øðrum leysum	3. — —
„ — „ aktium vanliga	1 %
og fyri skuldarbrøv	3. deildar takst.
Ábyrgd ella veð	2. — —

Við vekslar ikki yvir 2.000 kr. 25 oyru fyri hvørjar 500 kr. og annars 50 oyru fyri hvørjar 1.000 kr.

Deild 6 hevur reglur um undantak og lættan viðvíkjandi stempilskyldu.

Har eru fyrst ymisk almenn undantøk sum kvittanir, rokningar, anmeldan í búgvum, ymsar protokollir hjá embætismonnum o. t., skjøl viðvíkjandi statsins tænastusøkum, danskar statsobligatiónir, kommunuobligatiónir, skjøl í straffimálum o. t.

Harnæst er gjørt undantak fyri serstakar stovnar ella feløg, soleiðis viðvíkjandi obligatiónum hjá ymiskum kreditfeløgum, og við bevilling kann verða gjørt undantak fyri til dømis sparikassar og bankar viðvíkjandi kontrabókum.

Danska lógin er long og umfatandi 158 paragraffir.

Íslendska lóggávan.

Tá skjøl, sum talan er um í lógini, verða givin út ella avgreidd, skulu tey stemplast. Stjórnarráðið letur gera stempilmerkir og er heimilað at lata gera pappír við áprentaðum stempilmerki, sum kann verða nýtt í staðin fyri merkini. Stempilskyldug skjøl, sum givin eru út í Íslandi, skulu stemplast áðrenn 2 mánaðar eru lidnir frá útgávudegnum.

Allir almennir starvsmenn eru skyldugir til at stempla tey skjøl, teir geva út ella á einhvønn hátt avgreiða. Harumframt er lógreglustjórin skyldugur at stempla skjøl fyri fólk móti 25 oyru viðurlag fyri hvørt skjal. Bankar og sparikassar eru skyldugir til at stempla uttan endurgjald tey skjøl, sum fara um teirra hendur.

Stjórnarráðið kann veita feløgum, stovnum og einstøkum monnum rætt til at stempla.

Tey, sum hava á hondum stemplan av skjølum, kunnu krevja allar neyðturvuligar upplýsingar og áseta so gjaldið. Um viðkomandi er ónoyddur við ásetanina, kann hann skjóta málið undir avgerð stjórnarráðsins áðrenn 2 mánaðar, og um hann heldur ikki góðkennir avgerð stjórnarráðsins, kann hann leggja málið undir dómstólarnar.

Sum dømir uppá stempilgjald skulu verða nevnd:

1 % við sølu av fastari ogn og førum yvir 5 tons.
Viðvíkjandi lutabrøvum í partafeløgum vanliga 1 %.
Fyri skuldabrøv og tryggingarbrøv vanliga 3 ‰.

og fyri vekslar	200 kr. ella minni við	....	20 oyru
„ —	200—400 kr.	.....	40 —
„ —	400—600 kr.	.....	60 —
„ —	600—800 kr.	.....	80 —
„ —	800—1.000 kr.	.....	1 kr.

Um peningahæddin er meira, skal skjalið verða stemplað við 1 kr. av hvørjari 1.000 kr.

Uppskot fyri Føroyar.

Uppskot fyri Føroyar kann gerast við fyrimynd í donsku lóg, íslendsku lóg ella øðrum norðanlanda stempillógum við broytingum, sum eru neyðugar ella hóskandi fyri føroysk viðurskifti.

Undirskrivaði hevur gjørt eitt uppskot til lóg fyri Føroyar um stempilgjald, sum kann verða lagt fyri viðkomandi nevnd.

D. Skemtunaskattur.

Kunngerð nr. 44, 28/11 1940, ásetir gjald fyri at vísa fram livandi bíløt ella hava almennan dans; tó undantikið føroyskan dans ella føroyskan sjónleik. Gjaldið verður rindað sum skattur á seldar bilettir.

Fyri ein billettpris	.....	inntil	50 oyru	10 oyru
„ „ —	yvir 50 oyru	—	75	— 15 —
„ „ —	„ 75 —	—	100	— 20 —
„ „ —	„ 100 —	—	125	— 25 —
„ „ —	„ 125 —	—	150	— 30 —
„ „ —	„ 150 —	—	175	— 35 —
„ „ —	„ 175 —	—	200	— 40 —
„ „ —	„ 200 —	—	250	— 50 —

o. s. fr. við 10 oyru fyri hvørju 50 oyru ella part harav.

Inntøkan til løgtingið av stuttleikaskattinum var í

1941	.....	21.000 kr.
1942	.....	32.700 „
1943	.....	40.600 „

E. Bilskattur.

Lóg 19. mars 1930, § 32, ásetir 10 kr. pr. h. k. fyri motorvognar og 20 kr. pr. 100 kg eginvekt fyri motorcyklir.

Við kunngerð nr. 52, 19/12 1943, varð skatturin hækkaður 100 %. Pengarnir fara í vegagrunnin og vóru undan hækkanini 25.000 kr. og nú 50.000 kr. árliga.

F. Arvagjald.

Fyriskipan fyri Føroyar av 8/11 1921 um arvagjald hevur lægri satsar enn í nógvum londum.

Spurningurin verður um at revidera hesar reglur.

Ríkiskassin fær ein part og amtsfátækrakassin restina.

Inntøkurnar hjá løgtinginum hava verið um 5—10.000 kr. árliga.

Harnæst er tað ein spurningur, um ikki eisini gjald eigur at verða sett fyri gávur.

Vanligt arvagjald í Danmark gevur 13 mill. kr. um árið. Inntøkur í Føroyum, um reglurnar vóru liknandi sum í Danmark, kunnu kanska verða ætlaðar til 30.000 kr. árliga.

G. Skattur á fastari ogn.

Kunngerð 8/2 1810 ásetir ½ % gjald við eigaraskifti. Gjaldið fer í ríkiskassan. Í Danmark er hetta gjald avtikið, men teir hava í staðin hægri tinglesingargjald.

Lóg 23/4 1897 ásetir kongs- og matrikulskatt til ríkiskassan av benificeraðari jørð árliga 20 oyru pr. skattamørk og av aðrari jørð 36 oyru, hækkað við lóg 1/4 1908 til 80 oyru árliga pr. skattamørk.

Metanin av jørðini, sum gjørd varð eftir lóg 29/3 1867, er ikki framhildin, og træðir, sum eru innlagdar seinni svara ti ongan tilíkan skatt.

Lóg nr. 126, 27/5 1908, inniheldur reglur um byggningsskatt fyri Tórshavn.

Lóg 12/3 1923, § 30, sbr. lóg 7/3 1928, ásetir jarðaskatt til løgtingið, 2 kr. árliga pr. skattamørk.

Í lóg um kommunuskatt 12. mars 1923, § 37, eru reglur um, at kommunuskattur verður at álíkna eftir markatali og ogn og førimuni eftir reglum, sum verða ásettar 3. hvørt ár av løgtinginum eftir uppskoti frá kommunustýrunum.

Lóg 7/8 1922, sbr. lóg 6/3 1936, ásetir, at í Danmark verða rindað árliga til ríkiskassan 6 ‰ av grundvirðinum, tað vil siga virðið av grundini óbygdari. Umframt hetta gjald «Grundskyld» verður rindað «Ejendomsskyld» á tann hátt, at frá tí peningahædd, sum metanin til «Ejendomsskyld», tað vil siga virðið í handil og vandil, er meira enn grundvirðið, verður givin frádráttur 10.000 kr., og av tí, sum so er eftir, verður rindað «Ejendomsskyld» 4,5 ‰.

Í Íslandi hava teir nakað liknandi reglur.

Í Føroyum eiga óivað reglur at verða settar um metan av fastari ogn 5. ella 10. hvørt ár. Tað eigur so at verða umhugsað, um ikki jarðaskattur til kommunurnar kann falla burtur, og skattur til løgtingið av fastari ogn at verða skipaður eftir líknandi reglum sum í Danmark og Íslandi. Ein tílíkur skattur vildi givið 50—100.000 kr. árliga, meðan jarðaskatturin til tingið og ríkiskassan nú er ca. 12.000 kr.

H. Gebyrir.

Gebyrir eru ásett í ymiskum lógum, harav summar eru gamlar, og tykjast ásett eftir ójøvnum grundreglum.

Rættargjøld eiga at verða hækkað í rættarmálum um stórt virði og tinglesingargjøld á líknandi hátt. Spurningurin er eisini, um ikki gjøld fyri handilsbevillingar eiga at verða hækkað.

Um gebyrlóggávan verður skipað sum í øðrum Norðanlondum, vil inntøkan ætlandi verða 100.000 kr. árliga. Sorinskrivarin hevur gjørt so væl at gera yvirlit yvir lóggávuna.

I. Lestagjald.

Fyri fremmand fiskiski og farmaskip er lestagjaldið 5 oyru pr. ton, sbr. lóg 23/4 1881 og lóg 30/3 1892.

Eftir lóg nr. 86, 30/3 1935, og lóg nr. 85, 15/3 1939, fara hesi gjøld í amtsgrunnin. Tey geva árliga 5—10.000 kr.

Spurningurin er, um tey eiga at verða reviderað.

K. Vitagjald.

Tílíkt gjald er ikki í Føroyum, men verður rindað í nógvum øðrum londum.

L. Lottarí.

Í nógvum londum hava teir lottarí, til dømis í Danmark og Íslandi, og spurningurin hevur fleiri ferðir verið frammi um at fáa føroyskt lottarí.

M. Almenn virkir.

Ymisk tílík eru eisini í Føroyum, til dømis telefonverkið og postverkið, og spurningurin verður at skipa raksturin av hesum virkjum so, at inntøkurnar bera útreiðslurnar.

N. Aðrar inntøkur.

Samfelagið hevur aðrar inntøkur enn tær, sum frammanundan eru nevndar, til dømis sektir, vinningsbýti, rentur o. t.

Um inntøkulógir verða settar í gildi sum nevnt, kunnu inntøkurnar til løgtingið árliga verða ætlaðar:

A.	Beinleiðis skattur og ognarskattur	500.000 kr.
B.	Tollur	1.500.000 »
C.	Stempilgjald	100.000 »
D.	Skemtunarskattur	50.000 »
E.	Bilskattur	50.000 »
F.	Arvagjald	30.000 »
G.	Skattur á fastari ogn	50.000 »
H.	Gjøld	100.000 »
I.	Lestagjøld	10.000 »
		2.390.000 kr.

Hartil koma uakrar aðrar inntøkur.

Figgjarætlan danska ríkisins 1938/39.

Inntøkur:

Yvirskot av universitetsgrunninum o. a.		615.968 kr.
Skattur og gjøld:		
Skattur av fastari ogn	13.241.000 kr.	
Inntøkuskattur	132.360.000 »	
Formúguskattur	39.500.000 »	
Bráfengis arvagjald	2.600.000 »	
Stempilgjald	18.000.000 »	
Tollur	292.600.000 »	
Ymisk gjøld	12.289.329 »	510.590.329 »
Yvirskot av klassalottarínum		3.179,953 »
Ymiskar inntøkur		2.369.052 »
		516.755.302 kr.

Útreiðslur:

Domenirnar	92.620 kr.	
Ríkisstovnar	20.385.907 »	
Rentukonto	3.509.418 »	
Til H. H. Kong	1.000.000 »	
Árspeningur til «Det kongelige Hus»	155.200 »	
Ríkisdagurin	2.150.000 »	
Statsministeriið	767.596 »	
Uttanríkisministeriið	6.175.848 »	
Landbrúksministeriið	20.168.646 »	
Innanríkisministeriið	35.354.761 »	
Socialministeriið	168.629.003 »	
Ministeriið fyri almenn arbeiði	15.283.386 »	
Handilsministeriið	6.968.934 »	
Grønland	0 »	
Justitsministeriið	25.948.843 »	
Kirkjuministeriið	3.026.376 »	
Undirvisningsministeriið	75.413.469 »	
Kriggsministeriið	39.037.153 »	
Marineministeriið	29.058.521 »	
Finansministeriið	43.686.569 »	
Eftirlønarmál	17.360.072 »	514.172.322 kr.
Meirainntøkur at yvirføra		2.582.980 »
		516.755.302 kr.

Rakstrarroknskapur íslendska ríkisins 1938.

Inntøkur:

Skattir og tollur:		
Fastognarskattur	483.393,26 kr.	
Inntøkuskattur og ognarskattur	2.225.818,12 »	
Lestagjald	66.904,32 »	
Eykainntøkuskattur	672.453,10 »	
Arvaskattur	55.045,74 »	
Vitagjald	468.671,56 »	
Loyvisbrævagjald	32.528,14 »	
Stempilgjald	690.403,21 »	
Bilskattur	496.047,04 »	
Bensinskattur	357.038,41 »	
Tollur	9.286.249,69 »	
Gjald av innlendskum vørum	593.688,81 »	
Skemtanaskattur	197.502,07 »	
Restauratiónsskattur	95.905,01 »	
	15.721.648,48 kr.	
Frá verður drigið endurgreiddar inntøkur o. a.	685.836,52 kr.	
		15.035.811,96 kr.
Inntøkur av rakstri ríkisstovnanna		3.796.220,21 »
Inntøkur av fastognum ríkiskassans		48.554,24 »
Inntøkur av bankum og rentur		562.298,02 »
Óvissar inntøkur		89.695,91 »
		19.532.580,34 kr.

Útreiðslur:

Rentur	1.770.938,80 kr.
Borðfe kongsins	60.000,00 »
Altingskostnaður og grannskoðan ríkisroknskapin	269.339,29 »
Stjórnarráðið, statistisk skrivstova og uttanríkismál	583.546,34 »
Dómstólar og lógreglustjórn	1.795.871,58 »
Felags útreiðslur við embætisrakstur	444.126,13 »
Til læknaskipan og heilsumál	728.157,17 »
Vegamál	1.826.764,77 »
Samgongur á sjógvi	663.179,80 »
Vitamál og havnagerðir	662.485,24 »
Flúgvumál	17.226,32 »
Kirkjumál	403.287,44 »
Kenslumál	2.106.917,59 »
Til vísinda, bókmenta og lista	247.188,22 »
Verkligar fyritøkur	3.920.522,25 »
Social mál	1.618.490,66 »
Eftirløn og styrkveitan	363.899,95 »
Óviss útgjøld	285.995,90 »
Munur	1.764.642,39 »
	19.532.580,34 kr.

Útreiðslur.

Hvat kostar ella hevur hitt almenna húsarhaldið í Føroyum kostað? Útreiðslurnar verða goldnar av kommunum, løgtinginum og ríkiskassanum.

Kommunurnar.

Til rindan av kommunalum útreiðslum verður áliknaður kommunuskattur.

Kommunuskatturin var í 1910	kr.	58.500
» 1920	»	375.000
» 1930	»	681.000
» 1936	»	774.000
» 1937	»	950.000
» 1938	»	825.000
» 1939	»	550.000

Hækkanin frá 1920 og fram yvir er ársakað av hækkanini av útreiðslum til skúlar (lønir o. a.) og socialar útreiðslur. Í 1938 minkaðu útreiðslurnar við 75.000 kr. av tí, at kommunurnar sluppu frá útreiðslum til sjúkrakassalimir, sum liggja á sjúkrahúsinum, og í 1939 lækkaðu útreiðslurnar við 275,000 kr. av tí, at útreiðslur til læraralønir, einkjupengar o. a. varð flutt frá kommununum yvir til løgtingið og ríkiskassan. Í kriggsárunum eru útreiðslurnar hækkaðar nógv ársakað av hækkandi prísum og størri útreiðslum til havnir, vegir o. t.

Løgtingið.

Útreiðslurnar hjá amtsgrunninum, økonomiska grunninum og amtsfátækragrunninum vóru í

1900	kr.	17.500
1909–1910	»	78.000
1919–1920	»	90.000
1922–1923	»	160.000
1929	»	178.000
1934	»	250.000
1939	»	550.000

Í 1934, undan finansplaninum av 1934, vóru sum nevnt útreiðslurnar 250.000 kr. Harav ætlað til:

Løgtingið	kr.	30.000
Sjúkrahús og læknar	»	50.000
Skúlamál o. t.	»	15.000
Lendingar og vegir	»	30.000
Renta	»	25.000
«Smiril»	»	10.000

Í 1939 eftir finansplaninum av 1938 vóru útreiðslurnar 550.000 kr. Harav ætlað til:

Løgtingið og skrivstovuna	kr.	50.000
Sjúkrahús, læknar o. t.	»	100.000
Skúlamál	»	15.000
Landbúnaðurin	»	15.000
«Smiril»	»	25.000
Havnir og vegir	»	250.000
Renta	»	30.000

Undir kríggsárunum eru útreiðslurnar hjá løgtinginum hækkaðar nógv, í 1940 til 853.000 kr., í 1941 til 1.100.000 kr., í 1942 til 2.200.000 kr. og í 1943 til 3.600.000 kr.

Rikiskassin.

Í 1856/57 til 1873/74 vóru útreiðslurnar í alt kr. 609.000 og inntøkurnar kr. 658.000, so tað var eitt avlop uppá 50.000 kr. Í 1874/75 til 1893/94 vóru útreiðslurnar í alt 1.575.000 kr. og inntøkurnar 1.099.500 kr., so hallið varð ½ millión kr. Í 1894/95 til 1914/15 vóru útreiðslurnar 4.250.000 kr. í alt, og inntøkurnar vóru 1.200.000 kr., so hallið var 3 milliónir kr. (harav tó til herskip til eftirlit við fiskiveiðu frá fremmandum trolarum um 1 millión kr.). Í 1910/11 vóru útreiðslurnar 250.000 kr. og inntøkurnar 51.000 kr., so hallið tað árið var gott 200.000 kr. Í 1915/16 og 1916/17 vóru útreiðslurnar árliga 575.000 kr. og inntøkurnar 50.000 kr. Í 1917/18 til 1919/20 vóru útreiðslurnar um 1 millión kr. árliga og inntøkurnar 50.000 kr. Í 1920/21 og 1921/22 vóru útreiðslurnar árliga 1.700.000 kr. og inntøkurnar 80.000 kr. Í 1922/23 til 1929/30 vóru útreiðslurnar 2,4 milliónir kr. árliga og inntøkurnar 100.000 kr. Í 1939 var støðan nakað tað sama, og tað hevur hon eisini verið í kríggsárunum, soleiðis at útreiðslurnar hjá ríkiskassanum til Føroya hava verið gott og væl 2 milliónir kr. um árið.

Samlaðar útreiðslur.

Útreiðslurnar til tað almenna húsarhaldið í Føroyum hava soleiðis verið:

1910	kommunurnar	kr.	58.500	
	løgtingið	»	78.000	
	ríkiskassan	»	200.000	
				kr. 336.500
1920	kommunurnar	kr.	375.000	
	løgtingið	»	90.000	
	ríkiskassin	»	1.600.000	
				kr. 2.065.000
1930	kommunurnar	kr.	681.000	
	løgtingið	»	178.000	
	ríkiskassin	»	2.300.000	
				kr. 3.159.000
1934	kommunurnar	kr.	774.000	
	løgtingið	»	250.000	
	ríkiskassin	»	2.300.000	
				kr. 3.324.000
1937	kommunurnar	kr.	950.000	
	løgtingið	»	400.000	
	ríkiskassin	»	2.300.000	
				kr. 3.650.000
1938	kommunurnar	kr.	825.000	
	løgtingið	»	400.000	
	ríkiskassin	»	2.300.000	
				kr. 3.525.000

1939	kommununtnar	kr. 550.000	
	løgtingið	» 550.000	
	ríkiskassin	» 2.300.000	
			kr. 3.400.000

Undan veraldarbardaganum vóru útreiðslurnar hjá ríkiskassanum og løgtinginum árliga 2¾ milliónir kr. til 3 milliónir kr., og tær vóru hesar:

Løgtingskostnaður	kr.	50.000
Til amtmann, sorinskrivara, fúta, skrivstovur teirra o. a.	»	300.000
Sjúkrahús, læknar o. t.	»	350.000
Vegir og havnir	»	250.000
Strandferðaskip («Smiril»)	»	50.000
Vitarnir	»	50.000
Poststjórnin (hall)	»	100.000
Kenslumál (læraralønir, læraraskúlin, realskúlin, studentaskeiðið, bókasøvn o. t.)	»	450.000
Kirkjumál (prestar, kirkjur o. a.)	»	100.000
Landbúnaðurin (jarðagrunnurin, royndarstøðin, búnaðarráðgevari, djóralækni o. a.)	»	200.000
Sjóvinna (navigatiónsskúli o. a.)	»	100.000
Social mál (ellisrenta, sjúkrakassar o. t.)	»	600.000
Ymist	»	200.000
	kr.	2.800.000

Henda fíggjarætlan roknar við, at prísviðurskiftini verða nakað, sum tey vóru í 1939 undan veraldarbardaganum. Prístalið hevur nú ligið um 250, samanborið við prístal 100 í 1939. Í yvirgongdstíðini, til prístalið verður 100 ella har um leið, má fíggjarætlanin vera tilsvarandi hægri.

Undirskrivaði heldur at tað vil vera beint at undirsøkja postarnar í omanfyri nevndu fíggjarætlan, millum annað:

a) Spurningurin er, um administratiónin er skipað, sum hon eigur at vera ella best kann vera, um hon ikki er ov fløkt, tá talan er um administratión av 28.000 fólkum, og spurningurin verður, hvussu hon skal verða skipað best og bíligast.
b) Yvirlit eigur at fáast til vega yvir lønirnar hjá embætismonnunum og tænastumonnunum og verða tær at samanlíkna við tilsvarandi løn í Danmark, Íslandi og Noregi; um hesar lønir mugu so upplýsingar fáast. Spursmálið verður so at seta og javna lønirnar hóskandi við lønarviðurskiftini og hóskandi til inntøku- og fíggjarviðurskiftini hjá okkara fólki, at javna lønirnar hjá embætismonnunum í Føroyum sína millum og at skipa so, at hesar lønir standa í samsvar til almen lønarviðurskiftir og inntøkuviðurskiftir her á landi, samsvarandi við líknandi viðurskiftir í øðrum norðanlondum.
c) Viðvíkjandi sjúkrahúsviðurskiftunum eigur at verða upplýst, hvussu skipað er aðrastaðni, og spurningurin at taka til viðgerðar umleggjan av administratiónini o. s. fr., byggjan av nýggjum sjúkrahúsum og vissan av atgongd til at senda til útheimin sjúklingar, sum tørva serstaka viðgerð. Læknaskipanin eigur at verða samansett við viðurskiftini í øðrum norðanlondum, har umstøðurnar svara til umstøðurnar í Føroyum, og talan hevur verið og vil óivað verða um nýskipan.
d) Eisini viðvíkjandi skúlaskipanini og kirkjumálum (prestar o. a.) eigur at verða fingið til vega upplýsingar frá øðrum londum at nýta, tá talan verður um nýskipan.

e) Eins og í øðrum londum kemur spurningurin fram, um hvat hitt almenna eigur og kann gera fyri at styðja vinnulívi, bæði fiskivinnu, jarðabrúki o. ø.

f) Social mál. Í nógvum londum er frammi spurningurin um at broyta og gera betur ta lóggávu, sum er hesum viðvíkjandi, og í Føroyum vil eisini óivað spurningurin koma sterkari fram um at umskipa og samanarbeiða allar reglur hesum viðvíkjandi í nýggjari lóg (fólkatrygging), samsvarandi tær reglur, sum eru ella koma at galda í øðrum norðanlondum, hóskandi við okkara viðurskiftir. Her vildi tað óivað verið heut at fáa sett ein mann, sum kann ferðast um landið og kanna viðurskiftini hjá teim einstøku, sum treingja til hjálp (gomul, brekaðu og sjúk fólk o. o.), eins og tað vildi verið hent at fáa sett ein mann til at ávísa arbeiði.

g) Harnæst verður at umhugsa nýggjar uppgávur, sum teir hava tikið upp í øðrum londum, men, sum ikki enn eru loystar í Føroyum.

Tað má haldast ógjørligt í einari tingsetu at fáa til vega tær omanfyri nevndu upplýsingar og neyðturviligt yvirlit, og undirskrívaði skal tí mæla til, at tingið samtykkir, at ein millumtinganevnd fær ta uppgávu at fáa fram nærri yvirlit og upplýsingar frá øðrum londum til brúks við tær tingingar og umhugsanir, ið koma at fara fram aftaná heimsbardagan, og at nevndin verður heimilað at taka eykahjálp til hetta arbeiði, at samráðast við tænastumenn o. s. fr. Tað vil óivað verða beint at fáa samráð við sakkønar menn frá Danmark, Íslandi og Noregi.

Hvussu tingingarnar aftaná bardagan vilja fara fram, er tað ikki uppgávan her at umrøða, ei heldur hvørji sjónarmið eiga at verða løgd til grund av teimum 3 sjónarmiðum, sum talan kann vera um. Hesi eru:

1. Støðan verður hin sama sum undan 1939 soleiðis, at kommunur, løgting og ríkiskassi viðvarandi skulu bera tær somu útreiðslur ella líknandi útreiðslur, sum tey bóru undan bardaganum. Í so tilfelli verður ikki talan um stórar broytingar, men nærmast um eina vissa revisión.
2. Føroyar bera allar útreiðslur og allar inntøkur.
3. Løgtingið tekur fleiri útreiðslur fult út yvir frá ríkiskassanum, t. d. skúlamál, kirkjumál, sjúkrahús og vinnumál, kanska nakað meir, meðan ríkiskassin viðvarandi skal hava nakrar útreiðslur og nakrar inntøkur.

Ætlandi vil eitt ár ella nakað meiri vera neyðugt sum yvirgongdstíð ella sum tíð til umhugsan og tingan, og í hesi tíð má væl tann núverandi skipan, sum er skapað undir krígnum, standa við, og í hesi tíð eiga nýggir embætismenn og tænastumenn bert at verða fyribils settir ella í hvørt tilfelli við fyrivarni viðvíkjandi lønregulering.

Mælt verður til, at Millumtinganevnd fær í hendi ta uppgávu at fyrireika tær tingingar og umhugsanir, ið ætlast at fara fram aftaná heimsbardagan, harundir gera uppskot um inntøkulógir fyri Føroyar, eftir líknandi sjónarmiði, sum í øðrum norrønum londum, og eftirkanna allar almennar útreiðslur í Føroyum og at gera viðmerkingar og uppskot til møguliga umskipan og umbøtan.

Nevndin verður heimilað at taka neyðturviliga eykahjálp til hetta arbeiði.

Løgtingsskrivstovan, Tórshavn, tann 5. aug. 1944.

Edw. Mitens.

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókhandils

Amtsfondsálikningin fyri 1945.

	Sóknar kommuna	Fólkatal	Skattainntøka	Eftir skattainnteku 1/2	Eftir samtykt løgtingsins	Tilsamans
1	Fugloyar	241	247795	175	50	225
2	Svínoyar	230	198250	140	55	195
3	Viðoyar	483	574410	407	83	490
4	Klakksvíkar	1805	4152800	2942	4228	7170
5	Kunoyar	197	198250	140	25	165
6	Mikladals	139	140450	99	51	150
7	Húsa	176	164700	117	18	135
8	Oyndarfjarðar	400	298570	216	74	290
9	Fuglafjarðar	902	1565820	1109	1071	2180
10	Lorvíkar	443	592060	419	101	520
11	Gøtu	584	763194	540	150	690
12	Nes	1438	2171250	1538	1562	3100
13	Sjóar	1000	1302079	922	818	1740
14	Sunda	487	136950	97	53	150
15	Eiðis	933	462300	328	132	460
16	Funnings	434	267700	190	90	280
17	Haldórsvíkar	427	362150	257	73	330
18	Saksunar	42	35000	25	35	60
19	Hvalvíkar	452	285449	202	118	320
20	Kollafjarðar	439	391300	277	103	380
21	Kvívíkar	494	478470	339	371	710
22	Vestmanna	884	1261000	893	1007	1900
23	Kaldbaks	118	139150	99	66	165
24	Havnar uttanb.	322	631000	447	173	620
25	Kirkjubøar	114	138900	98	62	160
26	Hests	131	102905	73	27	100
27	Nólsoyar	258	218760	155	45	200
28	Sandavágs	570	804560	570	360	930
29	Miðvágs	666	644285	456	234	690
30	Sørvágs	755	1196886	848	1652	2500
31	Bíggjar	113	108080	77	88	165
32	Mykines	144	117450	83	27	110
33	Sands	645	613000	434	126	560
34	Skopunar	376	416750	295	125	420
35	Skálavíkar	217	252530	179	31	210
36	Húsavíkar	240	169260	120	20	140
37	Skúoyar	168	150000	106	34	140
38	Hvalbiar	819	977930	693	107	800
39	Froðbiar	1939	3115143	2207	2043	4250
40	Fámjins	228	234522	166	14	180
41	Hovs	209	211442	150	15	165
42	Porkeris	436	438750	311	159	470
43	Vágs	1406	2723450	1929	2071	4000
44	Sunnbøar	775	455074	322	88	410
45	Tórshavnar	3440	12437850	8810	12165	20975
		26719	42347624	30000	30000	60000

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókahandils.

Álit D

í

løgtingsmáli nr. VI/1—44:

Endurnýggjan av skipaflotanum.

Málið um endurnýggjan av skipaflotanum verður meira og meira átroðkandi nú bardagatíðin skjótt kann væntast at fáa ein enda, og møguleikarnir aftur verða fyri skipabygging í størri mát, enn tað hevur verið í tey seinastu árini. Málið er til viðgerðar í fiskivinnunevndini, og er tað neyðugt at leggja soleiðis til rættis, at besta úrslit kann fáast burtur úr fyri framtíðina.

Fyrst ræður um at gera sær greitt, hvussu málið liggur fyri, og hvat ið tað almenna í Føroyum kann gera fyri at fremja skipabyggingina. Síðani kemur hin størsti spurningurin, hvussu tað kann eydnast at hjálpa fiskimanninum, skiparanum og reiðaranum til at fáa lagt tað neyðturviliga fíggjarliga grundarlagið til rættis fyri, at tey nýggju skipini kunnu verða okkara landi til størsta gagn.

Sjálv skipabyggingin fellur í tvíningar, skipabygging her heima í Føroyum, og tað, vit kunnu fáa bygt aðrastaðni.

Skipabyggingin í Føroyum eigur fyri tað almenna at verða tað fyrsta, sum liggur okkum á sinni, tí við at byggja skipini her heima loysa vit ikki bert spurningin um at útvega fiskimonnum reiðskap, men eisini at útvega àrbeiði til heimafólkið. Væl kann tað henda, at arbeiðsspurningurin verður tungur, tá tíðin nú skjótt fer at skifta frá bardagatíð til friðartíð, og tí ræður um at verja seg sum best móti arbeiðsloysi á landi.

Okkara skipasmiðjur hava longu sýnt, at tær í skipabygging standa mát við útlendskar skipasmiðjur, og væl kann tað hugsast, at vit her eiga ein fyrimun, av tí at okkara menn betri kenna, hvørja skipastyrki okkara farleiðir krevja. Øll smærri før t. d. 30—40 tons bátar eiga vit at kunna byggja her heima, og eisini er tað gjørligt at byggja nøkur størri skip í Føroyum.

Fyri at fremja hetta mál, ið eisini hevur sín stóra sociala týdning, krevst, at tilfar kemur til landið. Tað hevur mangan verið talað og samráðst um hetta á tingi tey seinastu árini; ein eigur ikki at halda uppat fyri tað. Heitt eigur at verða á Bretland um skjótast gjørligt at útvega byggitilfarið annaðhvørt úr Bretlandi ella úr Ameriku, og tað eigur at verða hildið fram, at løgtingið heldur, at Føroyingar eiga sømdir uppibornar í hesum; okkara sjómenn hava siglt vandasigling í ófriðartíðini, og førini, ið skulu skaffa

teimum føðina, eru minkað í tali, so nakað má gerast og tað skjótt, um ikki stórur vandi skal verða fyri okkara fólki í framtíðini.

Tað eigur eisini her at verða viðmerkt, at ikki einans eigur at verða lagdur dentur á at fáa skipasmiðjurnar at byggja, men vit eiga eisini at gera tað sama, sum frændur okkara, Íslendingar, longu hava gjørt, at seta skipabygging í gongd allastaðni, har ein vík er og fólk fæst til hetta arbeiði. Serliga vil hetta hjálpa til at fáa bygt útróðrarfør uppá eini 20—25 tons, og vil tað lætta um arbeiðið hjá skipasmiðjunum, soleiðis at tær kunna leggja allar árar út fyri at fáa bygt størri før.

Skipabygging í útheiminum eigur eisini at verða samrátt um. Tað liggja fyri tinginum skjøl, ið vísa, at 5 skip eru við at fara í gerð í Svøriki, og at svenska stjórnin er sinnað at samráðast um bygging av fleiri skipum, tá ið endaligur sáttmáli er gjørdur um tey fimm skipini. Her eigur ikki at verða drálað við at fara undir at samráðast um fleiri skip, og beinast vildi verið, um Føroyingar høvdu sær skipakønan umboðsmann í Svøriki, men ein eigur eisini at gera sær klárt, at tað heldur ikki ber til at føra samráðingar um skipini og so ongan hava, ið tekur av, tá ið boðið er framkomið. Tað má verða skipað so fyri, at nógvir her á landi eru førir fyri at taka við nýggjum skipum, men hetta skal verða nærri ummælt undir spurninginum um tey fíggjarliga vilkor, tað almenna kann bjóða borgarunum til at fara undir nýggja skipabygging uppá.

Skipabygging í Bretlandi eiga vit heldur ikki at gloyma at fáa kannaða. Um tað í Bretlandi finnast skipasmiðjur, ið eru fúsar til og førar at byggja okkum hóskandi fiskifør, so má ein minnast til, at í bardagatíðini hevur verið eitt samvirki millum Bretar og Føroyingar, ið ger tað mest náttúrligt, at vit minnast til hesa leiðina, um hon er gongd. Tíverri er tað so, at tað enn ikki er komið svar uppá áheitanina frá løgtinginum um at senda umboðsmenn til Bretlands til at samráðast um hetta; men málið eigur at verða uppaftur tikið til umhugsunar, og tað eigur at verða framborið fyri Bretum, at Føroya løgting fegin vil hava tílíkar samráðingar, sum kanska kann føra til sáttmála, ið kann verða til gagns fyri báðar partar. Tað er rímiligt, um tað er gjørligt, at vit Føroyingar leggja peningin har, vit hava vunnið okkara pening nú í bardagatíðini, og eisini má ein minnast, at tann sjógvur, vit skulu sigla, er tann sami, sum nógv skip ur Bretlandi sigla, soleiðis at í hesum landi vilja vit finna góðan kunnleika um, hvussu væl bygd okkara skip mugu verða. Eisini eigur at verða umhugsað, at ein partur av okkara nýggju skipabygging eigur at vera jarnskip, og hesi eigur tað skjótt at verða gjørligt at útvega í Bretlandi. Nevndin skal her vísa til samráðingar, ið hava farið fram við bretska umboðsmannin Quarrell úr London, soleiðis sum ummælt er í áliti A í hesum máli. Nevndin skal mæla til, at støðutakan til málið, tá svar liggur fyri á tingsins áheitan á Quarrell, verður givið upp í hendur á landsnevndini eftir samráð við millumtingasjóvinnunevndina og stýrið fyri vinnulánsgrunnin.

Tað liggur fyri tinginum boð um, at tað í Danmørk er í umhugsan at byggja skip til Føroya, men sum støðan er í dag, sleppa vit ikki í nærri samráðing við Danir um henda spurning. Nevndin skal annars vísa til tað, ið framført er í áliti B í hesum máli.

Vinnulánsgrunnurin er veruliga einasti peningur, ið hitt almenna hevur tøkan til skipabygging, og tað má standa øllum greitt, at hetta als einki røkkur til at fremja tey mál, sum nú og í komandi tíðum koma at liggja fyri. Grunnurin eigur í peningi um leið 1.200.000 kr., harav stóri parturin er annaðhvørt útgoldin ella játtaður til menn, ið ætla at fáa sær før ella umbyggja gomul før.

Tað er ikki lætt at fáa nógv burtur úr lítlum; men nakra leið kunnu vit koma við tí peningi, ið kann útvegast. Fyri at náa sum longst

heldur nevndin, P.M.Dam í aðru syftu, at peningurin úr vinnulánsgrunninum má verða nýttur sum tann almenni stuðul, ið stendur við endan og tekur ábyrgdina, meðan roynt verður at fáa til vega annan pening, ið kann muna betri til at fáa gongd á skipabyggingina. Fyri at hetta kann fáast í lag, má skipanin av vinnulánsgrunninum broytast.

Sum nú er gevur grunnurin lán móti fyrsta veðrætti upp til 70 pct. av byggipeninginum. Um hetta verður umskipað so, at grunnurin gevur 50 pct. móti øðrum veðrætti aftaná vanliga 25 pct. av byggipeninginum, vil nógv verða vunnið fyri grunnin, og roknast má við, at tað vil verða lætt hjá manni ella felagi, ið keypir nýtt skip, at fáa bankalán uppá fjórðingin móti fyrsta veðrætti til eina rentu av 4½ ella í mesta lagi 5 pct.

Sjálvsagt er tað nøkur óvissa um, hvat ið skip verða verd, tá krggstiðin er farin aftur um bak, men ein eigur tó at rokna við, at lægri enn niður í helvt kann ein illa hugsa sær at skip yvirhøvur fara at falla í virði. Tað vil siga, at helvtin av teimum lánum, sum vinnulánsgrunnurin hevur lænt út móti 2. veðrætti, má haldast at verða væl tryggjaður peningur. Nátturligt vil tað tí verða, at endurlána hesi skuldabrøv fyri upp í helvt av virðinum. Hetta halda vit lættast og beinast at verða gjørt hjá løgtingsins socialgrunni, hjá kriggstryggingini og sjóvátryggingini; allur hesin peningur er í løtuni órentaður, og hann er í hondum á tingvaldum monnum, so allir partar vilja fáa gagn av eini tilíkari skipan. Hyggja vit nú at muninum, vil hann verða heilt stórur. Lat okkum seta eitt skip til 200.000 kr., so vil tað siga, at vinnulánsgrunnurin nú hevði rokkið til 8 skip. Um lánið varð sett til 50 pct. av byggivirðinum í staðin fyri 70 pct., vildi tað fyrst rokkið til 12 skip, og síðani, tá ið grunnurin hevði tikið lán uppá skuldabrøvini, til 6 aftrat, við hesum skuldabrøvum eisini sett í veð vildi tað rokkið til enn 3 skip, soleiðis at tann sami peningur hevði tikið ábyrgdina fyri og skaffað pening til 21 skip í staðin fyri 8 skip, og tá er ikki íroknað tey skip, ið menn ella feløg kunnu útvega uttan lán frá tí almenna. Á hendan hátt skal tað eisini viðmerkjast, at teir, ið tóku skipini, fingu meira stuðul, tá ið ein roknar bankalán við, enn teir vildu fingið eftir tí gomlu skipanini av vinnulánsgrunninum. Tað er nú soleiðis, at maður ella felag, ið vil hava sær skip, má skaffa 30 pct. uttanum lánið frá vinnulánsgrunninum. Eftir tí, ið her er frambildið, er tað lækkað til 25 pct., men seinri í hesum áliti skulu vit koma inn uppá lánitreytir, hvar eginparturin verður væl lægri.

Av tí at uppgávan er so stór at loysa, um tað eydnast at skaffa tilfar og fáa byggiloyvi til øll tey skip, ið treingjast, má verða umhugsað at nøra um vinnulánsgrunnin.

Eftir tingsamtykt í fjør skal rakstraravlop av tingsins rokniskapi býtast soleiðis, at vinnulánsgrunnurin fær ein fjórðing, meðan ein fjórðingur fer í socialgrunnin og ein fjórðingur í ábyrgdargrunnin. Tað er tingmonnum kunnugt, at tað kann væntast ein eykainntøka í 1944, frá skattaskyldu tryggingarsambandsins og sjóvátryggingarinnar uppá um eina hálva millión. Av hesi orsøk má roknast við einum avlopi fyri 1944. Nevndin heldur tað vera beint, um tingið broytir býtisreglurnar fyri í ár, soleiðis at vinnulánsgrunnurin fyri 1944 fær alt avlopið. Hetta má roknast at geva grunninum nakað av peningi aftrat, og tað eigur at verða ásannað, at endurnýggjan av skipaflotanum er tað mest átroðkandi málið í løtuni, eitt mál, ið avger vinnumøguleikarnar hjá Føroya fólki í komandi tíðum.

Um tað eydnast at fáa nógv skip í gerð, kann tað henda, at heldur ikki hetta víðkaði virki hjá vinnulánsgrunninum vil verða nóg mikið til at skaffa tann pening, tørvur er á, og so eigur at verða givin heimild til, at grunnurin við tingsins ábyrgd tekur lán upp, har tað kann fáast, og eigur heimild at verða givin landsnevndini til at ásanna tingsins ábyrgd

fyri lánið, um hon heldur, at umstøðurnar eru soleiðis, at tørvur er til tess. Annars skuldi tann nevnda umskipan av lánikorunum gjørt at bygt skuldi kunnað verið fyri yvir 5 milliónir, útroknað soleiðis:

	lán:	bankalán:	byggipeningur:
Vinnulánsgr.	1.500.000,–	750.000,–	3.000.000,–
— lænt og útlænt	750.000,–	375.000,–	1.500.000,–
— . — » —	375.000,–	187.500,–	750.000,–

ella soleiðis:

Vinnulánsgrunnurin egin peningur	1.500.000,– kr.
Grunnurin lænt uppá skuldabrøv	1.125.000,– »
Bankalán við 1. pantirætti fyri 25 pct.	1.312.500,– »
Eigarin sjálvur skaffar 25 pct.	1.312.500,– »
Ialt...	5.250.000,– kr.

Tað eigur við hesum virki at verða umhugsað av tinginum og fastlagdar reglur soleiðis, at peningurin verður hóskandi sundurbýttur millum bygging heima í Føroyum og uttanlanda. Her halda vit, at tað eigur at verða arbeitt móti tí miði, at $^{2}/_{5}$ av øllum peningi verður nýttur til bygging í Føroyum, og at einans $^{3}/_{5}$ lánast til skipabygging uttanfyri Føroyar. Serliga má hetta haldast fram, tí tað hevur so stóran socialan týdning.

Tað kann væl henda, at bygging í Føroyum fer at verða trupul, tí tað kann henda, at bygging herheima vil verða munin dýrari, enn um bygt verður á skipasmiðjum í útheiminum. Serliga kann hetta koma av, at fraktin til Føroya av tilfari verður høg sammett við tað, aðrar skipasmiðjur gjalda. Her skal tí verða víst á tingsamtykt í 1943 (sí løgtingstíðindi 1943 síðu 19), har tað verður givið vinnulánsgrunninum saman við tveimum mannum frá reiðarafelagnum og fiskimannafeløgunum upp í hendi at kunna játta beinleiðis styrk úr løgtingsins tiltaksgrunni. Her ið tað hevur dupultan týdning fyri okkara oyggjar, kundi tað verið sera hóskandi, at tílíkur studningur varð givin, og skulu vit tí vísa á hetta her.

Allir mugu verða samdir um, at tann, ið fær nýggj skip, eisini ger tað besta fyri landið við at virka við tí nýggja amboðnum. Soleiðis má tað haldast, at tað er beint, at maðurin ella felagið, ið fer undir eina nýbygging, sjálvur letur munagóðan part av peninginum.

Sum nú er skipað fyri við vinnulánsgrunninum, letur maðurin 1. veðrætt frá sær fyri 70 pct. av byggikostnaðinum, tað vil siga hann má sjálvur skaffa til vega fyrst 30 pct. og síðani allar rakstrarútreiðslurnar. Hetta verður sjálvsagt so torført hjá manninum ella hjá samgongu av fiskarum, at tað nærum kann sigast at vera ógjørligt. Við okkara uppskoti er hetta broytt til 75 pct. almennt lán og bankalán, men eisini tey 25 pct. kunna verða ov tung at lyfta.

Tað verður tí sett uppskot um, at vinnulánsgrunnurin, tá ið umstøðurnar gera tað neyðugt, kann broyta útlánsreglurnar. Her skal verða víst á, at tveir vegir eru gangandi, annaðhvørt at hækka um tann partin, ið kann verða læntur móti 1. veðrætti ella hækka um tann partin, vinnulánsgrunnurin letur, ella kanska báðar vegir ísenn.

Vit vilja tilmæla, at tað verður givið vinnulánsgrunninum heimild t. d. soleiðis:

Ein fimtapart av útláninum soleiðis, at vinnulánsgrunnurin tekur 2. veðrætt fyri 50 pct. aftaná 30 pst. í 1. veðrætti, t. v. s. eigarin má útvega 20 pct. sjálvur.

Ein fimtapart av útláninum soleiðis, at vinnulánsgrunnurin gevur 60 pct. móti 2. veðrætti aftaná tey vanligu 25 pct. í 1. veðrætti, t. v. s., at eigarin má útvega 15 pct. sjálvur.

Ein fimtapart av útláninum, soleiðis, at vinnulánsgrunnurin letur lán 60 pct. móti 2. veðrætti aftaná 1. veðrætt uppá 30 pct. Tað vil siga, at eigarin sjálvur einans má útvega 10 pct.

Nevndin er samd um at mæla til at útbjóða eitt lán uppá 3 milliónir, ið eru samsvarandi við eitt uppskot, ið var borið uppá mál av Kr. Djurhuus í fíggjarnevndini sum stig móti inflasjón, sí mál nr. X—18/1944: (Økjan av seðlamongdini), soleiðis at peningurin skal nýtast saman við vinnulánsgrunninum, men at avgerð um nýtsluna verður tikin av landsnevndini. Vónandi kann tað á henda hátt skaffast inunandi peninganøgd fyri at taka tað fyrsta takið til endurnýggjanar av okkara skipaflota.

Ein minniluti (P. M. Dam) heldur víðari fram:

Í Føroyum eru um 4—5.000 sjómenn.

Av hesum eru í kríggsárunum bara okkurt um helmingurin sloppin til sjós. Og nógvir av teim hava bara siglt stuttan part av árinum, einans 2 túrar. Hina tíðina av árinum hava teir sitið í vinnuloysi ella í heilt lítlari vinnu.

Helmingurin hevur sitið heima vegna farloysi.

Hetta er ein ræðuligur verunleiki, ein verunleiki, ið land okkara í longdini ikki orkar at bera.

Hvat vil tað siga, at um 2.500 av okkara sjómonnum liggja á landi í farloysi?

Hvat vil tað siga fyri land okkara, at teir, ið sleppa at sigla, bara hava høvi at sigla tann styttsta partin av árinum?

Eftir sum kønir menn siga, kunnu vit í minsta lagi seta miðalinntøkuna hjá manni, ið sleppur at vera til sjós alt árið, til 8.000 kr., meðan vit ikki kunnu seta miðalinntøkuna hjá manni, ið ikki sleppur til sjós, hægri enn til 1.000 kr. og miðalinntøkuna á sjónum hjá teimum, ið hava siglt, kann ein ikki, av tí at teir ikki eru sloppnir at sigla alt árið, seta upp um 4.000 kr.

Fartrotið hevur so statt orsakað landi okkara eitt árligt tap uppá:

2.500 menn á (8.000÷1.000) kr.	kr. 17.500.000,—
2.500 — á (8.000÷4.000 kr.)	» 10.000.000,—
	kr. 27.500.000,—

Aftrat hesum má verða lagt tapið ið nationaløkonomiskt stendst av at hava 350 skip ov fá.

Hvat, ið hesi skip geva í friðartíðum, er ilt at siga. Men soleiðis sum veiðulíkindi og prísir hava verið seinastu árini, kann tað ikki vera ov høgt sett at seta 50.000 kr. í reinvinnu fyri hvørt skipið. Hetta týðir um 17 milliónir kr.

Hitt samlaða inntøgutapið, ið land okkara hevur av fartrotinum, er so statt yvir 45 milliónir um árið.

Hvussu nógv før tørva okkum fyri at geva øllum okkara sjómonnum ársarbeiði ella ið hvussu er vársø, summar og heystarbeiði?

Vit hava kanska um 100 skonnartir og sluppir, ið kunnu nútímansgerast. 5 trolarar hava vit.

Trolararnir geva um 100 sjómonnum ársarbeiði. Nútímansgjørd kunnu hini skipini ætlandi geva um 1.200 monnum ársarbeiði. Roknað er við 12 monnum til skipið.

Eftiri eru so 3.700 sjómenn.

Siga vit, at teir 700 av hesum kunnu sleppa til hvalaveiðu, farmasigling og aðra sigling, eru 3.000 fiskimenn eftiri at veita skip til.

Til hesar menn krevst t. d.:

25 trolarar à 20 menn	=	500	menn
50 90 tonsa skip à 12 menn	=	600	—
50 70 tonsa skip à 10 menn	=	500	—
75 50 tonsa skip à 7 menn	=	525	—
150 20/25/30/40 tonsa skip à 6 menn	=	900	—
		3025	menn

Hvat kosta hesi skip?

Kunnu vit veita tey til vega?

Sum prísirnir tykjast at liggja í dag vil kostnaðurin av teimum koma at liggja um leið:

25 126/30/50 fóta trolarar	25	mill.	kr.
50 90 tonsa skip	15	—	»
50 70 — »	13	—	»
75 50 — »	14	—	»
150 20/25/30/40 tonsa bátar	15	—	»
	82	mill.	kr.

Aftrat hesum kemur peningurin, ið tað kostar at nútímansgera 100 gomul skip.

Hesin kostnaður kann ikki vera settur til minni enn 150.000 kr., uppá skipið.

Nútímansgeranin av okkara gomlu skipum kann so statt vera sett til at koma at liggja um 15 mill. kr.

Eftir hesum verður endurnýggjanin og nútímansgeranin av okkara skipaflota at kosta um 97 ella slakar 100 mill. kr.

Men tað kann væntast, at nútímansgeranin og endurnýggjanin av skipaflotanum vil bera við sær, at tað vanliga arbeiðið á landinum umframt skipa- og jarnsmiðið verður at økjast, og at nýggj arbeiðsgevandi ídnaðarvirki sum flakavirki, tog-, snøris- og netavirki verða sett á stovn samstundis sum økjanin av skipaflotanum fer fram.

Henda økjan av arbeiðinum á landinum saman við tí, at tað óivað vil verða so, at nakrir av okkara fiskimonnum ikki verða at kunna taka lut í nútímans fiskiskapi, ið krevur serligt hegni, góða heilsu og kreftir, vil taka millum triðing og fjórðing av fiskimonnunum, ið nú vegna fartrot ikki sleppa til sjós ella sum einans sleppa at sigla eina stutta tíð av árinum.

Vit kunnu so statt minka kravið til skip við einum triðingi, og verður tá peningakravið at liggja um 65 mill. kr.

Tað er so, at nógvir, ið koma at yvirtaka skipini, verða ikki at orka at renta meiri enn 5—10 pct. av kostnaðinum, meðan tað aftur á hin bógvin verða fleiri, ið orka at rinda bæði 30 og 40 pct., og summir menn og feløg orka kanska at leggja á borðið allan peningin, ið skipið kostar.

Vit kunnu so statt rokna við, at hitt almenna saman við landsins privatu peningastovnum kann sleppa við at veita til vega $^{2}/_{3}$ av tí peningi,

ið nútímansgeranin og endurnýggjanin verða at kosta landinum sum heild tikið.

Hetta vil siga, at peningakravið til hitt almenna í skipabyggingarspurninginum verða at liggja um 45 mill. kr.

Ein 5 ára ætlan til nútímansgeran og endurnýggjan av okkara skipaflota vil krevja ein pening uppá 9 mill. kr. um árið frá tí almenna og privatum peningastovnum.

Vil ella kann hitt privata loysa hesa uppgávu?

Vit hoyra mætastu menn innan okkara vinnulív halda fram, at hin einstaki, ið aftaná seinasta veraldarbardaga brendi seg stórliga við at hava lagt ov nógv fyri seg til at klára í friðartíðum, hvørki kann ella vil «risikera» sín pening við at keypa ella seta seg fyri so dýr skip.

Av hesum kann ætlast, at tað verða einans fáir privatmenn, sum vilja seta sína ogn og formúgu í so dýr skip.

Skipaflotin kann so statt ikki væntast at verða endurnýggjaður av teim privatu, í hvørjumfalli ikki í stórum muni.

Ein kann ikki veita okkara sjómonnum før við at siga sum sagt hevur verið higartil her á landi, at tað mugu vera teir privatu vinnulívsmenninir, ið skulu hava at lúka allar uppgávur innan fyri vinnulivið.

Men hvat so?

Skulu vit gevast á hondum!

Skulu vit lata endurnýggjanina av okkara skipaflota falla? Tað vil siga, skulu vit lata okkara fólk søkka niður, longri og longri niður í arbeiðsloysisins vónloysi?

Hertil má verða svarað eitt samfelt: *Nei!*

Landið má átaka sær at fáa tey neyðturvuligu skip til vega.

— — —

Ávist var, at fartrotið elvdi landinum eitt árligt nationaløkonomiskt tap uppá ca. 45 mill. kr., sum innløguviðurskiftini nú liggja.

Ein kapitalinvesteringur, ið gevur 45 pct. aftur í. árið, má sigast at vera góður, og tá er vinningurin við tí við kapitalinvesteringini økta arbeiði á landi ikki tikin við.

Sjálvandi er tað ómøguligt at siga nakað við vissu um, hvat ið framtiðin vil geva. Klókur maður er fyrivarin. Tekur fyrivarni viðvíkjandi øllum framtiðarætlanum.

Tó eitt kann ikki verða gjørt.

Føroyingar kunnu ikki taka tað fyrivarni ikki at byggja skip, av tí at skipabygging kann verða ov dýr, um rakár koma aftaná hesi feiti innløguár hjá øllum teimum, ið før hava átt. Tí skip er sjálv lívsnervan í teirri føroysku tjóðini. Vit kunnu ikki koma uttanum, at skulu Føroyingar liva í Føroyum, megu teir hava skip, nýtímansfør. Her á landi kann einki figgjarlív verða plánlagt uttan við førum sum grundarlagi, førum og aftur førum.

Tá ið sum sagt hitt privata initiativið ætlandi ikki orkar uppgávuna at endurnýggja okkara skipaflota, má hitt almenna taka sær um reiggj.

Í samband hervið kann vera ávist, at í Íslandi hevur hitt almenna tikið sær um reiggj at veita landinum skip. Íslendska ríkisstjórnin hevur soleiðis kontraherað um bygging av 45 skipum í Svøríki.

Vit eru í eins trongum skóm og Íslendingar, hvat ið skipum viðvíkir. Tí almenna her á landi skuldi soleiðis ikki ligið minni skylda á enn í Íslandi at nýta alla sína peningaligu og stjórnarligu megi til at veita sjómonnum før til vinnu.

Tað er beinan vegin eitt fólkakrav til løgtingið, at tað letur landið átaka sær at loysa skipaspurningin, so okkara fiskimenn ikki nýtast at liggja á landi vegna farloysi.

Peningaspurningurin.

Hjá tí almenna eins og hjá tí privata er málið í fyrstu syftu eitt peningamál.

Spurningurin hjá tí almenna verður, hvussu tað kann skipa fyri at fáa tann neyðturvuliga pening til vega.

Hevur landið yvirhøvur møguleika at fáa sær henda pening?

Hvat orkar hitt almenna, um tað ger seg til harra yvir allari kontantari peningamegi í landinum?

Hvat orkar tað um tað harafturat ger seg til harra yvir landsins føstu og leysu ognum soleiðis, at peningur kann verða lántur uppá tær?

Í pundum eru hjá amtinum	£	1.741.364,–
bankunum	£	424.721,–
útflytarum	£	409.085,–
	£	2.575.170,–

Hetta er til kurs 22,2 í krónum *57.168.774,40* og kann í stórum verða tikin sum ein mynd av teirri kontantu megini hjá landi okkara.

Virði av hini føstu ognini er ómøguligt at siga av tí, at ongar hagskýrisligar upplýsingar eru atkomiligar.

Her kunnu bert virðini verða sett eftir ætli við lágum nútíðarprísum:

Skip.

5 trolarar	kr.	2.000.000
100 skonnartír og sluppir	»	10.000.000
100 smærri dekksfør	»	1.000.000

Hús.

5.000 sethús og onnur hús	»	75.000.000

Jørð.

2.600 merkur	»	20.000.000
Tilsamans	kr.	108.000.000,

ið í hesum døgum má ætlast at vera skuldaleys ogn og so statt tøk at seta í veð fyri lán.

Í almennum grunnum.

Vinnulánsgrunnurin	kr.	1.217.746,71
Socialgrunnurin	»	1.117.880,81
Ábyrgdargrunnurin	»	755.000,00
Tiltaksgrunnurin	»	700.000,00
Valutagrunnurin	»	1.115.654,48
Tryggingargrunnurin	»	6.023.102,01
	kr.	10.929.384,01

Í bankum og sparikassum.

Føroya banki:	
Munur á innistandandi íroknað bankans egna pening og útlánum pr. ult. sept. 1944	kr. 22.345.515,11
Sjóvinnubankin:	
Munur (á sama hátt sum við Føroya Banka) pr. ult. sept. 1944	» 13.906.265,42
Færø Amts Sparekasse:	
Munur (á sama hátt sum við bankunum) pr. 1.4.44	» 15.304.941,47
Norðoyar Sparikassi:	
Munur (á sama hátt) pr. 1.4.44.....	» 1.194.605,54
Suðuroyar Sparikassi:	
Munur (á sama hátt) pr. 1.4.44.....	» 138.553,16
	kr. 52.889.880,70

Henda kontanta avlopsmegin saman við teimum lánum, ið vit kunnu gera uppá ta skuldalcysu ognina, er ein figgjarlig orka, ið kann, um hon verður planøkonomiskt nýtt sum ein tjóðarorka, meiri enn so greiða peningaspurningin viðvíkjandi nútímansgeranini og endurnýggjanini av okkara skipaflota. Til hesa uppgávu vildi einans kravst ein lítil partur av tjóðarorku okkara, tá ið vit við lóggávuvaldi okkara hava givið tí almenna, løgtinginum atkomuligt at nýta hesa orku sum bílig og lagalig lán viðvíkjandi tí partinum av orkuni, ið tingið ikki sjálvt eigur.

Hvussu lániviðurskiftini eru viðvíkjandi skipabygging í:
Danmark, Noregi og Íslandi.

Danmark.

Seinasta uppskotið, ið kent var, miðaði ímóti, at Fiskeribanken skuldi læna eftir fylgjandi reglum:

1. Fiskimenn og fiskimannasamtøkur skuldu eiga fyrsta rættin til lán.
2. Lán: 60 pct. av skipavirðinum.
3. Studningurin: 20 pct. av skipavirðinum.
4. Fiskimaðurin, fiskimannasamtøkur og feløg skuldu veita atvikavist minst 20 og 40 pct. til vegar sjálvi.

Noregi.

Bankarnir læntu ímóti 1. veðrætti, hin almenni lánigrunnurin uppá 2. og lægri veðrætt. Fiskimenn og fiskimannasamtøkur áttu vanliga fyrstarættin til lagalig lán.

Íslandi.

Hitt seinasta uppskotið viðvíkjandi skipanini av almennum lánum til fiskivinnuna í Íslandi ljóðar soleiðis:

Gr. 1.

Fæ, sum statsins framkvæmdasjóður veitir til bygging av fiskiskipum, skal verða lagt í grunn, sum nevndur er «Fiskiskapastudnings- og lánigrunnur». Grunnsins fæ skal nýtast soleiðis, sum hesar lógir áseta, annað-

hvørt sum beinleiðis studningur ella sum rentuleyst lán til keyp av fiskiskipum.

Gr. 2.

Eingin kann fáa studning ella lán sambart hesar lógir, uttan at skipini, ið lænt verður til, eru bygd eftir uppdrátti, sum Vinnumálaráðið hevur góðkent og Fiskifelag Íslands hevur viðmælt. Á sama hátt við skipanna maskinum. Skipanna bygging skal fara fram undir umsjón, ið Vinnumálaráðið ásetur.

Gr. 3.

Vinnumálaráðið setur 5 manna nevnd, ið fær í hendi at býta út grunnsins fæ sambart umbiðið uppskot frá fiskifelag Íslands. 4 av nevndarinnar limum skulu vera valdir eftir uppskoti frá altingsins flokkum ein av hvørjum flokki. Tá nakar ynskir studning ella rentuleyst lán til bygging av fiskiførum, skal hann senda umsókn um tað til nevndina; hjá umsóknini skulu verða løgd umsøkjarans status eins og váttorð frá skattastjóranum ella skattanevndarinnar formanni um umsøkjarans høvuðsvirki seinastu tvey árini. Framvegis skal vera viðløgd frágreiðing um skipsins stødd, ætlað slag og stødd maskinunnar og støddina av keypipeninginum, sum er ásettur ella ætlaður.

Gr. 4.

Tá ið studningur ella rentufrí lán verða veidd, skulu skipsreiðarar, sjómenn, sjómanna og skipsreiðaranna feløg, sum hava drivið fiskiskap sum høvuðsvinnu eiga fyrsta rættin, harnæst býa- ella bygdafeløg, ið byggja skip til økingar av arbeiðinum í býnum ella bygdini. Tá studningur ella lán verður avgjørt, skal leggjast lag í, hvussu umsøkjarans status er.

Gr. 5.

Stuðul til keyp av skipum má ikki fara upp um 75.000 kr., og skal stuðulin ikki vera meiri enn 25 pct. av skipsins keypipeningi. Lán verða einans veidd móti 2. og 3. veðrætti. Øll lánini tilsamans iroknað lán við 1. veðrætti, megu ikki kunna fara upp um 85 pct. av skipanna keypipeningi, tó ongantið hægri enn 100.000 kr.

Lánið skal vera rentuleyst at afturrinda í 10 til 15 ár við líka nógvum á hvørjum ári. Tá veitt eru rentufrí lán, skulu tey afturkrevjast soleiðis, at tey ikki steðga virkinum hjá avvarandi skuldara. Kravt verður at raksturin fer fram økonomiskt, eins og at kapitalurin ikki verður drigin frá driftini og nýttur til onnur endamál.

Gr. 6.

Søla av skipum, ið hava fingið studning ella rentufritt lán sambart hesa lóg, verður ikki loyvd uttan vinnumálaráðsins átekning á ognarskjalið og góðkenning við samstundis avgerð, um studningurin ella lánið heilt ella partaliga skal verða afturgoldið.

Um skipana virði við søluna er líka stórt ella størri enn keypiprísurin, skal studningurin afturrindast allur. Annars skal verða afturgoldin munurin á skipsins virði, mett eftir søluprísinum, og ti peningi, sum upprunaliga varð goldin fyri skipið av ognarmanninum. Um søluprísurin er lægri enn tann upprunaligi prísurin minus studningin, sum ognarmaðurin hevur goldið fyri skipið, skal afturgjaldanin av studninginum ikki verða kravd. Ráðharrin skal innheimta «Fiskifélag Íslands» uppskot í hesum tilfelli. Tá ið skipseigari, ið hevur fingið studning ella lán sambart hesa lóg, ynskir at selja skipið, skal avvarandi kommuna hava fyrsta keypirætt til skipið til somu treytir sum hjá øðrum.

Gr. 7.

Tá ið skip, sum hava fingið studning ella lán sambart hesar lógir, ikki eru til fiskiskaps ella fiskaflyting, ella um skipini hava verið brúkt til onnur endamál í meiri enn 6 mánaðar, skal vinnumálaráðharrin krevja studningin ella lánið afturgoldið sambært frammanundan heimtað uppskot frá «Fiskifélag Íslands» frá sóknarstýrinum, har skipið er innregistrerað.

Gr. 8.

Stuðul ella lán sambært hesa lóg verða ikki goldin fyrr enn fiskifarið er liðugt bygt og kannað av skipsumsjónarmonnunum ella av vinnumálaráðsins umboðsmonnum.

Gr. 9.

Íslands Fiskiskapsgrunnur tekur skuldarbrøv fyri lánini, og til hansara verður avdrátturin goldin. Íslands Fiskiskapsgrunnur framleggur árliga roknskap til vinnumálaráðið fyri inngoldnan avdrátt í einum ári, og skal hesin peningur verða afturgoldin til grunnin; hetta arbeiði verður gjørt av fiskiskapsgrunninum uttan viðurgjald. Á sama hátt við útgjaldan av studningi eftir ráðharrans avgerð.

Gr. 10.

Teir, ið studning ella lán fingu sambart hesa lóg, eru skyldugir at avgreiða fiskiskapsgrunnskantórinum roknskap fyri skipsdriftina í tí skili, sum kantórið ynskir.

Gr. 11.

Nærri ásetingar viðvíkjandi hesi lóg kann ráðharrin seta í reglugerð eftir heimtaðum uppskoti frá «Fiskifelag Islands».

Javnaðarmenn hava á sinni, tá ið teir bretsku eikitrolararnir vóru fyri á tingi, sett fram uppskot um at læna pening frá Tryggingarsambandinum Føroyar til keyp av hesum førum.

Í fjør settu javnaðarmenn lógaruppskot viðvíkjandi einum frívilligum og tvungnum láni til Vinnulánsgrunnin.

Javnaðarmenn hava soleiðis langt síðani tikið støðu fyri og ávist møguleikan fyri at fáa skip við at nýta allar teir grunnar, ið tingið hevur vald á, eins og við lóggávuni at skipa fyri, at eisini ein partur av tí privata peninginum, ið annars ikki frívilliga vil bjóða sær fram til skipakeyps, kann koma at standa Vinnulánsgrunninum til nýtslu.

Men tá ið minnilutin bert í aðru syftu er við til at nýta Vinnulánsgrunnin og aðrar grunnar, ið standa undir tingsins valdi, til skipalán móti 2. og lægri veðrættindum, er tað tí, at hesin lánihátur ber í sær ógvuliga stóran vanda fyri, at nevndu grunnar kunnu koma at tapa allan sín pening, um fiskivinnan brádliga aftaná hákonjukturin, vit nú hava, dettur niður í ein konjunkturdal, sum — um ikki serlig styrkveitingar og verjunarskipan verður gjørd fyri skipaeigararnar — kemur at trýsta hópin av skipaeigarunum at lata skip sín av hondum til vanliga uppsølu.

Minnilutin heldur, at hesir grunnar hava so avgerandi og grundleggjandi uppgávur at lúka í okkara samfelagi, at hitt almenna eigur ikki einans at skipa fyri, at teimum verður ikki bert veidd hina bestu tryggjan ímóti tapum og oyðandi skákum, men haraftrat gevur teimum ávísar árligar innløgur til framhaldandi vøkstur og menning.

Viðvíkjandi nýtsluni av grunnunum til skipabygging heldur minnilutin tí í fyrstu syftu, at tingið eigur at tryggja teimum móti tapum uppá tann partin av láninum, ið eigur veðrætt aftaná tey 70 pct., ið eru lænt uppá skipið.

Minnilutin skjýtur so statt uppá:

Í fyrstu syftu:

Vinnulánsgrunnurin lænur sum higartil inntil 70 pct. av kostnaðinum móti 1. veðrætti og inntil 25 pct. ímóti 2. veðrætti við tingsins veðhaldan aftanfyri ella, um Vinnulánsgrunnurin og aðrir grunnar, ið eru undir tingsins valdi, ongan pening hava, tingsins vegna veitir ómúgvandi lántakarum garanti fyri eitt 4 pct. bankalán upp til 25 pct. av skipakostnaðinum.

Í aðru syftu:

Bankarnir og aðrir privatir peningastovnar ella einstakir menn kunnu fáa 1. veðrætt í skipinum fyri 4 pct. lán upp til 25 pct. av kostnaðinum.

Vinnulánsgrunnurin kann síðani lána 50 pct. av kostnaðinum ímóti 2. veðrætti í skipinum og inntil 20 pct. av kostnaðinum ímóti tingsins veðhaldan og 3. veðrætti í skipinum.

Stýrið í Vinnulánsgrunninum skal hava rætt til at læna uppá lániskjølini til viðari útlán, soleiðis sum frammanfyri er nortið við.

Í Vinnulánsgrunninum er ov lítil peningur at kunna loysa spurningin viðvíkjandi endurnýggjan av okkara skipaflota. Minnilutin setur tí fram aftur uppskotið um eitt tvungið lán sum uppískoyti til frívilligt lán, ið partarnir eru samdir um at seta fram uppskot um. Tann einstaklingurin ella felag, ið frívilliga hevur lænt ta peningahædd, ið er umtalað í uppskotinum til skipanina um tvungið lán, kemur sjálvandi ikki inn undir hesa lógina.

Harnæst mælir minnilutin til og setur uppskot um, at Tryggingarsambandið Føroyar og Landshandilin til Vinnulánsgrunnin skulu gjalda eina avgift uppá 50 pct. av sínum ágóða, tó ikki yvir ein pening, ið svarar til, hvat ið virkini annars vildu goldið í løgtings- og kommunuskatti, um tey vóru skattaskyldug. Í hesum viðfangi er at merkja, at hetta uppskotið eyðvitað forútsetir, at uppskotið um at sleppa øllum almennum driftum, virkjum og stovnum undan skatti verður samtykt.

Viðvíkjandi hesum spurningi kann verða vist á, at virki og stovnar hjá tí almenna hava sloppið undan skatti í Føroyum.

Fólk hava ikki mælt móti hesum ella kravt broyting; tað hevur so statt verið góðtikið av fólki, at hitt almenna skal vera í skattafrælsi.

Hetta frælsi má eisini sigast at vera beint og rímiligt. Hitt almenna eigur jú avlopið, reinágóðan av ummæltu virkjum og stovnum. Tí tørvar tessvegna ikki nøkur skattaskipan fyri at fáa fatur í pørtum av ella øllum hesum avlopi. Tann einasti spurningur, ið er ívingasamur í hesum máli er, hvussu skattainntøkurnar við eini skatting av almennum stovnum og virkjum vil koma at liggja hjá kommununum, um tær vildu mist ella vunnið við eini tilíkari skatting. Tað er dømt, at t. d. landshandilin eftir galdandi lógum er skattaskyldugur, og tað er í umbúnað at leggja skatt á Tryggingarsambandið Føroyar. Tað er eyðvitað, at eru hesi virki skattaskyldug sambart lógina, kemur skattaskyldan at raka øll almenn virki, bæði tey kommunalu og løgtingsins. Ravmagnsverk, telefonverkið og havnaverkini, ið øll sita við stórum innløgum, vilja koma at bera bæði løgtings- og kommunuskatt. Tað er eyðsað, at løgtingsskattur hjá hesum verkum vil fyri kommunur sum Havnar kommunu, Vágs, Tvøroyrar og Klaksvíkar kommunu koma at vera nógv tyngri fyri kommunurnar at missa enn tær skattainntøkur, tær vilja fáa við skatting av almennum stovnum. Tað er so statt eingin missur fyri kommununar, um tann skipan verður sett í gildi, at øll almenn virki og stovnar skulu vera skattafrí, og hjá løgtinginum vil tað vera greiðast ikki at lata skattaskyldu raka hesi virki og stovnar, men harafturímóti halda sær rætt til at leggja avgift á tey virki og teir stovnar, sum løgtingið til tær ymisku tíðir og í teim ymisku førum heldur eiga at taka lut í loysing av ymsum ávísum uppgávum við einum

parti av avlopi sínum. Samsvarandi tí frammanfyri standandi verður sett fram uppskot um at geva øllum almennum stovnum og virkjum skattafrælsi samstundis sum landsnevndin verður heimilað til saman við amtinum at áleggja nevndu stovnum og virkjum fastar avgiftir, soleiðis sum tørvur er á at fáa pening til røkjan og loysing av ávísum uppgávum.

Tað er upplýst, at um Tryggingarsambandið ikki sleppur undan skatti, kemur tað í fyrstu syftu fyri ta tíð, ið er farin, at rinda ein reiðiliga stóran skatt um 700.000 kr., nú beinan vegin.

Minnilutin mælir til, at samtykt verður við lóg at lata henda pening í Vinnulánsgrunnin. Hesin peningur eins og tann árliga avgift til grunnin eins og tingsins trygging móti tapi uppá eyka-lánini, ið eru givin við veðhaldi aftaná 70 pct. av virðinum í tí, sum lænt er til, vilja kunna bjarga grunninum at fara av fótum.

Fara vit sum frammanfyri skotið til undir eina 5 ára byggiætlan, verður peningakravið til Vinnulánsgrunnin og banka at falla nakað soleiðis:

1. árið.

Vinnulánsgrunnurin við deilvís løgtingsins veðhaldi	kr.	6.750.000
Privatir peningastovnar	»	2.250.000
Tilsamans	kr.	9.000.000

Annað árið kunnu vit rokna við, at Vinnulánsgrunnurin er vaksin við:

10 pct. afturrindan av lánum	kr.	1.000.000
Avgiftir og tingsins avlop	»	500.000
Tilsamans	kr.	1.500.000

Avgiftirnar og tingsins avlop av fíggjarrakstrinum er ilt at siga nakað ávíst um. Í hesum føri kann einans verða talan um ætl.

Seta vit grunnsins árliga vøkstur og afturrindanina til 1,5 mill. kr., má grunnurin fáa nýggjan pening, fyri at kunna fara undir næsta árið. Hesin peningur verður 6.750.000 + 1.500.000: 5.250.000 kr.

2. árið.

Vinnulánsgrunnurin við deilvís løgtingsins veðhaldi:

Tøkur peningur í grunninum	kr.	1.500.000
Nýggj lán til grunnin	»	5.250.000
Privatir peningastovnar	»	2.250.000
Tilsamans	kr.	9.000.000

Soleiðis verður roknað fyri komandi 3 ár: afturrindan 10 pct. av lánunum, grunnurin veitir, og ein avgift plus tingsins avlop, sett til 500.000 kr.

3. árið.

Vinnulánsgrunnurin:

Avdráttur	kr.	1.350.000
Avgiftir og avlop	»	500.000
Nýggj lán til grunnin	»	4.900.000
Privatir peningastovnar	»	2.250.000
Tilsamans	kr.	9.000.000

4. árið.

Vinnulánsgrunnurin:

Avdráttur	kr.	1.890.000
Avgiftir og avlop	»	500.000
Nýggj lán til grunnin	»	4.360.000
Privatir peningastovnar	»	2.250.000
Tilsamans	kr.	9.000.000

5. árið.

Vinnulánsgrunnurin:

Avdráttur	kr.	2.176.000
Avgiftir og avlop	»	500.000
Nýggj lán til grunnin	»	4.074.000
Privatir peningastovnar	»	2.250.000
Tilsamans	kr.	9.000.000

Tey nýggju lánini hvørt árið til Vinnulánsgrunnin kunnu fáast til vega deilvís við at læna uppá lániskjølini og deils við, at tingið ger nýggj tvungin ella frívillig lán hjá fólkinum og peningastovnunum.

Uppskot

frá *allari nevndini:*

I. Landsnevndini verður givið upp í hendi framvegis at arbeiði fyri at fáa menn til Bretlands at samráðast, eisini um møguleikan fyri at leiga skip til Føroya ella at fáa keypt hóskandi gomul skip.

II. Tá svar liggur fyri frá tingsins áheitan á bretska umboðsmannin Quarrell, tekur landsnevndin, eftir samráð við løgtingsins millumtinga sjóvinnunevnd og stýrinum fyri vinnulánsgrunnin, støðu til, hvat ið gerast skal.

III. Stýrið fyri vinnulánsgrunn Føroya løgtings fær heimild til at endurlæna skuldabrøv samsvarandi tí í álitinum framførda.

IV. Samtykt um lán til vinnulánsgrunn Føroya løgtings.

a. Føroya løgting tekur eitt lán upp til 3 miljónir krónur. Fyri lánið verða útgivin skuldabrøv í støddum 100 kr., 200 kr., 500 kr., 1.000 kr. og 5.000 kr. Av láninum verður latin renta 3 p. a., og tað verður afturrindað við 1/30 í hvørjari 11. juni og 11. desember termin, fyrstu ferð 11. desember termin 1945; tó skilar løgtingið sær rætt til at innloysa lánið alt ella ein part áðrenn ásettu terminur. Vanlig afturrindan fer fram á tann hátt, at so nógv skuldabrøv, sum svara til 1/30 av lánpeninginum í hvørjari rað, verða frábýtt við útdrátti sum notarius publicus tekur lut í.

Úrslitið av úrdráttinum verður lýst eina ferð í ti til rættarkunngerðir góðkenda blað í Føroyum við 3 mánaðar ávaring undan gjalddegnum.

Skuldabrøvini merkjast við litra og numrum soleiðis, at

skuldabrøvini	uppá	100	kr.	fáa	litra	A,
—	—	200	»	»	»	B,
—	—	500	»	»	»	C,
—	—	1000	»	»	»	D,
—	—	5000	»	»	»	E.

Lánið verður útgivið við ásettningsvirði.

Skuldabrøvini verða undirskrivað av løgtingsskrivstovustjóranum løgtingsins vegna.

Um lánið av løgtinginum verður uppsagt at innloysa alt ella ein ein part, má hetta verða gjørt til eina termin við ávaring 3 mánaðar frammanundan, í minsta lagi og við kunngerðan sum frammanundan ásett viðvíkjandi útdrignum skuldabrøvum.

Rentuseðlar og skuldabrøv verða, tá tey eru fallin til gjaldingar, greidd út á Gjaldstovu Føroya.

Av rentuseðlum og útdrignum skuldabrøvum verður eingin renta latin aftaná gjalddagin.

Viðvíkjandi mortifikatión uttan dóm av burturblivnum skuldabrøvum ella rentuseðlum verður gingið eftir leimum fyri Føroyar ásettu reglum í lóg nr. 145 frá 13. apríl 1938, gr. 16.

b. Lánið verður í fyrstu syftu ætlað til Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings, men nýtslan av tí verður annars at avgera av landsnevndini. Útreiðslur til renting og avdrátt og til útgávu og skipan av lántøkuni, ber nýtarin av láninum so leingi hann er til, og annars amtsgrunnurin, sum í hvussu so verður, ber ábyrgdina fyri renting og afturrindan av láninum.

Allar greinligari fyriskipanir um útgávu lánsins, útbjóðing til tekningar o. s. fr. verða gjørdar av fíggjarnevnd løgtingsins ella uttan fyri tingseturnar av landsnevndini.

V. Frá *nevndini:*

Tingsamtyktin í 1943 um býtan av rakstraravlopi av amtsgrunninum (sí tingtíðindi 1943, síðu 18) verður fyri árið 1944 broytt til, at alt avlopið verður lagt til vinnulánsgrunnin.

VI. Frá *minnilutanum* (P. M. Dam):

FORSLAG

til

midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Laan til Lagtingets Vinnulánsgrunn.

§ 1.

Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulánsgrunn bemyndiges til mod Amtsfondens Hæftelse at optage de fornødne Laan til Tilvejebringelse af Kapital og Lagtingets Vinnulánsgrunn til Udlaan, Køb, Nybygning, Ombygning om Modernisering af Skibe til Fiskeri og Fragtfart, Køb af Maskiner og Redskaber af enhver Art, til elektriske Kraftstationer, til Modernisering og Udvikling af Landbruget, til Anlæg af Fabrikker og nye Virksomheder og Udvikling af allerede eksisterende Virksomheder.

§ 2.

De i Prgf. 1 omhandlede Laan optages enten som frivillige Laan eller, hvis Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulánsgrunn anser det for nødvendigt, som tvungne Laan efter nedenstaaende Regler.

§ 3.

Enhver paa Færøerne hjemmehørende Person og Selskab er, hvis Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulánsgrunn i Henhold til § 2 træffer Bestemmelse herom, for saa vidt vedkommende ikke allerede har ydet det afkrævede Beløb ved frivilligt Laan, pligtig til at indbetale som Laan til Lagtingets Vinnulánsgrunn 100 Kr. for hvert fulde 1000 Kr. af sin Formue over 10.000 Kr. opgjort paa følgende Maade:

1. Formue bestaaende af fast Ejendom, Fabriksanlæg, Maskiner, Skibe og Baade beregnes til det halve af Værdien i Handel og Vandel.
2. Formue bestaaende af kontante Penge beregnes til det femdobbelte af det paalydende.
3. Formuer bestaaende af Værdipapirer og Indskud i Pengeinstitutter beregnes til det dobbelte af paalydende eller det dobbelte af Værdien.
4. Andre Formueobjekter, herunder udestaaende Fordringer, beregnes til den fulde Værdi.
5. Der bortses fra Formue bestaaende af eget Beboelseshus, Indbo og personlige Brugsgenstande.

§ 4.

Laanet kan til enhver Tid tilbagebetales af Lagtingets Vinnulánsgrunni.

Laanet er uopsigeligt fra Laangiverens Side indtil 1. December 1950. Efter dette Tidspunkt kan Laangiveren forlange Laanet med Renter tilbagebetalt med 2 Maaneders Varsel til den 1ste i hver Maaned. Delvis Tilbagebetaling kan ikke forlanges.

Under særlige Omstændigheder kan Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulánsgrunn give Tilladelse til Tilbagebetaling før den 1. December 1950.

§ 5.

Laanet forrentes med 2,5 pCt. pro anno af Laanesummen for hvert fulde Aar, Laanet har henstaaet. Renten beregnes fra den 1ste i den efterfølgende Maaned, efter at Laanet er fuldt indbetalt. Renten tilskrives Laanet og forfalder til Betaling sammen med Laanets Tilbagebetaling.

Laanet bestyres af Bestyrelsen for Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings, der træffer Bestemmelse om Anvendelse af de laante Midler til de i § 1 nævnte Formaal.

§ 6.

Alle nærmere Bestemmelser vedrørende de i § 2—5 omhandlede tvungne Laan, herunder alle fornødne Bestemmelser om Opgørelse af Laangivernes Formue, om Laangivernes samt om Pengeinstitutters og andres Pligt til at meddele Oplysninger og om Indbetaling og Opkrævning af Laanene, fastsættes af Amtmanden efter Indstilling fra Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulánsgrunn og Landsnævnet.

Undladelse af at meddele paabudte Oplysninger, Meddelelse af urigtige Oplysninger samt anden Overtrædelse af nærværende Bestemmelse eller af de af Amtet i Medfør af nærværende § givne Bestemmelser, straffes med Bøder, der tilfalder Amtsfonden, eller med Hæfte.

UPPSKOT
til
bráðfengis fyriskipanir fyri Føroyar um lán til vinnulánsgrunn Føroya løgtings.

1. gr.

Nevndin fyri vinnulánsgrunni Løgtingsins fær heimild til at taka tey neyðturvuligu lán, sum amtsgrunnurin ábyrgist, fyri at útvega pening til vinnulánsgrunn Løgtingsins til útlán til keyp, nýsmíð, umsmíð og umgerð av skipum eftir nútíðarhátti til fiskiskap og farmasigling, til keyp av allsligum maskinum og amboðum, til elektriskar máttarstøðir, til at menna og bøta um landbúnaðin eftir nútíðarlagi, til at stovna verksmiðjur og nýggj virki og stimbra virki, ið longu eru til.

2. gr.

Tey í gr. 1. umnevndu lán verða tikin annaðhvørt sum sjálvkrøvd lán, ella, tá nevndin fyri vinnulánsgrunn Løgtingsins heldur tað tørvast, sum ánoydd lán eftir reglunum, ið niðanfyri standa.

3. gr.

Hvør ein persónur og hvørt eitt felag, ið eiga heima í Føroyum, eru, um nevndin fyri vinnulánsgrunn Løgtingsins samsvarandi gr. 2 tekur avgerð um hetta, og tey ikki longu sjálvkrøvd hava lænt tann kravda pening, skyldug sum lán at gjalda til vinnulánsgrunn Løgtingsins 100 kr. av hvørjum fullum 1000 kr., ið hann ella tað eiga meira enn 10.000 kr., og verða ognirnar uppgjørdar á henda hátt:

1. Ognir, ið eru føst ogn, verksmiðjur, maskinur, skip og bátar, verða roknaðar til helvt av virðinum í vanligum handilsskapi.
2. Ognir, ið eru reiðupeningur verða roknaðar til 5 ferðir navnvirðið.
3. Ognir, ið eru virðisskjøl og innskot í peningastovnum, verða roknaðar til 2 ferðir navnvirðið ella 2 ferðir virðið.
4. Aðrir ognarlutir, har uppi í útistandandi skuldir, verða roknaðar til fult virði.
5. Undantiknar eru ognir sum egin sethus, húslutir og persónligir brúkslutir.

4. Gr.

Vinnulánsgrunnur Løgtingsins kann altíð rinda lánið aftur.

Lángevarin kann ikki siga láninum upp fyrr enn 1. december 1950. Eftir henda dag kann lángevarin krevja lánið afturgoldið við rentum við 2 mánaða ávaring til hin fyrsta í hvørjum mánaða. Ein partur av láninum kann ikki krevjast afturgoldin.

Í serstakligum førum kann nevndin fyri vinnulánsgrunn Løgtingsins geva loyvi til, at lánið er afturgoldið fyri 1. december 1950.

5. gr.

Tað verða latin 2,5 pct. p. a. í rentu av lánipeninginum fyri hvørt fult ár, lánið hevur staðið. Rentan er roknað frá 1. í mánaðinum eftir, at lánið alt er inngoldið. Rentan er skrivað aftrat láninum og fellur til gjaldingar, tá ið lánið verður afturgoldið.

Nevndin fyri vinnulánsgrunn Løgtingsins stendur fyri láninum og avger, hvussu hin lænti peningurin skal vera nýttur til tey í gr. 1 nevndu endamál.

6. gr.

Allar greiniligari reglur viðvíkjandi teimum í gr. 2—5 umnevndu ánoyddu lánum, haruppi í allar neyðugar reglur um uppgerð av ognum lángevaranna, um ta skyldu lángevarar, peningastovnar og aðrir hava til at geva upplýsingar, og um inngjald og innkrevjing av lánunum verða gjørdar av amtmanni eftir tilráðing frá nevndini fyri vinnulánsgrunn Løgtingsins og landsnevndini.

Tann, ið ikki gevur upplýsingar, ið honum er álagt at geva, gevur rangar upplýsingar ella á annan hátt brýtur hesa fyriskipan ella tær reglur, ið amtið gevur eftir hesari grein, verður revsaður við sekt, ið fellur til amtsgrunnin, ella við hefti.

VII. Frá *minnilutanum* (Dam):

FORSLAG

til

midlertidige Bestemmelser om kommunale (amts-kommunale Virksomheders Skattepligt m. v.

§ 1.

Offentlige Institutioner og Virksomheder, som drives for Amtskommunens, Thorshavn Kommunes eller en Sognekommunes Regning, eller som er oprettet i Henhold til Lov, er fritaget for enhver direkte Skat til Amtskommunen, Thorshavn Kommunes og Sognekommunerne, selvom Institutionen eller Virksomheden efter den almindelige Skattalovgivning vilde være skattepligtig.

Amtskommunens, Thorshavn Kommunes og en Sognekommunes Indtægter af Erhvervsvirksomhed er fritaget for enhver direkte Beskatning.

§ 2.

Der kan ved Bestemmelse truffet af Lagtingets Landsnævn og Amtmanden i Forening paalægges de i § 1 omhandlede Institutioner og Virksomheder eller enkelte af disse en særlig Afgift, som tilfalder Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings. Afgiften kan ikke fastsættes til et højere Beløb end den samlede Sum af den paagældende Institutions eller Virksomheds direkte Skat til Amtskommunen og Thorshavn Kommune (vedkommende Sognekommune) efter den for det paagældende Tidsrum gældende Skattelovgivning. De nærmere Regler med Hensyn til Afgiftens Beregning og Opkrævning fastsættes af Landsnævnet og Amtmanden i Forening.

§ 3.

Bestemmelserne i §§ 1 og 2 kan ikke bringes i Anvendelse paa Institutioner og Virksomheder, som efter den almindelige Skattelovgivning ikke er skattepligtige.

§ 4.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft med Virkning fra og med 1. Januar 1940. Afgift i Henhold til § 2 for Tiden fra 1. Januar 1940 indtil 31. December 1944 kan kun paalægges, forsaavidt Bestemmelse herom træffes af Landsnævnet og Amtmanden inden 31. Marts 1945. Bestemmelse om Afgift for senere Aar maa være truffet for hvert Kalenderaar inden det efterfølgende Aars 31. Marts.

Skattebeløb, som allerede maatte være betalt til Amtskommunen, Thorshavn Kommune eller en af Sognekommunerne af nogen af de i § 1 omhandlede Institutioner eller Virksomheder, kan uanset Bestemmelserne i første Stykke ikke kræves tilbagebetalt.

UPPSKOT
til
bráðfengis fyriskipanir um skattaskyldu o. a. hjá kommunalum (amtskommunalum) virkjum.

1. gr.

Almennar stovnanir og virki, ið eru rikin fyri rokning hjá amtskommunu, Tórshavnar kommunu, ella einihvørjari sóknarkommunu, ella ið eru sett á stovn samsvarandi lóg, sleppa undan øllum beinleiðis skatti til amtskommunu, Tórshavnar kommunu og sóknarkommununar, tó at stovnanin ella virkið eftir vanligu skattalóggávuni høvdu verið skattaskyldug.

Inntøkur, ið amtskommunan, Tórshavnar kommuna og einhvør sóknarkommuna hava av onkrari vinnu, sleppa frá allari beinleiðis skattalegging.

2. gr.

Tað kann við fyriskipan, ið landsnevnd løgtingsins og amtmaður í felag geva, verða álagt teimum í gr. 1 nevndu stovnanum og virkjum ella einstøkum av teimum eitt serligt avgjald, ið fellur til vinnulánsgrunn Føroya Løgtings. Avgjaldið kann ikki vera sett hægri enn tann samanlagdi beinleiðis skattur, ið henda stovnan ella hetta virkið átti at goldið til amtskommununa og Tórshavnar kommunu (viðkomandi sóknarkommunu) eftir skattalógunum, ið eru í gildi tað tíðarskeiðið, ið umvarðar. Greiniligari reglur viðvíkjandi útrokning og innkrevjing av avgjaldinum verða gjørdar av landsnevnd og amtmanni í felag.

3. gr.

Fyriskipanir í gr. 1 og 2 kunna ikki verða havdar frammi, tá ið hetta eru stovnanir og virki, ið eftir teirri vanligu skattalóggávuni ikki eru skattaskyldug.

4. gr.

Hesar fyriskipanir koma í gildi og virka frá 1. januar 1940 uppíroknaðum. Avgjald samsvarandi gr. 2 fyri tíðina frá 1. januar 1940 til 31. december 1944 kann ikki vera álagt uttan landsnevnd og amtmaður gera hetta av innan 31. mars 1945. Avgerð um avgjald fyri árini seinri skal verða tikin fyri hvørt kalendarár innan 31. mars árið seinri.

Skattapeningur, ið onkur av teimum í gr. 1 nevndu stovnanum ella virkjum longu kann hava goldið til amtskommununa, Tórshavnar kommunu ella eina sóknarkommunu, kann, hóast reglurnar í fyrsta stykki, ikki verða kravdur afturgoldin.

VIII. Frá *minnilutanum* (Dam):

Tingið mælir til, at landsnevndin og amtmaðurin skipa fyri, at Tryggingarsambandið Føroyar og landshandilin (Færøernes offentlige Vareforsyning) rinda eina avgift uppá 50 pct. av sínum yvirskoti roknað á sama hátt sum skattainntøkan verður funnin, tó skal avgiftin ongantíð vera størri enn peningurin, ið svarar til skattin, ið feløgini vildu goldið, um tey vóru skattaskyldug.

Avgiftin verður at fara í vinnulánsgrunn Føroya Løgtings og verður at nýta sum veðhald hjá grunninum móti møguligum tapum.

XI. Frá *minnilutanum* (Dam):

Aftaná 1. stykki í gr. 5 í «Samtyktir fyri vinnulánsgrunn Føroya Løgtings», samanber løgtingstíðindi 1941, síðu 59, verður sett:

«Grunnurin kann í serligum føri veita eykalán inntil 25 pct. av lánivirðinum móti løgtingsins veðhaldi.»

X. Frá *minnilutanum* (Dam):

Landsnevndin fær heimild til tingsins vegna at «kontrahera» um skipabygging.

Fiskivinnunevndin, 23. november 1944.

Ole Jacob Jensen. *J. F. Kjølbro.* *P. M. Dam.*

Kr. Djurhuus. v. f. *Jens Chr. Olsen.* m. f.

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókhandils.

Álit III

í

Løgtingsmáli nr. XIII—11/1944:

28 tingmál frá Javnaðarflokkinum.

Meirilutin í figgjarnevndini (nevndin undantikið P. M. Dam) skal í hesum áliti framseta sínar viðmerkingar til tey seinastu sjey málini av teimum, javnaðarflokkurin hevur lagt inn á ting. Hini málini eru viðgjørd í álitum I og II.

E. Búgva okkara fólk til farmasigling.

Meirilutin skal viðmerkja, at tað má sigast at vera umráðandi, at Føroyingar hava so væl útbúgvið fólk sum gjørligt, fyri at tað skal verða møguligt, tá bardagatíðin er av, at taka farmasigling upp sum ein mutandi part av okkara inntøkumøguleikum. Tað er so statt, at okkara skiparaskúli nú hevur nógvar næmingar, og eisini hevur víðkað um virki sitt, soleiðis at ungir menn har kunnu fáa sær eins góðan kunnleika og í øðrum londum. Meirilutin heldur ikki, at tað frá ti almenna kann verða gjørt meira í løtuni fyri at búgva okkara fólk út, serliga vísandi til at viðurskiftini gera tað trupult at útvega ungum monnum pláss at sigla úti í verðini, og á tann hátt fáa sær tann kunnleika, ið ikki kann fáast á skúlum. Meirilutin setur so statt einki uppskot fram í hesum spurningi.

F. Eina planøkonomiska skipan til tryggjanar av, at øll arbeiðsfør fólk skulu hava atkomu at fáa arbeiði.

Meirilutin skal vísa til meirilutastøðuna í tingmáli: Rætturin til arbeiði í 1943 (sí løgtingstíðindi 1943, síðu 327) og skal viðmerkja, at sjálvsagt má tað vera ásannað, at tann tíðin, ið kemur aftaná bardagan, kann

fara at verða trupul fyri okkara fólk, tí mangan fylgir arbeiðsloysi í hølinum á eini broytingartíð. Meirilutin vil tí fegin vera við til at virka fyri at lætta um trupulleikarnar, ið kunnu koma, men enn er tað ikki komið nakað uppskot, ið hevur vist vegin til hjálp uttan tey tiltøk, tingið í fjør og í ár hevur samtykt fyri at geva fólki munandi arbeiði við vega- og havnabygging o. a. Meirilutin setur tí einki uppskot fram í málinum, men má ásanna, at tað framvegis er soleiðis sum framført av minnilutanum (Dam) í 1943, at tað einasta, sum gerast kann í løtuni er, at eftirkanna og fyrireika tað virki, ið seinri skal setast á stovn.

G. Umskipan av okkara handilsviðurskiftum frá tí núverandi kapitalistiska systeminum til tað kooperativa.

Meirilutin skal viðmerkja, at kooperativ feløg eftir galdandi lóggávu hava fullan rætt til á ein hvønn hátt her í Føroyum at seta virkir á stovn og halda fram við tílíkum virkjum landinum til frama. Tað má ásannast, at kooperativ virkir í mongum londum hava verið landinum til stórt gagn, og tó hava hesi lond ikki hildið tað verið beint at geva tílíkum virkjum einkarrætt til at virka. Her í Føroyum halda vit tað besta má vera at halda fram á tann hátt, at bæði kooperativ feløg, onnur feløg og einstakir menn hava eins rætt til at virka, og meirilutin setur tí einki uppskot fram.

H. Setan av einum almennum hýringar- og arbeiðisávisingarkontóri.

Meirilutin skal halda fram, at hýringar- og arbeiðisávisingarkontór í øðrum londum eru skipað soleiðis, at tann, ið søkir sær arbeiðishjálp sjálvur millum tey, ið standa í boði velur tann, honum dámar best. Eitt tílíkt kontór kundi meirilutin tí gott tonkt sær at verið við til at sett á stovn, um tað varð prógvað, at tørvur var til tess. Hetta heldur meirilutin ikki liggur fyri, tí okkara viðurskifti eru ikki størri enn so, at tann, ið vil hava hjálp til arbeiði, lættiliga finnur tann, ið vil átaka sær hetta arbeiði. At seta eitt kontór á stovn á tann hátt, at kontórið skal ávísa, hvør arbeiðari ella sjómaður skal fáa plássið, sum stendur í boði, kann meirilutin ikki vera við til, tí tað má haldast at hetta einans kann verða til skaða fyri framdrift í okkara vinnu. Meirilutin setur einki uppskot fram.

I. Kooperativar fyritøkur og fiskimenn skulu eiga fyrsta rættin til skip, ið verða bygd við almennari hjálp.

Meirilutin skal halda fram, at tað er sjálvsagt, at fiskimaðurin eigur at verða styðjaður fram um aðrar, tá talan er um at geva almenna hjálp — lán ella tilskot — til skipabygging.

Meirilutin heldur ikki tað nýtist at gera serliga reglugerð um hetta, tí stýrið fyri vinnulánsgrunninum vil sjálvsagt velja fiskimannin, um umsókn liggur fyri frá einum fiskimanni og einum reiðara ella øðrum, og báðir partar kunnu skipa so fyri, at teir eru førir fyri at fáa skipið í gerð. Somuleiðis vil tað vanligt liggja við samgongu millum fleiri fiskimenn,

men um kooperativar fyritøkur, ið er samgonga av øðrum enn fiskimonnum ella á annan hátt er eins væl stillað sum ein reiðari, søkja um lán ella studning, tá mugu tílíkar fyritøkur ganga aftur um fiskimannsins rættindi. Meirilutin heldur ikki tað er neyðugt at seta serligt uppskot fram í hesum spurningi.

J. Útlendsk reiðarfíir fáa rætt til at arbeiða í Føroyum við somu skatta- og øðrum treytum, ið eru galdandi fyri føroysk virki, tó við skyldu til at nýta føroyska manning so langt sum hon er til taks. Tá ið talan er um serligar kvalifikatiónir, ið tørvur er á, og sum ikki finnast í landinum kunnu undantøk gerast.

Meirilutin kann ikki vera við til at geva nakað óbundið almennt loyvi til, at fremmandir koma og nýta okkara oyggjar til støðu fyri teirra veiðu ella teirra virki. Tað er í skrivinum til tingið frá javnaðarmonnum skotið upp, at teir skulu nýta føroyska manning mest gjørligt og lata skatt her, men tað kann væl hugsast, at tað almenna í einstøkum førum vil seta fleiri treytir fyri at loyva fremmandum monnum at virka her. Um tilíkt skuldi komið fyri, so eigur tað at verða umhugsað í hvørjum einstakum tilfelli, og tað eigur at verða gjølla umhugsað, um tílíkt virki kann koma at verða til hindurs fyri okkara landsmanna virki her heima, eins og tað væl kann vera, at loyvi í einkultum førum eigur at verða bundið av koncessiónsgjaldi (avgift) í staðin fyri ella við síðuna av skattskyldu, ella av, at einans avmarkaðar havnir verða til nýtslu fyri teir fremmandu, ið her ynskja at seta virki á stovn. Meirilutin kann ikki vera við til at seta uppskot um at geva nakað hvønns-manns loyvi í hesum spurningi, men má taka fyrivarni fyri støðutakan, tá umsókn kemur frá onkrum, ið hevur hug at virka higani.

K. Kannan av vinnuvegamøguleikum.

Meirilutin skal vísa til, at tingið hevur nevndir sitandi í arbeiði fyri at kanna okkara viðurskifti í búnaðarspurninginum og í fiskiskapsmálum. Sjálvsagt eiga øll at vera við til at kanna allar teir møguleikar, ið kunnu útbyggjast her í Føroyum fyri ymiskari vinnu, hetta kann sigast eins væl um tað almenna og tann einstaka, men meirilutin heldur ikki tað kann gerast nakað meira enn gjørt er frá tí almenna, og setur tí einki uppskot fram í málinum.

Meirilutin setur einki uppskot fram í hesum málum

Minnilutin (P. M. Dam) vil í serligum áliti seta fram sínar viðmerkingar og uppskot.

Figgjarnevndin, 9. november 1944.

Th. Petersen. *Kr. Djurhuus.* *J. M. Fr. Poulsen.* *R. Long.*

P. M. Dam, *J. F. Kjølbro.* *P. Dahl.*
við fyrivarni.

Minnilutaálit

i

lagtingsmáli nr. XIII—11 1944 E:

Búgva okkara fólk til farmasigling.

Minnilutin (P. M. Dam) flytir fram:

Í eini samrøðu, ið minnilutin hevði við ein av mætastu stjórnarmonnum Bretlands um føroysk vinnulíkindi aftaná kriggið, spurdi Bretin:

«Hvussu eru viðurskiftini á landi og á sjógvi hjá tykkum?»

Tá ið hann fekk at vita, at tað bert vóru gróðralíkindi á landinum, og at tað einans var talan um lítið økið uppá hvønn mannin av dyrkiligari jørð, meðan vit lógu mitt í Atlantshavinum, helt hann fyri:

«Tit skulu sjálvandi royna at dyrka teir fáu dyrkiligu plettir, tit hava. Men eg skilji, at av landbúnað og ídnað kann fjøldin ikki liva.

Tit eru geografiskliga og framleiðsluliga vístir at liva av havinum og ti ídnaði, ið kann standa í samband við sjóvinnuna.

Her er so talan um tvinnar hættir: fiskiskap og farmasigling.

Hvussu ið verður skipað aftaná kriggið, kann eingin einstakur maður siga. Men málið hjá okkum Bretum, ið sita við ábyrgdini í dag, er at øll fólk og allar tjóðir, tær smæstu so væl sum tær størstu, skulu hava rætt til at arbeiða, rætt til at vinna, so at øll kunnu liva væl og hava nóg mikið.

Tykkum Føroyingum verður óivað givið arbeiðsmøguleiki á sjónum. Tykkara sjómenn kunnu ti einki betri gera enn málvíst búgva seg til fiskiskap og farma- og aðra sigling.

Tann tjóð, ið hevur hitt ikki bert raskasta, men hartil kønasta og ídnasta fólkið, vil koma at standa væl, ti hin sorlaði heimurin, ið nú skal uppbyggjast og føðast, vil altíð hava boð eftir røskum, dugiligum fak- og í aðrar mátar væl lærdum fólkum.»

Hvør kann ivast í, at Bretin hevur rætt?

At tæri er í okkara sjómonnum til at verða fyrstaflokks at taka upp kappingina í farmasigling og langfarasigling, er uttan allan iva.

Men hví standa Føroyingar tá heilt á berum viðvíkjandi farmasigling og langfarasigling landanna millum, verður ofta spurt.

Heilt á berum eru vit kanska ikki. Vit hava hildið uppi snarferðina millum Danmark og Føroyar.

Og vit hava, siga menn, ein hóp av sjómonnum, ið sigla úti bæði sum kaptainar, stýrimenn, maskinistar og dekksmenn. Hvussu stórt talið er á hesum monnum, liggur einki álítandi frammi um. Men ætlandi er tað nógv av lítið til, at tað kann leggja grund undir eina munandi vinnu í farmasigling. Eisini er tað ivingasamt, um vit kunnu rokna við, at teir av okkara monnum, ið hava barí seg fram til týðandi sessar í útheiminum, koma at verða falir, um vit hava brúk fyri teimum.

Vit megu í høvuðsheitini rokna við fólki, ið er heima hjá okkum. Men vit megu tessverri viðganga, at farma- og langfarasigling landanna millum er ein heilt ókunnug vinnugrein fyri okkara sjómenn, ið eru heima.

Spurningurin er so, hvat ið vit kunnu gera fyri at ala fram eitt stórt lið av okkara sjómonnum, ið kann taka upp farmasigling við tí dugileika, kraft og ídni, ið krevst fyri at kunna standa á jøvnum og helst fremri enn tilfelli er hjá okkara framúr kappingarfúsu og føru grannum og frændum.

Her er fyrst at taka til Norðmenn, ið høvdu, áðrenn heimsbardagin brann á og bardi hitt norska ríkið niður í ómegd, eina av teim størstu flotum til farma- og langfarasigling.

Tá ið okkara frændir Norðmenn kundu dubba og búna seg til eina farma- og langfarasigling, ið vann fram á odda, eitt navn, ið lýsir við heiður um allan heimin, er tað sjálvandi eisini møguligt hjá okkum Føroyingum um ikki í fyrstu syftu at vinna fremst, so tó at koma uppí og teljast sum valamenn í hesi vinnu.

Men hvat kann frá almennari síðu verða gjørt fyri, at fólk okkara málvíst skal taka upp farmasiglingar- og langfarasiglingaruppgávuna og gera hesa vinnu til ein týdningarmiklan tátt í Føroyinganna vinnulívi.

Eins og tilfellið er í flestu vinnum, soleiðis er lærdómur, venjing og praktiskt arbeiði avgerandi hjá monnum, ið skulu røkja og framarbeiða farma- og langfarasigling.

Tað er tí umráðandi, at okkara sjómonnum verða gjørdar lættar og atkomuligar gøtur til lærdóm í øllum sjómannskapi líka frá inn- og út-skipan av vørum og avrikan av øllum arbeiði umborð og til navigatión, «chartring» og umborð av reiðarunum.

Tað ræður tá um at fáa skipað so fyri, at okkara sjómonnum er atkomuligt til besta skúlaskap, navigatiónskúlar, maskinskúlar og serligar sjómannsskúlar.

Eisini ræður um at skipað verður fyri, at okkara sjómonnum verður lættliga atkomuligt at sigla í útheiminum.

Minnilutin skjýtur tí uppá:

1. Sjómonnum okkara verður gjørt lættligari atkomuligt til navigatiónsskúlar við, at hitt almenna tekur lut í vistarhaldsútreiðslum næminganna og veitir teimum frían skúla.
   Í hesum sambandi verður víst til minnilutans uppskot um, at tingið játtar 50.000 kr. til gjaldan av vistarhaldsútreiðslum hjá avbygdanæmingum.
2. Givið verður landsnevndini í hendi til næstu tingsetu at koma fram við einum uppskoti um setan á stovn av einum serligum sjómannsskúla.
3. Givið verður landsnevndini í hendi at samráðast við Danir, Norðmenn, Svíar, Bretar og aðrar tjóðir um at veita einum ávísum tali av Føroyingum loyvi at fara í farma- og langfarasiglingina hjá teim.

Uppskot:

Til ávísing til tey í álitinum framflutta uppskot verður málið beint í landsnevndina til avgreiðslu.

Á Tingi, tann 10. november 1944.

P. M. Dam.

Minnilutaálit

í

løgtingsmáli nr. XIII–11 / 1944 F:

Ein planøkonomisk skipan til tryggjan av, at øll arbeiðsfør fólk skulu hava atkomu at arbeiði.

Plánloysi er ofta skilaloysi.

Skilaloysið og ólagið kring heimin og ikki minst í Føroyum stavar frá og botnar í plánloysinum, ið hevur verið í framleiðsluni, produktiónini.

Hitt ræðuligasta av øllum ræðuligum, ið kann raka mannaættina, arbeiðsloysi, fór sum ein kreftskaði kring allan heimin undan bardaganum, ið nú leikar á.

Milliónherar í teimum ymisku stóru londunum, hundraðtúsundtal av monnum í teimum smærri londunum knúgvaðust til jarðar av arbeiðsloysisins forbannilsi. Píndust í svongd, hálva og heilnakin og heimleys.

Hetta óskil. Hetta ólag. Hetta ókristiliga hjartaloysi, hin versta fruktin av plánloysinum, ræðast menn at koma aftur í.

Tí hugsa menn allastaðni um, hvussu teir skulu stjórna landi og fólki fyri at sleppa undan hesum óskili; ólagi og hjartaloysi! Hvussu ið teir kunnu rýma frá tí ræðuliga og ómenniskjaliga kapitalistiska stýrislagnum.

Allastaðni rópa menn deyðsdómin yvir ta gomlu verðina, ið setti órætt í staðin fyri rætt, harðskap og valdstøku í staðin fyri rættvísi og menniskjaligheit.

Eitt av tí, ið menn nú tala mikið um, er tí at skipa ikki bert tað einstaka landið, men allan heimin planøkonomiskt.

At skipa eitt land planøkonomiskt vil siga, at stýrið í landinum ansar eftir, at framleiðslukeldurnar og virðini verða so umsitin, at teir ymsu framleiðslutættirnir og tey ymsu virðini verða at kunna geva tað, ið fólkinum tørvar, og í einum tílíkum skili, at nóg mikið verður av øllum til øll, og at javnvág verður ímillum nýtsluna, brúkið og framleiðsluna.

Tað dugur soleiðis einki, at allir menn verða jarnsmiðir, meðan aðrar uppgávur liggja ónomnar. Fólk hèvur eisini brúk fyri øðrum. Jarnsmiðirnir eiga ikki at vera fleiri, enn tørvur er á til jarnsmíð.

Tá ið talan er um at skipa okkara vinnulív planøkonomiskt, ræður fyrst at finna fram orkuna og møguligleikarnar, ið goyma seg í teim ymsu førum og kraftarmiðstøðum í landinum.

Tær kanningar, ið t. d. eru gjørdar av minnilutanum undir málinum um endurnýggjan av skipaflotanum, nr. VI—1/1944, sýna, at vit av tøkari peningaligari tjóðarorku eiga standandi í sterlingpundum kr. 57.168.714.

Soleiðis sum søla og fiskaprísir liggja, er kanska orkan vaksandi í hvørjum, men hon liggur í høvuðsheitini bara hjá nøkrum fáum.

Í nevnda áliti verður ætlað, at Føroyingar í óbundnari ogn eiga yvir 100 mill. kr., ið væl kann verða lænt uppá, og er greitt frá, hvussu stóran ólæntan pening okkara bankar og sparikassar hava, og hvussu stórir ið teir grunnar eru, sum beinleiðis ella umvegis verða stýrdir av tinginum.

Í sparikøssum, bankum og almennum grunnum stendur ólæntur peningur uppá um leið slakar 64 mill. kr.

Ein partur av hesum peningi ger tað, ið menn kalla at «ganga aftur», t. v. s. lánistøðirnar seta inn hjá hvørjari aðrari, og grunnarnir, ið eru undir almennari umsitan, seta inn hjá lánistøðunum.

Men taka vit ta verunligu peningaligu tjóðarorkuna sum verandi tær 57 millónirnar í sterlingpundum og tað, ið kann verða lænt uppá ta óbundnu ognina, eru vit á beinari leið.

Í eini planøkonomiskari skipan fyri okkara land verður fyrst talan um fylgjandi høvuðsstættir í okkara vinnulívi:

I. Fiskivinnan.
II. Landbúnaðurin.
III. Ídnaðurin.
IV. Skúlaskapur.

I. Fiskiskapurin.

Í hesum vinnulívstátti stíga fremstir at loysa spurningarnir:

a. Hýringarkantór.
b. Endurnýggjan og nútímansgeran av okkara skipaflota.
c. Fremjan av solumøguligleikunum og ansan eftir, at okkara søluvørur fáa bestu viðgerð.
d. Onnur vinna á sjónum enn fiskiskapur, t. d. hvalaveiða, farmasigling o. s. fr.
e. Flaka-, tog-, snøris- og onnur virki.

Til a. Hýringarkantór.

Um hetta mál hevur minnilutin serligt álit í øðrum máli, har skotið verður til at seta á stovn eitt serligt hýringarkantór til rættvísa býtan av siglingskjansunum, so raskir sjómenn, ið ongatið undir kríggsárunum hava sloppið at sigla, kunnu sleppa til sjós við skipum.

Til b. Endurnýggjan av skipaflotanum.

Sambært nevnda minnilutans álit verður endurnýggjanin av skipaflotanum at kosta vinnulánsgrunninum og okkara privatu lánistøðum um 32 mill. kr., tá ið roknað verður við, at endurnýggjanin fer fram í 5 ár,

og at vanligur avdráttur verður goldin av teimum, ið hava fingið lán til skip. Men tá verður í meðalskurði einans roknað við einum láni uppá $^2/_3$ av kostnaðinum. Hin seinasti triðingurin verður greiddur av teimum privatu sjálvum soleiðis, at summir menn ætlandi verða førir at gjalda skipið kontant, alt sum tað er, aðrir kanska helmingin, meðan aðrir aftur megu fáa upp til 95 pct. í lán.

Til c. Fremjan av sølumøguligleikunum og ansan eftir, at okkara søluvørur fáa bestu viðgerð.

Viðvíkjandi sølumøguligleikunum hjá Føroyingum í framtíðini er ilt at siga annað enn, lagdar megu verða allar árar umborð fyri at vinna bestu — og helst frí og óheft — sølurættindi í øllum londum.

Her verða tað tær stóru tjóðirnar, ið avgera. Vit kunna og megu tó við hvørjari atløgu lata okkara rødd ljóða við fynd og styrki.

Skip okkara megu verða før at fara undir alla veiðu, nøgdar- eins og virðisfiskaveiðu.

Eins týdningarmikið og skipini er, at vit altíð selja fyrsta flokks vøru, so góða, at eingin skal kunna koma og siga, at hann hevur betri viðgjørda vøru enn vit.

Hitt almenna má tí við teim tørvandi lógreglum og fyriskipanum strangliga ansa eftir, at viðgerðin av okkara fiski eins og av allari okkara framleiðslu, ið er ætlað at verða seld, fer fram við hegni, skili, ja vísindaligari vitan um «orsøk og virkning», um treytirnar fyri fyrstaflokks vøru og fylgjurnar, ið standast einstaklinginum eins og tjóðini av ringari viðgerð, ið ger okkara vørur til 2., 3., og 4. flokks vøru.

Eitt stig er tikið á hesa leið í ár, samanber málið hjá F. F. og javnaðarflokkinum á tingi í ár um tvungna ferskfiskavraking.

Men hetta er bara eitt fet. Vit megu halda áfram, megu hava okkara menn úti til vísindaliga kannan av marknaðarkrøvunum til fyrstaflokks vørur.

At hava menn úti kostar pening, men hann eigur at verða goldin av rakstrinum.

Til d. Onnur vinna á sjónum enn fiskiskapur, t. d. hvalaveiða, farmasigling o. s. fr.

Tað er eyðvitað umráðandi at fjølstreingja okkara vinnulív á havinum. Brestur ein strongurin, kunnu aðrir halda. Men hongur øll sjóvinnan á einum tátti, fiskiskapinum, fellur og stendur fólksins vælgerð við, hvussu hesin tátturin ber seg.

Roynt má tí verða at fáa ymsar vinnur í lag aftrat fiskiskapinum. Hvalaveiða er ein vinna, farmasigling onnur.

Stórt hvalaveiðufelag er stovnað, og vónandi verður tað at eydnast hesum felagi aftrat teirri hvalaveiðu, ið varð steðgað av krignum, at fáa nakað fyri okkara land og fólk munandi virki í lag.

Farmasigling hevur bigartil hert havt littlan týdning hjá okkum. Men hann er av teirri náttúru, at Føroyingar eins væl og t. d. Norðmenn kunnu koma at vinna sær mikil lívsevni við at taka hann upp sum ein aðaltáttin at loysa.

Farmasiglingarspurningurin er annars viðgjørdur á tingi í einum øðrum áliti av minnilutanum, og verður vist til tað.

Til e. Frystis, flakas, snøris og onnur virki.

Okkum trýtur ísvirki, frystihús. Serliga trýtur okkum á oyggjum við ongari skipahavn skjótfrystivirki til flakafrysting.

Tá ið fiskivinnan er komin í fulla gongd, verður brúkt nógv av togum, snørum, netum og øðrum greiðum. Hetta stóra veiðugreiðabrúk ætlast at vera gott grundarlag fyri togs, snøris og netavirkjum. Vit megu gera monnum og felagum møguligt at fara undir hesa framleiðslu. Hvussu nógv tey neyðturvuligt ís og frystihús, tog og snørisvirki og onnur virki í samband við fiskivinnuna koma at kosta, er ilt at ætla um. Verða settar einar 5 milliónir at nýta í 5 ár, og verður roknað við 10 ára afturrindan, eru hesar 5 milliónir í nýtslu = stívar 6 milliónir.

II. Landbúnaðurin.

A. Eigindómsviðurskiftir.

a. Uttanbygdajørð.

Tá ið jørð ikki er almenn ogn, skal hon eigast og nýtast av fólki í tí bygd, hon liggur í.

Viðvíkjandi bøi er niðursetubygd at rokna javnt við aðra bygd.

Við hesum verður sama krav til brúkara av ognarjørð at sita á jørðini, sum tað nú er krav til kongsfestararnar.

b. Útskifting.

Tað verður sett útskiftingararbeiði í gongd beinan vegin, og verður hildið fram uttan støðg, til tað er liðugt. Miðað verður ímóti einari fullfíggjaðari skipan av byggigrundsspurninginum, samstundis sum útskiftingin fer fram.

B. Friðan av dyrkaðum lendi.

a. Vetrarfriðing.

Hvør maður skal hava loyvi til at vetrafriða bø, annaðhvørt hann er bóndi, traðarmaður ella ognarmaður.

b. Hegnmál.

Mál viðvíkjandi hegn og markfrið verða gjørt til almenn politimál.

C. Jørð til uppdyrkan.

a. Dyrkiplánur.

Tað verður gjørdur dyrkiplánur yvir alla uppdyrkingarjørð í oyggjunum.

b. Seyðatraðir.

Fyri at kunna brúka ta jørð, ið ikki er skikkað til uppdyrkan, verða avlagdar seyðatraðir í so stóran mun, sum tørvur kann verða á. Seyðatraðirnar verða avlagdar við tí fyri eyga, at tær verða gjørdar til kulturbeiti.

c. Dyrkijørð.

Alt, ið tá er eftir av tí plánløgdu jørðini, skal kunna takast til uppdyrkan.

d. Dyrkiskyldá.

Dyrkiskylda, sum lógfest er, skal galda fyri alla dyrkijørð.

e. Vegir.

Almennir vegir verða lagdir í so stóran mun, sum plánleggingin krevur tað. Hesir vegir verða bygdir av sama peningi sum aðrir vegir.

f. Vatnveitingar.

Høvuðsvatnveitingar verða gjørdar í tann mun, sum plánleggingin krevur.

g. Hjálp til dyrking.

1. Ferðandi dyrkilið verða sett í arbeiði, og skulu tey hjálpa monnum til at velta upp úr nýggjum, inntil tann einkulti hevur fingið hálva trøðna umvelta.
2. Tað, ið traðarmaðurin sjálvur skal gera á trøð sini av nýdyrkingararbeiði, skal hann fáa so nógvan studning til, at hann skal kunna liva við sínari familju, meðan hann arbeiðir uppá tað.

D. Kongsgarðarnir.

Tað er ein verunleiki, at nógvir kongsgarðar nú á døgum bert geva ein brotspart av tí, teir áttu at givið innangarðs. Tá má verða gjørt skil á, hvussu nógv ein kongsgarður skal geva fyri, at festarin skal kunna sita við bønum. Tað má vera eftirlit við gørðunum hvørt ár soleiðis, at fyrisætið kann standa almenninginum til svars fyri, at tann almenna jørðin verður røktað soleiðis, at hon svarar sína samfelagsligu uppgávu.

Viðmerkingar. A.

a. Uttanbygdajørð.

Tað má verða eitt samfelagsmál at gera livikorini á bygdunum soleiðis, at fólkið ikki flytur hagani. Nógvar eru tær bygdir, sum minka, meðan fólkið savnast saman í havnaplássunum. Hetta er ein útviklingur, sum eigur at verða mótvirkaður so væl, sum til ber. Tað frískasta samfelagslikamið fáa vit, um landsbygdirnar framvegis verða ein stórur partur av tí samlaða fólkinum.

Eitt tað, ið fyrst er at gera fyri at støðga hesum streymi frá landsbygdunum til havnaplássini, er, at tryggja við lóg soleiðis, at tann jørð, ið liggur til bygdirnar, verður verandi í hondunum á teimum, sum bygdirnar byggja.

Sum nú er, verður jørðin útarvað til aðrar bygdir og tá fyrst og fremst til havnaplássini, og hartil verður keypt jørð av múgvandi uttanbygdafólki, vanliga ikki fyri útkomunar skuld, men meira fyri bara at eiga. Tað er lætt fatiligt fyri øll, at hesi viðurskifti eru stórur skaði fyri bygdalívið og megu halda uppat.

Javnaðarflokkurin ræður tí til, at avvarandi lógir verða broyttar soleiðis,

1) at jørð, hvørki við arvi, sølu, gávu ella á annan hátt verður latin út úr bygdini,
2) at tann sama ásætistreyt, sum er á kongsjørð, verður gjørd galdandi fyri ognarjørð.

b. Útskifting.

Einhvør, ið vil jarðarbrúkinum væl, má fult út styðja tankanum um útskifting soleiðis, sum nú er, at ein og sami maður eigur upp til 100 smástykkir í bønum, ger, at bøfriðurin verður brotin, at alt arbeiði verður torført, at nýmótans amboð illa kunnu brúkast, og at tað ber illa til at byggja á jørðini.

Men samstundis sum útskifting av hesum orsøkum avgjørt er neyðug fyri trívnaðin av landbúnaðinum, er tað eisini neyðugt at koma til ein útskiftingarhátt, sum bæði er bíligari og skjótførari enn tann, sum higartil hevur verið nýttur. Eftir sum hetta arbeiði higartil hevur kostað, sleppa vit ikki bíligari enn fyri 5 milliónir kr. at útskifta Føroyar, og við tí tempo, ið verið hevur, kemur tað at taka 60 ár at gera liðugt.

Samstundis skulu vit leggja til merkis, at tann fínmáling, ið verður gjørd við ta útskifting, ið verið hevur, verður illusorisk í tí, at tað, sum tann endaliga útskiftingin hvílir á, er ikki nøkur fínmáling, men ein rein og sker meting yvir, hvat ið hvørt stykki kann vera vert.

Útskifting í minni mát fer dagliga fram í Føroyum; menn keypa og selja jørð, býta um sínámillum, leggja búgv sundur, leggja traðir inn o. s. fr. Til hetta arbeiði verður brúkt ein einfald máling og eitt praktiskt «skønn», sum fult út má sigast at vera tilfriðsstillandi. Um henda praktiska og einfalda útskifting hevði verið útvegað til at umfata heilar bygdir og sameind við einfaldari korttekning, vildi arbeiðið kunna gingið bæði skjótt og biliga frá hondini og verið ivaleysa gott fyri sítt endamál. Bygdirnar í Føroyum hava í síni tíð verið útskiftar av eigarunum sjálvum í tí, at bøurin upprunaliga hevur verið felagsogn. Nakað líknandi má kunna gerast aftur fyri uttan at kosta milliónir.

Minnilutin ræður tí til, at alt hetta verður simplificerað soleiðis:

1) Tað verður gjørd ein útskiftingardeild undir landbúnaðarskrivstovuni. Henda deild verður fyristaðin av einum landinspektøri, ið verður útskiftingarkonsulentur fyri landið.
2) Landmálingin við útskiftingina verður framd av fólki, ið av útskiftingarkonsulentinum eru «instrueað» til tað og við teimum málingarkønu kreftum, ið kunna vera í landinum.
3) Tað verður álagt dómaraskrivstovuni at fáa øll eigindómspappír í ordan áðrenn útskifting verður at fremja í einari bygd.
4) Hitt almenna rindar alla sakkøna leiðslu, meðan øll hjálp til uppmálingina, ið er neyðug aftrat tí, ið leiða skal arbeiðið, verður goldin av jarðareigarunum.
5) Alt arbeiðið skal «simplificerast» soleiðis, at tað bert tekur ein brotspart av kostnað og tíð.
6) Til hetta arbeiði verður avsett 50.000 kr. í 10 ár, og tokna vit við, at tað skal vera nóg mikið til at gera útskiftingararbeiðið liðugt.

B.

a. Vetrarfriðing.

Tað má innførast tað «principp», at einhvør eigari ella brúkari av dyrkijørð, má hava fullan rætt til at brúka og nýta jørðina alt árið uttan at nakar annar skal hava nøkur rættindir inni har av nøkrum slagi, hvørki við grasningi, torvskurði ella øðrum. Tann núgaldandi lógin má viðkast til eisini at geva bóndum og ognarmonnum rætt til at loysa sína jørð úr tí tvungna felagsskapi, sum hon nú er í viðvíkjandi vetrargrasningi og øðrum.

b. Hegnmál.

Tann lóg, ið nú er galdandi fyri hegn- og markfrið tykist okkum í tí stóra og heila at vera góð. Men tað sær út til, at tað gongur trupult við at halda hana. Tessvegna er tað beinast at geva henni tað uppískoyti, at sakir, ið verða reistar eftir henni verða at viðgera sum almennar politisakir. Tað eru ógvuliga nógv dømi um, at lógin verður so illa hildin, at tað eru heilar bygdir burturav, sum eru við at ganga undir av tí, at garðarnir halda ikki seyði, og av tí, at allur almindiligur óskikkur sleppur ótálmaður at breiða seg, sum t. d. at sleppa rossum leysum á bøin og hartil neytum, gásum, høsnum og dunnum, samstundis sum tað ikki verður havt fyrilit fyri at nerva høfriðin við at ganga allastaðni óansað uttan at brúka vegir. Tá ið tann einstaki maðurin vendir sær til politiið ella til hegnsýnskommissiónina, fær hann vanliga einki annað burtur úr sakini enn grannaklandur og ósemju um bygdina.

C.

a. Dyrkiplánur.

Sum nú er, verður í tí stóra og heila ein sak reist fyri hvørja troð, ið søkt verður. Vanliga er fyrsti mótstandurin móti einari sovorðnari sak fatin, at bagaeigarin sigur nei. Um so er, at tað er kongs, kann jarðarráðið seta á, at troðin skal latast, men festarin kann so leggja málið fyri

landvesinskommissiónina og yvirlandvesinskomissiónina. Hetta tekur langa tíð og førir mangan til einkis. Er tað ein ognarmaður, kann jarðarráðið einki gera enn kæra málið til landvesinskommissiónina. Hesar sakir hava higartil ongatíð fört fram, tá tær fyrst eru komnar til yvirlandsvesinskommissiónina, allar eru feldar. Hartil hevur yvirlandvesinskommissiónin, meðan Bonnevie hevur verið formaður, givið kennilsi, sum setur uppdyrkingarmálið til síðis fyri neytagrasningi í haganum. Alt hetta ger, at uppdyrkingarmálið má leiðast inn í eitt heilt nýtt spor, soleiðis, at tað verða ikki landvesinskommissiónirnar, sum í hvørjum einstakum tilfelli fella sakirnar ella draga tær út og gera tær dýrar. Jørð til uppdyrkingar má takast upp sum ein einasta sak fyri heila landið og loysast eina ferð fyri allar fult út.

Hetta arbeiðið kann ætlast at koma at kosta 50.000 kr. fyri allar Føroyar.

b. Seyðatraðir.

Fyri at fjallið í erva, tann jørðin, ið ikki dugur til uppdyrking, kann brúkast til seyðabeiti, verða seyðatraðir at leggja av í sovorðnari støddd, at tær, tá ið tær eru dyrkaðar ella gjørdar til kulturbeiti, kunnu hoyføða seyðin um veturin.

Tann, ið hagan missur, skal fáa almenna hjálp til at gera traðirnar til við burturavpeningi, ið kemur inn fyri avloysan av vetrarfriðing, sølu av traðarjørð, byggigrundum o. s. fr.

c. Dyrkijørð.

Tað, ið eftir er av jørðini — burtursæð frá vegum o. t. — verður latið til uppdyrkan í støddum, sum svara til «princippið»: Sjálvforsýning av mjólk, eggum, eplum, grønmeti og til deils av kjøti. Stórbrúk verða ikki upprættað av hesi plánløgdu jørðini, av tí royndir vísa, at tað lítla brúkið verður betri røkt í Føroyum enn tað stóra og framtíðin verður ivaleyst ikki løtt fyri føroyskar vørur at konkurera í á marknaðinum, meðan framleiðsla til sjálvforsýning altíð vil loysa seg, samstundis sum tað lítla brúkið eisini loysir eina «psykologiska» uppgávu í samfelagnum, at geva tí einstøku familjuni fast tilknýti til sín bústað og hollasta tilknýti til náttúruna, til gleði og heilsubót.

d. Vegir.

Almennir vegir verða lagdir í so stórt mát, sum innleggjuplánurin krevur tað. Hesir vegir verða kostaðir av sama peningi, sum vanligir vegir verða gjørdir fyri. Tað má ásannast at vera ein treyt fyri, at jørð skal verða dyrkað, at vegir ganga til stykkið. Tað besta er, um hvør familja situr á sínari trøð. Og tað er ikki gjørligt, um ikki vegirnir koma.

e. Vatnveiting.

Tað er so mangan, tá ið økir verða løgd inn til uppdyrkingar, at høvuðsvatnveitingar verða gjørdar, ið skulu tæna til felagsavrenning fyri heil økir, soleiðis at tann einstaki traðareigarin kann drena sína trøð hará, og soleiðis verða ótálmaður av grannum, ið mangan ikki góðvilliga vilja

gera sín part. Mangan eru eigarar uppi í, sum ikki hava arbeiðsført fólk í húsinum. Tað førir vanliga til, at ein veit, sum fyri at virka má gravast ígjøgnum fleiri stykkir, verður liggjandi órørd. Hesar høvuðsveitir, sum jú vanliga verða «reguleraðar» áir, eiga at verða við á innleggjupláninum og eiga at verða gjørdar av tí almenna eins og vegir, lendingar o. t., av tí at tað vanliga eru ov stór arbeiði fyri tann einstaka.

f. Hjálp til dyrking.

Tað er neyðugt at fáa tey nýmótans amboð, ið hóskandi kunnu vera til uppdyrkan og annað jarðararbeiði. Hóast hesi amboð, vil tó verða neyðugt at gera stórt arbeiði á traðunum við hond, tí tey mekanisku amboðini best kunnu hugsast a) at koma á stykkið at byrja við at beina grót burtur og ávirka veitirnar og b) at pløga og saksa eftir at veitirnar eru fullførdar við handarbeiði.

Hetta maskinarbeiði skal veitast traðarmonnum fyri einki. Og hartil skal ein maður fáa so nógvan studning til at arbeiða tað, ið neyðugt er í sambandi við maskinarbeiðið, at hann kann liva av tí, meðan tað varir.

Vit kunnu rokna við, at tað liggja 1300 ha av ódyrkaðari jørð innanfyri garðar í Føroyum, og at tað er trongd til innleggjan av øðrum 1200 í teimum komandi 5 árunum.

At gera hesar 2500 ha til bø við brúk av hóskandi maskinkraft kann metast at kosta 300 arbeiðisdagar fyri hvønn ha, harav helvtin handarbeiði. Seta vit á, at maskinarbeiðið verður goldið við 10 kr. um dagin, hevur ein maður 10 kr. + grøðina av tí hann hevur arbeitt fyri at dyrka sína egnu jørð upp úr nýggjum. Hetta mannsarbeiði kostar so tilsamans $2500 \times 150 \times 10 = 3^3/_4$ mill. kr.

Fyri at maskinarbeiðið skal verða gjørt, kann ætlast at krevja 8 dyrkilið. Við dyrkilið meinast her 2 kønir menn við tilhoyrandi deild av amboðum. Hesi amboð heldur javnaðarflokkurin eiga at verða keypt í einum tíðarskeiði av 5 árum, soleiðis at eitt lið kemur hvørt av teimum báðu fyrstu árunum og 2 hvørt árið tey síðstu trý.

Amboðini metast at kosta	kr.	160.000
Drift av amboðunum í 5 ár.....	»	630.000
Mannsarbeiðið er sett til.....	»	3.750.000
Tilsamans at dyrka 2500 ha.....	kr.	4.540.000
Kostnaðurin um árið í 5 ár.....	kr.	908.000

Hetta vildi givið ein grøðitilvøkstur uppá 100 byrður fyri hvønn ha. Seta vit hetta í mjólkaframleiðslu, vildi tað svarað til 4 mill. kg mjólk. Seta vit hetta hoyggj í virði í mun til handilspris á fóðri í dag (11 kr. byrðan), kostar grøðin í eitt ár 2,75 mill. kr.

D.

Kongsgarðarnir.

Tað má setast mark fyri, hvussu illa ein kongsgarður kann verða drivin, áðrenn festarin missur bøin. Tað hevði verið rímiligt, um maðurin framleiddi 50 byrður av hoyggi av hvørjum ha, ella helt eina kúgv av

einum ha, ella tilsvarandi av aðrari grøði. Um hann ikki ger tað, eigur hann at avstanda tann partin, ið er illa dyrkaður t. d. fyri sína festitið ella eitt fast ásett áramál. Soleiðis sum nú er, fara í summum førum upp til 8 merkur undir kúnna. Og enntá verður ein partur av bønum standandi ósligin. Tað kann samfelagið ikki lata um seg ganga.

— — —

Tilsamans verður soleiðis at rinda til jarðabrúkið:

Plánlegging av uppdyrking	kr.	50.000
Útskifting av bønum	»	500.000
Uppdyrking av 2500 ha	»	4.540.000
Ialt ...	kr.	5.090.000
Býtt uppá 5 ár, um árið = ...	kr.	1.018.000

Hetta gevur, tá teir 2500 ha eru tilsáddir við grasi og komnir at bera, eitt avgrøðisvirði av 2,75 mill. kr.

III. Ídnaðurin.

Føroyar verða sjálvandi ongantið eitt ídnaðarland.

Tað er fátækt uppá ráevni út yvir fiskin, og tað liggur so fyri, at ídnaðarmøguleikarnir røkka ætlandi ikki stórvegis út um heimabrúkið.

Men tað er eisini vert at troyta hesar møguleikar, um tað kann verða gjørt, uttan at okkara útfluttningsmøguleikar harav verða skerdir.

Høvuðstreytin fyri einum nútíðarídnaði her á landi er, at okkara oyggjar verða ravmagnaðar (elektrificeraðar).

Hetta krevur miklan pening. Hvussu miklan kennir minnilutin seg ikki føran at siga nakað álítandi um. Men soleiðis sum okkara lands figgjarorka er í dag, verður óivað til hesa ravmagnan av Føroyum og fremjan av teimum ídnaðarmøguleikum, ið standa í samband við hann, ivaleyst eftiri, tá ið hinir undir I, II og III nevndu vinnuvegatættir eru loystir.

IV. Skúlaskapurin.

Tað verður sagt um Týskarar, at teirra framúrskarandi dugnaskapur sum vísindamenn, verkfrøðingar, handilsmenn, ídnaðarmenn og búmenn í síni heild stavar frá einum frálíkum skúlaskapi, bæði hvat ið viðvíkur fólkaskúlanum og hægri skúlum. Tað sama kann verða sagt um Danmark, Noregi og Svøríki.

Tað er eyðvitað, at skal ein nationaløkonomisk umskipan kunna eydnast til fullnar, má doyður verða lagdur á at fáa hin besta

fólkaskúla,
realskúla,
studentaskúla,
skipara- og navigatørskúla,
sjómannsskúla,
búnaðarskúla,
kvøldskúla fyri ungdómin,
handilsskúla,
háskúla og
ellisskúla.

Atkoma til hesar skúlar má verða eins fyri øll. Hin peningaligi spurningurin eigur í ongum føri at vera tarnandi. Undirvísingin eigur at vera ókeypis, og avbygdanæmingar, ið hava ring ráð, eiga baraftrat at fáa ókeypis innivist á kostskúlum ella fáa peningaligan studning til vistarhald hjá privatum.

Útreiðslurnar, ið standast av skúlaskapinum, megu verða goldnar sum vanligar rakstrarútreiðslur hjá tí almenna.

Hin endaliga metingin av tí figgjarliga úrskurðinum av eini planøkonomiskari umskipan:

Kostnaðurin:

Hín kontanta tjóðarorkan			kr. 57.000.000
Við tí almenna og bankum:			
Endurnýggjan av skipaflotanum	kr.	33.000.000	
Ísvirkir og skjótfrystivirkir	"	5.000.000	
Búnaðarmál (hitt alm.)	"	5.000.000	
			kr. 43.000.000
Eftir til ravmagnan og ídnað			kr. 14.000.000

Hitt privata kann ætlandi greiða sín part við teirri árligu vinnuni og teirri óbundnu ognini.

Hin nationaløkonomiski vinningurin:

Av endurnýggjanini og økingini av skipaflotanum:

Í minnilutans áliti í málinum viðvíkjandi endurnýggjanini av skipaflotanum verður víst á, at hin nationaløkonomiski vinningurin av eini skipaøking uppá 350 smærri og størri skip kundi verða settur til um leið 45 mill. kr. um árið. Men av tí, at onnur virki kundu væntast at taka til sín 1/3 av teim sjómonnum, ið skuldu manna hesi skip, varð skipatalið fækkað við 1/3. Tær 45 milliónirnar megu so setast niður í 30 milliónir. Men tað er at viðmerkja, at tá hesin triðingurin av manningini fer frá til arbeiði, ið koma av skipaøkingini, er har sjálvandi talan um ein nationaløkonomiskan vinning, ið vigar um ikki heilt, so tó fyri ein stóran part upp ímóti 1/3 av 45 mill. kr.

Hin beinleiðis nationaløkonomiski vinningurin av skipaflotanum við fiskiskapi verður:

2. árið:	45 mill. × ²/₃ : 5	—	kr.	6.000.000
3. árið:	6 mill. × 2		»	12.000.000
4. árið:	6 mill. × 3	=	»	18.000.000
5. árið:	6 mill. × 4	=	»	24.000.000
		Í 5 ár...	kr.	60.000.000

Av landbúnaðarumskipanini:

Tá ið hin plánaða umskipanin er komin at 6. ári, gevur hon í meirúrtøku kr. 2.750.000, um vit seta tvey av teim 8 liðunum í arbeiði alt fyri eitt fyrsta árið og síðani atvikavist 4., 6. og hini árini.

Meirúrtøkan í 5 ár verður so statt:

2. árið:	2.750.000 : 5		kr.	550.000
3. árið:	550.000 × 2	=	kr.	1.100.000
4. árið:	550.000 × 3	=	kr.	1.650.000
5. árið:			kr.	2.750.000
Hin samlaða meirúrtøka			kr.	6.050.000

Av tí nationaløkonomisku umskipanini verður so statt talan um eina meirúrtøku:

Í 5 ár av skipaøkingini	kr. 60.000.000
Í 5 ár av landbúnaðinum	kr. 6.050.000
	kr. 66.050.000

Haraftrat kemur tann nationaløkonomiski vinningurin av meirarbeiðinum á landi, ið stendst av skipaøkingini:

Arbeiði við smíð, skjótfrysting, ísframleiðslu, flakavirki, niðursjóðingarvirki, tog-, snøtis- og netvirki o. s. fr.

Eisini eigur at verða nevnt tað mikla arbeiðið í bygging, ið ein stór sjóvinna og økt landvinna vil geva, so brátt byggitilfar verður at fáa.

Aftaná 5 ár verður meirúrtøkan: Sjóvinnan 24 mill. kr., landvinnan 8¾ mill. kr. + økt arbeiði á landi.

Uppskot:

1. Álagt verður landsnevndini at skipa fyri, at tann í álitinum umtalaða 5-ára ætlan viðvíkjandi eini nationaløkonomiskari umskipan av okkara vinnulívi á sjógvi og landi verður framd.
2. Landsnevndin fær heimild til tingsins vegna at samtykkja tær lógarreglur og fyriskipanir, ið tørva fyri at kunna fremja ta undir pkt 1 nevndu 5 ára ætlan.

Fíggjarnevndin, tann 25. november 1944.

P. M. Dam.

Nevndarálit

í

løgtingsmáli nr. XIII–11/1944:

G. Umskipan av okkara handilsviðurskiftum frá tí núverandi kapitalistiska systeminum til tað kooperativa.

I. Kooperativar fyritøkur og fiskimenn skulu eiga fyrsta rætt til skip, ið verða bygd við almennari hjálp.

Føroyar er ein lítil tjóð, ikki størri enn ein lítil partur av eini stórgøtu í einum stórstaði í útheiminum.

Føroya fólks handilsviðurskiftir eru ikki størri fjølbroyttari og meiri marghættað enn hjá einari meðalstórari forrætning og handilsvirki í útheiminum.

Tað skuldi solcíðis lættliga latið seg gjørt hjá einari leiðslu at tikið sær av handilsviðurskiftum okkara.

Sum landið hevur ligið og liggur enn tann dag í dag er eitt ótal av inn- og útflytingarmonnum her á landi. Hvør handlar og virkar eftir sínum tykki, sínu ætlan ofta dreivandi hvør um annan, hvarvið nógvir kjansir til ágóða fara fyri skeyti og verða landi okkara at tapi.

Tað er einki dulsmál, at nógvir, ja teir flestu av okkara handilsmonnum eru heilt ólærdir í handilsskapi, hava valla verið uttan fyri Føroya gátt og eru ókendir við útheimsins handilslag og -viðurskifti.

Tað er eyvitað, at hesir menn eru fullkomuliga í hondum teirra umboðsmanna í útheiminum ella tilfellisligum sølumonnum, ið vitja teir at bjóða teim vørur ella bjóða sær at keypa teirra framleiðslur.

Hvussu dýrur hesin handilsskapur hevur verið og er landi okkara, er ilt at siga og at meta í peningi. Tað er okkum greitt, at Føroyar gjøgnum tíðirnar hava tapt milj. av hesum handilsólagi ella handilsókunnleika,

Tað er soleiðis, at eingin tjóð er kappingarfør, uttan at hon eigur menn, sum við viti og mesta kunnleika viðvikjandi øllum sínum starvi, kunnu átaka sær at standa fyri og verða leiðarar av landsins stovnum og framtaksvirkjum.

Føroyingar verða heldur ikki kappingarførir, fyrr enn teir læra at ásanna, at eisini her á landi er alt arbeiði, øll kapping við aðrar tjóðir treytað av, at okkara bestu menn, okkara vitugastu og mest lærdu menn mest lærdu til tær ávístu uppgávur, verða settir at standa fyri at leiða og leggja øll framtaksarbeiðir til rættis í handilsskapinum.

Fyritøkur og virkir á sjógvi og á landi krevja so sanniliga menn við viti, lærdómi, stórsýni og framskygni. Vit eru fáir og vit eru smáir. Vit tola ikki at syndra okkum at føra ein stubbapolitikk, annaðhvørt tað er í handilsskapi, mentunarspurningum og øðrum livsspurningum.

Vit megu í øllum føri skipa okkum so, at vit virka sum ein heild, sum ein heildarkraft. Fyrst tá kunnu vit vóna at fáa frægast í lag, tað tað besta burtur úr og tað størsta gagni til einstaklingin sum til heildina.

Í okkara handilsskapi eins og í okkara vinnulívi — báðir tættirnir eru so nær knýttir hvør til annan og treyta hvønn annan — ræður um at skipa seg við útsýni við fynd og í samvinnu við tær skilabestu, frægastu og mest álítandi handils- og vinnulívskreftir í útheiminum.

Fyri at vit kunnu gera hetta, megu vit tsína fram sum ein kraft, sum ein heild, umboðað av valamanni ella -monnum. At bjóða okkum fram í hundrað tals útboðum — hvat ið vigar peningaliga einki hjá ti útlendska forrætningarmanninum — ger at vit ikki kunnu vinna athuga og forrætningarinteressu, har sum teir góðu og lønandi forrætningarnar eru at gera, men verða vit at falla í hendurnar á tilfellisligum sølumonnum og koma harvið at selja bíligt og keypa dýrt, also at gera tað, ein kallar ein ringan handil.

Kring um heimin er staðin fram ein handils- og framtaksrørsla, ið menn nevna andeilssamtøkur ella kooperatiónir, t. v. s. samvinna millum keyparar, ið eru brúkarar, og framleiðarar, ið framleiða vørurnar, ið verða brúktar.

Henda rørsla miðjar so statt ímóti, at framleiðarin fær meginpartin av ti, sum brúkarin gevur fyri vørurnar, og at brúkarin kann sleppa frá at gjalda eyka fyri vørurnar, tað sum einstakir spekulera í at verða ríkir av.

Kooperatiónin hevur vunnið fram í stórum stigum kring heimin, og hon er gingin saman í eina samvinnu landanna millum.

Kooperatiónin í einum landi kann altíð rokna við at fáa ta bestu handilsviðgerð hjá kooperatiónini í einum øðrum landi. Henda samvinnan millum eina fylking av brúkarum og framleiðarum í teim ymisku londunum hevur gjørt, at hin privati kapitalistiski handilsskapurin og framleiðsluhátturin hevur mist sitt tiltak til at halda fjøldina niðuri í treytini at keypa dýrt og selja bíligt.

Føroyar er eitt lítið fáment oyggjaland, men um tað so statt við sínum lítilleika og fámentsku ikki orkar at gera seg galdandi, vinna ljóð fyri sær í útheiminum hjá stórhandilsvirkjum og framleiðslukeldum, ið eru kapitalistisk, eiga vit tó tann moguleika, at um vit skipa okkum á andeilsgrundarlagnum, ganga saman í eina kooperatión, gera okkara handilsskap og vinnuliv til eina kooperativa fyritøku, vilja allar dyr standa opnar fyri okkum hjá kooperatiónini í útheiminum, og — tað vigar ikki minst — tann lívsins lærdómur, tað skil, tann ásannan og kringleiki, sum kooperatiónin í útheiminum hevur vunnið í bardaganum í kappingini við tey kapitalistisku virkini, hin kapitalistiska handilsskapin, vil falla okkum í lut og verða okkum at gagni til menning bæði viðvikjandi tí vinnu, sum er í virkan, og tí vinnu, sum verður sett á stovn.

Ganga vit inn á ta kooperativu leiðina, allir sum ein, verða vit ein partur av teirri kooperativu alheimsrørsluni, vilja vit vinna yvir fyri teim vommum og kunnu bøta tey brek, ið nú kosta okkum í hundraðtúsund, ja milj. av krónum millum ár og dag.

Her skyldar løgtingið at ásanna verunleikan. Her skyldar løgtingið at taka sær um teiggj. Her skyldar løgtingið at gera av við tann ómegdaranda og tað óskil og fákunnu, sum rátt hevur í okkara handilsskapi og vinnulívi, og sum hevur trýst okkum niður í fátækradóm og orkusloysi.

Javnaðarmenn hava altíð haft tað sum ein aðaltáttin í sínum starvi fyri fiskimenn og arbeiðsmenn, at teir skulu eiga tólini, teir arbeiða við, so teir av sonnum kunnu fáa fullan ágóða av sínum arbeiði.

Tað er út frá hesari hugsjón og støðu, at javnaðarflokkurin hevur reist kravið um, at kooperativar fyritøkur og fiskimenn skulu eiga fyrsta rættin til skipini, ið bygd verða við almennari hjálp.

Við størri og smærri kooperativum fyritøkum verður ágóðin at falla í fullum muni teim arbeiðandi fólkunum í virkinum í lut. Hetta lagið er tað rættvísasta og sterkasta, og má fyri rættvist hugsandi menniskja vera eyðtikið fram um tað, at einans ein ella nakrir fáir einstaklingar skulu eiga virki, hvar hópur av menniskjum hevur vinnu sína.

Minnilutin skjýtur tí til, at kooperativar fyritøkur ella báta- ella skipaløg skulu eiga fyrsta rættin til tann studning og tey lán, ið hitt almenna lænir. Hesin tanki, henda støða var longu undan krígnum, ið nú leikar á, knæsettur í t. d. Danmark, Noregi og er vorðin tað í Íslandi við.

Uppskot:

Tingið ásannar, at tørvur er á, at Føroyingar rýma frá teirri kapitalistisku handils- og virkisskipanini yvir til ta kooperativu.

Skrásett verður sum fast regla, at kooperativar fyritøkur og fiskimenn skulu eiga fyrsta rættin til tingsins lán og styrkveitingar.

Á løgtingi, tann 17. november 1944.

P. M. Dam.

Minnilutaálit

í

løgtingsmáli nr. XIII–11/1944:

H. Setan av einum almennum hýringar- og arbeiðsávísingarkontóri.

Minnilutin (P. M. Dam) heldur fram:

Í málinum «Rætturin til arbeiði» var av javnaðarflokkinum hildið fram, at tað er átroðkandi neyðugt at fáa eina skipan í lag, ið tryggjar monnum toluliga eins rætt at sleppa við skipan, ið sigla ella fiska.

Allir menn eru greiðir yvir, at soleiðis sum skilið hevur verið undir krígnum og er, hevur mongd av fiskimonnum noyðst at sita heima í vinnuloysi. Í summum bygdum hava flestir menn enn ongan túrin fingið við skipum.

Hetta er eitt órættvísi ímóti okkara gævu fiskimonnum, ið undan krígnum baldust á havinum fyri lítla løn. Hví skulu hesir menn sita við so svongum luti, nú nógv er at vinna? Hví skulu teir ikki sleppa uppí part? Teir hava fullan rætt at krevja at sleppa uppí part. Og tað má vera skylda tingmanna at hjálpa teimum uppí part. Hetta kann verða gjørt við, at samtykt verður lóg, ið setur á stovn eitt hýringarkontór.

Minnilutin skjýtur uppá, at hetta verður gjørt og tekur uppaftur uppskotið frá ifjør:

Uppskot:

Landsnevndin verður heimilað til tingsins vegna við lóg at seta á stovn eitt hýringarkontór, hagar útgerðarmenn og ein og hvør, ið skal manna havgangandi før, skulu venda sær at fáa ta neyðturvuligu manning. Ásetan av yvirmonnum um borð skal hýringarkontórið tó ikki hava nakað við at gera.

Á løgtingi, tann 15. november 1944.

P. M. Dam.

Minnilutaálit

í

løgtingsmáli nr. XIII–11/1944:

J. Útlendsk reiðarríir fáa rætt til at arbeiða í Føroyum.

At fáa arbeiði til øll arbeiðsfør menniskju er høvuðstakið í dag. Tað verður í meiri mun høvuðstakið í komandi døgum – høvuðstakið hjá tí almenna eins og hjá privatum.

Tey tiltøk, ið tæna at loysa hesa uppgávu, megu sigast at vera góð og landsgagnlig.

Soleiðis sum viðurskiftini nú liggja stjórnarliga byggir meirilutin í Føroyum á tiltøk frá tí privata. Orka ella vilja okkara heimligu peningamenn ikki at seta nóg nógv virki á stovn, ið kunnu geva øllum okkara arbeiðsmonnum og fiskimonnum arbeiði og rúmligt og gott breyð, má landið, megu aðrar kreftir enn okkara heimligu privatu kreftir, taka sær um reiggj. Tí vit kunnu ikki lata sita á okkum, at ein partur av okkara góða fólki ikki fær arbeiði, ikki fær góð livilikindi.

Javnaðarmenn hava varhuga av, at teir privatu her á landi ikki verða at kunna loysa uppgávuna at veita arbeiði til allar arbeiðandi hendur her á landi. Teir hava ikki bert varhuga av, men vissu fyri, at meirilutin á tingi ikki er sinnaður fyri, at hitt almenna, løgting, kommunur og statur skulu taka ábyrgdina fyri, at tey virki, ið tróta hjá okkara heimligu virkisherrum til at øll skulu hava nóg nógv fyri hendur og anda at takast við, nóg nógv til innloysan av einum góðum og sorgarleysum lívi, skulu verða sett á stovn. Tað verður tí av javnaðarflokkinum á tingi mælt til, at tað ikki má verða gjørt umaftur, ið gjørt varð á rinni, tá ið tingið sýtti at viðmæla, at italienskir trolaracigarar skuldu fáa loyvi at reka fiskivinnu frá Føroyum við Føroyingum umborð. Hvussu nógv hevur hendan sýtan ikki kostað okkara landi? Hvussu hevur hon ikki tarnað okkara sjóvinnu at ganga frammá, taka nútimans tól í nýtslu, ganga inn á nýggjar veiðuhættir?

Ein skaðagerð var tað, ið tá varð gjørd ímóti okkara landi, móti fyrst og fremst okkara sjómonnum. Henda gerð hevur harnað mangan

fiskimann, og hevur mangt hart orðið flogið monnum av munni, tá ið teir italsku trolararnir hava verið á máli.

Føroyar liggja enn sum áður væl fyri sum miðstøða fyri stórdrift, havfiskiskapi. Og tað er væl hugsandi at fremmandur kapitalur hevur hug at koma at virka her á landi og nýta føroyska arbeiðsmegi. Peningurin er jú internationálur. Sítt staðfestingarnavn ella nationalitetsmerki ber hann eftir tí landi, hann virkar í.

Tann peningur, ið er knýttur til virki, ið hava staðfesting, miðstøðu og bústað í Føroyum er føroyskur, sjálvt um menninir ella feløgini, ið eru komin við honum higar, ikki eru av føroyskum uppruna. Peningamenn eru alheimsmenn, eingin munur á teimum yvir fyri arbeiðarunum, hvørja tjóð teir hoyra til.

Soleingi meirilutin her á landi ikki er sinnaður heilt at leggja okkara virki og handilsskap yvir á andeils- og kooperatiónarleiðina, soleingi sum meirilutin er ímóti heilt at fara yvir á ein plánøkonomiskan politikk, men avgera, at landið skal í høvuðsheitini líta á ta privatkapitalistiska stýrislagið, mæla javnaðarmenn til at loyva øllum kapitalistarbeiðandi monnum og feløgum, uttan- sum innanfanda, sama arbeiðsrætt her á landi, soleingi allar hendur ikki eru í arbeiði.

Uppskot:

Tingið ber fram sum sína aðalstøðu, at tað er beint, at fremmanda menn, virki og feløg, ið hava hug at koma at virka í Føroyum og nýta føroyska arbeiðskraft, skulu fáa sama arbeiðsrætt, sum er givin Føroyingum, soleingi allar hendur ikki eru í arbeiði.

Á løgtingi, tann 16. november 1944.

P. M. Dam.

Minnilutaálit

í

løgtingsmáli nr. XIII—11/1944:

K. Kannan av vinnuvegalíkindunum.

Hetta mál, ið er borið á tingborð av javnaðarflokkinum, er fyri ein part svarað í minnilutans álitum viðvíkjandi málunum: «Endurnýggjan av skipaflotanum», «Planøkonomiska skipan av okkara vinnulívi», «Umskipan av okkara handilsviðurskiftum», o. ø., ið eisini eru reist av javnaðarmonnum.

Hertil er at leggja tað av meirlutanum ávísta, at sitandi millumtinganevndir hava sjóvinnu- og búnaðarmál og stevnir til umhugsingar.

Aftrat hesum hevur minnilutin hugsað sær, at tey ymsu vinnulívsfeløgini sum:

Føroya Arbeiðarafelag,
Føroya Fiskimannafelag,
Suðuroyar Fiskimannafelag,
Øll tey lokalu arbeiðsmannafeløgini,
Føroya Reiðarafelag,
Føroya Skiparafelag,
Føroya Motorpassarafelag,
Handils- og Skrivstovufelagið,
Trolarafelagið,
Keypmannafelagið og
møguliga onnur feløg

verða biðin um at taka sínar framtíðarligu vinnulívsinteressur og plánir til viðgerðar og til næstu tingsetu at senda løgtinginum eitt álit viðvíkjandi teim plánum og úrsliti, tey koma til fyri framtíðina.

Feløgunum eigur at verða send álit viðvíkjandi:

1. Endurnýggjan av skipaflotanum,
2. Plánøkonomisk skipan av okkara vinnulívi,
3. Úrslitinum, ið tann sitandi búnaðarnevnd kom til seinasta ár.

Uppskot:

Tey í álitinum nevndu feløg verða biðin um til næstu tingsetu at senda tinginum álit við uppskotum viðvíkjandi sínum vinnulívsplánum fyri framtíðina.

Feløgunum verður sent eitt eintak av hesum áliti og øllum tingsins álitum viðvíkjandi 1) endurnýggjan av skipaflotanum, 2) plánøkonomiska skipan av okkara vinnulívi, 3) úrslitinum, ið tann sitandi millumtingabúnaðarnevnd kom til seinasta ár.

Á løgtingi, tann 24. november 1944.

P. M. Dam.

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókahandils.

Álit

í

løgtingsmáli nr. VIII—4/1944:

Studningur til høvuðsumvøling av samferðsluvegum.

Kvívíkar, Sunnbøar og Porkeris sóknarstýri hava vent sær til tingið um studning til umsitingar av samferðsluvegum.

Eisini hevur Viðareiðis sóknarstýri biðið um studning til umsiting av vegnum inn í Dal á Viðareiði.

Hvør teirra ger galdandi, at kommunurnar hava langan tein at halda, og hartil eru nakrar so illa staddar við tilfar, at kostnaðurin av tílíkari umsiting vil ovbyrja kommununa ov nógv.

Í hesum viðfangi hevur løgtingsskrivstovan givið soljóðandi frágreiðing um Vegagrunnsins virki og ognir:

«VIÐLÍKAHALD AV VEGUM.

Spurningurin var til viðgerðar undir tinginum millum eina løgtingsnevnd og ríkisstýrið í 1938, og í semjuni, dagsett 3. sept. 1938, seinri góðkend av tinginum, eru uppsettar ymiskar reglur í punkt 8. Harettir skal løgtingið ansa eftir viðlíkahaldi av øllum vegum og seta vegmenn, ein reglugerð skuldi verða uppsett, og fyri at tryggja viðlíkahaldið av akvegunum skuldi verða settur á stovn ein vegagrunnur. Til henda grunn skuldi verða flutt ½ millión kr. í 4 pct. rentuberandi obligatiónum úr danska vegagrunninum, og gjøldini fyri bílar og motorcyklir skuldu falla til grunnin. Um grunnurin nakað ár hevur útreiðslur, sum eru hægri enn rentuinntøkan og motorgjøldini, kann hann fáa helvtina av meirútreiðslunum goldnar aftur frá ríkiskassanum, tó ikki yvir 10.000,— kr. árliga.

Vegagrunnurin skal bera útreiðslurnar til vegmenn og vegareiðskøp. Harnæst kann talan vera um studning úr vegagrunninum til viðlíkahald av vegum, og her kann løgtingið áseta, at inntøkur, sum vegagrunnurin hevur størri enn útreiðslur, kunnu verða veittar sum studningur til

kommunur fyri at lætta um serstakliga stórar byrður, ársakaðar av viðlika-haldi av vegum.

Viðvíkjandi viðgerðini av málinum í løgtinginum verður vist til løgtingstíðindi 1938, síðu 245, skjal 14, og serstakliga skjal 14 D. Uppskot var tá frammi til reglugerð, men tilík varð ikki samtykt og í 1939 var aftur uppskot frammi (sí løgtingstíðindi 1939, síðu 128). Aftaná viðgerð í landsnevndini varð so vegareglugerð fyri Føroyar staðfest og góðkend 19. december 1940.

Prgf. 4 ásetur: «Vejvæsenet paa Færøerne sorterer under Lagtinget, og det er en Lagtingsopgave at sørge for Vedligeholdelse af de offentlige Veje. Tinget fører Overtilsyn hermed, og der vælges for 4 Aar ad Gangen af Tinget et Vejudvalg paa 3 Medlemmer og 3 Suppleanter, som fungerer paa Tingets Vegne. Iøvrigt forestaas den daglige Ledelse af Lagtingets Vejingeniør, og der antages af Vejudvalget det nødvendige Antal Vejmænd, som fører stedligt Tilsyn, leder Vejarbejdet, og selv udfører Vedligeholdelsesarbejdet.»

Prgf. 5 sigur: «De kommunale Styrelser fører Tilsyn med de Veje, som findes indenfor vedkommende Kommunes Omraade.»

Prgf. 6: «Der oprettes en Vejfond, som bestyres af Lagtingets Vejudvalg. Fonden afholder Udgiften til Vejmænd, til Anskaffelse af Vejredskaber og almindelige Vedligeholdelsesudgifter, forsaavidt disse ikke falder paa Kommunerne. Dernæst kan der efter Lagtingets Beslutning af overskydende Beløb ydes Tilskud til Sognekommunerne til Lettelse af særlige store Byrder i Anledning af Vedligeholdelse af Hoved- og Biveje samt Tilskud til nye Veje. Fondens aarlige Regnskab indsendes til Ministeriet for offentlige Arbejder, før Statens Refusion udredes, bortset fra eventuelle a conto Udbetalinger.»

Prgf. 10: «Vedligeholdelsen af offentlige Veje paahviler Kommunerne. Der ydes hertil af Vejfonden Tilskud og Hjælp, dels gennem Vejmændene, dels ved Tilskud til Redskaber og dels ved Bevillingen efter Lagtingets Beslutning. Kommunerne er pligtige at følge Vejudvalgets nærmere Anvisning og Bestemmelser, navnlig med Hensyn til Levering af Materialer og Ydelse af Arbejdskraft.»

Prgf. 12: «Kommunerne er navnlig pligtige til at fremskaffe det nødvendige Vejmateriale og sørge for Læsning og Aflæsning samt Transport af dette, dog saaledes, at Vejmanden anviser, hvor egnet Materiale kan fremskaffes, og yder Vejledning med Hensyn til Harpning o. l. Kommunerne er pligtige til at fremskaffe Vejmateriale i det Omfang, af den Beskaffenhed og underkastet den Behandling, Vejmanden foreskriver. Kommunalbestyrelserne har Pligt til Stadighed at sørge for Udlægning af Depoter af Vejmateriale efter Vejmandens Anvisning.»

18/10 hevur vegastýri Føroya samtykt skipan fyri vegmenn við almennir vegir í Føroyum.

Vegagrunnurin átti pr. 1. mai 1944 kr. 85.571,08 og er vaksandi, so hann man vera um 100.000,-- kr., hatumframt eigur hann frá ríkiskassanum og rentum av teim fyrr umtalaðu 4 pct. obligatiónunum um 100.000,— kr., so grunnurin hevur ognir ca. 200.000 kr. Inntøkurnar hjá grunninum eru umframt tær 20.000,— kr., sum hann vil fáa árliga í rentu, 50.000,— kr. í bilgjøldum og 10.000,— kr. frá løgtinginum, so inntøkurnar verða um 80.000,— kr. árliga við teim núverandi bilgjøldum. Útreiðslurnar til vegmenn o. t. er upp móti 30.000,— kr. árliga.

Vegastýrið ger við góðari grund galdandi, at tað ikki hevur verið gjørligt at keypa vegareiðskøp, men at grunnurin nú skjótt má ætlast at fáa stórar útreiðslur til studningar til reiðskøp og tól, so tað er nakað ivingasamt, um grunnurin nú kann lata stórvegis studningar til viðlika-

hald, og í hvørt tilfelli er tað ringt at taka støðu til í løtuni, nú tað av kriggsávum er ógjørligt at fáa at ráða yvir tær 20.000,— kr. árliga av stovnsgrunninum ½ milj. kr.»

Av hesi frágreiðing sæst, at vegagrunnurin enn ikki kann ætlast førur fyri at veita studning til vegaumsiting yvirhøvur.

Málið hevur verið til ummælis hjá løgtingsverkfrøðinginum og hann tilskilar soleiðis:

Forslag til:
Forbedring af Trafikvejes Vedligeholdelse.

I Indberetning om Trafikveje 1944 af 25/10 1944 blev følgende bemærket:

«Vejstyret er efter sin Rejse kommet til den Anskuelse, at Vedligeholdelsen af Øernes Trafikveje efterhaanden er blevet saa stort et Spørgsmaal, at en Omordning synes paakrævet. Dette skyldes især, at Vejstrækningerne er ulige fordelt mellem Kommunerne, saaledes at de økonomiske Byrder falder meget ujævnt. En nærmere Drøftelse af dette Spørgsmaal vil blive foretaget i særlig Skrivelse.»

Herunder anføres et Skema over de Kommuner (ekskl. Klaksvig), hvem det paahviler at vedligeholde Trafikvejstrækninger. I Skemaets sidste Rubrik er anført Overslag over de sandsynlige Udgifter til den aarlige Vedligeholdelse. Overslagene baserer sig for en Del Kommuners Vedkommende paa kendte Udgifter i 1943. For de øvrige Kommuners Vedkommende er Beløbet anslaaet under Hensyntagen til Vejenes Tilstand, Adgangen til Vejmaterialer og Trafikkens Størrelse. Det er ikke medtaget Udgiften til forestaaende større Hovedreparationer, som f. Eks. Sumbø. For de fleste Vejes Vedkommende er Udgiften pr. m Vej ansat til 100—150 Øre pr. m. Den laveste anvendte Pris er 35 Øre pr. m (Saksen), og den højeste er 200 Øre pr. m (Frodebø).

Af Skemaet fremgaa umiddelbart følgende:

De anslaaede Vedligeholdelsesudgifter andrager gennemsnitlig kun 15 pCt. af Kommunernes Skatteindtægt. Hvis Frodebø, Vaag og Fuglefjord skydes ud, bliver Forholdet dog, at Vedligeholdelsesudgifterne udgør gennemsnitlig ca. 20 pCt. af Skatteindtægten.

Som Helhed betragtet er Vedligeholdelsesudgifterne ingenlunde foruroligende høje i Forhold til Kommunernes økonomiske Evne. Fejlen er, at Byrderne er altfor ulige fordelt.

Meget gunstigt stillede er Fuglefjord og Vestmanhavn paa Grund af korte Vejstrækninger. Begge disse Pladser nyder godt af Nabokommunens svære Vejudgifter. Dette gælder især Vestmanhavn. I al Almindelighed gælder det, at de større Pladser slipper forholdsvis billigst over Vejvedligeholdelsen.

Meget ugunstigt stillet er Kvivig, der har faaet sin Strækning forøget med ca. 10 km ny og bekostelig Vej i 1944, Kirkebø, der har den største Vejstrækning pr. Indbygger, Skaalevig og tildels Famien og Sumbø.

Ulighederne afspejler sig som man maatte vente i Vejenes nuværende Tilstand, jævnfør Indberetningen af 1944.

Kommuner	Indbyggere 1940	Skat 1944 %	Skat 1944 Indtægt	Trafikvej ialt km	Trafikvej pr. Indbygger m	Anslaaet aarlig Vedligeholdelse Kr.	Bemærkninger
Fuglefjord	902	8,5	135.800	3,0	3,5	4.500	Opg. ca. 10.000 f. 43
Lervig	443	8,0	48.300	4,0	9,2	6.000	
Gøte	584	9,0	71.500	9,7	16,6	14.000	Forbrug i 43
Nes	1438	7,5	162.500	25,0	17,4	30.000	33.000 i 43
Sjov	1000	7,0	93.900	8,6	8,6	13.000	
Ejde	600	9,0	45.800	10,2	17,0	12.000	
Sunda	333	8,0	19.800	5,3	16,0	5.300	
Saksen	42	4,0	1.500	4,2	10,0	1.500	
Kvalvig	452	6,0	17.500	8,1	18,0	4.000	
Kollefjord	439	5,0	20.300	6,0	13,6	6.000	
Kvivig	494	5,0	25.500	15,5	31,5	22.000	
Vestmanh.	884	6,0	77.200	3,8	4,3	6.000	
Thorsh. utt.	332	4,0	23.900	4,0	12,4	6.200	Forbr. i 43
Kirkebø	114	2,25	3.500	8,0	70,0	6.000	700.— i 43
Sandevaag	570	8,0	58.300	8,0	14,0	6.000	2 km asfalt.
Midvaag	666	6,0	41.400	6,7	10,0	1.000	asfalt. Vej.
Sørvaag	755	5,0	60.900	3,2	4,2	500	— —
Sand	645	8,0	51.700	11,0	17,0	15.000	Forbr. 60.000 i 3 Aar.
Skopen	376	5,0	21.400	2,0	5,3	3.000	
Skaalevig	217	7,3	19.400	6,0	27,7	9.000	
Husevig	240	8,0	14.500	3,2	13,3	3.000	
Frodebø	1939	9,5	312.800	15,0	7,8	30.000	Forbr. 57000 i 43(?)
Famien	228	5,5	14.300	4,5	20,0	6.500	Regner med 8000 pr. Aar.
Vaag	1406	8,0	220.600	9,0	6,4	13.500	Forbr. 19000 i 43.
Sumbø	624	9,0	44.000	12,0	19,0	18.000	
	15723		1.606.300	196,0	12,5 i Gennemsnit	242.000	

Udgiften til Vedligeholdelse er i Gennemsnit 1235 Kr. pr. km. Udgiften til Vedligeholdelse er i Gennemsnit 15.40 Kr. pr. Indbygger.

En Udjævning af Ulighederne kan foretages paa en af følgende Maader:

1. *Omlægning af eksisterende Vedligeholdelsesstrækninger.*
2. *Økonomisk Støtte til de Kommuner, hvis Udgifter er størst.*

De to Udveje vil blive behandlet hver for sig, idet jeg forudskikker den Bemærkning, at 1. kun vil medføre en ringe Udgift for det offentlige, medens 2. forudsætter et ret betydeligt Tilskud fra det offentlige.

1. *Omlægning af eksisterende Vedligeholdelsesstrækninger.*

En helt retfærdig Fordeling af Vejstrækningerne lader sig næppe udføre, idet Hensyn maatte tages baade til Vejlængde, Materialers Fore-

komst, økonomiske Evne hos de paagældende Kommuner og naturlige Skillelinier i Terrænet.

De mest iøjenfaldende Uligheder kan imidlertid bortskaffes paa følgende Maade:

Fuglefjord.	Nuværende Vejstrækning	3.0 km
	Fra Gøte Kommune overtages:	
	Mod Kommunegrænsen Lervig	1.0 —
	Mod Bøgrænsen Nordre Gøte	3.7 —
	Ny Vejstrækning	7.7 km
Gøte.	Nuværende Vejstrækning	9.7 km
	Aflastning	4.7 —
	Ny Vejstrækning	5.0 km
Vestmanhavn.	Nuværende Vejstrækning	3.8 km
	Fra Kvivig Kommune overtages	7.0 —
	Ny Vejstrækning	10.8 km
Kvivig.	Ny Vejstrækning 15.5 ÷ 7.0	8.5 km

Vestmanhavn skulde herefter overtage Vedligeholdelsen af Vejen helt til Bøgrænsen i Kvivig. Den nye Fordeling vil give Kvivig noget mere Vej, end hvad der svarer til Folketallet, men til Gengæld er Strækningen forholdsvis let at holde.

Skopen.	Nuværende Vejstrækning	2.0 km
	Fra Sand overtages ca.	3.0 —
	Ny Vejstrækning	5.0 km
Sand.	Ny Vejstrækning 11 ÷ 3	8.0 km

Skaalevig.

En Aflastning i Vejlængde maatte overføres til Sand og vilde igen kræve større Belastning af Skopen. Der foreslaas derfor et kontant Tilskud paa 50 pCt. af de virkelige Udgifter, dog ikke over *4.500 Kr.*

Famien.

En Aflastning i Vejlængde vilde i og for sig være ønskeligt. Skellet mellem Famien og Frodebø ligger imidlertid i Ørdevigskaret, og en Forskydning maa derfor anses for upraktisk. Det foreslaas derfor et kontant Tilskud paa 40 pCt. af de virkelige Udgifter, dog ikke over *3.000 Kr.*

Vaag.	Nuværende Vejstrækning	9.0 km
	Fra Sumbø overtages Strækningen fra Kommunegrænsen til Hesten	6.0 »
	Ny Vejstrækning	15.0 km
Sumbø.	Ny Vejstrækning 12 ÷ 6	6.0 km

Sumbø faar paa denne Maade en ret kort Vejstrækning, men den er til Gengæld ret bekostelig at holde.

Til Fordel for denne Ordning taler, at den kun vil medføre en ringe Udgift for Lagtinget, eventuelt ingen, idet man muligvis kan lade Vejfonden udrede de to nævnte Tilskud paa indtil 7.500 Kr.

Imod Ordningen taler følgende. De Kommuner, der faar deres Vejstrækninger foræget ind i Nabokommunen, vil antagelig forlange at udføre Vedligeholdelsesarbejdet med egen Arbejdskraft, og dette kan muligvis give Anledning til Gnidninger.

2. *Økonomisk Støtte til de Kommuner, hvis Vejudgifter er størst.*

Det siger sig selv, at økonomisk Støtte kun kræves i Tilfælde, hvor en Kommunes Vejlængde er over Gennemsnittet, eller hvor Vejudgifterne pr. Indbygger er over Gennemsnittet, d. v. s., hvor der er særlige Vanskeligheder forbundet med Vedligeholdelsen.

Nedenfor anføres en Liste over saadanne Kommuner. I Listen er angivet det Tilskud, der kræves for at bringe Udgiften ned omkring det normale. Størrelsen af Tilskudsprocenten bør naturligvis kunne reguleres indenfor rimelige Grænser. Der er ved Fastsættelse af Procenten taget noget Hensyn til Kommunernes Skatteevne.

Kommune	Anslaaet aarlig Vedligeholdelse	Tilskud %	Tilskud højst	
Gøte	14.000	30	4.000	
Nes	30.000	15	4.500	
Ejde	12.000	25	3.000	
Saksen				medtages ikke
Kvivig	22.000	60	13.000	Skatteprocenten bør forhøjes
Thorshavn udenb.				— — —
Kirkebø	6.000	60	3.500	— — —
Sand	15.000	30	4.500	
Skaalevig	9.000	50	4.500	
Famien	6.500	50	4.500	Skatteprocenten bør forhøjes
Sumbø	18.000	50	9.000	
			59.000	
		Uforudset	1.000	
		Ialt: Kr.	60.000	

I Listen er Tilskudene beregnet som en vis Procent af den anslaaede Vedligeholdelsesudgift. Hvis Ordningen føres ud i Praksis, bør man formentlig forlange, at Kommunen først og fremmest skal udføre Reparationer for et vist Beløb, hvorefter der for overskydende Beløb kan ydes helt op til 100 pCt. i Tilskud.

Udbetaling af Tilskud til Vedligeholdelse bør formentlig ske gennem Vejstyret og bør være betinget af

1. at Arbejdet er foretaget i Forstaaelse med Vejmanden i Distriktet,
2. at Vejen er synet og godkendt af Ingeniøren og
3. at der er aflagt nøjagtigt Regnskab over Arbejdstimer, Lastbiltimer og tilførte Materialer.

Ved Beregning af de virkelige Udgifter regnes Timelønnen til 70 Øre med forholdsvis Forhøjelse efter Pristallet.

Vejstyret raader ikke for Tiden over saa store Midler, at det kan paatage sig at afholde det kalkulerede Tilskud paa ca. 60.000 Kr. Dette Beløb maa derfor tilvejebringes ved en særlig Bevilling til Vejstyret, medmindre man vil foretrække at søge Midlerne tilvejebragt ved Indførelse af nye Afgifter, saaledes som foreslaaet i følgende Afsnit.

3. *Forhøjelse af Bilskat og Indførelse af Benzin- og Olieafgift.*

I foranstaaende Forslag 2 er Ulighederne i Kommunernes Udgifter til Vejvedligeholdelse foreslaaet udjævnet ved Tilskud fra Vejfonden, som til dette Formaal vilde behøve ca. 60.000 Kr. aarlig.

Dette Beløb — og mere til — kan fremskaffes ved en Forhøjelse af den nuværende Afgift af Motorkøretøjer samt Indførelse af en Afgift paa Benzin og Olie.

a. Forhøjelse af Bilskat.

I Henhold til Lov Nr. 73 af 19/3 1930 svares en aarlig Afgift af 10 Kr. pr. HK for Motorkøretøjer og 20 Kr. pr. 100 kg Egenvægt for Mortorcykler og Paahængsvogne. Denne Afgift er fra 1. Januar 1943 forhøjet med 100 pCt.

Bilskatten indbringer for Tiden ca. 50.000 Kr. aarlig. Der findes i Øjeblikket 104 Personvogne, 156 Lastvogne og 36 Motor-Cykler. I Gennemsnit betales der omkring 190 Kr. om Aaret for en Vogn. I Betragtning af, at Vognvægten utvivlsomt er steget betydeligt i de senere Aar og Trafikken ligeledes, vil jeg mene, at en Forhøjelse af Bilskatten med yderligere 100 pCt. af den oprindelige er ganske berettiget.

Dette vil indbringe ca. 25.000 Kr. aarlig.

b. Indførelse af en Benzin- og Olieafgift.

Saafremt man ved en Afgift som ovennævnte ønsker at fremskaffe et nogenlunde stort Beløb, har man Valget imellem at lægge en stor Afgift paa Vejbenzin eller en lille Afgift paa al Motorbrændsel. Det lader sig antagelig ikke gøre at føre effektiv Kontrol med den Benzin, der bruges af Motorkøretøjer, og jeg mener derfor, man snarest bør lægge en lille Afgift paa alt Motorbrændsel. Da Fiskerierhvervet og Landevejstransporten er ret nøje knyttet sammen, kan der næppe indvendes meget herimod.

Følgende Kvantiteter Motorbrændsel er indført i de 2 sidste Aar:

	Benzin kg	Petroleum kg	Solarolie o. lign. kg
1942	428.297	447.022	1.739.716
1943	793.496	822.960	2.602.761
Anslaaet Aarsforbrug	670.000	700.000	2.380.000

Samlet anslaaet Aarsforbrug 3.750.000 kg, som med en Afgift af 2 Øre pr. kg vil indbringe 75.000 Kr. aarlig.

De under a. og b. foreslaaede Afgifter, tilsammen 100.000 Kr., foreslaas anvendt saaledes:

Tilskud til Vedligeholdelse af Trafikveje	60.000 Kr.
— » Asfaltbelægning	40.000 —
	100.000 Kr.

Det maa betragtes som ganske naturligt at knytte de to Opgaver, almindelig Vedligeholdelse og Asfaltbelægning sammen, idet fremadskridende Asfaltbelægning vil bringe Vedligeholdelsesudgifterne ned.

Det til Asfaltbelægning afsatte Beløb er ikke saa stort, som det kunde ønskes, men det er dog tilstrækkeligt til, at man kan yde 50 pCt. i Tilskud til 5—6 km Vej om Aaret.

Tilskud til Asfaltbelægning tænkes i Almindelighed kun givet til smaa Kommuner, idet større Kommuner med bymæssig Bebyggelse saasom Thorshavn, Klaksvig, Tveraa og Vaag formentlig kan magte denne Opgave selv.

Asfaltbelægning af Trafikvejene vil som nævnt bringe Vedligeholdelsesudgifterne ned. Belægningen bør fremmes og opmuntres, dels ved Ydelse af passende Tilskud og dels ved at hjælpe Kommunerne til Laan, som meget vel skulde kunne afdrages paa 10 Aar.»

Havna- og veganevndin heldur ikki at kunna mæla tinginum til sum er at átaka sær umsitingarskyldu á vegum yvirhøvur í Føroyum, men sum tað sæst av frágreiðslu løgtingsverkfrøðingsins, so hava summar kommunur tað ovtungt at halda langar teinar av samferðsluvegi. Tað kann ikki sigast, at tann ójavni, sum í so máta er millum kommunur orsakað av, at hagamark er mark fyri skyldu kommunanna at halda vegir, er rættvisur. Møguligt mátti verið at skipa hesa umsiting eitt sindur øðrvísi, antin so, at løgtingið veitti studning til tær kommunur, sum hava ov langar teinar at halda, men í studningsveitan sum er liggur ein vandi fyri, at kommunurnar ikki vilja leggja sær so nær, sum tær eiga at halda vegirnar. Ein umskipan av hesum eigir at koma skjótt, í hvussu er, tá vegasamband er komið bygdanna millum, so langt sum gjørligt.

Fyri at linka nakað um tann verandi ójavna hevur nevndin hugsað um at givið landsnevndini mynduleika til eftir tilmæli løgtingsverkfrøð-

ingsins at loyva kommununum at nýta ein part av standandi vegajáttanum til tílíka vegaumsiting, sum metast kann javnt við vegaumbygging.

Meirilutin skal mæla til, at málið verður sent kommunustýrunum til ummælis, fyri at tey kunna taka støðu til tey ymisku uppskot, sum verkfrøðingurin hevur sett fram.

Minnilutin (J. P. Davidsen) skal mæla til at fylgja uppskot 2 frá verkfrøðinginum og veita studning til tær kommunur, har útreiðslurnar eru størstar, eins og mælt verður til at fáa neyðturviligan pening til vega við at hækka bilskattin og við benzin- og oljugjaldi, sum umtalað í pt. 3 hjá verkfrøðinginum.

Uppskot:

I. Frá meirilutanum:

a. Málið verður sent kommunustýrunum til ummælis.
b. Loyvi verður givið Sunnbiar, Þorkeris, Kvívíkar og Viðareiðis kommunum at taka neyðturvulig lán til hovuðsumvølingar av vegum, og tekur tingið ábyrgd fyri hesi lán.

Spurningurin um studning verður goymdur til næsta ár.

II. Frá minnilutanum (J. P. Davidsen):

A. MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER
OM
ÆNDRING I LOV FOR FÆRØERNE NR. 73 AF 19. MARTS 1930
OM MOTORKØRETØJER M. M.

§ 1.

I § 32 i Lov for Færøerne Nr. 73 af 19. Marts 1930 om Motorkøretøjer m. m. ændres «10 Kr.» til «30 Kr.» og «20 Kr.» til «60 Kr.»

§ 2.

Disse Bestemmelser træder i Kraft fra 1. Januar 1945. Samtidig ophæves Kundgørelse Nr. 52 af 19. December 1942.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR
VIÐVÍKJANDI
BROYTAN AV LÓG FYRI FØROYAR NR. 73, 19. MARS 1930
UM MOTORAKFØR O. A.

Gr. 1.

Í grein 32 í lóg fyri Føroyar nr. 73, 19. mars 1930 um motorakfør o. a. verður broytt: «10 kr.» til «30 kr.» og «20 kr.» til «60 kr.»

Gr. 2.

Hesar fyriskipanir koma í gildi 1. januar 1945. Samstundis verður kunngerð nr. 52, 19. december 1942, sett úr gildi.

MIDLERTIDIGE BESTEMMELSER FOR FÆRØERNE
OM
TILLÆG TIL LOV FOR FÆRØERNE NR. 53 AF 15. MARTS 1939 OM INDFØRSELSAFGIFTER M. V.

§ 1.

Som Nr. 63 indsættes i § 1 i Lov Nr. 53 af 15. Marts 1939:
Raaolje, Petroleum og Benzin pr. kg . . . . . 2 Øre.

§ 2.

Provenuet af Afgiften tilfalder Vejfonden og kan af dennes Bestyrelse anvendes til Støtte til Kommuner, som har store Udgifter til Vedligeholdelse og Udbedring af Veje.

§ 3.

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

BRÁÐFENGIS FYRISKIPANIR FYRI FØROYAR
UM
ØKJAN AV LÓG FYRI FØROYAR NR. 53, 15. MARS 1939 UM INNFLUTTNINGSGJALD O. A.

Gr. 1.

Sum nr. 63 verður innsett í grein 1 í lóg nr. 53, 15. mars 1939:
Ráolja, petroleum og benzin pr. kg . . . . . 2 oyru.

Gr. 2.

Inntøkan av gjaldinum fellur til vegagrunninum og kann av styrinum verða nýtt til studning til kommunur, sum hava stórar útreiðslur til umvælan og bøtan av vegum.

Gr. 3.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

III. Frá nevndini:

Til beinkan av vegsniðjum og breiðkan av brúm og setan av avvisatamúrum kann landsnevndin fyri 1945 nýta upp til 35.000 kr.

Havna- og veganevndin, 24. november 1944.

P. Petersen. *R. Rasmussen.* *A. Djurhuus.* *S. Ellefsen.*

J. F. Kjølbro. *J. P. Davidsen.* *Joh. M. Fr. Poulsen.*

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókahandils.

Skjal nr. 13.

ALIT

í

løgtingsmáli nr. X-8|1944: Fólkayvirlit.

Í skrivi dagfest 7. oktober 1943 hevur Tórshavnar Líkningarnevnd beitt á Føroya løgting um at seta í gildi í Føroyum lóg um fólkayvirlit, av tí at tað er vorðið ógvuliga torført hjá Líkningarvaldinum at halda skil á til- og fráflytan í Tórshavn. Eisini verður í skrivinum víst á, at fólkayvirlit eisini hevur týdning umfram fyri skattaálíkningina.

Áðrenn skrivið kom til løgtingið, hevði tað verið hjá Tórshavnar býráð til ummælis. Býráðið mælir til at fáa nevndu lóg selta í gildi.

Málið kom ikki til viðgerðar á tingi í tingsetuni 1943. Á landsnevndarfundi tann $^{25}/_{1}$—1944 varð samtykt at senda kommununum málið til ummælis. Úrslitið av hesum fyrispurningi var, at tá Tórshavnar kommuna er frokuð, mæla 21 kommunur til, at nevnda lóg verður sett í gildi í Føroyum, 6 kommunur hava ikki svarað, og 18 siga nei fyri, at henda lóg verður sett í gildi.

Undirritaða nevnd heldur tað vera av stórum týdningi hjá kommununum, serstakliga teimum stóru, at hava eitt álítandi manntalsyvirlit. Sjálvandi kemur hetta at skapa meiri arbeiði hjá kommununum, men fyri tær størri kommununum vil hetta koma at løna seg, við tað at tað í mangum førum vil koma af hetta um skrivstovuarbeiði, serstakliga undir skattaálíkningini, um kommunan hevur yvirlit yvir alt fólkið, sum í lotuni er innan sóknina.

Tað er lætt at fata, at kommunur hava mælt frá, at slík lóg verður sett í gildi, við tað at tað hevur minni týdning hjá smáum kommununum at hava eitt slíkt skrivligt yvirlit yvir alt fólkið í kommununi.

Undirritaða nevnd er samd í tí, at um lóg um fólkayvirlit skal koma at gera ta nyttu, ið er tilætlað við henni, má hon verða galdandi fyri allar kommunur í Føroyum.

Nevndin mælir til, at yvirlitið verður gjørt í 1945 á einum degi, ásettum av landsnevndini, í øllum kommununum. Hesi yvirlit skulu so fáast til vegar við manntalslistum, og skal hvør tann, sum á hesum degi býr ella fyribils heldur til í kommununi greiða frá sínum persónligu viðurskiftum s. t. d. fulla navn, yrki, føðingardag og -stað o.

s. fr., alt hetta í tráð við hina dansku lógina um fólkayvirlit. Annars má tað haldast at vera beinast, at landsnevndin skipar fyri manna-gongdini, tá ið yvirlitini verða stovnað. Og við tað at viðurskiftini í Føroyum eru so smá, má tað eisini vera rætt, at fleiri kommunur í somu oyggj ganga saman um felags yvirlit, hetta eigir so landsnevndin at gera av í høvrjum einsløkum føri.

Tað verður náttúrligt, at sama skipan verður viðvíkjandi frágreiðslu um føðslur, andlát, o. s. fr., sum galdandi er í dansku lóg um fólkayvirlit nr. 57 av 14. mars 1924, nevniliga at tey avvarandi yvirvald geva hesar upplýsingar. Tá yvirlitini eru sett á stovn, má ein og hvør hava skyldu at boða frá, tá ið hann flytur til eina kommunu ella úr einari kommunu, og um hann ikki akfar má hann kunna fleggjast bót. Hann, ið flytur úr einari kommunu og sigur til má fáa útflýggjað prógv frá tí kommunu, hann flytur úr, fyri at kanna avhenda hetta til ta kommunu, sum hann flytur til, sum prógv fyri, at rætt er alborið. Hvussu hetta flattningsprógv skal vera vorðið, eigur at verða álagt landsnevndini at gera av. Fyri at hava eitt visst eftirlit yvir fólkayvirlitini man helst verða neyðugt at senda útfyllingarbløð um landið og má tað so áleggja hvørjum húsaeigara at hava umsorgan fyri at skrivað verður á tey sum ávíst. Hvørja ferð manntal hevur verið eigur tað at vera álagt sóknarstýrinum at kanna eftir yvirlitunum eftir manntalslistunum.

Landsnevndin má hava hægsta ræði í øllum viðurskiftum viðvíkjandi yvirlitunum og má ásetta nærri reglur fyri, hvussu tey skulu verða stovnað og førd. Eisini um gjald fyri upplýsingar frá yvirlitunum. Ein roknar við, at kommununurnar fáa nakað av inntøkum fyri umbidnar upplýsingar, tað sum frestar eiga kommununurnar sjálvar at bera. Sum omanfyri nevnt eigur hvør tann, sum ikki fylgir hesum reglum ið verða ásettar, at fáa bót, og má hon fella í kommunu til, sum maður hevur gjørt brot móti. Og um trætur koma av reglunum, eiga tær at verða viðgjørdar sum politimál.

Ávísandi tað, ið frammanfyri er borið uppá mál, setur nevndin so stall hetta

Uppskot:

Niðanfyri standandi uppskot verður sent kommunustýrunum til ummælis, og endalig avgerð verður at taka á næstu tingsetu:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Folkeregister.

§ 1.

I Løbet af Aarel 1945 oprettes paa en af Landsnevndin fastsat Dag Folkeregistre for samtlige Kommuner paa Færøerne. Registrene tilvejebringes ved Hjælp af Folketællingslister, paa hvilke enhver, som den paagældende Dag er bosat eller midlertidigt opholder sig indenfor Kommunen, er pligtig til for sig og Medlemmerne af sin Husstand at meddele Oplysning om fulde Navn, Kon, Stilling eller Erhverv, Bopæl, Fødselsaar, Fødselsdag og Fødested, Statsborgerhold, ægteskabelig Stilling, Stilling i Husstanden samt, hvis paagældende er tilflyttet Kom-

minnen i Løbet af de sidste 5 Aar, da Tilflytningsaar og Fraflytningssted. Landsnevndin fastsætter Fremgangsmaaden ved Registrenes Oprettelse.

§ 2.

Folkeregistrene føres ved Kommunalbestyrelsernes Foranstaltning. To eller flere Kommuner indenfor samme Ø kan ved Landsnevndins Samtykke slutte sig sammen om et fælles Register.

§ 3.

De Myndigheder, overfor hvilke Fødsler, Navngivelser og Dødsfald skal anmeldes, er pligtige til at afgive Indberetning til Folkeregistrene om de til den skete Anmeldelser.

Saadanne Indberetninger skal videregives senest 5 Dage efter at de er anmeldt for Myndigheden. Indberetninger om Fødsler skal indeholde Oplysning om det paagældende Barns Køn, Fødselsdag, Fødested og Opholdssted samt om Forældrenes Navn og Bopæl. For uden for Ægteskab fødte Børn angives Mødrenes Navn og Bopæl.

Dødsfald skal indberettes til Registeret senest 3 Dage efter, at de er anmeldt for Færøernes Skifterel. Indberetningen skal indeholde Oplysning om afdødes fulde Navn, Livsstilling, sidste Bopæl, Dødsdag og Dødssted.

Landsnevndin kan paalægge andre Myndigheder end de ovennævnte at meddele Folkeregistrene alle Oplysninger, der maatte være af Betydning for Registrenes Virksomhed.

§ 4.

Efter Folkeregistrenes Oprettelse er enhver, som midlertidigt eller for længere Tid flytter fra en Kommune, pligtig til ved Bortflytningen eller senest 5 Dage derefter for sig og de Medlemmer af hans Husstand, der flytter sammen med ham, at melde Fraflytning til Folkeregistret i den Kommune, han forlader. Senest 5 Dage efter Ankomsten til den Kommune, hvortil han har meldt Flytning, paahviler det ham for sig og de Medlemmer af hans Husstand, der er flyttet sammen med ham, at melde Tilflytning til Folkeregistret i den paagældende Kommune.

§ 5.

Ved Anmeldelse af Flytning fra en Kommune udleverer Folkeregisteret vedkommende et Flyttebevis, som afleveres til Tilflytningskommunen.

De nærmere Regler for Indholdet af de i § 4 indeholdte Anmeldelser, samt de Oplysninger, Flyttebeviset skal indeholde angaaende vedkommendes personlige Data og Skatteforhold fastsættes af Landsnevdin.

§ 6.

Til Kontrol af de kommunale Folkeregistre er Kommunalbestyrelsen berettiget til at bestemme, at der een Gang aarlig omdeles Skemaer, og enhver Husejer er da pligtig til at foranledige, at disse Skemaer cirkulerer til Udfyldelse blandt Husets Beboere. Husfaderen eller den selvstændige Lejer er ansvarlig for, at Skemaerne rettidig udfyldes med de i Paragraf 1 omhandlede Oplysninger, og pligtig til efter Husejerens Anvisning at sende Skemaerne videre i Ejendommen. Skemaerne skal være udfyldt senest 14 Dage efter Omdelingen og skal derefter af Kommunasbestyrelsen afhentes hos Husejeren.

Paa Kommunalbestyrelsens Foranstaltning skal Registeret re-

videres efter hver almindelig Folketælling paa Grundlag af Folketællingslisterne.

§ 7.

Klage over Registrenes mangelfulde Førelse rettes til Landsnevndin. Kommunalbestyrelserne er pligtige til at rette sig efter de Paalæg, der som Følge heraf bliver givet dem af Landsnevndin.

§ 8.

Landsnevndin fastsætter Regler for kommunale Registres Indretning og Førelse, for det nærmere Samarbejde mellem de kommunale Registre og for Adgangen til at erholde Oplysninger fra Registrene og Betalingen herfor m. v.

§ 9.

Udgifterne ved de kommunale Registres Oprettelse og fremtidige Førelse paahviler Kommunerne, der til Hjælp ved Dækningen af deres Udgifter oppebærer Betalingen for de af de kommunale Registre meddelte Oplysninger.

§ 10.

Den Privatperson, der undlader rettidigt at foretage de i denne Lov omtalte Anmeldelser til Folkeregisteret, afgiver urigtige Anmeldelser eller iøvrigt overtræder denne Lov eller de i Henhold til den givne Bestemmelser, straffes, for saa vidt ikke højere Straf efter den øvrige Lovgivning er forskyldt, med Bøder fra 5 til 200 Kr. For Overtrædelser af Lovens Bestemmelser om Flytningsanmeldelser er Kommunalbestyrelsen i den Kommune, overfor hvis Folkeregister Lovens Bestemmelse er overtraadt, inden Sagen er forelagt Paatalemyndigheden, berettiget til at modtage den skyldiges Tilbud om at erlægge en passende Bøde indenfor den ovenfor fastsatte mindste og højeste Bøde. Saafremt en Person, der flytter fra een Kommune til en anden, undlader at anmelde Flytningen saavel i den Kommune han forlader, som i den Kommune, han tilflytter, betragles Overtrædelsen i denne Henseende som alene begaaet overfor Folkeregisteret i Tilflytningskommunen. Bøderne tilfalder, hvad enten de er idømt eller vedtaget, den Kommune, overfor hvilken Forseelsen er begaaet.

Sager derom behandles som Politisager.

Bráðfengis fyriskipanir fyri Føroyar um fólkayvirlit.

1. grein.

Í árinum 1945 verður ein dag, ið landsnevndin ásetir, fingið til vegar fólkayvirlit í øllum kommununum í Føroyum. Yvirlitini verða fingin til vegar við manntallslistum, og eru øll, ið hendu dag hava bústað og bráðfengis dvøljast í kommununni, viðvíkjandi sær og hásfólkunum skyldug at greiða frá fullum navni, kyni, embætti ella yrki, bústaði, føðingarári, føðingardegi og -staði, ríkisborgaraskapi, viðurskiftum viðvíkjandi hjúnarlagi, støðu í húsinum og, um so er, at viðkomandi er fluttur til kommununa innanfyri síðstu fimm árini, tá eisini tilflutningsári og staðnum, ið flutt er burtur frá. Landsnevndin skipar fyri framferðini, tá ið yvirlitini verða fingin til vegar.

2. grein.

Kommunustýrini hava umsorgan fyri, at fólkayvirlitini vera førd. Tvær ella fleiri kommunur í sama oyggj kunnu ganga saman um eitt felags yvirlit.

3. grein.

Tey yvirvald, sum føðing, navnagáva og andlát skal vera givið upp fyri, eru skyldug at greiða fólkayvirlitinum frá hesum uppgávum.

Hesar frágreiðingar skulu verða greiddar úr hondum í seinasta lagi 8 dagar eftir tað, at yvirvaldið hevur fingið tær. Tá ið greitt er frá føðing, skal eisini vera upplýst um kyn barnsins, føðingardag, føðingarstað og tilhaldsstað og um navn og bústað foreldranna. Er barnið født uttan hjúna, verður sagt frá navni og bústaði móðurinnar.

Andlát skal verða givið upp fyri yvirlitinum í seinasta lagi 3 dagar eftir tað, at skiffirættur Føroya hevur fingið boð um tað. Henda frágreiðing skal innihalda upplýsing um fulla navn hins deyða, lívsyrki, síðsta búðstað, deyðadag og -stað.

Landsnevndin kann áleggja øðrum yvirvaldi enn hesum, ið omanfyri er nevnt, at geva fólkayvirlitinum allar upplýsingar, ið týðning kunnu hava fyri yvirlitini og virkan teirra.

4. grein.

Tá ið fólkayvirlitini eru fingin til vegar, eru øll, ið hava flutt burtur úr einari kommunu, annaðhvørt tey ætla sær at vera burturi í longri ella stytri tíð, skyldug, tá ið tey flyta burtur ella í seinasta lagi 5 dagar aftaná, fyri seg og tey av húsfólkunum, ið flyta við, at siga fólkayvirlitinum í kommununi, sum flutt verður frá, frá burturflytinginí. Í seinasta lagi 5 dagar eftir tað, maður er komin í ta kommunu, hann hevur sagt seg at flyta til, er tað skylda hansara fyri seg og tey av húsfólkinum, ið við honum eru flutt, at siga fólkayvirlitinum í hesi kommunu frá tilflyting sínari.

5. grein.

Tá ið maður boðar frá flyting burturi úr einari kommunu, fær hann frá fólkayvirlitinum eitt flytingarprógv, sum verður fingið tilflytingarkommununi.

Greiniligari reglur viðvíkjandi innihaldinum í teimum fráboðanum, ið eru umrøddar í gr. 4, og viðvíkjandi teimum upplýsingum, ið flytingarprógvið skal innihalda um viðkomandi sjálvan og skattaviðurskifti vera settar av Landsnevndini.

6. grein.

Til rættleiðing fyri teimum kommunalu fólkayvirlitunum hevur kommunustýrið rætt at gera av, at eina ferð um árið verða útbýlt útfyllingarbløð, og hava allir húscigarar tá skyldu at fáa í lag, at hesi útfyllingarbløð koma runt til útfyllingar til øll, sum í húsinum búgva. Húsbóndin ella tann sjálvráðandi leigarin skulu standa til svars fyri, at útfyllingarbløðini í rættari tíð vera útfylt við teimum í gr. 1 umnevndu upplýsingum, og eru skyldigir, eftir ávísing húseigarans at flyta bløðini víðari í húsunum. Bløðini skulu vera útfylt í seinasta lagi 14 dagar aftaná útbýlingina, og skal kommunustýrið síðani lata fara eftir teimum hjá húseigaranum.

Kommunustýrið skal hava umsorgan fyri, at yvirlitið verður aftur um aftur kannað aftaná hvørja vanliga fólkateljing eftir manntalslistunum.

7. grein.

Klagur um, at yvirlitini eru illa førd, verða heindar til Landsnevndina. Kommunustýrini eru skyldug at fylgja teim skipanum, ið Landsnevndin av hesari grund setur teimum fyri.

8. grein.

Landsnevndin setur reglur fyri, hvussu tey kommunalu yvirlitini skulu vera løgd til rættis og førd, fyri samvirkinum teirra millum og viðvíkjandi atgongd til at fáa upplýsingar frá yvirlitinum og gjald fyri hetla o. a.

9. grein.

Útreiðslurnar av at fáa til vegar tey kommunalu yvirlitini og til at føra tey í framtíðini bera kommunurnar, ið fáa gjaldið fyri tær upplýsingar, ið tey kommunalu yvirlitini lata, til at lætta teimum um útreiðslurnar.

Tann maður, sum ikki í rættari tíð gevur upp fyri fólkayvirlitinum tað, ið henda lógin krevur, gevur skeivt upp ella annars brýtur hesa lóg ella tær í samsvar við hana gjørdu fyriskipanir, verður, um hann ikki eftir lógini hevur uppihorið størri revsing, revsaður við sekt frá 5 og upp í 200 kr. Tá ið onkur brýtur lógarinnar fyriskipanir um at geva upp flyling, hevur kommunustýrið í teirri kommunu, har sum hann ímóti fólkayvirlitinum hevur gjørt seg sekan í broti á fyriskipanunum í lógini, rætt til, áðrenn málið er lagt fram fyri klaguvaldið, at taka við tilboði frá hinum seka um at svara eina hóskandi bót innanfyri tað mark, ið omanfyri er sett fyri minnstu og størstu bót. Flytur onkur frá einari kommunu til aðra og boðar ikki frá burturflytan, hvørki í teirri kommunu, hann flytur frá ella teirri hann flytur til, verður brotsverkið í hesum føri roknað at vera gjørt móti fólkayvirlitinum í tilfluttningskommununi. Sektirnar falla, annaðhvørt tær eru dømdar ella tiknar við, til ta kommunu, sum hann hevur brotið seg ímóti.

Mál, ið standast av hesum, verða viðgjørd sum løgreglumál.

KOMMUNALA NEVND LØGTINGSINS, 22. november 1944.

Kr. Djurhuus. *R. Long.* *A. Sørensen.* *J. H. Danbjørg.*

Skjal nr. 14.

ÁLIT

í

løgtingsmáli nr. X — 4/1944:

FÓLKATRYGGING

Málið um fólkatrygging var til viðgerðar á løgtingi í 1943 (sí løgtingstíðindi 1943, síðu 200), og varð tá samtykt at beina málið í landsnevndina til viðgerðar og fyrireikingar til hesa tingsetuna. Málið hevur fleiri ferðir verið til umrøðu í landsnevndini, og á fundi tann 17. august 1944 samtykti landsnevndin at leggja málið fyri Løgtingið; á sama fundi tá úttalilsi frá løgtingsskrivstovuni, soljóðandi:

»Tað má haldast ógjørligt at fáa sett upp forsvarligar reglur viðv. fólkatrygging, bygdar á heilt nýggjum grundarlagi enn tær núgaldandi reglurnar. Fyri at kunna gera tílíkt uppskot, er tað neyðugt at hava kunnleika til lógreglur í øðrum londum, og tað er ikki gjørligt at fáa tílíkar upplýsingar, eins og tað óivað er neyðugt at samráðast við sakkønar menn í øðrum londum, og tílíkar samráðingar eru heldur ikki gjørligar. Tað má tí haldast at vera neyðugt at uppihalda tá núgaldandi lóggávu, soleingi veraldarbardagin er, og geva dýrtíðarviðbót og socialhjálp aftrat, og so taka sparningin upp frá botni av, tá kríggið er at enda.«

Sociala nevndin, ið hevur haft hetta mál til viðgerðar, má ásanna, at tað er neyðugt at samráðast við serkønar menn fyri at leggja eina heilt nýggja sociala lóggávu til rættis, og at hetta ikki kann væntast at verða gjørligt, áðrenn bardagin er av. Á annan hátt má nevndin føra fram, at tað ikki kann vera beint at steðga við at byrja arbeiði, tí nakað má kunna gerast longu nú. Í tingsetuni 1940 varð samtykt at biðja landsnevndina gera uppskot til næstu tingsetu, og í 1941 var sama samtykt gjørd (sí løgtingstíðindi 1940 síðu 130 og 1941 síðu 128), men enn er einki uppskot framkomið. Nevndin heldur tað tí vera neyðugt at skipa serliga nevnd til at viðgerða málið, soleiðis at alt kann liggja so greitt sum gjørligt, tá bardagatíðin er av, og farið kann verða undir at seta umskipanina í verk við lóggávu.

Soleiðis sum ávíst í álitinum í 1940 er tað fyrst hesar lógir, ið skulu samarbeiðast til eina heild:

1. Reglugerð nr. 59 av 21. februar 1930 um sjúkrakassar.
2. Reglugerð nr. 161 av 29. mars 1939 um vanlukkutrygging.
3. Lóg fyri Føroyar nr. 120 av 15. mars 1939 um invalidutrygging.

4. Lóg fyri Føroyar nr. 104 av 31. mars 1933 um ellisrenta, við broyting av 31. mars 1938, nr. 92.
5. Lóg um studning til børn av einkjum, nr. 184 av 1. april 1921.

Tað eru tó nógv onnur mál og almenn studningartiltøk, ið mugu koma undir eina heildarskipan, soleiðis kann nevnast studningur til barnaheim, til hjálpikassar og til fólk undir heimaansan og meira.

Tað eru mangar ymiskar skipanir í øðrum londum, og í seinastuni vita vit, at tað er undir umbúna at umskipa øll hesi viðurskifti sum t. d. í Bretlandi við Beveridge planinum. Høvuðsreglan í øllum londum er tó tann, at tann sociali spurningurin er skipaður aftin við 1) frívillig trygging, ella við 2) tvungnari trygging, ella við 3) almennari trygging. Allir mugu verða á einum máli um, at tann frívilliga tryggingin ikki dugir í okkara tíð, tí hon vissar ikki øllum ta hjálp, tey veruliga mugu sigast at hava krav uppá frá tí almenna. Um tann nýggja skipanin so skal ganga vegin við tvungnari trygging ella við almennari trygging, má tað takast støða til, og hetta er ein spurningur, ið longu nú kann verða avgjørdur. Eisini er tað møguleiki fyri at lata nakað ganga undir tvungnari trygging og annað undir almennari trygging, men best vil hetta kunna klárleggjast, um teir, sum higartil hava arbeitt við hesum málum, koma saman til samráðingar.

Við tiltøkum sum hetta, her er talan um, vita vit, at tað skulu nógvir pengar til. Teir partar, sum luttaka, eru tríggir: 1) tað almenna, 2) arbeiðsgevarin og 3) arbeiðarin. Hvussu skulu nú byrðirnar býtast millum hesar tríggjar partar. Tað er hugsandi, at tað ikki vil verða beint at gera sama býli í øllum greinum; t. d. má tað almenna taka meginpartin við ellisrentuni, meðan vanlukkutrygging og sjúkrakassahjálp væl kann hugsast at skipast soleiðis, at stórur partur liggur á arbeiðsgevara og arbeiðara. Hetta vildi tað kunna først samráðingar um nú, soleiðis at málið ikki, tá bardagatíðin er av, skal seinkast av, at fyrst tá verður byrjað at arbeiða.

Ein spurningur, ið ikki eigur at verða gloymdur undir teimum samráðingum, ið skulu fara fram, er studningur til óarbeiðsførar fiskimenn og arbeiðarar. Tað er lungt hjá einum manni at vera óarbeiðsførur vegna sjúku, t. d. av tuberklum, men tyngri verður sjúkan fyri hann, um óttin fyri húsarhaldinum heima skal liggja á hansara tonkum. Einhvør í samfelagnum, ið kemur soleiðis fyri, at hann utlan sjálvur at hava skuld í tí — ikki kann skaffa sær og sínum innivist og føði, hann hevur krav uppá, at samfelagið skipar fyri, so tey onga neyð líða. Í 1940 var tað sokt um, at reglur fyri hjálp til arbeiðsloysi skuldu koma í gildi í Føroyum; tá var tað ógjørligt at loysa henda spurning, men nú, tá heila málið um umskipan av okkara socialu lóggávu fer til umhugsunar, eigur hesin spurningur at koma til viðgerðar og eigur at verða loystur. Væl má nevndin ásanna, at tað kanska ikki er so lætt at finna tann veg, ið beinastur er, tí so nógvir av okkara fiskimonnum hava alla teirra inntøku í nakrar mánaðar av árinum, og soleiðis ikki kunnu kallast veruliga arbeiðsleysir í teimum 4 ella 5 mánaðunum, teir vanliga liggja heima um veturin, men tað eigur at kunna setast upp reglur, ið geva øllum teimum hjálp, ið veruliga treingja til hennara.

Nevndin er eisini var við, at okkara sjúkrahús- og læknaskipan væl kann sigast at nerta so nógv við hetta mál, at tað eigur at umhugsast at taka nakað av henni inn undir heildarviðgerð av teimum socialu viðurskiftunum. Hetta eigur at verða umhugsað av teimum, ið fara undir at fyrireika málið, og eisini eiga teir at royna at gera reglur,

ið stimbra kommunur til, har tað er neyðugt, at fara undir ellisheim, við at tað almenna tekur part í tí fíggjarligu byrðini av tílíkum heimum.

Nevndin skal vísa á, at tíðin líka aftaná, at bardagin er av, má sigast at verða góð til, at hetta verður skipað av nýggjum, og at tað væl kann hugsast, at tað er lættari nú at skipa hetta, tá vit vita, at bæði vanlukkutryggingin og løgtingið hava lagt pening til síðis til at fara undir arbeiðið.

Minnilutin (J. H. Danbjørg) heldur fram:

Javnaðarflokkurin hevur, sum monnum kunnugt, havt á tingi mál um fólkatrygging og hevur í ár lagt inn á ting mál um uniskipan av allari teirri socialu forsorgini, samstundis sum flokkurin vísir á inntøkuleiðir, sum kunna stimbra tingið soleiðis peningaliga, at vit her á landi kunna verða førir fyri at skipa okkara socialu lógir og viðurskifti í eitt lag, sum kann vera samsvarandi viðurskiftunum í øðrum mentaðum samfeløgum.

Minnilutin hevur skrivað álit og uppskot í tí av javnaðarflokkinum reista máli um broytan av øllum teim socialu lógunum og vil tí í hesum fyriliggjandi máli vísa til tað omanfyri nevnda álit og uppskot, sum skal verða framsett í hesu tingseta.

Nevndin setur fram hetta

uppskot:

Løgtingið samtykkir at setu eina serliga nevnd til at fara undir arbeiðið at fyrireika eina fólkatryggingarlóggávu. Tingið velur 3 limir (innan- ella utanfyri tingmennirnir) og biður »Centralforeningen af Sygekasser paa Færøerne« og vanlukkutryggingarráðið velja hvør sín lim. Hesir fimm koma saman, velja formann og byrja arbeiðið, og skal henda nevndin so avgera, hvørjar fleiri teir vilja biðja taka lut í nevndarviðgerðini.

Álagt verður nevndini at føra samráðingar við Føroya arbeiðarafelag, Føroya fiskimannafelag, Suðuroya fiskimannafelag, Føroya arbeiðsgevarafelag, navigatørfelagið og reiðarafelagini, um allar spurningar teir ætla at seta uppskot um, áðrenn málið aftur verður lagt fyri tingið.

SOCIALA NEVNDIN, tann 23. november 1944.

A. Sørensen. *J. Slettenæs.* *Joh. M. Fr. Poulsen.*

O. F. Joensen. *J. H. Danbjør.*

ÁLIT

í

løgtingsmáli nr. X — 4/1944:

Broytan í teim socialu lógunum (Fólkatrygging).

Minnilutin (J. H. Danbjørg) heldur fram at ein broytan av teim socialu lógunum er so hart ároðkandi, at tingið ikki eigur at bíða við at taka støðu fyri eini tíðarhóskandi umskipan av:

I. ellisrentulógini;
II. lóg um ellisheim,
III. sjúkrakasaslóg,
IV. fluttningskassar,
V. vanlukkutrygging,
VI. avlamistrygging,
VII. einkjubarnastudningur,
VIII. serforsorg (sinnissjúk),
IX. lóg um fólk í heimaansan,
X. løn til læknar,
XI. løn til jarðamøður,
XII. hjálpikassar,
XIII. barnaheim,
XIV. jarðarferðaútreiðslur,
XV. arbeiðsloysisfyribyrgjan.

Føroya javnaðarflokkur, sum aftur í ár hevur reist málið um broytan av teim socialu lógunum, hevur samtundis vist á ymiskar leiðir, sum flokkurin heldur, at tingið eigur at ganga fyri at veita sær tær inntøkur, ið óivað verða neyðugar fyri at stimbra tingið peningaliga, soleiðis at tað verður fört fyri at fáa okkara socialu lógir og viðurskifti í eitt lag, sum kann verða samsvarandi viðurskiftunum í øðrum mentaðum samfeløgum. Tílíkar inntøkuleiðir skulu verða nærri viðgjørdar seinari í hesum álíti og í tí uppskoti, sum minnilutin framsetur.

1. *Ellisrentulógin* hevur mangar ferðir verið til viðgerðar á tingi og er broytt nakað, men enn kann ikki sigast, at komið er á mál til bota fyri ley fálæku gomlu, og minnilutin er á tí áskoðan, at tað rættasta er at ganga heilt burtur frá teim lógum um ellisrentu, sum nú eru í

gildi, og í staðin fyri innføra eina heilt nýggja skipan soleiðis, at øll gomul fólk fáa rætt til eina hóskandi pensión, ið skal verða ásett somikið rúmlig, at tað av sonnum kann sigast, at øll gomul fólk skulu kunna sleppa frá svongd, kulda, klædnatroti etc., soleiðis at tað, hvat ið tilfíkum viðvíkjur, skal kunna sigast, at her á landi er alt gjørt, sum gerast kann, fyri at øll skulu eiga rætt til at liva sorgleys ellisár.

Sambart fólkateljing av 5. november 1930 vóru 24200 íbúgvarar her í Føroyum. Harav vóru 2340 yvir 60 ár. Av teim vóru 1070 yvir 70 ár og 1270 millum 60 og 70 ár. Omanfyri 60 ár vóru soleiðis o. u. $9^1/_2$ % av øllum íbúgvarunum. Av teim vóru tey o. u. 5%ini millum 60 og 70 ár og tey o. u. $4^1/_1$%ini yvir 70 ár.

Sambart fólkateljing 1935 vóru 26.231 íbúgvarar í Føroyum, og síðan tá hevur èingin fólkateljing verið; men við tað, at fólkatalið frá 1930 til 1935 vaks frá 24.200 til 26.231, fara vit ikki nógv skeivir, um vit í dag rokna við einum íbúgvaratali av 28.000 fólkum.

Rokna vit nú við somu procentum sum omanfyri, koma vit til tað úrslit, at her á landi finnast í dag o. u. 2.660 fólk yvir 60 ár, og av teim eru o. u. 1400 millum 60 og 70 ár og o. u. 1260 yvir 70 ár.

Av teimum millum 60 og 70 ár eru o. u. 800 gift og o. u. 600 ógift.

Av teim yvir 70 ár eru o. u. 440 gift og 820 ógift.

Verða 600 kr. til hjún og 400 kr. til ógift sett sum hóskandi árlig pensión í friðartíðum verður tað við dýrtíðarviðbót roknað við prístalinum 260 tað sama sum 1560 króur til hjún og 1040 krónur til ógift.

Veitir samfelagið pensión til øll, ið fylli hava 60 ár, verða

útreiðslurnar $1560 \times \frac{1240}{2} = 967.200$ kr.

$+ \quad 1040 \times 1420 = 1.476.800$ »

ella tilsamans 2.444.000 kr.

Minnilutin er greiður yvir, at tingið ikki kann rinda so stórar útreiðslur, sum her er tala um, fyrr enn nýggjar inntøkulógir eru komnar í gildi og hava virkað í minsta lagi í eitt ár.

Tessvegna ætlar minnilutin ikki í hesari tingsetu at framseta uppskot um pensión soleiðis sum frammanfyri umtalað, men vil bert framseta uppskot um bøtan av tí núgaldandi ellisrentulógini, soleiðis at veitt verður ein dýrtíðarviðbót samsvarandi ellisrentuna faldaða við prístalinum og dividerað við 100, og at inntøkumarkið fyri at fáa ellisrentu verður hækkað sambart prístalið og dividerað við 100; men av tí at undirritaði minniluti hevur sett fram uppskot hesum viðvíkjandi í málinum um ellisrentu, sum eisini er til viðgerðar á tingi í ár, verður sjálvandi ikki sama uppskot framsett eisini í hesum máli.

Minnilutin er av tí áskoðan, at málið um broytan av øllum teim socialu lógunum er átroðkandi, og at tað er eitt so stórt mál, at tað eigir at verða uppaftur tikið á tingi í næstu tingsetu fyri tá, um gjørligt, at koma fram á tað mál, sum ávíst er fremri í hesum áliti, ella í minsta lagi at koma til eina skipan, sum minnilutin heldur vera væl gjøgnumførliga, sum ein fyribilsskipan, inntil landsins vinnuvegir eru komnir í eitt tíkt lag, at tingið lættliga skal kunna veita sær tær inntøkur, ið neyðturvoligar eru fyri at kunna rinda tær útreiðslur, sum mega gjaldast til bøtan av øllum teim socialu viðurskiftunum her á landi.

Í sambandi við broytan av øllum teim socialu lógunum og inn-

tøkuveitan hesum viðvíkjandi vísir minnilutin til tað skriv frá arbeiðsmannafelagnum »Framtíðin« í Vági, sum prentað er í hesum álíti.

Sum eina fyribils skipan heldur minnilutin, at øll ley, ið eru ella verða 70 ár, skulu eiga pensiónsrætt eftir teim frammanfyri ávístu reglum, soleiðis, at hjón skulu eiga 600 kr. árliga og ógift 400 kr., meðan dýrtíðarviðbótin verður at leggja aftrat í mun til líggjarumstøðurnar hjá teimum, og verður hæddin á henni funnin við at falda ta fastsettu pensión við einum tali á stødd við prístalið dividerað við 100, og verður so harfrá drigin fortjenastan, ið viðkomandi gamla menniskja hevur.

Sambart áður umtalaðu fólkateljing eru 1260 fólk yvir 70 ár og av teimum $^1/_3$ gift fólk og $^2/_3$ ógift. Hjón kunnu tí ættast at verða $\frac{1260.1}{3.2}$ = 210 og ógift 840 fólk.

Pensión til øll hesi verður 600 × 210 + 400 × 840 + dýrtíðarviðbót.

600 kr. × 210 = 126.000 kr.
400 kr. × 840 = 336.000 kr.

Tilsamans 462.000 kr. fyri uttan dýrtíðarviðbót.

Tey millum 60 og 70 ár skulu hava rætt sum nú nevniliga at søkja og fáa pensión, tá ið teirra ogn og inntøka liggja niðanfyri eitt mark, ið er væl hægri enn eftir núgaldandi lóg viðvíkjandi ellisrentu.

Málið viðvíkjandi broytan av reglunum um ellisrentu var í fjør til viðgerðar á tingi (sí løgtingstíðindi 1943 bls. 205) og helt undirritaði minnilutti tá fram, at inntøkumark fyri at fáa ellisrentu sambart lóg nr. 104, 31. mars 1933, broytt við lóg nr. 92, 31. mars 1938, skuldi verða hækkað sambart prístalið, og at øllum ellisrentunjótarum verður givin ein dýrtíðarviðbót, ið svarar til ellisrentuna faldaða við prístalinum dividerað við 100, tó soleiðis, at dýrtíðarviðbótin onganlíð verður minni enn eftir núgaldandi lóg.

Hvussu stórar, ið útreiðslurnar verða eftir hesi fyribils skipan kann ikki sigast heilt visst, men at útreiðslurnar verða væl hægri, um øll omanfyri 60 ár skulu hava fullan rætt til pensión, sum ávíst fremst í álitinum, er sjálvsagt.

Tað umtalaða skriv frá arbeiðsmannafelagnum í Vági er soljóðandi:

»Stjórn felagsins hevur mangan havt á máli og umhugsað tey kor, gomul fólk og sjúklingar liva undir her í Føroyum.

Einstakur maður, einsløk kvinna ella hjún fáa ellisrentu, tá ið gjøllað og ofta við nógvum strevi er prógvað, at tey veruliga hava slíka hjálp uppibornað. Henda socialhjálp virkar so stall mest sum í »Flæng«, og hjálp ella stuðul á henda hátt er samfelagsliga sæð verri enn eingin hjálp yvirhøvur.

Verður arbeiðari ella fiskimaður sjúkur, so sum tíverri mangur maður í hesi seinastu árini er fallin á sottarsong yvirhovur av tuberklasjúku, og harav brekaður í longri tíð, ja í mongum førum fyri lívstíð, so er neyðin slíkum manni og heimi hansara vís.

Her skal verða sagt, at ellisrentulógin eftir okkara hugsan eigur at verða broytt. Tær treytir, ið galdandi eru — sum mark fyri inntøku, ellisrentunjótarar hava loyvi at uppibera, — mega broytast so-

leiðis, at markið fyri inntøkuna verður hækkað í neyðturviligan mun til livikostnaðin.

Ávirkaðir av hugsjónum í samband við hesi samfelagsviðurskiftir, loyvir stjórn felagsins sær at heita á Føroya løgting um at kanna fyri álvara møguleikan fyri at fáa sett á stovn ein »pensiónsgrunn« fyri arbeiðarar og fiskimenn. Stjórnin er sjálvandi greið yvir og á einum máli um, at ein spurningur sum hesin má kannast av sakkønari nevnd — men fremst av øllum má viljin vera til staðar.

Ymsir stættir í okkara samfelag hava gingið saman og stovnað pensiónsgrunnar t. d. bankfunktionerar og lærarar. Tað er eisini kunnugt, virkir her heima — bæði privat og kommunal — hava í umbúna at stovna »pensiónsgrunnar« fyri funktionerar teirra.

Tann einasti stættur í okkara samfelag, hin stóra fjøldin, arbeiðarar og fiskimenn, er útihýstur. Onga trygging aflaná lívslaugan og strevnan arbeiðsdag í samfelagsins tænastu. Kann ikki verða bøtt um hetta, sjálvt um talan er um ein statt, sum ikki er fastløntur, men sum aloftast má liva »frá hond til munn.«

Vit loyva okkum at seta fram okkara hugsan um at fáa í lag ein »pensiónsgrunn« á henda hátt:

1) Øll arbeiðarafeløg í Føroyum — gjøgnum Føroya Arbeiðarafelag — og somuleiðis fiskimannafeløgum, seta á stovn ein grunn.
2) Peningurin til grunnin útvegast soleiðis, at allir felagslimir ganga við til at lata eitt nærri ásett limagjald í grunnin. Somuleiðis verður ein partur av teirri provisión, sum verður goldin har arbeiðsfeløg hava løngjaldsstovur, lagdur í sama grunn.
3) Heitt verður á kommunur í Føroyum um at lata t. d. 1 % av bruttoskattainntøkuni til grunnin.
4) Heitt verður á Føroya Løgting at lata ein part til grunnin, sum stendur í mun til omanfyri nevndu gjøld.
5) Heitt kann eisini verða á og samarbeiði sokt við feløg sum t. d. skipara og navigatørfelagið, motorpassarafelagið og Færøernes Rederiforening og aðrar stovnar kring Føroyar.

Um stjórnarviðurskifti Føroya verða so, at heitast kann á danska statin, ern eisini vónir um, at tilskot kann verða veitt haðani.

Sjálvandi er hetta eitt bráðfengis og ófullfíggjað yvirlit frá okkum, og geva vit okkum ikki av við at uppstilla nokrar »teoriir« hvareffir ein skipan í praksis kann verða lustløgd. Hettar er til fulnar greitt fyri okkum og líkaleiðis er tað greitt fyri okkum, at ein hollur kunnleiki tørvar frá okkara síðu. Men málið er at skapa ein grunn, sum kann fáa inntøku nokk til at bvíla í sær sjálvum um eitt vist áramál. Sjálvandi skal hesin grunnur verða óbundin av øðrum »socialum« grunnum.

Vit biðja tað heiðraða løgting um at kanna hesar hugsjónir okkara, og um møguligt, fáa tær omsettar í handling.

Við hávirðing

ARBEIÐSMANNAFELAGIÐ »FRAMTÍDIN«, VÁGUR

H. J. Hjelm (sign.)

Tað má ásannast, sum framført er í hesum skrivi, at hin stóra fjøldin, arbeiðarar og fiskimenn megu eiga sama ræll til pensión sum t. d. embætismenn og aðrir, ið stovnað hava pensiónsgrunnar. Tað má sigast at vera sera áhugavert, at arbeiðsmannafelagið »Framtíðin« í Vági vísir leiðir, sum kunna føra til tess, at inntøkur á lagaligan hátt verða veittar aftrat tí peningi, sum tað almenna kann síggja seg ført fyri at veita til botan av okkara sociala lógum.

Viðvíkjandi innihaldinum av skrivinum eins og málinum um broytan av øllum teim sociala lógunum mælir minnilutin til, at landsnevndin tingast við stjórnina fyri arbeiðsmannafelagnum »Framtíðin«, Vági, Føroya arbeiðsmannafelag ásamt øllum organisatiónum og øllum sóknarstýrum her í Føroyum og leggur málið aftur á ting í næstu vanligu tingsetu. Eitt eintøk av hesum álitti eigur skjótast gjørligt at verða sent øllum teim nevndu organisatiónum soleiðis, at tær á teirra fundum ella aðalfundum kunna viðgera málið áðrenn teirra tingingar við landsnevndina fara fram.

II. *Ellisheim.* Viðvíkjandi ellisheimum er at siga, at her á landi eru í dag einans tvey ellisheim.

At her er trongd til fleiri ellisheim er eyðsæð, og minnilutin er av tí áskoðan, at kommunat ellisheim verða ikki at kunna veita innivist til øll tey gomlu, ið treingja til at koma á tílík heim.

Hvussu moug ellisheim, ið neyðugt verður at hava, er ilt at siga, fyrr enn málið verður gjølla kannað, men eitt stórt ellisheim fyri allar Føroyar ber neyvan til at hava, tí viðurskiftini eru so ólík hvørjum øðrum í teim ymisku plássum, at gomul fólk úr eini bygd t. d. úr Norðuroyum ella í Suðuroy verða neyvan at trívast væl, um tey koma á eitt ellisheim t. d. í Tórshavn.

Heldur kundi eitt ellisheim verið sett á stovn fyri hvørja sýsln í Føroyum umfram eitt í Tórshavn. Tá verða 7 ellisheim í alt her á landi.

Hvussu mikið útreiðslan verður, kann ikki roknast eftir nútíðar prísum og útreiðslum, serliga av tí, at tað neyvan í loluni verður gjørligt at byggja ella keypa hóskandi bygningar til ellisheim. Í 1941 varð roknað við 7.000 kr. sum árlig útreiðsla fyri ellisheim á Tvøroyri, ið er innrættað til 10 gomul fólk.

Henda kostnaðarætlan hevur ikki hildið í hesum óvanligu tíðum, men er ikki nógv skeiv í vanligum tíðum. Ellisheim fyri 10 gomul fólk verða ikki stór nokk, tá ið tey skulu vera fyri heilar sýslur, men rúm til 20—30 fólk man fara at verða hóskandi, og kann útreiðslan tá metast til 15.000 kr. um árið til hvørt ellisheim ella fall 15.000 kr. × 7 = 105.000 kr.

III. *Sjúkrakassalógin.* Viðvíkjandi broytan av sjúkrakassalógini og

IV. *lóg um fluttaingskassar* framsetir minnilutin einki uppskot í hesi tingsetu, men til vegleiðing viðvíkjandi framhald av viðgerð av málinum skal minnilutin framseta fylgjandi:

Tað kann ikki verða rætt, at fólk við heilt lítlum inntokum skulu rinda eitt so stórt gjald til sjúkrakassan, sum tað ið nú er, tí hetta fellur nógv ovlungt fyri ónúgvandi fólk. Tað rættasta má vera at broyta lógina soleiðis, at øll fáa sama ókeypis ræll til læknahjálp, sjúkrahúsupphald, medicin og hægri dagpening o. s. fr., og at kostnaðurin verður rindaður á tann hátt, at tey, ið minstu inntoku hava, rinda minst, og tey, ið góð ráð hava, rinda meira eftir hækkandi skala.

V. *Vanlukkutrygging.* Viðvíkjandi broytan av lógini um vanlukkutrygging og

VI. *Avlamistrygging,* er at siga, at tær eiga at viðgerast undir einum við tað, at fann, ið er óarbeiðsfærur vegna sjúku, má hava sama rætt, sum fann, ið er vorðin sjúkur av vanlukku. Eisini eigur at verða sett í gildi viðvíkjandi endurgjaldi fyri mistan forsyrgjara tær somu reglur, annaðhvørt viðkomandi er deyður av sjúku ella av vanlukku. Tá ið trongdin er eins, eigur endurgjaldið eisini at vera eins.

Tað fyrsta brekið, ið fellur í eygnni, er tann stóri ójavni á studningunum, ið veitir verða, tó at trongdin er eins, og so tað, at einkjur ongan studning fáa, tá ið maðurin doyr av sjúku. Ju, enntá kunna nevnast dømir um, at mynstraðir menn eru farnir til útlondini við skipum, og ikki eru komnir livandi aftur, og einkjur hava einki endurgjald fingið. Undirritaði minniluti kennir t. d. eini viðurskifti har einkjan einki viðurgjald kann fáa vegna tess, at maður hennara, ið doyði í dokkini í Aberdeen, ikki arbeiddi í tí løtuni, tá ið hann var fyri óhappinum, tó var hann í Aberdeen við føroyskum skipi við ferskum fiski.

Eisini kunna nevnast tvær einkjur, sum sita aftaná menn, ið nýliga eru druknaðir, og onnur einkjan hevur fingið 9.500 kr. sum endurgjald fyri mistan forsyrgjara, meðan hin, ið eisini hevur mist forsyrgjara sín, bert kann fáa 3.600 kr. Ársakin er tann, at annar maðurin roknast fyri at verða deyður av krígsávum, sum tó kanska ikki kann prógvast, meðan hin sigst at vera deyður av illveðri, men heldur ikki hetta kann prógvast. Studningsveitarin kundi kanska verið fallin beint øðrvísið, um menn hevdu ta rætta vitan um deyðsársokirnar. Her kemur soleiðis gátan at avgera, hvussu stórt endurgjald ið einkjan skal fáa ella, um hon í heita tíkið skal fáa nakað endurgjald. Slíkt fer ikki at bera til í longdini. Tað hevur gingið soleiðis alt ov leingi, og má tí broytast so skjótt sum gjørligt.

Kemur maður til skaða á arbeiðsplássinum, fær hann endurgjald, men fær 13 fyrstu vikurnar fær hann einki uttan nokur oyru frá sjúkrakassanum, í mesta lagi o. u. 2 kr. 40 oyru, men so mikið fær hann ikki, uttan hann hevur rindað eitt eykagjald til sjúkrakassan. Hevur hann ikki gjørt tað, er studningurin einans 10 oyru um dagin, og tað ger somu nytta sum einki.

Kemur maður til skaða uttan fyri arbeiðsplássið ella missur hann heilsuna av sjúku, fær hann einki endurgjald.

Harav sæst, at tað ikki er trongdin, sum hjálpt verður, og sum stødd hjálpanna verður mett eftir, men heldur umstøðurnar viðvíkjandi vanlukku ella vanlukkustað ella, um orsokin er sjúka.

Minniluti er av tí áskoðan, at tað má vera trongdin og einki annað, ið løgd verður til grund fyri stødduni av øllum endurgjoldum og setur samsvarandi hesum fram uppskot um, at avlamistryggingargjaldið verður dýrtíðarviðgjort á sama hátt, sum fremri í hesum áliti er skrivað um dýrtíðarviðgerð av ellisrentuni.

